Skatt- og avskrivingarlógirnar — samtyktar í 1985, '86 og '87 — hava avmarkað spekulatiónsvinningar, har eingin verulig framleiðsla liggur aftanfyri. Ístaðin verður nú spekulatiónin bend yvir í jarðir og aðra fastogn, sum er óskattað, og fer ein partur av kapitalinnflutningunum til hesi øki, har stór frívirði finnast. Hetta fyribrigdi noyðir ein í umfordeilingspolitikkinum at fremja nakrar nýskipanir viðvíkjandi samfelags og sosialari »service«, sum alt annað líka, heldur áttu at bíða nakað, tí meðan biðað verður, er vandi fyri, at allur ágóðin verður bundin inn á hesi øki, har hann kemur at liggja í ov fáum hondum.

Prísvøksturin — sum verið hevur í hesum samfelag, men kortini ikki er skáscttur — kemur eisini sum frálíður at dýrka byggilendi og húsaprísir, og kemur hetta at gera tað truplari at seta búgv. Annars hevur inflatiónin í 1986 verið negativ (÷2%) og er higartil í 1987 mett so lág sum +½%. Hetta hevur verið fyrimunur fyri lønarfólkið, sum hevur havt eina hægri realtímaløn, men sum sagt kemur nakað av hesum teim ungu aftur um brekku, tá ið tey seta búgv um nøkur ár.

Ein álvarssamur skeivleiki í okkara búskaparviðurskiftum er, at tað so væl lønar seg at læna pening til spekulatión í skattaskipanini. Tað var væl ongantíð meiningin, at tað skuldi verða ein góð forrætning at læna pening til uppsparing.

Tað hevur verið torført at viðgjørt hetta mál politiskt sakliga, tí so nógvir rópa um brandskatting av rentum og uppsparing. Tað hevur tað ongantíð verið talan um. Men allir partar høvdu havt fyrimun av eini regulering her, ikki minst samfelagið og tey, sum hava brúk fyri at byggja.

Um ein ávís upphædd — rímilig í mun til inflatión — av rentuágóða kom undir lagaligu skattingina, og restin kom undir hægri skatt, og hin vegin tær veruligu rentuútreiðslurnar til húsabygging kundu verið frádrignar við ávísari upphædd ta eina ferðina, tú noyðist at byggja, meðan rentur av forbrúkslánum og vanligu spekulatiónslánum - undantikið vinnuligum lánum — ikki koma undir skipanina, hevði tú eina samfelagsgagnligari skipan enn hesa, vit nú nýta. Hetta vildi eisini trýst rentustøðið longri niður, tí bankarnir sjálvsagt vildu royna at lagt innlánsrentuna so nær markinum fyri lága rentuskatting sum gjørligt. Alt vinnulív og øll sethúsabygging vildi havt stórar fyrimunir av hesum. Skipanin, vit nú hava, blæsir mánaðarjavna og ársjavna bankanna upp, uttan at uppsparing er aftanfyri, og tað kann bert í longdini bera í sær, at øll skipanin tekur seg sjálva av døgum.

Spell, um hetta seinasta skal henda, áðrenn støðan er búgvin til politiska viðgerð.

— — --

Skiparaksturin í 1986 hevur sum heild roynst betri enn í 1985, men tølini, sum eru hjáløgd hesi røðu, mugu takast við størri fyrivarni enn vanligt, tí tey eru ikki endaliga viðgjørd av fiskivinnuráði og øðrum stovnum.

Tølini sýua tekniskt rakstrarúrslit áðrenn studning, og hóast hesin varð lækkaður nakað, broytir tað ikki heildarmyndina ímillum 1985 og 1986.

Eitt av teimi búskaparamboðum, landsstýrið kendi seg noytt at nýta, var ein avmarking í sokallaða fiskivinnustudninginum, sum ár um ár vaks lutfallsliga skjótt.

Hesin var í 1984 væl omanfyri 400 mió. kr. og kom í 1986 niður á 294 mió. kr. Vónandi klára vit skerini í ár við umleið 250 mió. kr.

Gagnliga virkanin av hesi stýring sannfurir landsstýrið um, at rætt er at so líðandi at minka studningin niður ímóti 200 mió. kr.

Nógv kjak hevur verið um avgjaldslógirnar, løgtingið samtykti seinasta heyst. 180-190 mió. kr. varð miðað ímóti, og kemur so við og við henda upphæddin inn, tó at tað hevur tikið tíð at fremja summar av lógunum í verki.

Serliga vóru tað 70 oyruni í oljuavgjaldi, sum stóðu fyri skotum. Løgið, tá ein veit, at sammett við okkara grannalond hava vit so avgjørt lægsta oljuprísin. Skipanin hevur eisini tann fyrimun, at nú ráoljuprísurin fer upp um 20 $ og heilsøluprísurin tí hækkar, so veksur prísurin til búkaran bert við 1 oyra fyri hvørju 2 oyru, heilsøluprísurin hækkar. Vit hava sostatt skapt eina skipan, sum tryggjar brúkarunum eitt nógv longri tíðarskeið við javnari príslegu, enn annars vildi verið.

Annar fyrimunur er, at hvørt avgjaldsoyra fer í oljugrunnin, sum bert kann læna út til ávís endamál, har annars vildi verið lænt í útlondum. M.a. skuldi hetta gjørt tað møguligt at framt eina bíligari orkuúthygging, sum í seinna enda kemur brúkarunum meira til nyttu enn eitt stutt tíðarskeið við óvanliga lágum oljuprísi. Oljugrunnurin hevur 53 mió. kr. á bundnari konto í Danmark.

Talan hevur nógv verið um skeivleikan í at »busjettera« eina fíggjarlóg við stórum yvirskoti, tí hetta skuldi verið óneyðugt. Sum fyri nevnt verður ikki talan um nakað risaavlop, og tað avlop, sum verður, fær bein at ganga á, nú so stórar veðhaldsskyldur gerast effektivar. Nú sleppa vit so frá í størri mun at læna pening uttanlands til hesar skyldur, og er kortini avlop, verður hetta bundið uttanlands. Í løtuni hevur landskassin 75 mió. kr. á bundnari konto í Danmark, umframt at kassakreditturin í Tjóðbankanum, ið var 75 mió. kr., er goldin niður á 0.

Eyðkennandi er tað, at júst teir, sum grammastir hava verið at koppa ábyrgdina fyri sínar vinnulívsroyndir yvir á skattgjaldaran, skulu vera teir, ið harðast tala um óblúgv og óforsvarlig avlop í landskassaroknskapinum. Sum toll- og skattainntøkurnar í løtuni roynast, er ikki útlit til nakað risaavlop í 1987.

Støðan í dag — har ein lítil linkan er at hóma í virkseminum — sýnir, at ræett var atborið av samgonguni, tá hon í forhond royndi at medvirka til hetta. Her var mál tikið til viðgerðar og avgreitt, áðrenn tað gjørdist veruligt vandamál. Tað styrkir um álit til okkara uttanlands og gevur okkum skothrá til at virka longri fyri teirri framleiðsluøking, sum veruliga kann loysa okkara búskapartrupulleikar. Sparsemi og afturhald einsamalt ger tað jú ikki.

Tað eru tættir í okkara búskapurmynstri, sum kortini ikki tola ov langa viðgerð og bíðan. Ein teirra er umskipanin og smidliggerðin av okkara søluskipan, har alt tykist mala í somu trongu ringrás sum áður. Tað tykist, sum tað er avgerandi í søluskipan okkara at hava ein risa á leirføti, sum hevur alt ov leingi um at venda sær. Verður hetta ikki broytt, fáa vit ikki tann pening til vega, sum neyðugur er til at renta fløgur okkara, gjalda hýrur og lønir og skapa kapital til víðari framtøk. — Hetta saman við betri stovnsrøkt og fragari viðgerð av øllum okkara tilfeingi, er einasta gongda leið.

Fiskivinna — Fiskimøguleikar

Størstu trupulleikarnir hjá fiskiflotanum fyrru helvt av 1987 hava verið minni veiða á summum økjum og lágir prísir, serliga á ídnaðarfiski.

Skipini á Flemish Cap hava havt vánaligastu veiðuna, menn vita um; nøgdin av rækjum við Svalbard er minkað, og eisini í fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum hevur veiðan verið væl lakari, og trupulleikar hava verið við støddunum. Heilt óvanliga prísfallið á ídnaðarfiski — sum ikki bert hevur rakt Føroyar — hevur gjørt raksturin av nótabátunum sera tungan, meðan ídnaðartrolararnir hava klárað seg betri av góðum fiskiskapi.

Lakari fiskiskapurin við Svalbard partar av árinum hevur borið í sær, at skip hava roynt at útvega veiðumøguleikar í Kanada. Í ávísan mun er hetta eydnast, tó undir harðari treytum enn fyrr. Kanadiskir myndugleikar hava latið 16 veiðuloyvir til privat felløg, og eru tað hesi, føroysk felløg samráðast við. Á stjórnarstigi ber sostatt ikki til at samráðast um rækjurættindi.

Hin vegin hevur landsstýrið havt samráðingar við kanadiskar myndugleikar um aðrar fiskivinnuspurnignar, m.a. møguleikarnar hjá salfiskalínubátum, hemara- og svartkalvabátum. Nú nýbygging er framd til svartkalvaveiðu, eru góðar vónir um, at veiðan vestanfyri fer upp frá uml. 600 tonsum til eini 4-5000 tons. Hesi nýggju skip hava havt góðan fiskiskap seinastu tveir mánaðirnar, og prísúrslitini eru góð.

— — —

Landstýrið hevur tá fatan, at svartkjaftastovnurin er størsta tilfeingið av róvøru, vit eiga, og tað er neyðugt fyri eina áhaldandi og tryggari menning av fiskivinnuni, at vit duga at nýta hetta ríkidømi. Fyri svartkjaftaskipini hava trupulleikar við sølu av skræðu- »butterfly« fløkum noytt skipini at royna aðrar framleiðsluhættir, og tað tykist nú, sum at rokkið er á mál at framleiða skæðuleyst heinfítt flak umborð. Hetta sleppur svartkjaftinum inn á hin stóra og í løtuni sera prísgóða blokkmarknaðin. Fleiri av svartkjaftaskipunum hava havt byrjunnartrupulleikar, og tað má viðgangast, at fyri at fáa hesi stóru og dýru skip at ganga væl er ikki nóg mikið bara at hava góðar fiskimenn at manna hesi skip, men líka stóran týdning hava maskinfólk á verksmiðjuni, góðskueftirlitsfólk og tey, sum stýra fíggjarskapinum og søluni hjá skipunum.

— — —

Tað er avgjørdi politikkur landsstýrisins at royna at passa veiðutrýstið til teir veiðumøguleikar, sum eru. Orðaskifti hevur verið við vinnuna um, hvussu hetta mál best verður rokkið, og sum ein byrjan er samtykt skipan fyri fiskiloyvum.

Hesin politikkur merkir øðrumegin, at har sum veiðutrýstið er ivaloysa stórt, kann bert útskifting verða loyvd, sum ikki økir um veiðutrýstið. Hetta merkir eina ávísa óhepna fastfrysting av ognarviðurskiftunum og hevur eisini trupulleikar við sær fyri ávís flakavirki, sum hava ov lítla rávøru. Hin vegin er ikki møguligt at loyva øktum veiðutrýsti eftir vanligu botnfiskasløgunum, tí hetta bert kostar hjá tí flotanum, sum longu er.

Eisini á djúpum vatni undir Føroyum er um at vera fullskipað, so møguleikar fyri øktari rávøru til flakavirkini kunnu bert finnast vesturi í havi í altjóða sjógvi. Fyrst og fremst á Hatton Banka og Reykjanesryggi. Í hesum sambandi hevur Íslands-sáttmálin stóran týdning. Stjórnarkreppan í Íslandi fekk óhepnar avleiðingar, serliga fyri snellubátarnar, men landsstýrið vónar enn, at íslendska stjórnin fer at geva okkum størri nøgd av botnfiski í ár. Eitt loyvi til at fiska kalva av rudkvotuni í Íslandi hevur verið gott íkast hjá fleiri bátum.

Landsstýrið hevur fingið eitt stórt tal av umsóknum um nýggj skip. Umsitingin hevur kannað og viðgjørt tær umsóknir, har greiðar upplýsingar um ætlanirnar lógu fyri. Støðan er tó ikki tikin enn til umsóknirnar. Tað er greitt, at á nógvum økjum eru ikki veiðumøguleikar til at loyva bygging. Á ávísum økum verður tað hildið at vera best at gera fleiri royndir við skipum, sum longu eru í drift. Men á onkrum øki eru møguleikar, sum kanska skulu roynast, t.d. skeljaveiða. Tveir bátar eru í gerð og koma í hesum ári. Umframt veiðumøguleikar eru eisini spurningar um samfelagsbúkskap yvirhøvur, sum mugu havast í huga, men landsstýrið ætlar sær í næstum undir veruliga viðgerð av umsóknunum, har bæði veiðumøguleikar og figgjar- og búskaparmetingar benda á, at íløgur eru rættar.

Veiðan eystanfyri hevur verið góð, og ein roynd at beina nakrar av ístiskatrolarunum hurtur av føroyskum øki og loyva teimum at fiska í Barentshavinum hepnaðist væl.

— — -

Føroyska laksaveiðan er nú komin í fasta legu. Tað eydnaðist at fáa eina økta kvotu á fundi í laksastovninum NASCO næstu tvý árini, og í hesi loysn liggur eisini, at tað, sum føroyingar seta út av laksasmolti, ikki skal roknast upp í hesa kvotu. Við tí skipatali, sum er, skuldi — sum frálíður — borið til at givið hvørjum laksabáti eina kvotu, sum gevur rímiligt úrslit.

— — —

Metingarnar hjá fiskivinnuráðnum vísa, at rakstrarúrslitið hjá skipaflotanum ikki verður verri í 1987 enn í 1986, tá onkrir partar av flotanum við heilt serligum trupulleikum eru undantiknir.

Ráðið hevur helst bygt meting sína á óbroytta veiðu, og her kann so minkandi nøgd gera rakstrin nakað tyngri. Kortini hevur landsstýrið ikki broytt politikk viðvíkjandi studninginum til fiskivinnuna. Broytingar eru tó gjørdar í býtinum av studninginum, soleiðis at roynt verður at tryggja manningunum í ávísum pørtum av flotanum slíka inntøku, at hon støðast á skipunum, tí koma vit til, at manningin ikki støðast, missa skipini allar møguleikar fyri rímiligan rakstur. Í minkingini av studninginum liggur eisini eitt ynski um at leggja eitt størri trýst á framleiðsluna og søluli∂, at finna fram til framleiðslur og søluhættir, sum minka tørvin á studningi. Landsstýrið leggur fyri tingið í hesi tingsetu uppskot um nýggja skipan fyri prísásetingina á ráfiski, og harav fylgja eisini broytingar í stuðulsskipanini. Samstundis stuðlar landsstýrið royndum at økja um góðskuna á fiski hjá útróðrarbátum.

— -- —

Tó at umsóknirnar um skip eru nógvar, kennir ein í dagliga viðurskiftinum við veiðu- og vinnulívsmenn, at íløguhugurin viðvíkjandi feskfiskaflotanum er eitt sindur fjarandi. Helst stavar hetta frá fastfrystingini av fiskivinnustuðlinum og teirri minkandi veiðuni.

Tað er ein sannroynd, at skjótt er hvønn vegin í slíkum málum. Var ikki prísurin á fiskiskipum uttanlands í botni, kundi helst ein náttúrlig minking farið fram í feskfiskaflotanum, men ringt er at sleppa snikkaleysur við at selja í dag.

Vit mugu so leggja neyðugar útskiftingar so til rættis, at vit yvir eitt áramál finna vinnunøguleikar uttan fyri føroyskt øki til tann partin av flotanum, sum ikki kann seljast uttan stórt tap. Her koma Joint-Venture royndir sterkt upp á tal.

— — —

Veiðuhagtølini 1. hálvár eru sum vant at finna í fylgiskjølunum til hesa røðu, og sýna tey hóast minni veiðu við Føroyar, størri heildarveiðu. Veidd eru á øllum leiðum 186.000 tons mógvegis 179.000 tonsum 1. hálvár 1986. Tað er serliga økta nebbasildaveiðan, sum ger seg galdandi.

Ídnaður

Seint á sumri 1977 setti landsstýrið eina starvsnevnd við fimm limum at kanna viðurskiftini hjá ídnaðinum í Føroyum.

Til at vera bindilið millum starvsnevndina og íðnaðin varð ein umboðsnevnd vald við 10 umboðum fyri vinnulívið. Henda umboðsnevnd skuldi tryggja, at starvsnevndin fekk »tað tilfar, sum tørvur var á«. Nevndin læt landsstýrinum álit í desember 1978, og m.a. mælti hon til at skipa eina menningarstovu fyri íðnað, handverk og tænastuvirksemi.

Í vár løgdi landsstýrið uppskot til løgtingslóg um menningarstovu fyri tingið. Hetta uppskot fekk góða undirtøku og varð samtykt við stórum meiriluta. Menningarstovan hevur til endamáls at menna íðnað, handverk og tænastuvirksemi. Í sambandi við hetta at ráðgeva innan tøkni, búskap, útflutning av vørum og skeiðvirksemi. Eisini skal Menningarstovan samskipa ymiskt virksemi, eitt nú virksemið hjá ymiskum almennum fíggjargrunnum.

Eitt menningarráð við 15 limum verður skipað. Hesir verða valdir millum vinnulívsfólk, fólk í almennum og hálvalmennum starvi, sum hava beinleiðis samskifti við vinnulívið, og millum fólk við góðum innliti í vinnuskúlamál. Til at skipa fyri arbeiðinum millum fundirnar hjá menningarráðnum verður eitt stýri við fimm limum valt. Landsstýrið velur formannin. Hinir fýra verða valdir av menningarráðnum og millum limir tess.

Eftir lógini kann Menningarstovan við stuðli og í samstarvi við kommunur í ávísum nærri avmarkaðum økjum seta fólk úti um landið at skipa fyri virksemi sambært endamálsgreinini í lógini. Ætlanin er, at landsstýrið skal seta nærri reglur hesum viðvíkjandi.

Helst verður talið av ráðgevarum úti um landið tríggir ella fýra. Eitt møguleiki er, at Menningarstovan rindar helmingin av lønunum, treytað av at kommununar í avvarðandi øki rinda hin helmingin og skrivstovuútreiðslurnar.

Menningarstovan er farin at virka. Menningarstjóri er settur og tekur við starvinum 15. august. Næsta stigið er at viðka virksemið hjá Menningarstovuni bæði her og úti um landið.

Landbúnaður

Uppskotið til nýggja jarðarlóg kom ikki aftur á tingborð í setuni 1986/87, tí búnaðarnevndin ynskti rúmari tíð til viðgerðina. Henda nevnd varð til endamálið gjørd til millumtinganevnd og greiðir helst málið aftur til tingið í hesi setuni.

Føroyska mjólkin hevur nú veruliga yvirtikið heimamarknaðin og tað skjótari, enn menn droymdu um. Hildið varð, at 5% í árligum vøkstri var rímiligur málsetningur, men fyrstu 6 mánaðirnar í ár er framleiðslan vaksin heili 21%.

Hetta fekk so enn einaferð bikarið at flóta yvir, og er nakað av mjólk farin fyri skeytið í ár.

Tiltøk til tess at javna framleiðsluna yvir árið mugu tí fremjast, og møguliga

er javningarstudningurin ambodið, sum skal nýtast enn meira, men verður tá helst neyðugt at minka prísin summarhálvárið, so meira verður tøkt vetrarhálvárið.

Nýtslan av mjólk er um 7 mió. litrar árliga, og verður framleiðslan í ár millum 5,5 og 6 mió. litrar.

Avloysingarskipanin, sum avtalað varð í samgongugrundarlagnum, er farin at virka í hesum árinum. Bøndur kunnu nú fáa frítíðaravloysing um royndarstøðina í tann mun, henda kann lata fólk.

Arbeitt verður eisini fyri at fáa sjúkraavloysing, og er uppskot um at normera eitt starv á Royndarstøðini til hetta endamál.

Arbeitt hevur verið við uppskoti um prisjavningargrunn fyri landbúnaðarvørur, men eru menn ikki samdir um slíka skipan, tó kemur hon møguliga til viðgerðar í tinginum hesa setuna.

Alivinnan

Tá ið heila landsstýrið tók við, var onki samsvar millum smoltaling og sjógvaling. T.d. kundu tey nýggju loyvini til sjógvaling á vári 1985 bert fáa 14.000 smolt. Hesi áttu at fingið eini 60-70.000 smolt, um trygt grundarlag skuldi verið undir lønandi rakstri.

Tíverri kundu við eisini sanna, at ov nógv loyvi til sjógvaling vóru givin á ávísum økjum, uttan at nóg nágreiniligar árinskanningar vóru gjørdar frammundan. Talan verður tí um at kanna møguleikan fyri at flyta sjógvalistøðir burtur av hesum økjum, samstundis við at heilt nágreiniligar árinskanningar verða gjørdar á øðrum økjum, áðrenn ov nógv loyvi verða givin.

Vánaliga smoltstøðan og tørvandi árinskanningar vóru orsøkin til, at landsstýrið hevur verið afturhaldandi, tá talan hevur verið um at geva nýggj loyvi til sjógvaling. Smoltframleiðslan er økt so munandi, at vit nú kunnu tosa um, at javnvág er komin í. Í ár er framleiðslan millum 3 og 3,5 mió. smolt. Næsta ár verður hon 4 mió. Árinskanningar eru og verða gjørdar. Grundarlag skuldi sostatt verið fyri nýggjum loyvum til sjógvaling.

Alivinnan er í ávísum fíggjarligum trupulleikum. Í høvuðsheitum eru orsøkirnar trinnar. Tær alt ov smáu smoltnøgdirnar tey fyrstu árini, tann lági marknaðarprísurin, sum verið hevur tey seinastu tvey árini afturímóti árunum framman anundan, og tann stutta avdráttartiðin av lánum. Landsstýrið hevur sett eina kanning av hesum viðurskiftum í gongd. Alirádið, Ídnaðargrunnurin og Menningargrunnurin gera kanningina saman við einum privatum ráðgeva. Úrslitið fyriliggur um nakrar fáar dagar.

Fyri at bøta um fíggjarligu støðuna hjá vinnuni hevur landsstýrið millum

annað hugsað sær at broyta áramálið í øllum aliloyvum. Higartil eru øll aliloyvi givin at galda í sjey ár. Avdráttartiðin hjá Ídnaðargrunninum, Menningargrunninum og øðrum lánistovnum er hareftir. Tá ið kanningin av figgjarligu støðuni hjá alivinnuni er lokin, fer landsstýrið at taka støðu til, um áramálið í aliloyvunum verður at seta upp í 10 ella møguliga 12 ár. Ídnaðargrunnurin, Menningargrunnurin og aðrir lánistovnar fara so væntandi at leingja avdráttartíðina í sama mun.

— — —

Á lóggávuøkinum kann verða nevnt, at lógin um sjúkur hjá fiski er avgreidd á tingi og lýst at galda, at lógin um aling er í millumtinganevnd og verður vónandi avgreidd í hesi tingsetuni. Í farnu tingsetu varð tinglýsingarlógin eisini broytt, soleiðis at tað nú er møguligt hjá lánistovnum at veita fígging móti trygd í fiskinum. Eftir er nú at gera uppskot til lóg um útseting og havbit. Kanningar í sambandi við slíkt lóggávuarbeiði fara í gongd nú.

Djóralæknatænastan er eitt týðandi mál hjá alivinnuni. Normering er til ein fiskasjúkudjóralækna. Hetta starv er sett. Landsstýrið hevur boðið sær til at útvega hølir og amboð til ein fiskasjúkudjóralækna afturat. Hetta er treytað av, at vinnan vil gjalda fyri hesa tænastu í tílíkan mun, at gjøldini frá vinnuni svara til ta løn, ein fiskasjúkudjóralækni skal hava. Í løtuni bíðar landsstýrið eftir einum útspæli frá vinnuni. Málið er at tryggja alivinnuni eins góða djóralæknatænastu og landbúnaðinum.

— . —

Eftir teimum metingum, sum gjørdar eru, verður útflutningurin av alifiski 10.000 tons í 1989 og 12.000 í 1990. Við verandi marknaðarprísum skuldi hetta givið eitt útflutningsvirði uppá ávikavist 500 og 600 mió. kr. nevndu ár.

Sjóvinnumál

Í sambandi við trongstøðuna hjá farmaskipaflotanum eru átta skip seld á tvingsilssølu í Rotterdam í ár og fyrra árið.

Hesi skip vórðu øll latin føroyskum eigarum sum nýbygningar í tíðarskeiðinum 1982-1985. Tapið, sum landskassin hevur havt av hesum skipum, er umleið 150 mió. kr. Talan er um studulslán og veðhald.

Høvuðsorsøkin, til at skipini komu í hesa trongstøðu, var, at raksturin av skipunum bert var førur fyri at bera eina skuld, ið var helvt ella minni enn ein helvt av tí skuld, sum skipini høvdu, tá tey komu.

Á tvingsilssølunum eru skipini keypt fyri eina helvt og í summum førum fyri minni enn eina helvt av tí, tey kostaðu at byggja. Tøl vísa, at í meðal vóru frak-

tratur og dollarakursurin ikki lægri í 1985 og fyrru helvt av 1986 enn í februar 1984, tá ið tey fýra av skipunum komu til landið.

Eftir hesum kann sigast, at orsøkin, at skipini komu í trongstøðu, var tann, at inntøkurnar vóru munandi lægri enn mett varð, og at rentuútreiðslur og aðrar útreiðslur væl hægri enn mett, og kemst hetta m.a. av, at skipini gjørdust dýrari enn ætlað.

— — —

Landsstýrið var sinnað at hjálpa feløgunum, áðrenn skipini fóru á tvingsilssølu. Landsstýrið beyð sær til at umleggja skuldina til landskassan, t.v.s. veðhald og stuðulslán til lán, sum skuldu verða rindað aftur yvir 12 ár við eini rentu uppá 4½% p.a. aftaná 3 ár. Um raksturin aftaná 3 ár ikki var førur fyri at rinda rentur og avdrátt av skuldini til landskassan, var landsstýrið sinnað til at tosa við feløgini um nýggjar treytir, tá 3 ár vóru liðin.

Í sambandi við tað eina skipafelagið hevur verið sagt, at felagið hevði greiðar avtalur við týska bankan og við landspartasjórnina í Slesvig-Holstein. Eftir at hesi fýra skipini vórðu seld, var landsstýrið gjørt til syndabukk, men umrøddu avtalur hevur landsstýrið ongantíð sæð.

Hin vegin fekk landsstýrið greitt at vita, at treytin frá onkrum ánara var, at landskassin bert kundi vera við sum parthavari við lítlari upphædd, hægst 5 mió. kr.

Tá sagt hevur verið, at landsstýrið — umframt 150 mió. kr. í útleggum — átti at sett seg fyri munandi upphæddir fyri at varðveita hesi ov dýru skip í Føroyum, er hetta ógvuliga grunn búskaparlig hugsan.

Sum gongdin varð varðin, var samfelagsliga talan um eitt beinleiðis hall uppá 20 mió. kr. árliga, og eru tá ikki avskrivingar tiknar við. Skuldu eisini hesar — umleið 70 mió. kr. árliga — verið fluttar yvir skattgjaldararnar frá øðrum vinnuøkjum í Føroyum, vildi talan verið um beinleiðis hall fyri samfelagið uppá 90 mió. kr. árliga.

Til tess at varðveitt eitt hall uppá 20 mió. kr. árliga í Føroyum skuldi landskassin sostatt í fyrstu syftu spent seg fyri hundraðir av milliónum uttan vissu fyri, at hesar komu aftur um nøkur ár við bøttum marknaði.

Landsstýrið metti tað skeivt, at spenna annað fyri enn tey veðhald, sum longu vóru givin. Havandi í huga, at hesir sjómenn undir galdandi umstøðum lættliga fingu annað arbeiði, og havandi í huga, at skip av sama slag lógu til sølu í ymsum havnum fyri prísir, sum ikki komu upp í helvt av teimum, sum fóru, vildi slík yvirtøka av privatari ábyrgd verið fullkomiliga ábyrgdarleys mótvegis skattgjaldarunum.

Marknaðurin er framhaldandi gingin niður, og skulu íløgur fremjast, sum eru greiðar at virka, tá hesin gongur upp aftur, er skilabetri at keyp skip, sum nú fáust fyri botnprís.

Nevndi í fjør ta hugmóðigu liberalismu, sum bert stendur mát, tá landskassin er opin, men tað er avmarkað, hvussu nóg ber til at opna hann.

Vit hava frammanundan eitt framleiðslutól í fiskivinnu og fiskatilvirking, sum hyggir á eitt náttúrligt rávørutilfeingi, og har tann umfordeilding, sum skattgjaldarin er við til at fremja, samstundis tryggjar honum inntøkuna. Skulu vit fjøltátta vinnulívsroynd okkara, má tað vera við tættum, sum eiga ein náttúrligan rentabilitet.

Í hesum føri er »rávørutilfeingi« okkara dugnaliga og vællærda sjófólk, og eg eri tí sannførdur um, at skilagóð fyriskipan frumvegis kann geva okkum eitt haldgott støði til at byggja hesa vinnu uppá.

— ---

Landsstýrið hevur fingið fyrispurning, um møguleiki er fyri at skáseta donsk farmaskip í Føroyum. Her er talan um eina ætlan, har føroysk feløg átaka sær at reka donsk farmaskip, soleiðis at ágóðin so sum lýrur, umsiting, viðlíkahald o.s.fr. kemur føroyska samfelagnum til góðar. Talan er um donsk partsreiðarafeløg. Eisini hava fyrispurningur verið frá øðrum londum.

Var talan um partafeløg, vildi einasta treytin verið, at meirilutin av nevndarlimunum skal hava fastan bústað í Føroyum, men tá talan her er um partsreiðarafeløg, er spurningurin fløktari. Helst er ikki møguligt at skapa lógargrundarlag fyri hesum. Tað eigur eisini at verða umhugsað gjølla, áðrenn vit sleppa politikkinum um helst at eiga skipini á føroyskum hondum.

Orkuútbyggingin

Í ár er í fylgiskjølunum frágreiðing frá Orkuráðnum, sum vísir, at arbeitt verður sera álvarsliga við lívsneyðugu orkuútveganini og orkusparingini.

Kanningar ráðsins hava fevnt um:

Egin elverk á virkjum, avlopshita frá brenni- og kraftstøðum, vatn- og vindorkumátingar, árinskanningar, partroling, vatnorkuútbygging og streymorkuverk.

Serliga forvitnisligt er tað, at S.E.V. og Orkuráðið eru komin væl ávegis við fyrireikan av víðari útbygging av vatnorkuni í Eysturoy.

Helst fer S.E.V. fyrsta dagin at søkja friðingarnevndina um góðkenning av endaligum projekti til útbygging í erva.

Kanningin, ið danska orkumálaráðið hevur latið gera av møguleikunum fyri at nýta havstreym í orkuverkum, er ógvuliga spennandi.

Landsstýrið, S.E.V. og Orkuráðið fáa í heyst nærri kunning um hetta mál, tá umboð fyri teir, ið gjørt hava projektið, koma til Føroya.

Íbúðarmál

Lógin um íbúðagrunn virkaði ikki eftir ætlan, m.a. tí kommuna, sum setti 18 % í eina íbúðarbygging, misti pening sín til grunn, um íbúðin varð seld, og tí at fólk bert kundu búgva í íbúðagrunnsíbúð í fimm ár.

Nevndin, sum landsstýrið setti at endurskoða lógina, mælti til heilt nýggja lóg um íbúðagrunn, og ognarviðurskiftini eru eisini broytt soleiðis, at nú er tað ikki grunnurin, sum er ánari, men íbúðafeløg, íbúðastovnar og kommunur.

Lógirnar um rentustudning til samansparing til sethús- og íbúðarbygging og um húsalánsgrunn eru broyttar og gjøgdar liðiligari.

Rentuískoytið er hækkað úr 2% upp í 3%, og luvt er húsalánsgrunninum í ávísum førum at veita lán til keyp av eldri húsum.

Leigulógin verður nú endurskoðað. Hon kom í gildi í 1940 undir teim serligu umstøðunum, ið tá vóru. Leigulógin hevur bert virkað í Tórshavnar kommunu.

Landsstýrið roknar við, at uppskot til nýggja leigulóg kann koma fyri tingið í hesi ella næstu setu.

Almannamál

Almannastovan fekk seinasta heyst nýggjan bygnað, og varð 1. januar 1987 nýggjur stjóri settur, samstundis sum skipað varð serligt starv til løgfrøðiliga ráðgeving og lógarsmíð, sum fráfarandi stjórn hevur um hendi.

Umframt eitt hóskiligari starvsbýti eru fleiri nýggj størv normerað, og verður bøtt um hølisviðurskiftini.

Neyðuga umsitingin av almannalóggávuni skal liggja so nær brúkarunum sum møguligt, og er innan almannaverkið sett miðspjaðingarnevnd, sum skal liggja sosialu eindirnar úti um landið til rættis. Nevndin fer í næstum kanningarferð til Grønlands, har nógv av sosialari umsiting er á hygd.

Nú blokkstuðulsavtalan frá 9. mars 1987 er samtykt, fara fram nógvar javnføringar innan almannaveitingar bæði á økjum innan blokkstuðulin, og har danir og føroyingar framvegis fremja helvtarbýti, t.d. viðvíkjandi fólka-, avlamis- og einkjupensiónunum.

Serliga fáa hjún og avlamin munandi pensjónshækking frá 1. oktober í ár.

Fylgilóggávan, sum stondst av umskipanini av ríkisveitingum, verður løgd fyri tingið á næsta fundi, og har kunnu nevnast broytingar í forsorgarlógini, ið javnstilla arbeiðsloysi og sjúku, og sum gevur møguleika at hjálpa, tá ið talan er um serliga stórar bústaðarútreiðslur og forsyrgjaraskyldur.

— — —

Endurbúgvingin verður flutt frá avlamispensiónslógini til forsorgarlógina og umsitin sambært hesa.

Ein virkin endurbúgvingarpolitikkur vil geva møguleika fyri skipan av vardum arbeiði í privatum og almennum stovnum, har tað almenna kann rinda lønarískoyti, sum minkar um pensiónsútreiðslurnar og mennir hin einstaka og samfelagið.

— — —

1. januar 1988 verður øll serforsorg í Føroyum á føroyskum hondum, og andveikraverndin og skúlin á Tróndi verða yvirtikin. Í hesum sambandi verður neyðugt at seta út í kortið viðvíkjandi framtíðarrinnar sosialverki í Føroyum, serliga hvussu serforsorgin skal skipast. Foreldrafeløg og áhugabólkar mugu í hesum sambandi verða eftirspurd.

Landsstýrið fór beinanvegin at útbyggja til andveikraverndina í smærri eindum, og er nú komið ávegis við hesum. Bygging í Runavík og bygging av umlættingarheimi í Klaksvík — sum sjálvsognarstovnar — eru farin í gongd. Leiðari er settur til vardan verkstað í Klaksvík og landsstýrið fer í næstum at seta leiðara til verkstað inni á Bakka í Vági. Hesir báðir stovnar verða riknir undir andveikraverndini.

Landsumfatandi kanning viðvíkjandi tørvi á bústovnum til brekað fer fram, og meinginin er at røkka viðurskiftunum hjá øllum brekaðum, so grundarlag verður undir víðari útbygging av serforsorg og útvegan av arbeiðs- og útbúgvingartilboðum.

— — —

Røktarheim til 48 búfólk er liðugt í Suðurstreymoy, og í Sandoynni verður fyrireikað bygging til 24 røktarsjúklingar. Semja er um at byggja í trimum deildum, ið hvør sær røkir felagsuppgávur fyri hinar, t.e. matgerð, vask og umsiting. Í Norðstreymi er eisini talan um at byggja í smærri eindum, og verður arbeitt við reglugerð fyri hesar.

Hildið verður, at tað er eins hóligt at reka smærri sjálvstøðug røktarheim sum tey størru, ið eru sambygd við sjúkrahús, og er tí spurningurin, um hesi skulu

rekast óhøft av sjúkrahúsinum.

Úr syðru helvt í Suðuroy er umsókn komin um bygging av røktarheimi, og kannar almannastovan tørvin.

Afturatbygging í Eysturoy, sum fevnir um 12 pláss, verður fyri fyrstu ferð eisini til ung rørslubrekað.

— — —

Nevnd er sett at samskipa heimahjálparskipanina og heimasjúkrasystraskipanina og at tilevna uppskot um, hvussu hesar kunnu knýtast saman við eini døgnvaktarskipan og eini umhvørvissálarrøkt. Lækni verður settur til hesa sálarrøkt, sum skal fara fram »ambulant« úti um landið.

Hetta fyri uppaftur betri at røkja politska setningin um at hjálpa fólki at búgva heima sum longst. Hesar skipanir saman við møguleikanum fyri samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum heima, hava minka munandi um tørvin á røktarheimsplássum.

— —

Á fíggjarlógini eru settar upphæddir til rakstur av nýggjum blindaheimi og deyvahúsinum, sum reist varð fyri nøkrum árum síðani.

— — —

Í seinastu tingsetu varð dagpeningalógin broytt, so dagpeningatíðin við sjúku verður longd úr 13 vikum upp í 20 vikur; hetta fær gildi 1. oktober í ár.

Sjálvbodna dagpeningaskipanin, sum fólk í sjálvstøðugari vinnu og húsmøður kunnu tryggja seg í, verður ov lítið nýtt, og kannar landsstýrið tí møguleikan fyri, at hesi verða betri tryggjað.

Kunngerðin frá 20. juni 1979 um dagpening verður nú endurskoðað.

— — —

Løgtingið hevur samtykt at hækka skattalágmarkið hjá pensiónistum og somuleiðis inntøkumarkið fyri brennioljustudning, hartil eru hjálvingarstuðulslánini hækkað úr 25.000 kr. upp í 45.000 kr.

Arbeitt verður nú við at endurskoða inntøkumarkini, sum bera í sær, at lækkingar verða framdar í pensjónsupphæddum og viðbótum.

At eldri fólk eru virkin, so leingi tilber, er eftirynskjandi, og eiga tí at verða ávísir møguleikar fyri eykainntøku út yvir pensjónina.

Landsstýrið hevur boðað landsfelag pensjónistanna frá, at sett verður eitt pensjónistaráð, ið kann ráðgeva um viðurskifti pensjónista, so sum gjørt verður í øðrum londum.

Familjn- og trivnaðarmál

Frá 1. okt. 1987 verður veitt øllum kvinnum, ið fáa børn, full dagpeningaupphædd í 20 vikur og aftaná 1. juli 1988 í 24 vikur. Lógin javnsetir allar kvinnur og gongur fyri hina heimaarbeiðandi mammuna longri enn í hinum norðanlondunum.

Tá við her veita betri sømdir enn danir, er náttúrligt, at landskassin einsamallur ber meginpartin av útreiðslunum. Eisini er ætlanin at fáa samtykt skiftireglur, sum bera í sær, at mammur, sum 1. okt. 1987 fáa dagpening, koma undir lógina, t.v.s. eisini slíkar, sum hava átt, áðrenn lógin kom í gildi.

— — —

Lóg um barnastyrk er samtykt at galda frá 1. okt. 1987, meðan lóg um barnafrádrátt í skatti fer úr gildi 1. januar 1988.

Henda umlegging er framd fyri at stuðla smábarnafamiljum, so betri møguleiki er fyri at vera meira saman.

Barnastyrkurin er inntøkujavnaður, tí ætlanin er, at hann skal gagna mest, har inntøkan er lítil.

Møguleikin fyri serligum sømdum til foreldur, sum ansa børnum sínum heima, og til teirra, sum hava brekað børn, tey mest møguligt vilja taka sær av sjálvi, verður framvegis kannaður.

— — —

Lóg um eykapensjón til giftar avlamispensjónistar, soleiðis at teir varðveita fulla grundupphædd uttan mun til inntøku hjúnafelagans, fær gildi 1. okt. í ár, og er harvið ein ójavni millum danskar og føroyskar pensjónistar burturtikin.

Somulciðis er ætlanin at javnseta hjún, ið fáa fólkapensjón, við donsk hjún.

— — —

Játtanin til at minka um rúsevnismisnýtslu er munandi økt, og er stuðul veittur til viðgerðarheim hjá Losjuni og Bláa Krossi.

Heilbrigdi á Velbastað — ið verður rikið eftir heimild í forsorgarlógini — hevur farna hálvárið havt 123 fólk í viðgerð, og 125 vóru í 1986 til viðgerðar í Íslandi.

Sett er tubbaksráð, og verður umhugsað at seta eitt alkoholráð, sum kann viðgera spurningar í samband við vaksandi rúsdrekkamisnýtslu og gera kanningar í økinum.

— — —

16. § í S. T.-fráboðanini um mannarættindi sigur m.a.:

»Familjan er náttúrligi og grundleggjandi eindarbólkurin í samfelagnum og hevur

krav uppá verju samfelagsins og ríkisins.«

Samgongan ynskir at reka politikk í samljóði við hesa ásannan og leggur dent á, at tey, sum hava stuðul fyri neyðini, kunnu fáa hann heima og frá sínum egnu. Í hesum ljósi skulu ábøturnar á lógirnar um ansingarstuðul, heimahjálp, barnastyrk, barsilsorlov metast, eins og útbyggingin av dagrøktarskipanum og dagstovnum.

Kommunumál

Landsstýrið vil halda fram við miðspjaðingarpolitikki sínum, soleiðis at almennir stovnar fáa deildir á bygd á sama hátt sum líkningarráðið og arbeiðseftirlitið.

Sum nevnt verður virkað fyri at útbyggja almannaverkið á bygd. Uppskot kann væntast í næstum um bygging av vinnuskúlum á bygd og flyting av einstøkum almennum stovnum.

— —

Kommunulógin eigur at verða endurskoðað, so tað gerst møguligt hjá kommunum at ganga saman um at loysa sosialar og tekniskar spurningar.

— .

Landsstýrið miðar ímóti at hækka kommunala lánigrunnin og víðka um lániheimildir hansara, so at óneyðugt verður at fara so nógv uttanlands eftir lánum. Ein byrjan er gjørd við avlopi landskassan fyri 1986, ið fyri ein stóran part er lagt í kommunala lánigrunnin.

Kommunali lánigrunnurin hevur í 1986 veitt tilsamans 3 mió. kr. í láni til 3 kommunur (Runavík, Skála og Vág). Samlaða útlánið er uppá 7,6 mió. kr.

— — —

Planleggingarnevnd er sett og fer at koma við uppskoti til eina nýggja byggi- og býarskipanarlóg. Verandi lógin er frá 1954.

Hugsað verður eisini um figgjarliga planlegging.

— — —

I. R. F. hevur fingið endaligt loyvi til at byggja brennistøð úti á Vík í Leirvík, og er farið undir byggingina. Stjóri er settur.

Tórshavnar býráð hevur tikið sína brennistøð í nýtalu, og hon verður royndarkoyrd í løtuni.

Heilsuverkið

Nú stuðulssamráðingarnar eru loknar, verður av álvara farið undir viðgerð av útbyggingarætlanunum fyri tey trý sjúkrahúsini, herundir at leggja tær tilrættis soleiðis, at tær samsvara best møguligt við okkara fíggjarligu orku og trýstið á arbeiðsmegina á byggiøkinum.

Neyðugt verður við sterkari stýring á hesum øki, skulu vit ikki missa tamar-

haldið, og noydist landsstýrið at útvega sær serkøna óhefta ráðgeving, sum kann døma um tey tilmæli, vit fáa frá okkara egnu, tá hesi í so stórum mun hava verið merkt av lokalum áhugamálum.

Virkandi sjúkrahússtjóri hevur gjørt ein samandrátt av virkseminum seinasta árið og teim samtyktum, gjørdar eru viðvíkjandi heilsuverkinum. Hesin er at finna í fylgiskjølunum.

Skúli og undirvísing

Útlit eru til, at tann økta játtanin á fíggjarlógini til gerð av undirvísingartilfari á føroyskum fer at sýna seg við øktum útgávuvirksemi í næstum.

Avgerð er nú tikin um, at Landsmiðstøðin fyri undirvísingarumboð fyribils fer at leiga seg inn í ein part av tí bygningi við Hoyvíksvegin, sum Húsalánsgrunnurin og Menningargrunnurin hava keypt. Seinni er so ætlanin at keypa hendu part av húsinum til landsmiðstøð.

Lesiætlanarnevnd er sett at gera uppskot til nýggjar lesiætlanir fyri fólkaskúlan og eina endurskoðan av fólkaskúlalógini.

Eftir nýggju frítíðarundirvísingarlógini er møguleiki fyri at seta á stovn frítíðarundirvísing, ið er á hædd við ta frítíðarundirvísing, ið boðin verður í hinum norðurlondum.

Lógin er farin at virka, men enn eru ikki allir møguleikar, ið lógin gevur, troyttir, enn vanta reglur og kunngerðir.

Menningin hevur verið stór. HF-stakgreinaskeið og skeið til stakgreinaundirvísing til fráfaringarroyndir fólkaskúlans umframt yrkiskend skeið og serundirvísing fyri fólk yvir skúlaaldur verður nú sett á stovn ymsastaðni í landinum.

Vegna vantandi kunngerð er tann tátturin, ið nevndur verður frítíðarvirksemi, enn ikki farin at virka.

Sitandi landsstýrið hevur lagt stóra áherðslu á at styrkja vinnulívsútbúgvingarnar og laga tær eftir tí føroyska samfelagnum.

Løgtingið hevur sum kunnugt samtykt eina lóg um yrkisskúla fyri fisk, ídnað og havbúnað, eins og lóg um sjóvinnuskúla liggur á tingborði. Peningur til hesar skúlar er settur á fíggjarlógina, og vónandi kunnu teir byrja komandi ár.

Nýtt motorpassaraskeið, ið varir 5 máṇaðir, er sett á stovn. Fyrsta skeiðið av hesum slag fór fram í vár.

Víðkað maskinmeistaraprógv kann nú takast í Føroyum, og fyrsti flokkurin byrjar í heyst.

Fiskiskiparaútbúgvingin verður broytt, so at hon nú verður 1½ ár, og aftan á neyðuga siglingartíð verður møguleiki fyri at halda fram til skipsførara.

Tey formligu viðurskiftini í sambandi við 2. byggistig av Tekniska Skúla í Klaksvík og bygging av handilsskúla á Kambsdali eru í lagi, og er gongd komin á hesa byggingar.

Í hesum viðfangi kann nevnast, at ætlanin er at flyta skúlagongdina hjá veikstreymslærlingum heim til Føroya, eins og miðað verður ímóti við neyvum samstarvi við vinnulívið at dagføra lærlingaútbúgvingarnar og laga tær betur til føroyskt viðurskifti.

Ætlanin er at seta verkstaðarskúla á stovn á Tekniska Skúla í Klaksvík og

útbúgving til byggi- og/ella maskinteknikara á Tekniska Skúla í Tórshavn.

Til heystar byrjar ein landmálaratøknikkaraútbúgving. Eftir avtalu við Journalistháskúlan í Danmark fer nú upptøkuroynd á henda skúla fram í Føroyum eina ferð um árið.

Umframt verandi sjúkrasystraútbúgving verður nú arbeitt við at seta á stovn sjúkrarøktaraútbúgving.

Nógv hevur verið tosað um, hvar í landinum skúlar og útbúgvingar skulu verða løgd, eitt nú Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy. Í staðin fyri at taka støðu til ein skúla og eina útbúgving í senn, arbeiðir landsstýrið við at gera ein heildarætlan.

Neyðugt verður at umskipa studentaskúlaútbúgvingina komandi ár, og ein ætlan er at gera eina liðiligari skipan í samsvar við HF. Tílík skipan verður at bera í sær, at fleiri skúlaformar kundu samarbeitt, og ein miðspjaðing av ymsum útbúgvingum kundi verið framd.

Fróðskaparsetur Føroya

Viðvíkjandi fróðskaparsetrinum verður í samgonguskjalinum sagt:

»...miðað verður ímóti at útbyggja møguleikarnar fyri prógvtøkulestri við Fróðskaparsetur Føroya og menna hetta sum hægri lærustovn.«

Við øktari játtan á fíggjarlógini í 1987 og nýggjari stýrisskipanarlóg, sum at kalla eitt einmælt løgting samtykti í vár, eru lunnar lagdir til tess, at fróðskaparsetrið kann víðka um virksemið sítt.

Vøl fleiri tilboð um hægri útbúgving verða nú bjóðað, og fyri fyrstu ferð í Føroyum er møguligt at taka endaligt prógv á universitetsstigi. 2-ára høvuðsgreinalestur eman á exam.art prógv í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum, byrjar í heyst. Tá verður eisini farið undir eina 2-ára grundútbúgving í søgu og siðsøgu. Innan náttúruvísindi og tøknifrøði verður skipað fyri sonevndum BS útbúgvingum og verkfrøðiútbúgvingum, ið taka 3 og 3½ ár. Sum dømi um nýtt tilboð er eiu 3½ ára útbúgving í matverkfrøði.

Komandi lestrarár verða tilsamans einir 75-80 lesandi á fróðskaparsetrinum, nærum ein tvífalding afturímóti seinasta lestrarári. Harumframt eru nógv fólk í kvøldundirvísing og ymsum stakskeiðum, sum setrið skipar fyri.

Tann økta undirvísingin á setrinum merkist eisini í granskingini, sum bæði økist og gerst meira fjøltáttað. Dømi um ein nýggjan tátt innan bæði gransking og undirvísing er ætlanin um í 1988 at skipa eina deild fyri samfelagsvísindi.

Hetta, at fleiri av teimum ungu ikki nýtist av landinum til at nema lærdan lestur, er ein sjálvsagdur styrkur fyri samfelagið, og tann serkunnleiki, ið ein hægri lærustovnur savnar og framleiðir, gevur fólki okkara størri medvit og sjálvbjargni.

Men útbyggingin av fróðskaparsetrinum, sum sett er í verk, gerst ikki eftir einum fíggjarári, og ti er neyðugt at hækka játtanina komandi árini, eins og sagt er frá í álitinum. Eisini eigur okkurt at verða gjørt fyri at bøta um tey trongu hølisviðurskiftini á fróðskaparsetrinum. Tað er eyðsæð, at Debesartrøð — umframt teir stovnar, sum longu eru har — ikki kann rúma einum fult útbygdum fróðskaparsetri, og landstýrið er sinnað til at bera so í band, at setrið kann fara undir bygging onkustaðni uttan fyri Debesartrøð um nøkur ár.

Arbeiðsmarknaðarmál.

Arbeiðseftirlitið verður framhaldandi útbygt við deildum kring landið. Í 1986 var ein deild skipað í Norðoyum. Í ár verður ein deild skipað í Suðuroy og í 1988 ein í Eysturoy. Sambart ta útbyggingarætlan, landsstýrið samtyktið á vári 1985, er ein deild eftir at skipa fyri Vágar og Norðstreym, og eigur hon at koma í 1989.

Íseinastu tingsetu varð lógin um arbeiðaravernd broytt, soleiðis at eitt arbeiðsumhvørvisráð verður skipað. Tað skal beinanvegin gera uppskot til eina arbeiðsumhvørvislóg.

— — —

Á fíggjarlógunum fyri 1985, 1986 og 1987 hevur normering verið til ein arbeiðsmedisinara í hálvtíðarstarvi. Á komandi fíggjarlógaruppskoti verður normeringin broytt til eitt fulltíðarstarv. Arbeiðsmedisinarin skal kanna og ávísa sambandið millum sjúkratilburðir og arbeiði. Hann skal eisini koma við tilmælum um ábøtur, soleiðis at talið á sjúkratilburðum, sum hava samband við arbeiðsumhvørvið, lækkar.

— — —

Fyri at bøta um tryggleikan á arbeiðsplássunum skipar arbeiðseftirlitið framhaldandi fyri skeiðum bæði her heima og í Danmark. Í september verður norðurlendsk ráðstevna um arbeiðsumhvørvi í fiskiídnaðinum hildin í Føroyum. Hetta er eitt áhugavert tiltak, tá hugsað verður um, at júst fiskiídnaðurin er ein munandi partur av føroyska arbeiðsmarknaðinum.

— — —

Í seinastu tingsetu varð lógin um trygdargrunn veiðumanna broytt. Hann ber nú heitið »Trygdargrunnur fyri avreiðingar og lønir á fiskivirkjum». Higar til hevur grunnurin tryggjað fiskiførum og manningum 90% av ágóðanum, tá og um teirra fiskakeypari fór á húsagang. Aftaná lógarbroytingina hava løntakarar á fiskavirkjum somu trygd. Lóg um trygdargrunn fyri aðrar løntakarar er eisini samtykt. Hvussu hesin skal virka, hvar og hvussu hann verður at umsita, og nær hann fer undir virksemi, fer landsstýrið at áseta í kunngerð.

— — —

Landsstýrið hevur sett sær fyri at fremja lóggávu um arbeiðsmarknaðarpensjón og at kanna møguleikarnar fyri eini fastlønar- ella minstulønarskipan fyri fólk á fiskavirkjum.

Nevnd av serkønum fólki er sett at arbeiða við hesum málum. Saman við landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum hevur serkøna nevndin verið á kanningarferð í Danmark, Noregi og Svøriki. Í samband við, at tey her nevndu mál, sum viðkoma pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, verða viðgjørd, hevur landsstýrið samtykt at skipa eitt arbeiðsmarknaðarting, har umboð fyri avvarðandi feløg — umboðandi báðar partar á arbeiðsmarknaðinum — fáa sæti. Í alt er talan um 19 feløg.

— — —

Nýggj javnstøðunevnd varð sett í september 1986, og reglugerð varð gjørd fyri

hana, sum landsstýrið hevur góðkent. Nevndin hevur m.a. viðgjørt fleiri kærur um kynsmismun. Ásannandi, at uttan lógargrundarlag er torført at gera nakað munagott, arbeiðir nevndin nú við eini føroyskari javnstøðulóg. Eisini hevur nevndin tikið upp samstarv við aðrar javnstøðunevndir og -ráð innan Norðurlandaráðið, og kann verða nevnt, at á fundi tann 11. august í ár hjá norðurlendskum javnstøðuráðharrum er tann føroyski ráðharrin fyrstu ferð við.

Samskiftisviðurskifti

Í løtuni verður arbeitt fram ímóti at fáa sett eina smaskiftisdeild á stovn í landsumsitingini. Endamálið er, at deildin skal veita landsstýrismanninum í samferðslumálum (landsstýrinum) tann stuðul, sum er neyðugur til at betra møguleikarnar fyri effektivt at útinna leiðsluuppgávurnar innan økið.

Í fylgiskjølunum til hesa røðu hevur landsverkfrøðingsstovnurin eitt nágreiniligt yvirlit yvir arbeiði í gerð ella framd í tingárinum 1986/87.

Ferjulegan við Gomlurætt er seinkað nakað. Hetta arbeiði verður útboðið í oktober í ár.

Funningsvegurin kemur igjøgnum í ár.

Tvær tunnilsgerðir fóru í gongd fyrr í ár: Sumbiar — og Kaldbak/Signabøtunnilin. Næsta ár verður aftur farið í holt við Gásadalstunnilin.

Landsstýrið hevur samtykt at farast skal í gongd við nýggja havnarætlan. Uppskot verður lagt fyri tingið í hesi tingsetuni.

— —

Sum kunnugt hava samráðingar verði um flogmálið, og fyriliggja ítøkilig uppskot, sum støða skal takast til.

Í spurninginum um flogmálið hevur tað eydnast at samsetna allar og øll tey, sum hava áhuga fyri, at føroyingar koma upp í part, tá talan er um flúgving.

Tá støða er tikin og sáttmáli gjørdur, skuldi borið til at flogið við egnum flogfari, og borið til at fingið útbúgvið føroyingar innan flogferðslu.

Talan verður um flogskiparar, mekanikarar, flogternur, fyrisiting og onnur neyðug starvsfólk í einum vælvirkandi flogfelag. Helst verður talan um 20-25 arbeiðspláss.

Virksemið á Strandferðsluni er vaksið munandi hesi seinastu árini, bæði á sjógvi og landi.

Skip eru komin aftur at,sum t.d. Dúgvan, ið varð sett inn í rutuni millum Skálafjørðin og Havnina, og er flutningurin av ferðafólki og bilum vaksin munandi.

Samstundis sum Tróndur varð leysur av rutuna inn á Skálafjørðin, var hetta skip sett inn í rutuna millum Tórshavn og Skopun, og eru møguleikarnir øktir munandi, bæði hvat ferðafólki og bilum viðvíkur. Meðan Ritan fyri bert ikki so langari tíð síðan sigldi 2-3 túrar um dagin so siglir Tróndur í dag 5 túrar hvønn vegin um dagin, og er hann um summarið fyri tað mesta fullsettur av bilum hvønn túrin.

Yvir um Vestmannasund er tørvurin fyri flutningi av ferðafólk og bilum vaksin so nógv, at Sam ongan møguleika hevur havt til at flyta tey nógvu ferðafólk og bilarnar. Í 1984 setti Strandferðslan gomlu 'Ternuna' at røkja ferðasambandið saman við Sam, og hevur henda loysnin roynst væl, eins og fólk hava verið glað

fyri hetta skip, ið annars var nýtt sum eykaskip.

Hetta hevur stytt munandi um bíðitíðina, bæði á Oyragjógv og í Vestmanna.

Í summar er Teistin settur inn í siglingina saman við Smyrli til Suðuroyar og Klaksvíkar, soleiðis at túratalið og ferðasambandið er vaksið og betrað munandi, og við hesum sambandinum gerst møguleiki fyri at avlasta Ternuna á rutuni millum Leirvík og Klaksvík, ið hevur verið vaksandi, serliga er tað flutningurin av lastbilum, trailarum v.m., ið er øktur. Á øðrum rutum er túratalið eisini vaksið, sum t.d. til Nólsoyar, har Ritan í dag gor 4 túrar um dagin.

Í sambandi við keypið av Dúgvuni, og nú Smyril og Teistin sigla til Klaksvíkar, verður allur farmurin fluttur á mafi- vognum og trailarum við hesum skipum.

Inntøkan av farmaflutningi hevur verið vaksandi hesi tvey árini. Fyri árið 1986 vaks henda inntøka við umleið 14%-í mun til árið 1985, og higar til er hesin vøkstur upp á umleið 25%, tó mugu hesi tøl takast við størsta fyrivarni, av tí at tey bert eru fyribilstøl. Ein orsøk til hesa hækking er eisini tað stóra virksemi innan byggisektorin, sum er í landinum.

Viðurskiftini á økinum strandferðslu og bygdaleiðum verða tikin upp til viðgerðar í heyst. Ein sera nágreinilig frágreiðing fyriliggur, sum lýsir virksemi stovnana, og miðað verður ímóti eini rationalisering av virkseminum hjá báðum stovnum.

Tann 1. oktober 1986 gjørdi Strandferðslan avtalu við Sjúkrahúsverkið um flutning av sjúklingum, læknum v.m., aftaná at Reyði Krossur verður lagdur. Henda skipan, har Tróndur altíð liggur til reiðar í Skopun, Ritan í Havn til Nólsoyar og Sam yvir um Vestmannasund, hevur roynst ógvuliga væl, og eru sjúklingar, ið hava havt fyri neyðini at verða fluttir til Landssjúkrahúsið, fluttir upp á skjótasta máta.

— — —

Á vári 1986 samtykti løgtingið 5-ára útbygging fyri telefonverkið.

Partar av hesi ætlan eru longu framdir.

Nýggja digitala telefonstøðin var tikin í nýtslu í juni í ár, og hevur henda stóra umlegging longu bøtt munandi um telefontænastuna. Digitaliseringin verður at halda fram, og í 1988 verður øll Suðuroyggin digitaliserað.

Fylgisveinastøðin á Húsarcyni, ið skal tryggja telefonsambandið millum Føroyar og útheimin, var eisini liðug í juni í ár, men nytta fæst ikki av hesi stød fyrrenn seinni í ár,tí fylgisveinurin, ið støðin skal samvirka við, er vorðin seinkaður av trupulleikum við fronsku ARIANE - rakettini, og tí er uttanlandssambandið í styttri tíð nervað av, at ov fáar linjur eru til útheimin.

Til heystar byrjar uppsetingin av Nordisk Mobil Telefon, sum virkandi partur av NMT-skipanini í hinum norðurlondunum. NMT-fartelefonin væntast at verða tikin í nýtslu á summri 1988.

Nú er komið upp undir land við nýggja 200-KW millumbylgjusendaranum til útvarpið, og verður landsstýrið at taka endaliga avgerð um byggingina áðrenn 15. august. Telefonverkið metir, at byggingin kann vera liðug í seinnu helvt av 1988, og verður støðin bygd í syðru helvt av Suðuroynni, annaðhvørt í Akrabergi ella Porkerisnesi.

Seinastu 2 árini hava verið samráðingar millum landsstýrið, P & T, Store Nordiske og telefonverkið um yvirtøku av telegrafstøðini,sum síðani 1906 hevur

verið rikin av Store Nordiske. Store Nordiske hevur boðað frá, at teir ynskja at taka seg burtur úr hesum virksemi. Landsstýrið hevur boðað l' & 'l frá, at landsstýrið principielt hevur góðtikið at fremja hesa yvirtøku, har telefonverkið í flestum førum kemur inn í myndina sum arbeiðstakari fyri P & T í staðin fyri Store Nordiske.

Millum partarnar verða í mestum samráðingar um viðurskiftini hjá starvsfólkunum á telegrafstøðini skulu tryggja sotanarviðurskiftini hjá starvsfólkunum á støðini aftan á eina yvirtøku.

Lógarmál

Á lógarmálsøkinum eru tað serliga tær tríggju sjóvinnulógirnar, sum verða viðgjørdar í løtuni.

Talan er um nýggja sjóvinnulóg, sjómannaløgtingslóg og lóg um manning av skipum. Øll trý lógaruppskotini vóru frammløgd, áðrenn vertrartingsetan endaði, og verða nú viðgjørd í løgtingsins rottarnevnd ið virkar sum millumtinganevnd, tí uppskotini eru so rúgvumikil.

Orsøkin, til at landsstýrið ynskir at seta nýggjar reglur í gildi fyri nevnda øki, er tann, at galdandi lógir eru ótíðarhóskandi og ikki fremja tey krøv, sum altjóðasáttmálarnir á sjóvinnuøkinum seta.

Serliga er tað tann nýggja sjómansútbúgvingin og STCW-sáttmálin saman við øðrum altjóðasáttmálum, ið seta ørðvísi krøv á nevnda øki. Eftir at løgtingið í sept. 1984 samtykti, at STCW-sáttmálin skuldi galda fyri Føroyar, setti landsstýrið arbeiðsbólk at arbeiða við hesum lógum. Arbeiðsbólkurin fór til verka í januar 1986.

Tað, at nýggju lógarreglurnar enn ikki galda í Føroyum, hevur skapt trupulleikar, tá føroyingar skulu mynstra við útlendskum skipum. Hetta hevur sitandi landsstýri fingið ábreiðslur fyri, men landsstýrið hevur gjørt sína skyldu og hevur arbeitt framúr skjótt við hesum málum.

Landsstýrið fekk tey lidnu lógaruppskotini frá arbeiðsbólkinum tann 11. mars 1987. Longu 25. mars vóru tvey av uppskotunum løgd fram á tingi, meðan tað triðja var lagt fram 7. apríl. Talan er um tilsamans 134 lógargreinir. Við viðmerkingum fyllir lógarverkið 130 bls. Sostatt kann eingin páslanda, at landsstýrið hevur drálað við hesum lógararbeiði.

Landsstýrið vónar, at tingið verður fært fyri at avgreiða hesar lógir sum allarskjótasta.

Dálking — Umhvørvi

Umhvørvisdálkingin er farin at gera veruliga vart við seg seinastu árini.

Hon kennir sum kunnugt ikki landamark, og eru í seinastuni komin slík sløg av dálking upp á tal, at vit kenna eitt ávist máttleysi.

Kortini er neyðugt, at vit fylgja so væl við sum gjørligt og ávirka í tann mun, vit megna til tess at fyribyrgja vannlukkum, sum vit valla duga at hugsa okkum fylgjurnar av.

T.d. ávirkar Dounray-ætlanin okkum nógv, og kenna vit ótryggleika av henni.

Landsstýrið heldur, at arbeiðið við føroysku umhvørvislógini kemur so nikið

áleiðis, at løgtingið nú fær uppskotið til viðgerðar.

Mentunnarstovnar

Seinnapartin av 1988 fer útvarpið – sum nevnt – at fáa 200 KW millumbylgjusendaran, sum arbeitt hevur verið við í nøkur ár. Tá verða líkindi at gera sendingar til sjófólkið og føroyingar, sum eru burturstaddir, og við hesum sendarum verða líkindi til at gera sendingar til útlond, sum viðgera føroysk málsøki og spurningar. Eisini verða betur líkindi at andøva móti tí fremmanda mentunnarárgangi, sum vit kunnu vænta okkum frá sendingum, ið sendar verða um satellitstøðir.

— — —

Arbeiðsumstøðurnar í sjónvarpinum eru vánaligar, og neyðugt verður skjótt at gera nakað, so at starvsfólkið fær rúmari arbeiðsumstøður.

Frá 1. januar í ár hevur sjónvarpið leigað Havnar Bio í eitt fimm ára skeið. Hetta hølið er nú gjørt til upptøkuhøli og verður tikið í nýtslu nú eftir summarfrítíðina. Í hesum høli verða fyrst og fremst uppsetingar til ymiskar fastar sendingar sum t.d. Lítlating og Gluggan. Hølið í Havnar Bio sparir ein part av tí arbeiði, sum hevur staðist av at broyta uppsetingina í upptøkuhølinum í Vørðsluni, hvørja ferð ein sending skal takast upp, men samstundis ger hetta, at arbeiðið nú skal avrikast á trimum støðum, og tað ger tað torførari at leggja til rættis.

Loysn á hølisviðursviðurskiftunum hjá sjónvarpinum skal finnast, antin við at keypa hús ella byggja. Roknast kann við, at hóskiligt sjónvarpshús kostar einar 50 mió. kr. at byggja.

Neyðugt verður at játta eina peningaupphædd árliga á fíggjarlógini til hetta endamál. Einasta inntøkukeldan hjá sjónvarpinum er hyggjaragjaldið, og tað rekkur ikki til meira enn raksturin. Skal sjónvarpið sjálvt vera við til at fíggja nýggj hús, mugu aðrar inntøkukeldur útvegast stovninum.

Í teimum báðum sjónvarpsgrunnunum, sum standa á fíggjarlógini, eru tilsamans 28,9 mio. kr. Men úr hesum grunnum eru brúktar tilsamans 28 mió. kr., so tøkar eru bert 900.000 kr.

Tó skal viðmerkjast, at peningurin er nýttur úr grunninum at keypa tey gomlu útvarpshúsini á Bryggjubakka fyri stívliga 1,5 mió. kr. Haraftrat eru 8,4 mió. kr. nýttar til sendinetið, sum sambært lóg skal gjaldast úr landskassanum.

Landsstýrið ætlar at gjalda hesar báðar upphæddir aftur úr landskassanum í grunnarnar, sum tá hava 10,8 mió. kr. tøkar. Tað mesta av tí útgerð, sjónvarpið hevur, kann flytast í onnur høli.

— — —

Ein stovnur á Debesartrøð, sum hevur stórar høllistrupulleikar, er Føroya Landsskjalasavn. Savnið hevur til endamáls at goyma bøkur og skjøl hjá tí almenna, soleiðis at hesi altíð eru til taks hjá myndugleikunum. Eisini er endamálið at varðveita skrivligu keldurnar til Føroya søgu, at skipa og skrásetahesar keldur og gera tær atkomuligar hjá granskarum og almenningi.

Savnið, ið fevnir um skjøl frá 1615 til okkara dagar, húsast í løtuni í 4 ymiskum

bygningum — nakað sum ger tað torført at røkja tær uppgávur og tænastur, ið ein eigur at kunna krevja av slikum stovni.

Landsstýrið fer sum skjótast at takað støðu til, hvussu bygging av nýggjum Landsskjalasavni kann setast inn í íløgumyndina. Hetta hevur eisini samband við viðurskiftini hjá Fróðskaparsetrinum og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

— — —

Nevndin, sum landsstýrið setti at endurskoða fólkabókasavnslógina frá 1968 við tí fyri eyga, at lógin eisini skal fevna um skúlabókasøvn, er nú liðug við arbeiði sítt og hevur latið landsstýrinum álit um málið.

Nevndin hevur gjørt uppskot til eina lóg, sum fevnir bæði um almanna og skúlabókasøvn.

Í álitinum verður m.a. mælt til at skipa landið í 7 meginbókasavnsdømi, ið hvørt skal hava eitt væl útgjørt meginbókasavn, sum tekur sær av bókasavnstænastuni á staðnum. Nevndin skjýtur eisini upp, at sett verður á stovn ein bóka stova, ið skal samskipa keypið av føroyskum bókum og øðrum tilfari til bókasøvnini.

Høvuðstankin í hesum álitinum er at leggja almanna- og skúlabókasavnsuppgávurnar uttanfyri tað dagliga virksemið hjá landsbókasavninum, soleiðis at Landsbókasavnið kann fara undir aðrar stórar uppgávur, uppgávur, sum bert Landsbókasavnið kann og eigur at taka sær av, eitt nú at gera eina fullfíggjaða skráseting av Føroyadeild savnsins, og ein útbyggjan av vísindadeild savnsins er eisini hóskandi nú, ið farið verður undir hægri lestur á Fróðskaparsetrinum.

— — —

Í vár flutti Fornminnissavnið arbeiðshøli síni niðan í bygningarnar hjá Roykdarstøðini í Hoyvík. Einans framsýningar savnsins eru nú eftir á Debesartrøð. Hetta er fyrsti liður í eini ætlan um at flyta alt fornminnissavnsvirksemið til Hoyvíkar og fáa Fornminnissavnið at virka í nýggjum samljóði við siðsøguliga umhvørvið á gamla Hoyvíksgarið og vakra náttúrumhvørvið har um leiðir.

Sum fríøki hevur Hoyvíksøkið alsamt vaksandi týdning fyri almenningin, og mitt í lendinum er gamli Hoyvíksgarður, hampiliga heilskapaður gamal bóndagarður við sethúsum, úthúsum, bøi, høgørðum, geil o.s.fr., sum tó er í vánaligum standi. Ætlanin er so vítt gjørligt at fáa sett bygningar og umhvørvi í uppruna-ligan sand og lata tað vera atkomiligt fyri almenningin, so gamli garðurin í sjálvum sær kann virka sum útisavn.

Landsstýrið er sinnað, so skjótt løgir eru, at royna at loysa uppgávurnar í samband við avtaluna um at fáa aftur lutir og forngripir frá Nationalmuseet.

Almenna umsiting — Ríkisstuðulin

Segði fyri tveimum árum síðani, at almenna umsitingin var vorðin nakað niður slitin, og at politikkararnir, sum hava ábyrgd av hesum, helst hava latið seg ávirka av teirri ósonnu agitatión um bólgnan av almennari umsiting, ið bert kostar pening og onga nyttu ger, og at serliga vinnulívið ongan tørv hevur fyri »service».

Sannleikin er hin øvugti, at valla nakað samfelag hevur verið umsitið av so fáum sum hitt føroyska, serliga hvat veruligari landsfyirisiting viðvíkur.

Vit standa tí á einum vegamóti, har neyðugt er at taka heilt aðrar partar fyri seg.

Økt krøv standast av áhaldandi samfelagsútbyggingini, og økt krøv koma í samband við umleggingarnar av ríkisstuðlinum.

Hetta hendir samstundis sum samfelagsvirksemið er óvanliga stórt, og eftirspurningurin eftir úthúnum fólki tí er sera stórur.

Í kappingini við privata marknaðin um løn, tapir hitt almenna sum oftast, og tí fáa vit kanska ikki framt ta útbygging, sum er so neyðug.

Vit mugu so kortini royna.

Í sjálvari landsumsitingini er ætlan gjørd um uppbýti í einar 6 deildir hvør við sínum stjóra, og innan fleiri av stovnunum fer eisini eitt sundurbýti framm, sum skuldi smidlig — gjørt virkanina hjá hesum stovnum, sum almenningurin og vinnulívið so sterkt hava brúk fyri, og sum hitt almenna sjálvt hevur brúk fyri til at tryggja, at samfelagsorkan verður umsitin og brúkt so skilagott, sum til ber.

Td. hava danir leingi verið afturhaldandi við játtanum til neyðugar útbyggingar í Føroyum, her kann nevnast útbyggingin av heilsuverkinum, skúlaverkinum, sosiala verkinum og havnaverkunum.

Nú játtast kann bert frá føroyskari síðu kemur væntandi eitt øki økt trýst at gera seg galdandi, eitt nú í krøvum frá kommununum. Hetta ger, at vit mugu umhugsa rammujáttanir innan hvørt øki fyri eitt áramál í senn.

Bert hetta setir stór krøv til eina dugandi og virkna umsiting.

Undirgrundin

Sum nevnt í fjør hevur gingið sera illa at koma til sættis við danir um eina undirgrundsavtalu.

Teir hava ikki viljað tala um yvirtøku, men bert um eina sonevnda ráevnisskipan.

Vit mugu nú sjálvi gera uppskot, sum bæði fevna um, at undirgrundsmál verða sermál og um ráevnisumsiting, sum tryggjar ríkinum ávís áhugamál, men væl merkja trygdir, sum einans koma upp á tal undir teirri fortreyt, at málsøkið gerst føroyskt sermál.

Grindadráp

Ágangurin móti rætti okkara at drepa grind er munandi minkaður, hóast onkur ørvitisfiskur enn er at sfggja í bløðum og sjónvarpi. Á fundi á Alljóva Hvalanevndini, IWC, varð hildið fast um, at hesin felagsskapur einki hevur við grindahval at gera. Tó hevur tann viðferð, sum m.a. Ísland hevur fingið í hesum felagsskapi, givið grund til ørkymlan, og landsstýrið hevur tí tikið spurningin upp við danskar ríkismyndugleikar fyri at sleppa undan at verða sama lagnu fyri sum

Ísland, har ein meiriluti av limalondum í IWC, við USA á odda, gjørdu eina samtykt, sum greitt er móti sjálvum IWC sáttmálanum. Áhaldandi arbeiðið at bøta um drápsháttin er besta trygd fyri at halda áganginum burtur.

Syrgliga vanlukkan, har tríggir ungir menn lótu lív á veg til arbeiðis okkara vegna at útvega vitan um grindastovnin, hevur skelkað okkum, og vit mugu hava djúpastu samkenslu við teim, sum eftir sita.

Mc Cloy

Eri vorðin spurdur, um eg ætli at kanna, um landsstýrið hevur meiriluta í tinginum fyri avgerðini um at treyta vitjanarloyvið til Mc Cloy av váttan um, at treyt løgtingsins um atomvápnaloysi var uppfylt, og um eg ætli at kanna um hetta skal hava parlamentariskar avleiðingar.

Svarið er nei.

Hernaðar- og uttanríkisspurningar eru í seinasta enda ábyrgd stjórnarinnar, og tað vildi verið øvugt at leita eftir álitis — ella misálitisváttan í tinginum, sum onga avgerð skuldi ella skal taka um Mc Cloy, tá skiftandi stýri í Føroyum onga avleiðingar hava tikið av, at tey beinleiðis eru komin í minniluta í málum, har vit hava fult lóggávuvald.

T.d. kann nevnast, at eg metti málið um avtalubrot fólkafloksins í Lassa II málinum so álvarsligt, at eg mælti til at útskriva val í 1979. Tá helt einmæltur folkaflokkur, einmæltur tjóðveldisflokkur og partur av javnaðarflokkinum, at eingin grund var at taka tørvandi løgtingsmeiriluta í álvara.

Heldur ikki tykist nakar hava havt stórar moralskar trupulleikar av, at øll okkara parlamentariska skipan var sett út av spælinum í 1981-85 av paragraf 13.

Avgerðin um Mc Cloy er avgerð, sum umsitingarvaldið — landsstýrið — og ikki tingið skuldi taka.

Meti, at landsstýrið eigur at halda seg til tær samtyktir, tingið hevur gjørt, so leingi tær galda, og rokni við, at hesum tekur ein fullsamd samgonga undir við.

Hin vegin leggi eg meg ikki út í, um andstøðan ella partar av henni vilja seta fram misálitisuppskot í tinginum, men boði heldur ikki frá í forhond, um leiðari landsstýrisins tekur parlamentariskar avleiðingar av slíkum møguligum misáliti.

Liggja á takinum

Vit ganga nú inn í eitt valár, og væntandi kemur hetta at ørkimla tingarbeiðið nakað.

Yvirbjóðing og taktiskt spæl verður helst meira enn seinastu tingsetu, men vónandi forðar hetta ikki samgongu og andstøðu at liggja á takinum, soleiðis at teir batar, fingnir eru í búskapi okkara, verða varðveitir og mentir, so vit, tá vit fara út í valstríðið, kunnu siga, at vit bjóða okkum fram til at stýra einum sterkari, betri útbygdum og tryggari samfelag næsta valskeið.

Farloyvi

Formaðurin las upp skriv dagfest 24. juli 1987 frá Tordi Niclasen, sum biður varamann møta á tingi fyribils, tí hann er burturstaddur.

Við 25-0 atkvøðum var samtykt, at Juul Jacobsen møtir á tingi fyribils.

Skriv dagf. 28. september 1987 frá Óla Breckmann, har hann biður um farloyvi vegna fólkatingsarbeiði fyribils, og at næsti maður tekur sætið á tingi fyri hann. Við 23-0 atkvøðum varð samtykt, at Eliesar Arge skuldi taka sætið.

Skriv dagf. 28. september 1987 frá Karini Kjølbro, har hon biður um farloyvi í viku 40, og at næsti maður tekur sætið á tingi fyri hana. Við 23-0 atkvøðum varð samtykt, at Ingrid Sondum skuldi taka sætið.

Skriv dagf. 28. september 1987 frá Adolf V. Hansen, har hann biður um farloyvi vegna sjúku, og at næsti maður tekur sætið á tingið fyri hann. Hans J. Debes, Hilmar Kass og Flemming Mikkelsen vórðu bidnir um at kanna valbrøvini og mæltu til, at Assved Djurhuus skuldi taka sætið á tingi. Hetta varð við 23-0 atkvøðum samtykt.

Skriv frá Poul J. Olsen, løgtingsmanni, ið vegna sjúku hevur biðið um farloyvi og at næsti maður tekur sætið á tingi. Samtykt við 25-0 atkvøðum, at Gullak Gullaksen tekur sætið á tingi undir sjúkrafráveru Poul J. Olsens.
Samtykt varð eisini, at Sverre Midjord skuldi vera limur í skattanevndini fyri Poul Jacob Olsen.

Skriv frá Asbjørn Joensen, løgtingsmanni, ið vegna sjúku biður um farloyvi og at næsti maður tekur sætið á tingi fyri hann. Samtykt varð við 20-0 atkvøðum, at Páll Josefsen, Klaksvík, skuldi taka sætið á tingi fyri Asbjørn Joensen.

14. december var við 22-0 atkvøðum samtykt, at Eliesar Arge skuldi taka sætið á tingi fyri Óla Breckmann, løgtingsmann, sum í skrivi bað um farloyvi vegna fólkatingsarbeiði.

Skriv frá Agnar Nielsen, løgtingsmanni, ið biður um farloyvi, og at næsti maður tekur sætið á tingi fyri hann. Samtykt varð við 21-0 atkvøðum, at Terji Davidsen, Kollafirði, skuldi taka sætið á tingi fyri Agnar Nielsen.

Skriv frá Jákup Lindenskov, løgtingsmanni, ið biður um farloyvi vegna uttanlandsferð, og at næsti maður tekur sætið á tingi fyri hann. Samtykt varð við 23-0 atkvøðum, at Jona Henriksen, Tórshavn, skuldi taka sætið á tingi fyri Jákup Lindenskov.

12. november var við 22-0 atkvøðum samtykt, at Kári Petersen skuldi taka sæti á tingi fyri Thomas Arabo, sum í skriv bað um farloyvi.

24. november var við 23-0 atkvøðum samtykt, at Gisley Bonde skuldi taka sætið á tingi fyri Jóannes Dalsgaard undir fráveru vegna sjúku.

Skriv 16. december frá Jóannesi Dalsgaard, løgtingsmanni, um farloyvi fyribils vegna sjúku.

Við 23-0 atkvøðum var samtykt, at Gisley Bonde tekur sætið á tingi.

Við 27-0 atkvøðum var samtykt, at Ólavur Heinesen skuldi taka sæti á tingi fyri Jørgen Thomsen, sum fær farloyvi vegna sjúku.

10. februar 1988 var við 20-0 atkvøðum samtykt, at Dánjal Larsen skuldi taka sætið á tingi fyri Paula Ellefsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna privat ørindi uttanlands.

Sama dag var við 22-0 atkvøðum samtykt, at Sune Jacobsen skuldi taka sæti á tingi fyri Ivan Johannesen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna almenn ørindi uttanlands.

17. februar varð við 17-0 atkvøðum samtykt, at Jona Henriksen skuldi taka sætið á tingi fyri Jákup Lindenskov, sum í skrivi dagf. 17. februar 1987 bað um farloyvi.

17. mars við 21-0 atkvøðum varð samtykt, at Jona Henriksen skuldi taka sætið á tingi fyribils vegna Jákup Lindenskov, løgtingsmann, sum í skrivi bað um farloyvi.

Sama dag varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Kári Petersen skuldi taka sætið á tingi fyribils vegna Thomas Arabo, sum í skrivi bað um farloyvi.

Sama dag varð við 22-0 atkvøðum samtykt at Essa Arge skuldi taka sætið á tingi fyribils vegna Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi.

22. mars 1988 var við 25-0 atkvøðum samtykt, at Juul Jacobsen skuldi taka sætið á tingi fyri Tord Niclasen, sum í skrivi bað um farloyvi.

Sama dag var við 22-0 atkvøðum samtykt, at D. P. Danielsen skuldi taka sætið á tingi fyri Eliesar Arge, sum í skrivi bað um farloyvi.

23. mars var við 22-0 atkvøðum samtykt, at Martin Nielsen skuldi taka sætið á tingi fyri Svend Aage Ellefsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

30. mars kom skriv frá Jákupi Lindenskov, løgtingsmanni, um at hann aftur tekur sætið á tingi.

Sama dag varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Ingrid Sondum tekur sæti á tingi fyri Hans J. Debes, sum í skrivi bað um farloyvi.

7. apríl varð við 19-0 atkvøðum samtykt, at Jona Henriksen tekur sæti á tingi fyri Jákup Lindenskov, sum í skrivi bað um farloyvi.

19. apríl var við 24-0 atkvøðum samtykt, at Edmund Joensen skuldi taka sæti á tingi fyri Johannes Martin Olsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

21. apríl var við 28-0 atkøvðum samtykt, at Eliesar Arge skuldi taka sæti á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi.

27. apríl var við 25-0 atkvøðum samtykt, at Jona Henriksen skuldi taka sæti á tingi fyri Jákup Lindenskov, sum í skrivi bað um farloyvi.

3. mai var við 26-0 atkvøðum samtykt, at John Petersen skuldi taka sæti á tingi fyri Eyðun Videro, sum í skrivi bað um farloyvi til 10. mai.

Sama dag var við 26-0 atkvøðum samtykt, at Eliesar Arge skuldi taka sæti á tingi fyri Poul Michelsen, sum í skrivi bað um farloyvi, til 1. juni.

5. mai var við 27-0 atkvøðum samtykt, at Dánjal P. Danielsen skuldi taka sæti á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi.

3. juni var við 27-0 atkvøðum samtykt, at Eliesar Arge skuldi taka sæti á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi í eina viku.

13. juni var við 19-0 atkvøðum samtykt, at Gullak Gullaksen skuldi taka sæti á tingi fyri Poul Jacob Olsen, løgtingsmann, sum í skrivi bað um farloyvi.

Sama dag var við 19-0 atkvøðum samtykt, at Hilmar Boch skuldi taka sæti á tingi fyri Sverra Midjord, løgtingmann, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúku.

1 Ymsar lógir at seta í gildi innan almannaverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini.

Ár 1987, fríggjardagin 31. juli legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið mælir til, at hesi uppskot til lóg verða sett í gildi í Føroyum:

1. Uppskot til lóg »om tilskud til Færøernes hjemmestyre på det sociale område. (Omlægning av visse statsrefusioner m.v. inden for Socialministeriets område til bloktilskudd«, sí skjal 1.

2. Uppskot til lóg »om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser (Ændring af regler om finansiering, forhøjelse af pensioner m.v.)«, sí skjal 2.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 133/1986 samtykti løgtingið at góðkenna avtalu frá 9. mars 1987 millum landsstýrið og ríkisstýrið um eina broytta stuðulsskipan.

Umframt tað, at broytingin hevur tað við sær, at stuðulin í stóran mun verður broyttur frá eini endurrindingarskipan til eina sonevnda blokkskipan, yvirtekur heimastýrið í samsvar við § 10 í heimastýrislógini fyrisitingina av teimum økjum, sum avtalan fevnir um og fær eisini myndugleika innan ávíst mark at fyrisita tær reglur, ið skulu galda á økjunum, eins og tá heimastýrið yvirtók fyrisitingina av t.d. skúlaverkinum.

Fyri at fremja hesa § 10-yvirtøku skulu broytingar gerast í ymiskum serlógum, har m.a. tann myndugleikin, ein ráðharri hevur, verður fluttur til landsstýrið, og eisini eru broytingar neyðugar, har stuðulin eftir lógini er endurrindan.

Samráðingar hava verið millum landsstýrið og ríkisstýrið um hesar broytingar, úrslitið er tey uppskot, sum landsstýrið nú leggur fyri løgtingið.

Viðvíkjandi almannamálaráðnum er umframt sjálva blokkstuðulslógina, har blokkurin er settur til 176.695.000 kr. 1987-príslegu, talan um uppskot til lóg um »ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser«.

Viðvíkjandi broytingarlógini er serstakliga at viðmerkja, at her eru eisini ymiskar ábøtur í teimum almennu veitingunum tiknar við. Nevnast kann hækking av pensjónunum, soleiðis at tryggjað verður pensjónistunum somu tøku inntøku sum í Danmark, tær ymisku skattareglurnar íroknaðar, at reguleringin av grundpeningshæddini hjá pensiónistum undir 67 ár hert verður grundað á inntøkuna hjá pensiónistunum sjálvum og ikki eisini inntøkuna hjá hjúnafelagum, at dagpeningatíðin aftan á føðing verður longd frá 8 vikum til 24 vikur í tveimum stigum frá 1. januar 1988 til 20 vikur og frá 1. juli 1988 til 24 vikur, og at endurútbúgving og hjálpartól verða flutt frá avlamispensiónslógini til forsorgarlógina, t.v.s. at fyrisitingin verður flutt frá Vanlukkutryggingarráðnum til Almannastovuna. Viðvíkjandi meiriútreiðslum sí skjal 3.

Landsstýrið vísir annars til lógaruppskotini og viðmerkingarnar.

Sí skjal 3.

1. viðgerð 3. august. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunum 2: Ymsar lógir at seta í gildi í heilsuverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini, 3: Ymsar lógir at seta í gildi innan undirvísingarverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini, 4: Broyting í løgtingslóg um dagpening í samband við barnsburð og sjúku og 5: Lóg um yvirtøku av serforsorgini í Føroyum.

Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 31. august legði fram soljóðandi

Áli

Málið er lagt fyri løgtingið av Føroya Landsstýri hin 31. juli 1987 og eftir 1. viðgerð hin 3. august 1987 beint í almanna- og heilsunevndina.

Uppskotið fevnir um fíggjarligu broytingarnar í stuðulsskipanini í sambond við blokkstuðulsskipanina. Spurningurin um blokkstuðulsskipanina hevur verið til viðgerðar á Føroya Løgtingi og varð samtyktur 13. apríl 1987.

Lógartekniska broytingarnar fevna um hesar lógir
Fólkapensjónslógin, avlamispensjónin,
dagpeningalógin,
forsorgarlógin,
barnaforsorgarlógin,
lóg um barnapening til stakar uppihaldarar.

Viðvíkjandi veitingarreglunum, so verða fólka-, avlamis- og einkjupensjónirnar í Føroyum sum higartil endurgoldnar við 50% aftaná 1. januar 1988. Veitingarnar úr danska ríkiskassanum til t.d. dagpening, forsorgarlóg, barnaforsorgarlóg, eins og persónlig ískoyti til pensjónir verða í framtíðini endurgoldin við 25%.

Samstundis sum gingið verður yvir til blokkstuðulsskipanina, verða ymsar broytingar framdar í pensjónsviðurskiftunum. Hesar broytingar fara at virka frá 1. januar 1988. Samstundis sum pensjónirnar hækka, fer eisini tann broyting fram, at pensjónistahjún fáa útgoldna hvør sína helvt av samlaðu pensjónini.

Higartil hevur tann regla verið galdandi, at fólk, ið fáa fólkapensjón og eru undir 67 ár, hava fingið eina upphædd, ið hevur verið ávirkað av inntøkuni hjá hjúnafelaga. Hetta heldur nú uppat, og grundupphæddin verður nú útroknað í mun til inntøkuna hjá pensjónistinum sjálvum. Serligu frádráttarreglurnar í samband við útrokningina av pensjónini verða nú eisini broyttar og føra við sær, at allir pensjónistar hava sama frádrátt uttan mun til, um teir eru giftir ella ikki.

Annars er at siga, at broytingin í útrokningargrundarlagnum fyri pensjón fer at hava serligan týdning fyri giftar avlamispensjónistar, hvørs útgoldna avlamispensjón ofta hevur verið nógv skerd vegna inntøku hjá hjúnafelaga, hin 1. oktober í ár.

Dagpeningalógin

Sum kunnugt varð dagpeningalógin broytt í seinastu tingsetu soleiðis, at dagpeningatíðin við sjúku varð longd úr 13 vikur upp í 20 vikur. Broytingin í dagpeningalógini nú førir við sær, at barsilsdagpeningurin nú verður broyttur frá 8 vikur til 24 vikum. Skipanin fer fram í tveimum umførum, frá 1. januar 1988 verður tíðin longd frá 8 vikum til 20 vikur, og frá 1. juli 1988 frá 20 vikum til 24 vikur. Skiftisreglur verða settar í verk frá 1. oktober í ár fyri tær, ið eigu aftaná henda dag.

Serforsorgin.
Samstundis sum ymiskar lógartekniskar broytingar eins og ábøtur fara fram viðvíkjandi ymisku sosialu serlógunum, so liggur í løtuni eisini á tingborði lóg aruppskot um yvirtøku av serforsorgini (løgtingsmál nr. 5/1987).

Broytingar í reglunum viðvíkjandi endurbúgving og hjálpartólum.
Í samband við blokkstuðulsskipanina fer eisini tann broyting fram, at reglurnar viðvíkjandi endurbúgving og hjálpartólum, sum eftir verandi skipan hoyra undir avlamispensjónslógina, nú verða lagdar undir forsorgarlógina.

Henda broyting førir við sær, at tað er Almannastovan, sum í framtíðini skal átaka sær viðgerðina av málum viðvíkjandi endurbúgving og hjálpartólum. Hesi mál hava eftir verandi skipan lutvist verið umsitin av Føroya Vanlukku-tryggingarráði.

Hetta verður hildið at vera ein náttúrlig broyting, tí Almannastovan framman-undan hevur so nógv við hesi mál at gera, og sostatt skuldi hetta ført við sær eina einfaldgering av umsitingini.

Peningatigar og umsitingarligar fylgjur.
Tað, at pensjónirnar verða hækkaðar og ikki longur skulu verða útroknaðar eftir inntøku hjá hjúnafelaga, førir við sær meirútreiðslur. Hesar útreiðslur verða fyri landskassan 4,6 mió. kr. (skjal 3). Samlaðu útreiðslur landskassans vegna hækking í pensjónini verða 17,9 mió. kr.

Viðmerkingar annars.
Sum nevnt verður grunduppheddin til pensjónirnar hækkað. Í framtíðini verður grundupphæddin fyri gift 158,9% av grunduppheddin fyri ein stakan. Sum áður nevnt er tað henda upphædd, ið verður tillutað við helvtarbýti til hjún.

Figgingin av persónligum iskoyti til penjsónirnar verður í framtíðini endurgoldin við 25% (munurin, 25% fer í blokkin). Samstundis sum henda prosentbroyting fer fram, verða galdandi reglur um luttøku statsins í figgingini av íløguni til ellis- og røktarheim broytt, soleiðis at hesar útreiðslur fara í blokkin.

Sum áður nevnt, verður serliga frádráttaruppheddin í útroknингini av grunduppheddini til fólk undir 67 ár, avtikin fyri hjún. Fyri framtíðina fáa hjún hvør sær sama frádrátt, sum nú er galdandi fyri støk.

Rakstur av ellis- og røktarheimum fer í blokkin.

Umframt grunduppheddina verður eisini pensjónsiskoyti til giftar pensjónistar býtt í tvein partar.

§ 9 í forsorgarlógini.
Henda grein, ið higartil hevur verið brúkt í samband við sjúku ella barnsburð ella hjúnaskilnað í eina avmarkaðari tíð, har møguleiki ikki er fyri dagpeningi ella øðrum veitingum, skal í framtíðini eisini fevna um fólk, ið komu í vinnu-

loysi, ella hava serliga tunga forsyrgjarabyrði í samband við stórar íbúðarútreiðslur ella serligar truplar umstøður annars. Møguleiki verður fyri at hækka hesa hjálp, og heimilar henda grein eisini stuðul í samband við stórar íbúðarútreiðslur.

Heimahjálparar.
Í samband við at heimahjálparaskipanin fer yvir í blokkin, hendir eisini tann broyting, at útbúgvingin av heimahjálparum verður løgd frá danska sosialministeriinum til Føroya Landsstýri.

Dagstovnar fyri børn og ung og dagrøkt.
Eftir uppskotinum verður endurgjaldið frá statinum til rakstur broytt frá 40 til 25%. Sama verður galdandi við døgnstovnum til børn og ung, frá 40 til 25%.

Barnapeningur.
Barnapeningur í Føroyum fer eftir broyttu reglunum í blokkin.

Ein sand nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til, at peningur verður settur av til skeið fyri tey, ið skulu umsita broyttu sosialu lógirnar, og at farið verður undir arbeiðið beinanvegin at orða allar lógirnar á føroyskum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) kann ikki taka undir við, at arbeiðsloysisstuðul verður settur í verk í Føroyum. Avleiðingar av slíkum skipanum í øðrum londum virka ræðandi, og væntast kann eisini, at um slík skipan verður sett í gildi her, so fer hon í sjálvum sær at økja um arbeiðsloysi og minka um framleiðsluna, samstundis sum bæði almenna og privata nýtslan vaksa.

Minnilutin setir tí fram hetta

broytingaruppskot

Í § 4, *punkt 1.*

Viðv. § 9, stk. 1, í »lov for Færøerne om offentlig forsorg« ganga út orðini: »svigtende arbejdsmuligheder«.

Ein annar meiriluti (Flemming Mikkelsen) førir fram:

Sum kunnugt samtykti ein meiriluti í løgtinginum blokkstuðulsskipanina í vár. Hesa skipan ynskti ein meiriluti av teimum føroysku veljarunum til løgtingsvalið í november 1984.

Sambandsflokkurin kundi ikki ganga inn fyri hesi skipan og atkvøddi heldur ikki fyri uppskotinum, men flokkurin tekur til eftirtektar tað, ein meiriluti í løgtinginum samtykkir, og ein meiriluti av Føroya fólki ynskir.

Blokkstuðul ljóðar kanska meiri føroyskt, men kortini eru krónurnar líka danskar fyri tað, harafturat eru vit komnir í eina álmussustøðu, nú vit sjálvir

skulu eitast at valda og hinir gjalda, og kunnu tí taka undir við norska skaldinum, tá hann førdi fram: «...evigst ejes kun det tabte».

Sambandsflokkurin ásannar, at ikki loysir seg at gráta um spilta mjólk, men vil royna sum ábyrgdarflokkur at arbeiða fram ímóti, at føroyska samfelagið fær sum frægast burturúr.

Løgtingsmálini nr. 1, 2, 4 og 5, sum fingu 1. viðgerð í løgtinginum 3. august og vóru beind í almanna- og heilsunevndina, eru ein fortreyt fyri at fáa nýggju skipanina at virka. Sambandsflokkurin kann tí stórt sæð taka undir við fyriliggjandi lógaruppskotum, soleiðis at ruðuleikin, ið Lassi Klein, landsstýrimaður, boðaði frá, tá blokkstuðulsskipanin var fyri í vár, verður minst møguligur.

2. viðgerð 23. september. Atkvøðugreiðslan útsett. Atkvøðugreiðsla á seinni fundi sama dag. Broytingaruppskotið frá Jógvan Sundstein fall við 5-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins samtykt við 18-0 atkvøðum.

F. Lj.nr. 450-1-2.

2 Ymsar lógir at seta í gildi innan heilsuverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini.

Ár 1987, fríggjadagin 31. juli legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið mælir til, at hesi uppskot til lóg og fyriskipan verða settar í gildi í Føroyum:

1. Uppskot til lóg om tilskud til Færøernes hjemmestyre på sundhedsområdet. (Omlægning af statsrefusionerne m.v. til bloktilskud.), sí skjal 1.

2. Uppskot til lóg »om ændring af forskellige love om Færøernes sundhedsvæsen. (Ændring af regler om financiering og refusion.)«, sí skjal 2.
3. Uppskot til fyriskipan »om ændring af forskellige anordninger om Færøernes sundhedsvæsen. (Ændring af regler om financiering og refusion.)«, sí skjal 3.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 133/1986 samtykti løgtingið at góðkenna avtalu frá 9. mars 1987 millum landsstýrið og ríkisstýrið um eina broytta stuðulsskipan.

Umframt tað, at broytingin hevur tað við sær, at stuðulin í stóran mun verður broyttur frá eini endurrindingarskipan til eina sonevnda blokkskipan, yvirtekur heimastýrið í samsvar við § 10 í heimastýrislógini fyrisitingina av teimum økjum, sum avtalan fevnir um, og fær eisini myndugleika til innan ávíst mark at fyriseta tær reglur, ið skulu galda á økjunum, eins og tá heimastýrið yvirtók fyrisitingina, av t.d. skúlaverkinum.

Fyri at fremja hesa § 10-yvirtøku skulu broytingar gerast í ymiskum serlógum, har m.a. tann myndugleikin, ein ráðharri hevur, verður fluttur til landsstýrið, og eisini eru broytingar neyðugar, har stuðulin eftir lógini er endurrindan.

Samráðingar hava verið millum landsstýrið og ríkisstýrið um hesa broytingar, úrslitið er tey uppskot, sum landsstýrið nú leggur fyri løgtingið.

Viðvíkjandi innanríkismálaráðnum er uniframt sjálva blokkstuðulslógina, har blokkurin er settur til 176.695.000 kr. 1987 príslegu, talan um uppskot til lóg um »ændringer af forskellige love om Færøernes sundhedsvæsen« og fyriskipan um »ændring af forskellige anordninger om Færøernes sundhedsvæsen«.

Landsstýrið vísir annars til lógaruppskotini og viðmerkingarnar.

Sí skjal 4

1. viðgerð 3. august. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunum 1: Ymsar lógir at seta í gildi innan almannaverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini, 3: Ymsar lógir at seta í gildi innan undirvísingarverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini, 4: Broyting í løgtingslóg um dagpening í samband við barnsburð og sjúku og 5: Lóg um yvirtøku av serforsorgini í Føroyum.

Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 31. august legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt hin 30. juli 1987 fyri Føroya Løgting av Føroya Landsstýri og varð aftaná 1. viðgerð 31. juli 1987 beint í løgtingsins almanna- og heilsunevnd.

Uppskotið fevnir um tær lógarbroytingar, ið eru fylgja av sáttmálanum millum Danmarkar og Føroya viðvíkjandi blokkstudningi, ið varð samtyktur í Føroya Løgtingi hin 14. apríl 1987. Partur av hesum er, at heimastýrið í tráð við § 10 í heimastýrislógini yvirtekur fyrisitingina av teimum málsøkjum, sum av-

talan fevnir um. Broytingin førir eisini við sær myndugleika til á ávísum økjum at seta reglur, ið skulu galda í Føroyum á sama hátt, sum tá heimastýrið yvirtók fyrisitingina t.d. av skúlaverkinum.

Umframt broytingar í sjálvari stuðulsskipanini, so er talan um broytingar í lógum og fyriskipanum.

Lógirnar fevna um sjúkrahúsverkið, lógina um almenna sjúkratrygging og lógina um kynssjúkur.

Broytingarnar í fyriskipanum fevna um: Barnakønurøkt og føðihjálp, fyriskipan móti smittandi sjúkum, fyriskipan um skúlalæknaskipan, fyriskipan um heilsusjúkrasystraskipan, fyriskipan um heimasjúkrasystraskipan, kommunulæknar, smábarnakanningar og innleggingar á ríkishospitalið.

Broytingin í stuðulsskipanini verður endurgjald fyri øll tilskot og allar endurrindingar, ið staturin higartil hevur rindað føroyska heilsuverkinum. Heruppí hoyrir tilskot til sjúkrakassaverkið. Hesin stovnur kemur í framtíðini undir eftirlit av Almannastovuni.

Alt heilsuverkið er sostatt farið undir blokkstuðulsskipanina. Eftir er at nevna, at landslæknastovnurin eftir blokkstuðulsskipanini ikki verður yvirtikin. Hvíso er stendur heldur einki um íuppskotinum. Samlaði árligi raksturin av hesum stovni er umleið hálv millión krónur um árið.

Uppí broyttu stuðulsskipanina er eisini endurgjald fyri, at landsstýrið í framtíðini skal gjalda fyri kanningar og viðgerðir av føroyskum sjúklingum á ríkishospitalinum eftir 1. januar 1988. Hetta endurgjald er bygt á ta nýtslu, ið sjúkrahúsverk Føroya hevur havt av ríkishospitalinum í 1986. Kostnaðurin fyri at gera nýtslu av ríkishospitalinum verður eftir 1. januar 1988 eftir somu reglum, sum donsku amtskommununrnar gjalda fyri nýtslu av ríkishospitalinum.

Veitingarnar verða árliga viðgjørdar eftir sama prosenti, sum samlaða danska statsfíggjarlógin fylgir.

Broytingar kunnu tó gerast, um týdningarmiklar broytingar henda í teimum fyritreytum, ið eru grundarlag undir avtaluni frá 9. mars 1987. Hetta kann tó bert henda eftir samráðingar millum heimastýrið og donsku ríkisstjórnina og við tilmæli frá donsku fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Karin Kjølbro, Jákup Lindenskov, Tordur Niclasen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins um yvirtøku av heilsuverkinum og setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at taka undir við uppskoti landsstýrisins um ymiskar

broytingar innan heilsuverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini.

Meirilutin heldur, at tað er eitt kærkomið høvi at fáa umsett lógir og kunngerðir, ið viðvíkja Føroyum í samband við, at blokkstuðulsskipanin verður sett í verk, og setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta pengar av á komandi fíggjarlóg til tess at fáa umsett tær lógir og fyriskipanir til føroyskt, sum eru partur av broyttu stuðulsskipanini innan heilsuverkið.

Meirilutin í nevndini (samgongufloklkarnir) minnir landsstýrið á nevndina, ið sett var at viðgera ivamál í heimastýrislógini, herundir yvirtøku av landslæknastovninum.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) tekur undir við viðmerkingum meirilutans, men viðmerkir, at taið øll umsitingin av heilsuverkinum nú verður yvirtikin og samlaða heilsu- og sjúkrahúsverkið fer undir blokkstuðulsskipanina, er tað løgið, at landslæknaembætið, sum einsamalt øki verður eftir undir danskari fyrisiting.

Landslæknaembætið kostar umleið eina hálva miljón krónur árliga.

Minnilutin setir tí fram hetta:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at landslæknaembætið verður føroyskt sermál frá 1. januar 1988. Álagt verður landsstýrinum at gera tær neyðugu fyrireikingar fyri at fremja hetta.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) vísir á sínar viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 1/1987: Ymsar lógir at seta í gildi innan almannaverkið í sambband við broyting í stuðulsskipanini.

2. viðgerð 23. september. Uppskot landsstýrisins samtykt við 23-0 atkvøðum.

Uppskot nevndarinnar til samtyktar viðvíkjandi avseting av peningi til umseting av lógunum til føroyskt varð samtykt við 18-0, og uppskot minnilutans til samtyktar fall við 11-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 450-1-3.

3 Ymsar lógir at seta í gildi innan undirvísingarverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini.

Ár 1987, fríggjadagin 31. juli legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið mælir til, at hesi uppskot til lóg verða sett í gildi í Føroyum:

1. Uppskot til lóg »om tilskud til Færøernes hjemmestyre på undervisningsområdet« (Omlægning af statsrefusioner m.v. til bloktilskud)«, sí skjal 1.
2. Uppskot til lóg »om ændring af forskellige love om Færøernes undervisningsvæsen (Ændring af regler om financiering og refusion)«, sí skjal 1.

Viðmerkingar:
Í løgtingsmáli nr. 133/1986 samtykti løgtingið at góðkenna avtalu frá 9. mars 1987 millum landsstýrið og ríkisstýrið um eina broytta stuðulsskipan.

Umframt tað, at broytingin hevur tað við sær, at stuðulin í stóran mun verður broyttur frá eini endurrindingarskipan til eina sonevnda blokkskipan, yvirtekur heimastýrið í samsvar við § 10 í heimastýrislógini fyrisitingina av teimum økjum, sum avtalan fevnir um, og fær eisini myndugleika til innan ávíst mark at fyrisita tær reglur, ið skulu galda á økjunum, eins og tá heimastýrið yvirtók fyrisitingina, av t.d. skúlaverkinum.

Fyri at fremja hesa § 10-yvirtøku skulu broytingar gerast í ymiskum serlógum, har m.a. tann myndugleikin, ein ráðharri hevur, verður fluttur til landsstýrið, og eisini eru broytingar neyðugar, har stuðulin eftir lógini er endurrindan.

Samráðingar hava verið millum landsstýrið og ríkisstýrið um hesar broytingar, úrslitið er tey uppskot, sum landsstýrið nú leggur fyri løgtingið.

Viðvíkjandi kenslumálaráðnum er umframt sjálva blokkstuðulslógina, har blokkurin er settur til 157.225.000 kr. 1987-príslegu, talan um uppskot til lóg um »ændringer af forskellige love om Færøernes undervisningsvæsen«.

Landsstýrið vísir annars til lógaruppskotini og viðmerkingarnar.

Sí skjal 5.

1. viðgerð 3. august. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunuum 1: Ymsar lógir at seta í gildi innan almannaverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini, 2: Ymsar lógir at seta í gildi innan heilsuverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini, 4: Broyting í løgtingslóg um dagpening í samband við barnsburð og sjúku og 5: Lóg um yvirtøku av serforsorgini í Føroyum.

Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 31. august legði fram soljóðandi.

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 31. juli 1987 og varð eftir 1. viðgerð tann 3. august 1987 beint í Mentanar- og skúlanevndina.

Málið snýr seg um ríkislógir, sum eru ein fylgja av blokkstuðulsskipanini og blokkstuðulsavtaluni frá 9. mars 1987 millum landsstýrið og ríkisstýrið og av at heimastýrið yvirtekur ávís fyrisitingarøkir í hesum sambandi.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Ein samd nevnd mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið til samtyktar óbroytt.

Eilif Samuelsen tekur undir við uppskotinum, men hevur hesar viðmerkingar.

Tá ið uppskotið um broyting í stuðulsskipanini til heimastýrið var fyri á tingi í vár, tók sambandsflokkurin sum vera man ikki undir við uppskotinum av tí at flokkurin heldur, at skipanin er við til at máða støðið undan tí 600 ára gamla samarbeiðinum, ið hevur verið millum Føroyar og Danmark. Hetta samarbeiði hevur verið við til at menna føroysku tjóðina og føroyska samfelagið solciðis, at land okkara í dag telist millum tey mest framkomnu ídnaðarlondini í heiminum.

Ein og hvør skipan, sum minkar um samvinnuna Føroya og Danmarkar imill-

um, er tí Føroyum til ógagns og slíkum vil sambandsflokkurin ikki undir nøkrum umstøðum vera við til.

Ein meiriluti av Føroya Løgtingi samtykt 13. apríl í ár at góðtaka avtalu frá 9. mars 1987 millum ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri viðvíkjandi broytingum í stuðulsskipanini. Hesa meirilutaavgerð tekur sambandsflokkurin til eftirtektar.

Flokkurin tekur tí eisini undir við, at tær fylgilógirnar, ið neyðugar eru at fremja í hesum sambandi og sum avvarðandi donsku ráðharrastovurnar hava útarbeitt, verða samtyktar.

Í samband við broyting í lóg um tænastmenn v.m. í føroyska fólkaskúlanum fær heimastýrið heimild at avloysa hesa lóg við føroyskum reglum.

Sambandsflokkurin metir tað at hava stóran týdning, at ríkisstjórnin í viðmerkingunum undirstrikar og ger tað til eina fyritreyt fyri ásetan av nýggjum reglum »at der ikke sker en forringelse af de allerede ansattes vilkår...« og at løn- ar- og setanarkor sum higartil verða ásett við avtalu við avvarðandi felag, ið hevur samráðingarrættin.

11. september legði Jógvan Sundstein vegna fólkaflokkin fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Víst verður á, at Fólkaflokkurin í tingsetuni 1986 hevði uppskot um at avtaka samskipannarfrádráttin fyri lærarar og aðrar tænastumenn. Hetta uppskot varð sett fram fyri, at hesir bólkar kundu fáa sína pensjón og fólkapensjón óskerda.

Í samband við broyting í lóg um tænastumenn v.m. í føroyska fólkaskúlanum fær heimastýrið heimild at avloysa hesa lóg við føroyskum reglum. Fólkaflokkurin ynskir, at hesar nýggju reglur m.a. skulu innihalda ásetingar um, at samskipannarfrádrátturin verður avtikin.

Flokkurin setir tí fram hetta:

Uppskot

til

samtyktar

Í samband við at nýggjar reglur verða gjørdar av heimastýrinum í lóg um tænastumenn v.m. í føroyska fólkaskúlanum, verða ásetingar gjørdar um, at samskipannarfrádrátturin hjá tænastumonnum eftir hesi lóg verður avtikin.

2. viðgerð 23. september. Við 19-0 atkvøðum varð málið alt urbeint í mentamnar-

og skúlanevndina, sum 23. september legði fram:

Álit II

Málið varð við 2. viðgerð beint aftur í nevnd í samband við uppskot frá Fólkaflokkinum um samskipannarfrádráttin hjá tænastumonnum í føroyska fólkaskúlanum.

Nevndin hevur hildið fund, og er ein meiriluti (Eilif Samuelsen, Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen og Jóannes Dalsgaard) komin ásamt um at seta fram fylgjandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum í komandi samráðingum við feløgini hjá tænastumonnunum at finna fram til eina skipan, ið stigvíst avtekur samskipannarfrádrátt tænastumanna.

Ein meiriluti (Jógvan Sundstein) mælir í fyrsta lagi løgtinginum til at samtykkja uppskot fólkafloksins óbroytt, í øðrum lagi til at samtykkja uppskot meirilutans.

23. september framhaldandi 2. viðgerð Uppskot Fólkafloksins fall við 8-0 atkvøðum. Uppskot nevndarinnar (álit II) varð samtykt við 25-0 atkvøðum, uppskot landsstýrisins samtykt við 25-0 atkvøðum.

F. L. j.nr. 450-1-4.

4 Broyting í løgtingslóg um dagpening í samband við barnsburð og sjúku

Ár 1987, fríggjadagin 31. juli legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening í samband við barnsburð og sjúku.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 25 frá 13. apríl 1987 um dagpening í samband við barnsburð og sjúku verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 8, stk. 1 verður orðað soleiðis:

»Henda løgtingslóg fær gildi 1. oktober 1987. Persónar, sum tá henda lóg kemur í gildi, fáa dagpening sambært teimum higartil galdandi reglunum, meðan teir eru burturstaddir eitt samanhangandi tíðarskeið vegna tað, at kvinnan er við barn ella hevur átt, verða framhaldandi at fáa dagpening eftir reglunum í hesi lóg.«

2) § 8, 2. stk. verður orðað soleiðis:

»Kvinnan, ið hevur átt í einum tíðarskeiði upp til 8 vikur, áðrenn lógin fær gildi, og sum ikki kemur undir kapittul 6 í dagpeningalógini, hevur rætt til dagpening eftir reglunum í hesi lóg, soleiðis at tíðin frá føðingini, til lógin fær gildi, verður frádrigin samlaða dagpeningatíðarskeiðinum sambært lógini.«

lagtingslog om ændring i lagtingslog om dagpenge ved barsel og sygdom.

§ 1.

I lagtingslov nr. 25 af 12. april 1987 om dagpenge ved barsel og sygdom foretages følgende ændringer:

1) § 8, stk. 1 affattes således:

»Denne lagtingslov træder i kraft 1. oktober 1987. Personer, der ved lovens ikrafttræden modtager dagpenge efter de hidtidige regler under en løbende fraværsperiode på grund af svangerskab eller fødsel, overgår til at modtage dagpenge efter bestemmelserne i denne lov.«

2) § 8, stk. 2 affattes således:

»Kvinde, som har født i en periode indtil 8 uger før lovens ikrafttræden, og som ikke er omfattet af kapitel 6 i dagpengeloven, er berettiget til dagpenge efter reglerne i denne lov, således at perioden fra fødselen til lovens ikrafttræden bliver fradraget den samlede dagpengeperiode ifølge loven.«

3) 2. og 3. stk. verða 3. og 4. stk.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi 1. oktober 1987.

3) Stk. 2 og 3 bliver stk. 3 og 4.

§ 2.

Denne lagtingslog træder i kraft 1. oktober 1987.

Viðmerkingar:

Í samband við, at blokkstuðulsskipanin kemur í gildi 1. januar 1988, verða flest allar av teimum donsku sosiallógunum, sum eru galdandi í Føroyum broyttar, so tær eru í samsvar við blokkstuðulsskipanina.

Soleiðis sum § 8, stk. 1 í løgtingslóg nr. 25 frá 13. apríl 1987 nú er orðað, hava tær kvinnur sum *eiga* tann dagin, lógin kemur í gildi ella seinni, rætt til dagpening sambært lógina (í 20/24 vikur).

Tilsvarandi regla i Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel § 18, stk. 2 ásetir, at tær kvinnur, sum tann dagin lógarbroytingin kemur í gildi, hava *rætt til dagpening* sambært § 18, stk. 1 í samband við, at tær eru við barn, eisini hava rætt til dagpening sambært lógina, aftaná at tær hava átt (20/24).

Broytingin av skiftiregluni í § 8, stk. 1 umfatar einans útiarbeiðandi kvinnur. Løgtingslóg nr. 25 frá 13. apríl 1987 er rúmari enn tann danska lógin, við tað at hon gevur eisini heimaarbeiðandi kvinnum rætt til dagpening í samband við barnsburð. Fyri at skiftisreglan ikki skal viðføra munum á rættindunum hjá heimaarbeiðandi og útiarbeiðandi kvinnum, er nýtt 2. stk. sett í § 8 í løgtingslógini.

Skiftisreglan í § 8, 2. stk. viðførir, at ein heimaarbeiðandi kvinna, ið t.d. eigur 1 viku, áðrenn lógin fær gildi, fær dagpening í 19 vikur (20 : 1), meðan ein heimaarbeiðandi kvinna, ið t.d. eigur 5 vikur, áðrenn lógin fær gildi, fær dagpening í 15 vikur (20÷5) o.s.fr., at rokna frá tí degi lógin fær gildi.

Sambært § 7 í løgtingslóg nr. 25 frá 13. apríl 1987 ber landskassin allar útreiðslurnar til dagpening og eykadagpening eftir løgtingslógini. Hagtøl finnast ikki í størri mun, men Almannastovan metir, at broytingin av skiftisregluni í § 8, 1. og 2. stk. í løgtingslógini kemur at kosta landskassanum 2,7 mill. sum eingangsútreiðsla.

Broytingin í hesi løgtingslógini, sum er ein yvirbygningur á donsku lógini, er ein neyðug broyting, sum viðførir, at reglurnar í báðum lógunum, um hvørjir persónar hava rætt til dagpening í samband við barnsburð verða einsljóðandi, og at heimaarbeiðandi kvinnum verða tryggjað somu rættindi til dagpening í samband við barnsburð sum útiarbeiðandi kvinnum.

1. viðgerð 3. august. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunum 1: Ymsar lógir at seta í gildi innan almannaverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini, 2: Ymsar lógir at seta í gildi innan heilsuverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini, 3: Ymsar lógir at seta í gildi innan undirvísingarverkið í samband við

broyting í stuðulsskipanini og 5: Lóg um yvirtøku av serforsorgini í Føroyum.

Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 31. august legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð framlagt av Føroya Landsstýri hin 31. juli 1987 og eftir 1. viðgerð hin 3. august 1987 beint í løgtingsins almanna- og heilsunevnd.

Hin 13. apríl 1987 varð dagpeningalógin broytt soleiðis, at dagpeningatíðin við sjúku varð longd úr 13 vikum upp í 20 vikur. Henda lógarbroyting snýr seg um skiftisreglur í samband við, at dagpeningalógin skal broytast soleiðis, at frá 1. oktober 1987 skal veitast øllum kvinnum, ið fáa børn, fulla dagpeningaupphædd í 20 vikur. Eftir 1. juli 1988 verður tíðin 24 vikur. Tað, sum er serligt við hesi lógarbroyting er, at heimaarbeiðandi kvinnur verða javnstillaðar við útiarbeiðandi kvinnur. Viðvíkjandi heimaarbeiðandi mammum gongur hetta lógaruppskot longri enn í hinum norðurlondunum. Harumframt føra skiftisreglurnar í hesi lógarbroyting við sær, at mammur, sum 1. oktober 1987 fáa dagpening, koma undir lógina, tað vil siga eisini tær, sum hava átt, áðrenn lógin kom í gildi. Hetta sama er galdandi fyri mammur utlan inntøkur.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Karin Kjølbro, Jákup Lindenskov, Tordur Niclasen og Jógvan Sundstein) mælir løgtinginum til at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein minniluti (Flemming Mikkelsen) vísir á sínar viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 1/1987: Ymsar lógir at seta í gildi innan almannaverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini.

2. viðgerð 23. september. § 1 varð samtykt við 22-0 atkvøðum, § 2 samtykt við 21-0 atkvøðum. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

F. L. j.nr. 1010-12-2-4. Lóg nr. 86 frá 2. oktober 1987.

5 Lóg um yvirtøku av serforsorgini í Føroyum.

Ár 1987, mánadagin 3. august legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið mælir til, at hetta uppskot til lóg verður sett í gildi í Føroyum:

Uppskot til lóg »om udlægning af særforsorgen m.v. på Færøerne«.

Viðmerkingar:

Síðan 1978 hevur verið arbeitt við, at heimastýrið eftir § 9 í heimastýrislógini yvirtekur umsitingina av serforsorgini í Føroyum.

Arbeitt hevur verið við málinum í tveimum nevndum, og er ætlanin nú, at yvirtøkan verður framd samstundis sum blokkstuðulsskipanin, sí løgtingsmálini nr. 1, 2 og 3/1987, t.v.s. frá 1. januar 1988.

Landsstýrið vísir annars til lógaruppskotið og viðmerkingarnar.

Sí skjal 6.

3. august var uttan atkvøðugreiðslu loyvi givið at víkja frá tíðarfreistini at viðgera málið, sum síðani varð viðgjørt saman við tingmálunum 1: Ymsar lógir at seta í gildi innan almannaverkið í sambond við broyting í stuðulsskipanini, 2: Ymsar lógir at seta í gildi innan heilsuverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini, 3: Ymsar lógir at seta í gildi innan undirvísingarverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini, 4: Broyting í løgtingslóg um dagpening í sambund við barnsburð og sjúku.

Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 31. august legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt av Føroya Landsstýri hin 3. august 1987 og varð við 1. viðgerð sama dag beint í almanna- og heilsunevndina.

Í viðmerkingunum til uppskot sigur landsstýrið at síðan 1978 hevur verið

arbeitt við at yvirtaka umsitingina av serforsorgini í Føroyum sambært § 9 í heimastýrislógini. Um hetta sama mundi hendi tann broyting viðvíkjandi serforsorgini í Danmark, at amtskommununurnar yvirtóku hetta øki frá 1. januar 1980.

Serforsorgin í Føroyum varð tó eitt verandi felagsmál. Í samband við at blokkstuðulsskipanin fer at virka frá 1. januar 1988 er so eisini ætlanin, at serforsorgin verður yvirtikin. Hetta mál kom til 1. viðgerð á tingi sama dag, sum tað varð framlagt, saman við hinum lógarbroytingunum viðvíkjandi heilsuverkinum, almannaverkinum og skúlaverkinum.

Ymiskir spurningar stungu seg upp undir 1. viðgerð, og verða tí við hesum gjørdar nakrar viðmerkingar til broytingina um serforsorgina sum føroyskt málsøki.

Allar ognir, økir, innbúgv og rættindi verða yvirtikin ókeypis. Øll starvsfólk, ið arbeiða í føroysku serforsorgini við árslok 1987, fáa tilboð um framhaldandi arbeiði. Eisini skulu gerast avtalur um setanar-, lønar- og pensjónsviðurskifti.

Í uppskotinum § 4, stk. 1 verður sagt, at heimastýrið bjóðar statstænastumonnum lønar- og eftirlønarvilkor, ið svara til vilkor, sum eru galdandi fyri viðkomandi statstænastumenn, ið settir eru undir statinum.

Úr landsstýrinum verður upplýst, at fíggjarmálaráðið í Danmark tulkar hesa grein soleiðis, at heimastýrið eisini framyvir verður bundið av donskum reglum, um tað møguliga í framtíðini verður munur millum lønar- og eftirlønarsemdir hjá tænastumonnum í ávikavist Danmark og Føroyum.

Almanna- og heilsunevndin mælir tí til, at henda grein verður broytt.

Møguleiki verður áhaldandi, um tørvur er fyri tí, at vísa fólki við serligum breki til danskar stovnar, um hóskandi møguleikar ikki eru í Føroyum.

Serforsorgin hevur til endamáls at veita hjálp til viðgerð, undirvísing, upplæring, arbeiði og harumframt økta umsorgan til fólk við serligum likamligum ella sálarligum brekum. Stovnarnir, ið skulu taka sær av hesum, skulu rekast av Føroya Landsstýri.

Hin 1. januar 1988 yvirtekur Føroya Landsstýri hesar stovnar:

1) Deildirnar á Eirargarði 14-16,
2) Pensiónatið í Hoyvík,
3) Verkstaðið Vón á Argjum og
4) Sosialu deildina (Andveikraverndin).

Føroya Landsstýri yvirtekur 1. janur 1988 raksturin av Føroya Specialskúla við tveimum næmingaheimum eins og frítíðar- og umlættingarheimið. Hesir stovnar verða sjálveigandi stovnar.

Føroya Landsstýri fór longu í 1985 undir at fíggja fleiri tiltøk undir serforsorgini. Peningur hevur verið játtaður bæði til raksturin av andveikraverndini, eitt nú raksturin av bústovninum á Gerðisvegi í Runavík. Á fíggjarlógini fyri 1987 eru játtaðar 3,8 mió. kr. til raksturin av andveikraverndini og 5,5 mió. kr. til íløgur og bygging.

Nýggjur stovnuar skal byggjast í Runavík, eins og vardir verkstaðir í Klaksvík og Vági eru í umbúna. Hesir verða riknir eftir reglunum í verandi avlamispensjón.

Á fíggjarlógini 1987 vórðu eisini settar av 60.000 kr. til tess at kanna tørvin á verkstøðum og bústøðum til evnaveik í Føroyum. Peningurin verður eisini latin til rakstur av deyvahúsinum eins og til raksturin av Sólteigi, sum Sinnisbatí rekur. Harumframt er eisini peningur avsettur til rakstur av nýggja blindahúsinum. Samanum tikið kann sigast, at blokkurin tryggjar serforsorgini tann pening, ið higartil hevur verið latin úr ríkiskassanum. Í tráð við blokkstuðulsskipanina koma vit tó sjálvi at gjalda tað, ið restar í í verandi virksemi, eins og vit skulu gjalda tað nýggja, sum er ætlað at seta í verk.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Karin Kjølbro, Jákup Lindenskov, Tordur Niclasen) mælir tingi num til at samtykkja uppskot landsstýrisins, men setir fram soljóðandi:

broytingaruppskot

Í »lov om udlægning af særforsorgen m.v. på Færøerne« ganga í § 4, stk. 1, út orðini: »at regne med løn- og tjenestevilkår, der svarer til de for de pågældende statstjenestemænd under ansættelsen i staten gældende.

Ein minniluti (Flemming Mikkelsen) vísir til viðmerkingar sínar í løgtingsmáli nr. 1/1987: Ynsar lógir at seta í gildi innan almannaverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini.

2. viðgerð 23. september. Við 22-0 atkvøðum varð málið beint aftur í almanna- og heilsunevndina, sum á seinni fundi sama dag legði fram soljóðandi:

Uppískoytisálit

Almanna- og heilsunevndin legði fram álit á løgtingsfundi tann 31. august 1987.

Meirilutin setti fram broytingaruppskot til § 4, 1. stk. í lógaruppskotinum í tí líki, sum tað var lagt fram av landsstýrinum.

Aftaná hava samráðingar verið millum almannamálaráðið, lønar- og pensjónsdeildina hjá fíggjarmálaráðnum og landsstýrið.

Almannamálaráðið hevur hereftir evnað til nýtt lógaruppskot, sum er dagfest september 1987, og sum landsstýrið hevur tikið undir við.

Nýggja lógaruppskotið, ið fylgir við, hevur umframt smærri málsligar (redaktionellar) broytingar eina nýggja orðing av § 4, 1. stk., ið gongur ynskjum hjá meirilutanum á møti.

Ein samd almanna- og heilsunevnd tekur undir við nýggju ordingini og mælir tinginum til at samtykka soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið mælir til, at hetta uppskot til lóg verður sett í gildi í Føroyum:
Uppskot til lóg »om udlægning af særforsorgen m.v. på Færøerne« dagfest september 1987.

23. september framhaldandi 2. viðgerð. Uppskot landsstýrisins burturfallið.
Uppskot nevndarinnar, álit II, samtykt við 19-0 atkvøðum.
F.L. j.nr. 911-2-9.

6. Fíggjarløgtingslóg 1988.

Ár 1987, mánadagin 31. august legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram uppskot til fíggjarløgtingslóg 1988.

Sí skjal nr. 7 A.

Viðmerkingar

Hetta er fyrsta uppskot til fíggjarløgtingslóg, sum verður gjørt síðan løgtingið samtykti at skipa danska stuðulin sum eina heildarveiting (blokkstuðul).

Nýggja skipanin hevur stórar broytingar við sær á fíggjarlógini.

Heildarveiting verður bókað sum inntøka á inntøkusíðuni, somuleiðis endurgjaldið fyri almannaveitingar.

Á útreiðslusíðuni eru hókaðar tær samlaðu útreiðslurnar. Hetta førir við sær, at tað eru nógv nýggj rakstrarstøð innan skúla-, heilsu- og almannaverkið.

Uppskotið til fíggjarløgtingslóg fyri 1988 javnvegar nú við *2.821.335.000 kr.*

Tað er torført at sammeta hetta fíggjarlógaruppskotið við uppskotini árini frammanundan.

Fyrst og fremst er fíggjarlógaruppskotið økt við tí upphædd, sum svarar til heildarveitingina og endurgjaldið.

Annars eru útreiðslurnar nakað hækkaðar.

Tað hevur verið arbeitt við at høta um umsitingina, miðspjaðing av líkningarráðnum og arbeiðseftirlitinum, eins og tolldeild er stovnað fyri seg.

Hækkingar í lønunum hækka nakað um útreiðslurnar, tí lønirnar eru so stórur partur av útreiðslum stovnanna.

Somuleiðis eru lógir samtyktar í vár á almannaøkinum um harnastyrk, longri barnsburðarfrí, og til heystar hækka pensjónirnar.

Eisini á uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri 1988 er lagt væl í grunnar, til endurnýggjan skipaflotans og veðhaldsgrunn, hóast ikki so nógv sum árini frammanundan. Annars er lagdur peningur av til íløgur á sjúkrahúsverkinum, skúlaøkinum og almannaøkinum eins og til landsverkfrøðingin.

Eisini hetta fíggjarlógaruppskot javnvigar uttan lántøku.

Inntøkurnar fyri 1988 eru mettar útfrá tí virksemi, sum er í landinum í dag við óbroyttum skatta- og tolllógum, og hædd er tikin fyri lønarhækkingum og prísvøkstri í samfelagnum.

Tað er ringt at meta um inntøkurnar í komandi ári, men út frá teimum upplýsingum og metingum, sum vit í løtuni hava, eru inntøkurnar varisliga mettar.

Undanfarnu uppskot til fíggjarløgtingslóg, sum hetta landsstýrið hevur lagt fyri tingið, hava verið merkt av, at landsstýrið hevur skula vent einum undirskoti á fíggjarlógini til eitt yvirskot, eins og arbeitt hevur verið uppá, at fáa viðurskiftini í rættlag í teim grunnum, sum so ógvusliga hava verið yvirtrektir, og játta neyðugan pening til at standa ímóti teim tapum, vit hava verið fyri.

Við hesum arbeiði er eydnast so mikið væl, at nú merkist hetta aftur á gjaldføri landskassans soleiðis, at landskassin nú kann svara hvørjum sítt til tíðina og harvið spara stórar rentuútreiðslur.

Á hesum fíggjarlógaruppskoti kann rættiliga sigast, at politikkur samgongunnar kemur til sjóndar.

Fylgiskjølini til fíggjarløgtingslógar uppskotið 1988 eru til skjals á landsskrivstovuni, løgtingsskrivstovuni og landsbókasavninum.

1. viðgerð 29. og 30. september. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 14. december 1987 legði fram soljóðandi.

Álit

Sí skjal nr. 7 B og C.

2. viðgerð 16. december 1987 av løgtingsmáli nr. 6/1987: Fíggjarløgtingslóg 1988.

Fyrst kom til atkvøðugreiðslu broytingaruppskotið frá Fólkaflokkinum.
§ 1 fall við 7-0,
§ 2 fall við 8-0,
§ 3 fall við 7-0,
§§ 4 og 5 vórðu útsettar til atkvøðugreiðsluna saman við meirilutatilráðingini.
§ 6 fall við 7-0,
§§ 7, 8 og 9 er útsettar til viðgerð av meirilutatilráðingini vegna samanfallandi tilráðing.
§ 10 fall við 8-0,
§ 11 fall við 8-0,
§ 12 fall við 8 0,
§ 13 fall við 7-0,
§ 14 fall við 8-0,
§ 15 fall við 8-0,
§ 16 fall við 8 0,
§ 17 fall við 8-0,
§ 18 fall við 7-0,
§ 19 fall við 7-0,
§ 20 fall við 8-0,
§ 21 varð útsett til viðgerð av meirilutatilráðingini,
§ 22 fall við 8-0,
§ 23 fall við 8-0,
§§ 24, 25 og 26 fall saman við meirilutatilráðingini,
§ 27 fall við 7-0,

Uppskot Sambandsfloksins og meirilutans í fíggjarnevndini komu undir felags atkvøðugreiðslu.
Meirilutans § 1 samtykt við 19-0,
§ 2 frá meirilutanum samtykt við 25-0,
§ 3 frá meirilutanum samtykt við 26-0,
§ 4 frá meirilutanum samtykt við 31-0,
§ 5 frá meirilutanum samtykt við 31-0, Broytingaruppskot frá Sambandsflokinum í fíggjarnevndini § 6, konto 6014 fall við 8-0, konto 6033 fall við 8-0,
§ 6 frá meirilutanum samtykt við 23-0,
§ 7 frá meirilutanum samtykt við 31-0,
§ 8 frá meirilutanum samtykt við 31-0,
§ 9 frá meirilutanum samtykt við 31-0,
§ 10 uppskot frá meirilutanum samtykt við 18-0,

§ 11 broytingaruppskot frá sambansflokkinum, konto 11053 fall við 9-0, konto 11257 fall við 8-0, konto 11359 fall við 8-0, konto 11447 fall við 8-0, konto 11452 fall við 8-0, konto 11709 fall við 8-0, konto 11725 fall við 7-0.

Uppskot frá meirilutanum konto 11053, 11257, 11447, 11452 samtykt við 18-0, konto 11661 samtykt við 24-0, konto 11758 samtykt við 25-0.

§ 12 broytingaruppskot frá Sambandsflokkinum konto 12109 fall við 7-0, konto 12009 samtykt við 29-0. Viðmerking til konto 12009 varð atkvøtt við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu:	Ivan Johannesen, Johannes Martin Olsen, Jørgen Thomsen, Ashjørn Joensen, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Adolf V. Hansen, Tordur Niclasen.
Nei atkvøddu:	Eliesar Arge, Jógvan Sundstein, Poul Michelsen, Eilif Samuelsen, Henrik Old, Gisley Dalh Bonde, Jona Henriksen, Hilmar Kass, Karin Kjølbro, Hans Jacob Debes.
Atkvøddu ikki:	Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Svend Aage Ellefsen, Eyðun Viderø, Pauli Ellefsen, Flemming Mikkelsen, Agnar Nielsen, Jógvn Olsen, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Gullak Gullaksen, Tummas Arabo, Heini O. Heinesen, Øssur av Steinum.

Konto 12109 við viðmerking frá meirilutanum: samtykt 18-0, Konto 12202 og 12310 samtyktar við 18-0. § 13: Uppskot frá Sambandsflokkinum konto 13037 fall við 7-0, konto 13089 fall við 7-0, uppskot frá meirilutanum samtykt við 18-1.

§ 14: Uppskot frá Sambandsflokkinum konto 14953/313319 fall við 7-0. Greinin sett til 370.000.000 fall við 7-0. Uppskot frá meirilutanum samtykt við 19-0, § 15 Uppskot frá Sambandsflokkinum konto 15406 fall við 8-0, konto 15907/323331 fall við 8-0, viðmerking til somu konto fall við 8-2. Konto 15907/323364 fall við 10-1. Konto 15907/373305 fall við 7-0. Uppskot frá meirilutanum samtykt við 17-0.

§ 16 Uppskot frá Sambandsflokkinum konto 16904/333017 fall við 9-0, konto 16904/333082 fall við 8-0. Uppskot frá meirilutanum konto 16904/333017 samtykt við 30-0. Greinin samlað samtykt við 23-0.

§ 17 uppskot frá Sambandsflokkinum konto 17103 fall við 7-0, konto 17205 fall við 7-0. Uppskot frá meirilutanum samtykt við 18-0.

§ 18 Uppskot frá Sambandsflokkinum konto 18907/35083 fall við 8-0. uppskot frá meirilutanum konto 18202 samtykt við 21-1, konto 18337 samtykt við 19 atkvøðum fyri, 3 neiatkvøðum, 10 atkvøddu ikki. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu:	Flemming Mikkelsen, Jógvan Olsen, Johannes Martin Olsen, Henrik Old, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Gisley Dal Bonde, Jona Henriksen, Gullak Gullaksen,

Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Hilmar Kass, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes.

Nei atkvøddu: Eliesar Arge, Óli Breckmann, Poul Michelsen,

Atkvøddu ikki: Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Svend Aage Ellefsen, Eydun Viderø, Pauli Ellefsen, Ivan Johannesen, Agnar Nielsen, Eilif Samuelsen, Asbjørn Joensen, Adolf V. Hansen.

Konto 18356 samtykt við 17-0. Greinin samtykt við 17-0. § 19: Uppskot frá Sambandsflokkinum, konto 19062 fall við 7-0, uppskot frá meirilutanum konto 19061 og 19062 samtykt við 30-0, konto 19904/363549 samtykt við 22-0, konto 19904/363731 og 19904, nýtt nr. FPV samtykt við 18-0. Greinin samtykt við 18-0.

§ 20: Meirilutans uppskot: Samtykt við 20-0,
§ 21: Samtykt við 20-0,
§ 22: Samtykt við 18-0,
§ 23: Samtykt við 19-0,
§ 24: Samtykt við 19-0,
§ 25: Samtykt við 19-0,
§ 26: Samtykt við 19-0,
§ 27: Samtykt við 19-0,.
§§ 30-45: Samtyktar við 17 0.

Við 32-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt.

Karin Kjølbro, Hans J. Debes, Gisley Bonde, Hilmar Kass og Henrik Old løgdu fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

§ 18 — konto 19904 Ymsir studningar
Nýtt nr. F.P.V. Fosturtøkufyribyrging:

Ráðgeving og upplýsing ..... kr. 200.000.

Tekstur og upphædd verður strikað.

Fíggjarnevndin legði fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

Í álitinum frá meirilutanum í fíggjarnevdini undir § 18, konto 18109 verður ordingin strikað, og í staðin fyri upphæddina: »kr. 2.731.000« verður sett: »kr. 2.899.000«.

3. viðgerð sama dag á seinri fundi.

Broytingaruppskotini vóru samtykt við 19-0 atkvøðum.

Fíggjarløgtingslógin soleiðis broytt endaliga samatykt við 18-0 atkvøðum og avgreidd.

F.L. j. nr. 400- . Lóg nr. 103 frá 17. december 1987.

7. Partapeningur í flakavirkið í Skopun.

Ár 1987, mánadagin 31. august legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um partapening í P/F Sólarris.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 800.000 kr. í partapeningi í P/F Sólarris, ið rekur flakavirki í Skopun, og at leggja peningin út úr landskassanum.

lagtingslov om aktier i aktieselskabet Sólarris.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i aktieselskabet Sólarris, der driver filétfabrik i Skopun med et beløb på indtil 800.000 kr. i aktiekapital, og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ 2. Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.

§ 2. Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales, før alle bestemmelser, landsstyret måtte stille, er opfyldt.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Partafelagið Sólarris í Skopun hevur biðið um, at landskassin setur nýggjan partapening í felagið, 800.000 kr., sum er 20 % av tí ásetta partapeninginum. Partapeningurin er ásettur til 4.000.000 kr. Teir, ið skulu tekna tann nýggja partapeningin umfrant landskassan, eru:
Skopunar bygdarráð við 1.400.000 kr.
Skopunar Arbeiðsmannafelag og Skopunar Arbeiðskvinnufelag 1.400.000 kr. og P/F Sjóvinnubankin við 400.000 kr.

Umbyggingin av virkinum er ein liður í eini «rekonstruktión«, sum er gjørd í samráð við landsstýrið. Upprunaligi partapeningurin verður niðurskrivaður til 0.

Útbyggingin er mett at kosta 22.000.000 kr.

Viðvíkjandi spurninginum um rávøru er at viðmerkja, at fleiri útróðrarbátar eru í Skopun. Við teimum bátum og skipum, sum eru í Skopun ella loyvi eru fingin til, er rávørugrundarlagið tryggjað. Landsstýrið heldur tað vera rætt at stuðla ætlaða tiltakið og seta upp til 800.000 kr. í felagið sum partapening.

1. viðgerð 1. oktober. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 24. februar legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 31. august 1987 og eftir fyrstu viðgerð 1. oktober beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd fíggjarnevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 1. mars 1988. § 1 samtykt við 27-0, § 2 við 27-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 22. mars. Málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1413-1-70. Lóg nr. 24 frá 22. apríl 1988.

8 Alment kunngerðablað.

Ár 1987, týsdagin 29. september legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um alment kunngerðarblað.

§ 1. Frá 1. oktober 1988 stílar landsstýrið fyri útgávu av einum almennum kunngerðahlaði: Kunngerðablaðið.

§ 2. Í kunngerðarblaðið skulu allar løgtingslógir og kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur givnar av landsstýrinum lýsast.
2. stk. Í kunngerðablaðið kunnu eisini upptakast:

a. Lýsingar, fráboðanir o.t. frá tí almenna
b. Kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur frá øðrum almennum stovnum enn landsstýrinum og fráboðanir frá privatum í rættarviðurskiftum.

§ 3. Frá 1. oktober 1988 er lýsingin í Kunngerðablaðnum einasti bindandi kunngerðarhátturin av løgtingslógum v.m. eftir § 2, 1. stk. Verða tær í § 2, 2. stk. nevndu kunngerðir v.m. lýstar í kunngerðablaðnum, hevur lýsingin sama lóggildi sum lýsing av løgtingslógum v.m., hesin kunngerðarháttur er tó eigin treyt, um viðkomandi løgtingslóg sjálv ikki krevur hann.

lagtingslog om en offentlig kunngørelsestidende.

§ 1. Fra 1. oktober 1988 udgives ved landsstyrets foranstaltning en offentlig kundgørelsestidende: »Kunngerðablaðið«.

§ 2. I »Kunngerðablaðið« indføres såvel alle lagtingslove som kundgørelser, reglementer og andre offentlige forordninger udstedt af landsstyret.
Stk. 2. I »Kunngerðablaðið« kan også indføres:

a Annoncer, meddelelser o.l. fra det offentlige.
b. Kundgørelser, reglementer og andre offentlige forordninger i det hele taget fra andre offentlige institutioner end landsstyret, samt meddelelser fra private i retsforhold.

§ 3. Fra 1. oktober 1988 er optagelsen i »Kunngerðablaðið« den eneste bindende kundgørelsesmåde for lagtingslove m.v., som nævnt i § 2, stk. 1. Såfremt de i § 2, stk. 2 nævnte kundgørelser m.v. optages i »Kunngerðablaðið«, har optagelsen samme lovkraft som optagelse af lagtingslove m.v., denne kundgørelsesmåde er dog ingen betingelse, med mindre den er foreskrevet af vedkommende lagtingslov.

2. stk. Tá ið eink stendur tilskilað í løgtingslógini v.m., kemur hon í gildi vikudagin eftir dagin, tað nummarið av Kunngerðarblaðnum, sum hon stendur í, er givið út.

§ *4.* Kunngerðablaðið kemur út so ofta tørvur er, tó í minsta lagi eina ferð hvønn mánað.
2. stk. Hvørt nummar skal tilskila dagin, tað kemur út.

§ *5.* Alt yvirvald, sorinskrivarin, postverk og kommunustýrir frá ókeypis eintak av Kunngerðablaðnum.

§ *6.* Landsstýrið fyriseur gjøllari reglur fyri útgávuni, útsjónd, haldaragjald, lýsingarprís o.t. eins og landsstýrið gevur út Kunngerðasavn har tær løgtingslógir v.m. nevndar í § 2, 1. stk. verða upptiknar. Eisini kunnu kunngerðirnar v.m. eftir § 2, 2. stk. og lógirnar v.m. eftir § 7, takast við í savnið.

§ *7.* Landsstýrinum er heimilt eftir avtalu við ríkisstýrið ella ríkismyndugleikar og aðrar myndugleikar í Kunngerðablaðnum at upptaka lógir, kunngerðir, lýsingar o.t.

Stk. 2. Med mindre andet er foreskrevet i vedkommende lagtingslov m.v., træder denne i kraft ugedagen efter det nummer af »Kunngerðablaðið«, som denne er optaget i, er udkommet.

§ *4.* »Kunngerðablaðið« udkommer så ofte, som der er behov herfor, dog mindst en gang om måneden.
Stk. 2. Hvert nummer skal angive udgivelsesdagen.

§ *5.* Al øvrighed, sorenskriver, postvæsen og kommunalbestyrelser får tilstillet eksemplar af »Kunngerðablaðið« uden betaling.

§ *6.* Landsstyret foreskriver nærmere regler for udgivelsen, udseende, abonnement, annoncepriser o.l. Ligeledes udgiver landsstyret et »Kunngerðasavn«, hvori optages de lagtingslove m.v. omhandlet i § 2, stk. 1. Kundgørelserne m.v. efter § 2, stk. 2, og lovene m.v. efter § 7, kan endvidere optages i samlingen.

§ *7.* Landsstyret bemyndiges til efter aftale med regeringen eller rigsmyndighederne og andre myndigheder at optage i »Kunngerðablaðið« love, kundgørelser, meddelelser o.l.

Viðmerkingar:

Málið um alment lýsingartýðindi fyri Føroyar er viðgjørt í løgtingssetunum 1918, 1932, 1937, 1963, 1964, 1965, 1979 og 1981.

Eftir lóg nr. 51 frá 1. apríl 1896 »om kundgørelse af love og anordninger på Færøerne« verða ríkislógir og ministerieller fyriskipanir, hvat tær so eru nevndar, umframt í »Lovtidende« eisini kunngjørdar í tí blaðnum í Føroyum, sum hevur fingið góðkenning at lýsa almennar kunngerðir. Síðani 10. juli 1879 hevur Dimmalætting havt hesa góðkenning. Umframt verða lógirnar v.m. framlagdar

á fyrsta vanliga tingdegi í Tórshavn aftaná kunngerðina, jbr. § 2 í lógini.

Meðan kunngerð í almenna kunngerðablaðnum er ein treyt fyri lóggildi, er tinglesingin tað ikki. Undir krígnum var rættarfylgjan bert knýtt at kunngerðini í almenna kunngerðablaðnum, jbr. fyribils kunngerð nr. 2 frá 9. mai 1940.

Tilsvarandi reglur hvussu løgtingslógir og kunngerðir v.m. frá landsstýrinum skulu lýsast eru ikki, tó sigur § 3, 1. stk. í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum, at løgmaður staðfestir og kunnger løgtingslógirnar, eingi verður sagt um kunngerðirnar ella kunngerðaháttin.

Hóast tað eftir hesum ongar skrivaðar reglur eru um kunngerðarháttin, eru ikki bert løgtingslógir, men eisini kunngerðir alment lýstar í kunngerðarblaðnum av landsstýrinum, síðani heimastýrið tók við, og er hetta helst gjørt eftir einari analogi frá 1896-lógini. Landsstýrið hevur sostatt kent seg bundið av meginregluni, at lógir og aðrar almennar fyriskipanir skulu lýsast, áðrenn tær eru bindandi fyri borgararnar, jbr. eisini § 22 í grundlógini.

Skipanin higartil hevur í vissum førum verið fyri atfinningum. Í mongum førum eru størri lógir lýstar soleiðis, at tær í brotum eru tiknar í fleiri fylgjandi nummur, eins og tá fleiri lógir hava ligið fyri til lýsingar, hava tær ikki allar kunnað komið við beinanvegin.

So hvørt sum kunngerðatilfarið veksur, at so er sæst av teimum seinastu kunngerðasøvnunum, eru lýsingarnar helst meira ein byrða enn fyrimunur fyri blaðið, lýsingarnar eru ókeypis, haraftrat kann sigast, at tað er prinsipielt skeivt at lata uppgávuna til ávíst blað, tí bløðini her eru øll meira ella minni politiskt litað. Náttúrligt er tí, at tann tankin er framkomin, at landsstýrið sjálvt skipar fyri einum almennum kunngerðablaði, við tí rættarfylgju, at lýsingin í hesum er hin bindandi kunngerðahátturin. Nú eru eisini aðrar almennar frásagnir enn løgtingslógir og kunngerðir frá landsstýrinum, har verður serliga hugsað um lýsingar frá kommununum. Tað er uttan iva ein fyrimunur bæði fyri hann, ið lýsir, og fyri fólk, at tey vita, at hesar lýsingar kunnu lýsast í blaðnum, sum ber boðini um galdandi lógargrundarlag. Ætlanin er tí, at blaðið skal vera eitt lýsingarblað hjá øllum almennum stovnum.

Skulu ríkislógir og ministeriellar kunngerðir lýsast í kunngerðublaðnum, krevst broyting í galdandi skipan, tó ikki lógarbroyting. Skipanin eigur helst at verða broytt soleiðis, at alt lógatilfar verður lýst í tí blaðnum, sum bert er til tað sama.

Hvussu blaðið er ætlað skipað, er ikki tikin endalig støða til enn, men helst verður avtala gjørd við onkra prentsmiðju aftaná útbjóðing.

---

ad § 3.

Meðan lógirnar v.m. nevndar í § 2, 1. stk. skulu lýsast í Kunngerðablaðnum og bert tá fáa lóggildi, so eru ongi tilsvarandi krøv fyri kunngerðunum eftir § 2,

2. stk. uttan so, at viðkomandi lóg krevur tað. Tó eigur at verða so, at flest møguligar eisini av hesum kunngerðum eru at finna í Kunngerðablaðnum.

Eftir § 3 í lóg nr. 51 frá 1. apríl 1896 fáa ríkislógir og fyriskipanir fyrst gildi 4 vikur eftir dagin, tær hava verið lýstar í almenna kunngerðablaðnum, um tær ikki siga annað. Í lóggávuni á løgtingi er tað vanligt, at lógirnar sjálvar siga, nær tær koma í gildi, antin beinanvegin ella ávísan dag. Sigur lógin einki, er sambandið oyggjanna millum nú so í mun til, hvat tað var í 1896, at eftir viku skuldi Kunngerðablaðið vanliga kunna verið úti um bygdirnar. Spurningurin um at geva lógum gildi afturút verður at loysa eftir vanligum rættargrundreglum.

ad § 6.

Tá ið annað tilfar enn lógartilfar kann takast við í Kunngerðablaðið, er tað tørvur á savni, har bert lógir, kunngerðir o.t. verða savnað, eins og Kunngerðasavnið, landsskrivstovan (løgtingsskrivstovan) hevur skipað fyri síðan 1940. Upptøkan í Kunngerðasavninum hevur sum higartil onga rættarfylgju.

1. viðgerð 1. oktober. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 17. november legði fram soljóðandi:

Sí skjal 8.

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum 29. september 1987 og eftir 1. viðgerð 1. oktober beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Hans Jacob Debes og Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Eilif Samuelsen) førir fram:

Hetta uppskotið er enn eitt dømi um, hvussu henda samgongan og hennara líkasinnaðu líðandi, men miðvist marva støðið undan framtíðar føroyska vinnulívinum við at økja tær almennu útreiðslurnar við enn einum óneyðugum stovni, sum fer at kosta skattaborgarunum hundraðtúsundtals krónur í árligum útreiðslum.

Høvið til at leggja málið fyri tingið á hesum sinni er fingið til vega við einum skrivi frá Føroya Advokatfelag, har teir klukka um, at ríkislógir einans verða kunngjørdar við eini lítlari fráboðan í Dimmalætting, uttan at advokatarnir

harvið hava møguleika fyri at siggja veruleika innihaldið í lógini. Haraftrat sigur felagið, at skipanin er fløkt, og at ofta er ivi um, hvørjar lógir veruliga eru settar í gildi í Føroyum, og annars hvat galdandi rættur er.

Nú er at vóna, at advokatstættirin í roynd og veru er meira at sær komin, enn hvat ið framgongur av skrivi advokatfelagsins.

Ein áheitan til Føroya landsstýri ella Ríkisumboðið hevði útvegað einum og hvørjum advokati og øðrum áhugaðum eitt yvirlit yvir, hvat ið myndugleikarnir hava sett í gildi, og har hevði eisini fingist fotokopi av øllum ríkislógum og øðrum fyriskipanum, um so er, at avvarðandi advokatur ella áhugað ikki regluliga útvegar sær Lovtidendo ella onnur rit, ið kunna um lógir og aðrar almennar fyriskipanir.

Í uppskoti landsstýrisins verður í § 2, 2. stk. mælt til, at allar lýsingar, fráboðanir o.t. frá tí almenna, og kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur frá øðrum almennum stovnum enn landsstýrinum skulu kunna upptakast í tað almenna Kunngerðablaðið.

Slíkar fyriskipanir hava higartil vanliga verið lýstar í øllum teim føroysku bløðunum, og hava tey havt eina kærkomna og hart tiltrongda inntøku av hesum.

Tá ið nú hesar fyriskipanir fara at verða lýstar í tí almenna Kunngerðablaðnum, verða tær ikki lýstar í teimum privatu bløðunum -- tað fer av góðum grundum at verða mett sum alment oyðsl, ið ikki verður góðtikið.

Minnilutin er samdur í, at tað prinsipielt er skeivt, at bert eitt ávíst blað skal hava góðkenning at lýsa almennar kunngerðir. Hesa góðkenning áttu øll bløð at havt, um tey ynskja tað.

Endamálið við øllum hesum er fyrst og fremst, at lógir og aðrar almennar fyriskipanir — hvat heiti tær enn hava — verða kunngjørdar og harnæst, at tær koma út til so nógvar av landsins borgarum sum møguligt. Hetta gerst avgjørt best og bíligast við at útnytta verandi bløðini.

Av praktiskum grundum hevði tað verið hent, um bløðini høvdu samlað hesar lógir, kunngerðir og aðrar almennar lýsingar á einum føstum plássi í blaðnum, so at tær ikki hvørva sær burtur í millum hitt tilfarið.

Minnilutin tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið at bera so í bandi, at øll føroysk blað, ið ynskja tað, fáa góðkenning at lýsa almennar kunngerðir.

2. viðgerð 25. november: Atkvøtt varð við navnakalli um uppskot til samtyktar frá Eilifi Samuelsen í álitinum frá rættarnevndini soleiðis:

Ja atkvøddu:	Poul Michelsen, Ivan Johannesen, Flemming Mikkelsen, Jógvan Olsen, Johannes M. Olsen, Eilif Samuelsen, Hilmar Kass og Tordur Nielasen.
Nei atkvøddu:	Henrik Old, Gisleyg Bonde, Jørgen Thomsen, Kári Petersen og Hans Jacob Debes.
Atkvøddu ikki:	Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Svend Aage Ellefsen, Eyðun Viderø, Jógvan Sundstein, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Jona Henriksen, Gullak Gullaksen, Ashjørn Joensen, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro og Øssur av Steinum.
Burturstaddir:	Óli Breckmann, Pauli Ellefsen, Agnar Nielsen og Adolf V. Hansen.

3. viðgerð 8. december. Málið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 112-1. Lóg nr. 109 frá 17. december 1987.

9 Tíðarfesting fyri løgtingsvali.

Ár 1987, mikudagin 23. september legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at løgtingsvalið aftan á valskeiðið 1984-88 verður hildið ein dag innanfyri tíðarskeiðið 20.-30. september 1988.

Viðmerkingar:

Valskeiðið 1984-88 er lokið hin 8. november 1988. Tað vil siga, at næsta løgtingsval skal verða í seinasta lagi hendan dato.

Valdagurin í november er helst komin av, at valið í 1946 av tilvild varð hildið 8. november. Av ymiskum orsøkum kann hugsast, at tað er betur at hava val aðrar árstíðir.

Fyrst og fremst kunnu øll verða samd um, at ringasta árstíð at hava val er um summarið, t.v.s. frá uml. 1. mai til fyrsta september. Løgtingsins fremsta arbeiðstíð er frá oktober til apríl. Besta tíðin at hava val er tó helst líka áðrenn 1. oktober.

Fíggjarárið er nú álmanakkaárið, og fíggjarlógin skal samtykkjast beint undan jólum. Við at hava val í november er ómøguligt valárið at hava nakra líkinda viðgerð av fíggjarlógini, sum má metast at vera týdningarmesta afturvendandi lógarumráðið hjá løgtinginum og hjá einum og hvørjum landsstýri. Av hesi orsøk tí eisini best at hava løgtingsval í september.

Um løgtingsval var í september, hevði tíðin til kommunuval sama árið eisini verið eitt sindur longur, 2 - 3 mánaðir í staðin fyri ein mánað. Hetta hevði eisini verið ein fyrimunur.

Fólkaflokkurin setir tí fram omanfyrinevnda uppskot til samtyktar. Leggjast skal afturat, at tað er týdningarmikið longu nú, at politikkarar og almenningurin vita av, um valdagurin verður broyttur.

1. viðgerð 1. oktober. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 4. november legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum tann 22. september 1987 og eftir 1. viðgerð 1. oktober beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í 4 minniluttar.

Ein minniluti (Jóannes Dalsgaard og Jákup Lindenskov) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Hans J. Debes) tekur ikki undir við uppskotinum og setir eini uppskot fram, men viðmerkir:

Hóast tað møguliga ikki er neyðugt, so er veruleikin tann, at tað vanliga tekur 2 mánaðir at skipa eitt landsstýri.

T.v.s. verður løgtingsval hildið 1. oktober, og landsstýrið verður skipað 1. december, so er eingin tíð hjá landsstýrinum og fíggjarnevndini at viðgera fíggjarlógaruppskotið, sum skal leggjast fram 1. november.

Spurningurin er tí, um tað ikki er líka fræagt, at tað landsstýrið og verandi

samgonga, ið hevur sitið, ikki skal gera uppskotið, sum næsta samgonga skal virka undir.

Skulu broytingar gerast, er so møguleikin at koma fram við uppskoti á tingi á týdningarmiklum økjum, sum t.d. hesum.

Triði minnilutin (Eilif Samuelsen) tekur støðu í tingsalinum.

Fjórði minnilutin (Jógvan Sundstein) mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 11. november 1987. Atkvøðugreiðslan 12. november. Málið fall við 5-0.

10 Avtøka av lóg um gjald av ferðaseðlum.

Ár 1987, mikudagin 23. september legði Ivan Johannesen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av lóg um gjald fyri ferðing úr Føroyum.

§ *1.*

Løgtingslóg nr. 23 frá 30. apríl 1987 um gjald fyri ferðing úr Føroyum verður sett úr gildi.

§ *2.*

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ophævelse af lov om afgift på rejser fra Færøerne.

§ *1.*

Lagtingslov nr. 23 af 30. april 1987 om afgift på rejser fra Færøerne ophæves.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg nr. 23 frá 30. apríl 1987 kom í staðin fyri løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 1979, og sum seinast varð broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 1. oktober 1986. Lógin, ið var galdandi, álegði eitt gjald upp á 30 kr. til landskassan av uttanlandsferðaseðlum, men henda lóg hevur ongantíð virkað.

Seinasta broytingin áleggur eitt gjald upp á 200 kr. av uttanlandsferðaseðlum úr Føroyum.

Tá málið varð til viðgerðar í 1986, kundi Sambandsflokkurin ikki taka undir við hesi hækking, ið landsstýrið legði á tey, ið skulu úr Føroyum.

Í viðmerkingunum til broytingaruppskotið í 1986 sigur landsstýrið, at við at leggja avgjald á ferðir úr Føroyum, verður minkað um hugin til uttanlandsferðing føroyinga, tí at minkað verður um tað, teir hava til taks at nýta í útlandinum, samstundis við at økt verður um ta upphædd, sum útlendingar leggja eftir seg í Føroyum.

Tað er við hesi lógini sum við fleiri øðrum, ið henda samgongan hevur gjørt, hon rakar harðast tey minni mentu, ið ikki hava ráð at ferðast, men sum av ymiskum ávum eru noydd at ferðast.

Eitt má ásannast, tey ið verða roknað fyri vælhavandi, setast ikki aftur, um ferðaseðilin kostar 200 kr. meira. Eisini er tað sera óheppið fyri útlendingar, ið koma hendan vegin og hava keypt sær returferðaseðil og so verða noydd at gjalda eyka fyri at sleppa úr Føroyum aftur.

1. viðgerð 1. oktober. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 5. mai 1988 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum 23. september 1987 og eftir 1. viðgerð beint í skattanevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hilmar Kass og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum, og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Agnar Nielsen og Jógvan Sundstein) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

2. viðgerð 6. mai. Uppskotið fall við 13-0 atkvøðum.

11 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bústaðarhús til fólk í útbúgving.

Ár 1987, týsdagin 29. september legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bústaðarhús til fólk í útbúgving.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om kollegier til folk under uddannelse.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving verður gjørd henda broyting:

§ 7, 2. stk. verður orðað soleiðis:

»Verða bústaðarhús ikki longur nýtt til endamálið ella verða tey seld, fellur tann parturin av ognarvirðinum ávikavist nettosøluprísinum, sum lutfalsliga svarar til tann studning, sum er veittur eftir § 3 í hesi lóg, samanber § 2, pkt. 1) ella 2), til landskassan, og landsstýrið ger av, hvussu hesin parturin av ognarvirðinum ávikavist nettosøluprísinum skal nýtast.

§ 1.

I lagtingslov nr. 63 af 23. juni 1983 om kollegier til folk under uddannelse foretages følgende ændring:

§ 7, stk. 2 affattes således:

»Benyttes et kollegium ikke længere til formålet eller bliver solgt, falder den del af ejendomsværdien henholdsvis nettosalgssummen, som forholdsmæssigt svarer til det tilskud, der er ydet i medfør af § 3 i denne lov, jævnfør § 2, pkt. 1) ella 2), til landskassen, og landsstyret afgør, hvorledes denne del af ejendomsværdien henholdsvis nettosalgssummen skal anvendes.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

§ 2.

Denne lagtingslog træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í sambandi við, at Tórshavnar kommuna hevur sett á stovn ein sjálvsognarstovn undir heitinum »Íbúðir til ung undir útbúgving« og ynskir, at stovnurin skal fáa studning eftir løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving, hevur kommunan vent sær til landsstýrið við uppskoti um, at § 7,

2. stk. í nevndu lóg verður broytt, so at ikki at øll ognin ávikavist allur nettosøluprísurin fellur til landskassan, um bústaðarhús til fólk í útbúgving ikki longur verða nýtt til endamálið ella verða seld.

Landsstýrið er samt í, at tað ikki er rímuligt, at tann peningur, sum kommunur og onnur seta í bygging av bústaðarhúsum til fólk í útbúgving, skal falla til landskassan, um bústaðarhúsið ikki longur verður nýtt til endamálið ella verður selt, og landsstýrið setir sostatt fram uppskot til broyting í framman-fyri umrøddu løgtingslóg samsvarandi hesum.

1. viðgerð 1. oktober. Málið varð beint í skúla- og mentannarnevndina, sum 5. mai 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 29. september 1987 og varð 1. oktober 1987 beint í mentannar og skúlanevndina.

Broytingin snýr seg um, at ikki øll ognin ávíkavist allur nettosøluprísurin skal falla til landskassan, um eitt bústaðarhús til fólk í útbúgving verður selt. Talan er um hús bygd ella útvegað efter lóg nr. 63 frá 23. juni 1983.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja uppskotið, hóast nevndin heldur at verandi lóg møguliga inniheldur ta heimild, landsstýrið søkir sær við uppskotinum.

Ein samd nevnd heldur annars, at okkurt eigur at verða gjørt fyri at økja um áhuga fyri at nýta lógina um bústaðarhús til fólk í útbúgving, og heldur nevndin, at ein bati kundi verið at hækka studningin, ið kann verða latin sambært § 3 úr 55% upp í 65%, og setir lógaruppskot samsvarandi.

Nevndin heldur eisini, at landsstýrið sjálvt eigur at hava ein meira virknan leiklut í hesum spurningi og setir tí uppskot til samtyktar samsvarandi.

Ein samd nevnd mælir løgtinginum til at samtykkja fylgjandi.

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bústaðarhús til fólk í útbúgving.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving verður gjørd hendan broyting:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om kollegier til folk under uddannelse.

§ *1.*

I lagtingslog nr. 63 af 23. juni 1983 om kollegiebygninger til folk under uddannelse foretages følgende ændringer:

§ 3, 1. stk, verður orðað soleiðis:

»Studningur kann veitast við upp til 65% av byggikostnaðinum ella keypsprísi og umbyggingarkostnaði.«

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1989.

§ 3 1. stk. formuleres således:

»Tilskud kan ydes med op til 65% af byggeprisen eller købsprisen og ombygningsudgifter«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1989.

Út frá omanfyri nevndu viðmerkingum setir ein samd nevnd fylgjandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við avvarðandi kommunur, lærustovnar og næmingafelagsskapir við tí endamáli at fáa gongd á kollegiubygging í Føroyum eftir løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983.

2. viðgerð 5. mai. Uppskotið til samtyktar frá mentannar- og skúlanevndini samtykt við 19-0. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 24-0, § 2 við 25-0. Lógaruppskotið frá mentannar- og skúlanevndini § 1 samtykt við 29 0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At málið skulu fara soleiðis til 3. viðgerð varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 6. mai. Málið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2115-6-4. Lógirnar nr. 55 frá 9. juni 1987 og 127 frá 25. oktober 1987.

12 Løgtingslóg um útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudning til ávísar pensiónistar o.o.

Ár 1987, týsdagin 29. september legði Atli Dam, løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudning til ávísar pensiónistar o.o.

lagtingslov om radio- og fjernsynslicenstilskud til visse pensionister m.fl.

§ *1.* Úr landskassanum verður eftir umsókn til ávísar pensiónistar o.o. veittur árligur studningur svarandi til helvtinu av ásetta útvarpsgjaldinum og helvtina av ásetta sjónvarpsgjaldinum í fíggjarárinum.

§ *1.* Af landskassen ydes ser efter ansøgning til visse pensionister m.fl. et årligt tilskud svarende til halvdelen af den fastsatte radiolicens og halvdelen af den fastsatte fjernsynslicens i finansåret.

§ *2.* Útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudningurin verður veittur til fólk, ið áðrenn 1. januar hava fingið játtað fólkapensión, avlamispensión ella einkjupensión ella hava sent inn umsókn um slíka pensión, tí rætturin til hana er uppnáddur, og seinni fáa pensiónina játtaða.

§ *2.* Radio- og fjernsynslicenstilskuddet ydes til personer, som inden 1. januar har fået bevilget folkepension, invalidepension eller enkepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

§ *3.* Ein treytin fyri at fáa útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudning er, at pensiónisturin við pensiónsútgjaldingina fyri januar mánað hevur rætt til pensiónsviðbót. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensiónistar, eiga ein part av báðum studningum í felag.

§ *3.* En betingelse for at få radio- og fjernsynslicenstilskud er, at pensionisten ved pensionsudbetalingen for januar måned er berettiget til pensionstillæg. Ægtefæller, som begge er pensionister, får tilsammen en andel af begge tilskud.

2. stk. Aðrar treytir fyri at fáa útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudning eru, at pensiónisturin er skrásettur fyri útvarps- og/ella sjónvarpsmóttakara, og at eingi onnur í húskinum hava inntøkn enn pensiónisturin og møguligi hjúnafelagin, um hesin er pensiónistur.

Stk. 2. Andre betingelser for at få radio- og fjernsynslicenstilskud er, at pensionisten er registreret for radio- og/eller fjernsynsmodtager, og at ingen andre husfolk har indtægt end pensionisten og den mulige ægtefælle, såfremt denne er pensionist.

§ *4.* Úr landskassanum verður eisini, eftir umsókn og undir somu treytum sum ásett í § 3, til fólk, sum 1. januar fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlógini, veittur árligur studningur svarandi til helvtina av ásetta útvarpsgjaldinum og helvtina av ásetta sjónvarpsgjaldinum í fíggjarárinum.

§ *4.* Af landskassen ydes også, efter ansøgning og på samme betingelser som fastsat i § 3, til personer, der den 1. januar modtager hjælp efter forsorgslovens § 13, et årligt tilskud svarende til halvdelen af den fastsatte radiolicens og halvdelen af den fastsatte fjernsynslicens i finansåret.

§ *5.* Føroya Gjaldstova rindar ávikavist Útvarp Føroya og Sjónvarpi Føroya útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudningin beinleiðis.
2. stk. Annars hava Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya í samstarvi við Almannastovuna og kommununrnar fyrisitingina av hesi løgtingslóg um hendi, og landsstýrið kann áseta nærri reglur um hesa fyrisiting.
3. stk. Avgerðir, sum Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya taka, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

§ *5.* Føroya Gjaldstova betaler radio- og fjernsynslicenstilskuddet direkte til henholdsvis Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya .
Stk. 2. Iøvrigt varetager Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya i samarbejde med Almannastovan og kommunerne administrationen af denne lagtingslov, og landsstyret kan fastsætte nærmere regler om denne administration.
Stk. 3. Afgørelser, som Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya træffer, kan inden 4 uger indbringes for landsstyret.

§ *6.* Útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudningurin er ikki skattskyldugur.

§ *6.* Radio- og fjernsynslicenstilskuddet er ikke skattepligtigt.

§ *7.* Henda løgtingslóg fær gildi frá 1. januar 1987.

§ *7.* Denne lagtingslov får gyldighed fra 1. januar 1987.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 um útvarp við seinni broytingum er í § 3 ásett, at landsstýrið fyrisetur útvarpsgjaldið fyri eitt ár í senn eftir tilráðing

fíggjarnevndarinnar, og í somu grein hevur landsstýrið heimild at undantaka blind at lata gjald.

Í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp er í § 4 ásett, at landsstýrið fyrisetur sjónvarpsgjaldið fyrí eitt ár í senn eftir tilráðing fíggjarnevndarinnar, og í somu grein er ásett, at landsstýrið í serstøkum førum kann gera undantak frá at lata sjónvarpsgjald.

Nógvir fyrispurningar koma frá pensiónistum og øðrum um at fáa lækkað útvarps- og/ella sjónvarpsgjald, men landsstýrið metir seg ikki hava heimild í galdandi útvarps- og sjónvarpslóggávu at gera frávik frá teimum vanligu ásettu gjøldunum uttan í omanfyrinevndu báðum serligu undantaksheimildunum.

Til hetta kemur, at neyðugt er at útvega heimild at rinda Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya tann rakstrarpeningin úr landskassanum, sum stovnarnir ikki fáa inn í útvarps- og sjónvarpsgjaldi, um hesi gjøld verða lækkað hjá stórri bólk um av útvarps- og sjónvarpsmóttakarum.

Landsstýrið er í samráð við Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya og Almannastovuna komið til ta niðurstøðu, at ein rímilig loysn er, at útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudningur verður veittur eftir líknandi skipan, sum er galdandi eftir løgtingslóg nr. 119 frá 25. november 1986 um brennistudning til ávísar pensiónistar v.fl., tó so, at Føroya Gjaldsstova rindar ávikavist Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudningin beinleiðis.

Mett verður, at útreiðslur landskassans til útvarps- og sjónvarpsgjaldsstudningin eftir uppskotinum verða umleið 1 mió. kr. í fíggjarárinum 1987.

1. oktober varð samtykt at víkja frá tíðarfeistini at viðgera tingmálið.

1. viðgerð 1. oktober. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 4. november legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt av Føroya landsstýri hin 29. september í ár og aftan á 1. viðgerð hin 1. oktober beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur havt fund um málið og m.a. tosað við almannastjóran. Eftir uppskotinum skulu ávísir pensiónistar eftir umsókn fáa árligan studning svarandi til helvtina av útvarpsgjaldinum og sjónvarpsgjaldinum.

Umsitingin av málinum stendur ikki nærri tilskilað í lógini.

Eftir tí, nevndin hevur fingið at vita, so er Almannastovan ikki spurd í hesum máli og heldur ikki Útvarp Føroya.

Nevndin tekur undir við hugskotinum um, at ávísir pensiónistar skulu gjalda hálvt útvarps- og sjóvarpsgjald. Fyrr í hesum valskeiði hava løgtingsgrannskoðararnir mælt til slíka skipan í Føroyum. Øll grannalond okkara hava skipan um hálvt gjald av hesum slag. Sum heild heldur nevndin, at hetta mál skal skipast

á tann hátt, at ávísir pensiónistar bert verða kravdir fyri hálvt gjald. Spurningurin verður so, hvussu útvarp og sjónvarp skulu hava tað endurgoldið. Umsitingin eigur at verða so einføld sum gjørligt, og mælt verður tí til at kanna, hvussu slíkir spurningar verða avgreiddir í grannalondunum.

Tað er ein samd almanna- og heilsunevnd, ið mælir til, at málið verður beint aftur í landsstýrið til nærri viðgerðar.

2. viðgerð 12. november. Við 22-0 atkvøðum varð samtykt at beina landsstýrinum málið aftur.

F. L. j.nr. 1910-2-17-2.

13 Wien-sáttmáli um verju av ozonlagnum í stratosfæruni.

Ár 1987, týsdagin 29. september legði Atli Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at »Wien sáttmálin um verju av ozonlagnum í stratosfæruni« verður settur í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:
Landsstýrið hevur fingið skriv dagfest 11. august 1987 frá Miljøstyrelsen í Danmark viðvíkjandi staðfesting av »Wien-sáttmálanum um verju al ozon-

lagnum í stratosfæruni«. Hesin sáttmálin pliktar londini, sum góðkenna sáttmálan, til eitt ávíst vísindaligt samarbeiði, upplýsingarskifting og til at gjørdar verða millumtjóða reglur til verju av ozonlagnum.

Í skrivinum verður sagt frá, at Danmark hevur undirskrivað sáttmálan í mars 1985, og við tað at staðfestingin av sáttmálanum ikki krevur nakrar lógarbroytingar í Danmark, er tað ætlanin hjá Miljøstyrelsen at leggja spurningin um staðfesting vegna alt Danska Kongaríkið fyri donsku stjórnina á fundi hin 1. september 1987. Biðið verður um viðmerkingar hesum viðvíkjandi skjótast gjørligt og í seinasta lagi hin 20. august 1987.

Landsstýrið hevur hin 21. august 1987 boðað Miljøstyrelsen frá, at spurningurin um staðfesting av sáttmálanum fyri Føroyar viðkomandi má leggjast fyri løgtingið, og tí er tað ikki møguligt at koma við viðmerkingum fyrrenn í fyrsta lagi í november 1987.

Landsstýrið loyvir sær tí at leggja umanfyri standandi uppskot til samtyktar fyri løgtingið við tilmæli um, at sáttmálin verður settur í gildi fyri Føroyar.

1. oktober varð samtykt at víkja frá tíðarfreistini at viðgera tingmálið.

1. viðgerð 1. oktober. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 22. mars 1988 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 30. september 1987 og varð eftir 1. viðgerð beint í umhvørvisnevndina.

Eftir 1. viðgerð hevur nevndin frá landsstýrinum fingið sendandi sjálvan sáttmálan og protokol til sáttmálan samt kunngerð frá danska umhvørvismálaráðnum um nýtslu av driv- og upploysingarevnum í aerosolldósum nr. 571 frá 29. november 1984.

Endamálið við sáttmála og protokoll er at avmarka nýtsluna av freonum og chlorfluorcarbonum, evni, ið eru til skaða fyri ozonlagið í stratosfæruni.

Nevndin loyvir sær at vísa á, at ozonlagið sum oftа ávíst er hótt av ymiskum vandamiklum evnum. Ozonlagið í stratosferuni hevur stóran týdning fyri lívið á jørðini. Hetta ozonlag verjir plantur, djór og menniskju móti vandamiklum ultraviolettum geislingum frá sólini.

Síðani 1979 hava vísindaligir stovnar kring um heimin mátað ozonlagið, og eru teir komnir til tað niðurstøðu, at lagið tynnist í hvørjum, serstakliga yvir suðurpólinum, norðpólinum og aðra staðir við.

Vísindamenn halda, at sleppur dálkingin at halda fram sum nú ótálmuð, verða teir partar av ozonlagnum, sum verja móti vandamiklum geislingum tyntir eini 30 - 40% um ár 2000. Ein slík gongd fer at hava ógvuliga álvarsamar fylgjur fyri heilsuna hjá fólkið og fyri veðurlagið. Tað verður tí roynt um allan heim at tálma

nýtsluna av freonum og chlorfluorcarbonum (CFC-gassum). Fleiri lond, eitt nú U.S.A. og Svøríki hava sett fullkomið forboð fyri nýtslu av hesum evnum. Soleiðis hava hesi lond sett bann fyri nýtslu av freon í spraydósum.

Danmark hevur við frammanfyri nevndu kunngerð avmarkað nýtsluna av freonum og fluorcarbonum í spraydósum.

Avmarkingin fevnir tó ikki um íløt til heilivág og til ídnaðarliga nýtslu.

Í frammanfyri nevndu protokol hava luttakaralondini bundið seg til at minka um nýtsluna av CFC-gassum fram til ár 1999.

Sum framhald av Wien-sáttmálanum og protokollini hava norðurlendsku umhvørvismálaráðharrarnir gjørt avtalu um at minka um nýtsluna av CFC-gassum eisini í ídnaðinum. Endamál teirra er at fáa nýtsluna niður í eina helvt við árslok 1989.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur undir viðgerðini fingið upplýst, at Wien-sáttmálin, fyrst og fremst er ein ætlanaryvirlýsing. Tað er síðani upp til tey einstøku við lóg at fylla út ætlanirnar.

Føroyingar kunnu fylgja Wien-sáttmálanum og protokollini við einari føroyskari umhvørislóggávu.

Ein samd nevnd mælir út frá hesum løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 13/1987 óbroytt.

2. viðgerð 23. mars. Uppskotið varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2207-4-2.

14 Veiting av ríkisborgararætti.

Ár 1987, týsdagin 29. september legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 1 frá 11. mars 1987 og lóg nr. 2 frá 26. mai 1987, báðar um veiting av ríkisborgararætti, verða lýstar at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at hesar lógir verða lýstar at galda í Føroyum.

Eftir báðum lógunum verður eisini veitt persónum búsitandi í Føroyum ríkisborgararætt.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við tilmæli.

1. oktober varð samtykt at víkja frá tíðarfreistini at viðgera tingmálið.

1. viðgerð 1. oktober. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 14. november legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 29. september 1987 og eftir 1. viðgerð 1. oktober beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 12. november. Uppskotið samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 508-3.

15 Broytingar í ferðslulógini.

Ár 1987, mikudagin 4. november legði Villhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtinglóg um ferðslu.	*lagtingslov om ændringer i lagtingslov om færdsel.*

§ 1.

Í ferðslulógini, smbr. lógarkunngerð nr. 10 frá 18. mars 1966, seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 5. juni 1986, verða hesar broytingar gjørdar:

1) § 42, stk. 4, verður soleiðis orðað:

»Skylda til at nýta trygdarbelti geldur heldur ikki fyri hýruvognskoyring, koyring hjá postverkinum á rættiliga tætt bygdum øki í sambandi við at bera út brøv og pakkar, tøma postkassar, og koyring hjá løgreglu til varðhaldsendamál og flutning av handtiknum og øðrum, ið kunnu vera til vanda, meðan koyrt verður. Landsstýrið kann seta reglur, ið loysa frá skyldu at nýta trygdarbelti við onnur serstøk sløg av koyring.«

2) Í § 55, stk. 1, verður »10.000.000 kr.« og »1.000.000 kr.« broytt til ávikavist »50 mió. kr.« og »10 mió. kr.«

3) Í § 55, stk. 1 verður skoytt uppí:
»Tryggingarupphæddirnar verða javnaðar hvønn 1. januar í mun til prístalið tann 1. januar 1987.«

4) § 58, stk. 1, nr. 1, verður soleiðis orðað:
»brýtur lógir ella fyriskipanir givnar sambært henni, smbr. tó stk. 2 og stk. 6-10,«.

5) § 58, stk. 7, nr. 1, verður soleiðis orðað:
»áður er dømdur fyri rús- ella promillukoyring,«.

6) Í § 59 a, verður orðið »kunnu« broytt til: »skulu«.

§ 2.

Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 1.

I færdselsloven, jfr. lovbekendtgørelse nr. 10 af 18. marts 1966, som senest ændret ved lagtingslov nr. 67 af 5. juni 1986, foretages følgende ændringer:

1) § 42, stk. 4 affattes således:

»Pligten til at anvende sikkerhedssele gælder endvidere ikke for hyrevognskørsel, postvæsenets kørsel inden for tættere bebygget område i forbindelse med uddeling af brev- og pakkepost og postkassetømning og politiets kørsel i særligt bevogtningsøjemed samt befordring af anholdte og andre, der kan være til fare under kørslen. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser, der fritager for pligten til at anvende sikkerhedssele ved andre særlige former for kørsel.«

2) I § 55, stk. 1, ændres »10.000.000 kr.« og »1.000.000 kr.« til henholdsvis »50 mill. kr.« og »10 mill. kr.«

3) I § 55, stk. 1, tilføjes:
»Forsikringsbeløbene reguleres hver 1. januar i forhold til prístallet den 1. januar 1987.«

4) § 58, stk. 1, nr. 1, affattes således:
»overtræder loven eller i de medfør af denne fastsatte forskrifter, jfr. dog stk. 2 og stk. 6-10,«.

5) § 58, stk. 7, nr. 1, affattes således:
»tidligere er dømt for promillekørsel,« .

6) Uændret.

§ 2.

Loven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 67 frá 5. juni 1986, samanber løgtingsmál nr. 48/1985, vórðu fleiri týðandi broytingar gjørdar í ferðslulógini.

Undir viðgerðini eru komnir nakrir feilir í lógina, og er endamálið við hesum uppskoti at rætta hesar.

Haraftrat verður skotið upp at broyta endurgjaldsupphæddirnar í § 55 í lógini. Upphæddirnar eru nú 10. mió. kr. fyri persónsskaða og 1 mió. kr. fyri tingskaða. Tryggingarsambandið Føroyar hevur skotið upp at hækka upphæddirnar til 50 mió. kr. fyri persónsskaða og 10 mió. kr. fyri tingskaða, so upphæddirnar liggja ájavnt við støðið í grannalondum okkara.

Til tær einstøku broytingarnar skulu annars gerast hesar viðmerkingar:

Til § 1, nr. 1.

Sum skjal 1 fylgir orðingin av § 42, sum henda varð broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 5. juni 1986.

Samsvar er ikki millum føroyska og danska tekstin í stk. 4. Danski teksturin er tann rætti og verður føroyski teksturin sostatt broyttur, so hann samsvarar við tann danska tekstin.

Til § 1, nr. 2 og 3.

Ein serlig orsøk, at hesar hækkingar eru neyðugar nú er tann økta bussferðslan, har bussarnir hvør sær taka rættiliga nógv fólk. Ábyrgdartryggingin svarar fyri fólkunum, og hendir ein størri bussvanlukka, rekka 10 mió. kr. ikki langt. Eisini verður skotið upp at javna upphæddirnar í mun til broytingarnar í prístalinum.

Til § 1, nr. 4.

Sum skjal 2 fylgir orðingin av § 58, sum henda varð broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 5. juni 1986.

Ávísingin í stk. 1, nr. 1, skal eisini fevna um stk. 10, og verður hesin feilur rættaður.

Til § 1, nr. 5.

Orðingin av § 58, stk. 7, sum hon varð viðtikin við løgtingslóg nr. 67 frá 5. juni 1986 sæst av skjali 2.

Reglan ásetir eina harðari revsirammu – hefti ella fongsul í upp til 1 ár – fyri rúsdrekkakoyring, har alkoholkonsentratiónin í blóðinum undir ella aftaná koyringina ikki er farin upp um 2 promille, men har skerpandi umstøður eru. Reglan í stk. 7 upprokнar, hvørjar tær skerpandi umstøðurnar eru.

Í stk. 7, nr. 1, verður ásett, at skerpandi revsiramman eisini er galdandi, har førarin áður er dømdur fyri rúsdrekkakoyring.

Hetta er ein feilur í orðingini, at tað ikki eisini er tilskilað, at skerpaða revsiramman eisini er galdandi, har førarin áður er dømdur fyri promillukoyring.

Í uppskotinum verður hesin feilur rættaður.

Til § 1, nr. 6.

Samsvar er ikki millum føroyska og danska tekstin.

Danski teksturin er tann rætti.

1. viðgerð 17. november. Málið var uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 25. november. Uppskotið um at beina málið í rættarnevndina fall við 16-0. § 1 samtykt við 22-0, § 2 samtykt við 22-0. Við 22-0 atkvøðum varð samtykt at málið skuldi fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt.

7. december løgdu tingmenninir Tordur Niclasen, Signar Hansen, Jørgen Thomsen, Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Ferðslulógin § 59 a er tann nýggja greinin, sum kom við í lógina í 1986, og sum frádøming av førararættinum verður framd eftir.

Umtalaða grein vísir tó bert til § 30 a, har talan er um ávikavist 50 og 80 km/t hámarkið.

§ 30 a rúmar ikki øðrum bílum enn vanligum persónvognum og øðrum akførum, sum eru undir 3.500 kg. Sostatt verða tað bert førarar av nevndu akførum, ið koma undir § 59 a -- og verða frádømdir førararættin, meðan førarar av akførum omanfyri 3500 kg, t.d. bussar, lastvognar, vøruvognar v.m. og sum av trygdarorsøkum bert mega koyra 50, 60 og 70 km/t, ikki verða frádømdir førararættin, um teir koyra við eini ferð, sum er ávikavist 20 og 30 km/t omanfyri tað loyvda. Hetta má metast trygdarliga skeivt og órættvist soleiðis.

Mangt bendir á, at bæði bussar og lastvognar/vøruvognar mangan koyra alt ov skjótt og óivað mangan meiri enn 30 km/t omanfyri hámark.

Slíkt má metast sera vandamikið og verður tí hildið rímuligt og rættvíst, at sama regla, hvat frádøming av førararættinum viðvíkir, gerr seg galdandi fyri akfør omanfyri 3.500 kg sum teim, ið eru niðanfyri 3.500 kg.

Sostatt verður skotið upp soljóðandi:

broytingaruppskot

Í ferðslulógini, smbr. lógarkunngerð nr. 10 frá 18. mars 1966, seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 5. juni 1986 verður gjørd hendla broyting:

Í § 59 a verður 2) soljóðandi:

»hann hevur koyrt við ferð, ið er meiri enn 30 km um tíman oman fyri tey ferðamark, ið sett eru í § 30 a, stk. 1, og § 30 b, stk. 1, 1), 2) og 3) ella er meiri enn 20 km um tíman oman fyri ferðamark, ið sett eru sambært § 30 a, stk. 2, ella«

I færdselsloven, jfr. lovbekendtgørelse nr. 10 af 18. marts 1966, som senest ændret ved lagtingslov nr. 67 af 5. juni 1986 foretages følgende ændring:

I § 59 a formuleres 2) således:

»har kørt med en hastighed, der overstiger de i § 30 a, stk. 1, og § 30 b, stk. 1, 1), 2) og 3) fastsatte hastighedsgrænser med mere end 30 km i timen eller de i medfør af § 30 a, stk. 2, fastsatte hastighedsgrænser med mere end 20 km i timen, eller«

3. viðgerð 8. december. Atkvøðugreiðslan 11. december. Broytingaruppskotið samtykt við 25-0 atkvøðum. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt og avgreidd við 26-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 514-5-1. Lóg nr. 106 frá 17. december 1987.

16 Veðhald fyri láni til Menningargrunn Ídnaðarins.

Ár 1987, mikudagin 4. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Menningargrunn Ídnaðarins.

lagtingslov om garanti for lån til Menningargrunn Ídnaðarins.

§ *1.* Menningargrunni Ídnaðarins verður loyvt umframt hansara árligu lánsheimild, at upptaka 40 mió. kr. í láni í Føroyum við landskassaveðhaldi.
2. stk. Lánstreytirnar skulu góðkennast av landsstýrinum og figgjarnevndini.

§ *1.* Menningargrunnur Ídnaðarins får tilladelse til, udover den årlige låne hjemmel, at optage 40 mio. kr. i lån på Færøerne med landskassegaranti.
Stk. 2. Vilkårene for lånet skal godkendes af landsstyret og finansudvalget.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

§ *2.* Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Menningargrunnurin fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur bleiv stovnaður við løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973. Grunnurin fekk tá heimild at upptaka lán við landskassaveðhaldi uppá 2 mió. kr. um árið. Hetta er broytt síðani, seinast við løgtingmáli nr. 8/1986 til 10 mió. kr. árliga.

Út yvir hesa heimild hevur grunnurin við løgtingslóg nr. 13 frá 30. apríl 1985 fingið loyvi til at lána 10 mió. nkr., við løgtingslóg nr. 28 frá 21. mai 1985 30 mió. kr. og við løgtingslóg nr. 43 frá 2. mai 1986 30 mió. kr.

Í skrivi frá 11. februar 1987 hevur Menningargrunnur Ídnaðarins heitt á landsstýrið um at geva grunninum heimild til at taka eitt lán uppá 40 mió. kr. Landsstýrið veðheldur landskassans vegna fyri láninum, og skulu lánstreytirnar góðkennast av landsstýrinum og figgjarnevndini.

Talan er um eitt innlendis lán, sum møguliga kann fáast til vega gjøgnum oljugrunnin, Íløgugrunnin á Føroya Gjaldstovu og Íleggingargrunnin fyri Føroyar.

Krøvini til Menningargrunnin um figging av ídnaðarvirkjum, tænastuvirkjum og handverkaravirkjum eru alsamt vaksandi. Nú er so hent tað, at alivinnan í 1986 av ymiskum orsøkum hevði eitt stórt hall, sum ikki skal verða komið nærri inn á her, men fordi hetta við sær, at Menningargrunnurin í fleiri førum mátti figgja hetta hall, og er hetta sostatt orsøk til, at nógvar ídnaðir ikki hevur fingið ella fær tær upphæddir, sum ynskiligt hevði verið.

Útlán grunsins er støðugt vaksandi, soleiðis var játtanin fyri 1985 63 mió. kr. og fyri 1986 87,5 mió. kr. Harvið er ikki sagt, at útlán grunsins skulu økjast enn meir, men um tað eydnast grunninum at fáa ódýr lán, soleiðis at rentumarginalurin nærkast einum prosenti, verða útlit til at geva størri studning til útjaðaraøkini.

1. viðgerð 11. november. Skotið var upp at beina málið í figgjarnevndina, hetta fall við 4-0. Málið var síðani beint í ídnaðarnevndina, sum 28. januar 1987 legði fram soljóðadi:

Áti

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. nov. 1987 og undir 1. viðgerð tann 11. november 1987 beint í ídnaðarnevndina.

Talan er um at veita veðhald fyri innanlendisláni upp á kr. 40 mió.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur nevndin sum heild undir við uppskoti landsstýrisins.

Ídnaðarnevnd løgtingsins hevur havt ynski um at broyta reglugerðina fyri menningargrunnin soleiðis, at hesin tekur sær meira av útjaðaraøkinum, her verður serliga hugsað um oyggjar, sum ikki hava vegasamband við meginøkið í okkara landi.

Nevndin hevði fund við menningargrunnin í fjør um hesa broyting, og kom hann við einum uppskoti, sum nevndin ikki kann taka undir við, tí tað var ikki nóg víttgangandi, tá tað snúði seg um útoyggjarnar, her er serliga tørvur á flutningsstudningi og rentustudningi fyri at gerast kappingarførir við meginøkið.

Broytingin skal eisini siga nakað um, hvat samband skal vera í millum »Menningargrunnin« og »Menningarstovuna«. Annars er nevndin til reiðar at koma á fund um broytingina.

Nevndin setir tí fram hetta:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at broyta reglugerðina fyri menningargrunnin soleiðis, at reglugerðin betri samsvarar við tær hugsjónir, ið menningargrunnurin er grundaður á, her serliga at menna útjaðaraøkini, og hvat samband skal vera í millum grunnin og menningarstovuna.

2. viðgerð 3. februar. Skotið var upp at beina málið í figgjarnevndini, hetta fall við 8-0. Uppskotið til samtyktar frá Ídnaðarnevndini var samtykt við 25-0. Lógaruppskotið § 1 samtykt við 26-0, § 2 samtykt við 26-0. Við 26 0 atkvøðum var samtykt at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. februar. Lógin var endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum og uppskotið til samtyktar frá ídnarðarnevndini samtykt við 25 0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1212-14-1. Lóg nr. 25 frá 22. apríl 1988.

17 Partapeningur í P/f Nólsoyar Flakavirki

Ár 1987, mikudagin 4. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um partapening í P/F Nólsoyar Flakavirki.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 200.000 kr. í partapeningi í P/F Nólsoyar Flakavirki, Nólsoy.

§ *2.* Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.

§ *3.* Løgtingslógin kemur í gildi, tá hon verður kunngjørd.

lagtingslov om aktiekapital i P/F Nólsoyar Flakavirki.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i P/F Nólsoyar Flakavirki, Nólsoy, med et beløb på indtil 200.000 kr.

§ *2.* Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales, før alle betingelser, landsstyret skulle stille, er opfyldt.

§ *3.* Lagtingsloven træder i kraft ved dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Seinast í 1984 var P/F Klivar í Nólsoy komið í so stórar fíggjarligar trupulleikar at raksturin av flakavirkinum ikki kundi halda fram.

Fyrstu tveir mánaðirnar í 1985 vóru tingingar millum P/F Klivar og Føroya Landsstýri um støðuna hjá virkinum. Partarnir komu til ta niðurstøðu, at likvidatión av felagnum var einasti møguleiki. Um hetta mundið var samlaða skuldin hjá felagnum millum 13 og 14 mió. kr. Serkønir mettu, at raksturin bert kundi bera eina skuld uppá 7 til 8 mió. kr.

Frá tinginum fekk landsstýrið heimild at reka flakavirkið í Nólsoy fyribils. Tann 8. mai 1985 tók virkið aftur ímóti fiski og stóð landsstýrið fyri rakstrinum fram til 1. november 1986. Í hesum tíðarskeiði gav raksturin eitt samlað avlop uppá 2,3 mió. kr.

Í tíðarskeiðinum landsstýrið rak virkið, vórðu íløgur gjørdar fyri 1,2 mió. kr. Eftir avtalu við likvidator var hetta leigan, landsstýrið skuldi rinda. Restin ella

umleið 1,1 mió. kr. eru tøkar. Landsstýrið kemur seinni við uppskoti um, hvat gerast skal við hendan pening.

Flakavirkið hjá P/F Klivar varð selt á tvingsilssølu og keypt av Menningargrunninum, ið seldi virkið til Føroya Landsstýri, sum aftur seldi virkið til eitt partafelag stovnað av Nólsoyar kommunu, Nólsoyar Arbeiðsmannafelag og Leivi Mohr, virkisleiðara.

Ætlaði partapeningurin hjá nýggja felagnum er 1 mió. kr. Felagið keypti virkið frá landsstýrinum fyrí 3,6 mió. kr. Av hesum vórðu 2,5 mió. kr. goldnar kontant. 1,1 mió. kr. vórðu veittar sum lán úr landskassanum. Hetta lán er rentu- og avdráttarfrítt í trý ár. Verður síðani rentað við 4,5% og afturgoldið eftir 10 árum.

P/F Nólsoyar Flakavirki hevur ætlanir um at útbyggja og nýmótansgera virkið fyri umleið 5 mió. kr. Síðani nýggja felagið yvirtók virkið, hevur raksturin eisini gingið hampuliga væl.

Landsstýrið hevur fingið umsókn frá P/F Nólsoyar Flakavirki, har søkt verður um, at landskassin setir 20% av 1 mió. kr. ella 200.000 kr. sum partapening í felagið.

Landsstýrið mælir til, at henda umsókn verður játtað.

1. viðgerð 10. november. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 24. november legði fram soljóðandi:

Álit

Málið var framlagt 4. november 1987 av landsstýrinum og eftir 1. viðgerð 10. november 1987 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 8. december. § 1 varð samtykt við 30-0, § 2 við 30 0. Við 30-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 11. december. Málið samtykt og avgreitt við 25-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1413-1-74 B. Lóg nr. 108 frá 17. december 1988.

18 Keyp av grundøki til Strandferðsluna.

Ár 1987, mikudagin 4. november legði Lasse Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um keyp av grundøki til Strandferðsluna.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at keypa grundøki til Strandferðsluna og í samráð við fíggjarnevndina landskassans vegna at taka upp lán í mesta lagi 4,8 mió. kr. til keypið.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

løgtingslov om køb af grundareal til Strandferðslan.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at købe grundareal til Strandferðslan og i samråd med finansudvalget landskassens vegne at optage lån maksimalt 4,8 mio. kr. til købet.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelsen.

Viðmerkingar:

Standfaraskip Landsins hevur søkt landsstýrið um loyvi og fígging til at ogna sær grundøki í Tórshavnar kommunu til bygging av verkstaði til viðlíkahald av landflutningsamboðum hjá Strandferðsluni.

Við somu ferð sum tænastustøðið hjá Strandferðsluni er hækkað, er eisini talið á flutningsamboðum vaksið.

Nevnast kann, at tann 1. januar 1987 hevði Strandferðslan 27 last- og vøruvognar, 26 truckar, 26 flutningsvognar og 11 containarar.

Tað er sjálvsagt, at um mesta nytta skal fáast av hesum dýru amboðum, so er viðlíkahaldsstøðið ein sera avgerandi faktorur. Fyri at kunna viðlíkahalda, vaska og parkera eitt so stórt tal av ymsum akførum, so krevst nógv pláss, bæði undir taki og uttanum. Eisini kann ein verkstaður hjá Strandferðsluni, tá hann er úthygdur, taka sær av flutningstólum hjá øðrum almennum stovnum. Strandferðslan hevur fyrr fingið slíka áheitan, t.d. frá Postverkinum.

Sjálvt um tað er rætt, at Strandferðslan beinan vegin ognar sær grundøki til verkstað, so metir landsstýrið ikki, at tað er rætt at fara undir at byggja slíkan verkstað nú, tí sum øllum kunnugt er byggivirksemið í landinum væl hægri enn ynskiligt er.

Landsstýrið hevur søkt fíggjarnevnd Løgtingsins um loyvi til Strandferðsluna at keypa grundøki, men hevur landsstýrið bundið seg til at leggja lógaruppskot fyri løgtingið um heimild til keypið.

Við hesum verður málið lagt fyri Føroya Løgting.

1. viðgerð 25. november. Skotið varð upp at beina málið í fíggjarnevndina, hetta fall við 8-0 atkvøðum. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 4. november 1987 og eftir 1. viðgerð 25. november 1987 beint í ídnaðarnevndina.

Undir 1. viðgerð kom tað fram, at tingmenn vóru sinnaðir at decentralisera hetta virksemið, í sjálvum sær ein góður tanki, men eftir at ídnaðarnevndin hevur kannað hetta virksemið, kann sigast, at líka so lítið sum tað er møguligt at flyta barberarnar í Havn vestur í Vágar ella til Fuglafjarðar, er tað møguligt at flyta hetta virksemið langt út um Havnina, av tí at flest allar rutur og ein stórur partur av tí flutningi, sum hesi tól skulu brúkast til, ganga út frá Tórshavn.

Ídnaðarnevndin hevur havt fund við stjóran og verkstaðsleiðaran hjá Strandferðsluni og er komin til ta niðurstøðu, at beinast er at taka undir við uppskoti landsstýrisins, og mælir ein samd ídnaðarnevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 4. mai. § 1 samtykt við 18-0, § 2 við 18-0, § 3 við 18-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð var samtykt við 20-0 atkvøðum.

5. mai løgdu tingmennirnir Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Edmund Joensen, John Petersen og Jógvan Sundstein fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at virka fyri, at strandferðslan letur flutningstól stovnsins umvæla og halda viðlíka á vanligu verkstøðunum kring landið.

Viðmerkingar:

Tað verður sagt í álitinum frá ídnaðarnevndini, at tað ber ikki til at flyta hetta virksemið út úr Havnini, av tí at flest allar rutur og ein stórur partur av tí flutningi, sum hesi tól skulu brúkast til, ganga út frá Tórshavn.

Tað varð víst á undir fyrstu viðgerð, at fleiri av flutningstólunum hjá strandferðsluni hava stað úti um landið.

Nøkur í Klaksvík - Vágum - - Suðuroy og aðrastaðni, tey koma vanliga ikki til Havnar uttan til viðlíkahald og umvælingar. Tí varð mælt til at gera sáttmála við verkstøð úti um landið og eisini í Tórshavn, soleiðis at tað arbeiðið, sum náttúrliga hoyrir heima í einum øki, verður verandi har.

Hetta hevur ídnaðarnevndin sjálvandi ikki lurtað eftir.

Tað, sum ídnaðarnevndin mælir til (fyri at nýta sonn orðavendingar), at tvangsflyta barberin av bygdunum til Tórshavnar, tí hvat skal ein verða til úti á bygdunum, tá alt urbeiðið skal flytast til Tórshavnar.

Við hesum stóra verkstaði eru eisini aðrar ætlanir millum annað, at øll almenn flutningstól, so sum postflutningsbilarnir og aðrir skulu umvælast har, tí er hetta eitt sera álvarsamt mál fyri teir, ið hava bilverkstøð sum vinnu.

3. viðgerð 5. mai. Broytingaruppskot frá Ivan Johannesen, Edmund Joensen, John Petersen, Anfinn Kallsberg og Jógvan Sundstein fall við 13-0. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1800-50-3. Lóg nr. 80 frá 9. juni 1988.

19 Løgtingslóg um serveiting til pensiónistar v.fl.

Ár 1987, mikudagin 4. november legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um serveiting til pensiónistar v.fl.

§ *1.* Serveiting verður útgoldin í december 1987 til øll, ið móttaka fólkaavlamis- og einkjupensión og avlamisveiting, og sum pr. 1. desember 1987 hava rætt til pensión v.m.
Stk. 2. Tað sama verður at galda fyri tey, ið móttaka hjálp eftir forsorgarlógini v.m., tá hjálpin er ásett út frá pensiónsupphæddum, og fólk, sum í staðin fyri pensión eiga rætt til upphædd til persónligan tørv, (lummapeningur).

§ *2.* Serveitingin er 1.050 kr.

§ *3.* Landskassin ber allar útreiðslurnar av serveitingini.

§ *4.* Almannastovan hevur fyrisitingina av hesi lóg um hendi.
Stk. 2. Reglurnar í viðkomandi lógum hava annars við neyðugum tillagingum samsvarandi gildi fyri serveiting.

§ *5.* Serveiting er ikki skattskyldug.

§ *6.* Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om særydelse til pensionister m.fl.

§ *1.* Særydelse bliver udbetalt i december 1987 til alle, der modtager folke-, invalide- og enkepension, og som pr. 1. december 1987 er berettiget til pension m.m.
Stk. 2. Det samme er gældende for dem, der modtager hjælp ifølge forsorgsloven m.m., såfremt hjælpen er fastsat udfra et pensionsbeløb, og for personer, som i stedet for pension er berettiget til »beløb til personlige fornødenheder« (lommepenge).

§ *2.* Særydelsen er 1.050 kr.

§ *3.* Landskassen afholder alle udgifter i forbindelse med særydelsen.

§ *4.* Almannastovan administrerer denne lov.
Stk. 2. Bestemmelserne i vedkommende love har med de nødvendige tillempelser tilsvarende gyldighed for særydelse

§ *5.* Særydelsen er ikke skattepligtig.

§ *6.* Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 1/1987 er m.a. samtykt, at ávísar hækkingar av pensiónum v.m. skulu fara fram frá 1. januar 1988 at rokna.

Ætlan landsstýrisins var, at hesar hækkingar skulu koma at galda frá 1. oktober 1987; tí varð ein upphædd sett av á fíggjarløgtingslógini 1987 til tílíka útreiðslu. Tá ið løgtingsmál nr. 132/1986 um eykaviðbót til ávísar avlamispensiónistar varð lagt fyri løgtingið, upplýsti landsstýrið, at arbeitt varð við munandi hækkingum í grundupphæddini fyri fólka- og avlamispensiónistar at galda frá 1. oktober 1987.

Landsstýrisins áskoðan er, at hetta gerst best við at gjalda øllum pensiónistum eina serveiting fyri oktober ársfjórðingin 1987.

Samstundis við hesum leggur landsstýrið fram uppskot um brennistudning fyri teir pensiónistar, ið ikki hava stórvegis av aðrari inntøku aftrat pensiónini.

Munurin millum serveitingina og brennistudningin er annars hann, at serveitingin verður goldin hvørjum pensiónisti sær, t.e. at pensiónistahjún eiga tvær serveitingar.

Um broytingarnar í pensiónslóggávuni, sum koma í gildi frá 1. januar 1988, høvdu verið galdandi í øllum lutum í tíðarskeiðnum 1. oktober til 31. desember 1987 fyri landskassans rekning burturav, hevði landskassans útreiðsla verið um 9 mió. kr.

Útreiðslurnar av løgtingslóg nr. 51 frá 5. mai 1987 um eykaviðbót til ávísar avlamispensiónistar, ið hevur gildi 1. oktober til 31. desember 1987, verða mettar til um 1,5 mió. kr.

Útreiðslurnar av serveitingini verða mettar til um 6,7 mió. kr. Talið á teimum, ið fáa fólkapensión, avlamisveiting og forsorgarhjálp, er 6.345 persónar.

1. viðgerð 12. november. Málið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 17. november. § 1 samtykt við 25-0, §§ 2-6 samtyktar við 25-0. Við 25-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 25. november. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1010-15-4. Lóg nr. 102 frá 16. december 1987.

20 Stovnan av partafelag við endamáli at taka lut í flogferðslu.

Ár 1987, mikudagin 4. november legði Lasse Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um tekning av partapeningi í felag við endamáli at taka lut í flogferðslu.

lagtingslov om tegning af aktiekapital i selskab, hvis formål er at deltage i luftfart.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 1.020.000 kr. í partapeningi í felag við tí endamáli at taka lut í flogferðslu og at rinda neyðugar útreiðslur í samband við stovnan av felagnum.
2. stk. Til rindan av partapeninginum verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka lán 1.020.000 kr.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at tegne aktiekapital op til 1.020.000 kr. i et selskab med det formål at deltage i luftfart og at afholde nødvendige udgifter i forbindelse med selskabets stiftelse.
Stk. 2. Til betaling af aktiekapitalen bemyndiges landsstyret til på landskassens vegne at optage lån 1.020.000 kr.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ *2.* Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Ynski um føroyska luttøku í millumlanda rutuflogferðslu hevur verið frammi í mong ár og skiftandi landsstýri hava arbeitt við spurninginum.

Sum kunnugt er lóggávumyndugleikin viðvíkjandi loftferðslu hjá ríkismyndugleikunum, tí málsøkið »loftferðsla« sambært heimastýrislógini er eitt sokallað lista B-mál.

Frammanundan 1. oktober 1985 hevur tað ikki sambært loftferðslulóggávuni verið møguligt hjá føroyingum at fingið konsessión til rutuflogferðslu við umheimin.

Tann 1. oktober 1985 vórðu loftferðslureglurnar broyttar, so føroyingar fingu rætt til konsessióneraða rutuflogferðslu til og úr Føroyum saman við ella við

síðuna av dønum. Í hesum sambandi hevur landsstýrið arbeitt við ymiskum møguleikum fyri at fáa í lag rutuflúgving.

Tað hevur víst seg at vera ógvuliga torført at byrja nakra flúgving uttan stórar kapitalfløgur. Ein enn størri meinbogi er tó, at okkum vantar manning á at kalla øllum økjum innan loftferðslu. Útbúgvingin av tílíkari manning fer at taka ár og er hartil sera kostnaðarmikil.

Landsstýrið hevur í samráðingum við eitt danskt flogfelag funnið fram til eina nýtiliga loysn av hesum spurningi.

Ein fyribilsavtala er gjørd við felagið um at stovna eitt føroyskt partafelag til at standa fyri millumlanda loftferðslu. Føroyingar skulu eiga 51% av partapeninginum, meðan danska felagið skal eiga 49% av partapeninginum. Talan er um, at partapeningurin skal vera 2 mió. krónur.

Ætlanin er at stovna eitt sokallað »holdingfelag«, sum hevur til endamáls at eiga tann føroyska partin av partapeninginum í áður umrøddu flogfelag. P/F Flogsamband F.F. fær høvi til at vera partaeigari við ¼ av partapeninginum í holdingfelagnum saman við landsstýrinum.

Fyriliggjandi uppskot hevur til endamáls at útvega landsstýrinum neyðuga heimild til at seta partapening í holdingfelagið og at gjalda neyðugar útreiðslur í samband við fyrireikingararbeiðið.

1. viðgerð 10. november. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 18. november legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. november 1987 og undir 1. viðgerð tann 10. november beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og havt fundir við Lassa Klein, landsstýrismann, arbeiðsbólkin, ið hevur fyrireikað málið, umboð fyri P/f Flogsamband og grannskoðarafelagsins.

Á hesum fundi hevur landsstýrið lagt fram ávíst tilfar, frágreiðingar og kalkulatiónir. Fíggjarnevndarlimir hava sett fram spurningar um málið í síni heild og um serlig viðurskifti, har sakkunnleiki hevur verið neyðugur. Í hesum sambandi er ávíst meiri tilfar útvegað og munnligar frágreiðingar givnar.

Eisini hevur fíggjarnevndin havt fund við umboð fyri Flogfelag Føroya, og umframt at málið varð lýst frá hesi síðu bæði í tekniska og fíggjarliga táttinum, vóru frá limunum í fíggjarnevndini settir fram spurningar, ið vórðu svaraðir.

Av viðmerkingunum til lógaruppskotið framgongur, at P/f Flogsamband fær høvi at vera partaeigari við ¼ av partapeninginum í holdingfelagnum, ið fer ein partapening upp á kr. 1.200.000,-, t.v.s. landsstýrið kr. 900.000 og P/f Flogsamband kr. 300.000.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Hilmar Kass, Signar Hansen og Tordur Niclasen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broyting og setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1, 1. stk. og í 2. stk. verður upphæddin »1.020.000 kr.« broytt til: »900.000, kr.«

I § 1, stk. 1 og i stk. 2 ændres beløbet »1.020.000 kr.« til: »900.000 kr.«

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, Eyðun Videro og Ivan Johannesen) førir fram:

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur í hesum sambandi fingið yvirlit tilfar til tess at lýsa málið.

Harafturat hevur fíggjarnevndin innkallað persónar umboðandi nýggja felagið og umboð fyri Flogfelag Føroya.

Eisini hevur ynski verið reist um at fáa innkallað umboð fyri Cimber Air og Danair/Mærsk Air, men hevur hetta ikki vunnið frama í fíggjarnevndini.

Út frá tí skrivliga tilfarinum, sum fyri tað mesta er fundarfrásagnir frá ti arbeiðsbólki, sum arbeitt hevur við málinum, framgongur, at orienterandi fundur gevur verið 26. juni 1987 við Danair/Mærsk Air, og longu dagin eftir er fundur við Cimber Air, har landsstýrið gevur eina positiva ábending um eitt samarbeiði, hóast landsstýrið yvirfyri Danair hevur bidið um eitt uppskot til loysn av Føroya flúgvingini innan tann 22. juli 1987.

Sostatt kann ásannast, at landsstýrið hevur bundið seg áðrenn veruligar samráðingar við Danair vórðu komnar í gongd.

Minnilutin hevur eisini roynt at fingið fram fíggjarliga grundarlagið hjá nýggja felagnum, men er einasta úrslit av hesum tær munnligu frágreiðingarnar, ið grannskoðari felagsins er komin fram við.

Minnilutin hevur tí ikki havt møguleikar at eftirkanna tølini ella kalkulatiónirnar. Eisini hevur minnilutin fregnast eftir tí løgfrøðiliga táttinum í samstarvsavtaluni, uttan at tað er eydnast at fáa vissu, um trygd er fyri at hesi viðurskifti eru nóg haldgóð. Viðari er minnilutin av teirri áskoðan, aftaná at hava fundast við umboð fyri Flogfelag Føroya í fíggjarnevndini, at teir praktisku spurningarnir í tilknýti til flúgvingina, viðlíkahald v.m. ikki eru greidliga lýstir og nóg væl umhugsaðir og avkláraðir til at veita trygd, at hesin flutningur er kappingarførur.

Minnilutin gongur inn fyri, at føroyingar koma upp í flúgvingina og út frá tí tilfari og teimum frágreiðingum, nevndin hevur at leggja til grund fyri støðutøku er helst møguleiki til staðar fyri lønandi rakstur.

Tá føroyingar áður hava stovnsett flogfelag, ið eitur P/f Flogsamband, við tí endamáli at koma upp í flúgvingina, og tá hetta felag hevur rúman eginpening tøkan til slíka íløgu, setir minnilutin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at bera so í bandi, at P/f Flogsamband fær høvi at seta seg fyri allan tann føroyska partin av partapeninginum í felagnum, sum tilskilað í fyriliggjandi løgtingsmáli.

2. viðgerð 25. november. Uppskot til samtyktar frá minnilutanum í fíggjarnevndini fall við 9-0. Broytingaruppskot frá meirilutanum til § 1 samtykt við 21-0. § 1 soleiðis broytt samtykt við 22-0, § 2 samtykt við 17-0 atkvøðum. Við 22-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt.

8. december legði minnilutin í fíggjarnevndini fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

Við 2. viðgerð av hesum máli varð lógaruppskotið við broyting frá meirilutanum í fíggjarnevndini samtykt. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum um, at Flogsamband skal vera føroyski luttakarin, varð felt.

Minnilutin í fíggjarnevndini (Anfinn Kallsberg, Eyðun Videro og Ivan Johannesen) heldur framvegis, at ov skjótt er gingið fram í samband við avtaluna við Cimber Air, og at ov lítið er gjørt við at fáa í lag eina avtalu við Danair og/ella Mærsk Air.

Minnilutin heldur tí, at ein roynd eigur at verða gjørd aftur at fáa í lag samarbeiði við Danair og/ella Mærsk Air. Hendan roynd eigur at verða gjørd, áðrenn lógin verður lýst.

Minnilutin setir tí fram hetta:

Uppskot

til

samtyktar

Áðrenn løgtingslógin í tingmáli nr. 20/1987 verður lýst, verða nýggjar samráðingar við Danair og/ella Mærsk Air um eitt føroyskt-danskt flogfelag. Hesar samráðingar skulu verða loknar áðrenn 1. apríl 1988.

3. viðgerð 8. december. Atkvøðugreiðsla á seinna fundi sama dag. Broytingaruppskotið frá minnilutanum fall við 7-0 atkvøðum. Lógaruppskotið varð samtykt við 20-0 atkvøðum og avgreitt.

F.L. j.nr. 1820-21-5. Lóg nr. 11 frá 25. januar 1988.

21 Veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir.

Ár 1987, mikudagin 4. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir.

lagtingslov om garanti for lån til mindre industrivirksomheder.

§ *1.* Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1988 og 1989 at veita veðhald fyri lánum upp til 3,0 mió. kr. hvørt fíggjarárið til smærri ídnaðarvirkir.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansårene 1988 og 1989 at yde kaution for lån indtil 3,0 mio. kr. hvert finansår til mindre industrivirksomheder.

§ *2.* Hesi lán verða at nýta til stovnan av nýggjum virkjum, víðkan og nútímansgerð av gomlum o.t.
2. stk. Veðhald skal altíð verða ásett við eini mestu upphædd.
3. stk. Lánini mugu ikki fara upp um 70% av tí virði, sum nýggju íløgurnar hava eftir meting.
4. stk. Lánini skulu verða tryggjað við panti í fastogn ella leysafæ innanfyri 70% av tí virði, fastognin ella leysafæið eru mett til. Leysafæ kann tó bert nýtast sum pant um metingarvirðið er ikki minni enn 150.000 kr.

§ *2.* Disse lån skal anvendes til reetablering af virksomheder, udvidelse og modernisering af gamle o.l.
Stk. 2. Kautionen skal altid være fastsat med et maximumsbeløb.
Stk. 3. Lånene må ikke overstige 70% af den værdi, som de nye investeringer har i henhold til vurdering.
Stk. 4. Lånene skal være sikrede ved pant i fast ejendom eller løsøre inden for 70% af den værdi, som den faste ejendom eller løsøret er vurderet til. Løsøre kan dog kun anvendes som pant for så vidt vurderingssummen er ikke mindre end 150.000 kr.

§ *3.* Kemur landskassin sum veðhaldari at rinda pening, og sostatt fær krav móti skuldarunum, verður kravið at renta við rentu, landsstýrið ásetir, frá tí degi, landskassin hevur lagt pening út.

§ *3.* Såfremt landskassen som kautionist kommer til at betale penge, og på denne måde får krav imod skyldneren, forrentes dette krav med en rente, som landsstyret fastsætter, fra den dag, landskassen har udlagt beløbet.

§ 4. Um lán ikki er veitt eitt ár eftir, at landsstýrið hevur givið tilsøgn um veðhald, fellur tilsøgnin burtur.

§ 5. Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 4. Såfremt lån ikke er effektueret et år efter, at landsstyret har givet tilsagn om kaution, bortfalder tilsaguet.

§ 5. Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur hvørt ella annaðhvørt ár síðani 1960 fingið heimild við løgtingslóg at veðhalda fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir. 1. januar 1988 gongur núverandi heimild út, sum er ásett við løgtingslóg nr. 68 frá 5. juni 1986, jbr. løgtingsmál nr. 74/1985.

Í 1986 og 1987 eru veitt veðhald uppá tilsamans 1.604.000 kr.

1. viðgerð 17. november. Málið var uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 25. november. § 1 varð samtykt við 18-0 atkvøðum, §§ 2-5 samtyktar við 18-0. Við 19-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt.

3. viðgerð 8. december. Málið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1427-2. Lóg nr. 3. frá 15. januar 1988.

22 Skattalætti av útleiging av býli.

Ár 1987, mikudagin 4. november legði Eilif Samuelsen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Sum nýggj § 33, nr. 13 verður sett:

»Persónur, sum leigar út kamar ella íbúð til fólk, sum eru undir útbúgving ella í læru, kann draga alla goldna leigu frá fyri — kamar tó treytað av, at hetta er 9 m² ella meira til víddar, við atgongd til wc, bað og køk, og at kostnaðurin fyri nýtslu av kamarinum er 1.000,- kr. ella minni um mánaðin, um framt kostnað fyri nýtslu av el, olju og telefon, — fyri íbúð tó treytað av, at íbúðin hevur 2 rúm ella meira og ikki er undir 20 m² til víddar, fyriuttan wc, bað og køk, og at kostnaðurin fyri nýtslu av íbúðini pr. m² er 50 kr. ella minni, umframt kostnað fyri el, olju og telefon. — Annars kann persónur, sum leigar út kamar við atgongd til wc, bað og køk ella íbúð, sum hevur wc, bað og køk til fólk, sum ikki er undir útbúgving ella í læru, draga helvtina av goldnari leigu fyri bústað frá treytað av, at kostnaðurin fyri nýtslu av bústað pr. m² er 60 kr. ella minni, umframt kostnað til nýtslu av el, olju og telefon.

§ 1.

I lagtingslog nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

Som ny § 33, nr. 13 indsættes:

»Person, som udlejer værelse eller lejlighed til folk under uddannelse eller i lære kan fradrage den totale betalte leje for – værelse på betingelse af, at dette har en størrelse af 9 m² eller mere med adgang til wc, bad og køkken, og at udgifterne for benyttelse af værelset er 1.000,- kr. eller mindre pr. måned, excl. udgifter for el, olie og telefon, — for lejlighed, dog på betingelse af, at lejligheden har 2 rum eller mere og ikke er under 20 m² stort, foruden wc, bad og køkken, og at prisen for benyttelse af lejligheden pr. m² er 50 kr. eller mindre, excl. udgifter for el, olie og telefon. — Desuden kan person, som udlejer værelse med adgang til wc, bad og køkken eller lejlighed, som har wc, bad og køkken til folk, som ikke er under uddannelse eller i lære, fradrage halvdelen af betalt leje for bolig dog på betingelse af, at udgifterne for benyttelse af bolig pr. m² er 60 kr. eller mindre, excl. udgifter til benyttelse af el, olie og telefon.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter kundgørelse.

Viðmerkingar:

Hóast tann veruleika, at tað verða bygd so nógv sethús her á landi sum ongan tíð áður, og hóast tað, at nógv eldri hús verða umbygd, so er tørvurin fyri at leiga íbúðir og kømur størri enn nakrantíð. Hesin tørvurin er sum vera man størstur í Havnini, men er eisini á teimum størru bygdunum.

Ein hópur av ungfólki kemur til Havnar at ganga í skúla ella í læruplass fyri eina longri ella stytri tíð.

Nakrar fáir skúlar hava skúlaheim, t.d. Studentaskúlin, Tekniski skúlin, Sjúkrasystraskúlin og Læraraskúlin, men hesi skúlaheim saman við bústaðarhúsunum í Børkugøtu og í Fjalsgøtu nøkta bert ein lítlan part av tí tørvi, sum er.

Ynskjandi hevði verið, at fleiri bústaðarhús eins og tey í Børkugøtu vórðu bygd eftir teimum lagaligu treytunum í lógini um bústaðarhús til fólk í útbúgving frá 1983.

Tey flestu sethúsini, ið bygd eru hesi seinastu árini, eru sera rúmlig, og eingin ivi er um, at her eru nógv rúm, ið kundu verið leigað út bæði sum íbúðir til familjur og sum kømur til einstaklingar.

Tað er heldur eingin ivi um, at fólk annars kundu hugsað sær at hjálpt upp á støðuna við at leiga út, aftra seg, tí tey vita, at nakað av trupulleikum standast av at hava leigarar, men tað ringasta er, at skatturin fer við einum stórum parti av inntøkuni, og skal nakað fáast burturúr, so má leiga setast so høgt, at tað skapar stórar trupuleikar hjá leigarunum.

Byggivirksemið í landinum er í løtuni sera høgt. Hetta førir við sær, at eftirspurningurin á handverkarum, tilfari og tænastum økist nógv, og tað ber aftur við sær, at lønir og prísir eru nógv uppfarin.

Ein munandi lætti í skattingini av útleiging hevði uttan iva virkað við til, at fleiri fóru at leiga út, og at dygdin á teimum útleigaðu rúmunum gjørdist betri, og harvið hevði tað ovurstóra trýstið á nýbygging linkað nakað.

Fyri at bøta um tann stóra tørvin, sum fyri íbúðum og kønrum, og fyri at gera tað rímuliga lønandi hjá fólki at leiga út og samstundis at halda leiguna niðri á einum rímiligum støði, setir Sambandsflokkurin fram hetta uppskot um broyting í skattalógini.

1. viðgerð 11. november. Málið vard beint í skattanevndina, sum 3. mai 1988 legði fram.

Álit

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum 4. november 1987 og eftir 1. viðgerð 11. november 1987 beint í skattanevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hilmar Kass, Heini O. Heinesen og Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

2. viðgerð 5. mai. § 1 í uppskoti Sambandsfloksins fall við 7-0. Málið burturdottið.

23 Løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág. (LM 119/86).

Ár 1987, týsdagin 1. mars legði almanna- og heilsunevndin fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt av Føroya Landsstýri hin 31. mars 1987, og eftir 1. viðgerð hin 6. apríl beint í almanna- og heilusnevndina.

Í áliti dagf. 9. apríl 1987 frá nevndini varð mælt til, at nevndin varð gjørd til millumtinganevnd til tess at viðgera málið. Hetta varð samtykt.

Almanna- og heilsunevndin hevur viðgjørt málið og er komin til ta niðurstøðu, at hon vil taka undir við uppskotinum.

Tað er semja í nevndini um at gera vart við, at kommunulæknarnir í Eysturoynni fyri árini síðani bóðu um at fáa apotek í Eysturoynni, eins og kommunurnar í Vágum hava spurt til apotek í Vágum. Eisini var semja um at mæla landsstýrinum til at umhugsa, hvørjir møguleikar eru fyri at fáa eina hondkeypsútsølu í miðbýnum í Havn.

Sambært § 3 í lógini er tað landsstýrið, sum ger av, um apotek skulu setast á stovn, avtakast ella flytast.

Annars er at siga, at óvissan tók seg upp í nevndini um § 11, stk. 2, í lógaruppskotinum. Hendan sigur: »Er apotekari frá, skal hann siggja til at seta forsvarliga leiðslu á apotekinum.«

Sambært viðmerking til greinina stendur: »Skyldan til at stýra apotekið ber í sær, at ein trygg fyristøða er undir frávegu. Við trygga fyristøðu er at skilja persón, sum hevur innlit við øll viðurskifti rakstrinum viðvíkjandi, og skal hesin persónur hava í minsta lagi prógv sum apoteksassistentur.«

Tað er hetta, sum ivi er um, nevniliga at ikki farmaceutur kann hava ábyrgd av einum apoteki, tá apotekaranum berst frá. Nakað av kjaki hevur staðist av hesum, men eftir tí, ið er komið fram, so hevur ráðleggingarnevndin fyri apoteksverkið sett § 11, 2. stk. í lógina fyri at formalisera verandi skipan, ið hevur verið nýtt við góðkenning frá landsstýrinum eftir tilmæli frá landsapotekaranum og ummæli frá landslæknanum. Avrit av brævinum frá landsapotekaranum hin 21. desemer 1987 er hjálagt.

Landsstýrið hevur lagt hetta lógaruppskot fyri løgtingið við viðmæli um at samtykkja tað.

Ein meiriluti (Karin Kjølbro, Henrik Old og Flemming Mikkelsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Tordur Niclasen og Jógvan Sundstein) setir út frá hesum fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum skjótast at taka stig til, at apotek verðu sett á stovn

1) Í Eysturoy og í Vágum, og

2) hondútsøla verður sett á stovn í Tórshavn.

Minnilutin hevur annars viðmerkingar til málið:

§ 11, 2. stk. ljóðar soleiðis: »Undir fráveru skal apotekarin syrgja fyri forsvarligari leiðslu av apotekinum ...« og verður í viðmerkingunum til hetta

sagt, at »við forsvarliga leiðslu er at skilja persónur, sum hevur innlit í øllum viðurskiftum rakstrinum viðvíkjandi, og skal hesin persónur í minsta lagi hava prógv sum apoteksassistentur...«

Minnilutin metir, at her verður ein prinsipiellur skeivleiki gjørdur, tá við lóg verður heimilað persóni *uttan* farmaceutútbúgving somu møguleikar at standa fyri apoteksleiðslu sum persóni *við* farmaceutútbúgving.

Her skal eisini vísast á, at norsk og dansk lóg um apoteksverk bert loyvir persóni við farmaceutiskum kandidatprógvi at vera apoteksleiðara.

Heldur átti *landsstýrinum* verið heimilað at gjørt undantøk, um hetta skuldi gjørst neyðugt, t.d. um trupult var at fingið farmaceut til avvarðandi apotek.

Sostatt setir minnilutin fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í uppskot landsstýrisins § 11 verða gjørdar hesar broytingar:

1) 2. stk. verður soljóðandi:
   »Er apotekari frá meir enn 8 dagar, eigur ein, ið lýkur treytirnar eftir § 7 at verða settur.«
2) Nýtt 3. stk. verður soljóðandi:
   »Landsstýrið kann gera frávik frá reglunum í 2. stk.«
3) 3. stk. verður 4. stk.

I landsstyrets forslag § 11 foretages følgende ændringer:

1) Stk. 2 formuleres således:
   »Såfremt en apoteker er fraværende i mere end 8 dage, skal en person, der opfylder betingelserne i henhold til § 7 konstitueres i stillingen.«
2) Som nyt stk. 3 indsættes:
   »Landsstyret kan meddele dispensation fra reglerne i stk. 2.«
3) Stk. 3 bliver stk. 4.

SÍ SKJAL 9.

2. viðgerð 13. apríl. Atkvøðugreiðsla 27. apríl. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum, pkt. 1. fall við at 16 atkvøddu ja, 15 atkvøddu ikki, 1 var burturstaddur, atkvøtt var við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Essa Arge, Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Svend Auge Ellefsen, Eyðun Videro, Jógvan Sundstein, Pauli Ellefsen, Ivan Johannesen, Agnar Nielsen, Edmund Joensen, Johs. Martin Olsen, Jona Henriksen, Asbjørn Joensen, Sigmar Hansen, Adolf V. Hansen og Tordur Niclasen.

Atkvøddu ikki: Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Henrik Old, Sverre

Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Jóannes Dalsgaard, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Hilmar Kass, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum og Hans Jacob Debes.

Burturstaddur: Poul Michelsen.

Pkt. 2 fall við, at 13 atkvøddu ja, 18 atkvøddu ikki, 1 burturstaddur, atkvøtt var við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Essa Arge, Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Svend Aage Ellefsen, Eyðun Viderø, Jógvan Sundstein, Pauli Ellefsen, Agnar Nielsen, Edmund Joensen, Johs. Martin Olsen, Poul Jacob Olsen, Adolf V. Hansen, Tordur Niclasen, Jona Henriksen.

Atkvøddu ikki: Ivan Johannesen, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Henrik Old, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Jóannes Dalsgaard, Vilhelm Johannesen, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum og Hans Jacob Debes.

Burturstaddur: Poul Michelsen.

Broytingaruppskot minnilutans fall við 7-0 atkvøðum. Broytingaruppskot tilmælt av landsstýrinum í skrivi til § 5, 1. stk., § 6, § 7, §§ 8,9, 10, 11, 3. stk. og § 58 samtykt við 31-0.

§§ 6-57 Soleiðis broyttar samtyktar við 31-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 31-0 atkvøðum.

3. mai legði almanna- og heilsunevndin fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Samd almanna- og heilsunevnd setir við hesum fram hetta broytingaruppskot til lógaruppskot landsstýrisins:

Í § 55, 1. stk. verður »1. januar 1988« broytt til: »1. januar 1989«	I § 55, stk. 1 ændres »1. januar 1988« til: »1. januar 1989«.

3. viðgerð 3. mai. Broytingaruppskotið frá almanna- og heilsunevndini samtykt við 27-0 atkvøðum. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 918-3-1. Lóg nr. 104 frá 5. september 1987.

24 Broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjøld.

Ár 1987, týsdagin 10. november legði Jógvan I. Olsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjøld.

§ 1.

Í § 2 í løgtignslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 við seinri broytingum um eykainnflutnignsgjøld verður frammanfyri orðini: »Skip yvir 20 br. reg, tons« sett orðini: »gassolja og tungolja«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1988.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om ekstra indførselsafgift.

§ 1.

I § 2 i lagtingslov nr. 32 fra 19. maj 1979 om ekstraindførselsafgift sættes foran ordene »skibe over 20 br. reg. tons« ordene: »gasolie og tungolie«.

§ 2.

Denne love træder i kraft 1. januar 1988.

Viðmerkingar:

Føroyska fiskivinnan er á flestu økjum í fíggjarligari trongstøðu. Hetta er ikki minst galdandi fyri føroysku heimafiskivinnuna.

Orsøkin er í stuttum, at inntøkurnar eru ov smáar og útreiðslurnar eru ov stórar. Galdandi eykainnflutningsgjald upp á 6% er í stóran mun við til at økja um útreiðslurnar hjá vinnuni.

Nevnast kann eisini, at hetta avgjaldið eisini liggur á tí olju, sum SEV nýtir til elframleiðslu. Hetta økir um útreiðslurnar hjá flakavirkjunum og øðrum fiskavirkjum, og minkar samstundis um fiskaprísirnar.

Ein lækkan av elprísinum, og á oljuprísinum, hevði lætt munandi um hjá føroyska ídnaðinum annars.

Endaliga er bæði olja og el ein neyðsynjarvøra hjá øllum føroyskum húsarhaldum. Tleir høgu el- og oljuprísirnir tyngja munandi um, serliga hjá pensionistum og øðrum lágløntum.

Umrødda broyting í eykainnflutningsgjaldinum kemur at kosta landskassa-

num eina 20 til 25 miljónir kr., og eigur at verða tikin hædd fyri hesum, tá fíggjarlógin verður løgd fram aftur til aðru viðgerð.

1. viðgerð 17. november. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. mars 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Sambandsflokkinum 10. november 1987 og undir 1. viðgerð 17. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen og Tordur Niclasen) setir eingi uppskot fram, men vísir á álit meirilutans í løgtingsmáli nr. 26/1987.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg og Eyðun Videro) vísir á viðmerkingar sínar í løgtingsmáli nr. 26/1987: Avtøka av ymiskum avgjøldum fyri fiski- og alivinnuna, og setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at heina málið til viðgerð í skattanevndini.

Ein annar minniluti (Ivan Johannesen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandstloksins.

2. viðgerð 7. apríl. Uppskot til samlyktar frá Eyðun Videro og Anfinn Kallsberg fall við 6-0 atkvøðum. § 1 fall við 11 0 atkvøðum. Uppskot sambandsfloksins sostatt fallið.

25 Broyting í løgtingslóg um serligt gjald av brenniolju v.m.

Ár 1987, týsdagin 10. november legði Jógvan I. Olsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt gjald á brenniolju v.m.

løgtingslov om ændring i lagtingslov om særlig afgift på brændselsolie m.m.

§ *1.*

Í § 2 í løgtingslóg nr. 99 frá 1. oktober 1986 verður aftaná orðini: »skip yvir 20 brt.« sett orðini: »fiskavirkir, SEV«.

§ *1.*

I § 2 i lagtingslov nr. 99 fra 1. oktober 1986 sættes efter ordene: »skibe over 20 brt« ordene: »fiskevirksomheder, SEV«.

§ *2.*

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1988.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft 1. januar 1988.

Viðmerkingar:

Kreppan í føroysku heimafiskivinnuni stavar fyri stóran part frá tí førda politikkinum hjá sitandi landsstýrissamgongu.

Millum nógv onnur mistøk, hevur samgongan lagt stórt oljugjald á SEV og á føroysku fiskavirkini. Hetta merkir størri útreiðslur fyri fiskavirkini bæði til olju og til el. Hetta førir aftur við sær, at fiskaprísirnir lækka.

Fyri at bøta um úrslitini hjá føroysku fisivinnuni verður sett fram uppskot um at avtaka avgjald uppá 70 oyru á smyrjiolju, og 70 og 50 oyru á brenniolju til SEV og øll fiskavirkir, Havsbrún í Fuglafirði íroknað.

Hetta merkir samstundis lægri el-prísir fyri allar føroyskar el-nýtarar.

1. viðgerð 17. november. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. mars 1988 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Sambandsflokkinum 10. november 1987 og undir 1. viðgerð 17. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgin Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen og Tordur Niclasen) setir einki uppskot fram og vísir til løgtingsmál nr. 26/1987: Avtøka av ymiskum avgjøldum fyri fiski- og slivinnuna.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg og Eydun Videro) vísir til viðmerkingar sínar í løgtingsmál nr. 26/1987 og setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samlyktar

Løgtingið samtykkir, at lógaruppskot Sambandsfloksins verður beint til viðgerð í skattanevndini.

Ein annar minniluti (Ivan Johannesen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins við teirri broyting, at orðingin: »tó ikki fyri smyrjiolju« í løgtinglóg nr. 99 frá 1. oktober 1986 um serliga gjald á brennsluolju v.m. verður strikað og setir fram soljóðandi:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot Sambandsfloksins.

Í § 2, 1. stk. í løgtingslóg nr. 99 frá 1. oktober 1986 verður orðingin: », tó ikki fyri smyrjiolju« strikað.	I § 2, stk. 1 i lagtingslov nr. 99 af 1. oktober 1986 udgår ordene: », dog ikke for smøreolie«.

Við hesi broyting mælir minnilutin (Ivan Johannesen) løgtinginum til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

2. viðgerð 7. apríl. § 1 í uppskoti Sambandsfloksins fall við 11-0. Broytingaruppskot minnilutans í fíggjarnevndini fall við 12-0.

26 Avtøka av ymiskum avgjøldum fyri fiski- og alivinnuna.

Ár 1987, týsdagin 10. november legði Jógvan I. Olsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at koma við uppskoti til løgtingslóg um broyting í tollløggávuni um avtøku av øllum gjøldum, sum eru á útgerð, sum verður nýtt innan fiski- og alivinnuna.

Viðmerkingar:

Eftir galdandi toll- og avgjaldslógum er álagt øllum fiskireiðskapi og aðrari útgerð til fiskiskip avgjøld upp á 6 til 28%, og í summum førum enn meira.

Útgerð til alivinnuna er álagt avgjøld upp á minst 28%.

Sambandsflokkurin metir, at hetta er skeiv mannagongd.

Fiski- og alivinnan eigur at verða skattað eftir, hvussu rakstrarúrslitið er, og ikki út frá tí, vinnan er noydd til at keypa inn.

Ein skeivleiki við galdandi mannagongd er, at ein vinnufyritøka, sum er óheppin og er fyri brekum og øðrum óhappum, og av hesum er noydd til at keypa meira enn annars, kemur at gjalda enn meira til landskassan.

Herumframt kann vísast á, at landskassin letur munandi upphæddir í endurgjaldi til fiskivinnuna, samstundis sum tollur og onnur avgjøld av útgerð verða innkravd frá somu virksemum.

Út frá hesum verður mælt til, at tollur og onnur avgjøld á útgerð til fiski- og alivinnuna verða avtikin.

Hendan broyting kemur at minka um hallið hjá einari rað av skipum og øðrum virksemum og kemur at vaksa um rakstraryvirskotið, og harvið skattskyldugu inntøkuna hjá øðrum virksemum.

1. viðgerð 17. november. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. mars 1988 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Sambandsflokkinum 10. november 1987 og undir 1. viðgerð 17. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen, Tordur Niclasen) setir einki uppskot fram, men vísir á, at landsstýrið arbeiðir við at broyta tolllóggávuna, eisini spurningin um gjøld, sum eru á útgerð til fiski- og alivinnuna.

Landsstýrið hevur boðað frá, at uppskot um broyting í tolllógini verður framlagt í hesi setuni.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg og Eyðun Videro) førir fram:

Fyriliggjandi uppskot til samtyktar um uppskot til løgtingslóg um broyting í tolllóggávuni skulu sambært tingskipanina, § 7, viðgerast av skattanevndini. Tað er tí í stríð við tingskipanina, at fyriliggjandi uppskot er beint í fíggjarnevndina.

Minnilutin mælir til at beina málið til viðgerðar í skattanevndini og setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at fyriliggjandi uppskot verður beint í skattanevndina.

Hin minnilutin (Ivan Johannesen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

2. viðgerð 7. apríl. Uppskotið til samtyktar frá Fólkaflokkinum fall við 6-0 atkvøðum, uppskotið frá sambandsflokkinum fall við 11-0, málið fallið.

27 Um serskatting av hjúnafelaga.

Ár 1987, mikudagin 4. november legði Pauli Ellefsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður Føroya landsstýri at leggja fyri Føroya Løgting uppskot um broytingar í skattalógini, sum føra við sær, at heimaarbeiðandi hjúnafelagi verður skattaður av helminginum av inntøkuni upp til eina vanliga ársløn fyri ófaklærdan.

Viðmerkingar:

Meira enn eina ferð fyrr hevur Sambandsflokkurin mælt til, at heimaarbeiðandi hjúnafelagar verða serskilt skattaðir av helvtini av inntøkuni upp til eina vanliga ársløn fyri ófaklærdan.

Hendan broyting stillar nøkur teknisk krøv til skattaumsitingina, men ikki fleiri enn, at hesi lættliga kunnu loysast.

Orsøkin til, at Sambandsflokkurin ikki tók hesa broyting við í seinasta samgonguskeiði sínum, er, at tá fór fram ein total umlegging av okkara skattaskipan til samtíðarskatt.

Tí var hildið ráðiligt at bíða við hesi broyting.

Nú umleggingin til samtíðarskatt í stórum er liðug, mælir Sambandsflokkurin til, at henda týdningarmikla og átrokandi broyting verður gjørd sum skjótast.

Út frá hesum viðmerkingum verður sett fram hetta.

1. viðgerð 17. november. Málið varð beint í skattanevndina, sum 7. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum 4. november 1987 og eftir 1. viðgerð 17. november beint í skattanevndina.

Sambandsflokkurin skjýtur upp at samtykkja, at álagt verður Føroya Landsstýri at leggja fyri Føroya Løgting uppskot um broytingar í skattalógini, sum føra við sær, at heimaarbeiðandi hjúnafelagi verður skattaður av helminginum av inntøkuni upp til eina vanliga ársløn fyri ófaklærdan.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hilmar Kass, Heini O. Heinason) tekur ikki undir við uppskoti Sambandsfloksins og setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur í høvuðsheitinum undir við uppskotinum, men av tí, at tað bert ásetir inntøkupartin hjá heimaarbeiðandi hjúnafelaganum til vanliga ófaklærda løn uttan mun til, hvør samlaða inntøkan er, setir minnilutin í staðin fram hetta

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum í seinasta lagi hin 1. august 1989 at leggja fyri løgtingið eitt greitt uppskot um broyting í skattalógini, soleiðis at hjúnafelagar verða skattaðir hvør sær av helminginum av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafelagunum.

Minnilutin (Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskot Sambands floksins.

2. viðgerð 5. mai. Uppskot til samtyktar frá Sambandsflokkinum fall við 14-0 og uppskot til samtyktar frá Jógvan Sundstein fall við 13-0.

28 Lán til fiskifør.

Ár 1987, mikudagin 4. november legði Olaf Olsen, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um lán til fiskifør.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at lúna upp til 150 milliónir krónur at nýta til lán til fiskifør, sum eru í trongstøðu vegna munandi broytingar í rakstrargrundarlagi teirra.

§ *2.* Lán kunnu veitast til fiskifør, um veruliga kann roknast við, at rakstrargrundarlagið bøtist munandi eftir stytri tíð, antin av tí, at tann vinna, tey hava verið í, broytist til tað betra, ella at tey kunnu fara í aðra vinnu, sum metist at vera nóg góð til, at skipini kunnu bera seg

§ *3.* Lánini verða at nýta til rindan av falnum terminsgjøldum, ognarum og til íleggingar við tí endamáli at gera skipini nýtilig til aðra lønandi vinnu.

§ *4.* Lán verður at veðtryggja best møguligt í avvarðandi skipi.

§ *5.* Treyt fyri, at lán kann verða játtað, er, at eginpeningurin verður hækkaður við minst 5% av tí peningi, ið veittur verður samsvarandi hesi lóg.

lagtingslov om lån til fiskefartøjer.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån op til 150 millioner kroner til anvendelse til udlån til fiskerfartøjer, der er i økonomiske vanskeligheder på grund af betydelige ændringer af erhvervsgrundlaget.

§ *2.* Lån kan ydes til fiskefartøjer, såfremt der realistisk kan regnes med, at driftsgrundlaget forbedres betydeligt efter kort tid, enten på grund af at den drift, de har bedrevet, forbedres, eller at de kan komme i anden drift, som skønnes at være tilstrækkelig god til, at skibenes drift kan balancere.

§ *3.* Lånene skal anvendes til betaling af forfaldne terminer, kreditorer og til investeringer med det formål at gøre skibene brugbare til anden rentabel virksomhed.

§ *4.* Lånet skal sikres bedst muligt ved pant i vedkommende skib.

§ *5.* Betingelsen for at lån kan bevilges, er, at egenkapitalen forhøjes med mindst 5% af det beløb, som ydes i henhold til denne lov.

§ 6. Lán kunnu veitast yvir 7 - 10 ár at afturgjalda við hálvárligum gjaldi. Tvey tey fyrstu árini eru avdráttarfrí. Rentan er 5% p.a. Útgjalding fer fram eftir avgerð landsstýrisins. Í hvørjari játtan skal liggja ein bindandi útgjaldingarskrá.

§ 6. Lån kan ydes over 7 - 10 år og skal tilbagebetales med halvårlige rater. De første to år er afdragsfri. Renten er 5% p.a. Udbetaling sker efter landsstyrets afgørelse. I hver bevilling skal foreligge en bindende udbetalingsliste.

§ 7. Landsumsitingin ger tilmæli viðvíkjandi innkomnum umsóknum, og kann hon taka sær serkøna hjálp í viðgerðini av umsóknunum.

§ 7. Landsadministrationen foretager indstillinger vedrørende indkomne ansøgninger, og kan antage særkyndig hjælp i behandlingen af ansøgningerne.

§ 8. Umsøkjarin skal viðleggja roknskap fyri 3 tey seinastu árini, um hann hevur havt skipið so leingi, og upplýsingar um støðuna umsóknardagin, grundgeving fyri trongstøðuna eftir § 1 og gjølligar upplýsingar um, hvussu raksturin kann gerast lønandi og um møguligar íleggingar fyri at gera skipið nýtiligt til aðra lønandi vinnu.

§ 8. Ansøgere skal vedlægge regnskab for de sidste tre år, såfremt han har haft skibet så længe, og oplysninger om situationen ansøgningsdage, begrundelsen for de økonomiske vanskeligheder i henhold til § 1 og nøjagtige oplysninger om, hvordan driften kan gøres rentabel og om mulige investeringer for at gøre skibet brugbart til anden rentabel virksomhed.

§ 9. Umsóknir skulu vera Føroya Landsstýri í hendi seinast 31. januar 1988, men landsstýrið kann eisini veita lán til seinni innkomnar umsóknir.

§ 9. Ansøgninger skal være Færøernes landsstyre i hænde senest 31. januar 1988, men landsstyret kan også yde lån til senere indkomne ansøgninger.

§ 10. Umsitingin av givnum lánum verður fyribils at leggja til Føroya Gjaldstovu.

§ 10. Administrationen af ydede lån overføres foreløbig til Føroya Gjaldstova.

§ 11. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ 11. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tað eru fleiri bólkar av veiðiflotanum í dag, sum eru soleiðis fyri økonomiskt, at um teir ikki verða stuðlaðir við serligum tiltøkum, er vandi fyri, at teir fara á húsagang og kanska verða seldir av landinum. Her er t.d. talan um svartkjaftatrolararnar, nótaskipini og saltfiskalínuskipini. Tað eru eisini onnur

enn hesi, sum kunnu hava hjálp fyri neyðini. Í hesum førum hjálpir einki við vanligum prísískoyti ella rakstrarstudningi, tí veiðigrundarlagið er ikki til staðar. Tí má eitt lán til fyri at bøta um likviditetin.

Hesin stuðulsháttur varð nýttur fyri 8 árum síðani, og tað bjargaði einum stórum parti av flotanum tá, og tey lánini eru tey flestu langt niðurgoldin nú.

Tað er torført at meta um, hvussu stór upphædd er neyðug til hesi lánini, men mong av hesum skipum eru dýr og kosta tí nógvan pening fyri hvønn dag, sjálvt um tey liggja við bryggju.

Við at skapa henda møguleikan fyri likviditeti fáa teir, sum eiga hesi skip, høvi til at fáa tann akutta tørvin nøktaðan, um mett verður, at møguleikar eru fyri at fáa fast undir føti aftur, tí teir skulu ikki sjálvir reisa nógvan pening, men tó nakað, og lángevarin fær eina frágreiðing um, hvørjar møguleikar teir siggja fyri framhaldandi rakstri.

Tað eru so stór virði, ið hesi skip umboða, og so stórir vinnumøguleikar, ið tey kunnu geva, at tað er ikki rætt at lata tey gleppa okkara samfelag av hondum, fyrrenn alt er gjørt fyri at finna eina skilagóða loysn til at hava tey í vinnu á føroyskum hondum. Tí verður hetta uppskot sett fram.

1. viðgerð 11. november. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 23. mars 1987 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum 4. november 1987 og undir 1. viðgerð 11. november beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Asbjørn Joensen og Tordur Niclasen) hava hesar viðmerkingar:

Týðiligt er, at partar av fiskiflota okkara hava fyri neyðini at fáa ein »likviditetsstyrk«.

Landsstýrið hevur arbeitt við hesum spurningi, og var ætlan landsstýrisins at gera ein líknandi skipan sum hana, ið gjørd var í 1979, og sum Fólkaflokkurin nú hevur skotið upp.

Tá fingu fiskiskip, sum vóru í trongstøðu, eitt sokallað »serlán« úr landskassanum. Hesi lán vórðu játtað eftir ávísum treytum, lágari rentu og lagaligari afturgjalding.

Henda skipan loysti trupulleikarnar tá, og eru hesi lán nærum afturgoldin nú. Ætlanin er, at lán kunnu veitast at afturgjalda við hálvárligum gjøldum í upp til 10 ár, fyrsta árið avdráttarfrítt.

Í hvørjari játtan skal liggja ein bindandi útgjaldingarskrá. Veitast kunnu í hvørjum einstøkum føri í mesta lagi 5 mió. kr. Lán verða at veðtryggja best møguligt í avvarðandi skipi.

Treytin fyri veiting av láni er, at metingar av veiðuvanum, prísútlitnum og gongdini í rakstrarútreiðslunum geva grundarlag fyri at halda, at farið við tí serláni, sum verður veitt, verður fært fyri at bera seg fíggjarliga.

Umsøkjarin skal í minsta lagi viðleggja roknskap fyri tey seinastu trý árini, um skipið hevur verið í flotanum so leingi, og upplýsing um støðuna umsóknardagin.

Sum áður fráboðað, hevur landskassin pening tøkan til áðurnevndu serlánsskipan, men tað kann verða ein fyrimunur at læna peningin heldur enn at taka peningin út, sum stendur í banka.

Tað eru tí tvinnar heimildir í hesum lógaruppskoti, sum verður sett fram í staðin fyri uppskot Fólkafloksins. Heimild at brúka peningin í landskassanum eins og heimild verður at læna peningin.

Undir 1. viðgerð av uppskoti Fólkafloksins varð víst á, at lógin um serlán frá 1979 í høvuðsátttinum hevði virkað eftir ætlan.

Meirilutin hevur tí valt at gera hetta lógaruppskot og mæla til, at treytirnar verða fyriskipaðar við reglugerð, soleiðis at allar játtanir, sum gjørdar verða eftir hesi lóg, krevja góðkenning fíggjarnevndarinnar.

Út frá hesum viðmerkingum setir meirilutin fram soljóðandi uppskot um serlán til fiskifør í staðin fyri uppskot Fólkafloksins.

Uppskot

til

logtingslóg um lán/serlán til fiskifor.

lagtingslov om lån/særlån til fiskefartøjer.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini at nýta upp til 150 mió. kr. úr landskassanum ella læna peningin at brúka sum lán/serlán til fiskifør at bøta um rakstrargrundarlag teirra.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget at anvende op til 150 mio. kr. af landskassens midler eller låne nævnte beløb at anvende som lån/særlån til fiskefartøjer til forbedring af deres driftsmæssige grundlag.

§ *2.* Lán kunnu veitast til fiskifør, sum eru komin í fíggjarligu trongstøðu vegna broyttu forteytirnar fyri at reka fiskiskap.

§ *2.* Lån kan ydes til fiskefartøjer, der som følge af stedfundne ændringer i forudsætningerne for deres fiskeri, er kommet i økonomiske vanskeligheder.

§ *3.* Landsstýrið setir reglur um treytir fyri lánveitingini eftir hesi lóg.
2. stk. Hesar reglur verða at góðkenna av fíggjarnevnd løgtingsins.

§ *3.* Landsstyret fastsætter betingelserne for ydelse af lån i henhold til nærværende lov
Stk. 2. Disse regler skal godkendes af lagtingets finansudvalg.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

§ 4. Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelse.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Poul Michelsen) hevur hesar viðmerkingar:

Tað er átaluvert, at 5 mánaðir skulu ganga frá tí, at fíggjarnevndin fær eitt so álvarsamt mál sum hetta, áðrenn meirilutin fær upp í lag at avgreiða tað aftur til løgtingið.

Tað er tó gleðiligt, at samgongan stórt sæð tekur undir við uppskoti Fólkaflokksins, men skiljandi at vegna politiskt spæl reynir at undirskriva tað soleiðis, at tað skal síggja út sum, at hetta er eitt nýtt uppskot.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Poul Michelsen) mælir til í fyrra lagi at atkvøða fyri uppskoti Fólkafloksins og í øðrum lagi at atkvøða fyri uppskoti meirilutans, hóast hetta ikki er so gott sum Fólkafloksuppskotið, men tó nýtiligt.

Minnilutin (Ivan Johannesen) førir fram:

Ásannandi, at tann politikkur, ið sitandi samgonga hevur ført móti høvuðsvinnu okkara, er skeivur, metir minnilutin, at tað er bráðneyðugt, at likviditetshjálp verður veitt, um vinnan ikki skal steðga upp.

Tað er gamalt, at søgan endurtekur seg. Eftir at Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin høvdu skipað samgongu frá 1974 til 1980, og teir vegna klandur og maktarloysi máttu leggja frá sær, var fiskivinnan so illa fyri fíggjarliga, at bráðneyðugt varð at veita likviditetshjálp, um ikki øll fiskivinnan skuldi steðga upp.

Frá januar 1985 til nú hava Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin skipað landsstýrið. Støðan nú er upp á seg líka so hættislig sum í 1980, men nú skal tríggjar ferðir so nógvur peningur til, um tað skal muna nakað.

Tað er metan minnilutans, at um talan bert verður um at veita likvitetshjálp til fiskivinnuna, kemur hetta at verða ein stokkut hjálp, tí her er talan um at veita meiri lán til eina vinnu, sum eftir verandi fíggjarligu møguleikunum ikki hevur høvi at svara hvørjum sítt.

Hetta ásannar eisini Fiskivinnuráðið í síni árligu frágreiðing fyri 1987, har m.a. verður sagt, at fiskiflotin hevur eitt hall upp á 98 mió. kr.

Tað er alneyðugt, at bøtt verður um raksturin hjá fiskivinnuni, soleiðis at vinnan kann svara hvørjum sítt.

Sambandsflokkurin hevur víst á gongdar leiðir við uppskotum, sum miðja ímóti at stuðla fiskvinnuni meiri. Her er talan um, at vinnan skal sleppa undan avgjøldum og eisini fáa beinleiðis stuðul.

Í áliti til fíggjarlógina fyri 1988 setti Sambandið uppskot fram um at seta 280 mió. kr. til minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna móti 260 mió. kr., sum samgongan avsetti, men varð hetta uppskotið felt.

Víst verður til fygljandi løgtingsmál: Løgtingsmál nr. 42/1987: Eykajáttan til Ráfiskagrunnin 25. mió. kr.

Løgtingsmál nr. 58/1987, har mælt verður til at broyta býtið av teimum 260 mió. kr., soleiðis at Ráfiskagrunnurin fær 30 mió. kr. meiri at ráða yvir.

Løgtingsmál nr. 26/1987: Avtøka av ymiskum avgjøldum fyri fiski- og alivinnuna.

Løgtingsmál nr. 25/1987: Broyting í løgtingslóg um serligt gjald av brenniolju v.m.

Løgtingsmál nr. 24/1987: Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld.

Um frammanfyristandandi uppskot verða samtykt, er tað minnilutans metan, at grundarlagið batnar munandi við at fáa raksturin at hanga saman við fiskivinnuni.

Tikið verður undir við broytingaruppskoti meirilutans.

2. viðgerð 7. apríl. Atkvøðugreiðslan 19. apríl. § 1 í uppskoti fólkaflokksins fall við 12-0. § 1 í uppskoti meirilutans samtykt við 29-0, § 2 við 30-0. Við 30-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 21. apríl. Málið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. Lóg nr. 41 frá 20. mai 1987.

29 Nýggj lóggáva og nýggjar reglur um trygging í Føroyum

Ár 1987, týsdagin 10. november legði Terji Davidsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtykt

Álagt verður Føroya Landsstýri at leggja fyri løgtingið eina nýggja lóggávu og nýggjar reglur fyri trygging í Føroyum.

Í fyrsta lagi verður skotið upp, at broytingarnar skulu føra við sær, at einkarrætturin til trygging verður avtikin, og at peningur, bundin og vunnin frá trygging, framvegis verður verandi í Føroyum.

Í øðrum lagi verður skotið upp, at tryggingarsamtakið verður liðað sundur, og at tær einstøku deildirnar fáa loyvi til at tekna tryggingar innan tey ymisku tryggingarøkini.

Viðmerkingar:

Sambandsflokkurin hevur fyrr skotið upp, at einkarrætturin til trygging í Føroyum verður avtikin. Hetta hevur ikki vunnið frama. Við hesum uppskoti verður eina ferð enn lagt upp til avtøku av einkarrættinum.

Í fyrsta lagi verður skotið upp at loyva privatum tryggingartiltøkum at tekna tryggingar í Føroyum. Í sama viðfangi verður lagdur dentur á, at peningur, vunnin av trygging, verður verandi í landinum.

Um hetta uppskot heldur ikki hesa ferð vinnur frama, so verður í øðrum lagi skotið upp, at tryggingursamtakið verður liðað sundur, og at tær einstøku tryggingardeildirnar fáa loyvi til at tekna tryggingar innan tey ymisku tryggingarøkini. Á hendan hátt ber til hóast alt at fáa eina ávisa kapping innan hetta økið.

Galdandi lógir og reglur innan tryggingarøkið eru bæði gamlar og ótíðarhóskandi, og er tað uppá hægstu tíð, at munandi broytingar verða gjørdar.

Føroya Vanlukkutrygging varð stovnað 1926. nakrar broytingar hava verið gjørdar, seinast í 1979 í sambandi við dagpeningaskipanina. Hóast broytingarnar í hesi lóg, so virkar hon alt annað enn tíðarhóskandi. Komur skaðatilburður fyri, sum ber deyðsfall við sær, fær avvarandi goldið meðaltal út frá inntøkuni 3 tey seinastu árini. Inntøkur kunnu vera sera ójavnar, bæði fyri tað einstaka árið hjá einum borgara, og eisini sera ójavnar hjá teimum ymisku borgarunum. Við øðrum orðum kann tann sami skaðatilburður í einum føri geva upp til fleiri ferðir tað endurgjald, sum verður givið í einum øðrum føri.

Lógin fyri Føroya Brunatrygging er frá 1937 uttan stórvegis lógarbroytingar. Undir verandi viðurskftum verður dúgliga kært um, hvussu torført tað er at fáa endurgjald uttan tap, uttan so at hús brenna í grund.

Tryggingarsambandið varð stovnað í 1940. Nakrar broytingar eru gjørdar við bráðfeingis kunngerðum, og er núgaldandi lóg um trygging frá 25. mars 1956. Tá Tryggingarsambandið í 1940 varð stovnað, vóru Føroyar hersettar, og hevði hetta ivaleyst sína ávirkan á, at talan bleiv um einkarætt ella monopol. Ein onnur orsøk hevur ivaleyst verið at tryggja, at peningurin varð verandi í landinum.

Undir viðgerðini av nýggju brunalógini, og í fleiri øðrum førum, er komið týðiliga fram, at tað er tvingandi neyðugt at gera nýggjar lógir og reglur á tryggingarøkinum, og í hesum sama sambandi at avtaka galdandi einkurrætt ella mono-

pol. Eingin ivi er um, at einkarættarin er ein høvuðsorsøkin til, at vit eru eftirbátar á tryggingarøkinum í mun til okkara grannalond.

Umframt at vera ov gamlar og ótíðarhóskandi hvør sær, so hanga lógir og reglur fyri teir einstøku tryggingarstovnarnar ikki saman. Fleiri dømi um hetta eru nevnd í viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 67/1985. Tað er tí neyðugt undir øllum umstøðum at føra lógirnar og reglurnar fyri verandi tryggingardeildir ajour, uttan mun til um tað fyrra uppskotið um privatisering av tryggingarøkinum vinnur frama, ella um tað seinna uppskotið um sundirliðing av tryggingarsamtakinum verður fyritrekt.

1. viðgerð 18. november. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 3. mai 1988 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Sambandsflokkinum 10. november 1987. Við 1. viðgerð 18. november varð málið beint í rættarnevndina til viðgerðar.

Málið snýr seg í fyrsta lagi um, at einkarættarin til trygging verður avtikin, í øðrum lagi um, at tryggingartiltakið verður liðað sundur.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilutа og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hans J. Debes, Jóannes Dalsgaard og Jákup Lindenskov) tekur ikki undir við uppskotinum og setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Eilif Samuelsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) heldur, at Tryggingarsambandið Føroyar hevur havt stóran týdning fyri føroyska samfelagið. Men sum frá er liðið, er organisatiónin stirðnað, og ikki alt innan fyri samtakið riggar nóg væl. Til dømis kann nevnast, at brunatrygging v.m. ikki er tíðarhóskandi. Minnilutin heldur tað tí vera neyðugt við eini endurskoðan av allari føroysku tryggingarskipanini, herundir eisini lóggávuni og setir tí fram hetta:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta ein arbeiðsbólk at endurskoða lóggávuna um trygging í Føroyum og øll tryggingarviðurskifti annars. Arbeiðið skal vera liðugt í seinasta lagi hin 1. mars 1989.

2. viðgerð 5. mai. Uppskotið til samtyktar frá rættarnevndini fall við 10-0, og uppskot Sambandsfloksins fall við 11-0 atkvøðum.

30 Sjómannaløgtingslóg (Lm. 129/86).

Ár 1987, týsdagin 10. november legði rættarnevndin fram soljóðandi:

Álit

Landsstýrið legði málið fyri tingið 7. apríl 1987, løgtingsmál nr. 129/1986. Uppskotið er í sínt heild partur av sama lóggávuverki, sum løgtingsmálini nr. 114/1986: Løgtingslóg um manning av skipum og 115/1986: Sjóvinnulóg, ið skulu laga føroyskar reglur til galdandi millumtjóða reglur á hesum øki. Vantandi nýggj lóggáva á hesum øki hevur longu gjørt førleygingar til eftirbátar viðvíkjandi rættindum í millumtjóðasigling.

Málið var til 1. viðgerð 8. apríl 1987 og varð beint í rættarnevndina, sum hevur viðgjørt málið, men av tí at málið er so umfatandi, helt nevndin, at hon átti at fáa stundir at viðgera tað meira gjølla enn møguligt er við so stuttum skotbrá beint fyri tingslit, og mælti rættarnevndin til, at uppskot til sjómannaløgtingslóg varð viðgjørt framhaldandi í rættarnevndini, sum síðani varð gjørd til millumtinganevnd hesum máli viðvíkjandi. Hetta varð samtykt.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fundir við arbeiðsbólkin, ið gjørt hevur lógaruppskotið, sami arbeiðsbólkur, ið hevur uppskotini til manningarlóg og løgtingslóg um sjóvinnu (tingmálini nr. 31/1987: Løgtingslóg um manning av skipum og nr. 32/1987: Sjóvinnulóg (ávikavist 114 og 115 í 1986).

Undir arbeiðinum í millumtinganevndini eru øll ivamál lýst og í ávísum før um er tilfar útvegað, ið hevur verið mest neyðugt til tess, at støðið fyri uppskotinum er haldgott. Eisini hava verið settir spurningar til serkønar á avvarðandi økjum, og metir nevndin, at út frá fyriliggjandi tilfari er málið búgvið til viðari tingsviðgerð. Talan er um sera umfatandi økir, har lóggávan treingir til at koma á sama støðið sum í øðrum londum og ásannandi, at tørvur er fyri, at vinnulív okkara á hesum økjum skal eiga arbeiðsligar lógarreglur at virka undir, mælir ein samd rættarnevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Nevndin ásannar, at tað er umráðandi, at hendu lóg fær gildi skjótast gjørligt, og er semja um, at skuldi tað vísa seg, at smærri brek ella villur koma fyri í lógini, ella at neyðugt kann vera at broyta lógina av umsitingarligum orsøkum, er nevndin sinnað til at taka tey øki í lógini til endurviðgerð, ið tørvur møguliga kann vera fyri.

Víst verður annars til løgtingsmál nr. 31/1987: Løgtingslóg um manning av skipum (114/86), har broyting er til § 6 og løgtingsmál nr. 32/1987: Sjóvinnulóg (115/86), har broyting er til § 19, nr. 1.

2. viðgerð 12. november. § 1 samtykt við 21-0, §§ 2-74 samtyktar við 20-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 23-0 atkvøðum.

3. viðgerð 18. november. Málið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1600-3-3. Lóg nr. 4 frá 15. januar 1988.

31 Løgtingslóg um manning av skipum.

Ár 1987, týsdagin 10. november legði rættarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði málið fyri tingið 28. mars 1987 (løgtingsmál nr. 114/1986). Landsstýrið leggur dent á, at neyðugt er at broyta verandi lóggávu og ger vart við hesar 4 høvuðsbroytingar:

1. Sjóvinnulógin kemur í serstaka lóg,
2. Fiskiskip og handilsskip verða í sonu manningartalvum,
3. Stjórin, ið umsitur manningarlógina, ásetir sjóvinnukrøv og manningartal.
4. Avgerðir stjórans kunnu kærast til eitt sjóvinnuráð.

Málið varð eftir 1. viðgerð 8. apríl 1987 beint í rættarnevndina, sum hevur viðgjørt málið. Nevndin helt málið vera so umfatandi, at hon eigur at fáa stundir at viðgera tað meira gjølla enn møguligt er bert fáa dagar fyri tingslit, og mælti rættarnevndin til, at nevndin verður gjørd til millumtinganevnd hesum máli viðvikjandi. Hetta varð samtykt.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið, og verður vist til nýggja álitið í løgtingsmáli nr. 30/1987: Sjómannaløgtingslóg (129/86).

Í skrivi frá 23. apríl 1987 bevur landsstýrið heitt á rættarnevndina um at gera hesar rættingar í álitinum:

»Í føroysku talvuni til § 6 um maskinmeistarar og motorpassarar eigur »heimasigling (30 fjórðingar)« at verða broytt til: »strandasigling (30 fjórðingar)« og »nærsigling (200 fjórðingar)« eigur at verða broytt til: »heimasigling (200 fjórðingar)«.

Samsvarandi hesum setir samd nevnd fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o f

til

uppskot landsstýrisins

Í føroysku talvuni til § 6 um maskinmeistarar og motorpassarar eigur »Heimasigling (30 fjórðingar)« at verða broytt til: »Strandasigling (30 fjórðingar)« og »Nærsigling (200 fjórðingar)« eigur at verða broytt til: »Heimasigling (200 fjórðingar)«.

2. viðgerð 12. november. Rættarnevndin legði fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 19, 1. stk. verður orðað soleiðis:	§ 19, stk. 1 formuleres således:
»Føroya Landsstýri ásetir, nær henda lóg kemur í gildi.«	»Færøernes Landsstyre fastsætter tidsfristen for lovens ikrafttræden.«

Atkvøðugreiðsla: § 1: 24-0, §§ 2-5: 24-0 broytingaruppskot § 6, talva um maskinmeistarar: 24-0, §§ 7-18: 24-0. Broytingaruppskot § 19, 1. stk.: 23 0, § 19:14-0, §§ 20-21: 24-0. Við 24-0 samtykt, at málið skuldi fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt.

18. november legði rættarnevndin fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 6 verður skoytt uppí sum 5. stk.:
»5. stk. Fyri fiskiskip millum 800 og 1599 tons er førleikakravið til skiparan: Skiparabræv, um so er, at treytirnar í § 35, 1. stk., pkt. 3 í sjóvinnulógini, er loknar.«

3. viðgerð 18. november. Broytingaruppskotið frá rættarnevndini til § 6 samtykt við 25 0 atkvøðum. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1600-3-3. Lóg nr. 5 frá 15. januar 1988.

32 Sjóvinnulóg.

Ár 1987, mikudagin 4. november legði rættarnevndin fram soljóðandi:

Álit

Landsstýrið legði málið fyri tingið 28. mars 1987 (løgtingsmál nr. 115/1986).

Uppskotið snýr seg um tær broytingar, sum millumtjóða sáttmálar í sjóvinnumálum gera neyðugar eisini í føroyskari sjóvinnulóggávu.

Í fráboðan til IMO 20. januar 1981 góðkendi Danmark STCW-sáttmálan við fyrivarni viðvíkjandi Føroyum og Grønlandi. Sáttmálin kom í gildi 28. apríl 1984. Løgtingið góðtók hann í september 1984.

At tilhoyrandi fylgilógir ikki hava verið gjørdar, hevur skapað trupulleikar hjá føroyskum deksyvirmonnum, sum ikki longur fáa vinnubrøv við donskum skipum. Við 1. viðgerð hin 8. apríl 1987 varð málið beint í rættarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Rættarnevndin helt málið vera so umfatandi, at hon átti at fáa stundir at viðgera tað meira gjølla enn møguligt er bert fáar dagar fyri tingslit, og mælti nevndin tí til, at hon varð gjørd til millumtinganevnd hesum máli viðvíkjandi. Hetta varð samtykt.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og verður víst til nýggja álitið í løgtingsmáli nr. 30/1987: Sjómannaløgtingslóg (129/86).

Í skrivi frá 23. apríl 1987 hevur landsstýrið heitt á rættarnevndina um at gera hesar rættingar í álitinum:

»§ 19, nr. 1, a í føroyska tekstinum eigur at vera soljóðandi: »Grundskeiðið, sum Føroya landsstýri hevur góðkent, og síðani havt lærutíð í kokkayrkinum til longdar í minsta lagi 23 mánaðir, av hesum í minsta lagi í 12 mánaðir við havskipi ella«.

Samsvarandi hesum setir samd nevnd fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 19, nr. 1, a verður soljóðandi:

»grundskeiðið, sum Føroya landsstýri hevur góðkent, og síðani havt lærutíð í kokkayrkinum til longdar í minsta lagi 23 mánaðir, av hesum í minsta lagi í 12 mánaðir við havskipi ella«.

2. viðgerð 12. november. Rættarnevndin legði fram soljóðandi:

broytingaruppskot

§ 34, 1. stk., 1. pkt. verður orðað soleiðis:

»Føroya landsstýri ásetir, nær henda lóg kemur í gildi.«

§ 34, stk. 1, pkt. 1 formuleres således:

»Færøernes landsstyre fastsætter tidspunktet for lovens ikrafttræden.«

Atkvøðugreiðsla við 2. viðgerð: § 1 samtykt við 22-0, §§ 2-18 við 23-0, broytingaruppskot § 19, nr. 1 a samtykt við 23-0, § 19 soleiðis broytt samtykt við 23-0, §§ 20-33 samtyktar við 23-0, broytingaruppskot § 34, 1. stk. 1. pkt. samtykt við 24-0, § 34 soleiðis broytt samtykt við 24-0, §§ 35-38 samtyktar við 24-0. Við 24-0 atkvøðum samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

18. november løgdu tingmenninir Henrik Old, Jógvan I. Olsen, Olaf Olsen og Adolf V. Hansen fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

til

løgtingsmál nr. 32/1987: Sjóvinnulóg.

Í uppskoti landsstýrisins verður 4. stk. í § 27 í føroyska tekstinum soljóðandi:

»Uttan mun til reglurnar í § 20, 1. stk., § 21, 1. stk., § 22, 1. stk. og § 23, 1. stk. kann skipari, tá tað verður hildið neyðugt til tess at sleppa undan, at skip, ið verður tarnað, í undantaksføri mynstra persón, sum óroyndan matrós ella dekkara, royndan matrós ella dekkara, óroyndan motormann, royndan motormann, óroyndan dekkara, ella royndan dekkara, sjálvt um viðkomandi ikki lýkur tær treytir, sum ásettar eru í nevndu reglum fyri mynstring. Slík mynstring kann bara fara fram fyri túrin og, tá ið starvssetanin ikki er farin fram her á landi, bert við teirri fyritreyt, at avvarðandi lýkur tey krøv um siglingartíð, sum eru ásett við mynstring í samsvarandi starvi«.

3. viðgerð 18. november. Broytingaruppskotið frá Henrik Old fall við 13 0. Lógin soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 20-0 atkvøðun.

F.L. j.nr. 1600-3-3. Lóg nr. 16 frá 3. mars 1988.

33 Løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensiónistar v.fl..

Ár 1987, mikudagin 4. november legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensiónistar v.fl.

§ *1.* Í fíggjarárinum 1987 verður úr landskassanum veittur ein brennistudningur til pensiónistar við 1.200 kr. til hvønn pensiónist.

§ 2. Brennistudningurin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. oktober 1987 hava fingið játtað fólkapensión, avlamispensión ella einkjupensión ella hava sent inn umsókn um slíka pensión, tí rætturin til hana er uppnáddur, og seinri fáa pensiónini játtaða.

§ *3.* Treytin fyri at fáa brennistudning er, at pensiónisturin ikki hevur hægri ársinntøku út um pensiónina enn 80.000 kr. fyri hjún og 60.000 kr. fyri støk. Til grund fyri útrokningini verður løgd inntøkan, sum nýtt verður í sambandi við útrokning av pensiónini pr. 1. oktober 1987. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensiónistar, eiga ein part í felag.

lagtingslov om brændselstilskud til visse pensionister m.fl.

§ *1.* I finansåret 1987 ydes af landskassen et brændselstilskud til pensionister på 1.200 kr. til hver pensionist.

§ 2. Brændselstilskud ydes til personer, som inden den 1. oktober 1987 har fået bevilget folkepension, invalidepension eller enkepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og som ere får pensionen bevilget.

§ *3.* Betingelsen for at få brændselstilskud er, at pensionisten ikke har højere årsindtægt foruden pensionen end 80.000 kr. for ægtefæller og 60.000 kr. for enlige. Til grund for beregningen lægges den indtægt, der anvendes i forbindelse med beregning af pensionen pr. 1. oktober 1987. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ *4.* Í fíggjarárinum 1987 verður úr landskassanum eisini veittur ein brennistudningur við 1.200 kr. til fólk, sum tann 1. oktober 1987 fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlógini, undir somu treytum sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ *5.* Brennistudningurin verður útgoldin av Føroya Gjaldstovu.
2. stk. Annars hevur Almannastovan fyrisitingina av brennistudninginum um hendi.
3. stk. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

§ 6. Brennistudningurin er ikki skattskyldugur.

§ *7.* Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

§ *4.* I finansåret 1987 ydes af landskassen også et brændselstilskud på 1.200 kr. til personer, der den 1. oktober 1987 modtager hjælp efter forsorgslovens § 13, på samme betingelser som fastsat i § 3 i denne lov.

§ *5.* Brændselstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldstova.
Stk. 2. Iøvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændselstilskuddet.
Stk. 3. Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

§ 6. Brændselstilskuddet er ikke skattepligtigt.

§ *7.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í fíggjarárinum 1980/81 varð brennistudningur veittur til ávísar pensjónistar við 900 kr. til hvønn pensiónist sambært løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 1980 um brennistudning til ávísar pensiónistar.

Í fíggjarárinum 1981/82 varð brennistudningur veittur til ávísar pensiónistar við 1.200 kr. til hvønn pensiónist sambært løgtingslóg nr. 26 frá 5. mai 1981 um brennistudning til ávísar pensiónistar.

Í fíggjarárinum 1981/82 varð sambært løgtingslóg nr. 76 frá 11. desember 1981 um brennistudning til stakar uppihaldarar brennistudningur eisini veittur støkum uppihaldarum við egnum húsarhaldi, sum fingu hjálp sambært § 22 í forsorgarlógini.

Í fíggjarárinum 1982/83, 1983/84, 1984/85 og 1. apríl - 31. desember 1985 varð sambært løgtingslógunum nr. 79 frá 21. mai 1982, nr. 52 frá 20. mai 1983, nr. 63 frá 5. juni 1984 og nr. 3 frá 9. januar 1986 um brennistudning til ávísar pensiónistar og stakar uppihaldarar brennistudningur veittur við 1.200 kr. til hvønn í hvørjum fíggjarári.

Í 1986 vórðu eisini sambært løgtingslóg nr. 119 frá 25. november 1986 veittar 1.200 kr. til hvønn pensiónist.

Í hesi lóg var treytin tann, at ársinntøkan ikki var omanfyri 50.000 kr. fyri støk og 70.000 kr. fyri hjún. Áður hevði treytin verið, at viðkomandi átti rætt til — fulla ella skerda — pensiónsviðbót.

Útreiðslurnar til brennistudningsskipanina vóru í fíggjarárinum

1980/81	2.606.000 kr.
1981/82	3.596.000 kr.

1. viðgerð 12. november. Málið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 17. november: § 1 samtykt við 25-0, §§ 2-7 samtyktar við 25-0. Við 25-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

17. november legði Flemming Mikkelsen vegna Sambandsflokkinum fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Sambandsflokkurin vísir á, at tað er vorðið dýrari at búgva í Føroyum og heldur tað neyðugt at hækka brennistudningin í §§ 1 og 4 frá 1.200 kr. til 1.500 kr. og setir samsvarandi hesum til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 1 verður upphæddin »kr. 1.200,-« broytt til: »kr. 1.500,-«	1) I § 1 ændres beløbet »kr. 1.200,-« til: »kr. 1.500,-«
2) Í § 4 verður upphæddin »kr. 1.200,-« broytt til: »kr. 1.500,-«	2) I § 4 ændres beløbet »kr. 1.200,-« til: »kr. 1.500,-«.

Meiriútreiðslan, umleið 1. mió. kr. verður fíggjað úr oljugrunninum.

3. viðgerð 25. november: Broytingaruppskotið frá sambandsflokkinum til § 1 fall við 10-0 og til § 4 fall við 9-0. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1010-20-1. Lóg nr. 101 frá 16. december 1987.

34 Grannskoðan av almennum roknskapum
1. Føroyskur happadráttur 1986.

Ár 1987, mikudagin 11. november løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi:

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Føroyska Happadráttinum fyri árið 1986.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapin hjá Føroyska Happadráttinum fyri 1986 og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá happadráttinum eru kannað og í lagi.

Í 1986 vóru seðlar í útboði fyri 3.640.000 kr., minni enn 1% av seðlunum eru óseldir og umhugsað eigur at verða um seðlatalið ikki eigur at verða økt.

Á útreiðslusíðuni hevur eftirlit og roknskapur kostað knapt 237.000 kr. Arbeiðsháttur in viðvíkjandi hesum er so at siga óbroyttur síðani happadráttur in byrjaði at virka.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at kannað eigur at verða um ein nútímansgerð av eftirliti og roknskapi ikki eigur at fara fram, soleiðis at umsitingin av happadráttinum á henda hátt kann gerast bíligari.

1. viðgerð 24. november. Samtykt varð at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 8. december. Málið samtykt við 30-0 atkvøðum.

34 Grannskoðan av almennum roknskapum 2 Útvarp Føroya 1986.

Ár 1987, týsdagin 8. december løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot

til

samtyktar.

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Útvarp Føroya fyri árið 1986.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
Løgtingsgrannskoðararnir hava grannskoðað roknskapin hjá Útvarpi Føroya og fyri omanfyrinevnda tíðarskeið og ásanna, at roknskapargrannskoðanin á stovninum er farin fram samsvarandi reglunum.

Roknskaparliga úrslitið er eitt yvirskot uppá 774.000 kr. Stærsta inntøka útvarpsins er útvarpsgjald, ið er 14.800.000 kr. Hendan inntøkan er hækkað við 6,5 milj.kr. síðani fíggjarárið 1984/85 og stavar hetta partvís frá eini hækking í útvarpsgjaldinum frá 550 kr. til 700 kr. og eini hækking í skrásetta lurtaratalinum.

Tað er ógvuliga trupult at halda skil á lurtaratalinum og hetta ger so aftur tað, at eftirstøðurnar í útvarpsgjaldinum er ógvuliga skjótt vaksandi. Eftirstøðurnar eru pr. 1. januar 1987 kr. 4.781.276,00.

Løgtingsgrannskoðarnir hava eisini varnast, at tað eru ynskir frá fleiri bólkum í samfelagnum um at fáa niðursett lurtara- og sjónvarpsgjald. Uttan mun til um slík ynskir verða gingin á møti, so er eingin ivi um, at umsiting av gjøldum, bæði fyri sjónvarp og útvarp við tíðini verður alt meir og meir fløkt.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at tíðin er komin at gera eina nýggja skipan fyri innkrevjing av sjónvarps- og útvarpsgjaldi.

Samstundis eigur rakstrar- og íløgugrunnur fyri Útvarp Føroya at verða settur á stovn soleiðis, at útvarpið kann arbeiða út frá somu skipan, sum t.d. postverkið og sjónvarpið gera.

Løgtingsgrannskoðararnir gera eisini vart við, at tá ið nýggi millumbylgjusendarin fer at virka, ætlandi umleið ársskifti í 1989, koma rakstrarútreiðslur útvarpsins at økjast við umleið 3 milj. kr. árliga. Um raksturin skal fíggjast við eins stórum útvarpsgjøldum til allar skrásettar móttakarar, so má útvarpsgjaldið í 1989 roknast at koma upp um tær 1000 kr. árliga.

Eisini halda løgtingsgrannskoðararnir, at støða longu nú eigur at verða tikin til, um útvarp/sjónvarp skulu hava sama bygnað framyvir, nú stovnsleiðsluskifti má væntast at fara fram

1. viðgerð 14. december. Málið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 20. januar 1988. Uppskotið frá løgtingsgrannskoðarunum til samtyktar samtykt við 25-0 atkvøðum.

34 Grannskoðan av almennum roknskapum 3 Føroya Yvirformyndarí 1984/85, 1985 og 1986

Ár 1987, mikudagin 11. november løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi:

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Føroya Yvirformyndarí fyri fíggjarárið 1984/85, 1985 og 1986.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað roknskapirnar hjá Føroya Yvirformyndarí fyri nevndu fíggjarár og hava ásannað, at formyndaríið røkir sínar roknskaparligu skyldur samsvarandi lógini.

1. viðgerð 25. november: Samtykt varð at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 8. december: Málið varð samtykt og avgreitt við 30-0 atkvøðum.

34 Grannskoðan av almennum roknskapum 4 Sjúkrahús Føroya

Ár 1987, mikudagin 11. november løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi:

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyrinevndu roknskapir hjá Sjúkrahús verki Føroya fyri fíggjarárini 1983/84, 1984/85 og 1985.

Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum:
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar og roknskapar grannskoðarans frágreiðing frá Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar- og Suðuroyar sjúkrahúsi fyri omanfyrinevndu fíggjarár og fingið trygd fyri, at peningavirðið og skjalatilfarið hjá sjúkrahúsunum eru kannað.

Løgtingsgrannskoðararnir hava fyrr gjørt vart við, at eykafíggjarlógin hjá øllum sjúkrahúsunum, sum vanliga verður løgd fram rættiliga tíðliga í hvørjum fíggjarári sær, ikki hevur verið løgd fyri fíggjarnevnd løgtingsins til góðkenningar ella játtanar.

Í seinasta áliti verður sagt, at tá fíggjarlógaruppskotið varð gjørt fyri 1982/83 fekk leiðslan á sjúkrahúsunum boð um, at sjúkrahúsini skuldu halda seg innanfyri ta givnu játtanina í sjálvari fíggjarløgtingslógini, tí skuldi ikki verða neyðugt við eykafíggjarlóg í sjálvum fíggjarárinum. Tað árið vísti tað seg kortini, at yvirnýtsla var á øllum trimum sjúkrahúsunum. Í 1984 søgdu løgtingsgrannskoðararnir, at teir mettu, at høvdu sjúkrahúsini tørv á eykafíggjarlóg í sjálvum fíggjarárinum, so skuldi ein slík leggjast fyri fíggjarnevnd løgtingsins í sama árinum og ikki fyri løgtingið mánaðir og ár eftir, at fíggjarárið er farið aftur um bak.

Á fundi við setta sjúkrahússtjóran, Karter Højgaard, varð upplýst, at í 1985 og 1986 varð eingin eykafíggarlóg gjørd. Karter Højgaard segði víðari, at hann meinti, at Bonnevie, fyrrverandi umsjónarmaður, í sínari tíð byrjaði við hesum. Eykafíggjarlógin varð vanliga gjørd í november/december í sama ári, um tað vísti seg, at vanliga játtanin ikki fór at halda. Sjúkrahússtýrini samtykti síðani lógina. Karter Højgaard er ikki vitandi um, at eykafíggjarlógin hevur verið løgd fyri fíggjarnevnd løgtingsins aftaná, at sjúkrahússtýrini hava samtykt hana.

Av tí at ógreiða hevur verið á myndugleikabýtinum millum sjúkrahússtjóran/umsjónarmannin og formannin í einum sjúkrahússtýri, hava løgtingsgrannskoðararnir biðið skrivustovustjóran í landsstýrinum um responsum viðvíkjandi reglunum um myngugleikabýti í fyrisitingini av sjúkrahúsverkinum. Í svari til løgtingsgrannskoðararnar vísir skrivstovustjórin í landsstýrinum á reglugerð nr. 70 frá 6. oktober 1977.

Viðvíkjandi sjúkrahússtýrinum eru reglurar, at eitt sjúkrahússtýri kann viðgera øll mál viðvíkjandi sjúkrahúsinum. Av serligum týdningi er, at sjúkrahússtýrið gevur tilmæli til sjúkrahússtjóran um fíggjaræltanina.

Sjúkrahússtjórin hevur mótvegis sjúkrahússtýrinum ábyrgdina fyri gjølligari fyrisiting av sjúkrahúsverkinum eftir tí stevnu, sum sjúkrahússtýrini setur.

Sjúkrahússtjórin ger og sendir landsstýrinum uppskot til nágreiniliga figgjarætlan grundað á uppskotið frá stýrinum. Innum karmin á góðkendari figgjarætlan hevur stjórin heimild til vegna stýrið at taka avgerð í øllum málum, sum ikki eiga at verða løgd fyri stýrið. Verður figgjarætlanin góðkend av løgtinginum, má ikki farast útum; er ovurnýtsla neyðug, skal stjórin við viðmæli frá stýrinum senda umsókn til figgjarnevndina.

Umsjónarmaðurin hevur ábyrgd fyri stjóranunumum dagligu fyrisitingina av sjúkrahúsinum. Eftir hesum hevur sjúkrahússtjórin eina aðalfullmakt at fyrisita sjúkrahús/-húsini, men innan karmin av góðkendari figgjarætlan og við ábyrgd fyri sjúkrahússtýrinum/-unum. Lagt verður aftur at, at formaðurin í einum sjúkrahússtýri hevur ongan myndugleika at taka avgerð einsamallur. Er ein meirinýtsla samtykt av stýrinum, so skal stjórin leggja málið við sínum ummæli fyri figgjarnevndina.

Ráðgeving og eftirlit av arkitektavirki hjá sjúkrahúsverkinum.
Løgtingsgrannskoðararnir hava spurt sjúkrahússtjóran, hvat tað kostar um árið at hava donsk arkitektavirki til ráðgeving og eftirlit hjá sjúkrahúsverkinum. Í svari til løgtingsgrannskoðararnar 2. mars 1987 sigur setti sjúkrahússtjórin, at sjúkrahúsini ígjøgnum mong ár hava nýtt útlendsk arkitektavirkir. Hesi virki hava síðani fyrst í sekstiárunum tikið sær av byggimálum innan sjúkrahúsini. Hesi stóru fyri byggingini av statshospitalinum og hava síðani verið nýtt av sjúkrahúsunum.

Sjúkrahúsini rinda ikki fyri ráðgeving sum so, men einans tá talan er um projekt, har reelt arbeiði er gjørt. Í 1986 er verkfrøðinga/arkitektasamsýning rindað við tilsamans kr. 1.219.055,85, ið kann útgreinast soleiðis: Arkitektsamsýning kr. 467.581,- og verkfrøðingasamsýning kr. 699.042,34. Sjúkrahússtjórin leggur aftur at, at umframt nevndu upphæddir hevur landssjúkrahúsið goldið kr. 40.274,72 fyri ferðaútreiðslur og innivist v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at tíðin nú má vera komin til at taka støðu til, um ikki føroysk arkitekt- og verkfrøðingavirki kunnu taka sær av hesum spurningum. Væntiliga skulu øll trý sjúkrahúsini endurnýggjast í komandi tíðum, og má spurningurin vera rættiliga aktuellur júst nú.

Á seinastu figgjarlóg varð avgjørt, at ortopædkirurgisk skurðstova skuldi byggjast í Klaksvík og ortopædkirurgur setast á landssjúkrahúsinum. Síðani er vorðið greitt, at stýrið fyri Klaksvíkar sjúkrahús á fundi hin 30. mars 1987 er komið við nýggjum uppskoti viðvíkjandi byggjan av ortopædkirurgiskari skurðstovu. Hetta uppskot víkur nógv frá tí, ið samtykt varð á figgjarlógini, men kortini hevur stýrið fyri Klaksvíkar sjúkrahús biðið arkitektin um at gera nýtt uppskot viðvikjandi ortopædkirurgiskari skurðstovu. Hesin spurningur varð ikki lagdur

fyri ráðleggingarnevndina frammanundan. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at eitt sjúkrahússtýri biður um nýggj projekt, uttan at ráðleggingarnevndin fyri sjúkrahúsverkið hevur gjørt metingar av málinum.

Viðvíkjandi privatari praksis hjá yvirlæknum á sjúkrahúsunum.
Í samband við grannskoðanina av roknskapunum hjá teimum trimum sjúkrahúsununum hevur p/f Grannskoðarastovan Pauli Ellefsen statsaut. revisor gjørt vart við, at sera ymiskar og ógreiðar reglur eru galdandi fyri leigu og facilitetir hjá sjúkrahúsunum Grannskoðarastovan heldur, at reglurnar eru sera tilvildarligar, og mælir til, at tær verða fingnar í rættlag. Løgtingsgrannskoðararnir hava lagt honda spurning fyri sjúkrahússtjóran, sum við skrivi frá 12. december 1986 sigur, at málið er viðgjørt á fundi í stýrinum fyri landssjúkrahúsið tann 4. december 1986, har samtykt varð, at umsjónarmaðurin skal tingast við yvirlæknarnar um at fáa eina meira nágreinilíga avtalu í lag. Løgtingsgrannskoðararnir hava nýtt høvið til í skrivi til sjúkrahússtjóran at biðja hann bera so í bandi, at sami spurningur viðvíkjandi Klaksvíkar sjúkrahúsi og Tvøroyrar sjúkrahúsi verður fingin í rættlag.

1. viðgerð 8. december. Málið varð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 11. december. Málið samtykt og avgreitt við 23-0 atkvøðum.

34 Grannskoðan av almennum roknskapum. 5 Skúlabókagrunnurin 1986.

Ár 1988, týsdagin 23. februar løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi:

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Skúlabókagrunninum fyri fíggjarárið 1986.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað roknskapin hjá Skúlabókagrunninum fyri omanfyri nevnda ár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskiftini og skjalatilfarið hjá grunninum eru í lagi.

Samsvarandi lógini frá 1959 um skúlabókaútgávu hevur grunnurin ábyrgdina av, at skúlabøkur verða prentaðar og útgivnar í fyrstu syftu fyri barnaskúlarnar og síðani fyri teir hægru skúlarnar.

Løgtingsgrannskoðararnir eru nøgdir við, at játtanin á fíggjarlógini nú er í betri samsvar við tað umfatandi arbeiði, ið skúlabókagrunnurin ger við útgávu av skúlabókum.

Arbeiðið í Skúlabókagrunninum er sum nevnt ógvuliga umfatandi, og løgtingsgrannskoðararnir fegnast yvir, at í veruleikanum nú er skipaður sum sjálvstøðugur stovnur.

1. viðgerð 25. februar. Málið var beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 1. mars 1988. Uppskotið frá løgtingsgrannskoðarunum samtykt við 28-0 atkvøðumm.

34 Grannskoðan av almennum roknskapum.
6 Mentannargrunnur Føroya Løgtings.

Ár 1988, týsdagin 23. februar løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi:

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Mentunnargrunni Føroya Løgtings fyri fíggjarárið 1986.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað roknskapin hjá Mentunnargrunninum fyri omanfyri nevnda ár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskiftini og skjalatilfarið hjá grunninum eru kannað.

Løgtingsgrannskoðararnir eru nøgdir við, at Mentunargrunnurin í 1986 — nú játtanirnar frá løgtinginum eru munandi hækkaðar — hevur fingið nýggja reglugerð ístaðin fyri teirra gomlu, sum var frá 1947.

1. viðgerð 25. februar. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 1. mars. Uppskotið frá løgtingsgrannskoðarunum varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

34 Grannskoðan av almennum roknskapum.

7 Brandvenjingarstøðin við Áir.

Ár 1988, týsdagin 23. februar løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi:

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Brandvenjingarstøðini við Áir fyri árini 1985 og 1986.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Brandvenjingarstøðini við Áir fyri omanfyri nevndu ár og fingið trygd fyri, at roknskaparviðurskiftini hjá stovninum eru kannað og í lagi. Brandvenjingarstøðin er sjálveigandi stovnur.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, eins og í seinasta áliti, at hesin stovnur fíggjarliga eigur at hvíla í sær sjálvum og at tryggingin eigur at átaka sær tað gjald, sum landskassin hevur borið.

1. viðgerð 25. februar. Málið varð beint til 2. vigðerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 1. mars. Uppskotið frá løgtingsgrannskoðarunum varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

34 Grannskoðan av almennum roknskapum.
8 Sjónvarp Føroya 1986.

Ár 1988, mikudagin 2. mars legði grannskoðannarnevndin fram soljóðandi:

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Sjónvarp Føroya fyri tíðarskeiðið 1/1-31/12-1986.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað roknskapin hjá Sjónvarpi Føroya fyri umrunfyrinevnda tíðarskeið og fingið trygd fyri, at peningaviðurskiftini og skjalatilfarið hjá Sjónvarpi Føroya eru kannað og í lagi.

Sambært sjónvarpslógini (løgtingslóg nr. 77 frá 1982) er vald sjónvarpsnevnd við 6 limum, 5 valdir av løgtinginum og 1 av landsstýrinum. Hetta val fer fram á fyrsta tingi aftaná løgtingsval.

Landsstýrið og fíggjarnevndin leggja fíggjarliga karmin hjá sjónvarpinum við ásetan av sjónvarpsgjaldi og játtan á fíggjarløgtingslógini.

Sjónvarpsnevndin tekur avgerð innan hendan fíggjarkarm, hvussu dagsskrá sjónvarpsins í høvuðsheitum skal skipast, bæði viðvíkjandi dygd og longd. Landsstýrið hevur saman við løgtingsins fíggjarnevnd, sambært sjónvarlógina, avgerðarrættin og ábygrd av øllum fíggjarligum viðurskiftum í sjónvarpinum.

Lógin fyriskrivar, at fyristøðumaðurin í sjónvarpinum ger uppskot til fíggjarætlan fyri hvørt fíggjarárið og sendir landsstýrinum uppskotið til góðkenningar.

Løgtingsgrannskoðararnir eru av teirri áskoðan, at hetta er ein greið skipan, ið býtir ábyrgdina upp soleiðis, at fíggjarábyrgdin liggur hjá landsstýrinum, meðan sjónvarpsnevndin hevur ábyrgd av tí, ið sent verður.

Løgtingsgrannskoðararnir vísti í seinasta áliti á, at reglugerðin fyri sjónvarpið, ið er tann sama, sum fyri útvarpið, og er frá 1957, eigur at verða endurskoðað og broytt. Hetta er ikki gjørt. Tað er upplýst, at hetta hongur saman við at endaliga støða er ikki tikin til framtíðarbygnaðin í sjónvarpinum.

Løgtingsgrannskoðararnir heita á landsstýrið um at fáa avgreitt spurningin um bygnað sum skjótast, antin hann skal broytast ella verða sum hann er. Skal hann frambaldandi verða sum er, meta løgtingsgrannskoðararnir, at reglugerðin eigur at verða broytt, so sum ávist í seinasta áliti.

Sum nevnt verða rakstrarútreiðslurnar hjá sjónvarpinum fingnar til vega við sjónvarpsgjaldi, og játtan á fíggjarløgtingslógini. Harafturat verða íløgur eisini fíggjaðar úr grunnunum, ið hava inntøkur sínar av tollgjaldi av sjónvarpstólum o.tl., umframt íløgujáttan á fíggjarløgtingslógini.

Í seinasta áliti átaladu løgtingsgrannskoðararnir, at óskil var í ognarviðurskiftunum millum landsstýrið, Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya. Hetta óskil er nú komið í rættlag og fegnast grannskoðararnir um hetta.

Eitt annað er, at húsaumstøðurnar hjá sjónvarpinum eru vánaligar, og sæst hetta best av, at stovnurin heldur til í trimum bygningum í Havn. Einum, sum sjónvarpið eigur, og tveimum, sum sjónvarpið leigar.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at hetta er óheppið, og ein heildarloysn eigur at finnast.

Inntøkurnar hjá sjónvarpinum eru munandi hækkaðar í 1986. Orsøkin er partvís øking í skrásettum sjónvarpsmóttakarum og partvís øking í sjóvarpsgjaldinum, sum í 1986 hækkaði við 100 kr. um árið.

Samstundis eru eftirstøðurnar av sjónvarpsgjøldum alsamt vaksandi, fleiri og fleiri bólkar í samfelagnum seta krøv um serskipanir viðvíkjandi sjónvarpsgjaldi.

Nevndin er samd um, at ið hvussu er eigur innkrevjingarháttурin at verða broyttur soleiðis, at goldið kann verða yvir eitt longri tíðarskeið og ikki sum nú, í einum.

Allar størri fløgur til sjónvarpið verða fíggjaðar úr sjónvarpsgrunnunum. Samlaða nýtslan úr hesum grunnum var í tíðarskeiðinum 1,5 mió. kr. Fyri árið 1987 eru nýttar 6,6 mió. kr. Vøksturin í 1987 stavar í høvuðsheitinum frá útreiðslum av innrætting av Havnar Bio.

Pr. 31.1.1988 vóru umleið 5,5 mió. kr. í grunnunum.

Lønarútreiðslurnar fyri 1986 vóru 4.047.044 kr. Normerað støtv í sjónvarpinum vóru pr.26/11-1986 19½ starv. 31./12-87 er hetta tal økt til 21½ starv.

Samsýningar v.m. var fyri teir 9 mánaðirnar í 1985 178.000 kr. og er fyri árið 1986 kr. 678.732,-. Hesin vøkstur stavar partvís frá støtri virksemi og partvís frá, at tað gerst meiri og meiri vanligt, at tey, ið luttaka í sjónvarpssendingum, vilja hava samsýning aftur fyri.

Rentuútreiðslurnar hjá stovninum vóru í 1986 knappar 250.000 kr.

Løgtingsgrannskoðararnir vístu í seinast áliti á, at tað var átaluvert, at ein landsstovnur sum Sjónvarp Føroya skuldi hava stórar rentuútreiðslur, meðan landskassin átti pening standandi í peningastovnunum til nakað lægri rentu, enn tað sjónvarpið mátti gjalda til bankar.

Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um, at hetta, sambært upplýsingum frá sjónvarpsleiðsluni, er komið í rættlag, soleiðis at sjónvarpið hevur ávísan likviditet at trekkja beinleiðis úr landskassandum.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 7. apríl. Uppskotið frá løgtingsgrannskoðarunum samtykt við 22-0 atkvøðum.

34 Grannskoðan av almennum roknskapum.

9 Postverk Føroya

Ár 1988, hósdagin 17. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi:

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Postverki Føroya fyri tíðarskeiðið 1/1-31/12-1986.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapin hjá Postverki Føroya fyri omanfyri nevnda tíðarskeið og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar eru kannað, og at roknskapur og figgjarliga støða postverksins er í lagi.

Rakstrarúrslitið í hesum tíðarskeiði visir eitt hall upp á umleið 1,3 mió. kr. Hetta hallið svarar til umleið ta upphædd, ið er avskrivað uppá bygningar.

Hóast frímerkjadeildin hjá postverkinum hevur ein inntøkuvøkstur upp á umleið 10%, tykist álitgin fyri frímerkjakeypi og sølu at verða støðugt minkandi.

Høvuðsdeildin hjá frímerkjadeildini liggur framvegis í Havn. Her er nú settur setanarsteðgur í verk, og øll tey fólk úr Suðuroynni, ið starvast á frímerkjadeildini hava nú fingið tilboð um at taka upp arbeiði á nýggju deildunum, ið skipaðar eru í Vági og í Hvalba.

Landsstýrið hevur eisini samtykt, at verður vøkstur í frímerkjaarbeiðinum, skal hesin vøkstur skapa virksemi úti á bygd.

Løgtingsgrannskoðararnir hava fyrr víst á, at tað er rímiligt og rætt, at miðspjaðingar eiga at fara fram, har stovnar, rímiliga rationelt, kunnu gera hetta.

Í slíkum førum eigur mannagongdin at verða tann, at stovnsleiðarar fáa greið boð um, at miðspjaðingarstavnhaldið skal fremjast. Stovnsleiðslan kann síðani gera ætlanir yvir eina miðspjaðing og gera yvirlit yvir møguligan meirkostnað í hesum sambandi.

Henda mannagongd er ikki fylgd í hesum føri. Hetta eru átaluvert.

Viðvíkjandi útbygging er tað hent, at landsstýrið nú hevur samtykt, at Postverk Føroya skal byggja ætlaða posthúsið á Tvøroyri. Við í ætlanini eru eisini 160m², ið kunnu nýtast til onnur endamál, og skuldi tað verið sjálvsagt, at tolldeild landskassans á Tvøroyri ger nýtslu av hesum hølum.

Aðrastaðni eru fyrireikingar um byggjan av nýggjum posthúsum, t.d. í Sørvági, við Gøtugjógv og í Runavík. Tað er dámligt, at ætlanirnar miða ímóti at sambyggja almennar stovnar.

Sum nevnt í seinasta áliti er hugstoytt, at summar av hesum byggiætlanum ganga ov seint vegna langa almenna viðgerð.

Skulu hesar útbyggingarætlanir fremjast, halda løgtingsgrannskoðararnir at ov lítið er játtað til rakstrar- og íløgugrunn postverksins. Úrslitið verður, at peningur ikki verður tøkur til bygging. Tí verður neyðugt við lántøku, ið fer at tyngja rakstur postverksins í framtíðini.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at tá samskiftisdeildin í landsstýrinum fer at virka, verður arbeiðið hjá stovnunum greiðari og meiri samskipað.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 7. apríl. Uppskotið til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum samtykt við 21-0 atkvøðum.

34 Grannskoðan av almennum roknskapum.
10 Tjaldurs Apotekið.

Ár 1988, hósdagin 17. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi:

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Tjaldurs Apoteki fyri tíðarskeiðið 1/1-31/12-1986.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapin hjá Tjaldurs Apotekinum fyri omanfyrinevnda tíðarskeið og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá apotekinum eru kannað, og at fíggjarliga støða apotek sins er í lagi.

Rakstrarliga úrslitið hjá apotekinum í omanfyrinevnda tíðarskeiði er eitt avlop upp á kr. 732.513,-, áðrenn avskrivingar. Aftaná at avskrivingar eru 922.300,- vísir roknskapurin eitt hall uppá 189.786 kr. Avskrivingarnar hjá apotekinum eru nógv øktar, og skyldast hetta avskriving av EDV-útgerð.

Umsetningurin hjá apotekinum er vaksandi. Hann hevur í omanfyrinevnda tíðarskeiði verið 41.609.000 kr., meðan fíggjarætlanin roknaði við 36.880.000 kr.

Hóast hesa øktu sølu er úrslitið ikki batnað, og kemst hetta av, at vørugoymslan í 1985 ikki varð uppgjørd, og hevur sostatt ein feilur verið í talinum fyri vørunýtslu. Hetta er nú rættað.

Prísirnir hjá apoteksverkinum eru framhaldandi neyvt tengdir at donsku prísásetanini og føroysku medisinprísirnir eru nú 1.005 ferðir teim donsku. Sostatt er tað framhaldandi soleiðis, at føroyska apoteksverkið ikki hevur nakran sjálvstøðugan politikk viðvíkjandi prísum á heilivági.

Fyritreytirnar fyri at fáa ein slíkan fara nú at verða til staðar. Fyri tað fyrsta er blokkstuðulskipanin farin at virka, soleiðis at danski staturin ikki hevur beinleiðis ávirkan á hesar prísir og tá ið nú apotekslógin verður samtykt, kann ráðleggingarnevndin fyri apoteksverkið taka sjálvstøðugar avgerðir hesum viðvíkjandi.

Løgtingsgrannskoðararnir vístu í seinasta áliti á, at avrokningarskipanin fyri heilivág til sjúkrakassar og ávísar læknar eigur at verða endurskoðað. Hetta er ikki gjørt og er tað átaluvert.

Løgtingsgrannskoðararnir halda framhaldandi, at hugt eigur at verða eftir kalinum á ymsum sløgum av heilivági, ið kemur til landið. Hetta skal skiljast soleiðis, at tað eru nógv sløg av sama heilivági í ójøvnum prísklassa.

Framleiðsluvirðið av tí heilivági, ið apoteksverkið selur, er umleið 17,5 mió. kr. Harav verður framleitt fyri umleið 3 mió. kr. av apoteksverkinum sjálvum. Hetta gevur arbeiði til eini 8-10 fólk.

Apoteksverkið hevur ikki stóran vinning av hesi framleiðsu, men út frá einum tjóðhúskaparligum og trygdarligum sjónarmiði, er óivað rætt at úthyggja hesa framleiðslu, og at fáa hesa framleiðslu lagda í ein skipaðan karm.

Nú apoteksverkið fær nýggjar karmar at virka innanfyri, bæði við nýggjari apotekslóg og eini nýggjari samstarvsskipan við Danmark, halda løgtingsgrannskoðararnir, at varisliga eigur at verða farið fram við bygnaðarbroytingum av apoteksverkinum í aðrar mátar.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 7. apríl. Uppskotið til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum samtykt við 22-0 atkvøðum.

34 Grannskoðan av almennum roknskapum.
11 M/t »Nónhamar« 1986.

Ár 1988, hósdagin 17. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi:

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá M/T NÓNHAMAR fyri tíðarskeiðið 1/1-31/12-1986.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknunskapin og frágreiðing roknskapargrannskoðarans hjá M/T NÓNHAMAR fyri omanfyri nevnda tíðarskeið og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfarið er kannað, eg at roknskapargrannskoðarin hevur fingið røtta mynd av rakstri og fíggjarstøðu skipsins við árslok 1986.

Samlaða skuldin hjá M/T NÓNHAMRI var 31.12.1986 kr. 16.755.000,00 í mun til góðar 19 milj. kr. árið fyri. Skipið er bókað í landskassaroknskapinum og verður avskrivað har.

Rakstrarúrslitið fyri tíðarskeiðið 1/1-31/12-1986, vísir eitt yvirskot áðrenn avskrivingar uppá umi. 5,6 milj. kr.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 7. apríl. Uppskotið frá løgtingsgrannskoðarunum samtykt við 22-0 atkvøðum.

35 Løgtingslóg um friðing av bankunum og landgrunnarsoklinum.

Ár 1987, týsdagin 10. november legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna framburðsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um friðing av bankunum og landgrunnarsoklinum.	*lagtingslov om fredning af fiskebankerne og fastlandsokkelen.*
§ *1.* Øll veiðufør, sum veiða á føroyskum sjóøki, skulu í tíðarskeiðinum millum leygardag kl. 16.00 og mánadag kl. 08.00 hava ein veiðustøðg upp á 24 tímar.	§ *1.* Alle fartøjer, der udøver fiskeri på færøsk søterritorium, skal i perioden mellem lørdag klokken 16.00 og mandag kl. 08.00 opretholder en pause i fiskeriet i 24 sammenhængende timer.
§ *2.* Før, sum av serligum orsøkum ikki fáa yvirhildið § 1 í hesi lóg skulu uttan óneyðuga seinkan boða Vaktar- og Bjargingartænastuni frá hesum.	§ *2.* Fiskerfartøjer, som af særlig årsag ikke kan overholde § 1 i denne lov, skal uden unødvendig forsinkelse meddele dette til Vaktar- og Bjargingar-tænastan.
§ *3.* Brot á hesa lóg verður sektað sum ólóglig veiða.	§ *3.* Overtrædelse af denne lov straffes som ulovligt fiskeri.
§ *4.* Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1988.	§ *4.* Denne lov træder i kraft 1. januar 1988.

Viðmerkingar:

Føroysku fiskastovnarnir eru so niðurfiskaðir, at neyðugt er at gera nakað munagott, skal ikki grundarlagið verða tikið undan allari fiskivinnu á Føroyaleiðini.

Lógaruppskotið vil náttúrliga føra við sær, at veiðutrýstið fellur við umleið 10%. Sum støðan er hjá okkara fiskastovnum, má meira friðing til, men hetta er so ein byrjan.

1. viðgerð 18. november. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 10. februar 1988 legði, fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram 10. november 1987 av Framsóknarflokkinum. Eftir 1. viðgerð, ið var 18. november, varð málið beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Signar Hansen, Tórálvur Mohr Olsen, Olaf Olsen, Anfinn Kallsberg og Hilmar Kass) vísir á, at málið um at seta í verk tiltøk, ið bera í sær eitt minni veiðutrýst hevur verið viðgjørt í løgtingsins fiskivinnunevnd. Á fundi í nevndini tann 27. februar 1987 varð kunngerð um at minka trýstið á botnfiskastovnarnar undir Føroyum viðgjørt. Uppskotið miðaði ímóti at lýsa legudagar og veiðusteðg eftir ávísum reglum. Somuleiðis at áseta eitt minstamál av døgum, sum skal vera millum túrarnar hjá skipum yvir 100 tons, í mesta lagi 2 samdøgur. Í samráð við vinnufeløgini innan fiskivinnuna at kunna áseta landingarbann í upp til 4 vikur fyri ávísar skipa- og bátabólkar og ávís landingarpláss.

Fiskivinnunevnd løgtingsins samtykti at kanna hesar spurningar saman við vinnufeløgum, áðrenn endalig støða verður tikin.

Fiskivinnuumsitingin arbeiðir við málinum, og ætlanin er at leggja málið fram aftur rættiliga skjótt fyri løgtingsins fiskivinnunevnd og landsstýrið. Meirilutin heldur tí, at uppskot Framsóknarfloksins eigur at verða viðgjørt saman við teimum uppskotum, Fiskivinnuumsitingin arbeiðir við.

Nevnast skal, at Føroya Fiskimannafelag hevur í skrivi til løgtingsins fiskivinnunevnd, boðað frá síni støðu til uppskot Framsóknarfloksins. Felagið sigur m.a., at tað heldur, at í tann mun bundið verður frið, skal hetta vera, meðan skipið er heima, og víðari verður sagt: Felagið metir av ymsum orsøkum ikki, at tað ber til at gjøgnumføra eina skipan, har lagt verður stilt til sjós.

Fiskimannafelagið vísir annars á uppskot, ið teir hava sent landsstýrinum, ið miða ímóti at minka um veiðutrýstið.

Meirilutin (Signar Hansen, Tórálvur Mohr Olsen, Olaf Olsen, Anfinn Kallsberg og Hilmar Kass) mælir til at, at uppskot Framsóknarfloksins verður heint til landsstýrið og verður viðgjørt saman við teimum uppskotum, ið ætlanin er at leggja fram fyri løgtingsins fiskivinnunevnd.

Meirilutin setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Málið verður viðgjørt saman við øðrum líknandi málum av landsstýrinum og Løgtingsins fiskivinnunevnd.

Minnilutin (Jógvan I. Olsen og Tordur Niclasen) mælir til at samtykkja uppskot Framsóknarfloksins.

2. viðgerð 17. februar. § 1 í lógaruppskotinum fall við 8-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í fiskivinnunevndini varð samtykt og avgreitt við 21-0 atkvøðum.

36 Broyting í skattaviðurskiftunum hjá fólkapensiónistum.

Ár 1987, týsdagin 10. november legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í lagtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	*lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.*

§ 1.

Í § 29 nr. 13) í løgtingslóg nr. 86 frá 15. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verður sum 1. punktum sett:

»Hjá øllum fólkapensiónistum og øðrum persónum, sum eru fyltir 67 ár eins og persónum, sum fáa avlamis- og einkjupensión, ein upphædd svarandi til fólkapensiónsgrunduppheddina.«

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1988.

§ 1.

I § 29 nr. 13) i lagtingslov nr. 86 af 15. septmber 1983 om landsskat og kommuneskat indsættes som 1. punktum:

»Hos alle folkepensionister og andre personer, som er fyldt 67 år samt personer, som oppebærer invalide- og enkepension, og et beløb på størrelse med folkepensionens grundbeløb.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. januar 1988.

II Uppskot

til

løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan verður gjørd hendan broyting:

»Í § 3, stk. 2 verður »kr. 12.000« broytt til: »kr. 6.000« og »kr. 9.200« broytt til: »6.000 kr.«.

§ 2.

Henda lóg fær gildi hin 1. januar 1988.

lagtingslog om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen foretages følgende ændring.

»I § 3, stk. 2 ændres »kr. 12.000« til: »kr. 6.000« og »kr. 9.200« ændres til: »kr. 6.000«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. januar 1988.

III Uppskot

- til

løgtingslóg um gjaldan úr landskassanum til kommununrnar í mun til talið av pensiónistum v.m.

lagtingslov om betaling fra landskassen til kommunerne i forhold til antallet af pensionister m.v.

§ 1.

Føroysku kommununrnar fáa árliga goldið úr landskassanum eina upphædd gjørda upp eftir talinum á persónum, sum fyltir eru 67 ár ella fáa fólka-, avlamis- ella einkjupensión, og sum eru búsitandi í viðkomandi kommunu hin 1. juli.

§ 2.

Um talið á persónunum jvbr. § 1 búsitandi í kommununi er lægri enn 500 verður veitt eitt gjald upp á kr. 4.500 fyri hvønn persónin. Er talið hægri enn 500, verður veitt kr. 4.500 fyri teir fyrstu 500 og kr. 4.800 fyri restina.

§ 3.

Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1988.

§ 1.

De færøske kommuner får hvert år et beløb udbetalt fra landskassen opgjort efter antallet af personer, der er fyldt 67 år eller oppebærer folke-, invalide- eller enkepension, og som er bosiddende i vedkommende kommune den 1. juli.

§ 2.

Hvis antallet af personer jvf. § 1 bosiddende i kommunen er mindre end 500, betales et beløb på kr. 4.500 for hver person. Er antallet højere end 500, betales kr. 4.500 for de første 500 og kr. 4.800 for resten.

§ 3.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1988.

Viðmerkingar:

Tað hevur mangan verið talað um at skipa skattalóggávuna soleiðis, at fólkapensiónsgrundupphæddin ikki varð skattað.

Higartil hevur verið roynt at fremja hetta á tann hátt, at pensiónistar fingu eina hægri persónsfrádrátt — í 1987 er hann kr. 12.000 — soleiðis at ein inntøka svarandi til fólkapensión ikki bar nakran skatt.

Á hendan hátt sleppa láginntøkurnar stórt sæð undan skatti, men eru í prinsippinum ikki skattafríar. Tað hevur so við sær, at um pensiónistur hevur aðra inntøku afturat fólkapensiónini, t.d. sjálvbodna pensión, ella viðkomandi hevur arbeiðsinntøku, so verður hendan inntøka beinanvegin hart skattað.

Skipanin hevur tí ført við sær, at pensiónistar ofta hava latið vera við at arbeiða, hóast teir hava verið førir fyri tí — og sum nú er, at harðliga brúk fyri teirra arbeiðskraft. Eldri menn hava til dømis ofta hug at egna, og tørvur er á slíkari arbeiðsmegi. Men mangan og títt bera menn seg undan av skattaávum.

Allir borgarar rinda yvir skattin til komandi fólkpensión. Hetta skattgjald verður ikki frádrigið og eigur fólkapensiónin tí at vera skattafrí, tá hon kemur til útgjaldingar. Sjálvbodnar pensiónsskipanir, sum verða skattaðar, tá tær koma til útgjaldingar, kunnu dragast frá, tá premian verður goldin.

Fólkaflokkurin skjýtur tí upp, at hjá øllum persónum, sum hava fylt 67 ár — ella um teir fáa avlamis- ella einkjupensión — verður ein upphædd svarandi til fólkapensiónsgrundupphæddina skattafrí. Frammanundan eru nakrar av pen-

siónsviðhótunum skattafrían. Hetta verður ikki broytt. Tað vil siga, at hjá teim her umrøddu persónum vkerður í minsta lagi ein árlig upphædd upp á í løtuni kr. 38.652 hjá støkum og kr. 28.992 hjá hvørjum hjúnafelaga, tá tey fáa pensión, skattafrí.

Ikki fyrrenn tey vinna meira enn hetta, byrjar vanligi skattastigin at virka hjá teimum. Tað vil siga, at av ti, ið tey vinna omanfyri hesa upphædd, fáa tey løntakarafrádrátt og pensjónsfrádrátt, áðrenn talan verður um skatt. Fólkaflokkurin skjýtur upp, at persónsfrádrátturin hjá pensiónistum í framtíðini verður kr. 6,000. Sostatt kunnu pensiónistar v.m. vinna um leið kr. 20.000 árliga oman á fólkapensiónina, áðrenn talan verður um nakran skatt.

Á viðheftu útrokningum eru dømi viðvíkjandi skatti hjá pensiónistum í ymiskum kommunum. Dømini eru hesi:

Kommunur við: Núverandi skipan					Eftir uppsk.	
	Bert pensión:		Fólkap. + 30.000		Fólkap. 30.000	
	Støk	Hjún	Støk	Hjún	Støk	Hjún
18 %	A 1	A 2	A 3	A 4	A 5	A 6
14,4%	B 1	B 2	B 3	B 4	B 5	B 6
12 %	C 1	C 2	C 3	C 4	C 5	C 6

Av hesum sæst millum annað, at einstakur fólkapensiónistur í eini kommunu við 18% skattaútskriving við eini eyka inntøku upp á kr. 30.000 eftir núverandi skipan rindar kr. 13.051 í skatti. Eftir uppskoti Fólkafloksins kemur viðkomandi skattaborgari at gjalda kr. 3.120 í skatti.

Landskassin missir næstan ongar inntøkur av at gera fólkapensiónsupphæddina skattafría, tí frammanundan letur landskassin persónsfrádrátt, sum verður frádrigin í útroknaða landsskattinum. Tá ið lætt verður um skattin av inntøku oman á fólkapensiónina, kemur landskassin at fáa nakað minni av inntøku, helst eini 5-10 mill. kr. Men ein partur av hesum inntøkum kemur aftur av tí, at tað fer at løna seg betur hjá pensiónistum at arbeiða, og harvið verður samlaða inntøkan hægri.

Sum er fáa kommunurnar kommunuskattin av fólkapensiónini, ikki beinleiðis frá skattaborgaranum, men frá landskassanum. Landskassin rindar tann partin av persónsfrádráttinum, sum svarar til kommunuskattin til kommunurnar. Samanlagt rindar landskassin á hendan hátt umleið 26 mill. kr. árliga til kommunurnar. Hjá summum kommunum er hetta týðandi partur av teirra skattainntøku. Fyri at kommunurnar ikki skulu missa hesar inntøkur, setir Fólkaflokkurin fram serligt lógaruppskot um, at kommunurnar fáa hesa upphædd endurrindaða frá landskassanum við eini ávisari upphædd fyri hvønn pensiónist v.m., sum er skrásettur í kommununi hin 1. juli á hvørjum ári. Í kommununum við skattaprosentinum 18 er skatturin av hvørjum støkum fólkapensiónisti um leið 5.500 kr. og um leið kr. 4.200 av hvørjum giftum persóni, sum fær pensión. Hetta svarar til ca. 4.700 kr. í meðal.

Við tí lóggávu, sum her verður skotin upp, kann byrjast við eini ávísari umlegging av figgingarmøguleikunum hjá kommunum. Við hesi skipan er gjørd ein byrjan til ein neutralan blokkstuðul til kommunurnar. Seinri má hetta sjálvandi fylgjast upp við eini nágreiniligari sundurbýting av ábyrgdarøkjum millum land og kommunur.

Sum sagt frammanfyri hevur ofta verið upp á tal at broyta skattingina hjá pensiónistum, serliga fyri at geva teimum møguleika at hava lønandi arbeiði. Bíðað hevur verið eftir uppskoti frá landsstýrinum um hetta, men tað er ikki komið, í seinastu tingsetu boðaði Fólkaflokkurin frá, at um einki uppskot kom frá landsstýrinum, vildi hann koma við tí. Tað verður hervið gjørt.

1. viðgerð 12. november. Málið varð beint í skattanevndina, sum 5. mai 1988 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum 10. november 1988 og eftir 1. viðgerð 12. november 1987 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og er samja í skattanevndini um at mæla løgtinginum til at skattanevndin viðgerð hetta lógaruppskot sum milluntinganevnd og leggur málið aftur fyri løgtingið í Ólavsøkutingsetuni 1988.

Agnar Nielsen førir fram at undir verðandi skipan er tann regla galdandi at um ein fólkapensiónistur hevur eina munandi arbeiðsinntøku afturat, so missur hann burturav pensiónini.

Hesi viðurskifti hava ført við sær at nógvir fólkapensiónistar hava kent á sær at tað loysir seg illa at arbeiða tá teir umfram at rinda vanligan inntøkuskatt, sum er nóg tungur at bera, eisini skulu missa burturav pensiónina.

Sambandsflokkurin hevur tá áskoðan, at øll tey sum halda seg orka, eiga at fáa møguleikan fyri at arbeiða, eisini tey gomlu. At arbeiða má verða tann besta heilsubótin, og tey flestu ynskja at sleppa at halda fram at arbeiða, sjálvt um tey eru komin upp til pensiónsaldurin.

Kostnaðurin við tí broyting uppskotið inniber er í fyrsta lagi mettur at vera kr. 900.000 um mánaðin. Hin vegin er eingin ivi um at skipanin fer at føra við sær at fleiri fólkapensiónistar fara, at arbeiða meira enn tey gera undir verandi skipan. Økta virksemi fer at geva landskassanum meiri umfram kommunum meiri inntøkur sum minka um nevndu útreiðslur uppá kr. 900.000 um mánaðin.

Sambandsflokkurin hevur altíð virkað fyri at bøta um livikorini hjá okkara fólkapensiónistum.

Ein samd skattanevnd setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um endurgjald til fólkapensiónistar.

§ *1.*

Tann upphædd, sum fólkapensiónistur missir í pensiónini orsakað av arbeiðsinntøku, verður goldin honum av landskassanum.

§ *2.*

Henda skipan verður umsitin av Almannastovuni eftir reglum, sum landsstýrið ásetir.

§ *3.*

Henda lóg fær gildi 1. oktober 1988.

forslag om lagtingslov om refusion til folkepensionister.

§ *1.*

Det beløb, en folkepensionists pension reduceres ned på grund af arbejdsindtægt, refunderes vedkommende af landskassens midler.

§ *2.*

Ordningen administreres af Almannastovan efter regler, som landsstyret fastsætter.

§ *3.*

Denne lov træder i kraft 1. oktober 1988.

Vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar um framhaldandi viðgerð av fyriliggjandi lógaruppskoti setir ein samd skattanevnd fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur skattanevndini at arbeiða víðari við fyriliggjandi lógaruppskoti, sum millumtinganevnd og at leggja álit fyri løgtingið í Ólavsøkutingsetini 1988.

2. viðgerð 6. mai. Uppskot Fólkafloksins fall við 8 ja-atkvøðum, 21 atkvøddu ikki, 3 vóru burturstaddir.

Ja atkvøddu:	Jógvan Sundstein, Pauli Ellefsen, Ivan Johannesen, Flemming Mikkelsen, Agnar Nielsen, Edmund Joensen, Johs. M. Olsen, Eilif Samuelsen.
Atkvøddu ikki	Dánjal Pauli Danielsen, Svend Aage Ellefsen, Eyðun Viderø, Poul Michelsen, Hendrik Old, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes, Adolf V. Hansen.
Burturstaddir:	Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Tordur Niclasen.

Uppskotið frá skattanevndini afturtikið av Sverra Midjord og uppafturtikið av Agnar Nielsen. Uppskotið til samtyktar frá samdari skattanevnd samtykt við 28-0.

Sí skjølini 10 A-D.

37 Landsstýrismál.

Ár 1987, hósdagin 12. november legði landsstýrið við skrivi málið fram.

1. viðgerð 3. mai. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

28. apríl legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 12. november 1987.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hergeir Nielsen og Tummas Arabo) mælir tinginum til at samtykkja soljóðandi:

uppskot

til

samtyktar

Gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 1. august 1986 til 23. juli 1987 verður samtykt.

Ein minniluti (Flemming Mikkelsen) førir fram:

12. november 1987 varð gerðabók landsstýrisins løgd fyri løgtingið. Gerðabókin umfatar tíðarskeiðið 1. august 1986 til og við 23. juli 1987.

Við at taka okkurt burtur úr hesum rúgvumikla tilfari sust m.a., at landsstýrið viðger umsókn frá P/f Rógvutanga, sum eigur trolaran »Brestir«, har treytin um at flyta meðalvatnstrolara út, verður broytt til, at hinu/snelluskipið »Hoyvíkingur« verður fluttur út í staðin.

Hetta verður samtykt. Gongdina í hesum máli kenna vit, nevniliga at øll skipini sigla og veiða á løroysku grunnunum í dag.

Málið um reglugerð fyri telefonverkið um starvslýsing av fíggjarumsjónini hevur verið viðgjørt meira enn einaferð, tí hildið verður, at tað fyri telefonverkið er bráðneyðugt, at fíggjarstjóri verður settur.

Mær vitandi er eingin settur, hóast tað er eitt krav frá løgtinginum.

Í oktober 1986 hevur helst stórfundur verið í Tinganesi, har landsstýrið samtykkir at góðkenna ikki minni enn 8 inntøkulógaruppskot, sum at enda góvu føroyska arbeiðarafamiljuni eina eykaútreiðslu upp á 15.000 kr., har m.a. avgjald upp á 70 oyru varð lagt á hvønn litur av brenniolju.

Henda eyðrøkning var hildin uttanfyri prístalsútrokningarnar.

Sum heild hevur ikki staðið á hjá landsstýrinum at seta eina rød av almennum størvum.

Hinvegin hava nógvir fundir verið um setan av sjúkrahússtjórastarvinum, tó uttan úrslit.

Orsøkin sigst vera tjóðskaparligar undirlutakenslur.

Framstandandi táverandi samgongumaður (Tordur Niclasen) pástendur, at prísurin fyri hesar konslur og støðuloysi landsstýrisins er *ein syndrað sjúkrahúsverk*, nakað samgongan higartil hevur skuldsett danir fyri, men hetta frítekur kortini ikki Tord Niclasen fyri sín týðandi leiklut og valdandi støðuloysi innan táverandi samgongu.

Meðan landsstýrið er samt um keyp av eini rød av gomlum bygningum í Havnini til almennu umsitingina, er uppskot frá postverkinum um at selja gamla posthúsbygningin í Vági. Málið varð útsett og einki sæst til, um málið er viðgjørt av nýggjum, ella hvat aetlanin er við hesum bygningi.

Í november 1986 avger landsstýrið, at P/f J. F. Kjølbro skal reiða trolaran

»Nónhamar« út í 1987 undir somu treytum sum í 1985. Samuleiðis fær løgmaður heimild at kanna møguleikarnar um sølu av »Nónhamri«.

Einki sæst til, at løgmaður hevur arbeitt út frá hesi heimild.

Í november 1986 fær Telefonverkið heimild at samráðast við tilboðsgevarar um millumbylgjustøð á Skúvanesi.

Í mars 1987 góðkennir landsstýri uppskot til leigusáttmála um matr. nr. 654, Skúvanes, í Vági, millum hagastýrið og telefonverkið. Tá tað er komið fram, at millumbylgjustøðin skal byggjast aðrastaðni í oynni, skal eg loyva mær at spyrja landsstýrið um, hvørjar ætlanir eru viðvíkjandi niðurløgdu loranstøðini á Skúvanesi.

Blokkstuðulsskipanin hevur ikki havt tann stóra áhugan í landsstýrinum. Í januar 1987 sæst, at løgmaður greiðir landsstýrinum frá samráðingum, hann hevur havt við forsætismálaráðharran viðvíkjandi nýggju skipanini.

Frágreiðingin kann ikki hava verið serliga long ella áhugaverd, tí á sama fundi, sum vardi tveir tímar, hava 11 onnur mál verið til viðgerðar.

Eingin ivi er um, at bjargingarfeløgini kring landið gera eitt framúrskarandi sjálvboðið arbeiði við at koma til hjálpar, tá harðast leikar á. Hesi hava tí allan stuðul uppibornan.

Í mai 1987 viðger landsstýrið umsókn frá landsfelagnum fyri bjargingarfeløgini um studning til keyp av serligum slag av luftpútum at lyfta bilar/bussar við í neyðstøðu, kostnaðurin 120.000 kr.

Landsstýrið samtykti at senda málið til Brunarádið til ummælis.

Einki sæst til, hvat kom burturúr.

Lítið og einki sæst til nakra serliga landsstýrisviðgerð viðvíkjandi trongstøðuni hjá farmaskipaflotanum.

Málini verða umrødd, onkur nevnd verður sett at kanna ivasamar umstøður. Úrslitið kenna vit.

Tað kostar at mótmæla.

Lærararnir tóku eina manniliga støðu, tá teir við arbeiðsstevgi í ein dag mótmæltu harðrendu inntøkulógunum, landsstýrið og samgongan áløgdu hvørjum húsarhaldi í Føroyum.

Revsingin fyri hetta mótmæli var, at eitt samt landsstýri álogði lærarunum eina dagløn í bót, og at teir verða trektir fyri ein dag í løn.

23. apríl 1987 samtykkir landsstýrið at geva russum loyvi at umskipa fisk í føroyskum havnum.

Niels Pauli Danielsen, táverandi landsstýrismaður, var kortini ímóti, men tá avgerðin (líkamikið responsum) ongar politiskar avleiðingar hevði við sær, tá má haldast, at Niels Pauli Danielsen og flokkur hansum, Kristiligi Fólkaflokkurin, í prinsippinum hava góðkent at geva russum loyvi til at umskipa fisk í føroyskum havnum.

Nú val er fyri durum, skuldi verið óneyðugt við uppskoti til samtyktar um at biðja landsstýrið leggja frá sær. Tað kemur veljarin at taka støðu til um ikki so

langa tíð.

Minniltuin (Flemming Mikkelsen) setir ti einki uppskot fram, men *meðir tingnum avgjort frá* at góðkenna avgerðir landsstýrisins hetta tíðarskeið, eitt tíðarskeið føroyingar koma at merkja sviðan av nógv ár fram í tíðina. Ein lítil samandráttur sigur okkum, at:

hetta var árið, landsstýrið og samgongan løgdu ovurstórar byrðar á hvørt húsarhald/mansbarn í Føroyum.

hetta varð árið, farmaskipaflotin fekk mønustingin,

hetta varð árið ein illa frágingin blokkstuðulsskipan fyri Føroyar varð samtykt.

hetta var árið, vit mistu okkara náttúrligu rættindi til sjúkraviðgerð á rikis hospitalinum,

hetta var árið, okkara egna sjúkrahúsverk var langt í sor vegna støðuloysi (sambært Tord Niclasen),

hetta var árið, ávísur bólkur í samfelagnum varð revsaður fyri at nótmæla.

hetta var árið, landsstýrið samtykti at reka NATO-skip frá bryggju í Føroyum.

hetta var árið, sama landsstýrið samtykti at geva russum loyvi at umskipa fisk í føroyskum havnum.

tí má haldast, at leir tingmenn, ið greiða atkvøðu fyri hesi gerðabók, gera seg samsekar í m.a. nevndu avgerðum, avgerðum ávísir fyrrverandi og núverandi samgongutingmenn alment hava vist frá sær.

2. viðgerð 5. mai. Uppskotið til samtyktar samtykt við 17 atkvøðum fyri, 12 atkvøddu ikki.

38 Broyting í útvarpslógini.

(Ikki framlagt.)

39 Broyting í løgtingslóg um barnastyrk.

Ár 1987, týsdagin 24. november legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi,

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 50 frá 5. mai 1987 um barnastyrk.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 5. mai 1987 um barnastyrk verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, 2. stk. verður orðað soljóðandi:
»Barnastyrkurin verður javnaður eftir prístalinum pr. 1. juli í einum ári, galdandi fyri komandi ár.«

2) § 3, 1. stk. verður orðað soljóðandi:
»Fullur barnastyrkur verður goldin, um inntøkugrundarlagið er:
1) hjá støkum 165.000 kr. ella minni og
2) hjúnum 351.00 kr. ella minni.
Um inntøkugrundarlagið er hægri enn ávikavist 165.000 kr. og 351.000 kr., verður barnastyrkurin lækkaður við 1% fyri hvørt byrjað tal av 1.000 kr., sum inntøkugrundarlagið er hægri enn 165.000 kr. ávikavist 351.000 kr.«

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 50 af 5. maj 1987 om børnetilskud.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 5. mai 1987 om børnetilskud foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 2 affattes således:
»Børnetilskuddet reguleres efter pristallet pr. 1. juli i et år, med virkning for følgende år.«

2) § 3, 1. stk. affattes således:
»Fuldt børnetilskud udbetales, såfremt indtægtsgrundlaget er:
1) for enlige 165.000 kr. eller mindre og
2) for ægtepar 351.000 kr. eller mindre.
Såfremt indtægtsgrundlaget overstiger henholdsvis 165.000 kr. og 351.000 kr., nedsættes børnetilskuddet med 1% for hver påbegyndte 1.000 kr., som indtægtsgrundlaget overstiger henholdsvis 165.000 kr. og 351.000 kr.

3) § 3, 3. stk. verður orðað soljóðandi:
»Inntøkugrundarlagið er skattskylduga inntøkan. Skattaskylduga inntøkan verður roknað eftir somu reglum sum fyribilsskattaskrásetingin sbrt. §§ 67 76 í løgtingslóg nr. 86 frá 9. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.«

3) § 3, stk. 3, affattes således:
»Indtægtsgrundlaget er den skattepligtige indtægt. Den skattepligtige indtægt beregnes efter samme regler som forskudsregistreringen efter reglerne i §§ 67-76 i lagtingslov nr. 80 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer.«

4) Í § 3 verður sett sum nýtt 4. stk.:
»Líkningarráð Føroya javnar inntøkugrundarlagið 4 ferðir um árið við byrjan av einum ársfjórðingi.«

4) I § 3 indsættes som nyt stk. 4.:
»Likningsrådet Føroya regulerer indtægtsgrundlaget 4 gange årligt, i begyndelsen af et kvartal.«.

5) Í § 3 verður sett sum nýtt 5 stk.:
»Um útgjaldingin er ov lág orsakað av skeivt roknaðum inntøkugrundarlagi kann tann, ið fær barnastyrkin útgoldnan, eftir umbøn hjá Líkningarráð Føroya fáa írestandi upphæddina útgoldna beinanvegin. Í endaligu skattaálíkningini verður barnastyrkurin javnaður eftir somu reglum sum endaligi skatturin. Møguliga ov nógv útgoldin barnastyrkur verður innkravdur eftir somu reglum sum í írestandi skatturi.«

5) I § 3 indsættes som nyt stk. 5.:
»Såfremt der udbetales for lidt på grund af forkert beregnet indtægtsgrundlag, kan den, der får udbetalt børnetilskuddet efter anmodning hos Likningsrådet Føroya få udbetalt det resterende beløb. Børnetilskud bliver at regulere i den endelige skattepåligning efter samme regler som slutskatten. Eventuelt for meget udbetalt børnetilskud indkræves efter samme regler som restskat.«

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi eftir kunngerðina.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 50 frá 5. mai 1987 um barnastyrk var í § 3 sett, at inntøkugrundarlagið var skattskylduga inntøkan í tí inntøkuári, sum var fult álmanakkaár áðrenn útgjaldingina. Tá ið lógin skuldi umsitast samboert reglunum, hava tekniskir trupulleikar skotið seg upp, sum hava víst seg at vera torførir at fáa loyst. T'd. broyting í borgarastøðu, flyting, broytt inntøkuviðurskifti. Tað hevur tí verið neyðugt at broyta lógina, og skotið verður upp at nýta fyribils-

skattaskrásetingina sum inntøkugrundarlag. Á henda hátt verður útgjaldingin av barnastyrki útroknað av teimum beinastu tølunum, og broytingar gjørdar samsvarandi broyting í inntøku og aðrar broytingar í t.d. borgarastøðu smb. nýggju reglunum í 3. og 4. stk. í lógaruppskotinum. Í endaligu skattaálíkningini verður sostatt ov nógv útgoldin barnastyrkur innkravdur saman við møguligum írestandi skatti og ov lítið útgoldin barnastyrkur útgoldin saman við møguligum avlopsskatti.

Í sama viðfangi hevur tað verið neyðugt at hækka sjálvt inntøkugrundarlagið í § 3, 1. stk. hjá støkum og hjúnum úr ávikavist 160.000 kr. til 165.000 kr. og 340.000 kr. til 351.000 kr. Hetta vegna tær hækkingar, sum hava verið í samfelagnum sum heild síðan 1985.

Av tí at tølini í fyribilsskattaskránni skulu nýtast, verður Líkningarráð Føroya við kunngerð heimilað at útrokna og syrgja fyri útgjalding av barnastyrkinum, meðan Almannastovan annars umsitir lógina.

1. viðgerð 24. november. Málið beint í almanna- og heilsunevndina, sum 11. december legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð framlagt hin 24. november 1987 av Føroya landsstýri og aftan á fyrstu viðgerð 25. november beint í almanna- og heilsunevndina.

Spurningurin um veiting av barnastyrki varð samtyktur 5. mai 1987 (tingmál nr. 50). Orsøkin til, at hetta lógaruppskot longu aftur verður lagt fyri tingið til broytingar, er, at tekniskir trupulleikar hava stungið seg upp. Eftir uppskotinum verður mælt til at nýta fyribilsskattaskránna sum inntøkugrundarlag. Hetta førir við sær, at ov nógv útgoldin barnastyrkur verður innkravdur saman við møguligum írestandi skatti, og ov lítil útgoldin barnastyrkur verður útgoldin saman við møguligum avlopsskatti. Samstundis førir lógarbroytingin við sær eina dagførslu av upphæddini fyri at fáa barnastyrk. Henda upphæddin verður ávikavist kr. 165.000 fyri støk og kr. 361.000 fyri hjún.

Undir 1. viðgerð kom fram, at tingmenn úr andstøðuni hildu, at barnastyrkur átti at verið útgoldin til øll, ið hava børn, uttan mun til inntøku. Hetta sjónarmið var galdandi, tá barnafrádráttur varð nýttur í skattalógini. Eisini varð gjørt vart við, at nýggja uppskotið um barnastyrk førir við sær stóra umsiting. Til hetta er at siga, at eftir tí nevndin hevur fingið upplýst, so er bert talan um tvey fólk, ið skulu umsita barnastyrkin, eitt á almannastovuni og eitt á líkningarráðnum. Eisini hava vit fingið at vita, at skipanin við barnastyrki kemur at kosta tilsamans um 20 mió. kr. meira, um øll fólk við børnum úr 6 mánaðum til 15 árum skulu hava barnastyrk uttan mun til inntøku.

Meirilutin í nevndini (Karin Kjølbro, Tordur Nielsen, og Jákup Lindenskov) mælir til at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Jógvan Sundstein og Flemming Mikkelsen) hevur hesar viðmerkingar:

Longu, tá ið løgtingslógin um barnastyrk var til viðgerðar á tingi á vári 1987, høvdu vit ta støðu, at barnastyrkur eigur at vera eins fyri børn hjá øllum foreldrum.

Eisini helt minnilutin, at uppbýtið í bólkar eftir skattskyldugari inntøku fór at gera lógina ógvuliga trupla at umsita.

Tað hevur eisini longu vist seg, at hon var so trupul, at broytingar longu nú verða skotnar upp. Hesar broytingar gera kortini ikki lógina lættari at umsita, tí framvegis skulu upphæddirnar regulerast eftir skattskyldugu inntøkuni. Og nú skulu tær eisini regulerast aftaná at sjálvuppgávan er innsend. Tá kann bæði tað henda, at onkur fær meira barnastyrk útgoldnan ella øvugt, at onkur skal rinda útgoldnan styrk aftur.

Eftir teim útrokningum minnilutin hevur gjørt, kostar barnastyrkurin, um øll fáa eins styrk um leið 66 mill. kr. Um landsstýrisins uppskot verður samtykt, kemur kostnaðurin at verða um leið 60 mill. kr. Orsøkin til, at munurin er so lítil, er at tað eru lutfallsliga so fá, sum hava skattskylduga inntøku omanfyri ávikavist 165.000 og 351.000.

Í staðin fyri landsstýrisins uppskot setir minnilutin tí fram hetta:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnastyrk.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 50 frá 5. mai 1987 um barnastyrk verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3 gongur út. Fylgjandi greinirnar skifta tilsvarandi nummar.
2) Í núverandi § 6, síðsta punktum verður »almannastovan« broytt til: »líkningarráðið«.
3) Í núverandi § 8, 2. stk. verður »Almannastovan« broytt til: »Líkningarráðið«.
4) Núverandi § 8, 3., 4. og 5. stk. ganga út.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om børnetilskud.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 50 af 5. maj 1987 om børnetilskud foretages følgende ændringer:

1) § 3 udgår. De følgende paragraffer ændrer tilsvarende nummer.
2) I nuværende § 6 sidste punktum ændres »almannastovan« til: »líkningarráðið«.
3) I nuværende § 8, stk. 2 ændres »Almannastovan« til: »Líkningaráðið«.
4) Nuværende § 8, stk. 3, 4 og 5 udgår.

2. viðgerð 11. december. Atkvøðugreiðslan útsett. 16. december atkvøðugreiðsla við framhaldandi 2. viðgerð. Broytingaruppskotið frá minnilutanum í almanna- og heilsunevndini (Flemming Mikkelsen og Jógvan Sundstein) samtykt við 17-0. Uppskot landsstýrisins sostatt burturdottið.

Við 30-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

Áðrenn 3. viðgerð 16. december legði minnilutin í almanna- og heilsunevndini (Flemming Mikkelsen og Jógvan Sundstein) fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, pkt. 4) verður broytt til:

»Núverandi § 8, 3. og 4. stk. verða broytt til:

3. stk. Avgerðir almannastovunnar og líkningarráðsins kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

4. stk. Til nýtslu fyri fyrisitingina av hesi løgtingslóg lata landsfólkayvirlitið, skattainnkrevjingarvaldið, almannastovan og aðrir myndugleikar líkningarráðnum allar neyðugar upplýsingar í tørvandi skapi til nýtslu á tørvandi hátt.«

§ 1, pkt. 4 ændres til:

»Nugældende § 8, 3. og 4. stk. ændres til :

Stk. 3. Almannastovan og ligningsrådet afgørelser kan inden for 4 ugers frist kæres til landsstyret.

Stk. 4. Til brug for administrationen af denne lagtingslov leverer landsfolkeregisteret skatteindkrævningsmyndigheden og almannastovan og andre myndigheder alle nødvendige oplysninger til ligningsrådet i brugbar form til anvendelse i fornødent omfang.«

§ 1, pkt. 5):

Nýtt stk. 2 í § 14 ljóðar soleiðis:

»*2. stk.* Eykaburnastyrkur verður goldin av almannastovuni undir Føroya Gjaldstovu«.

§ 1, pkt. 5):

Nyt stk. 2 i § 14 formuleres således:

Stk. 2. Ekstrabørnetilskud udbetales af Almannastovan via Føroya Gjaldstova.«

3. viðgerð 16. december. Broytingaruppskotið frá Jógvani Sundstein og Flemming Mikkelsen varð samtykt við 29-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt endaliga samtykt og avgreitt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1010-31. Lóg nr. 104 frá 17. december 1987.

40 Skipan millum Føroya og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1988.

Ár 1988, týsdagin 8. december legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu skipan, dagfest 13. oktober 1987 um sínámillum fiskirættindi í 1988 millum Føroyar og EEC.

Viðmerkingar:

1. Tann 12. oktober 1987 byrjaðu samráðingar millum umboð fyri Føroya Landsstýri og EEC-nevndina í Tórshavn um sínámillum fiskirættindi í 1988 millum Føroyar og EEC. Úrslitið av samráðingunum er viðlagda skipan, undirritað í Tórshavn 13. oktober 1987.
2. Sáttmálin fyri 1988 javnvigar á eitt sindur hægri støði í toskavirði við sáttmálan fyri 1987.
3. Loyvdu veiðunøgdirnar í 1988 av ósløgdum fiski eru hesar:

Hjá EEC-skipum á landleiðini:

Samlaða nøgdin av botnfiski, svartkjafti og makreli verður í 1988 (1987-nøgdin í klombrum):

500 tons av toski og hýsu (500 tons)
2.400 tons av upsa (2.400 tons)
7.400 tons av kongafiski (7.000 tons)
3.600 tons av blálongu og longu (3.300 tons)
1.000 tons av flatfiski (svartkalvi íroknaður) (1.300 tons)
500 tons av ymiskum fiskasløgum (500) tons)
25.000 tons av svartkjafti (25.000 tons)
5.000 tons av makreli (5.000 tons).

Hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:

(a) 800 tons tilsamans av longu, brosmu og blálongu á Rock All-leiðini. Loyvt er eisini at veiða 400 tons av ymsum botnfiski sum hjáveiðu í ídnaðarfiskiskapi; í 1987 vóru nøgdirnar tær somu. Eisini er loyvt at veiða 940 tons av blálongu á havleiðunum vestanfyri Skotland (í 1987: 940 tons).

(b) 6.000 tons av tí vestara makrelstovninum; í 1987 var eisini loyvt at veiða 6.000 tons.

(c) 8.250 tons av rossamakreli (í 1987: 6.750 tons).

(d) 9.000 tons av hvítingsbróður, 9.000 tons av nebbasild og 2.000 tons av brislingi; 1987-tølini vóru tey somu. Fiskast kunnu tó eyka 10.000 tons av hvítingsbróður (íroknað hjáveiðu av svartkjafti, sum ikki slepst undan) og nebbasild, treytað av, at samlaða veiðunøgdin fyri hvítingsbróður (íroknað svartkjaft), nebbasild og brisling ikki fer upp um 20.000 tons (í 1987: 20.000 tons).

(e) 600 tons av sild vestan fyri Skotland, (í 1987: 600 tons).

(f) 62.000 tons av svartkjafti (1987 60.000 tons). Í veiðuni av svartkjafti er loyvt at hava hjáveiðu av gulllaksi sum ikki slepst undan.

(g) 500 tons av sild í Skagerak; sama nøgd sum í 1987.

(h) 150 tons av hemara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3 PS (St. Pierre og Miquelon) (í 1987 var nøgdin tann sama).

Hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi (smb. § 1 (3) í fiskisáttmálanum millum EEC og Grønland.

Í 1988 eru kvotur í grønlendskum sjógvi tær somu sum í 1987 nevniliga:

(i) 475 tons av rækjum í Vesturgrønlandi í NAFO-øki 1; (í 1987 sama nøgd). 675 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV (í 1987 sama nøgd).

(j) 150 tons av svartkalva undir Vesturgrønlandi og 150 tons undir Eysturgrønlandi. Í 1987 vóru nøgdirnar tær somu.

(k) Eisini verður loyvt at veiða 500 tons av kongafiski í ICES-øki XIV (Eysturgrønlandi) (í 1987 var nøgdin tann sama).

(l) Loyvt er í 1988 at veiða 10.000 tons av lodnu við Eysturgrønland (í 1987 sama nøgd).

Sí Skjal 11

1. viðgerð 27. januar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 10. februar legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 8. december 1987 og undir 1. viðgerð tann 27. januar 1988 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 28. januar, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 17. februar. Uppskot landsstýrisins samtykt við 28-0 atkvøðum og avgreitt.

F.L. j.nr. 1198-2-72.

41 Regulering av veiðuni av laksi sambært viðtøkunum í Norðuratlantisku Laksakonventiónini (NASCO).

Ár 1987, týsdagin 8. december legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina á NASCO ársfundinum í juni 1987 um regulering av fiskiskapinum eftir laksi á havinum í føroyskum sjóøki.

Viðmerkingar:

Norðureysturatlandiska nevndin hjá Norðuratlantisku Laksakonventiónini (NASCO) hevur á fundi í Edinburgh í Skotlandi 8.-12. juni 1987 víst á tað

neyðuga í at áseta reglur fyri fiskiskapin eftir laksi á føroyskum sjóøki í árunum 1987, 1988 og 1989.

Sostatt hevur nevndin samtykt, at eftirlit við føroysku veiðuna av laksi skal vera eftir eini skipan, sum avmarkar veiðutrýstið í einum royndartíðarskeiði uppá 3 ár. Skipanin er sett út í hjálagda ískoyti og enska orðingin er hjáløgd.

Í royndartíðini skal nevndin fylgja við í fiskiskapinum á árligu NASCO-fundunum. Í hesum sambandi skulu tey ráð, sum havrannsóknarfelagsskapurin ICES leggur fram, havast í huga.

Veiðitrýstið skal hava sum mál eina meðal árliga veiðu nevndu trý árini 1987, 1988 og 1989, soleiðis at samlaða veiðan hesi trý ár ikki fer upp um 1790 tons. Men í einum ári skal árliga veiðan ikki fara upp um 5% av árligu meðal veiðuni.

Ískoyti:

Hesar reglur skulu galda fyri fiskiskap eftir laksi í føroyskum sjóøki í árunum 1987, 1988 og 1989:

(1) øki, har laksur fæst sum er niðanfyri 60 cm skulu steingjast við stuttum varsli á sama hátt sum reglurnar eru fyri ungfiskakunngerðina.
(2) talið av bátum, sum fáa laksaloyvi, skal ikki vera størri enn 26.
(3) laksaveiðitíðin skal vera frá 15. januar til 30. apríl og frá 1. november til 15. desember.
(4) havandi í huga mest loyvdu árligu veiðuna skal loyvda veiðudagatalið ikki vera meir enn 1600 dagar, tilsamans, árliga.

Sí skjal 12.

1. viðgerð 27. januar. Anfinn Kallsberg skeyt upp at beina málið í fiskivinnunevndina, hetta fall við 4-0 atkvøðum. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 10. februar legði fram soljóðandi:

Álit I

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 8. december 1987 og undir 1. viðgerð tann 27. januar 1988 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 28. januar, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 17. februar. Við 23-0 atkvøðum varð samtykt at beina málið aftur í marknaðarnevndina, sum 24. februar legði fram.

Álit II

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 8. december 1987 og undir 1. viðgerð tann 27. januar 1988 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 28. januar, og mælti ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Undir 2. viðgerð tann 17. februar 1988 varð gjørt vart við, at samsvar ikki er millum ønsku orðingina: »However, in any given year the annual catch shall not exceed 5% more than the annual average.« og føroysku umsetingina: »Men í einum ári skal árliga veiðan ikki fara upp um 5% av árligu meðalveiðuni«.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum á fundi tann 17. februar 1988, og var semja um, at orðingin í viðmerkingunum til uppskotið á síðu 2 skal verða hendan: »Men í einum ári skal árliga veiðan ikki fara upp um 5% meira enn árliga meðalveiðan«.

Við hesi broyting í viðmerking landsstýrisins til fyriliggjandi uppskot til samtyktar mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrins.

Framhaldandi 2. viðgerð 1. mars. Málið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.J., j.nr. 1509-3-11.

42 Trygdargrunnur fyri avreiðingar og lønir v.m.

Ár 1987, týsdagin 24. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.

lagtingslov om garantifond for fiskeindhandlinger og løn m.v.

§ 1. Trygdargrunnur verður stovnaður fyri at tryggja løntakarum lønarkrøv v.m., herundir fiski- og útróðrarpartar, og føroyskum skipa/bátaeigarum avrokning fyri fisk avreiddan til føroysk flakavirkir í samband við.

1) at arbeiðsgevarin ella fiskavirkið eru komin í figgjartrot,
2) at arbeiðsgevarin doyr, og búgvið verður tikið til skiftiviðgerðar eftir 3. kap. í skiftilógini, ella
3) fyritøkan heldur uppat, og tað verður sannað, at arbeiðsgevarin er ikki førur fyri at rinda kravið.

2. stk. Í ivamálum tekur landsstýrið avgerð um at hvørju fiskavirki og hvørjar avreiðingar koma undir hesa lóg.

§ 2. Umframt avrokning til skipa/bátaeigarar fyri fisk avreiddan til føroysk fiskavirkir, fevnir trygdin um lønarkrøv og aðra samsýning, endurgjald fyri at kvetta arbeiðsavtaluna, samsýning í samband við uppsøgn ella slit av arbeiðsavtaluni og frítíðarløn, um so er, at krøvini eru ella í konkursi vildu komið undir §§ 63, 2. stk., 1. pkt., ella 95, 1. stk., nr. 1-5, jbr. 2. stk. í konkurslógini (konkurslov nr. 293 af 8. juni 1977). Trygdin fevnir eisini um tílík krøv, sum koma undir § 94, nr. 2 í konkurslógini, um so er at skiftirættarin í skiftiviðgerðini váttar, at konkurs — ella deyðsbúgvið er ikki ført fyri at rinda krøvini.

2. stk. Í teimum í § 1, nr. 3 nevndu førum ger grunnurin av, hvør dagur kemur í staðin fyri freistdagin, um kravið hevur framíhjárætt eftir § 95, 1. stk., nr. 5 í konkurslógini, og um útgjalding skal sýtast sambært § 96, 2. stk. í kon-

§ 1. Garantifond oprettes til sikring af lønmodtageres krav på løn m.v., herunder indtægter ved partsfiskeri, og færøske skips/bådejeres afregning for fisk, der er indhandlet til færøske fiskevirksomheden ved

1) arbejdsgiverens eller fiskevirksomhedens konkurs,
2) arbejdsgiverens død, såfremt boet behandles efter skiftelovens kap. 3, eller
3) virksomhedens ophør, såfremt det godtgøres, at arbejdsgiveren er ude af stand til at betale kravet.

Stk. 2. I tvivlstilfælde afgør landsstyret, hvilke fiskevirksomheder og hvilke indhandlinger denne lov omfatter.

§ 2. Foruden afregning til skibs/bådejere for fisk, der er indhandlet til færøske fiskevirksomheder omfatter garantien krav på løn og andet vederlag, erstatning for afbrydelse af arbejdsforholdet, godtgørelse i forbindelse med opsigelse eller afbrydelse af arbejdsforholdet samt feriegodgørelse, såfremt kravene er eller i tilfælde af konkurs ville være omfattet af konkurslovens (konkurslov nr. 293 af 8. juni 1977) § 63, stk. 2, 1. pkt., eller § 95, stk. 1, nr. 1-5, jfr. stk. 2. Garantien omfatter tillige tilsvarende krav, der kan støttes på konkurslovens § 94, nr. 2, såfremt den skifteret, der behandler konkursboet eller dødsboet, attesterer, at boet ikke for tiden er i stand til opfylde kravene.

Stk. 2. I de i § 1, nr. 3 nævnte tilfælde afgør fonden, hvilket tidspunkt der træder i stedet for fristdagen, om kravet kan tillægges fortrinsret efter konkurs-

kurslógini. Hevur fyritøkan boðað frá gjaldsstoðgi, er fráboðanardagurin freistdagur, um fyritøkan vegna insolvens er hildin uppat áðrenn 3 vikur aftaná, at gjaldsstoðgurin hevur mist gildi eftir § 16 í konkurslógini.

lovens § 95, stk. 1, Nr. 5. og om udbetaling skal meegtes i medfør af konkurslovens § 95, stk. 2. Har virksomheden anmeldt betalingsstandsning, er dagen for anmeldelsen fristdag, hvis virksomhedens ophør på grund af insolvens sker inden 3 uger efter, at virkningerne af betalingsstandsningen er ophørt efter konkurslovens § 16.

§ 3. Fyri tey krøv, sum nevnd eru í § 94, nr. 2 og § 95, 1. stk., nr. 1-3 og 5 í konkurslógini, kann grunnurin í tí einstaka førinum rinda í mesta lagi tilsamans 70.000 kr. til hvønn løntakara. Landsstýrið kann í kunngerð hækka hesa upphædd.

§ 3. For krav, der er nævnt i konkurslovens § 94, nr. 2 og § 95, stk. 1. nr. 1-3 og 5, kan fonden i det enkelte tilfælde i alt højst udbetale 70.000 kr. til hver lønmodtager. Landsstyret kan i bekendtgørelse forhøje dette beløb.

§ 4. Grunnurin rindar peningin, tá kravið er fráboðað og skjalprógvað fyri grunninum. Grunnurin kann rinda ávegisgjøld.
2. stk. Treytin fyri útgjalding er, at kravið er gjaldkomið.

§ 4. Fonden foretager udbetaling, når kravet er anmeldt og dokumenteret over for fonden. Fonden kan foretage delvis udbetaling.
Stk. 2 Udbetaling kan kun finde sted, såfremt kravet er forfaldet.

§ 5. Almennir myndugleikar, arbeiðsgevarar og yrkisfelagsskapir skulu eftir áheitan geva grunninum upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðir um at rinda út pening úr grunninum.

§ 5. Offentlige myndigheder, arbejdsgivere og faglige organisationer skal efter anmodning give fonden oplysninger, der har betydning for afgørelser om udbetaling fra fonden.

§ 6. Grunnurin tekur við kravi løntakarans og skipa/bátaeigarans.

§ 6. Fonden indtræder i lønmodtagerens og skibs/bådeejerens krav.

§ 7. Fæ grunsins verður fingið til vega við, at allir føroyskir arbeiðsgevarar árliga rinda inn í grunnin 1/1000 av tí samlaðu útgoldnu A-inntøkuni fyri hvørt ár.
2. stk. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um, hvussu og nær arbeiðsgevarin skal rinda tað í 1. stk. nevnda gjald.

§ 7. Fondens kapital tilvejebringes ved, at alle færøske arbejdsgivere indbetaler til fonden 1/1000 af den samlede udbetalte A-indkomst for hvert år.
Stk. 2 Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler om, hvorledes og hvornår arbejdsgiveren skal betale de i stk. 1 omhandlede bidrag.

3. stk. Rindar arbeiðsgevarin ikki rættstundis, skal hann gjalda 1½% í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað.
4. stk. Arbeiðsgevaragjaldið og rentur kunnu krevjast inn við panting.

Stk. 3. Såfremt arbejdsgiveren ikke betaler rettidigt, skal han betale renter med 1½% for hver påbegyndt måned.
Stk. 4 Arbejdsgiverbidraget og renter kan indkræves ved pantning.

§ *8.* Landsstýrið ásetir reglur um
1) hvussu krøvini skulu fráboðast og ásetir fráboðanarfreistir,
2) hvørji skjalprógv skulu fylgja við fráboðanini,
3) hvussu grunnurin viðger krøvini og
4) útgjaldingar úr grunninum.

§ *8.* Landsstyret fastsætter regler om
1) hvordan kravene skal anmeldes og fastsætter anmeldelsesfrister,
2) hvilken dokumentation der skal medfølge anmeldelsen,
3) fondens behandling af krav og
4) udbetalinger fra fonden.

§ *9.* Grunnurin verður fyrisitin av umsiting líkningarráðsins. Avgerðir hjá fyrisitingini kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri kærunevnd trygdargrunsins. Kærunevnd trygdargrundsins hevur 3 limir, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formaður. Limirnir í kærunevndini verða valdir av Føroya Landsstýri fyri 4 ár í senn. Samstundis verða vald varatólk, sum taka sæti í kærunevndini, tá limi berst frá.

§ *9.* Fonden administreres af ligningsrådets forvaltning. Dennes afgørelser kan inden 4 uger indbringes for garantifondens ankenævn. Garantifondens ankenævn består af 3 medlemmer, et medlem, der repræsenterer lønmodtagerne, et medlem, der repræsenterer arbejdsgiverne, og en formand. Ankenævnets medlemmer vælges af Føroya Landsstýri for 4 år ad gangen. Samtidig vælges stedfortrædere, der tager sæde i ankenævnet ved et medlems forfald.

§ *10.* Hevur ein løntakari ella skipa/bátaeigari givið grunninum skeivar upplýsingar ella tagt umstøður, sum hava týdning fyri útgjalding úr grunninum, kunnu upphæddir, sum av órøttum eru móttiknar, verða kravdar afturgoldnar av løntakaranum ella skipa/bátaeigaranum.

§ *10.* Har en lønmodtager eller skibs/bådeejer givet fonden urigtige oplysninger eller fortiet omstændigheder, der er af betydning for udbetaling fra fonden, kan beløb, som er modtaget med urette, kræves tilbage betalt af lønmodtageren eller skibs/bådeejeren.

§ *11.* Um ikki hægri revsing er ásett sambært lóggávuni annars, verður hann revsaður við sekt, sum

§ *11.* Medmindre højere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes med bøde den, der,

a. letur vera við rættstundis at inngjalda tað í § 7, 1. stk. nevnda gjald.
b. letur vera við at láta grunninum upplýsingar, tá grunnurin biður um teir ella gevur skeivar ella misvisandi upplýsingar, jbr. § 5.

2. stk. Er lógarbrotið gjørt av einum partafelag, lutafelag ella líknandi, kann áleggjast sjálvum felagnum sektaraábyrgd.

§ *12.* Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1988. Samstundis fara úr gildi løgtingslóg nr. 49 frá 7. juni 1979 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir á fiskavirkjum við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 34 frá 30. apríl 1987 um trygdargrunn løntakaranna.

2. stk. Lógin fevnir eisini um lønarkrøv v.m., sum vóru gjaldkomin 1. januar 1987 ella seinni.

3. stk. Fæið hjá trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir á fiskavirkjum pr. 31. december 1987 verður flutt í trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. Hesin grunnurin krevur inn gjaldið frá fiskavirkjum fyri árið 1987.

a. undlader rettidigt at indbetale bidrag, jfr. § 7, stk. 1,
b. undlader at efterkomme en anmodning fra fondon om oplysninger el ler afgiver urigtige eller vildledende oplysninger, jfr. § 5.

Stk. 2 Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ *12.* Denne lov træder i kraft 1. januar 1988. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 49 af 7. juni 1979 om sikringsfond for fiskeindhandling og løn på fiskevirksomheder med senere ændringer og lagtingslov nr. 34 af 30. april 1987 om lønmodtagernes sikringsfond.

Stk. 2 Loven omfatter også krav på løn m.v., som var forfaldet 1. januar 1987 eller senere.

Stk. 3 Akkumuleret kapital i sikringsfonden for fiskerindhandlinger og løn på fiskeivrksomheder pr. 31. december 1987 overføres til garantifonden for fiskeindhandlinger og løn m.v. Denne fond indkræver bidraget fra fiskevirksomheder for året 1987.

Viðmerkingar:

Trygdargrunnur Veiðumanna varð skipaður við løgtingslóg nr. 49 frá 9. juni 1979.

Endamálið við grunninum var at tryggja veiðuførum og fiskimonnum ávísan part av tí peningi, sum kom í vanda, um virki ella fiskakeypari fór av knóranum. Upprunaliga veitti grunnurin trygd fyri 80% av tapinum. Við lógarbroyting varð hetta seinni broytt til 90%.

Grunnurin verður fíggjaður við einum tonsagjaldi frá øllum rálfiskakeyparum og við eini upphædd á fíggjarløgtingslógini. Játtanin á fíggjarlógini hevur lógini svarað til samlaða tonsagjaldið.

Við løgtingsmáli nr. 45/1986 varð lógin um Trygdargrunn Veiðumanna broytt. Grunnurin her nú heitið »Trygdargrunnur fyri avreiðingar- og lønir á fiskavirkj-

virkjum« og harvið umfatar grunnurin eisini fólkið á virkjunum. Henda broyting varð fíggjað við, at tonsagjaldið varð hækkað úr 2 kr. uppí 3 kr., og játtanin á fíggjarløgtingslógini hækkar samsvarandi. Grunnurin eigur nú góðar 3 mió. kr.

Í samband við at løgtingsmál nr. 45/1986 varð viðgjørt í arbeiðsmarknaðarnevndini kom áheitan um at fáa grunnin at umfata allar løntakarar. Úrslitið av hesum varð, at løgtingið samtykti lógina um Trygdargrunn løntakaranna. Í teirri lógini er einki ásett um, hvør skal umsita tann grunnin, ella nær grunnurin skal byrja virki sítt.

Hjálagda lógaruppskot um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. ber í sær, at tær báðar galdandi lógirnar um ávikavist trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir á fiskavirkjum og trygdargrunn løntakaranna, verða settar úr gildi, tá lógaruppskotið fevnir um bæði avrokning fyri avreiddan fisk til føroysk fiskavirki og lønarkrøv v.m. hjá løntakaranum herundir eisini hýra, um skipaeigari ella reiðaravirki fer í konkurs ella kemur í líknandi støðu.

Høvuðsbroytingarnar í mun til verandi lógir eru hesar:

1. Galdandi avmarking uppá 90% av krøvunum fellur burtur.
2. Fíggingin av grunninum verður broytt á tann hátt, at allir arbeiðsgevarar, privatir og almennir, skulu rinda 1/1000 av útgoldnum A-inntøkum fyri hvør árið. Hetta verður mett at geva 3,7 mió. kr. árliga.
3. Tað verður ikki neyðugt at bíða eftir rættarútskurði fyri at fáa lønaráogn v.m. útgoldnar úr grunninum. Eisini verður møguligt at fáa úr grunninum, sjálvt um kravið hevur sjópant.

Skotið verður upp, at lógin skal eisini fevna um lønarkrøv v.m., sum vóru gjaldkomin 1. januar 1987 ella seinni. Hetta ber í sær, at møguligt verður at fáa grunnin at leggja út lønaráognir v.m. hjá arbeiðsgevarum, sum hildnar eru uppat í 1987.

Lógaruppskotið ber í sær, at grunnurin kann rinda tí einstaka løntakaranum tilsamans 70.000 kr. Aftrat hesum kemur so møgulig frítíðarlønaráogn. Meginreglan er, at grunnurin kann rinda lønarkrøv v.m., sum ganga 6 mánaðir aftur í tíðina.

At enda kann vísast á, at skotið verður upp, at grunnurin verður umsitin av fyrisitingini hjá Líkningarráði Føroya.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Ad § 1.

Endamálið við lógini um trygdargrunnin, er at tryggja løntakarum lønarágóða og skipa bátacigarum avrokning fyri fisk avreiddan til føroysk flakavirki, tá arbeiðsgevarin/fiskavirkið kemur í

1) fíggjartrot (konkurs),
2) arbeiðsgevarin doyr, og deyðsbúgv hansara verður viðgjørt eftir kapitul III í skiftilógini (t.v.s. arvingar arbeiðsgevarans ikki átaka at gjalda skuld hansara) og

3) fyritøkan heldur uppat uttan at vera komin í figgjartrot og tað kann staðfestast, at arbeiðsgevarin ikki er førur fyri at rinda kravið.

Eftir uppskotinum eru løntakarar umfataðir av skipanini. Treytin er tó, at setanarlagið er skipað. Útróðrar- og fiskimenn og fólk, sum eru mynstrað við føroyskum fiski-, farma- og ferðafólkaskipum verða roknað sum løntakarar eftir hesum lógaruppskoti. Nevndarlimir í partafeløgum og øðrum feløgum vera ikki mettir sum løntakarar fyri tann partin, sum umfatar samsýning fyri nevndararbeiði. Grunnurin kann sýta at gjalda til teir persónar, ið verða mettir sum nærstandandi eftir § 95, stk. 2, jbr. § 2 í konkurslógini. Avrokning fyri fisk, avreiddan av føroyskum skipum/bátum til føroysk fiskavirki er við í skipanini. Í ivamálum tekur landsstýrið avgerð um, hvørji fiskavirki og hvørjar avreiðingar koma undir hesa lóg.

Ad § 2.

Skipanin umfatar tær veitingar eftir konkurslógini, sum eru nevndar í §§ 63, 2 stk., 1. pkt. (í ávísum førum eru lønarkrøv, sum ein løntakari hevur vunnið rætt til eftir at figgjartrotið er lýst, fevnd af skipanini) og 95, 1. stk., nr. 1-5, jbr. 2. stk.

1) lønarkrøv v.m., sum eru fallin til gjaldingar í tíðarskeiðinum frá 6. mánaðum áðrenn freistdagin (jbr. § 1 í konkurslógini), til figgjartrotið verður lýst,
2) krøv um endurgjald fyri slit av arbeiðsviðurskiftum, tó ikki endurgjald fyri løn v.m., sum vildi verið fallin til gjaldingar áðrenn 6 mánaðir undan freistdegnum,
3) krav um gjald, um so er at uppsøgnin ella slitið av arbeiðsviðurskiftunum hevur verið í mesta lagi 6 mánaðir áðrenn freistdagin,
4) krav um frítíðarløn og
5) krøv, sum eru nevnd frammanfyri í nr. 1-3, men sum stava frá tíðarskeiðinum, sum liggur frammanundan freistini, sum nevnd er frammanfyri, um so er at kravánarin eftir metan skiftirættsins hevur roynt at fremja kravið uttan óneyðuga seinkan, men ov stutt tíð hevur verið til at fremja figjarúttøkn, sum tryggjar kravið mótvegis trotabúnum.

Tað sama er galdandi fyri krøv eftir § 94, nr. 2 (skuld, sum skuldarin átekur sær við samtykki frá umsjón trotabúgvsins, góðkend av skiftirættinum) um so er, at skiftirætturin í skiftiviðviðgerðini váttar, at figgjartrotabúgvið ella deyðshúgvið ikki er ført fyri at rinda krøvini. Avrokning fyri avreiðingar eru eisini umfatað av skipanini.

Í teimum førum, har virkið heldur uppat eftir § 1, stk. 1 nr. 3, ger grunnurin av, um kravið hevur framfhjárætt eftir § 95, nr. 5 í konkurslógini, og um úrgjalding skal sýtast sambært § 95, stk. 2. Er talan um gjaldsstøð, er fráboðanardagurin freistdagur, um fyritøkan vegna insolvens er hildin uppat áðrenn 3 vikur aftanú, at gjaldsstøðgurin hevur mist gildi eftir § 16 í konkurslógini.

Ad § 3.

Tá talan er um krøv samsvarandi konkurslógini § 93, nr. 2 og § 95, stk. 1, nr. 1-3 og 5, kann grunnurin í mesta lagi rinda 70.000 kr. tilsamans til hvønn løntakara í hvørjum føri. Landsstýrið kann við kunngerð hækka hesa upphædd. Landsstýrið kann harafturímóti ikki við kunngerð lækka upphæddina. Skal upphæddin lækkast niður um 70.000 kr., má hetta fremjast við lógarbroyting. Aftanat teimum 70.000 kr. kemur møgulig frítíðarløn, sum ikki er avmarkað.

Somuleiðis eru avrokningar fyri avreiðingar óavmarkaðar. Tó kann trygdin ikki koma uppum avrokningarvirðið.

Ad § 4.

Ein treyt fyri at fáa pening úr grunninum er, at kravið er skjalaprógvað. Er kravið ikki fult og endaliga skjalprógvað, kann grunnurin tó lata ávegisgjald. Hetta verður gjørt fyri at viðurskifti løntakaranna, skipa/bátaeiguranna verða órógvað minst møguligt. Ein onnur treyt er, at kravið er fallið til gjaldingar.

Ad § 5.

Fyri at lætta um t.d. skjalprógvan av krøvum, skulu almennir myndugleikar, arbeiðsgevarar og yrkisfelagsskapir eftir ábeitan geva grunninum upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðir um at rinda út pening úr grunninum.

Ad § 6.

Tá grunnurin hevur goldið fyri lønarkrøv v.m. og fyri avreiðingar, yvirtekur grunnurin kravið í tann mun, hann hevur goldið út.

Ad § 7.

Eftir uppskotinum skal grunnurin fíggja seg sjálvan við einum arbeiðsgevaragjaldi. Allir arbeiðsgevarar, bæði almennir og privatir skulu gjalda 1/1000 av tí samlaðu útgoldnu A-inntøkuni fyri hvørt ár. Landsstýrið ásetir í kunngerð, hvussu, hvar og nær arbeiðsgevarin skal rinda gjaldið. Rindar arbeiðsgevarin ikki rættstundis, skal hann gjalda 1½% í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað. Arbeiðsgevaragjaldið umframt rentur kunnu krevjast inn við panting.

Fólkapensjón og avlamispensjón eru A-inntøkur, men eru ikki lønarinntøkur, og tørvur er ikki at áseta gjald í mun til teirra, av tí at tey koma ikki at gera nýtslu av grunninum (vegna pensjónina). Men av tekniskum orsøkum ber ikki til at gera mun á ymsum A-inntøkum. promillugjaldið hevur sostatt ikki veruligt samband við pensjónina og kann tí ikki haldast sum pensjónsútreiðsla, sum ríkiskassin tekur lut í. Gjaldið, 1/1000 av almannapensjónum (tann skattskyldugi parturin), verður tí at gjalda av landskassanum sum studningur til trygdargrunn.

Að § 8.

Eftir hesi grein skal landsstýrið áseta nærri reglur um, hvussu krøv skulu fráboðast, hvørji skjalprógv skulu fylgja við, viðgerðarháttur av krøvunum og hvussu útgjaldingin verður skipað.

Að § 9.

Grunnurin skal fyrisitast av umsitingini hjá Líkingarráð Føroya. Avgerðir hjá umsiting Líkningarráðsins kunnu innan fýra vikur kærast fyri kærunevnd Trygdargrunsins, sum telur 3 fólk, ið verða vald av landsstýrinum. Landsstýrið velur limirnar og skal ein umboða løntakarar, ein arbeiðsgevarar og ein triðji limur skal vera formaður. Avgerðirnar hjá kærunevndini eru endaligar.

Að § 10.

Henda grein tryggjar grunninum afturgjalding, tá løntakarin ella skipa/bátaeigarin hevur givið skeivar upplýsingar og tagt umstøður um so er, at gjøld av órøttum eru móttikin.

Að § 11.

Tann, sum ikki letur arbeiðsgevaragjald rættstundis eftir § 7, 1. stk., kann revsast við sekt. Tað sama er galdandi, tá ein noktar at geva upplýsingar eftir § 5 ella gevur skeivar upplýsingar.

Að § 12.

Eftir hesi grein fær lógin aftanvirkandi gildi, soleiðis at krøv, sum vóru gjaldkomin 1. januar 1987 ella seinni, verða tikin við. Lógin kemur í gildi 1. januar 1988 og fella løgtingslógirnar um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir á fiskavirkjum og Trygdargrunn løntakaranna burtur. Tað fæ, sum er í grunninum fyri avreiðingar og lønir á fiskavirkjum, verður flutt yvir í trygdar-

grunnin fyri avreiðingar og lønir v.m., sum verður stovnaður sambært lógaruppskotinum.

1. viðgerð 14. december. Málið varð beint í arbeiðsmálanevndina, sum 3. mai 1988 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram landsstýrinum av 24. november 1987 og eftir 1. viðgerð 14. december beint í arbeiðaramálanevndina.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið á fundum 5. apríl og 22. apríl 1988.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum, soleiðis sum tað liggur á tingbordi, men tó við hesi broyting:

broytingaruppskot

Í § 9 verða 1. og 2. punktum broytt soleiðis:

»Grunnurin verður umsitin av Líkningarráð Føroya. Avgerðir ráðsins kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri kærunevnd Trygdargrunsins.«

I § 9 ændres 1. og 2. punktum således:

»Fonden administreres af Líkningarráð Føroya. Dettes afgørelser kan inden 4 uger indbringes for Garantifondens ankenævn.«

2. viðgerð 4. mai. Broytingaruppskotið til § 9 frá samdari arbeiðaramálanevnd samtykt við 31-0, § 1 samtykt við 31-0, §§ 2-8 samtyktar við 31-0, § 9 við broyting við 31-0, §§ 10-12 við 31-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 31-0 atkvøðum.

3. viðgerð 5. mai. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1320-1. Lóg nr. 68 frá 9. juni 1988.

43 Nýtt sjónvarpshús í Eysturoy.

(Ikki framlagt)

44 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Ár 1987, mánadagin 14. december legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Sum litra h í § 2, 1. stk. verður sett: »fær inntøkur stavandi frá arbeiði, sum er gjørt her í landinum, sum sambært § 60, 1. stk., nr. 8 skal roknast sum A-inntøka.«

2. Sum nr. 8 í § 60, 1. stk. verður sett: Samsýning í peningi og í hesum sambandi frítt vistarhald til persón, sum er til taks at gera arbeiði her í landinum, íroknað møgulig samsýning fyri útreiðslur til ferðing, uppihald v.m. Reglurnar eru galdandi uttan mun til, um inntøkan verður goldin triðja manni (møguliga felag).«

3. Í § 63, stk. 1 verður ískoytt:

»Avrokning av A-inntøku samhært § 60, stk. 1, nr. 8 áliggur tí, sum fær arbeiðið gjørt.«

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. Som litra h i § 2, stk. 1 indsættes: »oppebærer indkomst hidrørende fra virksomhed udført her i landet, der i medfør af § 60, stk. 1, nr. 8, skal henregnes til A-indkomst.«

2. Som nr. 8 i § 60, stk. 1 indsættes: »Vederlag i penge samt i forbindelse hermed ydet fri kost og logi til en person, der stilles til rådighed for at udføre arbejde her i landet, herunder eventuelt godtgørelse til dækning af udgifter til rejse og ophold m.v. Dette gælder uanset indkomsten udbetales til tredie mand (eventuelt til selskab).«

3. I § 63, stk. 1 in fine tilføjes:

»Indeholdelsespligten ved udbetaling af A-indkomst efter § 60, stk. 1, nr. 8 påhviler den, for hvem arbejdet udføres.«

4. § 141, stk. 1, 2) verður orðað soleiðis:
»ikki rættstundis heldur eftir og avroknar avgjald i vinningsbýti sambært § 30 og ikki rættstundis heldur eftir og avroknar avgjald av nýtslurætti sambært § 7 í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broyting.«

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi fyri inntøkur, sum verða goldnar aftanaá 1. januar 1988.

4. § 141, stk. 1, 2) formuleres således:
»undlader rettidigt at indeholde og indbetale aktieudbytteafgift jfr. § 30 og undlader rettidigt at indeholde og indbetale afgift af royaltybeløb jfr. § 7 i lagtingslov nr. 87 fra 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen med senere ændringer.«

§ 2.

Denne lagtingslov finder anvendelse på de indkomster, der udbetales efter 1. januar 1988.

Viðmerkingar:

Undir fulla skattaskyldu í Føroyum kemur sambært § 1, nr. 4 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt hvør persónur, ið uttan at hava bústað her innanfyri eitt 12 mánaða tíðarskeið hevur dvalt her í minst 180 dagar, annaðhvørt hann hevur verið burtur ímillum ella ikki.

Husir sonu persónar eru hinvegin avmarkað skattskyldugir, um teir dvølja her minni enn 180 dagar innanfyri eitt 12 mánaða tíðarskeið, um teir fáa løn í tænastuviðurskifti frá arbeiðsgevara í Føroyum ella frá útlendskum arbeiðsgevara, sum hevur heimating ella fulltrú í Føroyum.

Í stóran mun hendir tað í Føroyum í dag, at føroysk virki gera avtalu við útlendskan millumgongumann um, at hesin fær til vega arbeiðsfólk úr útlondum, sum fyri útlendska millumgongumannin fara til Føroya at gera ávís arbeiði. Millumgongumaðurin setir og lønar hesum fólki, og eru hesi tí ikki skattskyldug í Føroyum samhært núgaldandi skattalóg, tá millumgongumaðurin ikki hevur heimating ella fulltrú í Føroyum, og fólkini dvølja her í minni enn 180 dagar innanfyri eitt 12 mánaða tíðarskeið.

Við hesum lógaruppskoti er ætlanin at staðfesta, at tá talan er um sokallaða »arbeiðsútleigan«, hevur lønmóttakarin ein arbeiðsgevara í Føroyum. Tað, at 180-daga reglan í hesum førum ikki verður nýtt, merkir, at rætturin til at skatta inntøkuna virkar frá fyrsta degi, og at Føroyar sostatt hava rætt til at krevja skatt av inntøkuni frá fyrsta degi.

Løntakari verður roknaður fyri útleigaður, tá annar persónur (útleigarin) bjóðar hann út at arbeiða í virkinum hjá triðja manni (arbeiðsgevaranum) og útleigarin ikki ber ábyrgd av úrslitinum av arbeiðinum. Tá avgerast skal, um ein løntakari er at rokna sum útleigaður, skal hetta vera út frá eini heildarmetan av niðanfyri nevndu treytum:

A. Arbeiðsgevarin í arbeiðslandinum hevur ovastu leiðsluna,
B. Arbeiðið verður gjørt á einum arbeiðsplássi, sum arbeiðsgevarin í arbeiðslandinum ræður yvir og hevur ábyrgdina av.
C. Gjaldið til útleigaran verður roknað eftir tíðini, sum arbeiðið tekur, ella út frá øðrum sambandi millum gjaldið og ta løn, sum løntakarin fær.
D. Arbeiðsgevarin í arbeiðslandinum letur størsta partin av amboðunum og tilfarinum.
E. Útleigarin ásetir ikki einsamallur talið á løntakarum og útbúgving teirra.

Neyðuga lógarbroytingin viðvíkjandi arbeiðsútleigan er gjørd í § 2, har persónurin sjálvur verður avmarkað skattskyldugur, og sjálv inntøkan, nevniliga tann ávísa inntøkan, verður roknað sum A-inntøka sambært § 60, stk. 1, nr. 8.

Samstundis eru nakrar fylgisbroytingar, nevniliga hvør heldur peningin aftur: Tann, sum fær arbeiðið gjørt.

At enda ein lógarbroyting viðvíkjandi revsing, um avgjald av nýtslugjaldi og vinningsbýti ikki verður hildið aftur og goldið sambært lógarreglunum.

1. viðgerð 20. januar 1988. Málið varð beint í skattanevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 14. december 1988 og eftir 1. viðgerð 20. januar 1988 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd skattanevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 4. mai. § 1 samtykt við 31-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 31-0 atkvøðum.

3. viðgerð 6. mai. Uppskotið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 430-12-46-16. Lóg nr. 64 frá 9. juni 1988.

45 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Ár 1987, mánadagin 14. december legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

1. Sum § 8 verður sett:

»Vísandi til § 54 í samtíðarskattalógini verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 2, sum eru undir avmarkaðari skattaskyldu, ásettur til 35% av bruttoinntøkuni. Skatturin verður býttur við 40% sum kommunuskattur og 60% sum landsskattur«.

2. Í § 1 verður strikað:

»og teirra, ið nevnd eru í § 2«.

3. § 7 verður orðað soleiðis:

»Av nýtslugjaldi (royalty) sambært § 2, 1. stk. c) í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður ásett eitt gjald uppá 25%. Tann, ið rindar ella góðskrivar nýtslugjaldið skal halda aftur hetta avgjald og rinda peningin til Føroya Gjaldstovu við tilskilan av navn og bústað móttakarans. Rindan av avgjaldinum verður roknað at vera rættstundis, tá goldið verður í seinasta lagi við endan av mánaðinum,

§ *1.*

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af landsskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

1. Som § 8 indsættes:

»Under henvisning til § 54 i kildeskatteloven udskrives skatten til dem, der er omhandlede i § 2, med begrænset skattepligt, med 35 % af bruttoindtægten. Skatten fordeles med 40% som kommuneskat og 60% som landsskat«.

2. I § 1 slettes: »for dem, der er omhandlet i § 2«.

3. § 7 formuleres således:

»Af royalty, jfr. § 2, stk. 1 c) i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer udskrives en fast afgift på 25%. Den, som udbetaler eller godskriver royalty skal indeholde denne afgift og indbetale beløbet til Føroya Gjaldstova med oplysning om modtagerens navn og adresse. Indbetaling af royaltyafgift anses for rettidig, når den finder sted senest ved udløbet af den måned, der følger efter den måned,

sum kemur aftaná tann mánaðin, sum avgjaldið er gjaldkomið. Avgjuldið verður hýtt við 40% til avvarðandi kommunu og 60% til landskassan.

2. stk. Um avgjaldið ikki er goldið rættstundis sambært § 1, skal renta rindast av avgjaldinum við 1% um mánaðin frá gjaldkomudegi at rokna til goldið verður.

3. stk. Renta sambært stk. 2 kann ikki verða frádrigin skattskyldugu inntøkuni. Reglurnar í § 135, 3. stk. um rættin til at panta avgjaldið við aftratkomnum rentum, er galdandi í hesum førum.«

4. § 8 verður § 9.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi 1. januar 1988.

hvor royaltyafgiften er forfalden til betaling. Afgiften fordeles med 40% til pågældende kommune og 60% til landskassen.

Stk. 2. Er den i henhold til stk. 1 indeholdte afgift ikke indbetalt rettidigt, påløber der afgiften renter med 1% pr. påbegyndt måned fra sidste rettidige indbetalelsesdag af regne.

Stk. 3. Den i stk. 2 omhandlede rente kan ikke fratrækkes i den skattepligtige indkomst. Reglerne i § 135, stk. 3 om retten til udpantning af afgift med påløbne renter finder tilsvarende anvendelse.«

4. § 8 bliver § 9.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1988.

Viðmerkingar:

Fyrsta uppskotið er, at øll, sum sambært § 2 í samtíðarskattalógini eru undir avmarkaðari skattskyldu, verða skattløgd við 35% av bruttoinntøkuni.

Í dag er skipanin tann, at t.d. ein útlendskur lækni teir fyrstu 180 dagarnar ongan frádrátt fær, og tí verður skattaður av bruttoinntøkuni. Aftaná 180 dagar kemur hann undir fulla skattskyldu, og fær tá allar frádráttir, galdandi frá fyrsta degi, viðkomandi kom til Føroyar.

Nógv eru tey, ið bert dvølja her minni enn 180 dagar, og fyrisitingarliga hevði tað broytt arbeiðsumstøðurnar nógv, um hesi bert skuldi skattleggjast við 35% av bruttoinntøkuni eina ferð med alla.

Tey, ið dvølja her longri, koma altið undir fulla skattskyldu, og skatturin verður roknaður eftir galdandi skattastigi.

Við hesum lógaruppskoti verður gingið á møti einum tørvi at skattleggja bólkar av fólki, ið higartil ongan skatt hava goldið til Føroyar, tí tey dvølja her minni enn 180 dagar, og tey eru mong, og higartil hevur eingin heimild verið til at skattleggja hendan bólk.

Annað lógaruppskotið er um nýtslugjald. Reglur um nýtslugjald vórðu settar við lóg, sum kom í gildi í mai 1987. Í hesum lógaruppskoti verður nærri ásett, hvussu gjaldið av nýslugjaldinum skal rindast til Føroya Gjaldstovu, og avleiðingarnar av at upphæddin ikki verður goldin ella goldin ov seint.

1. viðgerð 20. januar 1988. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. mars legði fram soljóðandi.

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 14. december 1987 og undir 1. viðgerð 20. januar 1988 beint í skattanevndina.

Uppskot landsstýrisins er í tveimum:

Tað fyrra at øll, sum sambært § 2, 1. stk., a og b í samtíðarskattalógini eru undir avmarkaðari skattskyldu verða skattløgd við 35% av bruttoinntøkuni. Við fyriliggjandi uppskoti verður útvegað heimild at skattleggja hólkar av fólki, ið higartil ongan skatt hava goldið her í Føroyum, tí tey dvølja her stytri enn 180 dagar.

Ein samd skattanevnd mælir tinginum til at samtykkja henda fyrra partin av uppskoti landsstýrisins.

Tann seinni parturin er regla um nýtslugjald. Í fyriliggjandi uppskoti verður ásett, hvussu avgjaldið skal rindast til gjaldstovuna og avleiðingarnar av, at ikki ella ov seint verður goldið.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tann 24. februar 1988 havt fund við umboð fyri Líkningarráð Føroya.

Á hesum fundi var frá nevndarlimi í skattanevndini ført fram, at tað er átrokandi at fáa avklárað reglurnar um »leasing« í samband við fyriliggjandi lógaruppskot, tá tað frá fleiri síðum er sett spurnartekin við rættarstøðuna hesum viðvíkjandi.

Umboðini fyri Líkningarráð Føroya løgdu fram ymiskt skjalatilfar (10 skjøl), ið skulu lýsa spurningin.

Vart varð gjørt við frá nevndarlimi, at tað er umráðandi, at verandi sáttmálar (leasing) ikki verða nervaðir av nýggjum reglum. Rúmlig freist má útvegast til tess at broyta avtalurnar, so lógartreytirnar eru loknar uttan at figgjarligur missur stendst av broytingini.

Ein samd skattanevnd ásannar, at tað er umráðandi at staðfesta, at broytingin umfatar nýggjar avtalur, og at hetta verður virkandi frá 1. juli í ár. Tá ber til at tilevna komandi avtalur, soleiðis at galdandi lógarreglur takast inn í sáttmálarnar. Harvið er eingin ivi um, hvat er galdandi.

Eisini er tað umráðandi, at »leasing« sum fyribrigdi verður at tulka sambært verandi góðtiknar OECD-fyrimynd ella model.

Við frammanfyristandandi viðmerkingum frá skattanevndini verður mælt til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 7. apríl. § 1. samtykt við 18-0 atkvøðum, § 2 samtykt við 18-0 atkvøðum. Við 19-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 15. apríl. Málið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 430-12-45-16. Lóg ikki lýst. Sí løgtingsmál nr. 151/87 viðmerkingarnar.

46 Umhvørvislóg

Ár 1987, mikudagin 16. december legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja tað í viðlagda áliti framsetta uppskot til løgtingslóg um umhvørvisvernd.

Viðmerkingar:

Galdandi reglur um vernd av umhvørvinum á landi finnast í løgtingslóg nr. 38 frá 5. juli 1973 um heilsusamtyktir og í lóg nr. 40 frá 1. juni 1961 um oyðing av rottu. Við heimild í lógini um heilsusamtyktir varð gjørd ein standard heilsusamtykt, sum er sett í gildi í flestu kommununum. Einstakar reglur til vernd av umhvørvinum finnast í øðrum lógum, t.d. í fiskarílógini frá 1893 og í lógini frá 1937 um vøtn og áir.

Galdandi reglur lúka ikki tørvin til vernd av umhvørvinum í dag og landsstýrið setti tí við ársbyrjan 1986 ein arbeiðsbólk at gera uppskot til eina umhvørvislóg.

Í arbeiðsbólkin vórðu settir hesir limir:
Jórun í Dali, arkitektur, fyri Náttúru- og Umhvørvisverndarfelagið,
Marjun Hanusardóttir, leiðari á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni,
og seinni Ásmundur Gudjónsson,
Øssur av Steinum, løgtingsmaður, fyri Føroya Kommunufelag,
Tóri í Hoyvík, býargartnari, fyri Tórshavnar Kommunu,
Jústines Olsen, djóralækni,
Mogens Nepper-Christensen, landfúti, og seinni Finn Ougaard, varafúti,
Høgni Debes Joensen, landslækni, ið varð valdur til formann.
Skrivari hjá bólkinum var Trygvi Jacobsen, advokatur.

Nevndarálitið hevur verið til ummælis hjá Føroya arbeiðsgevarafelag, kommunufelagnum, Tórshavnar kommunu, F.N.Ú., landslæknanum, heilsufrøðiligu starvsstovuni, Føroya náttúrugripasavni, dómaranum, náttúrugripafelagnum, aliráðnum, havbúnaðarfelagnum, búnaðarfelagnum, bóndafelagnum, jarðarráðnum, meginfelag útróðrarmanna, fiskimannafelagnum, støðisútbúgvingini, fiskirannsóknarstovuni, landsdjóralæknanum og arbeiðseftirlitinum.

Ummælini, ið innkomin eru, eru hjáløgd málinum saman við álitinum.

Ummæli, ið landsstýrið ikki enn hevur fingið, verða send tingnevndini, ið fær málið til viðgerðar.

Sí skjøllini 13 A-F.

1. viðgerð 20. januar 1988. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 4. mai legði fram.

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 16. december 1987 og eftir 1. viðgerð 20. januar 1988 beint í umhvørvisnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fundir við umboð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Kommunufelagið, Tórshavnar Býráð og landslæknan.

Nevndin tekur undir við uppskotinum um, at Føroyar nú fáa eina umhvørvislóg, tí tørvurin á slíkari lóg er eyðsýndur. Nevndin tekur sum heild undir við endamálsgreinunum í lógini og teimum tiltøkum og atgerðum, sum lógaruppskotið nælir til.

Hin vegin kann nevndin ikki taka undir við uppskotinum um myndugleikabygnað, og um hvør myndugleiki skal verða kærumyndugleiki (6., 12. og 13 kapittul). Sum grund fyri hesum skal nevndin føra fram fylgjandi:

Eftir lógaruppskotinum verður mælt til stovnseting av umhvørvisdeild at umsita lógina. Hetta merkir, at kommunurnar verða ikki við sum primert eftirlit, og at øll fyrisitingin verður centraliserað. Hetta, metir nevndin, er óheppið, eftirsum umhvørvisdeildin jú bæði skal verða fakligi ráðgevin og ráðgevi hjá landsstýrinum.

Víðari skal nevndin vísa á, at kommunurnar sambært uppskotinum bert fáa tvær uppgávur: At seta avgjøld og at gera skrásetingar. Nevndin heldur ikki, tað er beint á henda hátt at taka ábyrgd frá kommunum, men heldur tvørturímóti tað vera ein fortreyt, fyri at lógin skal koma at virka eftir ætlan, at kommunurnar fáa medábyrgd av lógini.

Nevndin mælir tí til, at myndugleikabygnaðurin verður broyttur soleiðis, at tað í princippinum er Føroya landsstýri, sum er yvireftirlit og hægsta umsitingarvald viðvíkjandi umhvørvislógini. Samstundis mælir nevndin til, at landsstýrinum verður heimilað at lata frá sær henda myndugleika til kommunu ella kommunalar felagsskapir. Har hvørki kommuna einsæris ella kommunalir felagsskapir eru førir fyri at átaka sær at umsita lógina á staðnum, eigur landsstýrið at hava heimild til at lata umsitingina fara fram á almennum stovnum, t.d. Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Eisini eigur tað at verða loyvt smáum kommunum at lata størri kommunum umhvørvisligar uppgávur, um eingin felagskommunalur stovnur er t.d. í økinum.

Nevndin hugsar sær á hendan hátt, at tað fast til vega ein myndugleikabygnaður, sum tryggjar eitt primert eftirlit við lógini á staðnum (kommunalt/interkommunalt eftirlit og umsiting) við t.d. Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sum ráðgeva við neyturviligum starvsstovuútbúnaði. Landsstýrið verður tá yvirordnað eftirlit, regluskapandi við Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sum ráðgeva.

Ein slíkur bygnaður minnir um myndugleikabygnaðin í matvørulógini, ið tíverri enn ikki er farin at virka, men sum vónandi kemur at virka, nú ein paralell lóg verður samtykt, Nevndin hevur valt ikki at seta sjálvan myndugleikabygnaðin í lógina, í nevndin heldur tað vera beinast, at landsstýrið saman við Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í samráðingum við Føroya Kommunufelag, Tórshavnar býráð o.a. avvarðandi myndugleikar og stovnar finnur fram til ein hóskandi bygnað. Av hesi orsøk setir nevndin uppskot um, at landsstýrinum verður heimilað at delegera myndugleika sín til eitt nú eitt bý- ella bygdarráð og/ella kommunalar felagsskapir.

Tað er nevndini greitt, at tað verður kostnaðarmikið at umsita primera eftirlitið. Nevndin heldur tí tað verða ein loysn, at kommunur skipa seg í kommunalar felagsskapir við tí endamáli at umsita tær heimildir, sum teimum verða latnar av landsstýrinum í samband við umhvørvislógina og tær heimildir, sum kommunur hava sambært matvørulógina. Ein slíkur bygnaður vildi bæði givið ein veruligan møguleika fyri, at lógin verður umsitin lokalt, at kostnaðurin ikki gjørdist ov tyngjandi fyri kommununrnar og eitt gott høvi til at fáa bæði matvørulóg og umhvørvislóg at virka eftir ætlan.

Viðvíkjandi kæruspurninginum heldur nevndin, at ein annar bygnaður enn tann í lógaruppskotinum eigur at verða skipaður sum ein fylgja av frammanfyristandandi broyting. Nevndin hugsar sær ein bygnað, ið ger Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til kæruvald fyri tær primeru (lokalu) avgerðirnar, og sum ger Føroya landsstýri til kæruvald fyri avgerðir tiknar av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Eisini hendan skipan minnir um skipanina í matvørulógini. Nevndin setir uppskot um broytingar í uppskoti í landsstýrisins samsvarandi.

Nevndin skal viðmerkja, at fleiri av teimum umboðum, sum nevndin hevur havt fund við, taka undir við tí myndugleikabygnað, sum her er skotin upp. Annars hugsar nevndin sær, at landsstýrið aftan á lur omanfyri nevndu samráðingar fastleggur endaliga myndugleikabygnaðin í kunngerð.

Nevndin skal annars gera vart við, at tað her er talan um eitt ógvuliga stórt og týdningarmikið mál. Tað er tí torført í løtuni at yvirskoða í øllum lutum, hvussu lógin kemur at virka og hvørjar umsitingarligu, kostnaðarligu og umhvørvis-

ligu fylgjurnar av lógini verða. Nevndin heldur tað tí verða heint, at lógin verður endurskoðað longu um tvey ár og setir fram uppskot um hetta. Nevndin skal eisini loyva sær at vísa á, at ráðgeving, kanningar og starvsstovuroyndir kunnu gerast ein fíggjarliga tung byrða sjálvt hjá stórum kommunum og kommunufelagsskapum. Nevndin heldur tí, at kommunurnar í umsiting teirra av hesi lóg eiga at kunna nýta Heilsufrøðiligu Starvsstovuna í stóran mun, so tær ikki gerast heftar av eitt nú útlendskum ráðgevingarfyritøkum.

Út frá hesum mælir ein samd umhvørvisnevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins til umhvørvislóg við hesum broytingum.

broytingaruppskot

1) § 4, 3. stk. gongur út og í staðin verður sett:

»§ 4, 3. stk. Í reglunum kann landsstýrið geva boð um ábøtur á ella møguligt bann mótvegis øðrum virksemi enn tí, ið nevnt er í fylgiskjalinum til lógina, sbr. § 26, um so er, at hetta hevur við sær óheilsufrøðiligar avleiðing ella týðandi ampa fyri umhvørvið.«

2) Í § 5, 1. og 3. stk. verður orðið »Umhvørvisdeildini« broytt til: »hý- og/ella bygdarráðið«, í § 5, 3. stk., pkt. 3 verður orðið »umhvørvisdeildin« broytt til: »bý- og/ella bygdarráðið«.

3) Í § 6 verða ávikavist í 1. og 2. stk. orðini »umhvørvisdeildin« og »umhvørvisdeildarinnar« broytt til: »landsstýrið« og »landsstýrisins«.

4) Í § 12, 1., 2. og 4. stk. verður orðið »Umhvørvisdeildin« broytt til: »Landsstýrið«

5) Í § 13, 1. stk., 1 og 2. punktum verður orðað »Umhvørvisdeildin« broytt til: »Landsstýrið«.

1) § 4, stk. 3 udgår og i stedet indsættes:

»§ 4, stk. 3 i reglerne kan landsstyret give påbud om afhjælpende foranstaltninger eller eventuelt forbud at gribe ind overfor anden virksomhed end den, der er optaget i bilaget til loven, jfr. § 26, hvis den giver anledning til hygiejniske forhold eller væsentlige ulemper for omgivelserne

2) I § 5, stk. 1 og 3 ændres ordet »Miljøafdelingen« til »by- og bygderådet«, og i § 5, stk. 3, pkt. 1 og 4 ændres ordene »miljøafdelingens« til: »by- og/eller bygderådets«, i § 5, stk. 3, pkt. 3 ændres ordet »miljøafdelingen« til: »by- og/eller bygderådet«.

3) I § 6 ændres hendholdvis i stk. 1 og 2 ordene »miljøafdelingen« og »miljøafdelingens« til: »landsstyret« og »landsstyrets«.

4) I § 12, stk. 1, 2 og 4 ændres ordet »Miljøafdelingen« til: »Landstyret«.

5) I § 13, stk. 1 første og andet punktum ændres »Miljøafdelingen« til »Landsstyret«.

6) Í § 16 verður orðið »umhvørvisdeildini« broytt til: »landsstýrinum«.

7) Í § 18, 2. stk. verður »Umhvørvisdeildin« broytt til: »Landsstýrið«.

8) Í § 21, 1. og 2. stk. verður orðið »umhvørvisdeildin« broytt til: »landsstýrið«.

9) Í § 21, 3. stk. verður orðið »týðandi« broytt til: »álvarsamari«.

10) Í § 25 verður orðið »umhvørvisdeildin« broytt til: »landsstýrið«.

11) Í § 29 verður orðið »umhvørvisdeildini« broytt til: »landsstýrinum«.

12) Í § 34, 1., 2. og 5. stk. verður orðið »umhvørvisdeildin« broytt til »landsstýrið«.

13) Í staðin fyri 6. kapittul, § 35 í uppskoti landsstýrisins verður sett soljóðandi nýggjur 6. kapittul, § 35:

»6. kapittul.
Myndugleikarnir.

§ 35. Landsstýrið hevur yvireftirlitið við, at lógin og tær við heimild í lógini ásettu reglur verða hildnar.

2. stk. Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur tess eftir hesi lóg út til kommunur ella kommunufelagsskapir. Um hvørki kommuna einsæris ella kommunalur felagsskapur eru førir fyri at átaka sær at umsita lógina á staðnum, kann landsstýrið leggja eftirlits- og umsitingaruppgávurnar til ávísan landsstovn ella landsstovnar.«

14) Í § 36 verður orðið »Umhvørvisdeildin« broytt til: »Landsstýrið«.

6) I § 16 ændres »Miljøafdelingen« til »Landsstyret«.

7) I § 18, stk. 2 ændres »Miljøafdelingen« til »Landsstyret«.

8) I § 21, stk. 1 og 2 ændres »Miljøafdelingen« til »Landsstyret«.

9) I § 21, stk. 3 ændres i den færøske tekst »týðandi« til »Álvarsamari«.

10) I § 25 ændres »Miljøafdelingen« til »Landsstyret«.

11) I § 29 ændres »Miljøafdelingen« til »Landsstyret«.

12) I § 34, stk. 1, 2 og 5 ændres »Miljøafdelingen« til »Landsstyret«.

13) I stedet for kapitel 6, § 35 i landsstyrets forslag indsættes sålydende nyt kapitel 6, § 35:

»kapitel 6.
Myndighederne.

§ 35. Landsstyret har det overordnede tilsyn med at loven og de inde hjemmel i loven fastsatte bestemmelser overholdes.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til med bekendtgørelse af delegere sine tilsyns- og administrationsopgaver efter loven til kommune eller kommunale organisationer. Såfremt hverken kommune alene eller kommunale organisationer er i stand til at påtage sig at administrere loven lokalt, kan landsstyret delegere sine tilsyns- og administrations opgaver til en bestemt landsinstitution eller landsinstitutioner.«

14) I § 36 ændres »Miljøafdelingen« til »Landsstyret«.

15) § 36, stk. 2 ophæves.

16) I § 37, stk. 3 i den færøske tekst ændres »týðandi« til »álvarsamari«.

15) § 36, 2. stk. verður strikað.

16) Í § 37, 3. stk. verður orðið »týðandi« broytt til: »úlvarsamari«.

17) § 39, 1. stk. gongur út og í staðin verður sett:

»Landsstýrið, stovnar ella fólk, ið av landsstýrinum hava fingið litið upp i hendur at gera kanningar, og landslæknin hava atgongd til almennar og privatar ognir at fáa til vega upplýsingar til nýtslu viðvíkjandi avgerðum sambært lógini ella reglum, gjørdar við heimild í hesi lóg.«

18) Í § 40, 1. stk. verða orðini: »umhvørvisdeildini ella« strikað.

19) Í § 40, 2. stk. verða orðini »umhvørvisdeildin ella, » strikað.

20) Í § 42 verður orðið »Umhvørvisdeildin« broytt til: »Landsstýrið«.

21) Í § 45 verður orðið »umhvørvisdeildini« broytt til: »Heilsufrøðiligu Starvsstovuni«.

22) Í §§ 46, 48 og 49 verður orðið »Umhvørvisdeildin« broytt til: »Landsstýrið«.

23) § 50 gongur út og í staðin verður sett:

»§ *50.* Landsstýrið kann eftir samráðing við kommunalu myndugleikarnar fremja eina kortlegging av luftdálkingini, her uppi í eina kortlegging av dálkingarkeldunum og eina ætlan um luftdygdina.«

24) Í § 53, 1. stk. verður orðið »umhvørvisdeildin« broytt til: »landsstýrið«.

25) Í § 53, 2. stk. verða orðini ávikavist: »umhvørvisdeildini« tvær ferðir, »umhvørvisdeildin« og »umhvørvisdeildina« broytt til

17) § 39, stk. 1 udgår og i stedet indsættes: »Landsstyret, institutioner eller personer, der af landsstyret er bemyndiget til at foretage undersøgelser, samt landslægen har adgang til offentlige og private ejendomme for at tilvejebringe oplysninger til brug for beslutninger i henhold til loven eller regler udfærdiget med hjemmel i lovon«.

18) I § 40, stk. 1 udgår »Miljøafdelingen eller«.

19) I § 40, stk. 2 udgår »miljøafdelingen« eller

20) I § 42 ændres »Miljøafdelingen« til »Landsstyret«.

21) I § 45 ændres »Miljøafdelingen« til »Hygiejnisk Institut«.

22) I §§ 46, 48 og 49 ændres »Miljøafdelingen« til »Landsstyret«.

23) § 50 udgår og i stedet indsættes:

§ *50.* Landsstyret kan efter forhandlinger med de kommunale organisationer foretage en kortlægning af luftforureningen, herunder kortlægning af forureningskilder og en beregning af luftkvaliteten.«

24) I § 53, stk. 1 ændres »Miljøafdelingen« til »Landsstyret«.

25) I § 53, stk. 2 ændres »Miljøafdelingen« til: »Landsstyret«.

26) I § 54, stk. 1, § 55, stk. 1, § 56, stk. 1 og § 57, stk. 1, ændres »Miljøafdelingen« til: »Landsstyret«.

27) I § 57, stk. 5 udgår »kommunernes«.

28) I kapiteloverskriften til kapitel 12 udgår: »til miljøafdelingen«, og der indsættes i stedet: »Til hygiejnisk Institut«.

ávikavist: »landsstýrinum« í báðum førum, »landsstýrið« og »landsstýrið«.

26) Í § 54, 1. stk., § 55, 1. stk., § 56, 1. stk. og § 57, 1. stk. verður orðið »umhvørvisdeildin« broytt til: »landsstýrið«.

27) Í § 57, 5. stk. verða orðini: »umhvørvisdeildarinnar og kommununnar« strikað.

28) Í yvirskriftini til 12. kapittul verða orðini »til umhvørvisdeildina« strikað, og í staðin verður sett: »til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna«.

29) § 70, 1. stk. í uppskoti landsstýrisins gongur út, og í staðin verður sett:

»§ *70.* Averðir hjá kommunalum myndugleikum, ið hava fingið eftirlits- og umsitingarmyndugleika frá landsstýrinum sambært hesi lóg kunnu kærast til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna.«

2. stk. óbroytt. Sum nýtt 3. stk. verður sett:

»*3. stk.* Avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni kunnu kærast til Føroya Landsstýri.«

30) 13. kapittul, §§ 72-78 verða strikaðar. 14. kapittul. Revsi- og gildisreglur v.m. verður hereftir 13. kapittul og §§ 79-84 verða §§ 72-77.

29) § 70, stk. 1 i landsstyrets forslag udgår, og i stedet indsættes:

»§ *70.* Afgørelse fra de kommunale myndigheder, der af landsstyret har fået tildelt tilsyns- og administrationsmyndighed i henhold til denne lov, kan påklages til Hygiejnisk Institut.«

»*Stk. 2.* er nændret. Som nyt stk. 3 indsættes:

»*Stk. 3.* Afgørelser fra Hygiejnisk Institut kan påklages til Færøernes Landsstyre.«

30) Kapitel 13. §§ 72-78 udgår. Kapitel 14. Straffe- og ikrafttrædelsesbestemmelser m.v. bliver herefter kapitel 13, og §§ 79-84 bliver §§ 72-77.

2. viðgerð 6. mai. Broytingaruppskot frá nevndini, pkt. 1 samtykt við 26-0, pkt. 2 við 28-0, pkt. 3 við 27-0, pkt. 4 við 28-0, pkt. 5-7 við 28-0, pkt. 8-10 við 26-0, pkt. 11-13 við 27-0, pkt. 14 við 25-0, pkt. 15-16 við 26-0, pkt. 17 við 29-0, pkt. 18-19 við 28-0, pkt. 20 við 28-0, pkt. 21 við 27-0, pkt. 22-29 við 28-0, pkt. 30 og 31 við 27-0,

§ 82 samtykt við 27-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 7. mai. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 937-2-1. Lóg nr. 132 frá 29. oktober 1988.

47 Broytingar í lógini um ferðamannamiðstøð.

Ár 1987, mikudagin 16. december legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um ferðamannamiðstøð.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 61 frá 5. juni 1984 um ferðamannamiðstøð verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2 verður orðað soleiðis:
»Ferðamannamiðstøðin hevur til endamáls at fáa ferðamannavinnuna í eina skipaða legu, bæði út frá fólkalívsfrøðiligum, mentunarligum, umhvørvisligum og fíggjarligum sjónarmiðum.

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om turistcentral.

§ 1.

I lagtingslov nr. 61 af 5. juni 1984 om turistcentral foretages følgende ændringer:

1. § 2. affattes således:
»Turistcentralen har til formål at få ordnede forhold for turisterhvervet, både hvad sociologiske, kulturelle, miljømæssige og financielle forhold angår.

2. stk. Ferðamannamiðstøðin skal elva til, at ferðamannavinnan gevur sín part til ein búskaparligan vøkstur, at hon er við til at gera vinnulívið meira fjøllbroytt og til at høta um livilíkindini hjá teimum, ið her búgva.«

2. § 3, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Fyri miðstøðini situr stýri við 3 limum, ið landsstýrið velur og skipar. Fyri hvønn av limunum verður valdur tiltakslimur. Valið er galdandi fyri 4 ár í senn. Limirnir í stýrinum skulu vera óheftir av ferðamannavinnuni.«

Stk. 2. Turistcentralen skal medvirke til, at turisterhvervet yder sin andel til en økonomisk vækst, at den er med til at gøre erhvervslivet mere alsidigt og til at forbedre levestandardon for dem, der bor her.«

2. § 3, stk. 1, affattes således:
»Centralen ledes af en bestyrelse med 3 medlemmer, der vælges og konstitueres af landsstyret. For hvert medlem vælges en suppleant. Valget gælder for 4 år ad gangen. Bestyrelsens medlemmer skal være uafhængige af turisterhvervet.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
2. stk. Nýtt stýri verður valt beint eftir, at henda lóg er komin í gildi.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.
Stk. 2. Ny bestyrelse vælges straks efter at denne lov er trådt i kraft.

Viðmerkingar:

Tá lóg nr. 61 frá 5. juni 1984 um ferðamannamiðstøð varð sett í gildi, var tað úrslit av nevndararbeiði, sum fór fram í 1982/83 og er lógin í høvuðsheitum í tráð við tað álit, sum nevndin legði úr hondum.

Ætlanin við lógini var m.a. at ferðamannavinnan skuldi skipast og mennast.

Nú lógin hevur trý ár á baki, verður hildið rætt at meta um úrslitini, og at endurskoða lógina. Størstu broytingarnar sambært uppskotinum eru, at stýrið fyri ferðamannamiðstøðina verður minkað úr 7 niður í 3 fólk. Ætlanin við hesum er, at stýrið sjálvt, og samarbeiðið millum stýrið og ferðamannamiðstøðina, skal fáast at virka smidligari.

Eisini verður reglugerð gjørd fyri ferðamannamiðstøðina, og gevur hon heimild til, at ferðamannamiðstøðin í ávísan mun kann veita stuðul til ferðamannastovur. Somuleiðis skal ferðamannamiðstøðin hava heimild til at góðkenna reglugreir fyri ferðamannastovur, um reglugerð og virki hjá tí einstøku ferðamannastovuni annars er í tráð við tann ferðamannapolitikk, sum ferðamannamiðstøðin rekur.

SÍ SKJAL 14.

1. viðgerð 3. februar. Skotið varð upp at beina málið í samferðslunevndina, hetta fall við 11-0. Málið varð síðani beint í ídnaðarnevndina og er ikki afturkomið haðani.

F.L. j.nr. 2320-1.

48 Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1988.

Ár 1988, mikudagin 20. januar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 14. december 1987 millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1988.

Viðmerkingar:

Samráðingarnar vóru í tveimum umførum — 3. og 4. december í Bergen og 14. december í Keypmannahavn. Protokol frá samráðingunum er hjáløgd.

Orsøkin til at semja ikki varð rokkin í fyrsta umfari var, at partarnir vóru ósamdir um rættindini í Svalbardsøkinum.

Seinast í oktober tók ósemja seg upp millum Føroyar og Noreg um rættindini við Svalbard.

Norska tulkingin var, at føroyingar bert høvdu loyvi at fiska søguliga partin av triðjalandskvotuni, avtalað millum Sovjet og Noreg, (800 tons av toski og 300 tons av øðrum í 1987) og eisini kvoto á norskum øki, førd yvir til Svalbard.

Føroyska tulkingin var, at Føroyar hava rætt at fiska sín part av søguligu veiðuni við Svalbard og harumframt bæði norska og sovjetska kvotu yvirførda til Svalbard.

Føroyska tulkingin var, at vegna tess, at Noreg og Sovjett á ongan hátt avmarka tann partin av heildarkvotuni hjá teirra skipum, sum kann takast við Svalbard, var ikki rímuligt at avmarka rættindi føroyinga, tað teir fingu burtur av teirra kvotum. Hetta góðkennir Noreg eisini fyri norska kvotu, men ikki fyri sovjetska kvotu.

Hervið verða Føroyar sum einasta land »diskriminerað«, tí Føroyar eru einasta land, sum hevur bæði sovjetska og norska kvotu av norsk-arktiskum toski.

Tað var greitt undan samráðingunum, og meðan føroyingar hava nýtt síni rættindi meira enn 100%, so hava norðmenn fram til 1. november bert fiskað 4.800 tons av eini svartkjaftakvotu uppá 65.000 tons og 4.390 tons burtur av botnfiskakvotuni uppá 6.000 tons og ongan makrel av teimum 7.000 tonsunum teir áttu.

Norðmenn kundu við góðum rætti tí vísa á, at teirra áhugi fyri einum sáttmála var ógvuliga lítil. Greitt var tó, at føroyski vørrurin viðvíkjandi Svalbard, harundir eisini fundur um hetta evni millum løgmann og norska fiskimálaráðharran Bjarne Mørk Eidem, hevði økt norskan áhuga fyri eini avtalu, um ikki annað fyri at hava eitt ávíst tamarhald á Føroyum við Svalbard.

Sáttmálin fyri 1988.

Sáttmálin, sum semja varð millum báðar sendinevndirnar, kann dragast saman á henda hátt í tonsum.

Føroyskur fiskiskapur á norskum øki:			Norskur fiskiskapur á føroyskum øki:		
A. Norðan fyri 62°					
1) Norsk kvota					
	1987	1988		1987	1988
Toskur	3.600	3.4000	Botnfiskur	6.000	6.000
Hýsa	950	950			
Annað	850	850			
2) Flutt frá sovjetskum øki					
Toskur	4.200	6.500			
Hýsa og annað	0	1.800			
3)					
Makrel	7.000	3.000	Makrel	7.000	12.000
Svartkjaft	10.000	10.000	Svartkjaft	65.000	60.000
			Brugdulivur	100	100
Jan Mayn og og norskt øki					
B. Sunnan fyri 62°					
Ídnaðarfisk	18.000	22.000			
upsi	1.500	1.500			
Síld	1.800	1.600			

Fiskirættindi við Svalbard eru óbroytt 800 tons av toski og 300 tons av øðrum av triðjalandskvotuni, og rækjudagatalið er óbroytt 2555 dagar.

Føroyska sendinevndin ynskti at varðveita ein ávísan møguleika at fiska ser lig í juni - juli 1988 við Svalbard.

Av tí at norðmenn leggja sera stóran dent á, at tað ikki skal kunna sigast at sovjetska kvota er flutt til Svalbard, varð avtalað ein pro-rata avskriving av fiskiskapinum á gráu leið, soleiðis, at um nakað er eftir at fiska í norskum sjógvi, so verður tað avskrivað á henda hátt:

Veiða á gráu leið, toskur ..... 100 tons

Avskrivað av sovjetskari kvotu á sovjetskum øki ..... 50 tons

Avskrivað av sovjetskari kvotu á norskum øki (6.500 tons) ..... 33 tons

Avskrivað av norskari
kvotu (3.400 tons) ..... 17 tons

Sostatt hvørvir møguleikin at yvirflyta til Svalbard ikki, um tað er ynskiligt.

Hesa avskrivingarskipan senda norsku myndugleikarnir bræv um. Samstundis lova føroyskir myndugleikar at umhugsa at lata norðmenn veiða upp til 1150 tons av upsa, burturav botnfiskakvotuni, við troli. Svar skal gevast um hetta í seinasta lagi 10. januar.

SÍ SKJAAL 15.

1. viðgerð 27. januar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 10. februar legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 20. januar 1988 og undir 1. viðgerð 27. januar beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið tann 28. januar 1988, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 17. februar. Uppskot landsstýrisins samtykt við 28-0 atkvøðum og avgreitt.

F.L. j.nr. 1500-1-11-5.

49 Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1988.

Ár 1988, mikudagin 20. januar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina á NAFO-ársfundinum í september 1987 um regulering av fiskiskapinum á konventiónsøkinum í 1988.

Viðmerkingar:

Á 9. regluliga ársfundi í NAFO, hildin í Halifax, Kanada, 15.-18. september 1987, var tilráðingin aftur í ár frá vísindaliga ráðnum, at stovnurin av toski á Flemish Cap framvegis var ov lítil, og mælt varð tí frá at fiska av honum í 1988.

Undan NAFO-fundinum hevði fiskivinnuumsitingin fund við tey reiðarí, sum fiska á Flemish Cap og varð semja um, at okkurt álvarsligt mátti gerast fyri at fáa bankan á føtur aftur.

Best var at geva honum fullkomiliga frið í eitt ár.

Sendinevndin fyri Danmark (vegna Føroyar og Grønland) setti tí fram uppskot á fundinum, at Flemish Cap varð stongdur í eitt ár. Sovjet og Felagsmarknaðurin gjørdi vart við í Halifax, at tey kanska fóru at mótmæla, men seinni hava bæði londini fráfallið at mótmæla og sostatt er bann sett fyri at veiða tosk fyri allar tjóðir í 1988.

Afturfyri fekk sendinevndin økt um »others« kvotuna í Útsynningshellingini á Grand Bank, NAFO øki 3NO, frá 700 til 1400 tons. Bert Føroyar hava árini undan fiskað av hesi kvotu.

Eisini varð eitt uppskot frá sendinevndini um at seta 5000 tons av høgguslokki av til onnur lond samtykt. Av hesum kunnu føroyingar eisini fiska.

Víst verður til hjálagda skjal 1.

Framhald.....komandi síða.....

talva skal inn her.

skjal 1

Manussíða nr. 306

1. viðgerð 27. januar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 10. februar legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 20. januar 1988 og undir 1. viðgerð tann 27. januar beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 28. januar, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 17. februar. Uppskot landsstýrisins samtykt við 27-0 atkvøðum og avgreitt.

F.L. j.nr. 1519-20.

50 Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1988.

Ár 1988, mikudagin 20. januar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 2. december 1987 millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1988.

Viðmerkingar:

1. Váttaða frásøgnin frá fundinum er hjáløgd.

Samráðingar gingu lættliga. Sammett við í fjør, har føroyingar ynsktu eina øking í toskakvotuni, og sostatt vóru teir, sum vildu hava, so vóru tað í ár sovjettisku umboðini, sum ynsktu at økja um svartkjaftakvotuna og sostatt vóru teir í ár meira áhugaðir. Greitt var tó at avmarkað var, hvat russar høvdu av toski at gjalda við.

2. Sínámillumkvotur 1988.

Føroyar frá Sovjettsamveldinum			Sovjettsamveldið frá Føroyum		
	1987	**1988**		**1987**	**1988**
Toskur	25.500	26.500	Svartkj.	142.000	142.000 x)
Rækjur	2.500	2.500	Makrelur	(royndarfisk.)	5.000
Lodna	(20.000)	(20.000)	Svartkjaft	(20.000)	(20.000)

Royndarfiskiskapur

Skeljar	1 skip 200 tons	2 skip ásettar tíðir og leiðir	Djúpt vatn Høgguslo.	3 (5) skip 2.000 tons	3 (5) skip 2.000 tons
Atlanto-Skandiska síld	(um møguligt)	(um møguligt)		(um møguligt)	(um møguligt)

x) íroknað hjáveiða av makreli

Tal av skipum í 1988

Barentshavið	óavmarkað	óavmarkað	1/1-31/1	17	15
Eystursjógvurin	óavmarkað	óavmarkað	1/4 31/10	20	24
			1/11-31/12	17	10
			á høvuðsheitunum		
			15/4-31/5	15	15

Í høvuðsheitum hava Føroyar fingið 1.000 tons av toski aftrat og royndarloyvi til skeljaveiðu aftaná 1. apríl á leiðum og í tíðarskeiðum USSR ásetir. Fyri hetta hava vit latið 5.000 tons av makreli (sum fyrr var ókeypis royndarveiða hjá USSR) og tann makrel, sum USSR fær sum hjáveiðu, tá teir fiska svartkjaft, tó

so at tað, sum verður veitt av markreli í hjáveiðu, skal dragast frá kvotuni av svartkjafti.

Viðvíkjandi tali av skipum, sum kunnu royna ísenn undir Føroyum, gingu sovjetsku umboðini við til at minka um talið av skipum frá november til apríl (sum føroyingar meta at vera bestu fiskitíð) móti fáa eitt størri tal apríl — oktober (sum sovjetsk skip meta vera best fiskitíð), tó so at talið á tí høvuðsleið, sum Vaktartænastan ásetir, enn er 15 fyri at sleppa undan trokan á fiskifeltinum.

Í marguni av samráðingunum lótu sovjetsku umboðini okkum vita hetta:

1. Teir hava áhuga fyri at keypa lodnu.
2. Teir hava áhuga fyri einum handli, har teir selja tosk til føroysk flakavirki móti at sleppa at keypa makrel frá føroyskum skipum (evt. eisini rossamakrel).
3. Teir ynskja at økja um talið av skipum, sum vera umvæld í Føroyum.
4. Um tað ikki eydnast føroyingum at fiska alla kvotuna eystanfyri, eru teir til reiðar at fiska tað, sum írestar og selja tað til t.d. føroysk flakavirki.
5. Teir hava lítlar møgulcikar at selja okkum rækjur, tí teir fáa so lítið, og tosk bert sum t.d. nevnt omanfyri. Annars vildi harra Kargin fegin tosa við umboð fyri Fiskasøluna um møguleikan, um umboðini komu til Murmansk.

Í tí føri verður sostatt handlað við Sevryba og ikki Sovrybflot.

SÍ SKJAL 16.

1. viðgerð 27. januar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 24. februar legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 20. januar 1988 og undir 1. viðgerð tann 27. januar beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 28. januar 1988 og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minniluta.

Meiriluta (Hilmar Kass, Hergeir Nielsen, Karin Kjølbro, Henrik Old og Olaf Olsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Pauli Ellefsen og Jógvan I. Olsen úr Sambandsflokkinum) førir fram:

Sum ført fram undir fyrstu viðgerð av málinum, er við framløguni av hesi

løgtingsmáli komið fram nakað heilt nýtt í fiskivinnusáttmálanum millum Føroyar og Sovjetsamveldið.

Hetta nýggja fevnir um keyp og sølu av fiski og skeljadjórum og eisini um umvælingar av russiskum skipum á føroyskum skipasmiðjum.

Tað er almont kunnugt, at privat føroysk virkir hava havt og hava eina ávísa vinnuliga samvinnu við Sovjetsamveldið. Minnilutin hevur einki at finnast at hesum virkjum í hesum sambandi. Hin vegin er minnilutin av teirra áskoðan, at Føroya landsstýri í fyriliggjandi máli er farið út um tær heimildir, sum finguar eru frá Føroya Løgtingi.

Sáttmálarnir millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi fyri tey einstøku árini eru gjørdir við heimild í ti rammusáttmála millum londini, sum varð undirskrivaður vegna Føroya landsstýri, Danmarks Regering og stjórnina fyri Sovjetsamveldið tann 27. november 1977.

Henda rammuavtala umrøður fiskivinnuviðurskifti landanna millum, og nevnir einki um onnur viðurskifti uppi á landi.

Minnilutin vísir á, at rammuavtalan í § 9 sigur í danskari umseting: »*Denne aftale gælder for farvande henholdsvis under Færøernes og under Sovjetunionens fiskerijurisdiktion.*«

Umvæling av russiskum skipum á føroyskum skipasmiðjum hevur eftir áskoðan minnilutans einki við »*farvande henholdsvis under Færøernes og under Sovjetunionens fiskerijurisdiktion*« at gera.

Minnilutin átalar harðliga, at Føroya Landsstýri uttan heimild í samráðingunum við Sovjetsamveldið, hevur drigið heilt onnur viðurskifti fram á løgting, enn landsstýrið hevur heimild til sambært galdandi lóggávu.

Fyriliggjandi løgtingsmál er býtt upp í skjal 1 og 2 og eina vátlaða fundarfrásøgn.

Skjal 1, sum er høvuðsskjalið, ásetir sínámillum kvoturnar og inniheldur nakrar viðmerkingar um hesar. Her afturat eru í høvuðsskjalinum 5 pettir um áhugamál hjá russum í Føroyum.

Skjal 2 viðger vísindaliga samstarvið í felags áhugamálum millum Føroyar og Russland innan ymiskar fiskastovnar.

Herumframt er talan um eina hjálagda fundarfrásøgn.

Tá Føroya Løgting tekur støðu í málinum, so verður støða tikin til alt málið, sum tað er. Minnilutin tekur undir við fiskivinnusáttmálanum og hevur eisini fyribils góðkent hann í marknaðarnevndini.

Men minnilutin tekur ikki undir við at góðkenna tey fyri fiskivinnusáttmálan óviðkomandi 5 áhugapunktini hjá russum í Føroyum, men ynskir henda partin av viðmerkingunum burturúr.

Út frá hesum setir minnilutin fram broytingaruppskot, sum er orðrætt tað sama sum upprunauppskotið við tí undantaki, at tey 5 punktini á síðu 3 í skjali 1 eru strikað.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 2. desember 1987 millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1988.

Viðmerkingar:

1. Váttaða frásøgnin frá fundinum er hjáløgd.

Samráðingar gingu lættliga. Sammett við í fjør, har føroyingar ynsktu eina øking í toskakvotuni, og sostatt vóru teir, sum vildu hava, so vóru tað í ár sovjettisku umboðini, sum ynsktu at økja um svartkjaftakvotuna og sostatt vóru teir í ár meira áhugaðir. Greitt var tó at avmarkað var, hvat russar høvdu av toski at gjalda við.

2. Sínamillum kvotur 1988

Føroyar frá Sovjettsamveldinum			**Sovjettsamveldið frá Føroyum**		
	1987	1988		1987	1988
Toskur	25.500	26.500	Svartkjaftur	142.000	142.000x)
Rækjur	2.500	2.500	Makrelur	(royndfisk.)	5.000
Lodna	20.000	20.000	Svartkjaftur	(20.000)	(20.000)

Royndarfiskiskapir

Skeljar	1 skip 200 tons	2 skip ásett ar líðir og leiðir	Djúpt vatn	3 (5) skip	3 (5) skip
			Høgguslokk	2.000 tons	2.000 tons
Atlanto-skandiska sild	(um møguligt	(um møguligt		(um møguligt)	um møguligt)

x) íroknað hjáveiða av makreli

Tal av skipum í 1988

Barents-havið	óavmarkað	óavmarkað	1/1-31/3	17	15
Eystur-sjógvurin	óavmarkað	óavmarkað	1/4-31/10	20	24
			1/11-31/12	17	10
			á høvuðsskinum		
			15/4-31/5	15	15

Í høvuðsheitum hava Føroyar fingið 1.000 tons av toski aftrat og royndarloyvi til skeljaveiðu aftaná 1. apríl á leiðum og í tíðarskeiðum USSR ásetir. Fyri hetta hava vit latið 5.000 tons av makreli (sum fyrr var ókeypis royndarveiða hjá USSR) og tann makrel, sum USSR fær sum hjáveiðu, tá teir fiska svartkjaft, tó so at tað, sum verður veitt av makreli í hjáveiðu, skal dragast frá kvotuni av svartkjafti.

Viðvíkjandi tali av skipum, sum kunnu royna ísenn undir Føroyum, gingu sovjettisku umboðini við til at minka um talið av skipum frá november til apríl (sum føroyingar meta at vera bestu fiskitíð) móti at fáa eitt størri tal apríl-oktober (sum sovjettisk skip meta vera bestu fiskitíð), tó so at talið á tí høvuðsleið, sum Vaktartænastan ásetir, enn er 15 fyri at sleppa undan trokan á fiskifeltinum.

Ein annar minniluti (Olaf Olsen) viðmerkir, at hann ikki mælir til at taka tað, sum umtalað er í marginini — tað, sum Sovjet førir fram undir samráðingunum, pkt. 1-5 — burturúr, tá ið tað fyrst er komið í viðmerkingarnar, men av tí, at viðmerkingarnar eru við at tulka sáttmálan, er ikki rætt at hava hetta við í viðmerkingunum, men sum eitt skjal fyri seg.

24. februar legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

Undir 1. viðgerð fráboðaði Adolf V. Hansen vegna Framsóknarflokkin broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins og varð váttað frá formannaskapinum, at hetta skuldi takast við í viðgerðini.

Framsóknarflokkurin setir sostatt fram soljóðandi:

I Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við tann fría Vesturheimin, t.v.s. NATO-londini, um fiskirættindi og annað arbeiðs- og vinnuskapandi samstarv fyri at kunna avtrappa tað samarbeiði, sum tíðin og umstøðurnar hava tvingað okkum at hava við tann kommunistiska einaræðisheimin, serstakliga við Sovjetsamveldið.

II Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at minka um fiskanøgdirnar í sínámillum sáttmálunum við tey kommunistisku einaræðislondini við minst 1/10 um árið av núverandi nøgdum.

III Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at heita á NATO um, at lata føroyskar skipasmiðjur fáa nakað av tí viðlíkahaldsarbeiði, ið er av teimum verjuskipum, sum hava sítt vaktarhald á okkara leiðum. Í hesum sambandi eigur landsstýrið at hava í huga, at turrdokkin á Skála kann taka øll tey donsku verjuskipini og flest allar kavbátar.

Viðmerkingar:

Ikki kemst uttan um, at Føroyar eru tann stóri, týdningarmikli og berandi mistólpin í tí stóra dupultportrinum, sum førir út til Atlantshavið. Eingin ivi er um, at skal NATO vera ført fyri at verja Vesturheimin, er tað av størsta týdningi, at Føroyar ikki koma undir russiskt harradømi. Vit sleppa ikki undan, at ein av teimum stóru verjusamgongunum má hava fótin fastan her á landi. Vit føroyingar hava viðurkent, at vit hoyra til vesturheimin.

Søgan sigur okkum, at russisk vælvild altíð endar við russiskum yvirharradømi. Tann vaksandi vælvildin førir til, at vit gerast meira bundin (afhængig) av honum, ið vælvildina sýnir, í hesum føri Russland. Hetta ger okkum til eitt lætt offur hjá teimum.

Rusland hevur altíð síðan 1917 brúkt vælvild sum »agn« til at veiða smátjóðir við. Hetta »agnið« hevur roynst Ruslandi væl. Mangar eru tær smátjóðir, sum eru vorðnar eitt sokalla SSR, tí tær hava givið eftir fyri trýstinum, at geva Rusland »loyvi« at byggja sær eina hernaðarstøð í landinum (afturfyri ta ómetaliga stóru russisku vælvildina). Vit minnast Estland, Letland og Litauen fyri ikki at forgloyma Afganistan. Tað er at óttast fyri, at Føroyar eru eitt av næstu málum

Ruslands, og er tað tí neyðugt, at landsins kosnu kvinnur og menn rakna við, áðrenn ov seint er.

Javnvágin í fiskanøgdum er margfaldað hesi fáu árini, síðani rammusáttmálin við Sovjetsamveldið var undirskrivaður. Síðani er »Vælvildin« komin til sjóndar í sera stórum russiskum áhuga fyri at útvega viðlíkahaldsarbeiði til tær føroysku skipasmiðjurnar.

Og nú seinast er vælvildaráhugi russaranna farin at fevna um keyp av makreli og rossamakreli frá føroyskum skipum, um at veiða restkvotur føroyinga í russiskum sjógvi, og sjálvandi landa fiskin til føroysk flakavirkir, um at fáa samstarv við Føroya Fiskasølu, um at lata fleiri skip til føroyskar skipasmiðjur, og sum rosinan í pylsuendanum, vilja teir nú sleppa at sýna okkum ta »vælvild« at selja okkum blokkfrystan tosk til okkara flakavirkir.

Hetta førir við sær, at flakavirkini fáa ov mikið at gera, mugu fáa sær fremmanda arbeiðsmegi, mugu útbyggja virkini, meira russiskan toskablokk, meira útlendska arbeiðsmegi, og roulettin koyrir.

Ein dag banka russar upp á hurðina og siga: Vit lata rávøruna, men nú er arbeiðsloysið her í Rusland, so skulu vit halda fram at lata rávøru til Føroyar, mugu vit treyta okkum, at russarar hava framíhjárætt at gerast »fremmandaarbeiðarar« hjá tykkum.

Nei, tað fyrsta russar biðja um verður valla pláss fyri nøkrum kanónum, eins og teir gjørdu í Estlandi, Letlandi og Litauen. Í dag brúka teir aðrar snildir.

Hetta ljóðar kanska sum ein hugflogstala, men vit mugu hava í huga, at tað eru kommunistiskir vandasjógvar, sum í vælvildarinnar navni, floyma inn yvir okkum.

Søgan sigur okkum, at aftan á russiska vælvild fylgir altíð russiskt yvirliarradømi. Vilja vit hava tað, so er hert at halda fram ta leið, sum higartil er gingin, men ynskja vit at varðveita frælsið, so er at fylgja ráðum FRAMSÓKNARFLOKSINS, tí eingin annar flokkur hevur higartil dags torað at barst móti hesum vanda.

2. viðgerð 2. mars. Uppskot landsstýrisins samtykt við 21 ja-atkvøðum, 7 atkvøddu ikki, 3 vóru burturstaddir.

Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Olaf Olsen, Svend Aage Ellefsen, Jógvan Sundstein, Poul Mikkelsen, Henrik Old, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes, Tordur Niclasen.

Atkvøddu ikki: Pauli Ellefsen, Ivan Johannesen, Flemming Mikkelsen, Agnar Nielsen, Jógvan í. Olsen, Filif Samuelsen, Adolf V. Hansen.
Tók onga støðu: Anfinn Kallsberg.
Burturstaddir: Óli Breckmann, Eyðun Viderø og Johannes Martin Olsen.

F.L. j.nr. 1500-1-11-2.

51 Ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á gomslu.

Ár 1988, mikudagin 20. januar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.

§ *1.* Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1988 at borga sum einfaldur borgsmaður fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild, úrdráttir av svartkjafti og agn á goymslu. Eisini verða møguleikar fyri at borga vanligt fyri goymslulánum, bæði fyri rávørur og lidna framleiðslu, til niðursjóðingarvirki og til fiskaroykivirki í Føroyum. Borgan verður givin fyri lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1988 at kautionere med simpel kaution for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsild, produkter af blåhvilling og agn på lager. Også bliver det muligt at garantere simpelt for lagerlån, både for råvarer og for færdigproduktion, til konserveringsvirksomheder og til fiskerygningsvirksomheder på Færøerne. Kautionen ydes for lån, der ikke må overstige 70% af låneværdien.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 11 frá 27. februar 1987, sum fer úr gildi 31. desember 1987, sí løgtingsmál nr. 65/1986.

Víst verður til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975, Løgtingstíðindi 1975, bls. 231.

Higartil í fíggjarárinum 1987 eru hesar borganir veittar:

P/F Brekkum	2,5 mió. kr.
Havsbrún	2 × 10 mió. kr.
P/F í Garðastovu	13,0 mió. kr.
P/F Blue North	5,0 mió. kr.
P/F Havfiskur	5,6 mió. kr.
P/F Raðhamar	5,0 mió. kr.

1. viðgerð 28. januar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 24. februar legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 20. januar 1988 og eftir fyrstu viðgerð 28. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd fíggjarnevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 1. mars 1988. § 1 varð samtykt við 28-0 atkvøðum, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. Við 28-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 22. mars. Málið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F. L. j.nr. 1408-5-2. Lóg nr. 23 frá 22. apríl 1988.

52 Broyting í lóg um eigaraíbúðir.

Ár 1988, mikudagin 20. januar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eigaraíbúðir.

lagtingslog om ændring i lagtingslov om ejerlejligheder.

§ 1.

Í § 2, stk. 1 í løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir verður skoytt uppí:

»Eigaraíbúðir kunnu eftir somu reglum stovnast í eigindómum á leigaðum grundøki.«

§ 1.

I § 2, stk. 1 i lagtingslov nr. 11 af 3. april 1970 om ejerlejligheder tilføjes:

»Ejerlejligheder kan efter samme bestemmelser oprettes i ejendomme på lejet grund.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Sum § 2, stk. 1, í løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 er orðað, nevniliga soleiðis: »Eigari av íbúð hevur í felag við eigarunum av íbúðum **ognarrættin** til grundina, lutir í felag og tilhoyr v.m. eftir býtistali, sum fyrisett er sum brotpartar. Er býtistal ikki fyrisett, eru allar íbúðirnar javnbjóðis um.« Kann tað sýnast ógreitt, um eigaraíbúðir kunnu stovnast á leigaðum grundøki.

Ein advokatur hevur vegna eina kommunu heitt á landsstýrið um neyðugt at broyta eigaraíbúðarlógina soleiðis, at heimild verður til, at eigari av íbúð á leigaðari grund kann verða tinglýstur sum eigari av íbúðini samsvarandi reglunum í tinglýsingarlógini.

Landsstýrið hevur tí mett tað vera best við framløgdu lógarbroyting, soleiðis at ongin ivi er um, at eigaraíbúðir eisini kunnu stovnast í bygningum á leigaðum grundøki.

1. viðgerð 28. januar. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 1. mars legði fram soljóðandi:

Álit

Uppskotið er lagt fram av Føroya landsstýri 12. januar 1988 og eftir 1. viðgerð 28. januar 1988 beint í Almanna- og heilsunevndina.

Talan er um eina lógarbroyting, ið er eina mest av tekniskum slagi.

Eftir verandi lóg tykist ógreitt, um eigaraíbúðir kunnu stovnast á leigaðum grundøki. Eftir lógarbroytingini verður gjørt greitt, at eigari av íbúð á leigaðari grund kann verða tinglýstur sum eigari av íbúðini samsvarandi reglunum í tinglýsingarlógini.

Almanna- og heilsunevndin hevur havt fund um málið og er samd um at mæla løgtinginum til at taka undir við uppskotinum.

2. viðgerð 22. mars 1988. § 1 varð samtykt við 28-0 atkvøðum, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. Við 28-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 21. apríl. Málið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1426-8. Lóg nr. 33 frá 26. mai 1988.

53 Innflutningsloyvi til P/f Kjølbro, Klaksvík.

Ár 1988, mikudagin 27. januar legði Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður fram soljóðandi:

Uppskot

Fyrst í hesum mánaða, frættist tey tíðindi, at eitt av okkara stóru fiskiførum, »M/t Sundaberg«, var farin á land í norður Noreg og gjørdist vrak.

Hetta var ein stórur missur fyri reiðarí og manning, sum í mong ár høvdu fingið sína úrtøku í hesi vinnu. *P/f* J. F. Kjølbro hevur í mong ár verið undangongumenn á saltfiskaveiðu í Barentshavinum, og teimum fyri at takka, hevur tann kvota, ið okkara politikarar hava samrátt seg fram til, ikki einans verið pappírsfiskur, men hevur givið hópin av peningi til fólk og reiðarí, ja til alt tað føroyska samfelagið.

Tað er altíð ein smeitur, tá lagnan gongur okkum ímóti, men lukkutíð, at eingin mannskaði hendi, og tað eiga vit at verða takksom fyri.

Tað er okkara skylda sum politikkarar at skipa fyri, at missur samfelagsins verður so lítil sum møguligt.

Tí eigur P/f J. F. Kjølbro, at fáa innflutningsloyvi til ein nýggjan trolara alt fyri eitt og uttan unakað sum helst drál. Undir vanligum umstøðum skuldi alt hettar verið ein sjálvfylgja, men tá einstakir tinglimir alment boða frá, at einki innflutningsloyvi verður givið afturat í hesum valskeiðinum, er neyðugt at seta fram soljóðandi:

Í Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum alt fyri eitt, at geva P/f J. F. Kjølbro, innflutningsloyvi til nýggjan trolara fyri M/t »Sundaberg«.

Eisini manningin á M/t »Sundaberg« er illa fyri, nú teir hava mist eitt gott arbeiðsplass, sum í áravís hevur givið teimum eina góða úrtøku.

Tí er tað rímuligt, at P/f J. F. Kjølbro, hevur møguleikar at leiga sær annað skip í staðin fyri M/t »Sundaberg«, meðan nýggjur trolari verður bygdur.

Sambært tíðindi í útvarpinum, hevur reiðaríið fingið at vita frá landsstýrin-

um, at teir ikki skulu roknað við at kunna fiska kvotuna, sum tillutað var »Sundaberg« í norskum sjógvi. Hettar er tað sama sum at inndraga kvotuna hjá M/t »Sundaberg«, tí bert at kunna fiska í russiskum sjógvi verður ikki lønsamt.

Fyri at bøta um hettar, sum frægast fyri reiðari og manning, verður tí hildið neyðugt at seta fram soljóðandi.

II Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at loyva P/f J. F. Kjølbro at fiska tillutaðu kvotuna hjá M/t »Sundaberg« við øðrum, møguliga leigaðum skipi.

1. viðgerð 3. februar. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 10. februar. Uppskotini til samtyktar I og II fullu ávikavist við 5-0 og 6-0 atkvøðum.

54 Broyting í lógini um endurfígging av lánum.

Ár 1988, mikudagin 3. februar legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurfigging av lánum til landskassan og landsstovnar.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om refinansiering af lån til landskassen og landsinstitutioner.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 15 frá 10. februar 1984 um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovnar verður í § 1, stk. 2, aftná orðini »Telefonverk Føroya Løgtings» sett: »Føroya Jarðarráð«.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 15 af 10. februar 1984 om refinansiering af lån til landskassen og landsinstitutioner indsættes i § 1, stk. 2, efter ordene »Telefonverk Føroya Løgtings«: »Føroya Jarðarráð«.

§ *2.*

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerðing.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Eftir løgtingslóg nr. 15 frá 10. februar 1984 fekk landsstýrið heimild til at taka upp lán til endurfígging av verandi landskassalánum. Eftir lógini fekk landsstýrið við góðkenning fíggjarnevndarinnar eisini heimild til landskassans vegna at veðhalda fyri lánum, sum Telefonverkið, Húsalánsgrunnurin, Menningargrunnurin og Íðnaðargrunnurin tóku til endurfígging av verandi lánum. Hugsað varð serliga um lán í útlendskum gjaldoyra.

Við heimild í løgtingslóg nr. 25 frá 5. mai 1981 fekk landsstýrið heimild til landskassans vegna at veðhalda fyri uttanlands- ella innanlandsláni til Føroya Jarðarráð upp til 15 mió. kr.

Við heimild í nevndu lóg tók Jarðarráðið við landskassaveðhaldi eitt lán í føroyskum peningastovni uppá 1,5 mió. kr. og eitt lán í Vesturtýsklandi uppá 3.925.000 DM.

Jarðarráðið ynskir nú at fáa lánið í Týsklandi umbýtt við eitt lán í føroyskum

tryggingarstovni, fyri at sleppa undan meira kurstapi, og tí at afturgjaldingartreytirnar fyri føroyska lánið verða lagaligari.

Landsstýrið loyvir sær tí at skjóta upp, at Jarðarráðið verður tikið við í lógina um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovnar.

1. viðgerð 10. februar. Málið var beint í fíggjarnevndina, sum 24. februar legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 3. februar 1988 og undir 1. viðgerð tann 10. februar beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 23. februar 1988, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Sambært § 3 í løgtingslóg nr. 15 frá 10. februar 1984 verður sostatt konverteringin av DM-láninum hjá Føroya Jarðarráð at leggja fyri fíggjarnevndina til góðkenningar í samband við veðhaldið fyri upptikna lánið.

2. viðgerð 26. februar 1988. § 1 varð samtykt við 18-0 atkvøðum, § 2 við 18-0. Við 17-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 1. mars. Málið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 440-57. Lóg nr. 22 frá 22. apríl 1988.

55 Tiltak at bjarga m/s »Helenu« undan tvingsilssølu

Ár 1988, mikudagin 10. februar løgdu Svend Aage Ellefsen og Sune Jacobsen, løgtingsmenn fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið finnur útvegir fyri at bjarga frystifarmaskipinum »Helenu« undan tvingsilssølu.

Viðmerkingar:

Eftir fleiri tíð at hava samráðst við landsmyndugleikarnar við tí fyri eyga at finna útvegir fyri, at P/f Høvn skal verða framhaldandi lív lagað, hava umboð fyri felagið vent sær til løgtingsmenninar fyri økið við umbøn um at reisa málið á løgtingi.

Hóast samráðingarnar, ið verið hava, ikki hava givið nøktandi úrslit, so hava kortini ávís framstig verið gjørd. Eitt nú hevur landsstýrið bjóðað sær til at lagt sína kautión, uml. kr. 17.000.000 út saman við tilhoyrandi rentum.

Hinvegin hevur sakførari felagsins í skrivi til floksformenninar á tingi víst á, at nøyðugt er við ískoyti til felagsins likviditet, og verður av honum skotið upp at veita felagnum kreppulán.

Sagt kann verða frá, at felagsins leiðsla í dag ikki metir ta neyðugu upphæddina so høga sum mett var, tá umtalaða bræv varð skrivað - hetta orsakað av, at tær charterratur, skipið siglir fyri seinastu tíðina, eru munundi hækkaðar.

Í skrivinum til formenninar verður annars víst á, at møguleikarnir skuldi verið til staðar at fingið skipið fíggjað, so lánbyrðan gerst munandi lættari, um skipið fær nevnda kreppulán.

Uppskotsstillararnir mæla annars til, at umboð fyri felagið verða innkallað til fund við ta nevnd, sum fær málið til viðgerðar, og at ein nýtilig loysn verður funnin í samráð við teir.

Vit loyva okkum eisini at vísa á, at hetta skip er bygt í Føroyum, og at eisini av hesi orsøk eru serligar umstøður, sum tala fyri, at hjálp verður veitt.

Við tí í huga, at skjót hjálp er dupult hjálp, leggja vit málið fram til løgtingsins positivu viðgerð.

1. viðgerð 24. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av løgtingsmonnunum Svend Aage Ellefsen og Suna Jacobsen 10. februar 1988 og eftir 1. viðgerð 24. í sama mánað 1988 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við umboð fyri eigararnar av m/s »Helenu« og sakførara felagsins. Felagið hevur latið landsstýrinum rakstrarætlan fyri eitt 12-ára skeið.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen og Adolf V. Hansen) mælir til soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Málið verður sent landsstýrinum at viðgera saman við líknandi málum í landsstýrinum.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, Svend Aage Ellefsen og Ivan Johannesen) førir fram:

Undir viðgerðini av málinum hevur fíggjarnevndin havt fund við umboð fyri reiðaríið eins og sakførara teirra.

Á fundinum var m.a. vist á, at byggiprísurin á skipinum ikki var hægri enn tað, líknandi skip kostaðu um somu tíð.

Sagt var eisini frá, at orsøkirnar fyri, at skipið var komið í so vánaligu støðu fíggjarliga, vóru mangar.

Eitt nú høvdu fleiri teknisk brek tarnað rakstrinum fyrstu tíðina, eins og charterraturnar vóru munandi falnar, frá tí at skipið varð kontraherað, og til tað varð leverað.

Hinvegin varð eisini vist á, at skipið nú fungeraði væl, og at charterraturnar seinastu tíðina vóru munandi hækkaðar.

T.d. hevði likvidatiónsbúgvið herfyri chartrað skipið á timecharter yvir tveir mánaðir fyri ein charter, sum svaraði til uml. kr. 42.000, bruttoinntøku pr. dag.

Umboðini fyri eigararnar mettu, at tá hetta var gjørligt í eini likvidatiónsstøðu, skuldi verið lagað manni at fingið eina minst líka góða avtalu, um figgjarstøða felagsins gjørdis meiri trygg.

Sambært hjálagda telexi er sama avtalan framlongd til medio juni, og kann leingjast enn meira, um skipinum verður veitt hjálp til framhaldandi rakstur.

Samlaða skuldin hjá P/f Høvn til Skibskreditfonden við rentum og morarentum fram til mai mánað er tilsamans uml. 78,5 mió. kr.

Landskassans luttøka í figgingini av skipinum sær soleiðis út:

Veðhald Skibskreditfonden incl. rentur av veðhaldsupphæddini og útlegg uml.	kr. 20,0 mió.
Stuðulslán incl. rentur uml.	kr. 10,0 mió.
	kr. 30,0 mió.

Hesin peningur má metast mistur, um skipið fer á tvingsilssølu.

Upp á fyrispurning í figgjarnevndini mettu umboðini fyri reiðaríið, at gjørligt. varð at læna eins upphædd í lágrentuvaluta svarandi til f.kr. 50 mió. upp á skipið uttan landskassaveðhald.

Føroya landsstýri hevur áður boðið sær til at leggja út og »niðurfrysta« tann landskassaveðhildna partin av Skibskreditláninum við rentum av veðhaldsupphæddini ella uml. 20 mió. krónur tilsamans.

Nevnda landskassaútleggið (f.kr. 20 mió.) saman við nýggja lágrentuláninum (f.kr. 50 mió.) er sostatt ikki rættiliga nokk til, at lánið frá Skibskreditfonden kann verða útgoldið, og umfíggingin fremjast. Neyðugt er at finna útvegir fyri teimum freestandi f.kr. 8,5 mió.

Skotið verður tí upp í hjálagda uppskoti til løgtingslóg um serlán til m/s »Helenu«, at landsstýrinum verður heimilað at nýta úr landskassanum ella grunninum til endurnýggjan av skipaflotanum upp til 7,5 mió kr. at læna p/f Høvn sum serlán, so m/s »Helena« kann bjargast undan tvingsilssølu.

Uppskot

til

løgtingslóg um serlán til m/s »Helenu«.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at nýta upp til 7,5 mió. kr. úr landskassanum ella grunninum til endurnýggjan av skipaflotanum at brúka sum serlán til p/f Høvn í Miðvági til tess at bjarga m/s »Helenu« undan tvingsilssølu.

lagtingslov om særlån til m/s »Helenu«

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at disponere op til 7,5 mio. kr. af landskassen eller fonden til fornyelse af skibsflåden at bruge som særlån til p/f Høvn i Miðvági for at redde m/s »Helena« ud af tvangsauktion.

§ 2. Serlánið verður rentu- og avdráttarfritt í 3 ár og verður síðani afturgoldið yvir 12 ár og rentað við 4,5% árliga.

§ 3. Sum trygd fyri láninum fær landskassin best møguligt pant í skipinum.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

§ 2. Særlånet bliver rente- og afdragsfrit i 3 år og bliver siden betalt over 12 år og forrentet med 4,5% årlig .

§ 3. Som sikkerhed for lånet får landskassen bedst muligt pant i skibet.

§ 4. Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Ta frestandi upphæddina f.kr. 1,0 mió. (svarandi til góð 15% av serlánsupphæddini) verða partaeigarar í p/f Høvn sjálvir at útvega sum nýggjan partapening.

Eftir umfiggjanina sær tá skuldin hjá felagnum soleiðis út.

Nýtt lágrentulán	kr. 50.000.000
Niðurfryst landskassaútlegg	kr. 20.000.000
Nýtt serlán	kr. 7.500.000
Stuðulslán	kr. 10.000.000
	kr. 87.500.000

Hjálagda rakstrarætlan, sum byggir á galdandi charteravtalu og tær útreiðslurnar, sum reiðarfið higartil hevur havt í samband við raksturin, vísir, at skipið er ført fyri at bera umfiggjaðu skuldarbyrðuna — viðroknað stuðulslánið úr landskassanum.

Sostatt skuldi við hesum uppskoti verið gjørligt at bjarga landskassanum undan einum missi upp á tríati mió. kr., umframt at varðveita skipið og arbeiðsplássini undir føroyska merkinum, og eisini sloppið teim fólkum, sum persónliga hava lagt rygg til, undan ovurstórum tapi, og tá er væl vunnið.

Í øðrum lagi mælir sami minniluti til at samtykkja uppskot meirilutans.

2. viðgerð 5. mai. Uppskotið frá meirilutanum at senda landsstýrinum, málið samtykt við 27-0 atkvøðum og avgreitt. Lógaruppskotið frá minnilutanum í figgjarnevndini (Anfinn Kallsberg, Svend Aage Ellefsen og Ivan Johannesen) fall við 12-0 atkvøðum.

56 Veiting av ríkisborgararætti.

Ár 1988, mikudagin 10. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 4 frá 10. november 1987 um veiting av ríkisborgararætti, verður lýst at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til at nevnda lóg verður lýst at galda í Føroyum.

Eftir lógini verður veitt persóni, búsitandi í Føroyum, ríkisborgararætt.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

1. viðgerð 17. februar. Málið varð beint í rættarnevndin, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Eftir fyrispurning frá ríkisumboðnum til landsstýrið um viðmerkingar til at seta lóg nr. 4 frá 10. november 1987 um veiting av ríkisborgararætti í gildi í Føroyum.

Landsstýrið legði málið fyri tingið við viðmæli hin 10. februar 1988.

Við 1. viðgerð 17. februar varð málið beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og ein samd nevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 4. mai. Uppskotið til samtyktar, samtykt við 31-0 atkvøðum.

FL. j.nr. 508-3.

57 Løgtingslóg um broyting í fiskarílógini frá 1893.

Ár 1988, mikudagin 10. februar legði Agnar Nielsen, løgtingsmaður, vegna Øssur av Steinum, Adolf V. Hansen, Thomas Arabo, Olaf Olsen, Tordur Niclasen og seg sjálvan fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í fiskarílógini frá 1893.

lagtingslov om ændring i fiskeriloven af 1893.

§ *1.*

§ 1, 2. petti í »Fiskerilov for Færøerne« nr. 95 frá 14. apríl 1893 verður orðað soleiðis:

»Tað er ikki loyvt at seta gørn ella at kasta ella draga nót nærri 100 m frá ósamunna, mált frá hægstu fjøru. Frá hesi reglu kann landsstýrið eftir umsókn veita undantaksloyvi til veiðu av sild við gørnum og til at kasta ella draga nót eftir seiði á leiðum, har slíkur veiðuháttur er vanligur.«

§ *1.*

§ 1, stk. 2 i fiskerilov for Færøerne nr. 95 af 14. april 1893 formuleres således:

»Det er ikke tilladt af sætte garn eller at kaste eller trække not nærmere end 100 m fra elvemunding, målt fra ebbe ved springflod. Fra denne bestemmelse kan landsstyret meddele dispensation til fangst af sild med garn eller sej på steder, hvor sådanne fangstmetoder er sædvanlig.«

§ *2.*

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í 1973 var fiskarílógin fyri Føroyar frá 1893 broytt m.a. soleiðis, at tað ikki longur var loyvt at kasta nót ella seta gørn nærri landi enn 30 m, mált frá hægstu fjøru kring alt landið.

Tó kann undantaksloyvi í summum førum gevast av landsstýrinum. Hetta forboð greip tarnandi inn í tann garna og nótafiskiskap, sum verið hevur á firðum og sundum eftir sild og seiði í generatiónir, og sum mangan hevur bjagað døgurðan í pottin, og stundum eisini givið fitt av peningi av sær.

Tað má haldast at vera heilt órímuligt, at setter eitt 30 m fiskimark fyri seiða- og sildagørn, og somuleiðis at draga nót frá landi eftir hesum fiskasløgum, bert

fyri tann skuld, at hildið verður, at tað kann henda, at okkurt síl ella onkur laksur kemur við sum hjáveiða.

Viðmerkjast kann, at frá gamlari tíð hava íbúgvar við Sundalagið havt sum fastan tátt, tá innløga skal fáast frá sjónum, at flota bát og seta gørn, bæði úti á fjørðinum og heilt inni í klettin. Altið bar til at fáa upp í pottin.

Ein orsøk til, at hesin háttur hevur verið nýttur, er, at Sundalagið og harvið bygdirnar framvið liggja soleiðis fyri »geografiskt«, at óhøgligt er at fara rættiliga til útróðrar.

Aftaná at lógin um 30 metrar markið frá landi og 300 metrar frá ósamunna kom, er hesin veiðuháttur næstan burtur.

Tað, sum bleiv veitt, var fyri tað mesta seiður og síld. Tað hevur víst seg, at vársildin bert hevur kunnað verið veitt tætt inni við klettin, og tað sama er galdandi fyri seiðin. Okkurt hendinga síl og laksur eru endað í garninum. Hertil er at siga, at sílini í dag eru fullkomiliga útruddað, meðan ov mikið er til at laksi, eina mest út á fjørðinum. Orsøkin til, at sílini eru horvin, er ikki garnafiskiskapur, men laksurin, ið sleptur er út við Áirnar, og sum kemur aftur um várið at gýta.

Samanumtikið kann sigast, at fyri bygdirnar í Sundalagnum hevur útviklingurin ført við sær, at ein gomul tradition er um at fara í søguna.

Út frá hesum verður sett fram uppskot um at broyta lógina soleiðis, at loyvt verður at seta gørn og at kasta nót heilt inn at klettinum, men 100 metrar burtur frá ósamunna.

1. viðgerð 17. februar. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av tingmonnunum Agnar Nielsen, Adolf V. Hansen, Thomas Arabo, Olaf Olsen, Øssur av Steinum og Tordi Niclasen 10. februar 1988.

Skotið verður upp at gera broytingar í fiskarílógini frá 1893, soleiðis at loyvt verður at seta gørn og at kasta nót heilt inn at klettinum, men 100 metrar burtur frá ósamunna. Galdan lóg sigur, at tað ikki er loyvt at kasta nót ella at seta gørn nærri landi enn 30 m, mált frá hægstu fjøru kring alt landið.

Eftir 1. viðgerð tann 17. februar 1988 varð málið beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur havt fund við aliráðið um málið, har ráðið bar fram, at uppskotið um broytingar í fiskarílógini frá 1893 kann fáa keðiligar avleiðingar fyri ta havbitsgransking, ið fer fram í dag og eisini í framtíðini.

Uppskotið kann fáa keðiligar avleiðingar fyri tað náttúrliga tilfeingið, vit hava í Føroyum og sum kann gerast alifiskur.

Aliráðið mælir frá at samtykkja uppskotið, men heldur at skjóttstarvandi

arbeiðsbólkur eigur at verða settur til at gera eitt samlað tilmæli um neyðugar ajourføringar í fiskarílógini.

Fiskivinnunevndin hevur býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Signar Hansen, Hilmar Kass, Tórálvur Mohr Olsen) setir einki uppskot fram.

Ein aumar minniluti (Adolf V. Hansen, Olaf Olsen og Eilif Samuelsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

Ein triði minniluti (Anfinn Kallsberg) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 28. apríl. Uppskotið fall við 9-0 atkvøðum.

58 Løgtingslóg um býti av minstuløn og øðrum stuðli til fiskivinnuna 1988.

Ár 1988, mikudagin 17. februar legði Jógvan I. Olsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

I Uppskot

til

løgtingslóg um býti av kontoini »Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna« 1988.

lagtingslov om fordeling af kontoen »Mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet« 1988.

§ *1.* Á fíggjarløgtingslógini, í § 16. Fiskvinna, sigling o.t. verður konto nr. 16904/333017 »Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna« 260 mió. kr. at nýta soleiðis:

Studningur til studningsnevndina	140 mió. kr.
Minstaløn og minstiforvinningur	30 mió. kr.
Ráfiskagrunnurin	85 mió. kr.
Umsiting	3 mió. kr.
At taka til	2 mió. kr.
Tilsamans	260 mió. kr.

§ *1.* På finanslagtingsloven, § 16. Fiskeri, søfart o.l. skal konto 16904/-333017 »Mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet« 260 mio. kr. benyttes således:

Støtte til støttenævnet	140 mio. kr.
Mindsteløn og mindsteforvinding	30 mio. kr.
Råfiskefonden	85 mio. kr.
Administration	3 mio. kr.
Til disposion	2 mio. kr.
Ialt	260 mio. kr.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Fiskivinnan er nú komin í so álvarsligar trupullleikar, at verður ikki okkurt munagott gjørt beinanvegin, kann tað fáa álvarsligar avleiðingar.

Tosað hevur verið um, at serlán skulu kunna veitast, sum vit eisini taka undir við, men hetta hevur higartil bert verið lótir av samgonguni, tí slíkt uppskot hevur ligið í fíggjarnevndini síðani fyrrapart í november í fjør, og er ikki komið á tingbord aftur enn, so samgongan heldur fram at hungra fiskivinnuna, m.a. við at súlta hetta mál, eisini hevur hon lagt størri avgjøld á fiskivinnuna og minka um afturberingina úr landskassanum.

Samstundis sum hetta fer fram, bólgna tær almennu útreiðslurnar sum ong-

antíð áður, útreiðslur, sum fiskivinnan eisini skal gjalda, tá samanum kemur.

Sambandsflokkurin hevði uppskot um at hækka játtanina til »minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna« undir viðgerðini av løgtingsins fíggjarlóg fyri 1988, men hetta varð felt.

Nú komu so tey ófrættatíðindini, at fiskaprísirnir fullu við heilum 9% og komið er í ljósmála, at hetta kemur partvís av, at samgongan hevur tikið nógvar milliónir frá kontoini til »Minstuløn og annar stuðul til fiskivinnuna« til ein serligan grunn til fiskivinnuna og at hava til at taka. (Hetta er helst til at fíggja teirra svartkjaftaævintýr við).

Vit mótmæla, at fyrst verður ov lítið játtað til feskfiskaveiðuna, og at tað síðani gjøgnum bakdyrnar verður drenað út til onnur endamál, sum løgtingið einki veit um.

Um tað skulu nýtast nógvar tíggjutals milliónir til svartkjaftaroyndir úr landskassanum, so lat okkum fáa tað til løgtingið at viðgera og at taka støðu til.

Fyri at hjálpa eitt sindur upp á avreiðingarprísirnar seta vit fram uppskot um, at tær 260 kr. til »Minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna« í 1988, verða býttar øðrvísi enn skotið er upp av landsstýrinum sambært skjal av 11. november 1987, sum er viðlagt, og tá uppskot okkara er samtykt, kann ráfiskaprísnevndin hækka prísirnar aftur.

Skjal.

Føroya Landsstýri
FR-119 Tórshavn, 11. november 1987.

Landsstýrisins uppskot til fíggjarløgtingslóg 1988 § 16 »Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna« fevnir nú um 260 mió. kr., sum eftir landsstýrisins meting vera at nýta soleiðis:

Studningur undir studingsnevndini	140 mió. kr.
Minstaløn og minstiforvinningur, frítíðarløn	30 mió. kr.
Ráfiskagrunnurin (av hesum 5 mió. kr. í eykagrunn)	55 mió. kr.
Umsiting	3 mió. kr.
Serligur grunnur til fiskivinnuna	25 mió. kr.
At taka til	7 mió. kr.
	260 mió. kr.

Hjáløgd er kostnaðarmeting frá nevndin fyri studningi til fiskivinnuna, sum byggir á veiðuna í 1987 og galdandi studningar pr. 1. sept. 1987, serliga dagstudning, er latið fíggjarnevndini 11. nov.

+ skjal

Løgm.

Fíggjarnevnd Føroya Løgtings,
Árvegur 100 Tórshavn.

1. viðgerð 24. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum tann 17. februar 1988 og eftir 1. viðgerð tann 24. februar 1988 beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen og Adolf V. Hansen) tekur ikki undir við málinum og vísir til, at umstøðurnar nú er broyttar og setir eingi uppskot fram.

Meirilutin tilskilar, at landsstýrið arbeiðir við at loysa trupulleikarnar hjá fiskivinnuni.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, Eyðun Viderø og Ivan Johannesen) mælir til at samtykkja uppskot sambandsfloksins.

Anfinn Kallsberg og Eyðun Viderø vísa til, at hetta uppskot í høvuðsheitinum er í samsvar við tað uppskot, ið Fólkaflokkurin áður hevur havt viðvíkjandi játtan til § 16: Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna, í verandi fíggjarlóg.

2. viðgerð 4. mai. § 1 frá Sambandsflokkinum fall við 8-0, málið burturfallið.

59 Broyting í borgarligu revsilógini og lóg um forboð móti mismuni vegna rasu v.m.

Ár 1988, týsdagin 23. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 357 frá 3. juni 1987 um broyting í borgarligu revsilógini og lóg um forboð móti mismuni vegna rasu v.m. verður sett í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur við skrivi dagfest 16. oktober 1987 spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 357 frá 3. juni 1987 um broyting í borgarligu revsilógini og lóg um forboð móti mismuni vegna rasu v.m. verður sett í gildi í Føroyum.

Landfútin hevur mælt til, at lógin uttan broytingar verður sett í gildi í Føroyum, og hevur landsstýrið á fundi tann 10. december 1987 samtykt at leggja lógina fyri løgtingið.

1. viðgerð 25. februar. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Ríkisumboðið hevur spurt landsstýrið, um tað hevur nakað at viðmerkja til, lóg nr. 357 frá 3. juni 1987 um broyting í borgarligu revsilógini um lóg um forboð móti mismuni vegna rasu v.m. verður sett í gildi í Føroyum.

Eftir tilmæli frá landfútanum hevur landsstýrið einmælt samtykt á fundi 10. december 1987 at leggja málið fyri tingið til støðutakan.

Málið varð lagt fram 23. februar 1988 og varð við 1. viðgerð 25. februar beint til viðgerðar í rættarnevndini.

Undir viðgerðini er nevndin komin eftir, at verandi lóggáva veitir trygd fyri,

at bólkar og minnilutar verða ikki háðaðir og heldur tað tí vera óneyðugt við broytingum í galdandi revsilóg.

Ein sand rættarnevnd mælir tí til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 3. mai. Uppskot landsstýrisins fall við 1 atkvøðu fyri og 17 ímóti.

F.L. j.nr. 501-2-1.

60 Føroyskt mótmæli móti bygging av verki til endurútvinnan av kjarnorkubrennievni í Dounreay í Skotlandi.

Ár 1988, týsdagin 23. februar legði umhvørvisnevndin fram soljóðandi:

Álit

Málið var upprunaliga lagt fram av Sambandsflokkinum 3. mars 1987 og eftir 1. viðgerð 13. í s.m. beint í umhvørvisnevndina.

Í hesum tingmáli, ið snýr seg um mótmæli móti bygging av kjarnorkuverki í Dounreay var løgtingsins umhvørvisnevnd sambært samtykt tann 9. apríl 1987 gjørd til millumtingnevnd.

Í sambandi við, at nevndin varð gjørd til millumtinganevnd vóru fylgjandi uppskot til samtyktar gjørd á Føroya Løgtingi tann 9. apríl 1987:

I Løgtingið áleggur landsstýrinum at fylgja gjølla við gongdini viðvíkjandi ætlanunum um at byggja kjarnorkuverk til endurvinnan av kjarnorkubrennievni í Dounreay, og støðugt at boða avvarðandi donskum og bretskum myndugleikum frá støðu Føroya til nevndu ætlan.

II Løgtingið samtykkir, at umhvørvisnevndin sum millumtinganevnd saman við landsstýrinum arbeiðir víðari í Dounreaymálinum við tí fyri eyga at leggja álit fyri løgtingið við frágreiðing um Dounreay-ætlanina í ólavsøkutingsetuni.

Løgtingsins umhvørvisnevnd hevur viðgjørt málið og hevur í hesum sambandi saman við landsstýriskvinnuni í umhvørvismálum verið á kanningarferð í Skotlandi, hitt umboð fyri bretskar kjarnorkumyndugleikar, og vitjað á verandi kjarnorkuverkinum í Dounreay. Nevndin hevur luttikið á ráðstevnu í Lerwick, ið snúði seg um ætlanirnar um endurvinningarverk í Dounreay. Á hesi ráðstevnuni luttóku eisini løgmaður og landsstýriskvinnan í umhvørvismálum sum observatørar.

Nevndin skal loyva sær fyrst at greiða frá verandi verkinum og síðani at greiða frá teimum komandi ætlanunum, og í triðja lagi at gera sini tilmæli í hesum sambandi til Føroya Løgting.

I Verandi kjarnorkuverk í Dounreay.

Kjarnorka verður nýtt til friðarlig og vinnulig endamál víða hvar í dag, og 385 kjarnorkuverk eru í rakstri runt allan heim. Hildið verður, at tey næstu 4 árini verða 115 nýggir kjarnorkureaktorar tiknir í nýtslu, soleiðis at í 1990 verða umleið 500 reaktorar í virksemi um allan heimin.

26 lond víða um heimin seta sítt álit á kjarnorku. Tað land, sum mest hevur gjørt burturúr, er Frakland, sum í dag fær 70% av orku síni frá kjarnorkuverkum. Tað er alment semja um, at USA, Sovjetsamveldið, Frakland og Stóra Bretland liggja føknifrøðiliga framman fyri hini kjarnorkulondini. Hetta merkir so aftur, at onnur kjarnorkulond meir ella minni eru heft tøknifrøðiliga at frammanfyri nevndu stórveldum.

Í høvuðsheitinum verða kjarnorkuverk, ið framleiða orku til friðarlig endamál býtt upp í tvey sløg, ið eru eyðkend av tveimum sløgum av reaktorum:

1. Verk við termiskum reaktorum, sum nýta lágríkað uran (uran 235) sum brenni.
2. Verk við snarreaktorum, sum nýta plutonium og uran-238 sum brennievni.

Dounreayvirkið er høvuðsstøðin fyri kanning og gransking av snarreaktorum í Bretlandi og er største einstaka verk av hesum slagi innanfyri bretska gransk-

ingarvirksemið. Verkið rekur sum nevnt ein sokalladan »Prototype-Fastreactor«, og í samband við hann verður so endurvinningarstøðin rikin.

Virkið hevur verið rikið síðani 1955.

Í Dounreay eru tvær brennievnisringrásir — ein í einum royndarreaktori fyri ymsik radioaktiv evni, og ein í snarreaktorinum. Hesin reaktorur, sum varð bygdur í 1962, var tann fyrsti snarreaktorurin, sum framleiddi ravmagn til landsravmagnsnetið í Skotlandi.

Snarreaktorarar hava verið kendir í meira enn 40 ár. Í hesum tíðarskeiðinum hevur Dounreayverkið gingið á odda í menning av tøkni og nýtslu av brennievni, endurvinning og burturbeining av geislavirknum burturkasti. Teir, sum standa á odda fyri Dounreayverkinum, meta teirra skipan vera ta kjarnorkuskipan, sum fer at vera nýtt í 21. øld.

Brennievni í einum kjarnorkureaktori eru vanliga uran ella plutonium ella ein blanding av báðum. Í reaktorinum verða tey tungu atomini »kloyvd«. Hetta verður kallað fyri kjarnufissión, og tá ið hetta hendir, so gevur hetta nógvan hita, sum m.a. verður brúktur til at framleiða damp, og hesin dampur rekur so vanligar dampturbinur. Kjarnorkufissiónin »framleiðir« eisini gammageisling og »skjótar« neutronir.

Sum nevnt eru í høvuðsheitinum tvey sløg av reaktorum, terminskir reaktorar og snarreaktorar. Flestu reaktorar í heiminum eru terminskir reaktorar, og teir nýta uran 235 sum brennievni. Hesir termisku reaktorar innihalda evni, ið tálma teimum »skjótu« neutronunum, og kallast hesi evni moderatorar. Hesir reaktorar »brenna« bert 2% av uraniinum og lata eftir seg nógv hágeislavirkið burturkast.

Í snarreaktorum verður plutonium brúkt til brennievni, og plutonium nýtir ótálmaðar »skjótar« neutronir til tess at stuðla undir fissiónsprosessina. Reaktorurin í Dounreay nýtir blandað plutonium/uranium 238 brennievni í kjarnu síni. Kjarnan er umgyrd av meira uran 238. Hetta uran upptekur nakað av teim um neutronunum, sum leypa av við fissiónini, og fleiri neutronir verða skaptar enn neyðugt er til tess, at ketureaktiónin kann halda fram. Hetta merkir, at uran 238 verður gjørt um til plutonium.

Nakað av hesum nýggja plutoniumi verður fissionerað í reaktorinum, har tað verður gjørt, men nakað verður eftir í tí brúkta brennievninum, tá ið hetta sum burturkast verður tikið út úr reaktorinum. Tað er hetta burturkastið, sum verður endurvunnið og verður gjørt um aftur til nýtt brennievni.

Hetta er orsøkin til, at snarreaktorar verða kallaðir »Breeder Reactors«, og hetta merkir, at plutonium so at siga verður nørt ella alt burtur úr uran 238, eitt evni, sum annars verður mett sum torført at fissionera og tí er ónýtiligt í terminskum reaktorum.

Snarreaktorar sigast fáa 60 ferðir so nógva orku burtur úr uran enn termiskir reaktorar. Serfrøðingarnir, sum arbeiða við snarreaktorum vilja vera við, at ein snarreaktorur tey tríati árini, hann vanliga heldur, framleiðir plutonium brenniovni til tann næsta reaktorin til tey næstu 30 árini, hann verður mettur at halda. Hetta er orsøkin til, at nógvir serfrøðingar meta snarreaktorin sum framtíðarloysnina upp á trupulleikarnar innan kjarnorkuframleiðslu til friðarlig endamál. Ein onnur orsøk er hon, at snarreaktorurin ikki sum tann termiski virkar við trýsti, og hetta sigst í sjálvum sær at gera hann til eitt tryggari tól enn tann termiski reaktorurin.

Sostatt er endurvinningin ella tað, sum á bretskum eitur »reprocessing« ein týðandi táttur í allari skipanini við snarreaktorum. Við endurvinningini verða uran og plutonium skild frá teimum sokallaðu »fissiónsproduktunum«, og verða tey endurvunnu evnini uran og plutonium so brúkt aftur í snarreaktorunum. Talan er altso um eina ringrás, ella um at miðað verður ímóti einari ringrás, sum í síðsta enda skal hvíla í sær sjálvari.

Høvuðsdenturin við øllum virkseminum í Dounreay er at eftir hvat ið leiðslan har hevur upplýst, gransking í øllum endurvinningarspurninginum. Endamálið við granskingini er at finna fram til eina skipan, ið kann nýta plutonium og uran 238 100 % og eina skipan, ið kann endurvinna alt tað burturkast, sum teir termisku reaktorarnir leggja eftir seg. Leiðslan á Dounreay vil vera við, at tey 20.000 tonsini av urani 238, sum liggja í burturkastgoymslunum í Bretlandi svara til eina orku ella er ein orkukelda, ið svarar til alt tilfeingið av koli í Bretlandi.

Viðvíkjandi geislavirknum burturkasti, er talan um trý stig av geislavirknum burturkasti, hástig, miðstig og lágstig. Hástigar- og miðstigargeislavirkið burturkast verður goymt á staðnum, meðan lággreislavirkið flótandi burturkast verður veitt út í Pentlandsfjørðin og lágvirkin roykur leiddur út gjøgnum skorsteinin. Viðvíkjandi trygdini á verandi verkinum heldur leiðslan sjálv, at trygdarkrøvini eru sera høg, nakað sum leiðslan eisini heldur sæst av, at Dounreayverkið á hvørjum ári hevur fingið tann bretska heiðursprísin fyri trygd á ídnaðararbeiðsplássum.

Soleiðis sær myndin altso út, tá ið leiðslan á Dounreay greiðir frá virksemínum á hesari kjarnorkuroyndarstøðini. Tað er tó nógv, t.d. upplýsingar úr pressuni og upplýsingar, sum komu fram á ráðstevnuni í Lerwick í juli 1987, sum bendir á, at smærri óhapp (incidents) hava verið í Dounreay, men tey eru torfør at dokumentera. Tað er tó einki, sum bendir á, at geislavirkni, mátað í Pentlandsfjørðinum og lutvíst í Norðsjónum stavar frá verandi Dounreayvirki. Heldur stavar hetta geislavirkni frá Sellafield, sum liggur í Írska Havi á vesturstrond Englands og frá øðrum bretskum kjarnorkuverkum. Tá hetta er sagt, so er

ikki nomið við tann vandan, sum er fyri einum **óhappi** á verandi kjarnorkuverki. Tað er givið, at ein álvarsom vanlukka á verandi verki fær álvarsamar fylgjur fyri alt umhvørvið og fyri tey lond, sum liggja í grannalagnum. Fylgjurnar av eini vanlukkku á verandi verki, koma sjálvsagt í stórt mál at vera treytaðar av ættini og avfallsviðurskiftunum í vanlukkuløtuni.

II EDRP-verkætlanin.

Nýggju ætlanirnar fyri Dounreayverkið kallast í dagligari talu EDRP, ið merkir EUROPEAN DEMONSTRATION REPROCESSING PLANT.

EDRP stendur fyri eini fleirtjóða ætlan um framleiðslu av brennievni til snarkjarnorkureaktorar. Henda framleiðsla inniber eisini endurvinning av brúktum kjarnorkubrennievni.

Bretsku myndugleikarnir aftanfyri EDRP-projektið eru UKAEA (United Kingdom Atomic Energy Authority) og BNFL (British Nuclear Fuel plc).

Londini, ið skulu samarbeiða um EDRP í Dounreay, eru Bretland, Belgia, Frakland, Italia og Vesturtýskland.

Ætlanin hjá hesum 5 londum fevnir um trý virki við snarreaktorum við vinnuligum endamáli, eitt virki til framleiðslu av vanligum kjarnorkubrennievni og eitt virki til endurvinningar av brennievni til snarreaktorar burtur úr burturkastaðum brennievni frá vanligum sokallaðum termiskum reaktorum.

Sum longu nevnt frammanfyri hevur verandi Dounreay kjarnorkuverkið verið rikið av UKAEA síðan 1955, og høvuðsendamálið við virkinum hevur hetta at gera royndir við snarreaktorum og við endurvinning og menning av ymiskum slagi. Eitt endamálið við verandi virki hevur eisini verið við royndum at finna fram til eina snarreaktorprototypu til **vinnulig** endamál — eitt nú til framleiðslu av streymi til ídnað og húsarhald.

Bretska stjórnin stuðlar EDRP, tí stjórnin er sannførd um, at Bretland liggur á odda í royndum við snarreaktorum og endurvinningarvirksemi í samband við brúkt kjarnorkubrennievni frá vanligum termiskum reaktorum.

Tað ætlaða endurvinningarverkið EDRP er projekterað til at endurvinna millum 60 og 80 tons av geislavirknum brennievni um árið, og verður EDRP sostatt 10 ferðir størri enn verandi endurvinningarvirkið í Dounreay. Talan er um sera geislavirkið tilfar, sum verður flutt til Dounreay frá nevndu ætlaðu reaktorum í Europa og tí longu liðugt gjørda franska snarreaktorinum Super Phønix. Ætlanin er at flyta tað geislavirkna brúkta brennievni, við serligu útgjørdum skipum um Norðsjógvin til eina og hvørja havn í Bretlandi, sum enn ikki er endaliga fastløgd. Síðani verður tilfarið flutt víðari við jarnbreyt til Dounreay.

Tá tilfarið kemur til virkið, verður tað goymt í kuldagoymslum, av tí at hetta er tilfar, sum framleiðir nógvan hita og sum kann gerast vandamikið, um tað ikki verður kølt alla tíðina. Síðani verður tilfarið viðgjørt á serligan hátt í endurvinningarvirkinum, har ið plutonium- og urannitratini verða skild burturúr burturkastinum og konverterað til oxidir. Tá hetta arbeiðið er liðugt, eru nøgdir av sera geislavirknum leivdum eftir, og verða hesar leivdir fyribils varðveittar í serligum goymslum á staðnum.

Síðani er ætlanin, at plutonium- og uranoxidini skulu flytast til virki, sum gera brennievnið liðugt til at nýta í snarreaktorum, og at hesin flutningur skal fara fram við flogfari beinleiðis frá flogvøllinum í Dounreay.

Bretsku kjarnorkumyndugleikarnir upplýsa, at hetta virksemið fer alt at fara fram eftir altjóða reglum, og at tað, sum verður leitt út frá EDRP, verður á sama støði sum tað, sum í dag verður veitt burtur frá verandi kjarnorkuverki.

Myndugleikarnir siga, at teir fara at fylgja væl við og kanna umhvørvið alla tíðina, og at kanningar teirra eru nóg góður tryggleiki móti einum hvørjum vanda fyri starvsfólkini, fyri fólkið í Norð Skotlandi og í oyggjunum í Norðuratlantshavi.

Mótstøðan móti EDRP er stór í Orknoyggjunum og í Hetlandi. Henda mótstøða er skipað í felagsskapin Shetland/Orkney CADE, ið fær fíggjarligan stuðul frá Shetland og Orkney Councils. Hesin felagsskapur hevur flestu vinnu- og yrkisfeløg, og býráð og oyggjaráð sum limir. CADE hevur fingið til vega meginpartin av tí skjalatilfari, ið verður nýtt í virkseminum fyri at fáa bretsku myndugleikarnar til at sleppa ætlanini um EDRP. Á ráðstevnuni um EDRP í juni 1987 varð skipaður óformligur upplýsingarbólkur, kallaður NENIG. Endamálið við hesum bólki er at fáa til vega ein »stovn«, ið kann savna inn upplýsingar um EDRP og fáa hesar upplýsingar út til almenningin í Bretlandi og í Norðanlondum.

NENIG er sum nevnt ein heilt óformligur »stovnur« — ein bólkur, ið ongar beinleiðis limir hevur, bert stuðlar, men sum hevur eina umsiting, ið liggur hjá CADE-skrivstovuni í Lerwic. NENIG ger eitt týðandi upplýsingararbeiði, ið nevndin heldur tað vera heint, at Føroya landsstýri eins og The Joint Islands Councils fráðið fyri Hetland og Orknoyggjar stuðlar arbeiðinum bæði politiskt og fíggjarliga.

Áhugin fyri at steðga EDRP ætlanini er stórur í Norðanlondum. Soleiðis mótmælti Tingmannaráð Útnorðurs útbyggingini á fundum í Selfossi 1986 og í Tórshavn 1987.

Í Norðurlandaráðnum varð málið umrøtt undir aðalorðaskiftum 1987. Um sama mundið gjørdu norðurlendsku umhvørvismálaráðharrarnir samtykt, har teir vístu á vandan við EDRP fyri norðuratlantisku fiskivinnutjóðirnar.

Mótmæli er eisini komin frá »Veiði- og verkamannafylkingini í Norðuratlants havi«.

Í Føroyum er áhugin stórur millum mannað, og sæst hetta av, at felagið Fólk Fyri Friði í november 1987 kundi handa bretska stýrinum yvir 4000 undirskriftir móti EDRP.

Landsstýrið hevur eisini reist spurningin yvir fyri donsku eins væl og bretsku stjórnini, men løgtingið var, sum tað framgongur av tingmáli nr. 79/1986, ikki nøgt við svarið fyri bretsku stjórnini.

Eisini í Noregi er mótstøðan ímóti EDRP stór, og Noreg hevur mótmælt hjá bretsku stjórnini, eins væl og við at lata varaumhvørvismálaráðharran luttaka sum observatør á ráðstevnuni í Lerwick.

Flutningur.

Undir almennari viðgerð av EDRP — tí sokallaðu »Public Inquiry« vórðu nógvir partar av EDRP-ætlanini fyri hørðum atfinningum. Spurningurin um flutningin av tí geislavirkna tilfarinum til Dounreay skapti drúgvt ørðaskifti. Undir Public inquiry kom tað fram, at myndugleikarnir, sum longur nevnt, hava hugsað sær eina av tveimum havnum. Talan kann verða um Scrabster tætt við Dounreay í Caithness ella Cromarty Firth. Og í hesum sambandi hugsa myndugleikarnir um Alness, Invergordon ella Nigg. Tað hava verið gjørdar álvarsamar atfinningar til hesar ætlanir. Ført hevur verið fram, at havnin í Scrabster er alt ov lítil og illa útbygd, og at tað tí er vandamikið at brúka hana, soleiðis sum hon er nú. Eisini hevur verið ført fram, at skal hon kunna nýtast og vera toluliga trygg, so eiga stórar útbyggingar at verða gjørdar. Viðvíkjandi Cromarty Firth, so verður víst á, at har er stórt virksemi í samband við oljuútbúnaðin, og at tað fer at vera vandamikið at nýta hetta økið sum innskipingarhavn fyrí geislavirkið burturkast til endurvinningar í Dounreay. Eisini hevur verið ført fram sum álvarsom atfinning, at sjálvur flutningurin yvir havið er ein stórur vandi fyri umhvørvið. Víst varð á, at flutningsvegurin er langur, heilt frá Mið- og Vesturevropa til eitt plass, sum liggur í útjagaraøkinum av Europa. Flutningsleiðirnar koma at ganga yvir havøkið við nógvari ferðslu sjóvegis og eisini yvir havøkið, sum annars eru ótrygg fyri skipaferðsluna. Roknað verður við 14 sjóvegisflutningum um árið. Eisini vórðu gjørdar atfinningar ímóti flutninginum á landi, ið helst kemur at vera eftir jarnbreyt, og víst varð á, at jarnbreytin, ið í støðum kemur at ganga yvir høgar brýr, og annars at trupulleikar eru av jarnbreytarflutninginum um veturin. Um so er, at flutningurin kemur at vera eftir vegi, ja so kemur hesin flutningur at vera út fyri somu vandum sum allur annar flutningur eftir vegi við stórum fylgjum fyri um-

hvørvið, um vanlukkan skuldi hent. Í hesum sambandi hevur nógvur dentur verið lagdur á kontainararnar og teirra konstruktión. Myndugleikarnir vilja vera við, at hesir kontainarar kunnu tola allar hugsandi vanlukkur, ið kunnu koma fyri á sjógvi og á landi, meðan tey, sum gera atfinningar, sjálvsagt føra fram, at einki mannaverk er so væl gjørt, at tað ikki kann vera fyri óhappi. Í hesum sambandi verður eisini víst á, at tað er trupult at royna hesar kontainarar soleiðis, at tað ber til at fáa at vita, hvussu nógv teir í veruleikanum tola. Afturat hesum kemur so vandin við yvirgangsatsóknum.

Sum frammanundan nevnt verður ætlanin at flyta plutoniumið burtur frá Dounreay í flogførum. Undir almennu viðgerðini varð víst á, at vandin fyri eini flogvanlukku við plutoniumi frá Dounreay um borð ikki eigur at undirmetast. Í hesum sambandi verður serliga víst á, at flogførini verða at tlúgva ígjøgnum økið, sum bretska hervaldið nýtir sum venjingarøkið. Atfinningarnar í hesum sambandi ganga upp á, at myndugleikarnir ikki hava kalkulerað við møguleikanum av einum samanstoyti millum eitt hernaðarflogfar við bumbum umborð og eitt flutningsflogfar við plutonium umborð og at almenningurin sostatt ikki veit, um kontainararnir, sum innihalda plutonium, kunnu standa ímóti einari tílíkari vanlukku.

Niðurstøðan av spurninginum um flutning til Dounreay er sostatt sambært tey, sum gera atfinningar, at sjálvur flutningsspurningurin er eitt ógvuliga álvarsamt vandamál í øllum hesum samanhangi.

Trygdin.

Allur trygdarspurningurin í samband við ætlaða EDRP-verkið er framvegis rættiliga ógreiður. Høvuðsivin snýr seg um sjálva byggiætlanina, og kemst hetta av, at tala er um eitt skitsuprojekt, ið menn hava at taka støðu til. EDRP er enn ikki detailprojekterað, og hetta ger, at tey, sum eru í iva um trygdina, halda seg ikki kunna taka endaligar støðu út frá einum skitsuprojekti. Byggiharrin vísir á, at hann bert søkir um eitt prinsipielt byggiloyvi, og at øll trygdarviðurskiftini verða í lagi, tá ið fyribils byggiloyvi er givið, og viðari førir byggiharrin (UKAEA) fram, at ikki ber til at útarbeiða nágreiniligar trygdarskipanir, fyrrenn undir detailprojektkteringini. Tá ið detailprojekteringin verður sett í verk, verður hon gjørd eftir teimum krøvum og treytum, sum kjarnorkumyndugleikarnir og teir myndugleikar, ið hava eftirlit við trygdini á kjarnorkuverkum, seta. Hinvegin bendir alt á, at táið detailprojektið er liðugt, verður hetta ikki undirlagt nakra almenna kanning, heldur ikki trygdarviðurskiftini, soleiðis sum **skitsuprojektið** hevur verið fyri almennari kanning, ti sokallaðu Public Inquiry. Tað, sum almenningurin hevur havt at halda seg til,

er ein frágreiðing, ið kallast Enviromental Impact Assessment. Hetta er ein almenn frágreiðing um ávirkaninna á umhvørvi av einum møguligum endurvinningarverki í Dounreay. Henda almenna frágreiðing hevur verið fyri nógvum atfinninum, og høvuðsatfinningin er tann, at hon ikki viðger fylgjurnar av einari veruligari **kjarnorkuvanlukku** á tí nýggja verkinum, og tær fylgjurnar, ið ein tílík vanlukka kann hava fyri umhvørvi og fólk. Til tess at bøta um hetta hava The Joint Islands Councils, t.v.s. ráðini fyri Orkney, Shetland og Hebridurnar útvegað sær eina óhefta meting, har mett verður um fylgjurnar av einum óhappi. Tað óhapp, sum roknað hevur verið við, er ein leki í einum av teimum tangunum, sum goyma hágeislavirkin evni. Roknað verður við í kalkulatiónunum, at 0,1% av innihaldinum í einum av hesum tangunum lekur út. Við veðurlíkindunum verður roknað við umstøðum, sum vildu ført eitt geislavirkið skýggj út yvir Orknoyggjarnar og Shetland. Úrslitið av hesum metingum vísti, at fólk og fæ og umhvørvið yvirhøvur høvdu verið fyri álvarsamum skaða. Eisini vísti kanningin, at tað hevði verið trupult at flutt fólkið í oyggjunum burtur undir hesum vandamiklu umstøðunum. Herumframt vísti kanningin, at trupult hevði verið at fingið hjálp fram til oyggjarnar.

Í samhand við trygdina verður ofta vist til kjarnorkustøðina Sellafield, ið virkar á nakað sama hátt sum tað komandi Dounreay-verkið, og sum er eitt stórt kjarnorkuverk. Sum kunnugt hava sera nógv óhapp verið á Sellafield. Menn vilja vera við, at yvir 300 óhapp hava verið í 30 ár. Mest álvarsama óhappið var eldurin í 1957, tá ið fleiri fólk lótu lív, og tá ið ógvuliga álvarsamar umhvørvisdálkingar fóru fram. Onnur dálking frá Sellafield er útleiðingin av lággeislavirknum spillvatni í Írska Havið, nakað sum hevur givið írska havinum ógvuliga ringt umdømi millum eitt nú fiskakeyparar.

Viðvíkjandi **verandi** Dounreay-verkinum er tað ójavnt, sum upplýst verður um óhapp. Vanliga fatanin millum manna í Bretlandi hevur verið, at fá óhapp yvirhøvur hava verið á Dounreay-verkinum, men í samband við áðurnevndu almennu kanning (Public Inquiry) varð vist á smærri lekar og smærri óhapp í tí tíðini, Dounreay-verkið hevur verið til. Tað finst eingki samlað yvirlit yvir lekar og óhapp á Dounreay, og tí er tað trupult at siga nakað víst um, hvat ið veruliga er farið fram og hvat ið veruliga hevur verið av óhappum hesi seinnu árini. Tó er eitt yvirlit yvir smærri óhapp »incidents« í tíðini 1977-82 í skjalatilfarinum hjá nevndini, men hetta sigur eingki um, hvat slag av óhappum, talan hevur verið um. Tó stendur fast, at eingki stórt álvarsamt óhapp hevur verið.

Eftirlit.

Eftirlitið við trygdini av bretskum kjarnorkuverkum liggur hjá einum almennum stovni, ið kallast Nuclear Installations Inspectorate (NII). Tað er hesin

stovnur, ið hevur ábyrgdina av, at verkini virka eftir teimum lógum og teimum reglugerðum, sum bretska stjórnin setir fyri kjarnorkuverk og trygdina á hesum verkum. Í samband við tey mongu óhappini á Sellafield hevur verið ført fram, at NII hevur ov lítla manning og ov lítla orku til at ansa teimum bretsku kjarnorkuverkunum til lítar. Eisini verður ført fram, at ov lítið verður lurtað eftir NII, og víst hevur verið á, at bretska kjarnorkuverk ikki fylgja teimum boðum, ið tey fáa frá NII. Í hesum sambandi verður ofta víst á Sellafield, hvar ið tað verður ført fram, at leiðslan á Sellafield ikki aktar NII og at har henda óhapp aftan á óhapp av hesum orsøkum. Í hesum sambandi eigur at verða nevnt, at verandi verkið í Dounreay er eitt royndar- og menningarverk, og sostatt ikki er undirlagt NII. Hin vegin er eingin ivi um, at verður komandi verið EDRP bygt, verður hetta lagt undir NII, og at almenningurin sostatt kann fylgja við teimum frágreiðingum, sum NII árliga sendir út um bretsk kjarnorkuverk. Men sum longu frammanundan nevnt, so vísa atfinningarnar á, at NII líður av manningar- og orkutrupulleikum, og at tað er trupult hjá teimum at fylgja við tí, sum fer fram á bretskum kjarnorkuverkum, og halda atfinnararnir tí, at alt hetta er ein hóttan ímóti kjarnorkutrygdini í Bretlandi.

Aðrar atfinningar ímóti EDRP ganga út frá hesum, at verkið skal vera eitt vinnuligt verk, sum skal geva vinning til ánararnar, og halda nógv, at hetta í sjálvum sær eisini kann vera ein vandi fyri trygdina, við tað at tey, sum har koma at virka, koma at vera undir einum ávísum trýst. Serstakliga verður víst á, at soleiðis sum arbeitt verður nú, er neyðugt at køla burturkastið, ið kemur til verkið í minsta lagi 550 dagar, áðrenn tað kann fara undir endurvinningarprocessina. Í løtuni verða á Dounreay gjørdar royndir við at tilvirka og endurvinna geislavirkið burturkast ókølt, t.v.s. beinleiðis sum tað kemur inn á virkið, og meta menn, at hetta í sjálvum sær ber í sær ein álvarsaman vanda fyri starvsfólk og umhvørvi.

Burturkast.

Ein álvarsamur spurningur í samband við EDRP er sjálvsagt spurningurin um, hvat gerast skal við burturkastið. Tí hóast EDRP verður endurvinningarverk, kemur hetta endurvinningarverkið í virksemi sínum at lata frá sær stórar mongdir av geislavirknum burturkasti. Talan verður um luftevni, flótandi burturkast og fast burturkast, og talan verður um burturkast á teimum trimum stigunum, sum frammanundan eru nevnd, altso á lágstigi, miðstigi og høgum stigi. Hetta merkir so eisini, at talan verður um geislavirkið burturkast og spillevni, sum eru framleidd á verkinum, og sum koma at vera til í stytturi ella longri tíðarskeið, eisini eftir at EDRP-verkið einaferð er hildið uppat at virka. Hildið verður, at EDRP komur at lata frá sær umleið 2.000 m^3 av fastum burturkasti á lágum geislingarstigi um árið, og verður hetta pakkað í tunnur og grivið niður á staðnum við loyvi frá bretsku myndugleikunum.

Tað fasta burturkastið á miðstigi og hástigi, t.d. brúkt brennifløt av ymiskum slagi — nakað, sum kemur at fylla umleið 100 m³ um árið, verður tey fyrstu 10 árini varðveitt á staðnum. Brotsku myndugleikarnir hava ætlanir um eina støð, ið bert skal taka sær av hesum burturkasti og varðveitsluni av tí, men hendan støðin, sum eisini skal hava samband við EDRP, er ikki kannað nærri, og vita vit tí ógvuliga lítið um hana. Støðin er sostatt ikki komið longri enn á pappírið, og heldur ikki er nøkur avgerð tikin um, hvar í Bretlandi, henda støð skal vera.

Roknað verður við, at EDRP-verkið fer at »framleiða« umleið 50 m³ av flótandi burturkasti á hástigi um árið. Talan er um sera geislavirkin evni og evni, ið gera hita. Ætlanin er at goyma hesi geislavirknu evni í niðurkøldum tangum á staðnum tey fyrstu mongu árini. Seinni er ætlanin er gera hesi flótandi evni til eitt slag av glasevni (vitrifikatión), og síðani er ætlanin antin at goyma hetta djúpt í jørðini á landi ella undir havbotninum — hvar er ikki enn avgjørt. Møguliga verður loysnin eisini tann, at hesi hágeisluvirknu evni verða send aftur til tað landið, haðani tey upprunaliga koma til Dounreay. Endaliga avgerð um hetta er ikki tikin enn, og er hetta ein av ivaspurningunum í samband við alla EDRP-ætlanina. Lagt kann vera aftrat, at hesin spurningur ikki varð kannaður í samband við ta frammanfyri nevndu almennu kanningina (Public Inquiry).

Tað eigur í samband við burturkast eisini at verða víst á, at í samband við endurvinningina verður talan um stórar mongdir av miðal- og lággeislavirknum spillvatni. Roknað verður við, at frá EDRP verður talan um 17.000 m³ av miðalgeislavirknum spillvatni, og skal hetta viðgerast til tess at taka burtur úr hesum so mikið av geislavirkni, at tað reinsaða vatnið kann leiðast út. Hetta verður gjørt við at leiða spillvatnið ígjøgnum ymisk sløg av tangum. Sama verður gjørt við tær mongdirnar av lággeislavirknum spillvatni (35.000 m³ árliga), ið verða leiddar út í havið. Skipanin sigst at skula verða bygd upp soleiðis, at skuldi tað komið fyri, at hágeislavirkin evni verða funnin í hesum spillvatni, so skulu hesi verða ført aftur til verkið. Víst verður í hesum sambandi til ta skipan, ið verður brúkt á Sellafield, sum ikki hevur virkað serliga væl og sum er orsøkin til, at spilluvatn við geislavirknum innihaldi, sum er vyri tað loyvda markið, hevur verið veitt út í Írska Havið.

Samantikið kann sigast, at Public Inquiry og ráðstevnan í Lerwick tykjast vísa, at kjarnorkuverk av EDRP-slagnum ikki gera spurningin um geisluvirkið burturkast lættari. Tað er ikki soleiðis, at nøgdirnar av geislavirknum burturkasti verða minni við snarreaktorum ella við endurvinning. Nevndin skal í hesum sambandi vísa til áhugaverdu støðuna hjá myndugleikunum í Orknoyggjun-

um, sum er hendan:

Eingi loyvi til nýggj kjarnorkuverk eiga at verða givin, so leingi sum spurningurin, hvat gerst skal við burturkastið, er latin yvir at verða loystur eina ferð í framtíðini, uttan at nøkur ávís freist ella ávís ætlan fyri hesari endaligu loysn fyriliggur.

Heilsuligar avleiðingar.

Myndugleikarnir í Bretlandi og tey, sum hava gjørt atfinningar til EDRP-ætlanina fyrst og fremst umboð fyri Orknoyggjarnar, Hetlandi og CADE, hava eisini viðgjørt spurningin um **heilsuligu** avleiðingarnar av einum komandi endurvinningarverki í Dounreay. Umboðini fyri mótstøðuna hava fingið krabbameinsserfrøðingar at viðgera hagtøl frá Caithness, og eru hesir komnir til ta niðurstøðu, at serstakliga krabbameinssjúkan leukæmi hjá 0-24 ára gomul er økt í økinum, síðani verandi kjarnorkuverk varð stovnsett. Hinvegin hava serfrøðingarnir hjá stjórnini hildið fast um tað mótsetta, men teir kunnu kortini ikki avvísa, at samband tykist vera ímillum vaksandi talið av leukæmitilburðum og verandi endurvinningarverk. Í hesum sambandi verður eisini ofta víst til royndirnar frá økinum kring Sellafield, har talið av baranakrabbameini er økt, síðani verkið fór undir virksemi sítt her. Samantikið heldur frammanfyri nevnda andstøða seg vera komna til ta niðurstøðu út frá tí, sum teirra serfrøðingar hava lagt fram, at tað ber illa til at seta nakað mark fyri, hvat ið serstakliga børn tola av lágvirknari geisling. Serstakliga tykist vandin at vera við endurvinningarverk. Í hesum sambandi hava EDRP-andstøðan og bretskir serfrøðingar víst á, at markini fyri tí, sum fólk verður hildið at tola, av lággeislavirkni, eru hægri í Bretlandi enn tilsvarandi mark í Vesturtýsklandi, Japan og USA. Hesi viðurskifti vóru gjølla umrødd á ráðstevnuni í Lerwick, og tyktist lítil ivi vera um, at teir serfrøðingar, ið vistu á vandan við varandi lágvirknari geisling, hava grein í sínum máli.

Rúskapur.

Spurningurin um tað **búskaparliga skilagóða** í EDRP-ætlanina er sjálvsagt eitt innanhýsis brestskur spurningur, men EDRP-andstøðan hevur vist á, at ongar búskaparligar framskrivingar eru tøkar í samband við EDRP-ætlanina. Heldur ikki er myndin greið, tá talan er um búskaparliga útlitið fyri samstarvinum við hini europeisku kjarnorkuverkini.

Av hesum verkum er bert Superphønix í Fraklandi liðugt, og hevur ta tíð, ið hetta verkið hevur í gongd, framleitt streym til dupultan kostnað í mun til van-

lig kjarnorkuverk. Síðani er tað hent, at franska kjarnorkuverkið Superphønix er fyribils afturlatið, av tí at reaktorurin er farin at leka og at enn ikki hevur eydnast frønsku myndugleikunum at tetta hendan lekan, sum væl at merkja ikki er ein geislavirkin leki. Hann er tó so álvarsamur, at verkið ikki kann rekast og reaktorurin tí fyribils sløktur. Einki útlit er tó fyri, at hesin reaktor verður settur í gongd aftur í bræði. Í Vesturtýskalandi er byggingin av samstarvsverkinum fyribils steðgað av lokalum politiskum trupulleikum. Og í Italia er hent tað, at italsku elverksmyndugleikarnir eftir Tjernobyl hava broytt støðu og sett fram ynski um, at Italia tekur seg burturúr tí europeiska snarreaktorsamstarvinum. Búskaparliga myndin tykist tí ikki serliga bjørt, og hava tey, sum eru ímóti EDRP í Dounreay tí roynt at vísa myndugleikunum á hendan veruleika. Tá hetta verður nevnt her, er tað tí, at ymist bendir á, at júst hesi viðurskifti hava ávísa ávirkan á bretsku stjórnarmyndugleikarnar.

Ein spurningur, ið hevur verið nógv frammi, er hvørt komandi EDRP-verkið kemur at hava hernaðarligan týdning ella tað bert sum bretsku myndugleikarnir havs sagt, verður av friðarligum slagi. Í hesum sambandi hevur verið víst á, at tann eini samstarvspartnarin í EDRP-ætlanini, Frakland, er komið í plutoniumtrot, soleiðis at hetta land ikki í løtuni kann útvega sær nóg mikið av plutonium til taktisk atomvápn. Frakland hevur ikki undirritað altjóða avtaluna ímóti spjaðing av kjarnorkuvápnum, og hevur hetta land avgjørt at halda fram við at úthyggja kjarnorkuvápn sini. Á ráðstevnuni í Lerwick var upplýst, at teir kjarnorkureaktorar í Fraklandi, sum framleiða plutonium til atomvápn, eru uppslitnir, og eingir aðrir líknandi reaktorar eru projekteraðir. Frakland verður tí neyð til at fáa plutonium til síni taktisku atomvápn uttaneftir. Tað er tí ein spurningur, um ikki vandi er fyri, at plutonium frá komandi Dounreay verkinum antin viljandi ella óviljandi endar hjá franska kjarnorkuvápnaídnaðinum. Hesin spurningur hevur eisini áhuga í samband við Bretland. Sum kunnugt hevur Bretland kjarnorkuvápnasamstarv við USA. Men Bretland hevur eisini sín egna kjarnorkuvápnaídnað og framleiðir eina kjarnorkuvápnaða rakett, ið kallast »Trident«. Tað er almannakunnugt, at løðingarnar, ið verandi Trident-rakettum skulu skiftast út. Tað er eisini almannakunnugt, at plutonium 239 til hesar rakettir higartil er komið frá teim hernaðarligum kjarnorkuverkunum í Calderhall og Chappelcross. Verkini í Calderhall og Chappelcross eru uppslitin og tey verða afturlatin í næstu framtíð. Tað evur tí eisini spurt av EDRP-andstøðuni, um ikki vandi er fyri, at EDRP-verkið í Dounreay, ið sum frammanundan nevnt kemur at framleiða polutonium, antin viljandi ella óviljandi kemur at útgera bretska kjarnorkuvápaídnaðin. Hetta er sjálvsagt eitt innanhýsis bretskt mál, men verður tað so, at EDRP-verkið í Dounreay kemur at lata plutonium til franska og bretska kjarn-

orkuvápnaídnaðin, ja so er hetta ið hvussu er beint hvørtur ímóti allari europeisku EDRP-ætlanini, sum klárt og greitt sigur seg vera einans til friðarliga endamál og ikki av hernaðarligum slagi.

III Niðurstøða.

Út frá tí tilfari, ið nevndin hevur havt til taks og út frá teim fundum, ið nevndin hevur havt við avvarðandi bretskar myndugleikar og stovnar, er nevndin komin til fylgjandi niðurstøðu um sjálva verkætlanina EDRP:

1) Tað tykist ikki sum, at bretsku myndugleikarnir kunnu veita nóg góða trygd fyri, at EDRP-ætlanin ikki er ein vandi fyri umhvørvið eisini um okkara leiðir.
2) Tað er alt ov stórur ivi um tað mark, ið umhvørvið tolir av lággeislavirknum evnum, ið skulu út í sjógv og luft.
3) Tað tykist, sum bretsku myndugleikarnir onga endaliga og skilagóða loysn hava í samband við tað burturkast, ið EDRP-endurvinningarverkið sjálvt kemur at lata frá sær, og liggur her í sjálvum sær ein stórur vandi fyri umhvørvið í framtíðini.
4) EDRP tykist ikki at vera ein skilagóð búskaparlig íløga.
5) Tað tykist ikki sum, at bretsku myndugleikarnir kunnu veita trygd fyri, at plutonium frá EDRP ikki kann enda í bretska og franska kjarnorkuvápnaídnaðinum.
6) Tað tykist ikki sum, at bretsku myndugleikarnir kunnu vísa á eina skilagóða og trygga loysn av flutningsspurninginum.

So mikið um sjálva verkætlanina. Nevndin skal loyva sær at leggja aftrat aðrar og óhepnar fylgjur, sum hendan verkætlan kann fáa fyri samfeløgini í Norðuratlantshavi. Hóast havstreymarnir frá Pentlandsfjørðinum ikki beinleiðis ganga ímóti Føroyum, men fyrstganga niður í Norðsjógvin, so upp til Noreg og so vestur eftir norðan fyri Ísland, **so kann sjálv plaseringin av einum so umfatandi kjarnorkuverki koma at hava álvarsamar avleiðingar fyri eitt nú føroyska búskapin.** Bert hetta, at eitt verk, ið skal framleiða stórar mongdir av tí sera eitrandi evninum plutonium, at sera eitrandi og vandamikil evni skulu flytast til og frá hesum verki eftir sjónum og ígjøgnum luftina, og hetta at stórar goymslur av geislavirknum evnum møguliga koma at verða verðandi í Dounreay, kann koma at hava álvarsamar fylgjur fyri føroysku fiskivinnuna og búskapin. Soleiðis sum tilvitað er í keyparalondum okkara, so er vandi fyri, at bert hetta, at Føroyar liggja í einum øki, sum dagliga er í vanda fyri geislavirknari dálking, kann hava óhepna og negativa ávirkan á keyparalond okkara. Oman á hetta kemur tann veruligi vandin við einum álvarsomum geislavirknum leka ella beinleiðis van

lukku, ein vandi, sum kanska serstakliga hóttir Føroyar frá loftbornum geislavirknum eitri. Sum kunnugt eru lágaettirnar vanligar í Føroyum, og vandin fyri, at Føroyar verða raktar av geislavirknum skýggi ella regni er tí stórur. Oman á hetta koma teir avmarkaðu møguleikarnir hjá føroyingum at sleppa burtur, um vanlukka veruliga hendi á tí komandi EDRP-verkinum.

Í hesum viðfangi skal nevndin vísa á, at tørvur er á tilbúgvingar- og bjargingarætlan, um kjarnorkuvanlukka skuldi ført til vanda fyri fólk og fe í Føroyum.

Nevndin kann tí bert koma til ta samlaðu niðurstøðu, at ætlaða verkið alt sum tað er, **er ein hóttan móti føroyska samfelagnum eins og tað er ein hóttan móti hinum oyggjasamfeløgunum í Norðuratlandshavi og á vesturstrond Noregis.**

Tað má tí haldast at vera av størsta áhuga fyri føroyingar, at hetta verk ikki verður bygt, og eigur alt tí at vera gjørt til tess at fáa bretar tíl at sleppa hesari ætlan.

Nevndin heldur eisini, at tað er umráðandi, at føroyskir myndugleikar í framtíðini fylgja væl við tí, sum hendir við havumhvørvinum ikki bert um okkara leiðir, men eisini í Norðsjónum.

Nevndin er út frá frammanfyristandandi sannførd um, at føroysk áhugamál eru best vard við, at EDRP-ætlanin ikki verður sett í verk og heldur nevndin tað tí vera beint at mæla løgtinginum til at áleggja landsstýrinum at gera enn meira til tess at steðga nevndu ætlan. Nevndin kemur tí við uppskoti til samtyktar samsvarandi hesi støðu.

Uppskot

til

samtyktar

1) Álagt verður landsstýrinum at virka í móti EDRP-ætlanini í Dounreay á øllum teimum økjum, har hetta er møguligt eitt nú við, at landsstýrið tekur upp aftur hetta mál í Norðurlanda Ráðnum, yvirfyri donsku stjórnini og yvirfyri bretsku stjórnini.

2) Álagt verður landsstýrinum at taka upp samband við myndugleikarnar í hinum norðuratlantisku samfeløgunum, eitt nú Hetlandi, Orknoyggjunum, Íslandi, Grønlandi og Noregi til tess at samskipa mótstøðuna ímóti EDRP-ætlanini í Dounreay.

3) Álagt verður landsstýrinum at bera so í bandi, at sjógvurin kring Føroyar og luftin javnan verða kannað fyri geislavirkni.
4) Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot til eina tilhúgvingar og bjargingarætlan, at seta í verk, um so er, at kjarnorkuvanlukka skuldi hent við vanda fyri Føroyar.
5) Álagt verður landsstýrinum gjøgnum avvarðandi myndugleikar at tryggja Føroyum sínámillum ávaringarskipan, um so at ein kjarnorkuvanlukka skuldi hent við vanda fyri føroyska samfelagið.

Skjalatilfarið er til skjals á Løgtingsskrivstovuni, Landsskrivstovuni, Landsbókasavninum og Býarbókasavninum.

YVIRLIT

yvir hjálagt skjalatilfar í

løgtingsmáli nr. 60/1987: Føroyskt mótmæli móti bygging av verki til endurvinnan av kjarnorkubrennievni í Dounreay í Skotlandi.

1) *Environmental impact assessment relating to the proposed siting of the European Demonstration Fast Reactor Fuel Reprocessing Plant (EDRP), at Dounreay, Caithness.*
2) *Frágreiðing um verandi kjarnorkuverk í Dounreay (PFR).*
3) *Report of Dounreay EDRP.*
4) *Dounreay Public Inquiry (Viðmerkingar hjá Joint Islands Councils til (3)*
5) *Viðmerkingar frá Orkney CADE til Dounreay Public Inquiry.*
6) *Sikkeland, Torbjørn: Future aspect of nuclear energy and of Dounreay. Fyrilestrar á ráðstevnu í Lerwick 1987.*
7) *Leukaemia in Young Persons o.s.fr. Tilfar frá ráðstevnuni í Lerwick 1987.*
8) *Economic Importance of the North Sea. Fyrilestrar eftir John Goodland ráðstevnuni í Lerwick 1987.*
9) *Report on Radioactivity o.s.fr. Frágreiðing frá ráðstevnuni í Lerwick í seinastuni um geisling frá verandi kjarnorkuverki í Dounreay (PFR).*
10) *Yvirlit yvir »incidents« frá P.F.R.*
11) *Tilfar um P.F.R. úr bretskum bløðum.*
12) *Lýsing frá Shetlands Islands Council móti EDRP.*
13) *Faldari um EDRP frá CADE.*
14) *Fyrispurningur um EDRP: Norðurlanda Ráðið 1987.*
15) *Skriv og svarskriv millum landsstýrið og bretsku stjórnina. Brev til danska forsætismálaráðharran.*

16) *Radioaktivitetur frá Dounreay (Bogi Hansen 1986).*
17) *Dounreay's hidden agenda (Walt Patterson 1987).*
18) *Fundarsamtykt hjá norðurlondska umhvørvismálaráðharranum (1987).*
19) *Mótmæli móti Dounreay frá »Veiði- og verkamannafylkingini í Norðuratlantshavi (1987).*
20) *Tingmannaráð Útnorðurs Fundarsamtyktin/1986.*
21) *Tingmannaráð Útnorðurs Fundarsamtykt frá 17. september 1987.*
22) *Statement o.s.fr. Fundarsamtykt frá altjóða ráðstevnuni móti EDRP frá Lerwick.*
23) *Response o.s.fr. Endaligar viðmerkingar frá CADE til niðurstøðuna frá Public Inquiry.*

Skjalatilfarið er til skjals á Løgtingsskrivstovuni, Landsskrivstovuni, Landsbókasavninum og Býarbókasavninum.

2. viðgerð 1. mars. Uppskotið til samtyktar frá umhvørvisnevndini, pkt. 1 og 2 samtykt við 26-0, pkt. 3 við 27-0, pkt. 4 við 26-0 og 5 við 27 0 atkvøðum.

61 Partapeningur í P/F Saké, Hósvík.

Ár 1988, týsdagin 23. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um partapening í P/F Saké, Hósvík.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 375.000 kr. í partapeningi í P/F Saké, Hósvík, og at leggja út peningin úr landskassanum.

§ *2.* Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin, fyrrenn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerðing.

løgtingslov om aktier i P/F Saké, Hósvík.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i P/F Saké, Hósvík, med et beløb på 375.000 kr. og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ *2.* Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales, før alle betingelser, landsstyret skulle stille, er opfyldt.

§ *3.* Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

P/F Saké, Hósvík, er felag, ið skal seta á stovn virki til viðgerð av síli, laksi og øðrum fiski.

Viðgerðin fevnir um kryvjing, reinsing og pakking umframt góðsking av øðrum fiski.

Roknað verður við at viðgera um 1.600 tons av fiski um árið.

Virkið er mett at kosta 11,2 mió. kr. og er fígging fingin til vega í høvuðsheitinum frá Kreditforeiningini og Menningargrunninum.

Partapeningurin er settur til 1.875.000 kr. og eru góðar 1 mió. kr. teknaðar av íbúgvunum í Hósvík og 300.000 kr. av Hósvíkar kommunu.

Søkt verður um, at 20% av partapeninginum, ella 375.000 kr., verður teknaður av landskassanum.

Landsstýrið mælir til at tekna 20% av partapeninginum, tó hægst 375.000 kr.

1. viðgerð 1. mars. málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 23. februar 1988 og eftir 1. viðgerð 1. mars 1988 beint í figgjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen, Svend Aage Ellefsen, Eyðun Viderø og Ivan Johannesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Adolf V. Hansen tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 4. mai. § 1 samtykt við 29-0, § 2 við 30-0, § 3 uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 29-0.

3. viðgerð 5. mai. Uppskotið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1413-1-96. Lóg nr. 43 frá 20. mai 1988.

62 Løgtingslóg um fuglaveiðu.

Ár 1988, mikudagin 2. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um friðing og veiði av villini fugli.

Kapitul 1.

Verja av villini fugli.

§ *1.* Allur fuglur, ið ikki er nevndur í § 12 er friðaður allastaðni út at fiskimarkinum.

2. stk. Friðingin umfatar eisini egg, pisur (ungar) og reiður.

lagtingslov om fredning og fangst/jagt af vildfugle.

Kapitel 1.

Beskyttelse af vildfugle.

§ *1.* Alle fugle, som ikke er angivet i § 12, er fredede overalt ud til fiskerigrænsen.

Stk. 2. Fredningen omfatter tillige æg, unger og reder.

§ 2. Tað er bannað er flyta inn og út av landinum allan livandi fugl. Hetta forboðið umfatar eisini egg og pisur (ungar).
2. stk. Føroya Náttúrugripasavn kann í serligum førum og við vísindaligum endamáli gera undantak frá stk. 1.

§ 3. Tað er forboðið at órógva fuglin við óneyðugum óljóði frá skipum, bátum, skjóting, skipsfloytum, flogførum/tyrlum ella øðrum gangi.
2. stk. Tað er forboðið at órógva og at avmynda (fotografera-filma-taka upp á video) sjáldsom fuglasløg nærhendis og á reiðrum teirra, t.d. lóm, smyril og vípu.
3. stk. Ferðamannafeløg, stovnar og onnur, ið skipa fyri ferðum til fuglalendi, hava skyldu at kunna tey ferðandi um frammanfyri standandi reglur.

§ 4. Fuglakanningar og -eygleiðingar skulu fraboðast Føroya Náttúrugripasavni.
2. stk. Kanningar, sum órógva fuglin, harundir ringmerkingar, kunnu bert fara fram eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni og eftir ummæli frá viðkomandi eigara (hagastýri).

§ 5. Føroya Náttúrugripasavn kann skipa fyri týning av fugli, sum er til ampa á ávísum økjum, sum t.d. alibrúk og floghavn.
2. stk. Um ein fuglastovnur er til ampa fyri aðrar stovnar, kann Føroya Náttúrugripasavn skipa fyri, at minkað verður um stovnin um alt landið ella partar av landinum.

§ 2. Det er forbudt at importere og eksportere alle slags levende fugle. Forbudet omfatter tillige æg og unger.
Stk. 2. Færøernes Naturmusæum kan i særlige tilfælde og med videnskabeligt formål give dispensation fra stk. 1.

§ 3. Det er forbudt at forstyrre fuglenes fred ved unødvendig larm fra skibe, både, skibssirener, skydning, flyvemaskiner/helikoptere eller anden støj.
Stk. 2. Det er forbudt at forstyrre og at fotografere eller tage på film og video sjældne fuglearter i nærheden af og på deres reder, f.eks. lom, dværghals og vibe
Stk. 3. Turistforeninger, institutioner og andre, som arrangerer ture til fugleområder, har pligt til at gøre de rejsende bekendt med foranstående bestemmelser.

§ 4. Fugleundersøgelser og -iagttagelser skal meddelse Føroya Nátturugripasavn.
Stk. 2. Undersøgelser, der forstyrrer fuglene, herunder ringmærkning, kan kun foretages med tilladelse fra Færøernes Naturmusæum efter indhentet udtalelse fra vedkommende ejer (haugebestyrelse).

§ 5. Færøernes Naturmusæum kan forestå udryddelse af fugle, som er til ulempe i særlige områder, f.eks. fiskeopdræt og lufthavn.
Stk. 2. Hvis en fuglebestand er til ulempe for andre fuglebestande, kan Færøernes Naturmusæum forestå en udtyndning af bestanden over hele landet eller dele af landet.

3. stk. Um ein fuglastovnur er hóttur av skaðadýrum, t.d. rottum og kettum (útløgukattum), kann Føroya Náttúrugripasavn skipa fyri týning.

4. stk. Áðrenn Føroya Náttúrugripasavn ger tiltøk eftir stk. 1-3 skulu viðkomandi bygdaráð/býráð fáa høvi til at geva sítt ummæli.

Stk. 3. Såfremt der er fare for, at en fuglekoloni udryddes af skadedyr, feks. rotter og katte (vildkatte), kan Færøernes Naturmuseum forestå skadedyrsbekæmpelsen.

Stk. 4. Forinden Færøernes Naturmuseum griber ind efter stk. 1-3, skal der gives vedkommende bygderåd/byråd lejlighed til at udtale sig.

Kapittul 2.
Um veiðurættindi

§ 6. Uppi á landi eigur grundeigarin veiðurættin. Viðvíkjandi veiðurætti er hann, sum situr við kongs- ella aðrari almennari jørð javnbjóðis grundeigara.

2. stk. Har ikki serlig rættarviður skifti gera avvik, hava eigararnir í tí gamla, matrikuleraða bønum í tí bygd, har bjørgini liggja, fuglaveiðurættin í bjørgum, urðum og tílíkum fuglalendi.

3. stk. Har felag er, og samtykt ella fyrndarrættur ger ikki avvik, hava eigararnir javnbjóðis veiðurætt.

4. stk. Samtykt um nýtslu av veiðurætti í felag kann gerast í grannastevnu. Í tílíkari samtykt kann fyrisetast, at veiða bert kann fara fram í minni mun ella yvirhøvur ikki.

5. stk. Einsæris burturlating av veiðurættindi kann bert fara fram fyri upp til 5 ár í senn.

Kapitel 2.
Om fangst/jagtrettigheder

§ 6. Fangstretten til lands tilkommer grundejeren. Ligestillet med grundejeren betragtes med hensyn til fangstret besiddere af kongs- eller anden offentlig jord.

Stk. 2. Hvor ikke særlige retsforhold medfører afvigelse, tilkommer retten til fuglefangst i fuglebjerge, urer og lignende steder ejerne af den gamle matrikulerede indmark i den bygd, hvortil fuglepladsen hører

Stk. 3. På fællig, hvor ikke vedtægt eller sædvane medfører afvigelse, har enhver ejer lige fangstret.

Stk. 4. Vedtægt om udnyttelse af fangstret på fællig kan oprettes ved grandestævne. I en sådan vedtæge, kan fastsættes, at fangsten kun sker i mindre omfang, eller at der slet ikke foretages nogen fangst.

Stk. 5. Særskilt overdragelse af fangstret kan ske for indtil 5 år ad gangen

§ 7. Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, hava eigararnir (hagastýrini) heimild til at áseta samsýning fyri veiðurættindi.

2. stk. Slíkar inntøkur verða býttar millum hagarnar eftir markatalinum.

§ 7. Hvor ikke særlige retsforhold gør sig gældende, har ejerne (haugebestyrelserne) ret til at fastsætte betaling for fangstret.

Stk. 2. Sådanne indtægter fordeles mellem haugerne efter marketallet.

§ 8. Á sjónum út at fiskimarkinum er veiðurætturin við teimum avvikum, sum tilskilað eru í hesi lóg, opin fyri einum og hvørjum, sum hevur heimarætt.

§ 8. Fangst/jagtretten til søs ud til fiskerigrænsen er med de i denne lov fastsatte undtagelser fri for enhver, som har færøsk/dansk indfødsret.

Kapittul 3.
Um veiðutreytir.

§ 9. Tað er bert loyvt at veiða fugl til fólkaføði.

2. stk. Veiða má bert fara fram gerandisdagar.

3. stk. Føroya Landsstýri ásetir við kunngerð reglur um hagtøl yvir veiðuúrslit.

Kapitel 3.
Om fangst/jagtrettigheder.

§ 9. Det er alene tilladt at fange/nedlægge fugle til menneskeføde.

Stk. 2. Fuglefangst og -jagt er alene tilladt på hverdage.

Stk. 3. Færøernes Landsstyre fastsætter ved bekendtgørelse regler for statistik over fangst- og jagtresultater.

§ 10. Til fuglaveiðu má byrsa bert nýtast í báti.

2. stk. Til fuglaveiðu er bert loyvt at brúka høglbyrsu við hægst 2 skotum og størst kalibur 12.

§ 10. Til fuglejagt må skydevåben alene benyttes fra båd.

Stk. 2. Til fuglejagt er det alene tilladt at benytte haglgevær med højst 2 skud og størst. kaliber 12.

§ 11. Ongastaðni er loyvt at skjóta nærri landi enn 200 metrar.

2. stk. Við bygd øki má eingin skjóta nærri enn 500 metrar.

3. stk. Undir lomvigabjørgum (sambr. viðhefta kort) má eingin skjóta nærri enn 4 km frá 1. februar til og við 31. august.

4. stk. Undir ritubjørgum, lundaurðum/-londum, skarvaurðum og við æðuvørp má eingin skjóta í sama tíðarskeiði nærri enn 500 metrar frá 1. februar til og við 31. august.

5. stk. Undir súlubjørgum (sí viðhefta kort) má eingin skjóta nærri enn 4 km frá 1. februar til og við 31. august.

§ 11. Det er ingen steder tilladt at skyde nærmere land end 200 meter.

Stk. 2. Ved bebygget område må ingen skyde nærmere end 500 meter.

Stk. 3. Under fuglebjerge, hvor lomvier yngler (jfr. vedlagt kort) må ingen skyde nærmere end 4 km fra 1. februar til og med 31. august.

Stk. 4. Under fuglebjerge, hvor rider yngler, lundeurer og -lande, skarveur og ved rugepladser for edderfugle må ingen skyde nærmere end 500 meter fra 1. februar til og med 31. august.

Stk. 5. Under fuglebjerg, hvor sulen yngler (se vedlagte kort), må ingen skyde nærmere end 4 km fra 1. februar til og med 31. oktober.

§ *12.* Undir frammanfyri nevndu treytum er tað loyvt at veiða hesi fuglasløg og taka ungar/pisur og ogg teirra soleiðis:

Havhestur/náti: Havhestur kann fleygast alt árið og skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at ræna og taka ungar.

Skráður: Líri kann takast við ljósi frá 26. august til og við 5. september á ávísum plássum eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni.

Súla: Grásúla kann takast á ávísum rókum í Mykinesihólmi eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni.

Skarvur: Skarvsungi kann takast á reiðri á ávísum plássum eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni og skjótast frá 1. september til og við 31. oktober.

Likka: Likkuskuri kann skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at ræna og taka ungar.

Fiskimási: Másaskuri kann skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er at taka egg og ungar.

Bakur: Bakaskurði kann skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at ræna og taka ungar.

Rita: Rita kann fleygast alt árið og skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at taka egg og ungar.

Lomvigi: Lomvigi kann skjótast frá 1. september til og við 14. mars. Loyvt er at ræna til og við 8. juni í ávísum bjørgum eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni.

§ *12.* På foran anførte betingelser er det tilladt at fange/skyde følgende fuglearter og tage fugleunger og æg således:

Malemukken: Malemukken kan flejes hele året og kan skydes i tiden fra 1. september til og med 30. april. Det er også tilladt at tage dens æg og unger.

Skåpen: Skrápeunger kan tages med lys i tiden fra 26. august til og med 5. september på visse steder efter tilladelse fra Færøernes Natturmuseum.

Sulen: Grásulen kan tages på visse fjeldhylder i Mykines Holm efter tilladelse fra Færøernes Naturmuseum.

Skarven: Skarveungen kan tages på reden på visse steder efter tilladelse fra Færøernes Naturmuseum og kan skydes i tiden fra 1. september til og med 31. oktober.

Sildemågen: Sildemågeungen kan skydes i tiden fra 1. september til og med 30. april. Det er også tilladt at tage dens æg og unger.

Sølvmåge: Sølvmågens unge kan skydes i tiden fra 1. september til og med 30. april. Det er også tilladt at tage dens æg og unger.

Svartbag: Svartbagens unge kan skydes i tiden fra 1. september til og med 30. april. Det er også tilladt at tage dens æg og unger.

Riden: Riden kan flejes hele året og skydes i tiden fra 1. september til og med 30. april. Det er også tilladt at tage dens æg og unger.

Lomvien: Lomvien kan skydes i tiden fra 1. september til og med 14. marts. Det er tilladt at tage dens æg i tiden til og med 8. juni i visse fuglebjerge efter tilladelse fra Færøernes Naturmuseum.

Lundi: Lundi kan fleygast frá 24. juni til og við 31. august og skjótast frá 1. september til og við 14. mars. Dráttur kann, undir serligum umstøðum fara fram eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni, tó bert 3. hvørt ár í sama fuglalendi.

§ *13.* Føroya Náttúrugripasavn hevur heimild til í vísindaligum endamáli til at geva undantaksloyvi frá §§ 10 til og við 12.

Kapittul 4.
Eftirlit, revsing og nær lógin kemur í gildi.

§ *14.* Vaktar- og Bjargingartænastan hevur á sjónum eftirlit við, at lógin verður hildin og hevur rætt til uttan rættarúrskurð at fara umborð á bátar at gera neyðugar kanningar.

§ *15.* Uttan so at harðari revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars, kemur hann undir bót, hefti ella fongsul upp í 2 ár, sum brýtur reglurnar í § 2, stk. 1, §§ 3-4, § 9, stk. 1-2, § 10 og §§ 11-12.

2. stk. Í reglum, ið verða givnar við heimild í hesi lóg, kann verða ásett sekt fyri brot á reglurnar.

3. stk. Er brotið framt av partafelag, lutafelag ella tílíkum, kann bót verða áløgd felagnum í sjálvum sær.

§ *16.* Málini fara fram sum løgreglumál. Tey í rættargangslógini kap. 68 *(at leggja hald á)*, *kap. 71 (handtøka)*, kap. 72 *(fongsling)* nevndu tiltøk koma tó eisini í nýtslu á sama hátt sum í málum, sum statsákærin søkir at.

Lunde: Lunden kan flejes i tiden fra 24. juni til og med 31. august, og skydes i tiden fra 1. september til og med 14. marts. Trækning kan under særlige omstændigheder ske efter tilladelse fra Færøernes Naturmusæum, dog kun hvert 3. år i samme lundeland.

§ *13.* Færøernes Naturmusæum har bemyndigelse til i videnskabelige øjemed at give dispensation fra §§ 10 til og med 12.

Kapitel 4.
Tilsyn, straf og ikrafttræden.

§ *14.* Vagt- og Bjærgningstjenesten fører på søen tilsyn med, at loven overholdes og har ret til uden retskendelse at gå ombord i både for at foretage fornødne undersøgelser.

§ *15.* Medmindre højere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning straffes med bøde, hæft eller fængsel indtil 2 år den, der overtræder bestemmelserne i § 2, stk. 1, §§ 3-4, § 9, stk. 1-2, § 10 §§ 11-12.

Stk. 2. I forskrifter, der udstedes i medfør af denne lov, kan fastsættes straf af bøde for overtrædelse af forskrifterne.

Stk. 3. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges selskabet som sådant.

§ *16.* Sagerne behandles som politisager. De i retsplejelovens kap. 68 *(konfiskation)*, kap. 71 *(anholdelse)* og kap. 72 *(fængsling)* nævnte foranstaltninger tages også i anvendelse i lighed med statsadvokatsager.

§ *17.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
2. stk. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., sum hon er broytt við løgtingslógunum nr. 33 frá 7. juni 1972, nr. 44 frá 24. mai 1974, nr. 60 frá 5. juni 1984, nr. 33 frá 16. apríl 1986 og nr. 81 frá 14. august 1987.

§ *17.* Denne lov træder i kraft dagen efter at den er bekendtgjort.
Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v., som den er ændret ved lagtingslovene nr. 33 af 7. juni 1972, nr. 44 af 24. maj 1974, nr. 60 af 5. juni 1984, nr. 33 af 16. april 1986 og nr. 81 af 14. august 1987.

Viðmerkingar:

Samandráttur:

Lógin er gjørd einfaldari, raðfylgjan í innihaldinum er umskipað. Tí er torført at samanbera broytingarnar beinleiðis. Tær týdningarmiklastu broytingarnar eru viðgjørdar undir viðmerkingunum til tær einstøku greinirnar, har størsti dentur tó er lagdur á at greiða frá tí nýggja í lóggini.

Fyri at vísa á broytingarnar, sammett við núverandi lóg, sum helst hava áhuga, eru lagdar hjá tvær talvur, sum vísa, hvørjir fulgar kunnu skjótast, og nær teir kunnu skjótast. Eitt av høvuðsendamálunum hjá nevndini var, at skipa so fyri, at bannað er at skjóta á sumri.

Minsta frástøðan frá bergjnum, tá skotið verður, er stytt frá 3 fjórðingum (5.556 m) til 4 km, meðan tíðin, bjørgini eru friðað, er longd 1½ mánað (frá 15. mars - 31. august til 1. februar - 31. august). Tað er tó ongantíð loyvt at skjóta nærri enn 200 m úr landi og 500 m frá bygdum øki. Hetta er nýtt, og gevur fuglinum frið fram við landi og í fjøruni, samstundis sum fuglurin eisini fær frið inni á flestu firðum og havnum.

Frágreiðing um nevndararbeiðið:

Í skrivi dagfest 21. apríl 1986 setti Føroya Landsstýri eina nevnd at endurskoða fuglaveiðulógina, og nevndin er nú komin ásamt um eitt lógaruppskot aftan á at eitt fyribils uppskot hevur verið til ummælis hjá ymiskum stovnunum, feløgum og einstaklingum, sum nevndin metti høvdu serligan áhuga í hesum máli. Í nevndini sótu Óla Jákup Hentze, Skúvoy, Marni av Kák, sýslumaður, Miðvági, og Bergur Olsen, fuglafrøðingur, Vestmanna.

Tað, sum stendur niðanfyri, er samandráttur av viðmerkingunum hjá nevndini.

Fyrsta lógin á hesum øki er frá 9. februar 1854, og var hon ropt »Jagtlov for Færøerne«. Undan hesi lóg kenna vit ávísar friðlýsingar av fuglabjørgum v.m., ið teir, sum ognarrætt høvdu, fingu sett í verk. Friðlýsingarnar blivu vanliga lýstar á vártingi og tær kundu t.d. veru ein friðing ímóti ávísum veiðiháttum ella ein avmarking av rættinum til veiðu á ávísum støðum.

Í 1700-talinum fór nýtslan av byrsu at vinda upp á sig, og hetta eru nevndu friðlýsingar eisini merktar av. Klagurnar um, at skjótingin undir fuglabjørgum og aðrastaðni órógvaði fuglin og stygdi hann, førdi við sær, at fyrsta lógin um fuglaveiðu kom í gildi 1854. Lógin heimilaði friðlýsingar, sum í rættiliga stórum tali blivu tinglýstar, og enn tann dag í dag verða hesar gomlu friðlýsingar lisnar upp á grannastevnum.

1854-lógin fekk broytingar og uppískoyti í 1871, 1881, 1887 og 1891, til vit fingu eina nýggja veiðilóg í 1897. Ein endurskoðan afturat førdi við sær »Lov for Færøerne om jagt og fuglefangst« í 1928. Aftur í 1954 fingu vit eina endurskoðaða fuglaveiðilóg, sum síðani er broytt í 1972, 1974, 1984, 1986 og 1987.

Fuglur, serliga lomvigi og lundi, hevur verið ein týðandi partur av tí dagliga kostinum, men lomvigatalið er minkað ógvuliga nógv seinastu 25 árini. Havhesturin er harafturímóti nørdur nógv, og er nú okkara týdningarmiklasti fuglastovnur, sum vit veiða á ein fyrimyndarligan hátt.

Veiða í bjørgum er fyri tað mesta dottin niður fyri og verður at kalla sum ein leivd av okkara gomlu mentan, ið eigur at verða varðveitt sum best, og í øðrum lagi ber ferðil av ítrótti í sær.

Veiða við byrsu hevur frumvegis stóran áhuga, men hetta er ein vandamikil veiðiháttur, sum má stýrast, tí teir, sum veiða fugla á sjónum, hava lítlan møguleika at fylgja við, hvussu stovnurin broytist og tí eisini hvussu nógva veiðu hann tolir.

Kjakið um broytingar í veiðilógini seinastu 15 árini hevur serliga verið um hvørt lomvigin skuldi friðast ella ikki, men prógv eru nú fingin fyri, at stovnurin ikki tolir veiðu á sumri.

Í okkara grannalondum verður dentur lagdur á at veiða tey fuglasløg, sum verpa fleiri egg um árið og soleiðis kunnu nørast skjótt. Hetta er í nógvum førum antarfuglar, heiðafuglar og høsnafuglar, sum vit ikki hava møguleika at veiða.

Um vit skulu veiða fugl, so hava vit bert sjófuglin at taka av, og sjálvt um stovnarnir eru stórir, so mugu vit vera ógvuliga varnir, tí okkara týdningarmiklastu fuglar fáa í mesta lagi ein unga upp á parið á hvørjum ári, og bert ein lítil partur av hesum ungum eru á lívi, tá teir fleiri ára gamlir verða kynsbúnir.

Tann fuglur, sum verður veiddur, má tí røkjast á skynsamasta hátt, har búfuglurin fær so góðan frið sum gjørligt, meðan dentur verður ladur á at veiða tann unga fuglin.

Náttúran hevur stórt rekreativt virði og fyri at varðveita fuglastovnin so náttúrligan sum gjørligt, halda vit, at teir stovnar, ið ikki verða veiddir til matna, skulu hava frið, sjálvt um t.d. smyril, ravnur, kráka og másasløgini taka ein part av teirra føði av øðrum fuglastovnum. Hetta er heilt náttúrligt, og nú flakavirkini eru farin at nýta slógvið til djórafóður, og ruskplássini minka í tali, fer másastovnurin av sær sjálvum at koma niður á eitt meira náttúrligt støði.

Við hesum í huga hevur nevndin gjørt eitt nýtt lógaruppskot, har reglurnar samstundis eru gjørdar einfaldari, so t.d. tær núgaldandi friðlýsingarnar ikki

eru neyðugar, og skotið er upp, at Føroya Náttúrugripasavn fær heimild at umsita lógina — harundir at gera undantøk í ávísum førum.

Landsstýrið hevur undir viðgerðini av uppskotinum gjørt ta broyting, at § 11 er tikin burtur úr uppskotinum hjá nevndini. Henda grein setti reglur um skjótiloyvi og reynd fyri at fáa skjótiloyvi. Viðmerkingarnar hjá nevndini til hetta uppskot eru tó varðveittar í viðmerkingunum til einstøku greinirnar fyri at kunna løgtingið um sjónarmiðini hjá nevndini.

Annars ganga broytingar, sammett við galdandi lóg, fram av viðmerkingunum til einstøku greinirnar.

Landsstýrið leggur dent á, at hetta uppskot kemur frá nevnd, sum skuldu hava bestu møguleikar at mett um støðuna í føroyskari fuglaveiðu í dag. Nevndin hevur biðið um og fingið viðmerkingar frá einstaklingum, felagum og stovnum, sum hava serliga áhuga í hesum máli, og tikið hesar viðmerkingar við í lógaruppskotið.

— — —

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Ad 4 I:

Í núgaldandi lóg er haran tikin við, men skotið verður upp, at komandi lóg bert skal umfata fugl, og her verður bert hugsað um villan fugl. Friðingin er sett fyrst í yvirskriftini av tí at hildið verður mest umráðandi at lógin virkar sum vernd av fuglinum. Ein serstøk lóg fyri haruveiðu verður løgd fyri løgtingið.

Ad § 2, stk. 1:

Við hesi reglu verður í fyrsta lagi hugsað um, at sjúkur fuglur ikki verður fluttur inn og í øðrum lagi at varðveita fulgastovnin, sum hann er frá náttúruni av. Tað skal ikki vera loyvt, uttan serligt loyvi, at flyta inn fugl, t.d. havørn og hipling, við útseting fyri eyga og soleiðis broyta tað náttúrliga fuglalívið.

Ad § 3, stk. 2:

Henda reglan er sett sum ein eyka vernd fyri tey fuglaslóg, sum eru fáment, og tí heilt kunnu hvørva, um tey ikki fáa frið at reiðrast.

Ad § 4, stk. 1:

Allar fuglakanningar skulu skrásetast, so almenningurin veit, hvørjar kanningar fara fram, og Føroya Náttúrugripasavn skal hava høvi at samskipa kanningar, ið órógva fuglin, so fuglurin verður órógvaður minst møguligt.

Ad § 5, stk. 2:

Her verður hugsað um kráku, ravn, skúgv og másasløgini, sum í gomlu lógini vórðu loyvd at veiða fyri at minka um stovnarnar. Burtursæð frá skúgvastovn

inum, sum tíverri er avoyddur í støðum, hevur hetta veiðiloyvið ikki havt nakra ávirkan á stovnsstøddirnar. Stovnarnir eru ikki størri enn so, at ein stýring kann fremjast. Td. verður mett, at bert eini 250 skúgvapør, eisni 150-300 ravnapør og 500 krákupør eiga her. Másasløgini eiga í stórum bølum, sum eru væl kend, og her kann tí lættliga verða minkað um talið.

Ad § 9, stk. 3:

Tað hevur stóran týdning fyri eftirlitið við stovnsbroytingum og veiðitrýstinum, at veiðimenn eina ferð á hvørjum ári boða frá veiðinøgdini. Hetta er samsvarandi reglunum frá 1986 um treytirnar fyri ræning av lomvigareggum.

Ad § 10, stk. 1:

Saman við § 11 gevur henda reglan fuglinum frið alla staðni á landi og minst 200 m út á sjógv. Harafturat verjir hon ímóti, at fuglur verður skotin frá landi og dettur niður á sjógv, kanska lamskotin, har møguleiki ikki er fyri at fáa hendur á honum.

Ad § 11 í nevndaruppskotinum. Landsstýrið hevur tikið greinina burturúr.

Hugsanin um skjótiloyvi var eisini frammi í 1928, tá veiðilógin var til viðgerðar í løgtinginum, men uppskotið kom ikki við. Í Danmark og Noregi hevur skjótiloyvi verið kravt í nógv ár.

Aðrastaðni skulu fólk standa eina lætta roynd fyri at fáa skjótiloyvi. Tey, ið hava byrsu, áðrenn kunngerðin um skjótiloyvi verður sett í gildi, eiga at fáa skjótiloyvi uttan roynd, um tey boða frá innan ávísa tíðarfreist. Vanliga verður eitt lítið gjald latið fyri skjótiloyvið á hvørjum ári, sum m.a. umfatar eina ábyrgdartrygging. Harafturat tryggjar royndin, at teir, sum skjóta fugl, duga at handfara eina byrsu og kenna fuglarnar.

Fyri at fáa so álítandi veiðihagtøl sum gjørligt, skal ein ikki kunna keypa lóður uttan skjótiloyvi, og tað skal ikki kunna endurnýggjast fyrr enn veiðitølini eru latin inn.

Ad § 11.

Tær her uppsettu reglur avloysa tær friðlýsingar av fuglabjørgum, urðum, æðuvørpum o.t., sum vit hava havt heimild til í teim gomlu veiðulógunum. Hesar friðlýsingar umfataðu meginpartin av landinum, men kortini eru fuglapláss, t.d. Tindhólmur og Koltur, ið ikki er friðlýst. Sum § 12 nú er skrivað, eru hesi eisini pláss vard.

Frástøðan, ein skal vera frá bygdum øki og fuglabjørgum, tá skotið verður, er tann sama, um ein er beint út fyri ella um ein er við síðuna av, soleiðis at ein t.d. ongantíð loysir skot av nærri enn 4 km frá eini lomvigarók. Í núgaldandi lóg nýtist ein bert at vera hálvfjróðing frá, sum ein kemur fram við landi.

Til § 12.

Við hesi grein verður roynd at skipa veiðuna á skynsamasta hátt, soleiðis at mest fæst burtur úr teimum stovnum, sum tola veiðu, meðan restin fær frið. Tað skaðar stovnin minst, at ungur fuglur verður veiddur fram um búfugl.

Orsøkin til, at ein skal hava loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni til at veiða av ymsum fuglastovnum er, at summi pláss eru so smá, at tey ikki tola veiðu. Harafturat er tað lættari at hava eftirlit við hagtølunum, tá ein veit, hvør hevur verið á veiðu, tí øll veiða skal skrásetast, ikki bert tann sum fæst við byrsu.

Grundarlagið fyri, hvørjir fuglar kunnu veiðast, er støddin á stovnunum, men harafturat er hugsað um, at tey fuglasløg, sum verpa fleiri egg (másasløgini og skarvurin), tola lutvíst størri veiðu enn tey, sum bert verpa eitt (havhesturin, skrápurin, súlan, lomvigin, álkan og lundin). Tá stovnar eru í minking, sum t.d. lomviga- og álkustovnurin, má ein vera sera varin við veiðu.

Havhestur: Fleiri 100.000 pør. Sjálvt um veiðan er stór, nærist stovnurin framvegis.

Skrápur: 10.000 - 15.000 pør. Í summum plássum eiga bert nøkur fá pør, og hesi eiga at fáa frið.

Súla: 2.000 pør. Súla er nørd nógv um okkara leiðir, men á Mykineshólmi og á Mykinesi er bert ein lítil vøkstur. Hetta er tann stovnurin, sum hevur havt størsta veiðitrýsti, tí størsti parturin av ungunum hevur verið tikin. Um veiðitrýstið ikki hevur verið stórt, kundi tað hend, at súla hevði tikið nýtt berg.

Skarvur: Nøkur 1.000 pør. Av tí at ein skal vera minst 200 m frá landi, eru møguleikarnir fyri at veiða skarv minkaðir munandi, og tí kundi tíðin verið longd ein mánað, so loyvt varð at skjóta frá 1. september til og við 30. november.

Másasløgini: Lítið verður vanliga skotið av másasløgunum, og tí loyva vit veiðu av teimum stovnum, sum eru o.u. 1.000 pør og størri. Likka 9.000 pør, fiskimási 1.200 - 1.500 pør, hakur 900 - 1.000 pør og rita 230.000 pør.

Lomvigi: 175.000 pør. Lomvigastovnurin er minkaður o.u. 70-90% seinastu 30 árini, og teljingar í summar vístu, at stovnurin nú er komin niður á o.u. 175.000 pør. Veiða hevur ikki alla skuldina, men friðingin á sumri tykist at hava hjálp uppá støðuna, so minkingin ikki er sto stór sum árini frammanundan.

Ringmerkingar frá 1970-árunum vísa, at tað, sum verður skotið um veturin, mest er ungur fuglur, meðan búfuglurin bleiv skotin frá fyrst í apríl.

Áðrenn lomvigin bleiv friðaður, varð mest skotið um summarið, men nú hann hevur verið friðaður á sumri, er rættiliga nógv blivið skotið í februar og mars. Skotið verður tí upp at leingja friðingina ein hálvan mánað, so loyvt er at skjóta til og við 14. mars, men best hevði verið, um lomvigin varð friðaður allan mars mánað.

Álka: 5.000 pør. Álkan hevur higartil verið veidd í sama tíðarskeiði sum lomvigin, men av tí at stovnurin er so lítil, mæla vit frá at veiða álku.

Fyrr var álka tann svartfuglur, sum nógv mest bleiv skotið av um veturin, men hon er minkað nógv í tali, og er nú bert ein lítil partur av vetrarveiðini. Um tað

bert er føroysk álka, sum er undir Føroyum á vetri, so hevur stovnurin verið troyttur alt ov nógv.
Lundi: Fleiri 100.000 pør. Ongar stórvegis broytingar hava verið í stovninum seinastu árini.

Að § 15.
Um Vaktar- og Bjargingartænastan hevur eftirlit við fuglaveiðuni á sjónum vóna vit, at lógin verður hildin munandi betur.

Sí Skjøllni 17 A-D

1. viðgerð 20. apríl. Uppskot um at beina málið í landbúnaðarnevndina fall við 1-0. Málið varð síðani beint í umhvørvisnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 2. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 20. apríl 1988 beint í umhvørvisnevndina.
Nevndin hevur viðgjørt málið og skal gera vart við, at hetta er eitt ógvuliga stórt mál, sum nevndin ikki metir seg føra fyri at gera liðugt í hesi tingsetu.
Ein samd nevnd mælir tí tinginum til, at umhvørvisnevndin sum millumtinganevnd arbeiðir víðari við málinum og leggur fram álit á Ólavsøku.
Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at umhvørvisnevndin sum millumtingnevnd arbeiðir við løgtingsmáli nr. 62/1987: Løgtingslóg um fuglaveiðu og, leggur nevndin álit fyri løgtingið á Ólavsøku.

2. viðgerð 4. mai. § 1 samtykt við 24-0. §§ 2-4 samtyktar við 24-0, § 5 við 17-0, § 6 við 21-0, §§ 7-9 við 23-0, § 10, 1. stk. fall við 6-0, 2. stk. við 16-0, § 11, 1. og 2. stk. fullu við 10-0, 3. stk. samtykt við 24-0, § 12 fall við 15-0. Uppskotið til samtyktar frá umhvørvisnevndini samtykt við 31-0.

F.L. j.nr. 610-9-2.

63 Partapeningur í P/F Kovan, (28/11-1986), Sandavági.

Ár 1988, hósdagin 25. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um partapening í P/F Kovan, (28/11-1986), Sandavági.

lagtingslov om aktier i P/F Kovin, (28/11-1986), Sandavágur.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 200.000 kr. í partapeningi í P/F Kovan, (28/11-1986), Sandavági, og at leggja út peningin úr landskassanum.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i P/F Kovin, (28/11-1986), Sandavágur, med et beløb på 200.000 kr. og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ *2.* Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin, fyrrenn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.

§ *2.* Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales, før alle betingelser, landsstyret skulle stille, er opfyldt.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ *3.* Denne lov træder i kraft dagen efter, den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

P/F Kovin (28/11-1986), Sandavági, hevur til endamáls at reka niðursjóðingarvirki v.m.

Felagið keypti 28. november 1986 ognirnar hjá Kovanum, sum Menningargrunnurin hevði keypt á tvingsilssølu.

Keypsprísurin var 8,4 mió. kr. og bleiv keypið fíggjað á tann hátt, at felagið yvirtók lán frá Menningargrunninum uppá 7,9 mió. kr. og rindaði kontant 500.000 kr.

Roknað verður við at framleiða 1,6 mió. blikk á 200 gr. í 1988 og koma eini 10 fólk at arbeiða á virkinum.

Ætlanin er, at partapeningurin skal vera 1 mió. kr.

Teknaðar eru 728.000 kr. av íbúgvunum í Vágum.

Søkt verður um, at landskassin teknar 20 % av samlaða partapeninginum.

Skotið verður upp, at landskassin setur hægst 20% av partapeninginum, tó hægst 200.000 kr., í felagið.

1. viðgerð 22. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 25. februar 1988 og eftir 1. viðgerð beint í fíggjarnevdina.

Sambært løgtingslóg nr. 12 frá 27. februar 1987 kann landið keypa rogn og selja aftur til P/F Kovan, Sandavágur.

Løgtingslógin loyvir keyp av rognum fyri upp til 8,5 mill. kr.

Landsstýrið upplýsir at í fjør vár, vóru keypt tilsamans 529 tons av rognum fyri umleið 8,4 mill. kr. Av teimum liggja umleið 493 tons á goymslu ymsa staðni í landinum, sum tað skal gjaldast kuldaleiga fyri.

Annars verður upplýst, at Kovin hevur framleiðsluætlan (kontrakt), hvar nýtast skulu 140 tons av rognum. Men hetta er ætlanin er klára í rognatíðini nú úr feskum rognum, sum skuldu keypast í vár.

Grundin til hetta var, at hesi rogn kundu fáast bíligari enn tey, sum vórðu keypt í fjør.

Upplýsingar frá Fiskasøluni siga at eingin søla av rognum fer fram í løtuni hjá teimum, og at limir hjá Fiskasøluni liggja inn við 260 tonsum av frystum toska- og upsarognum, ið ikki eru seld.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Ashjørn Joensen og Adolf V. Hansen) heldur, at her er fyri neyðini at gera nærri kanningar og mælir til, at fíggjarnevndin, ið er millumtinganevnd fær loyvi frá tinginum at arbeiða víðari við málinum.

Uppskot

til

samtyktar

Fíggjarnevndin verður heimilað at arbeiða víðari við løgtingsmáli nr. 63 og leggja málið fram aftur í komandi tingsetu.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Svend Aage Ellefsen og Olaf Olsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

5. mai løgdu tingmenninir Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Asbjørn Joensen og Adolf V. Hansen fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

Orsakað av at nýggir spurningar hava tikið seg upp í samband við viðgerðina av tingmáli nr. 63: Partapeningur í P/F Kovin, mæla undirritaðu tingmenn til, at málið verður viðgjørt av nýggjum av landsstýrinum. Út frá omanfyri nevnda seta fíggjarnevndarlimirnir Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Asbjørn Joensen og Adolf V. Hansen fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum til at viðgera tingmál nr. 63: Partapeningur í P/F Kovin av nýggjum og leggja málið fyri tingið í ólavsøkutingsetuni.

2. viðgerð 6. mai. Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í fíggjarnevndini fall við 16-0. Uppskotið til samtyktar í broytingaruppskoti frá Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Asbjørn Joensen og Adolf V. Hansen samtykt við 17-2 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1427-1-167.

64 Partapeningur í P/F Frostvirkið, Norðdepli.

Ár 1988, hósdagin 25. februar legði Vilhelm Johannsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið hesum soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um partapening í P/F Frostvirkið, Norðdepli.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at sega upp til 500.000 kr. í partapeningi í P/F Frostvirkið, Norðdepli, og at leggja út pening úr landskassanum.

§ *2.* Einki av tí í § 1 nevnda partapeningi verður teknað ella útgoldið, fyrrenn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om aktiekapital i P/F Frostvirkið, Norðdepli.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at tegne op til 500.000 kr. i aktiekapital i P/F Frostvirkið, Norðdepli, og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ *2.* Ingen del af det i § 1 nævnte aktiebeløb kan tegnes eller udbetales, før alle betingelser, landsstyret måtte stille, er opfyldt.

§ *3.* Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

P/F Frostvirkið, Norðdepli, hevur biðið um, at landskassin setir nýggjan partapening í felagið 500.000 kr., sum er 20% av ætlaða partapeninginum 2,5 mió. kr.

Núverandi teknaði partapeningurin er 2.171.500 kr. Herav hava Viðareiðis og Hvannasunds kommuna hvør teknað 917.000 kr.

Samstundis við nýtekningini av partapeningi fer ein umfigging fram.

Landsstýrið hevur treytað sær at fáa ein av teimum 5 nevndarlimunum.

Landsstýrið heldur tað vera rætt at stuðla virkinum og fremja bygdamenning soleiðis sum gjørt hevur verið á øðrum plássum og skjýtur upp at seta 500.000 kr. í partapeningi í virkið.

1. viðgerð 22. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 25. februar 1988 og eftir 1. viðgerð 22. mars 1988 beint í fíggjarnevndina.

Frostvirkið í Norðdepli hevur biðið um, at landskassin setir nýggjan partapening í felagið kr. 500.000,-, sum er 20% av ætlaða partapeninginum kr. 2.500.000.

Landsstýrið upplýsir í viðmerkingunum til lógaruppskotið, at teknaði partapeningurin er kr. 2.171.500, og hava Viðareiðis og Hvannasunds kommunur harav teknað kr. 917.000.

Viðari sigur landsstýrið, at samstundis við nýtekningini av partapeningi fer ein umfígging fram, og at landsstýrið hevur treytað sær at fáa ein av teimum fimm nevndarlimunum.

Sambært § 2 í lógaruppskotinum verður einki av tí í § 1 nevnda partapeningi teknað ella útgoldið, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi sett, eru loknar. Út frá hesum mælir ein samd fíggjarnevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 5. mai. § 1 samtykt við 29-0, § 2 við 31-0 atkvøðum. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1413-1-38. Lóg nr. 42 frá 20. mai 1988.

65 Løgtingslóg um útjaðarafiskavirkir.

Ár 1988, hósdagin 25. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um útjaðarafiskavirki.

lagtingslov om udkantsfiskevirksomheder.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at áseta, at fiskavirki eru útjaðarafiskavirki. Treytin er, at fiskavirkini liggja á plássum, har fiskavirking er týdningarmesta grundarlagið fyri løntum arbeiði á staðnum.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til med bekendtgørelse at foreskrive, at fiskevirksomheder kommer under benævnelsen udkantsvirksomheder. Betingelsen er, at fiskevirksomheder ligger på steder, hvor tilvirkning af fisk udgør den mest betydelige del af grundlaget for lønnet arbejdet på stedet.

§ *2.* Landsstýrinum verður heimilað at veita útjaðarafiskavirkjum stuðning, herundir flutningsstuðning og landingarstuðning og tíðaravmarkaðar stuðningar til umleggingar í framleiðsluni.

2. stk. Fiskavirki kunnu søkja landsstýrið um at koma undir skipanina í 1. stk. Landsstýrið fær saman við figgjarnevndina heimild til við kunngerð at áseta, hvørji pláss koma undir hetta heiti.

3. stk. Stuðningur eftir hesi lóg verður ásettur av nevndini fyri stuðningi til fiskivinnuna, sett eftir løgtingslóg nr. 31 frá 29. mai 1985 um stuðning til fiskivinnuna og verður borin av landskassanum.

§ *2.* Landsstyret bemyndiges til at yde udkantsvirksomheder tilskud, herunder transporttilskud og lossetilskud og tidsbegrænsede tilskud til omlægninger i produktionen.

Stk. 2. Fiskevirksomheder kan ansøge landsstyret om at komme under ordningen i stk. 1. Landsstyret bemyndiges til sammen med lagtingets finansudvalg med bekendtgørelse at foreskrive hvilke steder, der kan komme under denne betegnelse.

Stk. 3. Tilskud efter denne lov bliver fastsat af nævnet for støtte til fiskerierhvervet, udnævnt ifølge lagtingslov nr. 31 af 29. maj 1985 om støtte til fiskerierhvervet, og udgifterne afholdes af landskassen.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 50 frá 28. mai 1984 um stuðning til fiskavirkir.

§ *3.* Denne lov træder i kraft. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 50 af 28. maj 1984 om støtte til fiskerivirksomheder.

Viðmerkingar:

Flakavirkini í útjaðaraøkjunum hava serligar trupulleikar at takast við. Higartil hevur studningur verið givin til tær eykaútreiðslur, sum standast av at flyta fisk til útflutningshavn. Í løtuni fer fram ein miðsavnan í flaka- og fiskavirkisídnaðinum. skip verða keypt frá einum plássi til annað og við teimum reglum, sum eru fyri útskifting av skipum og fiskiloyvum, merkir hetta, at meira av rávøruni verður drigin til tey større flakavirkini. Tað kann tí av bygdamenningarpolitiskum orsøkum vera neyðugt at gera størri mun á útjaðarafiskavirkjum og øðrum virkjum, enn higartil hevur verið gjørt í almennu studningsskipanini við núgaldandi løgtingslóg um útjaðarafiskavirki.

Uppskotið gev tað møguligt at geva tíðaravmarkaðan studning til umleggingar í framleiðsuni. Her verður serliga hugsað um, at útjaðaraflakavirkini við at viðgera serlig fiskasløg ella fara undir serligar framleiðslur kunnu fáa eitt trygt fíggjarligt støði at standa á.

Hetta kann vera ein hjálp til at andøvt verður ímóti, at útjaðaraplássini verða við sviðið soð í tí umlegging av føroyskari fiskivinnu, sum nú fer fram.

Eisini kann gerast møguleiki fyri avmarkaðari fiskavirking, t.d. salting á smáplássum, har bert smábátaútróður er møguligur.

1. viðgerð 22. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum hin 25. februar 1988 og eftir 1. viðgerð 2. mars 1988 beint í fíggjarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Í samband við broytingarnar, ið eru gjørdar í lógini um ráfiskagrunn, heldur fíggjarnevndina at hetta uppskotið eigur at fáa gjøllari viðgerð.

Samd nevnd mælir tí tinginum til at beina málið aftur til landsstýrið til viðgerðar og at leggja málið fram aftur í ólavssøkutingsetuni.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingsmál nr. 65: Løgtingslóg um útjaðaravirkir, verður beint í landsstýrið til gjøllari viðgerð.

2. viðgerð 5. mai. Uppskotið til samtyktar frá fíggjarnevndini samtykt við 26-0 atkvøðum.
F.L. j.nr. 1413-8.

66 Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

Ár 1988, týsdagin 1. mars legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir v.m.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1988 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip, fiskavirkir og smolt- og alibrúk, sum eru komin í fíggjarligu trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsuphæddin má ikki fara upp um 25. mió. kr.

§ *2.* Treytirnar, fyri at veðhald kann verða veitt, eru hesar:

1. At líkindi eru til, at raksturin framyvir eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera seg.

2a. Har talan er um fiskavirkir ella smolt- og alibrúk, at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av veðhildna láninum og at fingin verða onnur lán, sum í minsta lagi eru 15% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, og sum ikki kunnu krevjast afturgoldin yvir stytri áramál enn áramálið fyri tey lán, landskassin veðheldur fyri. Landsstýrinum er í serligum førum, har talan er um fiskavirki á smáplássi, heimilað at víkja frá regluni um 15% kravið.

lagtingslov om garanti for lån til fiskeskibe og fiskerivirksomheder m.v.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1988 at garantere for lån til fiskeskibe, fiskerivirksomheder og smolt- og fiskeopdrætsanlæg, der er kommet i driftsvanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 25. mio. kr.

§ 2. Betingelserne, for at garanti ydes, er disse:

1. At der er udsigt til, at driften fremover efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.

2a. Hvor det drejer sig om fiskerivirksomheder eller smolt- og fiskeopdrætningsanlæg, at egenkapitalen forhøjes med mindst 10% af det garanterede lån, og at andre lån tilvejebringes for mindst 15% af det beløb, der er nødvendigt til forsættelse af driften, og som ikke kan kræves tilbagebetalt over et kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke landskassen garanterer i henhold til denne lov. Hvor der er tale om fiskerivirksomhed på småpladser bemyndiges landsstyret til under særlige omstændigheder af fravige kravet om 15%.

2b. Har talan er um fiskiskip, har partafelag er ognari, at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av veðhildna láninum.

2c. Har talan er um fiskiskip, har einstaklingur, partsreiðarar ella líknandi og ognarar, at inngoldið er í minsta lagi út yvir kravda eginpeningin spardur skattur, sum stavar frá avskriving upp á skipið skattaárini 1982/83, 1983/-84, 1984, 1985 og 1986 og at nýinngoldin verða 10% av veðhildna láninum.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

2b. Hvor der er tale om fiskeskibe, der tilhører et aktieselskab, at egenkapitalen forhøjes med mindst 10% af det garanterede lån.

2c. Hvor der er tale om fiskeskibe, hvor enkeltpersoner, partsredere eller lignende er ejere, at det er indbetalt ud over den krævede egenkapital mindst sparet skat, som stammer fra afskrivning på skibet skatteårene 1982/83, 1983/-84, 1984, 1985 og 1986, og at nyindbetalt bliver 10% af det garanterede lån.

§ *3.* Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Eftir løgtingslóg nr. 13 frá 27. februar 1987 um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, tey sonevndu kreppulánini, jbr. løgtingsmál nr. 41/1986, er lógin galdandi í fíggjarárinum 1987.

Tilsagnir eftir hesi lóg eru givnar fyri 5,2 mió. kr. og umsóknir eru um 8,4 mió. kr.

1. viðgerð 19. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 1. mars 1988 og eftir 1. viðgerð tann 19. apríl 1988 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og metir ein samd fíggjarnevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 28. apríl. § 1 varð samtykt við 25-0 atkvøðum, § 2 við 25-0. Við 25-0 varð samtykt, at málið skuldi fara saleiðis til 3. viðgerð.

3. viðgerð 3. mai. Lógin soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum,

F.L. j.nr. 1413-5-1. Lóg nr. 34 frá 20. mai 1988.

67 Løgtingslóg um megin-, fólka- og skúlabókasøvn.

Ár 1988, týsdagin 1. mars legði Lassi Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um megin-, fólka- og skúlabókasøvn.

Kapittul 1
Endamál

§ *1.* Bókasøvn hava til endamáls at fremja upplýsing, lærdóm og mentunarvirksemi.

2. stk. Til hetta hava bókasøvnini til taks bøkur og annað hóskandi tilfar, sum verður lænt út uttan viðurgjald.

lagtingslov om central-, folke- og skolebiblioteker.

Kapitel 1
Formål

§ *1.* Bibliotekernes formål er at fremme oplysning, lærdom og kulturelle aktiviteter.

Stk. 2. Dertil har bibliotekerne til disposition bøger og andet egnet materiale, som udlånes vederlagsfrit.

Kapittul 2
Meginbókasøvn

§ *2.* Landið verður skipað í 7 meginbókasavnsdømi, og í hvørjum dømi verður eitt væl útgjørt meginbókasavn, ið sum fólkabókasavn tekur sær av bókasavnstænastuni á staðnum, og sum meginbókasavn tekur sær av bókasavnstænastuni í meginbókasavnsdøminum, um ikki annað er avrátt.

2. stk. Fyri hvørt meginbókasavn verður skipað ein meginbókasavnsnevnd, ið hevur ábyrgdina av rakstrinum av meginbókasavnsnevnd, ið hevur ábyrgdina av rakstrinum av meginbókasvninum. Nevndin hevur 3, 5 ella fleiri limir, men altíð stakt tal, eftir avgerð hjá bý/bygdaráðunum í døminum og verður vald av og samansett av umboðum úr hesum ráðum, soleiðis at bý/bygdarráðið, har meginbókasavnið er, altíð hevur í minsta lagi 1 lim í nevndini, meðan hinir limirnir verða valdir uppá skift millum bókasavnsnevndirnar í døminum, samanber § 3, stk. 2.

3. stk. Í øllum meginbókasøvnum skal leiðarin vera útbúgvin bókavørður við fullum arbeiðstímatali, og honum til hjálpar skal verða sett annað neyðugt starvsfólk.

4. stk. Landsstýrið kann gera frávik frá stk. 3 eftir tilmæli frá bókasavnsstjóranum, samanber § 11, og bókavarðafelagnum.

5. stk. Leiðarar á meginbókasøvnunum mynda í felag eitt bókasavnsráð, ið viðger mál innan bókasavnsverkið og hevur fund í minsta lagi 2 ferðir um árið. Ráðið ásetir sjálvt reglugerð fyri virki sítt.

Kapitel 2
Centralbiblioteker

§ *2.* Landet opdeles i 7 centralbibliotekdistrikter, og i hvert distrikt skal det være et velforsynet centralbibliotek, der som folkebibliotek tager sig af bibliotekstjenesten på stedet, og som centralbibliotek tager sig af bibliotekstjenesten i distriktet, når andet ikke er aftalt.

Stk. 2. For hvert centralbibliotek nedsættes et centralbiblioteksudvalg, der har ansvaret for driften af centralbiblioteket. Udvalget har 3-5 eller flere medlemmer, men altid ulige antal, efter afgørelse af by/bygderådene i distriktet, og vælges af og sammensættes af repræsentanter for disse råd, således at by/bygderådet, hvor centralbiblioteket ligger, altid har mindst 1 medlem i udvalget, medens de øvrige medlemmer vælges på skift blandt biblioteksudvalgene i distriktet, j.fr. § 3, stk. 2.

Stk. 3. I alle centralbiblioteker skal lederen være uddannet bibliotekar med fuld arbejdstid, og til hjælp for ham ansættes andet nødvendigt personale.

Stk. 4. Landsstyret kan gøre undtagelse fra stk. 3 efter indstilling fra biblioteksdirektøren, jfr. § 11, og bibliotekarforeningen.

Stk. 5. Centralbibliotekernes ledere danner i fællesskab et biblioteksråd, som behandler sager inden for bibliotekswesenet og holder møde mindst 2 gange om året. Rådet fastsætter selv en vedtægt for dets virksomhed.

6. stk. Landsstýrið rindar meginbókasøvnunum, tí partinum, ið er fólkabókasavn, studning til raksturin við 60% eftir § 6 í hesi løgtingslóg, og kommunan, har bókasavnið er, rindar restina.

7. stk. Landsstýrið veitir studning til bygging, um- ella uppibygging ella keyp av bókasavnshúsum til meginbókasøvn, tann partin, ið er fólkabókasavn, við 50% eftir § 7, stk. 2 og 3 í hesi løgtingslóg.

8. stk. Til tær meiriútreiðslur, ið standast av, at bókasavnið, umframt at vera fólkabóksavn, eisini er meginbókasavn, rindar landsstýrið studning til raksturin við 60% eftir § 6 í hesi løgtingslóg og til bygging, um- ella uppibygging ella keyp av bókasavnshúsum við 50% eftir § 7, stk. 2 og 3 í hesi løgtingslóg, meðan bý/bygdaráðini í døminum í felag rinda restina eftir fólkatalinum í báðum førum.

Stk. 6. Landsstyret yder centralbibliotekernes, den del, der er folkebibliotek, tilskud til driften med 60% ifølge § 6 i denne lagtingslov, og kommunen, hvor biblioteket og er beliggende, betaler resten.

Stk. 7. Landsstyret yder tilskud til bygning, om- eller tilbygning eller køb af bibliotekslokaler til centralbiblioteker, den del, der er folkebibliotek, med 50% efter § 7, stk. 2 og 3 i denne lagtingslov.

Stk. 8. Til de merudgifter, der skyldes, at biblioteket foruden at være folkebibliotek også er centralbibliotek, yder landsstyret tilskud til driften med 60% ifølge § 6 i denne lagtingslov og til bygning, om- eller tilbygning eller køb af bibliotekslokaler med 50% efter § 7, stk. 2 og 3 i denne lagtingslov, medens by/bygderådene i distriktet i fællesskab betaler resten efter folketallet i begge tilfælde.

Kapittul 3
Fólkabókasavn

§ *3.* Øll bý/bygdaráð skipa fyri fólkabókasavnstænastu.

2. stk. Fólkabókasøvnini eru kommunal, og bý/bygdaráðini velja eina bókasavnsnevnd, ið hevur ábyrgdina av bókasavnsrakstrinum. Virkisøkið er avvarðandi kommuna ella, um avtala er millum fleiri kommunur um felags bókasavnsrakstur, hesar kommunur.

3. stk. Tað stendur øllum íbúgvum í landinum í boði frítt at nýta eitt hvørt fólkabóksavn.

Kapitel 3
Folkebiblioteker

§ *3.* Alle by/bygderåde etablerer folkebibliotekstjeneste.

Stk. 2. Folkebibliotekerne er kommunale, og by/bygderådene nedsætter et biblioteksudvalg, som har ansvaret for biblioteksdriften. Virksomhedsområdet er vedkommende kommune eller, når der foreligger aftale mellem flere kommuner om fælles biblioteksdrift, disse kommuner.

Stk. 3. Alle landets indbyggere kan frit benytte ethvert folkebibliotek.

§ 4. Fólkabókasøvnini hava deildir fyri bæði børn og vaksin

1. stk. Í øllum fólkabókasøvnum skal leiðaran vera útbúgvin bókavørður, og hann til hjálpar verður sett annað neyðugt starvsfólk

2. stk. Landsstýrið kann gera undantak frá stk. 2 eftir tilmæli frá bókasavnsstjórnum, sambært § 11, og bókavarða felagnum

3. stk. Fólkabókasøvnini líta í lag avtalu við barnagarðar, vøggustovur og aðrar stovnar í virkisøkinum um bókasavnstænastu.

5. stk. Fólkabókasøvnini samstarva eisini við starvsbókasøvn og onnur sersøvn.

6. stk. Fólkabókasøvnum seta á stovn deildir og veita bókabil og aðra fatnastu, har tørvur er á økttari bókasavnstænastu

§ 5. Býr/bygdarráðið ger viðtøkur fyri hvørt fólkabókasavn, og um fólkabókasavnið er felags fyri fleiri kommunur, gera býr/bygdarráðini viðtøkurnar í felag.

2. stk. Viðtøkurnar verða sendar bókasavnsráðnum til góðkenningar.

3. stk. Meginbókasavnið hevur eftirlit við fólkabókasøvnunum í døminum og veitir ráð og leiðbeining.

§ 6. Landsstýrið rindar fólkabókasøvnunum 60% í studningi av rakstrarútreiðslunum, meðan býr/bygdarráðið rindar restina. Uppí rakstrarútreiðslurnar verður roknað:

Løn til starvsfólk, bókasavnstilfar, hiti, ljós og reingerð, innbúgv, og leiga av høli o.t., ella renting og avskriving av bygningum, savnið hevur.

§ 4. Folkebibliotekerne har afdelinger for både børn og voksne

Stk. 2. I alle folkebiblioteker skal lederen være uddannet bibliotekar, og vil hans assistance ansættes andet nødvendigt personale.

Stk. 3. Landsstyret kan gøre undtagelse fra stk. 2 efter indstilling fra bibliotekschefen, jfr. § 11, og bibliotekarforeningen.

Stk. 4. Folkebibliotekerne etablerer aftaler med børnehaver, vuggestuer og andre institutioner i virksomhedsområdet om bibliotekstjeneste.

Stk. 5. Folkebibliotekerne samarbejder ligeledes med institutionsbiblioteker og andre specialsamlinger.

Stk. 6. Folkebibliotekerne opretter filialer og yder bogbus- eller anden tjeneste, hvor der er behov for udvidet biblioteksbetjening.

§ 5. By-bygdeudvalget udfærdiger vedtægter for hvert folkebibliotek, og såfremt folkebiblioteket er fælles for flere kommuner, udfærdiger by/bygderådene vedtægterne i fællesskab.

Stk. 2. Vedtægterne forelægges bibliotekschefen til godkendelse.

Stk. 3. Centralbiblioteket har tilsyn med folkebibliotekerne i distriktet og giver råd og vejledning.

§ 6. Landsstyret yder folkebibliotekerne 60% i tilskud af driftsudgifterne, mens by/bygderådet betaler resten. Til driftsudgifterne henregnes:

Lønninger til personale, biblioteksmateriale, varme, lys og rengøring, inventar, og lokaleleje o.l. eller forrentning af bygninger i bibliotektes eje.

Stundingur verður goldin afturút fyri 1 ár í senn.

§ 7. Fólkabóksøvn, ið hava meira enn 10.000 bøkur, skulu hava egin bóksavnshøli.
2. stk. Tá ið eitt býr/bygdarráð ætlar at fara undir at byggja, umbyggja ella byggja uppí ella keypa høli til bókasavn, skal byggi- ella keypsætlanin við tilmæli frá bókasavnsráðnum verða send landsstýrinum til góðkenningar.
3. stk. Landsstýrið veitir 50% í studningi til bygging, um- ella uppíbygging ella keyp av bókasavnshølum, og tá ið landsstýrið hevur góðkent byggi- ella keypsætlanina, rindar landsstýrið eftir tilmæli frá bókasavnsráðnum í studningi 50% av ætlaða kostnaðinum, men er veruliga kostnaðurin hægri enn hin ætlaði, kann landsstýrið somuleiðis eftir tilmæli frá bókasavnsráðnum rinda 50% av tí veruliga kostnaðinum, um serligar grundir eftir fyri tí.

Tilskuddet udbetales bagud for 1 år ad gangen.

§ 7. Folkebiblioteker, hvis bogbestand overstiger 10.000 bind, skal have egne bibliotekslokaler.
Stk. 2. Når et by/bygderåd påtænker at bygge, ombygge eller udvide eller købe lokaler til bibliotek, skal bygge- eller købsplanen med indstilling fra biblioteksrådet sendes landsstyret til godkendelse.
Stk. 3. Landsstyret yder 50% i tilskud til bygning, om- eller tilbygning eller køb af bibliotekslokaler, og når landsstyret har godkendt bygge- eller købsplanen, betaler landsstyret efter indstilling fra biblioteksrådet i tilskud 50% af de anslåede omkostninger, men er de virkelige omkostninger højere end de anslåede, kan landsstyret ligeledes efter indstilling fra biblioteksrådet betale 50% af de virkelige omkostninger, hvis særlige grunde taler herfor.

Kapittul 4
Skúlabókasøvn

§ 8. Á hvørjum skúla innan fólkaskúlan við í minsta lagi 3 samanhangandi árgangum verður skipað eitt skúlabókasavn sum liður í skúlans virksemi og partur av bókasavnsskipanini.
2. stk. Landsskúlafyrisitingin og bókasavnsráðið áseta í felag nærri reglur um fólka- og skúlabókasøvn, sum eru í felags høli.

Kapitel 4
Skolebiblioteker

§ 8. Ved hver skole inden for folkeskolen med mindst 3 sammenhængende årgange oprettes et skolebibliotek som et led i skolens virksomhed og som en del af biblioteksordningen.
Stk. 2. Undervisningsdirektoratet og biblioteksrådet fastsætter i fællesskab nærmere regler for folke- og skolebiblioteker, som er i samme lokale.

§ 9. Skúlanevndin tekur avgerð um øll mál viðvíkjandi skúlabókasavninum, ið ikki er løgd undir bý/bygdarráðið ella aðra myndugleikar eftir løgtingslóg um skúlafyrisiting.
2. stk. Er fólka og skúlabókasavnið í felags høli, skal skúlanevndin verða umboðað í bókasavnsnevndini.

§ 9. Skolekommissionen træffer afgørelse i alle sager vedførende skolebiblioteket, der ikke er henlagt til kommunalbestyrelsen eller andre myndigheder i medfør af lagtingslov om styrelsen af undervisningsvæsenet.
Stk. 2. Såfremt folke- og skolebiblioteket er i samme lokale, skal skolekommissionen være repræsenteret i biblioteksudvalget.

§ *10.* Landsstýrið rindar skúlabókasøvnunum í studningi 60% av útreiðslun um til undirvísingartilfar og -amboð, meðan bý/bygdarráðið rindar restina, og studningurin verður goldin afturút fyri 1 ár í senn.

§ *10.* Landsstyret yder skolebibliotekerne 60% i tilskud til udgifterne til undervisningsmaterialer og -midler, mens by/bygderådet betaler resten, og tilskuddet udbetales bagud for 1 år ad gangenø

Kapittul 5
Bókastova

§ *11.* Bókastovan er stovnur undir landsstýrinum, sum undir leiðslu av bókasavnsstjóranum, ið skal vera útbúgvin bókavørður, skal:

a) samskipa keypið av føroyskum bókum og øðrum tilfari til megin-, fólka- og skúlabókasøvnini.
b) skráseta, binda inn og greiða hetta tilfarið til bókasøvnini,
c) fremja upplýsandi tiltøk um bókasavnstilfar,
d) skipa fyri skeiðvirksemi og eftirútbúgving fyri starvsfólkið á bókasøvnunum og
e) skipa fyri býti av bókasavnsgjaldinum, sum verður játtað á fíggjarløgtingslógini á hvørjum ári svarandi til 8% av allari játtanini til megin-, fólka- og skúlabókasøvn og av játtanini til Føroya Landsbókasavn, og sum verður at býta til føroyskar rithøvundar og týðarar, hvørs bøkur/týðingar eru til taks á nevndu bóka-

Kapitel 5
Bibliotekscentral

§ *11.* Bibliotekscentralen er en institution under landsstyret, der under ledelse af biblioteksdirektøren, som skal være uddannet bibliotekar, skal:

a) koordinere indkøbet af færøske bøger og andet materiale til central-, folke- og skolebibliotekerne,
b) registrere, indbinde og klargøre dette materiale til bibliotekerne,
c) forestå oplysende virksomhed om biblioteksmateriale.
d) forestå kursusvirksomhed og videreuddannelse for personalet på bibliotekerne og
e) forestå uddelingen af biblioteksafgifter, som bevilges på finanslugtingsloven hvert år svarende til 8% af hele bevillingen til central-folke- og skolebiblioteker og af bevillingen til Færøernes landsbiblioteker og af bevillingen til Færøernes Landsbibliotek, og som uddeles til færøske forfattere og oversættere,

sovnunum, og til myndlistafólk, tá myndir eru í minsta lagi 10% av bókini, eins og ofturhvørndi bjóðafelagi varðveitir rættin til bókasavnsgjaldið

2. stk. Bókasavnsstjórin ger reglugerð fyri bókastovnunum, herundir fyri býti av bókasavnsgjaldinum, og landsstýrið góðkennir reglugerðina

hvis bøger/oversættelser findes på de nævnte biblioteker, og til illustratorer, når illustrationer udgør mindst 40% af bogen, ligesom efterlevende ægtefælle bevarer retten til bibliotheksafgiften

Stk. 2. Biblioteksdirektøren udfærdiger reglement for biblioteks-centralen og herunder for fordelingen af bibliotheksafgiften, og landsstyret godkender reglementet.

Kapittul 6
Bókasavnsgrunnur

§ 12. Á fíggjarlógtingslógini verður á hvørjum ári játtað ein peningaupphædd svarandi til 10% av allari játtanini til megin-, fólka- og skúlabókasavn og av játtanini til Føroya Landsbókasavn, sum verður sett í bókasavnsgrunnin at nýta til felags bókasavnsuppgávur og serligu bókasavnstænastu.

§ 13. Bókasavnsgrunnurin verður stjórnaður av einum stýri við 3 limum, sum eru bókasavnsstjórin, ein limur, sum bókasavnsráðið velur, og ein limur, sum landsskúlafyrisitingin velur.

2. stk. Stýrið ger reglugerð fyri virksemi grunsins, og landsstýrið góðkennir reglugerðina.

Kapitel 6
Biblioteksfond

§ 12. På finanslagtingsloven bevilges hvert år et beløb svarende til 10% af hele bevillingen til central-, folke- og skolebiblioteker og af bevillingen til Færøernes Landsbibliotek, som henlægges i biblioteksfonden til brug for fælles bibliotheksopgaver og særlig bibliotekstjeneste.

§ 13. Biblioteksfonden ledes af en bestyrelse på 3 medlemmer, som er biblioteksdirektøren, et medlem, som biblioteksrådet vælger, og et medlem, som undervisningsdirektoratet vælger.

Stk. 2. Bestyrelsen udarbejder vedtægt for fondens virksomhed, og landsstyret godkender vedtægten.

Kapittul 7
Gildiskoma

§ 14. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

2. stk. Samstundis fer úr gildi lóg nr. 44 frá 24. mai 1968 um fólkabókasøvn v.m. sum broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 21. mai 1980.

Kapitel 7
Ikrafttrædelse

§ 14. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Stk. 2. Samtidig ophæves lov nr. 44 af 27. maj 1968 om folkebiblioteker m.v. som ændret ved lov nr. 64 af 21. maj 1980.

Viðmerkingar:

Við skrivi dagfest 27. februar 1984 setti landsstýrið ein arbeiðsbólk at kanna spurningin, um løgtingslóg um fólkabókasøvn v.m. nr. 44 frá 27. mai 1968 sum broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 21. mai 1980 átti at verið endurskoðað við tí fyri eyga, at skúlabókasøvn komu undir lógina og – um arbeiðsbólkurin metti, at nevnda løgtingslóg átti at verið endurskoðað sum tilskilað – at tilevna eitt uppskot um hetta.

Við skrivi dagfest 14. november 1986 setti landsstýrið arbeiðsbólkin nv nýggjum við fleiri limum og við teirri starvsskrá at endurskoða fólkabókasavnslógina sum heild, heruppií við tí fyri eyga at skúlabókasøvn komu undir lógina.

Arbeiðsbólkurin handaði í juli 1987 landsstýrinum álit sitt, og álitið er hjálagt hesum løgtingsmáli sum skjal.

Í mun til galdandi løgtingslóg um fólkabókasøvn v.m. er tær nýskipanir í frammanfyri standandi uppskoti til løgtingslóg um meginbókasøvn, fólka- og skúlabókasøvn:

- at landið verður býtt í 7 meginbókasavnsdømi, hvørt við sínum meginbókasøvni,
- at uppskotið fevnir um skúlabókasøvnini, sum verða stovnað samboert løgtingslóg um fólkaskúlan nr. 21 frá 22. mars 1979 § 25, stk. 2 og 3.
- at ein bókasavnsstjóri verður settur at taka sær av teimum uppgávum viðvíkjandi fólkabókasøvnum, sum landsbókavørðurin higartil hevur tikið sær av, og samsvarandi uppgávum viðvíkjandi meginbókasøvnunum, sí eisini næsta punkt.
- at ein bókastova verður sett á stovn undir leiðslu av bókasavnsstjóranum, sum m.a. skal hava ein bókbindaraverkstað, ið skal gera tað bókbindaraarbeiði fyri tey føroysku bókasøvnini, sum útlendskir verkstaðir higartil hava gjørt.
- at eitt bókasavnsgjald uppá 8% av játtanini til øll bókasøvnini kemur í staðin fyri rithøvundasamsýningina, og
- at ein bókasavnsgrunnur verður settur á stovn við árligum játtanum á fíggjarløgtingslógini.

Á fíggjarløgtingslógini 1988 er undir konto § 15.15202. Fólkabókasøvn, avsettur peningur til hægri bókasavnsgjald, fyrr rithøvundasamsýning, og til bókasavnsgrunnin, men peningur er ikki avsettur til útreiðslur í samband við setan av bókasavnsstjóra og stovnsetan og rakstur av bókasavnsstovu í 1988, tó so at í fylgiskjølunum til fíggjarløgtingslógaruppskotið 1988 er um bókasavnsgrunnin tilskilað, at ætlanin er at nýta játtanina til hendan grunn í 1988 til stovnsetanina av bókastovuni.

SÍ SKJAL NR. 18.

1. viðgerð 6. apríl. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 1. mars 1988 og eftir 1. viðgerð tann 7. apríl 1988 beint í mentanar- og skúlanevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jóannes Dalsgaard, Hergeir Nielsen og Asbjørn Joensen) førir fram:

Málið snýr seg um nýskipan av fólka- og skúlabókasøvnunum, og ber henda nýskipan við sær, um uppskotið verður samtykt, at landið verður býtt í 7 meginbókasavnsøki við hvør sínum meginbókasavni.

Víðari fevnir uppskoti um skúlabókasøvnini og mælt verður til at stovnað verður bókastova við tí endamáli at samskipa bókakeyp, skráseta, binda inn og gera alt tilfarið til fólkabókasøvnini greitt. Bókastovan verður stovnur undir landinum, men kann sambært sakkunnleikan verða rikin saman við einum meginbókasavni.

Sambært sama sakkunnleika ber væl til at leggja hendan stovnin uttan fyri Havnina.

Fakligi arbeiðsbólkurin, sum hevur evnað til uppskot landsstýrisins, hevur í sínum áliti, ið liggur við tingmálinum tilmæli um, hvar tey sjey meginbókasøvnini eiga at verða í framtíðini. Meirilutin heldur hetta uppskot vera skilagott og mælir til at seta plaseringarnar í sjálva lógina við teirri broyting, at meginbókasavnið í Suðuroy verður í tilknýti til skúla- og mentannardepilin í Hovi.

Herumframt mælir meirilutin til, at bókastovan verður stovnað í tilknýti til meginbókasavnið, sum arbeiðsbólkurin mælir til skal verða í Hvalvík.

Meirilutin setir broytingaruppskot til lógaruppskot landsstýrisins samsvarandi hesi støðu.

Uppskot landsstýrisins hevur eisini uppskot um ein bókasavnsstjóra. Hetta heldur meirilutin vera óneyðugt, tá leiðarin av bókastovuni og leiðarin á tí meginbókasavni, bókastovan verður knýtt, verða ein og sami persónur.

Meirilutin mælir til at strika stykkið um bókasavnsstjóra. Annars tekur meirilutin undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað við hesum broytingum:

Broytingaruppskot

1) Sum stk. 9 verður skoytt uppí:	1) Som stk. 9 tilføjes:
»*9. stk.* Meginbókasøvnini verða á hesum støðum: Eitt í Suðuroy í Hovs kommunu í tilknýti til komandi hægri skúla, eitt í Sandoy heima á Sandi, eitt í Suðurstreymoy í Tórshavn, eitt í Vágum í Miðvági, eitt í Norðurstreymoy í Hvalvík, sum kann dekka Norðureysturoy, eitt í Eysturoy á Glyvrum, eitt í Norðoyggjum í Klaksvík.«	»*Stk. 9.* Centralbiblioteket placeres på disse steder: Et på Suderø i Hovs kommune i forbindelse med den kommende højere skole, et på Sandoy på Sandur, et i Suðurstreymoy i Tórshavn, et i Vágar i Miðvági, et i Norðurstreymoy i Hvalvík, som kan dække Norðeysturoy, og i Eysturoy på Glyvrar, et i Norðoyggjum i Klaksvík.«

2) § 11, stk. 2 gongur út, og í staðin verður sett:
»Bókastovan verður stovnsett á sama staði sum meginbókasavnið fyri Norðstreymoy.«

3) Aftan á § 11, 2. stk. verður skoytt uppi:
»*3. stk.* Landsstýrið setir eftir tilmæli frá bókasavnsráðnum og meginbókasavnsnevndini í viðkomandi meginbókusavnsdømi leiðaran fyri bókastovuni.
4. stk. Leiðarin fyri bókastovuni kann eisini leiða tað meginbókasavn, ið bókastovan verður knýtt at.
5. stk. Landskassin ber allan kostnaðin av rakstri bókastovunnar, meðan meginbókasavnið annars verður figgjað sambært § 2, stk. 6 og 7.«

2) § 11, stk. 2 udgår, og i stedet indsættes:
»Bibliotekcentralen er etableret på samme sted som centralbiblioteket for Nordstreymoy.«

3) Efter § 11, stk. 2 tilføjes:
»*Stk. 3.* Landsstyret ansætter efter indstilling fra biblioteksrådet og centralbiblioteksnævnet i ved kommende centralbiblioteksområde lederen for bibliotekscentralen
Stk. 4. Lederen for bibliotekscentralen kan også lede det centralbibliotek, som bibliotekcentralen står i forbindelse med.
Stk. 5. Landskassen erholder alle udgifter af bibliotekscentralens drift, medens centralbiblioteket ellers financieres i henhold til § 2, stk. 6 og 7.«

Ein minniluti (Eilif Samuelsen) er samdur í, at neyðugt er við eini nýskipan av bókasavnsverkinum. Tað var eisini tí, at undanfarna landsstýrið setti ein arbeiðsbólk at fyrireika eina endurskoðan av lógini.

Undir 1. viðgerð av uppskotinum vóru allir ordførararnir samdir um, at uppskotið legði upp til eina alt ov fløkta og bureaukratiska skipan.

Undir nevndararbeiðinum hevur meirilutin ikki víst nakran vilja til at finna fram til eina meiri einfalda loysn.

Tað er eingin ivi um, at verður lógin samtykt í tí líki, hon nú hevur, ella við bert smávegis broytingum, so fara útreiðslurnar til raksturin og til íløgur at vaksa stórliga.

Minnilutin mælir til, at lógaruppskotið verður endurskoðað soleiðis, at tað bert verður eitt meginbókasavn í staðin fyri sjey. Hetta meginbókasvnið skal røkja tær uppgávurnar, sum landsbókasavnið higartil hevur røkt, og sum í lógaruppskotinum eru lagdar undir Bókastovuna í § 11. Hesin nýggi stovnurin undir landsstýrinum við sínum bókasavnsstjóra verður sostatt óneyðugur.

Meginbókasavnið kann so virka sum tænastustovnur fyri øll fólkabókasøvnini og skúlabókasøvnini runt um í landinum.

Á henda hátt kann fáast ein smidlig, vælvirkandi og lítið bureaukratisk skipan, sum øll hava eftirlýst.

Minnilutin setir til sosjáandi:

uppskot

til

samtyktar

Mentamnar og skúlanevndin heldur fram sum millumtinganevnd til at viðgera tingmálið nr. 67/1987: Løgtingslóg um megin, fólka og skúlabókasøvn.

Ein annar minniluti (Óli Breckmann) tekur undir við uppskoti meirilutans.

2. viðgerð 5. mai. Broytingaruppskot meirilutans samtykt pkt. 1 við 19-0, pkt. 2 við 17-0, pkt. 3 við 17-0. Uppskotið til samtyktar frá Eilif Samelsen fall við 6-0. Uppskot landsstýrisins § 1 við 20-0, § 2 við 20-0, § 3 19-0, §§ 4-14 við 19-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 19-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag, uppskot landsstýrisins við broytingum til §§ 2 og 11 frá meirilutanum í mentamnar og skúlanevndini endaliga samtykt við 20-0. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum fall við 6-0 atkvøðum.

FL. j.nr. 2230-1-4. Lóg nr. 56 frá 9. juni 1988.

68 Fyriskipan »om ikrafttræden på Færøerne af lov om anmeldelse af fødsler og dødsfald«.

Ár 1988, týsdagin 1. mars legði Lassi Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið mælir til, at uppskot til fyriskipan »om ikrafttræden på Færøerne af lov om anmeldelse af fødsler og dødsfald« verður sett í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:

Kirkjumálaráðið hevur sent ríkisumboðsmanninum uppskot til »anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om anmeldelse af fødsler og dødsfald« við viðmerkingum, sí hjálagda skjal 1, og eitt eintak av »lov om anmeldelse af fødsler og dødsfald« nr. 225 frá 31. mai 1968, sí hjálagda skjal 2, og biðið ríkisumboðsmannin útvega ummæli frá landstýrinum.

Samstundis sigur kikjumálaráðið frá, at prestarnir í Føroyum hava ynskt, at heimild verður fingin til vega fyri at uppskriva barnasburðir í teirri sóknini, har mamman býr, og andlát í teirri sóknini, har tann deyði búði, og ikki sum higartil í teirri sóknini, har barnsburðurin ávikavist andlátið fór fram.

Kirkjumálaráðið upplýsir herumframt, at forsætismálaráðið hevur sagt seg vera samt í uppskotinum, og at varabispur í Føroyum og bispurin í Københavns Stift hava mælt til, at uppskotið verður sett í gildi í Føroyum.

Ríkisumboðsmaðurin hevur síðani spurt, um landsstýrið er samt í, at uppskotið verður sett í gildi í Føroyum, og hevur samstundis eftir samráð við varabispin mælt til, at uppskotið verður sett í gildi 1. januar 1989.

Landsstýrið vísir annars til uppskotið til fyriskipan og viðmerkingarnar.

1. viðgerð 22. mars. Málið varð beint í ráðtarnevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Eftir áheitan frá kirkjumálaráðnum og ynski frá prestunum í Føroyum hevur ríkisumboðið biðið landsstýrið um, at heimild verður fingin fyri, at lóg nr. 225 frá 31. mai 1968 »om anmeldelse af fødsler og dødsfald« fær gildi í Føroyum.

Høvuðsbroytingin er, at barnsburðir verða uppskrivaðir í teirri søknini, har móðirin býr, og andlát í teirri søknini, har tann deyði búði, meðan hetta nú verður gjørt í teirri sókn, har ávikavist barnsburður ella andlát fer fram.

Forsætismálaráðið, varabiskupurin í Føroyum og biskupurin í Keypmannahavnar biskupsdømi hava givið viðmæli.

Skotið verður upp, at lógin fær gildi í Føroyum frá 1. januar 1989.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og ein samd nevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 5. mai. Uppskot landsstýrisins samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 633-1.

69 Broyting í løgtingslóg um skamtan av rúsdrekka.

Ár 1988, týsdagin 1. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skamtan av rúsdrekka.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 61 frá 19. mai 1980 um skamtan av rúsdrekka verða í § 2, stk. 4 orðini: »Keypikortini galda fyri 1 ár í senn (1. apríl - 31. mars).« broytt til: »Keypikortini galda fyri 1 ár í senn (álmanakkaárið).«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1988 *2. stk.* Í 1988 verður keypikortið tó galdandi fyri 3 ársfjórðingar (1. apríl - 31. december).

lagtingslov om ændring i lagtingslov om rationering af spiritus.

§ 1.

I lagtingslov nr. 61 af 19. maj 1980 om rationering af spiritus ændres ordene: »Købekortene gælder for et år ad gangen (1. april - 31. marts).« til »Købekortene gælder for et år ad gangen (almannakáret).«

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1988.

Stk. 2. I 1988 gælder købekortet dog for 3 kvartal (1. april - 31. december).

Viðmerkingar:

Tá fíggjarárið í 1985 varð broytt til at fylgja álmanakkaárinum, vóru broytingar gjørdar í ymiskum lógum, har ikki bert fíggjarárið var nevnt, men eisini tíðarskeiðið 1. apríl til 31. mars.

Løgtingslóg nr. 61 frá 19. mai 1980 er her gloppin burturimillum og verður hon nú løgd fyri løgtingið, tí tað er óhent roknskaparliga/fyrisitingarliga at samsvar ikki er.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 7. apríl. Atkvøðugreiðslan 15. apríl: § 1 samtykt við 21:0, § 2 samtykt við 21:0, at málið skuldi fara til endaligari samtykt í 3. viðgerð var samtykt við 21:0 atkvøðum.

3. viðgerð 21. apríl. Málið endaligga samtykt við 22:0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 607-11-7. Løg nr. 39 frá 20. mai 1988.

70 Broyting í rúsdrekkalóggávuni.

Ár 1988, týsdagin 1. mars legði Villhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í rúsdrekkalóggávuni.

§ *1.*

Í lóg nr. 115 frá 4. apríl 1928 »om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.« við seinni broytingum gongur § 3, stk. 4. út.

lagtingslov om ændring i ædruelihedslovgivningen.

§ *1.*

I lov for Færøerne nr. 115 af 4. april 1928 om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m. udgår § 3, stk. 4.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort

Viðmerkingar:

Í lóg fyri Føroyar nr. 115 frá 4. apríl 1928 »om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.«, sum broytt við løgtingslóg nr. 40 frá 16. juni 1986, er tilskilað í § 3, stk. 4, at rúsdrekka, sum verður flutt inn, verður ikki latið út, fyrr enn móttakarin hevur vístserliga váttan um, at hann ikki í skyldar gjaldfelommum skatt. til kommununa ella landskassan. Viðkomandi skattavald hevur skyldu til, tá biðið verður um tað og uttan óneydugan stoðg, at geva váttan um betta.

Sambært § 26 í kunngerð nr. 44 frá 18. september 1958 um uppkrevjing av gjøldum v.m. eftir løtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum, sum broytt við kunngerð nr. 45 frá 4. juli 1966, skal tollmyndugleikin og postverkið krevja »skattaváttan« í hvørjum einstøkum føri, tá ið persónur innleysa t.v.s. tollklarera rúsdrekka (spiritus, vin og sterkt øl).

Sum skattainnkrevjandi myndugleika er tað álagt Føroya Gjaldstovu at útflýggja persónum skattaváttan, tað vil siga, at gjaldstovan váttar, at avvarðandi ikki »í løtuni skyldar skatt, ið er komin gjaldingar«.

Við samtíðarskattalógini, sum kom í gildi 1. apríl 1984 broyttist skattaumsitingin radikalt soleiðis, at nú er tað bert ein lítil brøkpartur av skattaborgarunum í Føroyum, ið kunnu skylda gjaldkomnan skatt, nevniliga B skattborgarar og A-skattborgarar við frestandi skatti.

Innkrevjingin av A- og B-skattaeftirstøðum fer sambært gjaldstovuni um stutta tíð at liggja í tryggari legu.

Tær gomlu eftirstøðurnar – skatturin frammanundan 1. apríl 1984 — verða umsitnar við EDV teldu hjá gjaldstovuni, meðan samtíðarskatturin verður umsitin við EDV-teldu hjá P/F Elektron.

Hetta, at »gamalo skattur og »nýggjur« skattur hava hvør sína telduskipan, hevur ført við sær, at umsitingin við skattaváttan er vorðin sera trupul, og tað er meira ivasamt, um tað undir verandi umstøðum er gjørligt at umsita lógina á forsvarligan hátt, – og tað er hættisligt.

Havandi í huganum, at 80 – 90% av lands- og kommunuskattinum nú gongur inn av sær sjálvum, og at skattur frá 1983 og eldri er støðugt fjarandi, má síggjast í eyguni, at tað upprunaliga endamálið við skattaváttan er at kalla ikki til longur.

Um lógarbroytingin ikki verður framd, má stórliga gerast í EDV, og haraftrat kemur starvsfólkaspurningurin.

1. viðgerð 6. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 1. mars 1988 og eftir 1. viðgerð tann 6. apríl 1988 beint í skattanevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Heini O. Heinesen, Hilmar Kass og Jógvan Sundstein) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Agnar Nielsen) tekur ikki undir við málinum og førir fram:

Tað, sum fer fram í dag við misnýtslu av rúsdrekka, fyri ein stóran part millum tað unga fólkið, og fyri samfelag okkara, kann eingi vera meira harmiligt og skaðiligt enn júst hetta. Spurningurin verður ofta, hvussu fær hetta heilt unga fatur á so nógv rúsdrekka, er tað lógligt? Lógin ásetir klárt aldursmark fyri at útloysa rúsdrekka. Og lógin ásetir, at kortið er reint persónligt. Hvat svíkur? Er tað útflýggingarstøðin? Eru tað ølklubbarnir? Er tað løgreglan? Tað kunnu vera øll hesi punktini. Men størstu ábyrgdina hava vit politikarar. Viljin til at umsita rúsdrekkalógina er ikki til staðar. Umsitingarvaldið, sitandi landsstýrið, hevur ikki havt beint í nøsini til at gjøgnumføra umsitingina. Tað má og skal ongantíð verða ein donsk løgregla, sum avgerð, hvussu okkara føroysku lógir skulu umsitast, og hava teir heldur ikki henda rætt. Umsitingarvaldið liggur og skal liggja hjá landsstýrinum.

Størsti hágin við rúsdrekkalógini og rúsdrekkamisnýtsluni eru tey nógvu undantaksloyvini, sum verða givin við lógini, og tey eykaloyvir, sum verða givin av landsstýrinum, sum nærsagt eingi mark kennir; tað kemur nokk ikki so sjáldan fyri, at bæði ommur og abbar fylla 80 ár 3 ferðir um árið.

Tey, sum »brøytta« sær av hesum, fáa uttan víðari eitt eykaloyvi frá landsstýrinum til eina ávísa upphædd av rúsdrekka. Her verður lógin brotin, útflýggjan, (kortið), er og skal verða persónligt. Tað eru slík og onnur ting, sum eiga at fáast í rættlag.

Tað eru vit politikarar, sum hava ábyrgdina, og eiga at áleggja okkara umsiting (landsstýrinum) at gera reglur fyri, at lógin verður hildin.

Undir 1. viðgerð av málinum førdi skattanevndarformaðurin fram, at ein tann størsti skaðin við hesum óskili, við misnýtslu av rusdrekka millum ung, vóru ølklubbarnar.

Karin Kjølbro søknaðist eftir einum uppskoti um avtøku av ølklubbunum, fyri tey, sum ynsktu tað.

Minnilutin (Agnar Nielsen) setir ti fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Føroya løgting áleggur landsstýrinum at gera reglur fyri, at ølklubbarnir verða tiknir av, og at rúsdrekkalógin verður rættvíst umsitin fyriuttan undantøk.

6. mai løgdu tingmenninir Jákup Lindenskov, John Petersen, Adolf V. Hansen, Asbjørn Joensen og Agnar Nielsen fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at útvega reglur um persónligt skjal til staðfesting av aldrinum á móttakara av rúsdrekka, soleiðis at reglurnar um aldursmark í rúsdrekkalóggávuni kunnu fylgjast.

2. viðgerð 6. mai. Uppskotið til samtyktar frá skattanevndini fall við 8-0, uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 22-0, § 2 við 22-0. Broytingaruppskot frá Jákup Lindenskov, Agnar Nielsen, Adolf V. Hansen, John Petersen, Asbjørn Joensen samtykt við 22-0 atkvøðum. At málið skudi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð 7. mai. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 607-11-5. Lóg nr. 54 frá 9. juni 1988.

71 Lóg um endurrindan til fiskivinnuna.

Ár 1988, týsdagin 1. mars legdi Olaf Olsen, løgtingsmadur, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um endurrindan til fiskivinnuna.

§ 1. Játtaðar verða kr. 120 milliónir til fiskivinnuna, soleiðis at kr. 40 milliónir verða til at umsita av Ráfiskagrunninum, kr. 40 milliónir av Nevndini fyri Studningi til Fiskivinnuna, kr. 40 milliónir í grunn til landsstýrinum at ráða yvir til at nýta har, sum tørvurin er størstur, og har tað munar besta at stuðla.

§ 2. Peningurin verður at taka av landskassans yvirskoti fyri fíggjarárið 1987 og úr oljugrunninum.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Viðmerkingar:

Tað er øllum kunnugt, at tað eru trupulleikar við at fáa endaarnar at røkka saman við fiskivinnuna, bæði eina og aðrar staðir. Í nøkrum førum er tað so álvarsligt, at ilt er at síggja nakra loysn, meðan tað aðrar staðir er ein prísregulering, sum skal til.

Tað var mett áðrenn jól, at partar av fiskivinnuni vóru soleiðis fyri, at ein likviditetshjálp var bráðneyðugt, og tí varð eitt uppskot evnað til hesum viðvíkjandi, og tóku eisini tingmenn sera væl undir við uppskotinum undir fyrstu viðgerð, men ómetaliga leingi er at fáa málið aftur úr nevnd. Likviditedstørvurin er ikki minkaður síðani.

Nú er avgjørt neyðugt ikki bara at avgreiða tað málið, men eisini hetta, tí

lagtingslov om tilbagebetaling til fiskerierhvervet.

§ 1. Det bevilges kroner 120 millioner til fiskerierhvervet, således at 40 millioner bliver administereret gennem råfiskefonden, kr. 40 millioner af udvalget for støtte til fiskeriet, og kr. 40 millioner lægges i en fond, som landsstyret råder over til at bruge, hvor det er mest nødvendigt, og hvor støtte er til mest hjælp.

§ 2. Beløbet bevilges af landskassens overskud for 1987 og af oliefondens midler.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

fylgjurnar av ikki at gera tað eru ólukkuligar. Mótið upp á at reka skip svinnur burtur, bæði hjá eigarum og manning, so at tey meira og minni liggja við bryggju, tí at bæði hugur og evni til at fara út eru burtur. Fleiri av teimum, sum eiga førini, royna at selja fyri at sleppa frá at verða longur út í óføri, enn teir longu eru komnir. Fylgjan er, at nøkur flakavirkir verða biðin at selja fyri at sleppa frá at vaða longur út í óføri, enn teir longu eru komnir. Fylgjan er, at nøkur flakavirkir verða biðin um at keypa, og gera hetta, at færri og færri eiga veiðiflotan. Heldur ikki veit nakar, hvussu upphøggingarstuðulin skal virka, og heldur ikki hvørjar treytirnar eru fyri at leggja skipini ella selja tey av landinum.

Hetta er ein støða, sum tey, ið hava ábyrgd fyri samfelagnum ikki kunnu liva við.

Tað eru talvur lagdar við uppskotinum, sum sýna gongdina hjá heimaflotanum tey seinastu 10 árini, og ein meting av hesum árinum.

Á talvuni sæst týðiliga, at tað kostar millum 2 og 3 krónur fyri kg at fáa fisk upp á land í Føroyum til viðgerðar. Tað er betri, um so ikki var, men hetta vita vit, og mugu tí taka støðu út frá hesum veruleika. men hesin veruleikin hevur stórt sæð verið galdandi øll hesi árini, og tí má arbeiðast út frá hesum, tá ið umræður at fáa fyratahondavinnuna at virka.

Um meskavíddin á trolum skal økjast, so má roknast við, at eina styttri tíð verður tað verri hjá flotanum at bera seg, og eisini, um liggidagar skulu ásetast. Hetta eigur eisini at verða havt í huga.

Útlitini fyri at fáa virkað fiskin til eina dýrari vøru eru frægari nú, enn tey hava verið, so vit kunnu vænta, at tann endurrindan, sum nú er fyri neyðini, verður minni í framtíðini, men tað ger hana bara meira neyðuga nú. Nakað av teimum seinast nevndu 40 miliónunum eiga at verða nýttar til figgingarhjálp í samband við útbygging av virkjum til hesa framleiðslu.

Tað eru onnur skip enn heimaflotin, sum eru í trongstøðu, og tey eiga ikki at gleppa okkum av hondum, um nakað vit er í at halda teimum í vinnu, har tey eru ella aðrar staðir. Hagtøl eru ikki nóg góð at fáa fyri sunnni av teimum, men líknandi talvur, sum eru lagdar við uppskotinum fyri heimaflotan, verða helst tøkar í ein ávísan mun, áðrenn langt umlíður.

Tað er upplýst frá landsstýrinum, at nógvur peningur er tøkur, og tað er onga staðni meiri neyðugt at nýta nakað av honum, enn til hetta, júst fyri at tað framvegis skal koma nakar peningur í kassan í framtíðini. Tí verður hetta uppskot framlagt.

1. viðgerð 22. mars. Málið vurð beint í figgjarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum 1. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 22. mars 1988 beint í figgjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen, Adolf V. Hansen) tekur ikki undir við málinum, og setir einki uppskot fram. Nevndi meiriluti vísir á tær viðmerkingar, sum løgmaður hevði við 1. viðgerð í løgtinginum í samband við lógaruppskot um fiskivinnumál, har vist var á teir svingningar, ið koma fyri í prísinum, og hvørjar avleiðingar tað fær fyri komandi prísásetingar.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Fyðun Viderø) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot Fólkafloksins.

Ivan Johannesen tekur undir við málinum, og vísir til løgtingsmál nr. 72/1987: Løgtingslóg um eykajáttan til ráfiskagrunnin og til løgtingsmál nr. 58/1987: Løgtingslóg um býtið av minstuløn og øðrum stuðli til fiskivinnuna 1988.

2. viðgerð 4. mai. Uppskoti Fólkafloksins fall við 13-0 atkvøðum.

72 Løgtingslóg um eykajáttan til Ráfiskagrunnin.

Ár 1988, týsdagin 1. mars legði Jógvan I. Olsen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um eykajáttan til Ráfiskagrunnin.	*lagtingslov om ekstrabevilling til Rafiskefonden.*
§ *1.* Í fíggjarárinum 1988 verða út landskassanum játtaðar 25 mió. kr. til Ráfiskagrunnin.	§ *1.* I finansåret 1988 bevilges af landskassen 25 mio. kr. til Råfiskefonden.
§ 2. Upphæddin verður at taka við á eykafíggjarlóg fyri 1988	§ 2. Beløbet skal medtages på lagtingsloven om tillægsbevilling for 1988.
§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Fyri stuttum setti Sambandsflokkurin fram uppskot nr. 58/1987: Løgtingslóg um býti av minstuløn og øðrum stuðuli til fiskivinnuna 1988.

Í viðmerkingunum til nevndu uppskot, sum bert snúði seg um broyting av býtinum av játtanini á fíggjarlógini fyri 1988, verður greitt frá støðuni hjá føroysku fiskivinnuni og grundgivið fyri broyting og størri stuðuli.

Í broytingaruppskoti til sonu fíggjarlóg royndi Sambandsflokurin at fáa løgtingið til at økja um samlaðu játtanina til fiskivinnuna. Tað eydnaðist ikki.

Við hesum uppskoti verður gjørd enn ein roynd at økja um samlaðu játtanina til fiskivinnuna fyri 1988.

Vist verður til viðmerkingarnar til løgtingsmál nr. 58/1987.

1. viðgerð 22. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum tann 1. mars 1988 og eftir 1. viðgerð tann 22. mars 1988 beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Ásbjørn Joensen, Signar Hansen og Adolf V. Hansen) tekur ikki undir við málinum, men vísir á, at landsstýrið arbeiðir við spurningunum í sambandi við játtanina til ráfiskagrunnin og vísir meirilutin til ta semju, ið gjørd varð, tá nýggja samgongan varð skipað. Eisini verður víst til tær viðmerkingar, ið løgmaður hevði til annað løgtingsmál undir 1. viðgerð, har løgmaður umrøddi tær broytingar, ið kundu koma fyri á hesum øki.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Svend Aage Ellefsen) tekur undir við uppskotinum. Sambært upplýsingar frá ráfiskagrunninum er rakstrarætlanin hjá grunninum kr. 156 mill. við galdandi prísum roknað uppá ársbasis. Formaðurin í Framsóknarflokkinum hevur boðað frá, at hansara treyt fyri at fara uppí samgonguna á páskum er, at galdandi prísir skulu hækka 5% í juli og aftur 5% í oktober.

Samlaða nýtslan hjá ráfiskagrunninum verður sostatt helst umleið 200 mill. kr. fyri inniverandi fíggjarár. Sambært galdandi fíggjarlóg eru bert játtaðar 50 mill. kr. her resta sostatt umleið 150 mill. kr., sum eingin fígging er til. Á fíggjarlógini fyri 1987 er helst yvirskot, og gongur uppskot Fólkaflokksins út uppá at nýta hendan pening at fíggja hallið í ráfiskagrunninum.

Hin vegin er einki yvirskot á fíggjarlógini fyri 1988.

Einasti møguleikin, sum løgmaður hevur at ávirka fiskaprísirnar eru játtanirnar á fíggjarlógini. Tí er tað ábyrgdarleyst at seta krøv um fiskaprísirnar uttan at seta fíggjarligar karmar samsvarandi.

Minnilutin mælir tí til at samtykkja fyriliggjandi uppskot. Vist verður til

løgtingsmál nr. 71/1987: Lóg um endurrindan til fiskivinnuna, sum Fólkaflokkurin hevur lagt fyri tingið.

Mininilutin Ivan Johannesen mælir til at samtykkja uppskot sambandsfloksins.

2. viðgerð 5. mai. Uppskot Sambandsfloksins fall við 13 0.

73 Landskassaveðhald fyri lánum frá »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« til føroyskar kommunur.

Ár 1988, mikudagin 2. mars legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landskassaveðhald fyri lánum frá »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« til føroyskar kommunur.

§ *1.*

Í § 2 í løgtingslóg nr. 24 frá 30. apríl 1987 um landskassaveðhald fyri lánum frá »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« til føroyskar kommunur ganga orðini: »31. mars 1988« út, og í staðin verður sett: »31. mars 1989.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 31. mars 1988

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landskassegaranti for lån fra Kreditforeningen af kommuner i Danmark til færøske kommuner.

§ *1.*

I § 2 i lagtingslov nr. 24 af 30. april 1988 om landskassegaranti for lån fra Kreditforeningen af kommuner i Danmark til færøske kommuner udgår ordene »31. marts 1988«, og i stedet indsættes: »31. marts 1989«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 31. marts 1988.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 24 frá 30. apríl 1987 varð veitt landsstýrinum heimild til at veðhalda fyri lánum frá «Kreditforeningen af kommuner i Danmark« til føroyskar kommunur.

Lógin gongur út 31. mars 1988.

Hesar kommunur hava fingið játtað lán eftir lógini nr. 24 frá 30. apríl 1987:

Tórshavnar kommuna	50.000.000 kr. netto
Sandavágs kommuna	10.000.000 kr. netto
Viðareiðis kommuna	1.300.000 kr. netto
Tilsamans	61.300.000 kr. netto

Sjálvt um økt verður um kommunala lánigrunnin, verður tørvur hjá kommunum at hava møguleika fyri lántøku aðrastaðni, og verður tí skotið upp at framlegingja lógina um veðhald fyri lánum úr kommunukredittfelagnum.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 2. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 28. apríl. § 1 varð samtykt við 24-0 atkvøðum, § 2 við 26-0. Við 26-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis til 3. viðgerð.

3. viðgerð 3. mai. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 809-52-9. Lóg nr. 28 frá 30. apríl 1988.

74 Lóg um loftferðslu.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Lasse Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir viðlagda uppskot til kgl. fyriskipan um at seta lóg nr. 252 frá 10. juni 1960 um loftferðslu við seinni broytingum í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:

Galdandi lóg í Føroyum um loftferðslu er lóg nr. 175 frá 1. mai 1923 við seinni broytingum (fram til 1937).

Galdandi lóg í Danmark er lóg nr. 252 frá 10. juni 1960 við seinni broytingum.

Lógin frá 1923 er sjálvandi ikki tíðarhóskandi longur og orsøkin til, at lógin frá 1960 ikki er sett í gildi í Føroyum, er, at óvissa hevur verið um koncessiónsrættin.

Eftir § 158 kann lógin setast í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan við teimum broytingum, sum løgtingið mælir til.

Viðlagda uppskot til kgl. fyriskipan er gjørt av einum arbeiðsbólki við umboðum fyri landsstýrið, ríkisumboðið og loftferðslumyndugleikarnar.

Tá spurningurin um koncessiónina nú er avkláraður, verður skotið upp at seta lógina frá 1960 við seinni broytingum í gildi fyri Føroyar við tørvandi broytingum vegna serligu føroysku viðurskiftini.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1988 beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, sum snýr seg um at seta í gildi fyri Føroyar nýggja loftferðslulóg.

Framlagda lógin er í trimum pørtum:

1) Loftferðslulógin dagførd til 9. apríl 1980.
2) Broytingarlóg nr. 261 frá 8. juni 1983 til loftferðslulógina.
3) Tillagingar til føroysk viðurskifti.

Tillagingarnar snúgva seg fyri mestapartin um, at Føroya Landsstýri kemur inn í myndina, tá ið um føroysk viðurskifti ræður. Tær greinar, sum eru tillagaðar føroyskum viðurskiftum, eru prentaðar í fullum orðaljóði.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 3. mai. Uppskot frá Fólkaflokkinum um at útseta atkvøðugreiðsluna aftan á 2. viðgerð, tí at broytingaruppskotið frá Svend Aage Ellefsen hevði ligið ov stutt frammi, varð sett undir atkvøðugreiðslu og fall. Broytingaruppskot frá Svend Aage Ellefsen pkt. 1 fall við 6 0, pkt. 2 fall við 14 0, um pkt. 3 varð atkvøtt við navnakalli, 9 atkvøddu ja, 1 atkvøddu nei, 13 atkvøddu ikki, 9 vórðu burturstaddir, atkvøtt var við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu:	Svend Aage Ellefsen, Ivan Johannesen, Henrik Old, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Tummas Arabo, Heini O. Heinesen, Øssur av Steinum og Tordur Niclasen.
Nei atkvøddu:	Hilmar Kass.
Atkvøddu ikki:	Flemming Mikkelsen, Agnar Nielsen, Edmund Joensen, Johs. M. Olsen, Jákup Lindenskov, Vilhelm Johannesen, Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Karin Kjølbro, Hans J. Debes og Adolf V. Hansen.
Burturstaddir:	Óli Breckmann, Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, John Petersen, Jógvan Sundstein, Essa Arge, Pauli Ellefsen, Eilif Samuelsen og Jóannes Dalsgaard.

Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1820-9-1.

75 Broyting í lógini um landsskatt og kommunuskatt.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ *1.*

Løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 31, 2. til og við 6. stk. verða strikað.

2. § 120 a, 1. stk. síðsta punktum og 2. stk. verða strikað.

3. § 120 b, c, d, e, f, g, h, j, k, l, m, og n verða strikað.

§ *2.*

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

Lagtingslov om ændringer i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ *1.*

Lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer.

1. § 31, 2. til og med 6. stk., udgår.

2. § 120 a, stk. 1 sidste punktum og stk. 2 udgår.

3. § 120 b, c, d, e, f, g, h, j, k, l, m, og n udgår.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Frammanfyristandandi lógaruppskot snýr seg um broytingar av reglum í skattalógini, sum vórðu samtyktar í samband við løgtingsmál nr. 123/1986.

1. Avmarkan av avskrivingum í samband við uppgerð av eginnýtslu.

Henda reglan, sum varð samtykt í fjør, ásetir, at ein og hvør, sum persónliga rekur vinnuvirki, lítið ella stórt, skal uppgera sína eginnýtslu eftir serligum reglum, sum skattavaldið ásetir. Avskrivast má so ikki niður um eginnýtsluna.

Grundgevingin fyri hesi reglu var tann, at avskrivingarnar skuldu avmarkast, soleiðis at skattskylduga inntøkan ikki kundi fara niður um eginnýtsluna.

Høvuðssjónarmiðið móti hesi reglu er sjálvandi tann, at avskrivingar í einum vanligum sjálvstøðugum virki einki hava við privatnýtslu at gera (Stórar avskrivingar uppá skip og skipsanpartar eru avmarkaðir á annan hátt). Men harafturat hevur tað vist seg, at hendan lógarregla hevur havt við sær fleiri kunngerðir, reglugerðir, skema og annað pappírstilfar umframt nógv eykaarbeiði. Alt samalt stórt sæð til ongan nyttu, tí um onkur »missir« nakrar fáar túsund krónur eitt árið í avskrivingum, fær hann tað aftur árið eftir.

Úrslitið av øllum hesum óproduktiva byrokratiska arbeiði verður tí bert størri kostnaður fyri viðkomandi virki, størri almennar útreiðslur til fleiri fólk, størri misnøgd hjá teim, sum hava sjálvstøðugt virki, sum aftur ger, at tey í fleiri førum hava bestan hugin at gevast.

Tá reglan einki hjálpir, hvørki uppá rættferð ella vælferð, men bara gera samfelagsviðurskiftini enn meiri høpisleys, skjýtur fólkaflokkurin upp, at hon verður avtikin beinanvegin.

2. og 3. Upplýsingarskylda hjá peningastovnum v.m. við nýtslu av P-talinum.

Tá ið hendan lógarregla varð samtykt í tinginum í apríl 1987 segði andstøðan greitt frá, at reglan í fyrsta lagi var í stríð við skrásetingarlógina, sum ásetir at p-tølini bert skulu nýtast í samband við afturhaldan av samtíðarskattinum. Harafturat óttaðust vit fyri at gera tað framvegis, at allar hesar nýggju skrásetingarupplýsingar verða ein byrjan til inntøkuskatting av rentum og kanska eisini ognarskatti, tí nú eru hjálpiamboðini útvegað.

Eisini liggur aftanfyri slíka lóggávu ein illtanki á allar borgarar, eins og hon ger tað møguligt at útvikla eitt eftirlitssamfelag, sum føroyingar higartil ikki hava viljað vitað av.

Enn eru lógarásetingarnar ikki framdar í verki, og tí er tíð enn at rætta skeivleikan, sum gjørdur varð í fjør.

Tí verður uppskotið sett fram um at avtaka hesa lógarreglu aftur.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 beint í skattanevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hilmar Kass og Heini O. Heinesen) tekur ikki und ir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein og Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskot fólkafloksins.

2. viðgerð 5. mai. Uppskot Fólkafloksins fall við 14-0 atkvøðum.

76 Ferjulega í Syðradali.

(Ikki framlagt).

77 Løgtingslóg um bygging av hølum til Landsskjalasavnið.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Lassi Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um bygging av hølum til Landsskjalasavnið.

lagtingslov om bygning af lokaler til landsarkivet.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at taka upp lán til bygging av hølum til Landsskjalasavnið uppá tilsamans 11 mió. kr.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at optage lån til bygning af lokaler til landsarkivet på ialt 11 mio. kr.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ *2.* Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Føroya Landsskjalasavn er savn, ið goymir flestu skjøl hjá ríkis- og landsmyndugleikunum. Savnið goymir eisini kommunal og privat skjøl. Føroya Landsskjalasavn varð stovnað í 1932 undir heitinum Færø Amts Arkiv, men hetta var ikki fyrstu ferð, ið almenn skjøl vóru savnað undir einum taki. Longu í 1859 varð ásannað, at neyðugt var at varðveita tey almennu skjølini á einum staði. Tá vóru tey skjøl, ið donsku embætismennirnir og løgtingið ikki høvdu brúk fyri í tí dagliga virkseminum, savnað í Leigubúðini í Tinganesi.

Men tá ið danskir embætismenn í 1859 fingu nýggj embætishús, varð hetta savn sundurskilt. Tey søvn, ið mett vóru at hava týdning fyri dagligu umsitingina hjá embætismonnunum, vórðu løgd í hesi embætishús, meðan ein partur av teimum gomlu skjølunum varð varðveittur á loftinum í gamla sparikassanum og ein annar partur sendur niður til varðveitslu á Ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn. Mest týðandi parturin av hesum skjølum var savnið hjá kongaliga einahandlinum.

Longu í 1903 mæltu 15 tingmenn til at fáa skjalasavnið endurstovnað, men hetta varð av ongum í fyrsta umfari. Málið varð fleiri ferðir seinri reist á tingi, men ikki fyrr enn í 1920 var eftir uppskoti frá Jóannes Patursson samtykt at byggja hús til landsskjalasavn, landsbókasavn og fornminnissavn. Aftaná drúgv

ar samráðingar millum ríkisstýrið, amtið og løgtingið varð so gamla landsbókasavnshúsið á Debesartrøð bygt, og Føroya Landsskjalasavn flutti í hendan bygning í 1932.

Síðani 1952 hevur Føroya Landsskjalasavn verið rikið sum ein landsstovnur undir landsstýrinum eftir løgtingslóg frá 1952.

Sum nevnt flutti Føroya Landsskjalasavn í 1932 inn í nýggj høli á Debesartrøð, men longu í 1940 var avvarandi myndugleikum greitt, at húsini, ið hýsa skuli teimum trimum stovnunum, landsskjalasavninum, landsbókasavninum og fornminnissavninum, vóru alt ov lítil, og mælt varð longu tá til, altso í 1940, at byggja afturat verandi húsum. Hetta varð tó ikki gjørt, og landsskjalasavnið varð tí noytt í fimtiárunum at leiga sær goymslupláss ymsastaðni runt í Tórshavn. Í 1964 keypti landsstýrið Müllerstrøð til savnsbygningar og í 1965 samtykti Føroya Løgting at heimila landsstýrinum at lata detailprojektera nýtt landsbókasavn og nýtt landsskjalasavn á matr. nr. 1025a í Tórshavn (Løgtingsmál nr. 64/1965).

Í 1966 legði landsstýrið uppskot um nýtt landsbókasavn og nýtt landsskjalasavn við detailprojekti fyri løgtingið (løgtingsmál nr. 31/1966), men uppskotið frá landsstýrinum fall. Hølistrupulleikarnir hjá landsskjalasavninum stóðu tískil við og versnaðu, og tá ið var komið til 1972, var støðan tann, at Føroya Landsskjalasavn helt til í 4 ymiskum bygningum í Tórshavn. Sama ár avgjørdi landsstýrið at veita landsskjalasavninum innivist í kjallaranum á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, ið tá skuldi byggjast. Hóast landskjalasavnið í skrivi til landsstýrið dagfest 26. januar 1973 víst á, at henda loysn ikki fór at loysa hølistrupulleikarnar hjá landsskjalasavninum, stóð avgerð landsstýrisins við makt. úrslitið var, at landsskjalasavn og landsbókasavn nú høvisliga vóru sundurskild, og partar av skjalagoymsluni vóru lagdir í starvsstovukjallaran. Í starvsstovukjallaranum vóru eisini innrættað høli til lesistovu og til skrivstovur hjá starvsfólkum, men hølistrupulleikarnir vóru sum nevnt ikki loystir, og Føroya Landsskjalasavn varð tí frámvegis víst til at leiga høli úti í býnum.

Landsskjalasavnið hevur síðani fleiri ferðir yvir fyri landsstýrinum og í sambandi við uppskot til fíggjarlóg víst á, hvussu trupult fyri virksemið tað er hjá hesum stovni at halda til í fleiri ymiskum hølum. Eisini er hetta dýrt í longdini bæði í húsaleigu og viðv. starvsfólki. Í løtuni húsast Føroya Landsskjalsavn í starvsstovubygninginum, í gomlu postmeistarahúsunum, í gomlu skrivstovuhúsunum hjá Valdemar Lützen í Sigmundargøtu, í leigaðum kjallara í Vesturbýnum, og talan verður um at leiga enn fleiri høli til tær stóru mongdir av skjølum, ið landsskjalasavnið fær handað.

Tá ið avgerðin í 1972/73 varð tikin um at lata partar av landsskjalasavninum flyta í kjallaran í starvsstovuhúsunum, átti Føroya Landsskjalasavn part í flyta-

grunninum »Nýtt landsbókasavn/landsskjalasavn«, sum um hetta mundið var 4,5 mió. kr. stórur. Av løgtingsmáli nr. 82/1972 »Bygging av evnisfrøðiligari og bakteriologiskari starvsstovu« sæst, at løgtingið ikki ynskti, at nýtast skuldi peningur úr nevnda grunni til høli landsskjalasavnsins í starvsstovuhygningi-num. Í staðin mælti fíggjarnevndin til, at allur peningurin í grunninum til nýtt landsbókasavn/landsskjalasavn skuldi nýtast til bygging av nýggjum landsbókasavni. Sostatt stóð Føroya Landsskjalsavn við ongum byggipeningi, samstundis sum flutt varð inn í høli, sum frammanundan vóru alt ov lítil. Út frá tí sannføring, at farast nátti fyrr ella seinri undir at byggja nýtt landsskjalasavn burturav til tær stóru skjalagoymslurnar, ið Føroya Landsstýri og ríkismyndugleikarnir hava liggjandi hjá landsskjalasavninum, hava verið settar á fíggjarlógina 3 tey seinastu fíggjarárini upphæddir í grunn til landsskjalasavn, ið nú er komin uppá 4,5 mió. kr.

Føroya Landsskjalasavn hevur í varðveitslu elstu handrit, skjøl og protokollir, ið eru varðveitt her í landinum. Savnið goymir soleiðis skjalasavn løgtingsins frá 1615 til okkara dagar, bøkur og skjøl kirkjunar frá 1669, landfútans skjalasavn frá 1709 umframt hópin av øðrum skjølum hjá øðrum almennum og privatum stovnum. Í hesum viðfangi kunnu nevnast arkivini hjá landsstýrinum, ríkisumboðnum, almannastovuni o.ø.

Hetta tilfar fevnir um umleið 5000 hillametrar, ið sum nevnt hava innivist í fýra ymiskum bygningum. Eingin av hesum fýra goymslunum kunnu sigast at lúka tær treytir, sum í dag verða settar til bygningar, ið skulu goyma tilfar, ið undir ongum umstøðum eigur at kunna fara fyri skeyti.

Tað eru nógar góðar grundir til, at tað almenna ræður yvir einum vælvirkandi skjalasavni, har skjølini eru tryggjað, og sum kann halda eitt høgt tænastustøði mótvegis tí almenna og borgarunum.

Fyri tað fyrsta er eitt vælvirkandi landsskjalasavn ein fortreyt fyri, at lóggávuvaldið, dómsvaldið og útinnandi valdið kunnu røkja sínar uppgávur. Harnæst eru ella verða tey almennu skjølini høvuðskeldan til Føroya søgu.

Eitt landsskjalasavn eigur tí ikki bert at veita tí almenna og borgarunum tær tænastur, hesi hava rætt at krevja, men eisini at varðveita og røkja tann mentunararv, sum handrit, skjøl og bøkur, ið fevna um 400 ár, goyma.

Hetta merkir, at eitt nýtt landsskjalasavn eisini má taka sær av uppgávum sum konservering, gransking og tænastuveiting til innlendskar og útlendskar granskarar.

Landsstýrið heldur ikki, at landsskjalasavnið undir verandi umstøðum er fært fyri at røkja hesar uppgávur til fulnar og heldur tí, at tíðin nú er komin at veita Føroya Landsskjalasavni sømilig høli. Landsstýrið hevur tí latið gera skitsuprojekt til nýtt landsskjalasavn. Ætlanin er at byggja á økinum millum landsbókasavnið og sjómansskúlan. Økið er ogn landsstýrisins og lagt út til almenna

stovnsbygging. Talan er um 1660 fermetrar stóran bygning í trimum hæddum, ið mettur er at kosta 21,3 mió. kr. Støddin á bygningunum er gjørd út frá tí fortreyt, at hann skal lúka tørvin á goymsluplássi og fyrisitingar- og lesistovuplássi fram til ár 2000.

Á nevnda øki fer í løtuni fram munandi byggivirksemi í sambond við bygging av fiskiraunsóknarstovuni og umbygging av sjómansskúlanum og landsstýrið miðar sostatt ímóti, at byggingin av landsskjalasavninum fer í gongd, tá umrødda byggivirksemi fjarðar nakað av.

Landsstýrið skjýtur upp at fíggja byggingina lutvíst við láni og lutvíst úr grunninum til nýtt skjalasavn. Við tað at mett verður, at grunnurin, um hann varðveitir verandi játtan sína, er komin upp á 10,5 mió. kr. í 1991, tá ið bygningurin væntandi er liðugur og endaliga skal fíggjast, er lánitørvurin sostatt 11 mió. kr., ið landsstýrið mælir til, at tað fær heimild til at læna. Út frá hesum leggur landsstýrið fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um lántøku til bygging av nýggjum landsskjalasavni.

1. viðgerð 14. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 12. apríl 1988 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir eina samd fíggjarnevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ivan Johannesen heitir á landsstýrið at finna annað hóskandi pláss enn tað í uppskotinum er til at fremja ætlaðu byggingina, tá tað ikki er víst, at hetta grundøkið fer at nøkta tann komandi tørvin hjá Landsskjalasavninum.

2. viðgerð 28. apríl. § 1 varð samtykt við 25-0 atkvøðum, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. Við 25-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 3. mai. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt ivð 28-0 atkvøðum.

FL. j.nr. 324-12. Lóg nr. 58 frá 9. juni 1988.

78 Studenta- og HF-skeið í Norðoyum.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður fram soljóðandi:

Í dag hava vit 2 løgtingslógir um Studenta- og HF-skeið í Føroyum.

Henda lóggáva býtur Føroyar sundur í tvey skúlaøki.

Við lóg nr. 76 frá 21/5-82 er studentaskúli og HF-skeið í Eysturoy eisini umfatandi Norðoyar. Henda lóg var gjørd, av tí at tilgongdin til studentaskúlan var so stór, at ikki var ráðiligt at útbyggja tann longu ov stóra skúlan í Hoydølum.

Úrslitið var, studentaskúli fyribils var lagdur við Gøtugjógv, sum skuldi taka næmingar frá Norðoyum, Eysturoy og norðaraparti av Streymoy. Sum tíðin er fráliðin, má ásannast, at umstøðurnar við Gøtugjógv, eru alt ov trongar.

Tíðin er nú komin, har støða má takast til, hvussu okkara framtíðar skúlaskipan á hesum øki skal skipast.

Havandi í huga tað næmingagrundarlag, ið vit hava í Norðoyum til studentaskúla og IIF-skeiðið kann eingin yvi verða um, at einasta rætta loysnin er at skipa ein studenta og HF-skúla í Norðoyum.

Næmingatalið í dag er hetta:

Næmingar úr Norðoyum, sum í dag ferðast um Lorviksfjørð til Gøtugjógv	ca. 60
Studentaskúlanæmingar í Hoydølum	ca. 10
HF-skeiðið í Klaksvík	ca. 50
	120

Við einum næmingagrundarlagi uppá 120 má verða møguligt at samskipa Studenta og IIF-skeiðið í Klaksvík, soleiðis at vit sleppa frá at flyta so stóran part av okkara ungdómi av plássinum, við tí úrsliti at stórur vandi er fyri, at hesir næmingar ikki koma aftur til heimbygdina.

Møguleikar eru helst eisini fyri, í neyvum samarbeiði við Gøtugjógv, at vera felags um onkrar lærugreinir, har tilgongdin er í minna lagi.

Tað má verða betur at flyta nakrar lærarar eftur og fram, heldur enn eitt so stórt tal av næmingum.

Út frá frammanfyristandandi verður sett soljóðandi.

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri stovnsetan av studentaskúla í Norðoyum frá skúlaárinum 1988/89.

1. viðgerð 14. apríl. Málið varð beint í skúlanevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Anfinni Kallsberg, løgtingsmanni 17. mars. 1988 og eftir 1. viðgerð 12. apríl 1988 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Uppskotið gongur út uppá at áleggja landsstýrinum at skipa fyri stovnsetan av studentaskúla í Norðoyum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Jóannes Dalsgaard, Hergeir Nielsen, og Asbjørn Joensen) skal loyva sær at vísa á, at spurningurin verður loystur við lógaruppskotinum hjá sama meiriluta í tingmáli nr. 134/87 um bygging av ávísum skúlum. Eftir tí nevnda uppskoti verður við lóg heimilað landsstýrinum at seta á stovn sjálvstøðugan studentaskúla í Norðoyum.

Meirilutin setir tí einki uppskot fram.

Ein minniluti (Eilif Samuelsen) vísir á, at ov tíðliga er at taka endaliga støðu, av tí at spurningurin um strukturbroytingar gymnasiuskipanini enn ikki eru liðugt viðgjørdar. Minnilutin setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Óli Breckmann) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 5. mai. Uppskot Anfinns Kallsbergs fall við 12 ja-atkvøðum, 15 atkvøddu ikki, 4 burturstaddir.

Ja atkvøddu:	Dánjal P. Danielsen, Anfinn Kallsberg, Svend Aage Ellefsen, John Petersen, Jógvan Sundstein, Essa Arge, Poul Jacob Olsen, Asbjørn Joensen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes.
Atkvøddu ikki:	Olaf Olsen, Agnar Nielsen, Edmund Joensen, Johs. Martin Olsen, Eilif Samelsen, Henrik Old, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen. Jóannes Dalsgaard, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Hilmar Kass, Signar Hansen, Hergeir Nielsen .
Burturstaddir:	Pauli Ellefsen, Jákup Lindenskov, Adolf V. Hansen, Tordur Niclasen.

79 Broyting í løgtingslóg um Vaktar- og Bjargingartænastuna.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legdi Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Vaktar- og Bjargingartænastuna.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 83 frá 24. oktober 1978 um vaktar- og bjargingartænastuna verður gjørd henda broyting:

§ 1, 2. stk. verður soljóðandi:

»Stovnurin fyrisitur Bjargingartænastuna og fiskivinnueftirlitið sambært føroyska fiskivinnulóggávu. Stovnurin kann innganga samarbeiði við Færøernes Kommando og onnur«.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om Vagt- og Bjærgningstjenesten.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 83 af 24. oktober 1978 om vagt og bjærgningstjeneste foretages følgende ændring:

§ 1, stk. 2 formuleres således:

»Institutionen administrerer bjærgningstjenesten og fiskerikontrollen i henhold til færøsk fiskerilovgivning. Institutionen kan indgå samarbejde med Færøernes Kommando og andre«.

Viðmerkingar:

Sambært føroyska fiskivinnulóggávu er tað Vaktar- og bjargingartænastan, sum hevur eftirlitið við lógunum. Hetta samsvarar ikki við lógina fyri Vaktar- og bjargingartænastuna. Eisini tá tað kemur til bjarging eru ikki greiðar reglur um, hvør ið hevur ábyrgdina. Fólkaflokkurin heldur tað verða ógvuliga óheppið at stovnurin ikki hevur alla ábyrgd av hjálpar og fiskivinnueftirliti á føroyskum sjóøki. Hetta kann eisini fáa óhepnar avleiðingar, tá tað mangan er í einari knappari vending, at avgerðir skulu takast.

Tað sigur seg sjálvt, at staðkendir menn, sum vita alt um veður, vind og streym eru betur til at taka avgerðir um, hvussu fram skal farast. Sum nú er gongur øll umbiðin hjálp um Tórshavnar Radio til Færøernes Kommando. Okkara Vaktar- og bjargingartænasta er nú á einum sovorðnum støði, at vit sjálvir kunnu skipa fyri okkara egnu hjálpartænastu og fiskivinnueftirliti, og vil Færøernes Kom-

mando framvegis hava skip undir Føroyum, kunnu vit gera samstarvsavtalur við teir, men tað skal verða uppá okkara treytir.

Okkara sjóverja kemur framvegis at liggja undir Færøernes Kommando, eftir at hendan broyting er fraind.

1. viðgerð 13. apríl. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 13. mars 1988 beint í fiskivinnunevndina.

Skotið verður upp, at lógin um Vaktar- og Bjargingartænastuna frá 1978 verður broytt, soleiðis at samsvar verður ímillum føroysku fiskivinnulóggávuna og lógina fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna, tá ið talan er um at hava eftirlit.

Uppskotsstillarin heldur tað somuleiðis vera sera óheppið, at Vaktar- og Bjargingartænasta sum stovnur ikki hevur alla ábyrgd av hjálpar- og fiskivinnueftirlitinum á føroyskum sjóøki.

Undir nevndarviðgerðini av málinum, hevur leiðarin á Vaktar- og Bjargingartænastuni givið fiskivinnunevndini frágreiðing um stovnin og umstøður hansara at arbeiða undir.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Signar Hansen, Hilmar Kass, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) tekur undir við uppskoti Fólkafloksins. Sami meiriluti mælir til, at tað verður arbeitt fram ímóti at nýtt skip verður útvegað fyri Ólav Halga.

Meirilutin mælir til, at broyta orðaljóðið í § 1, 2. stk. í uppskoti Fólkafloksins, so tað verður soljóðandi:

broytingaruppskot

»Stovnurin fyrisitur bjargingatænastuna og fiskivinnueftirlitið sambært føroyska fiskivinnulóggávu. Stovnurin kann gera av talu um samarbeiði við Færøernes Kommando og onnur«	»Instutionen administrerer bjergningstjenesten og fiskerikontrollen i henhold til færøsk fiskerilovgivning. Institutionen kan indgå samarbejdsaftaler med Færøernes Kommando og andre«.

Minniluti n (Tórálvur Mohr Olsen, Adolf V. Hansen og Ivan Johannesen) metir at tíðin enn ikki er komin at gera broytingar í viðurskiftinum millum Færøernes

kommando og Vaktar- og Bjargingartænastuna.

Í lógaruppskotinum frá 1978 um Vaktar- og Bjargingartænastuna verður sagt: Stovnurin fyrisitur føroyska partin av Vaktar- og Bjargingartænastuni undir Føroyum í samarbeiði við Færøernes Kommando.

So vítt meirilutanum kunnugt er enn eingin tílík samstarvsavtala gjørd millum Vaktar- og Bjargingartænastuna og Færøernes Kommando.

Minnilutin heitir tí á landstýrið um at skipa fyri hesum samráðingum fyri at fáa eitt neyvari samstarv millum hesar stovnar og loyvir sær at seta fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at skipa fyri samráðingum millum Vaktar- og Bjargingartænastuna og Færøernes Kommando fyri at fáa í lag eina samstarvsavtalu.

2. viðgerð 5. mai. Broytingaruppskot frá meirilutandum í fiskivinnunevndini fall við 16 ja-atkvøðum, 8 nei-aktøvðum, 5 atkvøddu ikki, 3 vóru burtvurstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli solciðis:

Ja atkvøddu: Dánjal P. Danielsen
Anfinn Kallsberg
Olaf Olsen
Svend Aage Ellefsen
Johan Petersen
Jógvan Sundstein
Eliesar Arge
Jóannes Dalsgaard
Hilmar Kass

	Signar Hansen
	Hergeir Nielsen
	Heini O. Heinesen
	Karin Kjølbro
	Øssur av Steinum
	Hans Jacob Debes
	Tordur Niclasen.
Nei atkvøddu:	Ivan Johannesen
	Flemming Mikkelsen
	Agnar Nielsen
	Henrik Old
	Sverre Midjord
	Tórálvur Mohr Olsen
	Vilhelm Johannesen
	Adolf V. Hansen
Atkvøddu ikki:	Eilif Samelsen
	Jákup Lindenskov
	Jørgen Thomsen
	Tummas Arabo
	Asbjørn Joensen
Burturstaddir:	Pauli Ellefsen
	Jógvan Olsen
	Johs. Martin Olsen..

Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum fall við 14-0

80 Broyting í løgtingslóg um tænastumenn landsins.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtinslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumenn landsins.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 3 verður soljóðandi:
»Landsstýrið setir tænastumenn. Landsstýrið kann við kunngerð heilt ella partvís geva setanarmyndugleika sín til annan almennan stovn.«

2. § 12 verður soljóðandi:
»Til at viðgera mál eftir § 11, 2., 3. og 4. stk. setir landsstýrið nevnd við einum umboði úr hvørjum av teimum sambært § 35, 1. stk. góðkendu feløgum og sama tal umboðandi landsstýrið.«

3. § 23 verður soljóðandi:
»Landsstýrið ella tann, sum landsstýrið gevur myndugleika til tess, loysir tænastumenn úr starvi. Tó kann bert landsstýrið loysa tænastumenn úr starvi uttan umsókn.«

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landets tjenestemænd.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 31 af 5. juli 1971 om landets tjenestemænd foretages følgende ændring:

1. § 3 affattes således:
»Tjenestemænd udnævnes af landsstyret. Landsstyret kan dog ved bekendtgørelse helt eller delvis overlade udnævnelseskompetencen til anden offentlig institution.«

2. § 12 affattes således:
»Til behandling af sager efter § 11, stk. 2, 3 og 4, nedsætter landsstyret et nævnt sammensat af en repræsentant for hver af de i § 35, stk. 1, godkendte organisationer og et tilsvarende antal administrationsrepræsentanter.«

3. § 23 affattes således:
»Tjenestemænd afskedeiges af landsstyret, eller den, som landsstyret bemyndiger dertil. Dog kan uansøgt afsked kun foretages af landsstyret.«

4. § 31, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Lønar- og aðrar starvstreytir hjá tænastumonnum verða fyrisettar við avtalu millum landsstýrið og tey í § 35 nevndu feløg«.

5. Í § 34 verður »felag« broytt til »feløg«.

6. § 35 verður soljóðandi:
»Tænastumenn landsins hava rætt at tingast við feløg teirra, um feløgini lúka fylgjandi treytir:

a) Feløgini skulu verða góðkend av landsstýrinum aftaná tilmæli frá lønarráðnum.

b) Allir tænastumenn, sum koma undir hesa lóg, skulu kunna gerast limir í feløgunum, eisini eftirløntir tænastumenn.«

7. § 37, 1. stk. verður soljóðandi:
»Feløgini góðkend eftir § 35, 1. stk. velja hvør 1 lim í lønarráðið, tó skulu feløgini tilsamans hava minst 2 limir.
Landsstýrið velur 1 lim, sum er formaður og løgtingið velur mill um limir sínar eftir lutfalli eitt tal av limum, sum er 1 meira enn umboðini hjá landsstýrinum og feløgunum tilsamans.«

8. § 38, 2. stk., 2. pkt. verður soljóðandi:
»Sorinskrivarin setur 1, landsstýrið 1 og avvarðandi yrkisfelag 1 lim.

9. Í § 39, 1. stk., 2. pkt. verður í staðin fyri »tænastumannafelagið« sett: »avvarðandi yrkisfelag«.

2 §

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

4. § 31, stk. 1 affattes således:
»Løn- og andre ansættelsesvilkår for tjenestemænd fastsættes ved aftale mellem landsstyret og de i § 35 nævnte organisationer.«

5. I § 34 ændres »organisation« til: »organisationer«.

6. § 35 affattes således:
»Landets tjenestemænd har ret til at udøve forhandlinger gennem deres organisationer, såfremt disse opfylder følgende krav:

a) Organisationerne skal være godkendt af landsstyret efter anbefaling af lønningsrådet.

b) Alle tjenestemænd, som kommer under denne lov, skal kunne blive med også pensionerede tjenestemænd.«

7. § 37, stk. 1 affattes således:
»Organisationer, godkendt efter § 35, stk. 1, vælger hver 1 medlem i lønningsrådet, dog skal organisationerne ialt have mindst 2 medlemmer. Landsstyret vælger 1 medlem, der er formand, og lagtinget vælger blandt dets medlemmer et antal, som er 1 mere end landsstyrets og organisationernes repræsentanter tilsammen.

8. § 38, stk. 2, 2. pkt. affattes således:
»Sorenskriveren udpeger 1, landsstyret 1 og pågældende organisation 1 medlem.«

9. I § 39, stk. 1, 2. pkt. sættes i stedet for »tjenestemandsorganisationen«: »pågældende organisation«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Uppskotið til broytingar í tænastumannalógini, sum her verður framlagt, hevur til endamáls at gera skipanina í samband við setan av tænastumannastørvum meira smidliga og gevur møguleika fyri, at felǿg fyri ávísar yrkisbólkar, kunnu fáa samráðingarrættin fyri limir sínar, hóast hesir eru tænastumenn.

Orsøkin er, at landsstýrið kemur við hesu broytingaruppskoti nú, er, at landsstýrið sum fylgja av nýggju stuðulsskipanini og yvirtøkunum í sambandi við hesa í komandi árum fer at seta væl fleiri tænastumenn enn higartil.

Í sambandi við yvirtøkuna av serforsorgini, løgtingsmál nr. 5 frá 1987, hevur landsstýrið sambært lógina skyldu at geva statstænastumonnum á statsligum serforsorgarstovnunum tilboð um setan sum føroyskir tænastumenn. Hevandi í huga tað sermerkta arbeiði innan hesar stovnar, metir landsstýrið, at hesi eisini framyvir eiga at verða sett sum tænastumenn. Á hesum stovnum er í løtuni tørvur á 50 størvum.

Í løtuni eru samráðingar millum landsstýrið og Føroya Pedagogfelag um ein sáttmála sum er grundaður á tænastumannasetan.

Eisini kann hugsast, at fólkaskúlalærarar við tíðini gerast føroyskir tænastumenn, sí løgtingsmál nr. 3, 1987 um ymsar lógir at seta í gildi innan undirvísingarverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini. Í inniverandi skúlaári eru normerað umleið 500 tænastumannastørv.

Innan heilsuverkið eru nú fleiri størv sett sum tænastumannastørv, t.d. yvirlæknar og deildarsjúkrasystrar. Nátúrligt er, at hesi eisini koma undir somu lóg sum aðrir tænastumenn.

Landsstýrið hevur eisini í hyggju í mestum at seta tænastumenn í starv, sum av neyðugum samfelagsligum orsøkum ikki eiga at hava verkfallsrætt. Sum er eru t.d. tollarar tænastumenn av hesi orsøk, men er ætlanin eisini at skipa tænastumannastørv innan t.d. strandferðsluna og postverkið.

Sum er, er tað bert tænastumannafelag landsins, sum hevur samráðingarrættin fyri tænastumenn og umboðar hesar í lønarráði og gerðarrætti. Fyriliggjandi uppskot vil, um tað verður samtykt, tryggja øðrum fakfeløgum somu rættindi fyri limir sínar, um hesir verða tænastumenn landsins.

Eftir galdandi lóg verða øll tænastumannstørv sett av landsstýrinum. Landsstýrið ynskir at fáa heimild at geva honda myndugleika frá sær til annan almennan stovn. Sum dømi kann nevnast, at lærarar á Føroya Sjómansskúla eru tænastumenn og eiga tí eftir § 3 í galdandi lóg at verða settir av landsstýrinum.

Skúlin hoyrir undir undirvísingarverkið og skulu lærararnir eftir lógini setast av Landsskúlaráðnum. Sama kemur at gera seg galdandi, um fólka-

skúlalærarar verða føroyskir tænastumenn. Sostatt er ikki samsvar millum hesr báðar lógirnar.

Landsstýrið hevur gjørt nágreiniliga frágreiðing um tænastumannasetan v.m. og verður hondan latin teirri nevnd, ið kemur at viðgera málið, og eru tí ikki gjørdar viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.

Uppskotið er sent tænastumannafelagnum til ummælis. Felagið hevur havt ov stutt skotbrá til at svara, men kann tað, um tað hevur viðmerkingar, venda sær til nevndina, málið fer í.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 28. apríl 1988 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 beint í arbeiðaramálanevndina.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd arbeiðara málanevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 4. mai. § 1 samtykt við 25-0, § 2 samtykt við 25 0. At málið skuldi fara til 3. viðgerð solciðis samtykt, varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

3. viðgerð 5. mai. Uppskotið endaliga samtykt og avgreitt við 30-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 390-3-11. Lóg nr. 65 frá 9. juni 1988.

81 Løgtingslóg um sáttmálaeftirlit.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um sáttmálaeftirlit.

§ *1.* Landsstýrinum er heimilað at seta á stovn sáttmálastovn. Sáttmálastovnurin er stovnur undir landsskrivstovuni.

§ 2. Allar umsóknir um stuðul til skipabygging verða sendar sáttmálastovninum til viðgerðar. Stovnurin skal meta um tøkniligar loysnir, prísir og allar partar í teimum byggi- og umbyggingarsáttmálum, sum liggja til grund fyri umsóknunum. Havast skulu í huga møguleikarnir at byggja á føroyskari skipasmiðju. Stovnurin skal geva landstýrinum tilráðingar í teimum einstøku byggimálunum. Stovnurin skal hava eftirlit saman við byggiharrunum við bygging og umbygging, sum verða játtað sambært lógini, og gera endaligu virðismetingina.

§ *3.* Landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur fyri virki stovnsins.

§ *4.* Útreiðslur av arbeiðinum hjá stovninum verða bornar av landskassanum.

§ *5.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om et kontraktilsyn.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at etablere et kontraktinstitut. Kontraktinstituttet er et institut under landskontoret.

§ 2. Alle ansøgninger om støtte til bygning af skal indsendes til kontraktinstituttet til behandling. Instituttet skal vurdere tekniske løsninger, priser samt alle dele af de bygge- og ombygningskontrakter, der ligger til grund for ansøgningen. Mulighederne for bygning på færøske skibsværfter bør tages i betragtning. Instituttet skal afgive indstilling til landsstyret i de enkelte byggesager. Instituttet skal sammen med bygherren føre tilsyn med bygning og ombygninger der bliver bevilget i henhold til loven samt foretage den endelige vurdering.

§ *3.* Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse de nærmere bestemmelser for instituttets virksomhed.

§ *4.* Instituttets udgifter afholdes af landskassen.

§ *5.* Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Hóast landsstýrið, við uppskoti til nýggja løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum, hevur minkað munandi um part hins almenna í fíggingina av skipabyggingarmálum, er tað neyðugt í teimum førum veitt verða stuðulslán og landskassaveðhald, at ávisar treytir verða hildnar. Somuleiðis er í sambond við byggimál í dag ofta talan um sera stórar peningaupphæddir, so smá frávik í ætlanum kunnu hava stóran týdning. Týdningarmikið er at ein stovnur er til taks í sonn løtu møguliga byggitilsøgnir verða givnar aftur.

Sum veðhalds- ella lánveitari má landsumsitingin vegna landskassan hava møguleikar at tryggja sær, at øll viðurskifti, í sambond við byggisáttmála og eftirlit við at sáttmálatreytirnar verða hildnar, eru í lagi. Tað kemur alt ov ofta fyri, at byggimál koma aftanum aftur, eftir at veðhald og aðrar veitingar eru játtaðar, tí broytingar eru gjørdar í sáttmálanum, ella aðrar fyritreytir ikki hava hildið. Somuleiðis er av stórum týdningi at tryggja, at ein hóskiligur partur av teirri skipabygging, sum verður játtað, kemur virksominum á føroyskum skipasmiðjum til góðar, og er tað eisini av hesi orsøk neyðugt at hava ein stovn til at geva metingar av øllum skipabyggingarvirksominum.

Mett verður, at ein sáttmálastovnur ríviliga hevði spart seg inn aftur fyri landskassan, fyri einstaka byggisáttmálan og landsbúskapin sum heild. Ætlanin er, at partur av útreiðslunum verða bornar av teimum einstøku byggimálunum á sama hátt sum í løtuni metingar av skipum verða fíggjaðar.

1. viðgerð 19. apríl. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 19. apríl 1988 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Poul Jacob Olsen, Sverre Midjord) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men førir fram tað, sum stendur í samgonguskjalinum um hetta mál: »Stuðulin til skipabygging verður í størri mun tengdur at rationalisering, planlegging, nýtøkni, projekterings- og fyriskipanarorku sum støði undir menning av veruligum kappingarføri.

Í almennu fyrisitingini verður skipað teknisk deild ella *sáttmáladeild* at hava eftirlit við og luttaka í gerð av skipabyggisáttmálum, sum hitt almenna luttekur í. Eisini skal deildin vera føroyskum skipasmiðjum til hjálpar við útvegan og ger av sáttmálum, møguligari samskipan av innkeypi av byggitilfari og virksemi

annars. Spurningurin um eginpening í skipum verður tikin upp við tí fyri eyga at fáa størri samsvar millum reglur og praksis«.

Sostatt setir nevndi meiriluti fram soljóðandi:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ *1.* verður orðað soleiðis:

»Til tess at hava eftirlit við og luttaka í skipabyggisáttmálum, sum hitt almenna luttekur í, verður landsstýrinum heimilað at seta á stovn sáttmáladeild.

2. stk. Sáttmáladeildin skal eisini vera føroyskum skipasmiðjum til hjálpar við útvegan og gerð av byggisáttmálum og virksemi annars.

3. stk. Sáttmáladeildin er stovnur undir landstýrinum.«

§ *1.* formuleres således:

»Med det formål at føre tilsyn med og deltage i indgåelse i skibsbygningskontrakter, som det offentlige deltager i, bemyndiges landsstyret til at etablere et kontraktsinstitut.

Stk. 2. Kontraktsinstituttet skal også være færøske skibsværfter behjælpelig med fremskaffelse og indgåelse af byggekontrakter aktiviteter iøvrigt.

Stk. 3. Kontraktsinstituttet er et institut under landsstyret.«

Minnilutin (Olaf Olsen og Eilif Samuelsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 5. mai. Broytingaruppskot frá meirilutanum fall við 15 ja-atkvøðum, 2 nej-atkvøðum, 13 atkvøddu ikki, 2 burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu:	Henrik Old, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Paul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes, Adolf V. Hansen.
Nei atkvøddu:	Agnar Nielsen, Hilmar Kass.
Atkvøddu ikki:	Dánjal P. Danielsen, Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Svend Aage Ellefsen, John Petersen, Jógvan Sundstein, Essa Arge, Ivan Johannesen, Flemming Mikkelsen, Jógvan Olsen, Johs. Martin Olsen, Eilif Samuelsen, Asbjørn Joensen.
Burturstaddir:	Pauli Ellefsen, Turdur Niclasen.

Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 28-0, §§ 2-5 við 28-0. At málið skuldi fara solciðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 29-0.

3. viðgerð 6. mai. Lógin solciðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 69 frá 9. juni 1988.

82 Endurnýggjan av fiskiskipaflotanum.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

lagtingslov om fornyelse af fiskefláden.

Deild I.

Stuðulslán, lán og studningur.

§ *1.* Úr grunninum til endurnýggingar av fiskiskipaflotanum, stovnaður við løgtingslóg nr. 40 frá 4. mai 1957 fær landsstýrið heimild til at veita hesi stuðulslán, lán, studningar og veðhald fyri lánum eftir reglunum í § 2 og fylgjandi í lógini:

1. Stuðulslán og studning til bygging.
2. Stuðulslán til maskinur og aðrar tekniskar innleggingar.
3. Studning til farmagjald av tilfari til bygging.
4. Veðhald fyri lánum.
5. Kurstapslán.
6. Gjaldsførislán.

Afsnit I.

Støttelån, lån og tilskud.

§ *1.* Landsstyret får bemyndigelse til af fonden til fiskeflådens fornyelse, stiftet ved lagtingslov nr. 40 af 4. maj 1957, at yde disse støttelån, lån, tilskud og garanti for lån efter reglerne i lovens § 2 og følgende:

1. Støttelån og tilskud til bygning.
2. Støttelån til maskiner og andre tekniske installationer.
3. Tilskud til fragt af materiale til bygning.
4. Garanti for lån.
5. Kurstabslån.
6. Likviditetslån.

Deild II.

Stuðulslán og/ella rentustudning til bygging í Føroyum av fiskifari ella opnum útróðrarbáti.

§ 2. Stuðulslán til bygging av deks fiskifari ella opnum útróðrarbáti kann veitast upp til 10% av virðinum við maskinum og øðrum tilhoyri. Tá bygt verður fiskifar yvir 20 Brt. tó upp til 10% og 12% rentustudning. Landsstýrið fyrisetur við góðkenning frá fíggjarnevnd Føroya Løgtings í kunngerð gjøllari, hvussu heimildin verður at nýta.

§ 3. Lánsveiting er treytað av, at viðkomandi eigari hevur í eginpeningi í minsta lagi 10% av virði skipsins.

§ 4. Stuðulslán verður tryggjað við pantirætti í viðkomandi fiskifari innan fyri 90% av virðinum. Lánið verður goldið kontant og verður at afturrinda grunninum, tey fyrstu 3 árini eru avdráttarfrí, lánið verður síðani at rinda aftur yvir 17 ár. Rentan er 4% p.a.
2. stk. Um so er, at skip ella bátur skiftir eigara ella fer í aðra vinnu enn fiskiskap, fellur lánið ella tað, sum stendur eftir til gjaldingar. Landsstýrið kann tó geva loyvi til, at tað, sum eftir stendur av láninum, verður standandi í skipinum ella bátinum.

§ 5. Til fulla ella partvísa endurrinding av serliga innflutningsgjaldinum av tilfari til bygging av deksfiskifari í Føroyum kann skipasmiðjan fáa studning fyri serliga innflutningsgjaldið eftir váttan frá gjaldstovuni.

Afsnit II

Støttelån og/eller rentesubsidier til bygning af fiskefartøj eller åben båd, bygget på Færøerne.

§ 2. Støttelån til bygning af dæksfiskefartøj eller åben båd kan ydes med indtil 10% af værdien med maskine og andet tilbehør. Ved bygning af fiskefartøj over 20 Brt., dog op til 10% og 12% rentesubsidier. Landsstyret fastsætter med finansudvalgets godkendelse nærmere kundgørelse om og hvordan hjemmelen vil være at anvende.

§ 3. Ydelse af lån er betinget af, at vedkommende ejer i det mindste har en egenkapital på 10% af skibets værdi

§ 4. Støttelånet sikres ved pant i vedkommende fiskerfartøj indenfor 90% af værdien. Lånet udbetales kontant og tilbagebetales fonden, de første 3 år afdragsfri, lånet tilbagebetales derefter i 17 år. Renten er 4% p.a.
Stk. 2. Såfremt fartøjet skifter ejer eller overgår til andet erhverv end fiskeri, forfalder lånet eller det, der står tilbage af det, til betaling. Landsstyret kan dog give tilladelse til, at det, der står tilbage af lånet, bliver stående i skibet eller båden.

§ 5. Til fuld eller delvis dækning af den særlige indførselsafgift af materiale til bygning af dæksfiskefartøj på Færøerne kan skibsværftet få tilskud for den særlige indførselsafgift efter dokumentaion fra gjaldstovan.

2. stk. Áðrenn studningurin verður goldin, má skipið vera sýnað, góðkent og skrásett.

Deild III.

Studulslán til maskinu og aðrar tekniskar innleggingar.

§ 6. Studulslán til nýggja maskinu ella maskinu nýklassað frá verksmiðju við í minsta lagi 1 árs garanti og aðrar tekniskar innleggingar í fiskifar, umbygging í sambandi við umlegging til aðra veiðu ella til at gera skipið meira nýtiligt í vinnuni kann veitast við upp til 15% av kostnaðinum, heruppií innleggingarkostnaðinum.

2. stk. Verður arbeiðið gjørt aðrastaðni enn í Føroyum, kann studulslán veitast upp til 8% eftir avgerð frá landsstýri og fíggjarnevnd.

§ 7. Viðvíkjandi treyt til eginpening galda reglurnar í § 3 tilsvarandi. Eginpeningurin verður roknaður av tí virði, skipið hevur, aftaná at tað t.d. hevur fingið nýggja maskinu.

§ 8. Viðvíkjandi tryggjan av láninum, eigaraskifti, og at skipið fer í aðra vinnu enn fiskiskap galda reglurnar í § 4 tilsvarandi. Lánið verður at afturrinda grunninum, tey fyrstu 2 árini eru avdráttarfrí, lánið verður síðani at rinda yvir 8 ár. Rentan er 5% p.a.

Stk. 2. Forinden tilskuddet udbetales, må skibet være synet, godkendt og registreret.

Afsnit III.

Støttelån til maskiner og andre tekniske installationer.

§ 6. Støttelån til ny maskine eller maskine, der er nyklusset fra fabrikken med mindst et års garanti og andre tekniske installationer i fiskefartøj, ombygning i forbindelse med omlægning til anden drift eller til at gøre skibet mere anvendeligt i erhvervet kan ydes med indtil 15% af omkostningerne, heri medregnet installationsomkostningerne.

Stk. 2. Udføres arbejdet i udlandet, kan støttelån ydes indtil 8% efter godkendelse af landsstyret og lagtingets finansudvalg.

§ 7. Vedrørende krav til egenkapital gælder reglerne i § 3 tilsvarende. Egenkapitalen beregnes af den værdi, skibet har, efter at det f.eks. har fået installeret ny maskine.

§ 8. Vedrørende sikkerhed for lånet, ejerskifte, og det, at skibet overgår til andet erhverv end fiskeri, gælder reglerne i § 4. Lånet skal tilbagebetales fonden, de første 2 år er afdragsfri, lånet tilbagebetales over 8 år. Renten er 5% p.a.

Deild IV.

Farmagjaldsstudningur.

§ 9. Til fulla ella partvís endurrinding av farmagjaldsútreiðslunum av tilfari til byggingar av deksfiskifari í Føroyum kann studningur veitast við upp til 4,5% av virði skipsins eftir skjalprógvaðari umsókn.

Afsnit IV.

Fragttilskud.

§ 9. Til hel eller delvis dækning af fragtudgifterne for materiale til bygning af dæksfiskefartøj på Færøerne kan der ydes tilskud med indtil 4,5% af skibets værdi efter dokumenteret ansøgning.

Deild V.

Veðhald fyri lánum.

§ *10.* Landsstýrinum saman við figgjarnevndini er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri lánum til munandi umbygging av deksfiskifari við tí endamáli at gera skipið meiri nýtiligt í vinnuni.
2. stk. Veðhaldið kann vera upp til 30% av íleggingini eftir meting.

§ *11.* Landsstýrinum verður heimilað í samráð við figgjarnevndina landskassans vegna at veðhalda fyri lánum til bygging av deksfiskiførum og fyri at føroyskar skipasmiðjur lúka treytirnar eftir sáttmálanum um bygging av fiskiskipum.
2. stk. Landsstýrinum verður heimilað eftir góðkenning figgjarnevndarinnar landskassans vegna at veðhalda fyri prioritetslánum uppá hægst 10% av byggikostnaðinum í samband við bygging av fiskiskipum yvir 20 Brt. Um bygt verður í Føroyum tó upp til 15%. Veðhaldið kann verða fyri láni sum hevur pant upp til 90% av byggikostnaðinum. Veðhaldið er treytað av, at onnur javnsett trygd fæst fyri hesum parti av fíggingini.

Afsnit V.

Garanti for lån.

§ *10.* Landsstyret bemyndiges til efter forhandling med finansudvalget på landskassens vegne at garantere for lån til væsentlig ombygning af dæksfiskefartøj med det formål at gøre skibet mere brugbart i erhvervet.
Stk. 2. Garantien kan andrage indtil 30% af investeringen i henhold til vurdering.

§ *11.* Landsstyret bemyndiges til efter forhandling med finansudvalget på landskassens vegne at garantere for lån til bygning af dæksfiskerfartøjer og at afgive garanti for, at færøske skibsværfter opfylder kontrakter om bygning af fiskeskibe.
Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til efter godkendelse af finansudvalget på landskassens vegne at garantere for prioritetslån på højst 10% af byggeprisen i forbindelse med bygning af fiskeskibe over 20 Brt. Såfremt fiskefartøjet bygges på Færøerne dog op til 15%. Garantien kan ydes for lån, som har pant op til 90% af byggeprisen. Garantien er betinget af, at anden ligestillet garanti fås for denne del af finansieringen.

3. stk. Reglurnar fyri veðhaldi verða ásettar av landsstýrinum.

§ *12.* Lán, landskassin veðheldur fyri, skal tryggjast við pantirætti í viðkomandi skipi innanfyri 90% av virðinum.

§ *13.* Veðhald hevur ikki við sær, at stuðulslán ikki kann veitast eftir § 6.

Deild VI.

Kurstapslán.

§ *14.* Lán kann veitast svarandi til ein part ella alt kurstapið av lánum, í verða givin móti panti í deksfiskifari.

§ *15.* Kurstapslán verða tryggjað við pantirætti í viðkomandi fiskifari innanfyri 100% av virðinum.
2. stk. Viðvíkjandi treyt til eginpening, eigaraskifti og at skip fer í aðra vinnu enn fiskiskap galda reglurnar í §§ 3 og 4 tilsvarandi.

Deild VII.

Gjaldfarislán.

§ *16.* Lán kann veitast svarandi til avdráttirnar fyrstu 2 árini av lánum úr Færøernes Realkreditinstitut til nýbygging av deksfiskifari.
24.02	Andre varer	af værdien	100%

§ 2.

Som ny § 3 j indsættes:

»af sikkerhedsbeklædning, som kræves på farlige arbejdespladser,«

§ 3.

Som ny § 6, stk. 3 indsættes:

»Landsstyret kan oprette frihavne og tillade oprettelse af frilagre under kontrol af toldmyndighederne.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler med hensyn til ordningerne og kontrol af disse.

§ 4.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í hesum lógaruppskoti til broytingar í tolllógini er talan um ymsar tillagingar, sum hava verið havdar á lofti í sambandi við og aftaná viðtøkuna av inntøkulógunum á heysti 1986.

Til einstøku broytingarnar eru hesar viðmerkingar:

Til pkt. 1.
Í sambandi við at 28% gjaldið verður roknað av cif virðinum var tikin hædd fyri mismuninum, ið kom imillum tollin á útlendskum øli og framleiðslugjaldinum av føroyskum øli.

Henda broyting var ikki samstundis framd fyri »miniralvatn v.m.« Innflytarar av hesum vørum og Industrirådet vegna donsku framleiðararnar hava gjørt vart við hetta.

Til pkt. 2. og 3.
Hesar broytingar standa í sambandi við tey ynskir, ið hava verið frammi um at lætta tollin á musikinstrumentum og teimum hjálpitólum, ið serliga undirhaldstónleikararnir nýta.

8.01 er tollurin á sjálvum instrumentunum (15%), meðan broytingarnar í 8.02 eru gjørdar fyri at forsterkarar, hátalarar, mikrofonir o.tl. (vørur í vøruskránni til innflutningshagtøl nr. 85.18). Í *8.04* eru tiltaks- og eykalutir til sjónvarpsmóttakarar strikaðir, tí tað er torført at kenna nógvar av hesum eykalutun frá eykalutum til onnur elektronisk tól. Nýggi teksturin av *08.04* er partur av fyrrverandi 08.02. *08.05* a) fyrrverandi 8.05 b) er partur av fyrrverandi 8.02.

Til pkt. 4.
Tað hevur ofta verið borið fram, at leikutoy er alt ov høgt tollað, t.d. sammett við leik-og ítróttarlutir í verða tollaðir við 20% av virðinum. Skotið verður tí upp, at tollurin fyri leikutoy eisini verður 20%.

Til pkt. 5.
Broytingin stendur í sambandi við uppskot um broyting í lógini um serligt innflutningsgjald, hvar skotið verður upp, at serútgjørdir alibátar verða undantiknir serliga innflutningsgjøldunum.

Til pkt. 6.
Broytingin or fyrr gjørd lutvís fyri at fáa tekstin at samsvara við, hvussu summar av hesum vørum hava verið tollaðar, og lutvíst fyri at gera tað heilt greitt hvørjar vørur eru undantiknar, t.e. vørur undir 94.02 í vøruskránni.

Til pkt. 6 - 7 - 8 og 10
Broytingarnar í tollinum á gulli - silvuri og ørðum aðalmetalli eru gjørdar, tí at sølan av hesum vørum sær út til at verða steðgað.

Skotið verður tí upp, at innflutningsgjaldið, ið er 100%, verður strikað.

Metingar um broytingar í tollinntøkunum orsakað av tollógarbroytingum, sum eru skotnar upp, byggja á innflutningstølini 1986, eru, at tollinntøkan lækkar við umleið 3. mill. kr.

Að § 2

Trygdarbúnaður verður í løtuni tolladur eins og tilsvarandi búnaður til vanliga nýtslu. Soleiðis verða trygdarskógvar (við stálinnleggi) tollaðir sum vanligir skógvar. Hugsanin er, at loyvi um frítøku fyri toll eftir hesari lóg, (men ikki eftir lógunum um serligt og eyka innflutningsgjald) verður givið í samráð við Arbeiðseftirlitið.

Að § 3

Hugsan um frígoymslur og fríhavn hevur verið frammi fyrr, men organtíð endaliga viðgjørd.

Nú stovnað er føroyskt flogfelag við fastari støð í Føroyum, er umbøn komin um loyvi, at tær vørur, ið flogfarið skal nýta umborð, t.d. parfuma, chokolada, cigarettir og spiritus, kunnu goymast ótollaðar í Føroyum. Slíkar frígoymslur kunnu eisini hugsast fyri stórinnflutning av øðrum vørum.

Eisini hevur verið ynski frammi um møguleikar fyri fríhavn. Í einari fríhavn eru vanliga møguleikar fyri goymslu av vørum eins og í frígoymslum, men eisini er møguleiki at seta á stovn virkir innanfyri tollgirðingina at framleiða vørur til útflutnings ella til innlendska nýtslu, men sum tá verða tollaðar við flutning úr fríhavnini.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Mijord, Heini O. Heinesen, Hilmar Kass og Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskotinum.

Undir viðgerðini hevur skattanevndin havt fund við umboð fyri Føroya Tollstovu, har mælt varð til at dagføra ordingina í galdandi tolllóg viðvíkjandi

lutum, eykalutum, útgerð til loftfør, sí § 3 við undirpunktum í tolllógini. Hesum tekur ein sand skattanevnd undir við. Skattanevndin setir sostatt fram soljóðandi.

broytingaruppskot

§ 2 verður orðað soleiðis:

»1) Sum nýggj § 3, j verður sett:
»av trygdarbúnað, ið kravdur er á vandamiklum arbeiðsplássum«.

2) Sum nýggj § 3, k, verður sett:
»lutir, eykalutir og eykaútgerð til loftfør eins og flogvenjingarútgerð og lutir, eykalutir og útgerð til hesar. Landsstýrið kann gera skrá yvir, hvørjar vørur koma undir tollfrælsi eftir hesari reglu.«

§ 2 formuleres således:

»1) Som ny § 3, j indsættes:
»af sikkerhedsbeklædning, som kræves på farlige arbejdspladser.«

2) Som ny § 3, k, indsættes:
»dele, tilbehør og udstyr til luftfartøjer og flyvetræningsudstyr samt dele, tilbehør og udstyr hertil. Landsstyret kan udarbejde fortegnelse over hvilke varer, der kommer under toldfrihed efter denne bestemmelse.«

Ein minniluti (Agnar Nielsen) er samdur við uppskoti landsstýrisins, men tekur ikki undir við § 3 um fríhavnir og frígoymslur.

2. viðgerð 4. mai. § 1 samtykt við 29-0, broyting til § 2 samtykt við 29-0, § 3 varð samtykt við 18 ja-atkvøðum, 2 nei-atkvøðum, 9 atkvøddu ikki, 3 vóru burturstaddir.

Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu:	Dánjal P. Danielsen, Svend Aage Ellefsen, John Petersen, Jógvan Sundstein, Essa Arge, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Jóannes Dalsgaard, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes, Adolf V. Hansen.
Nei atkvøddu:	Agnar Nielsen, Johs. Martin Olsen.
Atkvøddu ikki:	Pauli Ellefsen, Ivan Johannesen, Flemming Mikkelsen,

Burturstaddir:	Jógvan Olsen, Eilif Samelsen, Henrik Old, Jákup Lindenskov, Poul Jacob Olsen, Signar Hansen, Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Tordur Niclasen.

At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 23-0 atkvøðum.

5. mai legði skattanevndin fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, pkt. 24 verður skoytt uppí: »brillugløs, ikki ísett, og kontaktlinsur úr glasi ella øðrum tilfari«.	1. I § 1, pkt. 24 tilføjes: »brilleglas, ikke isat, og kontaktlinser af glas eller andet materiale«.
2. Í § 2 verður skoytt uppí sum nýtt pkt. 1: »bjargingarbeltir og vestar. Neyðransóuir og onnur lógarbundin útgerð til bjargingarbátar og flakar«.	2. I § 2 tilføjes som nyt pkt. 1: »redningsbelter og -veste. Nødrationer og anden lovudkrævet udrustning til redningsbåde og -flåder«.

3. viðgerð 7. mai. Broytingaruppskotið frá skattanevndini pkt. 1 og 2 bæði samtykt við 29-0 atkvøðum. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 46 frá 26. mai 1988

88 Partapeningur í P/f Porkeris Roykivirki.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um partapening í P/f Porkeris Roykivirki.

lagtingslov om aktier i P/f Porkeris Roykivirki.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 400.000 kr. í partapeningi í P/f Porkeris Roykivirki og at leggja út peningin úr landskassanum.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i P/f Porkeris Roykivirki med et beløb på 400.000 kr. og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ *2.* Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin, fyrrenn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.

§ *2.* Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales, før alle betingelser, landsstyret skulle stille, er opfyldt.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerðing.

§ *3.* Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

P/f Porkeris Roykivirki hevur í hyggju at seta á stovn virki at roykja fisk í, serstakliga laks.

Virkið verður fært fyri at roykja 1 tons av lidnari vøru um dagin, og er ætlanin er roykja 200 tons um árið, men javnvág er í rakstrinum við 150 tonsum.

Kostnaðurin fyri virkið er mettur til 12.490.000 kr. og verður fíggingin:

Menningargrunnurin lán	kr.	4.731.000
Menningargrunnurin studning	kr.	300.000
Kreditfelagið Danmark	kr.	4.000.000
Banki	kr.	1.000.000
Menningargrunnurin og Banki	kr.	459.000
Partapeningur	kr.	2.000.000
	kr.	12.490.000

Partapeningurin er settur til 2 mió. kr. og søkt verður um, at 20% ella 400.000 kr. verður teknaður av landskassanum.

Landsstýrið mælir til at tekna 20% av partapeninginum.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 17. apríl 1988 beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið. Í fleiri ár hevur P/f Porkeris Roykivirki arbeitt við ætlanum um at seta á stovn virki at roykja fisk, serstaklig laks. Eisini er ætlanin at kryvja laks.

Figgjarnevndin hevur kannað marknaðarútlitið og sett fyrispurningar til føroyskar útflytarar. Her er frá føroyskari sølufyritøku víst á, at møguleikar eru fyri at skapa ein marknað í USA.

EF hevur verjutoll. Lítið verður selt av laksi til EF, men av royktari hýsu og toski vórðu í 1987 seld 170 tons, og væntast minst sama nøgd seld í 1988. Í EF er yvirkapasitetur av roykivirkjum.

Út frá teim upplýsingum, ið eru í málinum, er figging útvegað fyri alla ætlaða íløguna. Yvirlit yvir lántilsagnir er í viðmerkingum landsstýrisins.

Útlitið fyri roykivirksemi tykist ivasamt í løtuni, men út frá tí, at figgingarstovnarnir hava álit til ætlaða virkið, kann samd nevnd mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 6. mai 1988. § 1 varð samtykt við 26-0 atkvøðum, § 2 við 27-0, § 3 uttan atkvøðugreiðslu. Við 25-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 6. mai. Við 25-0 atkvøðum varð samtykt at útseta málið.

F.L. j.nr. 1427-1-199.

89 Uppskot um broyting í skattalógini.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Svend Aage Ellefsen, løgtingsmaður fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at leggja fyri løgtingið uppskot um broytingar í skattalógini, soleiðis at sjófólk fáa rætt at draga frá skattskyldugu inntøkuni útreiðslur til telesamband við heimið fyri tíðina, tey eru til skips.

Viðmerkingar:

Stóran part av árinum er einasta samband, sjófólk okkara hava við heimið gjøgnum telefon.

Hjá teimum, sum eru burtur heiman, eitt nú eysturi í Barentshavinum, við Svalbard, Canada, Labrador, Grønland o.s.fr. gerst telefonrokningin tíðum ógvuliga stór, og mangan man tað snúgva seg um fleiri túsund krónur árliga.

Men eisini hjá teimum, sum troyta heimaleiðirnar, man henda útreiðslan kennast tyngjandi. Og órættvíst má tað sigast at verða, at skatturin skal leggja á hesar upphæddir, sum mugu metast neyðugar rakstrarútreiðslur fyri teir av okkara samfelagsborgarum, sum hava yrki sítt á sjónum.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Svend Aage Ellefsen, løgtingsmanni 17. mars 1988 og eftir viðgerð 7. apríl 1988 beint í skattanevndina.

Skotið verður upp, at løgtingið samtykkir at landsstýrinum verður álagt, at leggja fyri løgtingið uppskot um broytingar í skattalógini, soleiðis at sjófólk fáa rætt at draga frá skattskylduga inntøkuni útreiðslur til telesamband við heimið fyri tíðina, tey eru til skips.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hilmar Kass, Heini O. Heinesen og Agnar Nielsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 5. mai. Uppskot um at beina málið í millumtinganevnd fall við 9-0. Upprunauppskotið fall við 12-0 atkvøðum.

90 Frammíhjárættur til fiskimenn at keypa/byggja fiskiskip.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um frammíhjárætt til fiskimenn at keypa og/ella byggja fiskiskip.

lagtingslov om fortrinsret til fiskere at købe og/eller bygge fiskeskibe.

§ *1.* Tá søla av fiskiskipi fer fram, og tá loyvi til bygging av fiskiskipum verður givið, hava fólk, ið eru ella hava verið aktiv innan fiskiskap umborð á skipi, framíhjárætt til hesi skipakeyp og hesar byggisáttmálar.

§ *1.* Når tilladelse til bygning af fiskeskib meddeles, har folk, der er eller har været aktive indenfor fiskerierhvervet, på skibsdæk, fortrinsret til disse skibskøb og disse byggekontrakter.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin, men er tó ikki galdandi fyri sáttmálar, sum gjørdir eru, áðrenn lógin er lýst .

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks, men er dog ikke gældende for kontrakter, der er indgået, inden loven er kundgjort.

Viðmerkingar:
Tá ringar tíðir hava verið, hava tað altíð verið fiskimenn av øllum bólkum, sum hava tikið seg saman fyri at vinna landinum til lívsins uppihald. Seinnu árini hevur rákið verið tann vegin, at onnur enn fiskimenn hava havt lættari við at fingið loyvi at bygt fiskiskip til teir lukrativastu veiðumøguleikarnar, meðan fiskimenn hava møtt sera stórari mótstøðu, sjálvt tá talan hevur verið um skip fyri skip, ja, eisini tá talan hevur verið um veiðu av ónýttum møguleikum. Um hetta rákið (hesin tendensurin) heldur fram, verður endin, at fiskimenn eingi skip eiga sjálvir.

Tað eru teir, sum sjógvin røkja, sum hava fingurin á pulsinum, og hevur tað tí alstóran týdning fyri framtíðar fiskivinnuna, at sum flest av okkara fiskiskipum verða á teirra hondum.

1. viðgerð 19. apríl. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Løgtingsmál nr. 90/1987: Framíhjárættur til fiskimenn at keypa/byggja fiskiskip er lagt fram av Framsóknarflokkinum tann 17. mars 1988. Eftir fyrstu viðgerð tann 19. apríl 1988 varð málið beint í fiskivinnunevndina.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður funnist at, at tey seinnu árini hevur tað verið soleiðis, at onnur enn fiskimenn hava havt lættari við at fingið loyvi at bygt fiskiskip til teir veiðuhættir, ið kasta mest av sær, meðan fiskimenn hava møtt stórari mótstøðu, sjálvt tá talan hevur verið um skip fyri skip, eisini tá talan hevur verið um veiðu av ónýttum møguleikum.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt uppskot Framsóknarfloksins og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Signar Hansen, Tórálvur M. Olsen, Hilmar Kass, Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen og Eilif Samuelsen) kann ikki taka undir við uppskotsstillaranum, tá hann sigur, at tað hevur verið sera trupult hjá fiskimonnum at kunna keypt/bygt skip, tey seinnu árini, sammett við aðrar.

Meirilutin heldur tvørturímóti, at dentur hevur verið lagdur á at jústfiskimenn hava fingið framáhjárættindi, tá ið talan hevur verið um at veita slík loyvir.

Meirilutin kann harafturímóti taka fult undir við teimum viðmerkingum frá uppskotsstillaranum, tá sagt verður, at tað er av stórum týdningi fyri framtíðar fiskivinnuna, at sum flest av okkara fiskiskipum verða á hondum teirra, ið sjógvin røkja.

Meirilutin (Sami) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 4. mai. Uppskotið frá Framsóknarflokkinum fall við 9-0 atkvøðum.

91 Uppskot um tíðaravmarkaða afturrindan av tolli og avgjøldum til alivinnuna.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

lógtingslóg um tíðaravmarkaða afturrindan av tolli og avgjøldum av tilfari til alivinnuna

løgtingslóg um tíðaravmarkaða afturrindan av tolli og avgjøldum av tilfari til alivinnuna,

§ *1.* Landskassin afturrindar alivinnuni allan toll og øll avgjøld av tilfari, fóðri og innpakningi v.m., sum brúkt verður til alivinnuna.
2. stk. Til allar føroyskar vørur, sum brúktar verða innan alivinnuna, letur landsstýrið eitt endurgjald, sum svarar til toll og avgjøld, sum mett verður, at viðkomandi vøra hevur lagt eftir seg í føroyska samfelagnum.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1988 og fer úr aftur gildi 1. juli 1992.

lov om tidsbegrænset refusion af told og afgifter af materialer til fiskeopdræt

lagtingslov om tidsbegrænset refusion af told og afgifter af materialer til fiskeopdræt,

§ *1.* Landskassen refunderer fiskeopdrætten al told og alle afgifter af materialer, foder og emballage m.v., der anvendes til fiskeopdræt.
Stk. 2. Til alle færøske varer, der anvendes i tilknytning til fiskeriopdræt, foretager landsstyret en refusion, der modsvarer den told og de afgifter, som man skønner, at vedkommende vare har bidraget med i det færøske samfund.

§ *2.* Denne lov træder i kraft 1. juli 1988 og ud af kraft den 1. juli 1992.

Viðmerkingar:

Tað eru tekin um, at alivinnan kann gerast okkara útflutningsálit næst eftir fiskivinnuna. Alivinnan er í dag sum eitt nýføtt barn, hon krevur at vera væl viðfarin, tolir ikki somu viðferð, sum tað meira tilkomna.

Verður ein vinnan sett á stovn her á landi, sum hevur til endamáls at góðska

innfluttar vørur og síðan útflyta tær aftur, fær viðkomandi vinna toll og avgjøld afturrindað sambært lóg gávuna.

Tað, sum í verulelkanum fer fram í alivinnuni, er júst tað, at innfluttar vørur verða »umgjørdar« til stór útflutningsvirðir, og átti vinnan tí um ikki av øðrum, so av hesi orsøk at fingið toll og avgjøld afturrindað.

Men eisini onnur viðurskifti tala fyri at frítaka alivinnuna fyri toll og avgjøld. Meginreglan í øllum toll-og avgjaldslógum átti at verið, at bert vørur til endaliga nýtslu her á landi komu undir toll- og avgjaldsskipanina. Tí verður tilfar og annað, sum brúkast skal í eini útflutningsframleiðslu, óneyðuga tyngt við fíggjarligum byrðum, so minkar kappingarførið tilsvarandi.

Vit vita longu í dag, at alivinnan framyvir kemur í harða kapping aðrastaðir frá, tí alingin kring allan heimin veksur í eini høgari potens. Tað er tí umráðandi, at vit búgva okkara alivinnu út, soleiðis at hon kann standa ímóti teirri kapping, ið koma má uttaneftir.

Alivinnuan er nýggj vinna; men hon er vinna, sum hevur fleiri ár á baki við stórum útreiðslum, áðrenn nakað oyra kemur inn. Tað vil aftur siga, at hon hevur stórar rentubyrðar at dragast við. Renta er tann mest vanliga orsøk til vinnudeyða, tann sokallaða rentudeyðan. Eingin orsøk skuldi verið til, at hitt almenna skundar undir, at rentudeyðin fær sína offur. Hin vegin verður ein afturrindan av tolli og avgjøldum ella ein fritøka av hesum gjøldum sum ein vaksinering móti vandanum at gerast offur fyri rentudeyðanum.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina og er ikki afturkomið haðani.

92 Uppskot um broyting í kommunalu vallógini fyri at tryggja smábygdunum umboð í bygdarráðnum.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at útarbeiða eina nýggja kommunala vallóg, sum er soleiðis háttað, at allar bygdir í somu kommunu fáa minst ein bygdarráðslim, sum býr í bygdini, at umboða seg. Hesir bygdarráðslimirnir (ein fyri hvørja bygd) skulu takast út soleiðis, at tann í bygdini búgvandi, ið annars vildi verið fyrst valdur, verður úttikin. Listi, sum fær ein soleiðis valdan bygdaráðslim, má eftir atkvøðutalinum annars, eiga rættin til ein mann. Í aðrar mátar skal útrokningin fara fram so nær verandi reglum sum gjørligt. Um neyðugt kann talið av bygdarráðslimum økjast, har bygdirnar eru nógvar.

Lógaruppskot skal vera lagt fyri tingið í ólavsøkutingsetuni, soleiðis at kommunuvalini til heystar kunnu fara fram eftir nýggju reglunum.

Viðmerkingar:

Í teimum kommunum, har fleiri bygdir eru um sama bygdaráð, verða tær smærru kommunurnar mangan ikki umboðaðar í bygdaráðnum. Sambandið millum borgara og kommunu er stórt í dag, og roknast kann við, at hetta samband kemur at vaksa við tíðini. Tað er tí umráðandi, at borgararnir í eini bygd hava eitt umboð í bygdaráðnum, sum er kent við viðurskiftini í bygdini.

Kommunala valskipanin er soleiðis, at vanliga fær størsta bygdin ella størstu bygdirnar allar bygdaráðslimirnar. Líta vit at t.d. Fuglafjarðar kommunu, sum hevur havt tvær bygdir og nú hevur tríggjar bygdir, so hava hvørki gamla bygdin Hellurnar við sínum umleið 50 íbúgvum, ella nýggja bygdin Kambsdalur við

sínum umleið 60 íbúgvum nakran møguleika at fáa mann í bygdarráðið, hvørki einsæris ella saman, tí samlaða fólkatalið í kommununi er fram ímóti 1700, og bert 9 bygdaráðslimir verða valdir. Tó skal sigast, at Hellurnar í fleiri valskeið hevur havt mann sitandi í bygdarráðnum, men hetta tí hann fekk nógvar atkvøður í Fuglafirði.

Onnur dømi um kommunur við fleiri bygdum kundu verið nevndar, men bert Runavíkar kommuna skal verða nevnd. Eisini hon hevur 9 bygdaráðslimir, men har eru ikki fleiri enn 9 bygdir. 6 av teimum hava umboð í bygdaráðnum, meðan 3 ikki eru umboðaðar av lokalum umboði. Bygdirnar eru Skipanes (0), Søldarfjørður (1), Lambareiði (0), Lamba (1), Glyvrar (2), Saltangará (3), Runavík (1), Rituvík (1) og Æðuvík (0). Tølini í klombrum siga talið á bygdarráðs/býráðslimum í bygdini.

Hugsanin við hesum uppskoti er at tryggja, at ein bygd altíð fær minst eitt umboð í bygdaráðið.

1. viðgerð 14. apríl. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Uppskotið varð lagt fram av Framsóknarflokkinum 17. mars 1988.

Við 1. viðgerð 14. apríl varð málið beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at leggja fyri tingið soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at gera uppskot til broytingar í kommunalu vallógini, sum skulu tryggja, at smábygdir, sum eru í kommunufelagsskapi við størri bygd, fáa ávirkan á stýring og umsiting kommununnar.

2. viðgerð 5. mai. Uppskotið til samtyktar frá samdari rættarnevnd samtykt við 25-0 atkvøðum.

93 Broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 um serligt innflutningsgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2, stk. 1. verður orðað soleiðis:
   »*Undantiknar frá innflutningsgjaldinum eru hesar vørur:* Rug, hveiti, bygg, havragrýn, sukur, grovt salt, fóðurevni, kol, koks, cinders, petroleum, benzin, brenniolja, smyrjiolja, gass, skip og bátar 5 br. reg. tons og størri, (tó ikki lystskip), flogfør og tyrlur, tunnustavar, gávupakkar, medicinvørur, prentpappír, bøkur og bløð (tó ikki prentlutir av sølufremjandi slag).«
2. § 2, stk. 2., pkt. 8 verður broytt soleiðis: »Maskinur til fiskiídnað og fiskaaling:
   a) Vektir og vektskipanir
   b) Aðrar maskinur«
3. § 2, stk. 2., pkt. 9 verður orðað soleiðis: »Fiskakassar og -kør, filetbakkar.«

lagtingslov om ændring i lagtingslov om særlig indførselsafgift.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 9 fra 27. april 1961 om særlig indførselsafgift med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. § 2, 1. stk. affattes således:
   »*Undtaget fra indførelsesafgiften er disse:* Rug, hvede, byg, havregryn, sukker, groft salt, foderstof, kul, koks, cinders, petroleum, benzin, brændselsolie, smørolie, gas, skibe og både 5 br. reg. tons og større (dog ikke lystskib), fly og helikoptere, tøndestave, gavepakker, medicinalvarer, trykpapir, bøger og blade (dog ikke salgsbrochurer og lignende)«.
2. § 2, stk. 2., pkt. 8 ændres således »Maskiner til fiskeindustri og fiskeopdræt:
   a) vægter og vægtsystemer
   b) Andre maskiner«.
3. § 2. stk. 2. pkt. 9 affattes således: »Fiskekasser og kar, filetbakker.«

4. § 2, stk. 2., pkt. 15 verður broytt soleiðis:
»Siglingar-, leitingar- og kommunikatiónsútgerð, skips- og bátamotorar, ljósmotorar, egningarmaskinur, skrúvudysur, kraftblokkar, trolspøl, snurpispøl og onnur skipsspøl.«
5. § 2, stk. 2., pkt. 16 verður strikað
6. Sum nýggj § 2, stk. 2., pkt. 18 verður sett:
»Til fiska- og skeljaaling:
a) Serútgjørdir alibátar undir 5 BRT
b) Aliringar og alibrúk
c) Flotbrýr
d) klekiútgerð (bakkar, rennur)«
7. Sum nýggj § 2, stk. 2., pkt. 19 verður sett:
»*Ymiskt byggitilfar:*
Cement, ótilgjørt timbur, krossfiner, byggiplátur, gipsplátur, masonitplátur, laminatplátur, stein- og glasull og glastrevja, plastrávørur, taksteinur, tjørupapp, tak- og klædningsplátur, planglas i talvum, ótilgjørt jarn og stál (plátur, bjálkar og profilir), ótilgjørt aluminium (plátur, bjálkar og profilir).«

§ 2.

Eftir umsókn kunnu virkir í alivinnuni fáa toll, ið er goldin, áðrenn hendan lógin fær gildi, endurgoldnan í samsvar við § 1
2. *stk.* Smoltstøðir og onnur virkir í fiska- og skeljaalivinnuni, kunnu eftir umsókn fáa toll av útgerð til fastar innleggingar, ið er goldin áðrenn henda lógin fær gildi, endurgoldnan eftir somu reglum sum fiskavirkir annars.

4. § 2, stk. 2., pkt. 15 ændres således:
»Navigations-, eftersøgnings- og kommunikationsudstyr, skibs- og bådmotorer, lysmotorer, agnmaskiner, skruedyser, kraftblokke, trawlspil, snurpespil og andre skibsspil.«
5. § 2, stk. 2., pkt. 16 udgår.
6. Som ny § 2, stk. 2., pkt 18 indsættes:
»Til fiske- og skaldyrsopdræt:
a) Særudrustede opdrætsbåde under 5 BRT
b) Opdrætsringe og opdrætsbure
c) Flydebroer
d) Udklækningsudstyr (bakker, afløbsrender)«
7. Som nyt § 2, stk. 2., pkt. 19 indføres:
»*Diverse byggematerialer:* Cement, ubearbejdet træ, krydsfiner, byggeplader, gipsplader, masonitplader, laminatplader, sten- og glasuld og glasfibre, plastråvarer, tagsten, tjærepap, tag og beklædningsplader, planglas i tavler, ubearbejdet jern og stål (plader, bjælker og profiler), ubearbejdet aluminium (plader, bjælker og profiler).«

§ 2.

Efter ansøgning kan virksomheder indenfor fiske og skaldyr opdrætsindustrien få refunderet told, der er betalt før denne lovs ikrafttræden i overensstemmelse med § 1.
Stk. 2. Smoltstationer og andre virksomheder inden for fiske- og skaldyrsopdræt, kan efter ansøgning få told af materialer til faste installationer, som er betalt før denne lovs ikrafttræden refunderet efter de samme regler som fiskefabrikker.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í lógaruppskotinum, ið her verður lagt fram verða gjørdar broytingar soleiðis, at alivinnan kann fáa sømdir á leið við tær, ið fiskivinna og fiskaídnaður fær viðvíkjandi tolli.

Herumframt er uppskot um at frítaka ávisar rávørur til handverk og idnað. Hetta eru rávørur, sum virkir í stóran mun fáa endurgoldnan tollin av sambært loyvi eftir kunngerð nr. 1 frá 19. mars 1973 um endurrinding av innflutningsgjaldi fyri rávørur og um gjaldfrían innflutning av rávørum til idnaðarvirkir.

Tey ídnaðarvirki fyrst og fremst talan er um, eru sniðhúsavirkir, betongstoypivirkir, plastbátavirkir, virkir innan metalídnað o.s.fr.

Hugsanin við broytingini er at lætta um fyrisitingina á hesum økj og eisini at seta framleiðarar á hesum økjum eins. T.d. er ofta torført at avgera, tá umsókn er til viðgerðar, um talan er um sniðhúsavirki ella talan er um byggimeistara, ið byggir 1 og 1 hús, men sum harfyri kunnu verða av sama sniði.

Ætlanin við uppskotinum er at fáa somu treytir fyri hesar bólkar.

Síðani er ætlanin at taka tey loyvir, ið umfata undantiknu rávørurnar, aftur samstundis sum allar tær vørur, ið higartil hava verið umfataðar av loyvinum, framyvir ikki kunnu koma undir eitt loyvi, t.v.s. at eitt byggivirki framyvir bert fær tær rávørur, ið her eru nevndar, til lægri toll, meðan ymiskt annað tilfar, t.d. seymur, besløg o.s.fr. framyvir ikki fáast til niðursettan toll.

Viðvíkjandi jarni og stáli er serliga at viðmerkja, at fleiri verksmiðjur í áravís hava átalað, at tað illa letur seg gera at gera umbyggingar av skipum í Føroyum, tí tollurin er 28%, meðan eingin tollur er, tá arbeiðið verður gjørt uttanlands. Tollendurgjald til skipasmiðjur verður bert latið í sambandi við nýbygningar.

Prentsmiðjufelagið hevur gjørt vart við, at hópur av prentlutum av sølufremjandi slag (sølubrochurur, katalog, smáprent o.tl.) sb. pkt. 5 í reglunum fyri kapitul 49 í vøruskránni, verða innfluttar sum bøkur og hløð og sostatt sleppa undan tolli og eisini eyka innflutningsgjaldi.

Til einstøku broytingarnar verða gjørdar hesar viðmerkingar:

Ad § 1

Til pkt. 1:

Umframt broytingina viðvíkjandi prentlutum sum nevnt frammanfyri eru »flogfør og tyrlur« sett inn í § 2, stk. 1.

Til pkt. 2:
Broytingin er í samsvar við tað, ið er sagt frammanfyri. Ivi hevur higartil verið um vektir á fiskavirkjum. Tí eru tær serliga nevndar.

Til pkt. 3:
Fiskakassar og -kør hava ikki verið undantikin, sjálvt um hetta er náttúrligur partur av útgerð á fiskavirkjum. Herumframt er at siga, at meginparturin av fiskakassunum verður keyptur av skipum í útlendskari havn.

Til pkt. 4:
Fyrrverandi pkt. 15 og 16 verða sligin saman og krav við um umsókn eins og krav um minstavirðið uppá 15.000,00 kr. verður strikað. Somuleiðis krav um at bátamotorar skula setast í brúktan bát, ið verður nýttur burturav til fiskivinnu. Hetta seinasta samanborið við rávørur til plastbátavirkini, sum í løtuni fáa motorarnar sum rávøru til bátaframleiðslu.

Til pkt. 5:
Pkt. 16 fellur burtur.

Til pkt. 6:
Talan er um ymiska útgerð til alivinnuna.

Til pkt. 7:
Tilfarið, talan er um at gera undantak fyri, er byggitilfar, sum í vøruskránni koma undir 25.23, 39.01-39.14, 44.01-44.13, 68.09 68.06, 70.19, 68.10, 69.07, 70.03-70.05, 48.07 (takpapp), 76.01-76.06.

Ad § 2

Henda grein er sett inn vegna tess, at alivinnan ikki - sum ein kundi hildið rímuligt -- hevur fingið somu sømdir sum fiskivinnan og fiskavirkir annars.

Í uppskoti til løgtingslóg nr. 1/1983 varð skotið upp at veita smolt- og alistøðum tær sømdir, sum nú liggja í hesum uppskoti. Nevnda løgtingsmál var ikki framt. og tíðani eru ikki tikin stig til broyting, sjálvt um málið fleiri ferðir hevur verið havt á lofti.

Í løtuni er 16 smoltstøðir, sum eru útbygdar. Tollurin (22%), ið hesar smoltstøðir hava goldið og sum tala kann verða um at endurgjalda, verður mett at liggja *umleið 4 mió. kr.*

Endurgjald til alistøðirnar verður munandi minni.

Metingar annars um, hvussu stórur tollmissurin verður við hesum uppskoti síggja soleiðis út:

Fyri byggitilfar, cement, jarn og stál v.m. verður tollmissurin, tá endurgjald eftir núgaldandi reglum er drigið frá, mettur til *umleið 10 mió. kr.*

Nakað meira av tollinntøkum kann roknast við og kanska samstundis meira arbeiði til føroysku prentsmiðjurnar, um sølufremjandi prentlutir ikki longur fáa tolllætta.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og er ein samd nevnd komin til ta niðurstøðu, at í § 1, pkt. 6 eigur sum nýtt pkt. e, at verða tikin við skiljingaramboð, tá her er talan um eitt tól, sum eftir sakligum metingum eigur at verða við í tí bólki av útgerð og tólum, sum umrøddur er í avvarðandi grein. Talan er um upptøku- og sorteringstól, sum er av stórum týdningi fyri forsvarliga viðgerð av alifiskinum.

Menningarstovan hevur í skrivi dagfest 7. apríl 1988 latið viðmerkingar til hetta løgtingsmál til Føroya Landsstýri, og hevur skattanevndin havt høvi til at kunna seg við hetta skriv.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Heini O. Heinesen, Hilmar Kass og Jógvan Sundstein) mælir til, at samtykkja uppskot landsstýrisins við omanfyri nevndu broyting og setir fram soljóðandi:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, pkt. 6 verður sett sum:	I § 1, pkt. 6 indsættes som:
»e) skiljingaramboð.«	»e) sorteringsredskaber.«

Minnilutin (Agnar Nielsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins við hesum viðmerkingum:

Eftir galdandi toll- og avgjaldslógum er álagt øllum fiskireiðskapi og aðrari út

gerð til fiskiskip avgjøld uppá 6% til 28% og í summum førum enn meira.

Útgerð til alivinnuna er álagt avgjøld uppá minst 28%.

Minnilutin metir, at hetta er skeiv mannagongd.

Ein skeivleiki við galdandi mannagongd er, at ein vinnufyritøka, sum er óheppin og er fyri brekum og øðrum óhappum, og av hesum er noydd til at keypa meira enn annars, kemur at gjalda enn meira til landskassan.

Sambandsflokkurin hevur áður í tingsetuni við lógaruppskoti mælt til, at tollur og onnur avgjøld til fiski- og alivinnuna verða avtikin. Uppskot Sambandsfloksins vann ikki frama, men hevur tó havt positiva ávirkan á sitandi stýri, sum framgongur í hesum lógaruppskoti, tó í ov lítlan mun.

Tað eigur at vera havt í huga, at virkir her á landi, sum eru í ferð við og hava ætlanir um framleiðslu á hesum øki, ikki verða tarnað við hesum uppskoti.

2. viðgerð 4. mai. Atkvøðugreiðsla 5. mai, § 1 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 30-0, § 2 við 29-0, § 3 uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 29-0.

5. mai legði skattanevndin fram soljóðandi:

broytingaruppskot

1. Í § 1, pkt. 7 verður skoytt uppí:
»rátt grót og marmor, eisini knúst, sandur og grús, lecca og impsteinur. Silicium. Stálmáttur (úr 5 & 6 mm kamstáli), sokallað rio-net. Papprør til framleiðslu av elementum.«

1. I § 1, pkt. 7 tilføjes: »utilhuggede klippestykker og marmor, også knust, sand og grus, lecca og pimpsten. Silicium. Stålmåtter (af 5 & 6 mm kamstål), såkaldet rio-net. Paprør til fremstilling af elementer.

2. Í § 1 verður sett sum nýtt pkt. 8:
»brilluglas, ikki ísett, og kontaktlinsur úr glasi ella øðrum tilfari.«

2. I § 1 indsættes som nyt pkt. 8:
»brilleglas, ikke isat, og kontaktlinser af glas eller andet materiale.«

3. Í § 8 verður sett sum nýtt pkt. 9:
»bjargingarbeltir- og vestar. Neyðran sónir og onnur lógarkravd útgerð til bjargingarbátar og -flakar.«

3. I § 8 sættes som nyt pkt. 9:
»redningsbælter- og veste. Nødraketter og anden lovkrævet udrustning til redningsbåde og -flåder.«

3. viðgerð 6. mai. Broytingaruppskotið frá skattanevndini, pkt. 1 samtykt við 29-0, pkt. 2 við 28-0 og pkt. 3 við 29-0. Uppskot landsstýrisns soleiðis broytt endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

Lóg nr. 52 frá 24. mai 1988.

94 Broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om ekstra indførselsafgift.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 um eyka innflutningsgjald verða gjørdar hesar broytingar:

§ 2 verður orðað soleiðis:

»Undantiknar frá innflutningsgjaldinum eru hesar vørur: *Skip yvir 20 br. reg. tongs.* (tó ikki lystskip), flogfør og tyrlur, gávupakkar, bøkur, bløð og prentpappír (tó ikki prentlutir av sølufremjandi slag) agn, fiskur, ið avreiddur verður frá fremmandum skipum, fiskur sum innfluttur verður til virkingar ella fiskur, ið er keyptur og innfluttur á føroyskum skipum. Somuleiðis eru tær í §§ 2 og 3 í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum nevndu vørur ávíkavist undantiknar ella kunnu undantakast innflutningsgjaldinum.«

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 om ekstra indførselssafgift foretages følgende ændringer:

§ 2 affattes således:

»Undtaget fra indførselsafgifterne er følgende varer: *skibe over 20 br. reg. tons,* (dog ikke lystskibe), fly, helikoptere, gavepakker, bøger, blade og trykpapir, (dog ikke salgsbrochurer og lignende), agn, fisk der indføres til virkning, eller fisk indkøbt og importeret med færøske skibe. Ligeledes undtages eller henholdsvis kan de i §§ 2 og 3 i lagtingslov nr. 23 fra 11. februar 1950 med senere ændringer omhandlede varer undtages for indførselsafgiften.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Broytingarnar í hesum lógaruppskoti eru gjørdar fyri at fáa samsvar við broytingaruppskotið til lóg um serligt innflutningsgjald.

Broytingin er, at »flogfør og tyrlur« og »(tó ikki prentlutir av sølufremjandi slag)« verða sett inn í § 2.

Samanumtikið kann sigast um hesi 3 lógaruppskotini um innflutningsgjald:

Í uppskoti til broytingar í løgtingslóg um innflutningsgjøld er tollmissurin mettur til *3 mió. kr.* og í broytingini til løgtingslóg um serligt innflutningsgjald verður nettoúrslitið (tollmissur ÷ hægri tollinntøkur) metið til ein tollmiss uppá umleið 10 mió. hesi íroknað eitt sindur hægri inntøkur í uppskotinum um broytingar í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald.

Metingin um tollmissin er sostatt sett til

13 mió. kr.

ið tað ikki verður hildið neyðugt at taka inn aftur við at hækka inntøkurnar á øðrum økjum, tá hetta tal liggur innanfyri tann útryggleika, ið liggur í samlaðu metingini av tollinntøkunum í 1988 uppá tilsamans *815 mió. kr.*

Aftrat hesum koma tær umleið *4 mió. kr.* til tollendurgjald til alivinnuna, serliga smoltstøðirnar. Eitt endurgjald at gjalda einaferð við alla.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 5. mai. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 31-0, § 2 31-0. At málið skal fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 31-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Uppskot landsstýrins soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

Lóg nr. 47 frá 26. mai 1988.

95 Javnstøða millum kvinnur og menn.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn.

lagtingslov om ligestilling mellem kvinder og mænd.

Kapittul 1
Vanligar reglur

§ *1.* Henda lóg hevur til endamáls at fremja javnstøðu millum kynini í øllum samfelagsviðurskiftum.

§ *2.* Tá lógaruppskot verða tilevnað, skulu tey vera soleiðis háttað, at tey tryggja javnrættindi millum kynini.
Stk. 2. Um so er, at reglur eru til hindurs fyri at kvinnur og menn fáa sama rætt og sama møguleika til arbeiði, útbúgving og fakliga og mentanarliga menning, ger Javnstøðuráðið lógaruppskot, sum landsstýrið kann leggja fyri løgtingið.

§ *3.* Galdandi lógir skulu endurskoðast við tí fyri eyga at beina burtur mismun millum kynini.
Stk. 2. Javnstøðuráðið skipar fyri hesi endurskoðan og sendir landsstýrinum uppskot til neyðugar lógarbroytingar.

§ *4.* Allur kynsmismunur er bannaður.
Stk. 2. Tó eru tiltøk, sum miða ímóti at útvega tí kyninum, sum er fyri vanbýti, javnstøðu, ikki mett brot á hesa lóg.

Kapitel 1
Almindelige bestemmelser

§ *1.* Denne lov har til formål at fremme ligestilling mellem kønnene i alle samfundsforhold.

§ *2.* Ved udarbejdelse af lovforslag skal disse være formet således, at de sikrer ligeberettigelse mellem kønnene.
Stk. 2. Hvis regler hindrer for, at kvinder og mænd får samme ret og samme mulighed til arbejde, uddannelse, faglig og kulturel udvikling, skal ligestillingsrådet gøre lovforslag, som landsstyret kan forelægge lagtinget.

§ *3.* Gældende love skal revideres med henblik på at fjerne forskelsbehandling af kønnene.
Stk. 2. Ligestillingsrådet foretager denne revision og sender landsstyret forslag til nødvendige lovændringer.

§ *4.* Al kønsdiskriminering er forbudt.
Stk. 2. Dog er foranstaltninger, der tilstræber at give det køn, der er forskelsbehandlet, ligestilling, ikke at regne som overtrædelse af denne lov.

Stk. 3. Reglan í stk. 1 er heldur ikki til hindurs fyri, at kvinnur og menn hava ymisk rættindi í heilt ávísum viðurskiftum, til dømis viðvíkjandi barnsferð.

§ *5.* Tá talan er um val av umboðum í almenn ráð og almennar nevndir, skulu almennir stovnar og myndugleikar, sum velja og mæla til umboð, miða ímóti jøvnum kynsbýti.

Kapittul 2
Arbeiðsmarknaðurin

§ *6.* Kvinnur og menn skulu hava sama rætt til lønt arbeiði og somu løn fyri sama arbeiði. Sáttmálar og siðvenja millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, sum heilt ella lutvíst stríða móti hesum, eru í sama mun ógildugir.

§ *7.* Tað er ikki loyvt arbeiðsgevara, hvørki almennum ella privatum, at gera mismun á løntakara eftir kyni. Hetta er galdandi fyri t.d.
1) starvsmetan,
2) lønarflokking,
3) starvssetan,
4) setan í annað starv,
5) setan í hægri starv,
6) farloyvi,
7) uppsøgn,
8) arbeiðsumstøður og
9) framíhjárættindi.

§ *8.* Ikki er loyvt at lýsa størv ella gera starvslýsingar á ein slíkan hátt, at lýsingin/starvslýsingin er at skilja soleiðis, at arbeiðsgevarin helst vil hava starvsfólk av øðrum kyninum. Tá almenn og privat størv verða lýst leys, hava kvinnur og menn sama rætt at søkja

Stk. 3. Reglen i stk. 1 er heller ikke til hinder for, at kvinder og mænd har forskellige rettigheder i helt bestemte forhold, f.eks. vedrørende barsel.

§ *5.* Når det drejer sig om valg af repræsentanter til offentlige råd og offentlige udvalg, skal offentlige institutioner og myndigher, som vælger og indstiller repræsentanter, tilstræbe ligelig kønsfordeling.

Kapitel 2
Arbejdsmarkedet

§ *6.* Kvinder og mænd skal have samme ret til lønnet arbejde og samme løn for samme arbejde. Overenskomster og sædvaner mellem parterne på arbejdsmarkedet, som helt eller delvis er i strid med dette, er i samme omfang ugyldige..

§ *7.* Det er ikke tilladt arbejdsgiveren, hverken offentlige eller private, at gøre forskel på lønmodtagere efter køn. Dett er gældende f.eks. ved
1) arbejdsvurdering,
2) lønningskategori,
3) ansættelse,
4) ansættelse i anden stilling,
5) ansættelse i højere stilling,
6) afskedigelse,
7) orlov,
8) arbejdsforhold og
9) privilegier

§ *8.* Det er ikke tilladt opslå stillinger eller formulere stillingsbeskrivelser på en sådan måde, at opslaget/stillingsbeskrivelsen kan forstås således, at arbejdsgiveren helst vil have personale af det ene køn. Når offentlige eller private stillinger bliver opslået, har kvinder og mænd samme ret at søge.

Stk. 2. Tó er hetta loyvt, tá ið ætlan arbeiðsgevarans er at stuðla javnari kynsbýti á starvsøkinum. Hetta skal tá verða viðmerkt í lýsingini.

§ 9. Hevur kvinna søkt starv, ið lýst hevur verið leyst, men maður verður settur, kann javnstøðuráðið, um hon biður um tað, krevja, at viðkomandi arbeiðsgevari letur ráðnum skrivligar upplýsingar um, hvørja útbúgving og hvørjar starvsroyndir ella hvussu tann, ið settur verður í starvið annars er skikkaður at røkja tað. Sama rætt hevur maður, sum søkt hevur starv, ið ein kvinna er sett í.

§ *10.* Kvinnur og menn skulu hava somu tilboð og møguleikar til framhaldsútbúgving og/ella yrkisupplæring og til at fara á skeið, ið kunnu økja starvsførið ella útbúgva einstaklingin til at taka við nýggjum starvi.

§ *11.* Almennir og privatir arbeiðsgevarar skulu miðvíst virka fyri, at kynini hava somu støðu í fyritøku teirra ella stovni, og bera so í bandi, at størv ikki eru flokkað í konufólka- og mannfólkastørv.

Stk. 2. Dette er dog tilladt, når arbejdsgiverens hensigt er at få en mere lige kønsfordeling. Dette skal da fremgå af opslaget.

§ 9. Hvis en kvinde har søgt en opsláet stilling, men en mand bliver ansat, kan ligestillingsrådet, hvis hun anmoder herom, forlange, at vedkommende arbejdsgiver giver rådet skriftlige oplysninger om, hvilken uddannelse, hvilke arbejdserfaringer den, der er ansat i stillingen har og hvordan vedkommende ellers anses som egnet til stillingen. Samme ret har en mand, der har søgt en stilling, som en kvinde bliver ansat i.

§ *10.* Kvinder og mænd skal have samme tilbud og muligheder for videre uddannelse og/eller faglig oplæring og til kursusdeltagelse, der kan gøre vedkommende bedre egnet i stillingen eller uddanne den enkelte til at opnå en ny stilling.

§ *11.* Offentlige og private arbejdsgivere skal målbevidst arbejde for, at kønene har samme stilling i deres virksomhed eller institution, og sørge for, at stillinger ikke opdeles i kvinde- og mandsstillinger.

Kapittul 3
Undirvísing

§ *12.* Skúlar og aðrir stovnar, sum fremja undirvísing og barnauppaling, skulu byggja á javnstøðu. Alt undirvísingartilfar skal vera vera so skikkað og nýtast soleiðis at eingin óneyðugur mismunur verður gjørdur millum kynini.

Kapitel 3
Undervisning

§ *12.* Skoler og institutioner, som meddeler undervisning og børneopdragelse, skal bygge på ligestilling. Alt undervisningsmateriale skal være af en sådan art og benyttes på en sådan måde, at der ikke gøres nogen unødig forskel mellem kønnene.

Stk. 2. Alt undirvísingartilfar, sum skúlabókagrunnur løgtingsins gevur út, skal leggjast fyri Javnstøðuráðið til ummælis.
Stk. 3. Øll lestrar- og starvskunning skal miða ímóti at broyta vanabundin lestrar- og starvsval í samsvari við endamálsgreinina í hesi lóg.

Kapittul 4
Javnstøðuráðið

§ *13.* Javnstøðuráðið er stovnur undir Føroya Landsstýri. Arbeiðssetningur ráðsins er:
1) at hava eftirlit við, at henda lóg verður hildin,
2) at vera ráðgevi hjá myndugleikum, stovnum, felagum og privatpersónum í javnstøðuspurningum,
3) at fylgja við, hvat fyriferst á javnstøðuøkinum bæði í Føroyum og í øðrum londum,
4) at geva Føroya Landsstýri tilmæli í javnstøðumálum,
5) at innsavna upplýsingar um javnstøðuspurningar og fáa hesar út til fjølmiðlar og felagsskapir,
6) at hava samskifti við tær javnstøðunevndirnar, sum verða settar eftir kap. 5 í hesi lóg,
7) at gera ársfrágreiðing og skipa fyri útgávu av hesi.

Stk. 2. Alt undervisningsmateriale, som udgives af Færøernes Skolebogforlag, skal forelægges ligestillingsrådet til udtalelse..
Stk. 3. Al studie- og erhvervsorientering skal have til formål at ændre vanebundet studie- og erhvervsvalg, i overensstemmelse med formålsparagraffen i denne lov.

Kapitel 4
Ligestillingsrådet

§ *13.* Ligestillingsrådet er en institution, der sorterer under Færøernes landsstyre. Rådets opgave er:
1) at have tilsyn med, at denne lov bliver overholdt,
2) at virke som rådgiver for myndighederne, institutioner, foreninger og private i ligestillingsspørgsmål
3) at gøre sig bekendt med, hvat der sker på ligestillingsområdet, både på Færøerne og i andre lande,
4) at give udtalelse i ligestillingsspørgsmål til landsstyret,
5) at indhente oplysninger i ligestillingsspørgsmål og formidle disse til massemedier og sammenslutninger,
6) at arbejde sammen med de ligestillingsudvalg, der nedsættes i henhold til kapt. 5 i denne lov,
7) at udfærdige årsberetning og sørge for dennes udgivelse.

§ *14.* Javnstøðuráðið hevur 8 limir. Teir 6 verða tilnevndir av landsstýrinum eftir tilmæli frá niðanfyri nevndu:
2 umboðandi løntakarar, 2 umboðandi arbeiðsgevarar, og 2 umboðandi kommununar, og hvør av teimum nevndu tilmæla ein mann og eina kvinnu. Føroya Landsstýri velur herumframt 2 limir, ein mann og eina kvinnu, harav annar limurin er framsøgufólk ráðsins.

§ *14.* Ligestillingsrådet består af 8 medlemmer. De 6 udnævnes af landsstyret efter indstilling fra nedenfor nævnte:
2 repræsenterende lønmodtagere, 2 repræsenterende arbejdsgivere, 2 repræsenterende kommunerne, og hver af de nævnte indstiller en mand og en kvinde. Færøernes landsstyre vælger herudover 2 medlemmer, en mand og en kvinde, hvoraf det ene medlem er ordfører for rådet.

Stk. 2. Tiltaksumboð verða vald á sama hátt sum limir eftir 1. stk.

Stk. 3. Javnstøðuráðið verður valt fyri fýra ár.

Stk. 4. Limirnir í ráðnum eru undir tagnarskyldu við tí, teir fáa at vita undir nevndararbeiðinum og sum eftir síni náttúru ikki eigur at vera borið víðari.

Stk. 5. Javnstøðuráðið ger reglugerð, sum fær gildi, tá hon er góðkend av landsstýrinum.

Stk. 2. Suppleanter vælges på samme måde som medlemmer ifølge stk. 1.

Stk. 3. Ligestillingsrådet vælges for fire år.

Stk. 4. Medlemmerne af rådet er underkastet tavshedspligt med hensyn til forhold, de bliver bekendt med under udførelsen af hvervet, og som efter sin natur bør hemmeligholdes.

Stk. 5. Ligestillingsrådet udfærdiger vedtægter, der træder i kraft efter landsstyrets godkendelse.

§ *15.* Javnstøðuráðið skal hava egna skrivstovu.

§ *15.* Ligestillingsrådet skal have eget kontor.

Kapittul 5
Javnstøðunevndir í sýslunum

§ *16.* Til tess at vekja ans fyri javnstøðu og fremja javnstøðuarbeiðið úti um landið, kunnu bý-/bygdaráðini í hvørjari sýslu velja eina javnstøðunevnd í sýsluni.

Stk. 2. Fyri Streymoyar sýslu kunnu verða valdar tvær javnstøðunevndir, ein fyri kommununrnar í Norðstreymoy og ein fyri kommununrnar í Suðurstreymoy.

Stk. 3. Javnstøðunevndirnar skulu hava 4 ella 6 limir, sum skulu búgva í viðkomandi sýslu. Nevndirnar skipa seg sjálvar. Landsstýrið ásetur nærri reglur um, hvussu valt verður.

Stk. 4. Tiltakslimir verða valdir á sama hátt sum teir føstu limirnir.

Stk. 5. Limirnir í javnstøðunevndini verða valdir fyri 4 ár í senn.

Kapitel 5
Ligestillingsudvalg i syslerne

§ *16.* Med det formål at skabe interesse om ligestilling og fremme ligestillingsarbejdet rundt om i landet, kan by/bygderådene i hver syssel vælge et ligestillingsudvalg i syslen.

Stk. 2. For Streymoy syssel kan vælges to ligestillingsudvalg, en for kommunerne i Norðstreymoy og en for kommunerne i Suðurstreymoy.

Stk. 3 Ligestillingsudvalgene skal have 4 eller 6 medlemmer, der skal bo i vedkommende syssel. Udvalgene vælger selv formand. Landsstyret fastsætter nærmere regler om, hvordan valget skal foregå.

Stk. 4. Suppleanter vælges på samme måde som de faste medlemmer.

Stk. 5. Medlemmerne i ligestillingsudvalget vælges for 4 år ad gangen.

Stk. 6. Tá val av javnstøðunevnd er farið fram, skal javnstøðunevndin boða javnstøðuráðnum frá innan 14 dagar, hvørji eru vald.

§ *17.* Limirnir í nevndini eru undir tagnarskyldu við tí, teir fáa at vita undir nevndararbeiðinum og sum eftir síni náttúru ikki eigur at vera borið víðari.

§ *18.* Javnstøðunevndirnar samstarvar við javnstøðuráðið, og tær senda klagur um kynsmismun til viðgerðar í javnstøðuráðnum.

§ *19.* Javnstøðunevndirnar skulu:
1) kanna, hvar og hvussu kynsmismunur fer fram í sýsluni,
2) seta fram uppskot til myndugleikarnar, hvat gerast kann fyri at loysa trupulleikarnar,
3) vekja ans fyri og skapa tjak bæði innan umsitingina og úti í sýsluni um trupulleikar á javnstøðuøkinum og
4) gera ársfrágreiðingar, sum síðani verða samskipaðar við ársfrágreiðingar hjá javnstøðuráðnum.

§ *20.* Javnstøðunevndirnar kunnu í upplýsingararbeiðinum um javnstøðunál halda fundir og ráðstevnur.

Kapittul 6
Klagur til ráðið vegna kynsmismun.

§ *21.* Tann, ið metir seg at hava verið fyri mismuni vegna kyn, kann klaga til javnstøðuráðið.

Stk. 6. Når valget af ligestillingsudvalget har fundet sted, skal ligestillingsudvalget inden 14 dage underrette ligestillingsrådet om, hvem der er valgt.

§ *17.* Medlemmerne af nævnet er underkastet tavshedspligt med hensyn til de forhold, de bliver bekendt med under udførelsen af hvervet, og som efter sin natur bør hemmeligholdes.

§ *18.* Ligestillingsudvalgene samarbejder med ligestillingsrådet, og de sender klager om forskelsbehandling på grund af køn videre til behandling i ligestillingsrådet.

§ *19.* Ligestillingsudvalgene skal:
1) undersøge, hvor og hvordan forskelsbehandling på grund af køn sker i syslerne,
2) fremsætte forslag til myndighederne om, hvordan problemerne kan løses.
3) skabe opmærksomhed og debat både i forvaltningen og ude i sysselen om problemer indenfor ligestillingsområdet og
4) skrive årsberetninger, der siden bliver indbefattet i ligestillingsrådets årsberetninger.

§ *20.* Ligestillingsudvalgene kan i deres oplysningsarbejde afholde møder og konferencer.

Kapitel 6
Klager til rådet om kønsdiskrimination

§ *21.* Den, der mener sig forskelsbehandlet på grund af køn, kan klage til ligestillingsrådet.

Stk. 2. Fær javnstøðuráðið illgruna um mismun vegna kyn, kann javnstøðuráðið sjálvt taka málið upp.
Stk. 3. Um mál viðvíkjandi almennum myndugleikum ella stovnum verður lagt fyri ráðið, ella ráðið sjálvt tekur málið upp, hevur myndugleikin ella stovnurin skyldu til at lata ráðnum ljósprent av skrivum (við fylgiskjølum), sum eru send og móttikin.
Stk. 4. Landsstýrið ásetir nærri reglur um málsviðgerð, kæruvegleiðing og kærufreistir v.m.

Stk. 2. Får ligestillingsrådet mistanke om diskrimination på grund af køn, kan ligestillingsrådet selv tage sagen op.
Stk. 3. Såfremt sager vedrørende offentlige myndigheder eller institutioner lægges for rådet, eller rådet selv tager sagen op, har myndigheden eller institutionen pligt til at udlevere til rådet fotokopi af skrivelser (med bilag), som er sendt og modtaget.
Stk. 4. Landsstyret fastsætter nærmere regler om sagsbehandling, klagevejledning, klagefrister m.m.

§ *22.* Heldur javnstøðuráðið, at einstaklingur, felag, virki ella líknandi hevur brotið hesa lóg, skal javnstøðuráðið innan 14 dagar, eftir at málið er liðugt viðgjørt av ráðnum, senda áheitan til avvarðandi um at fáa lógarbrotið rættað innan 2 vikur.

§ *22.* Hvis ligestillingsrådet skønner, at en person, forening, virksomhed eller lignende, har overtrådt denne lov, skal ligestillingsrådet inden 14 dage efter, at sagen er færdigbehandlet af rådet, sende henstilling til vedkommende om at rette lovovertrædelsen inden 2 uger.

Kapittul 7
Revsing og rættarviðgerð

§ *23.* Um ráðið heldur at farið er fram á ein hátt, sum er í stríð við lógina, og áheitan eftir § 22 ikki hevur havt nøktandi bata við sær, kann Javnstøðuráðið.

1) heita á ákæruvaldið um at byrja revsirættarliga forfylging,

2) mæla til, at tann, hvørs rættindi eru brotin, fær fría rættargongd til rættarmál um endurgjald,

3) leggja sak ímóti viðkomandi í borgarligum rættargangsskapi til viðurkenningardóm, at framferðarhátturin hevur verið í stríð við lógina,

Kapitel 7
Straf og retsbehandling

§ *23.* Såfremt rådet mener, at der er gået frem i strid med loven og henstilling efter § 22 ikke har ført til tilfredsstillende forbedring, kan rådet

1) opfordre anklagemyndigheden til at indlede strafferetlig forfølgning,

2) anbefale, at der bevilges fri proces til den, hvis rettigheder er krænket, til anlæggelse af erstatningssag.

3) anlægge sag mod vedkommende i den borgerlige retsplejes former til opnåelse af anerkendelsesdom for, at fremgangsmåden har været lovstridig,

4) tá talan er um almennan myndugleika ella stovn, heita á viðkomandi yvirskipaða stovn um at áleggja viðkomandi myndugleika ella stovni at broyta avgerð ella framferðarhátt.

4) når det drejer sig om offentlig myndighed eller institution, opfordre vedkommende overordnede myndighed til at pålægge den pågældende myndighed eller institution at ændre afgørelse eller fremgangsmåde.

§ 24. Um ikki hægri revsing er uppiborin sambært lóggávuni annars, verður tann revsaður við sekt, sum

1) Í stríð við § 7 við starvssetan ella annars í privatum arbeiðsviðurskiftum hevur gjørt mismun á løntakara eftir kyni,
2) í stríð við § 8 hevur lýst starv ella gjørt starvslýsing, ið er at skilja soleiðis, at persónur av øðrum kynínum fer at verða tikin framum,
3) ikki innan rímuliga tíð kemur við skrivligum upplýsingum, sum Javnstøðuráðið hevur kravt við heimild í § 9,
4) í stríð við § 10 sum arbeiðsgevari hevur givið tilboð ella møguleika til framhaldsútbúgving, alvirkisupplæring ella skeiðluttøku bert til annað kynið.

Stk. 2. Er lógarbrotið framt av einum partafelag, lutafelag ella líknandi, kann áleggjast sjálvum felagnum sektarábyrgd.

§ 24. Hvis ikke strengere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes med bøde den, der

1) i strid med § 7 ved ansættelse eller iøvrigt i private arbejdsforhold har gjort forskel på lønmodtagere efter køn,
2) i strid med § 8 har opslået stilling eller formuleret stillingsbeskrivelse på en sådan måde, at det fremgår at person af bestemt køn vil blive foretrukket.
3) ikke inden for rimelig tid er fremkommet med skriftlige oplysninger, som Ligestillingsrådet har forlangt med hjemmel i § 9.
4) i strid med § 10 som arbejdsgiver har givet tilbud eller mulighed for videreuddannelse, faglig oplæring eller kursusdeltagelse kun til det ene køn.

Stk. 2. Har et aktieselskab, andelsselskab eller lignende overtrådt loven, kan selskabet som sådant pålægges bødeansvar.

§ 25. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 25. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Í vetrartingsetuni 1978, løgtingsmál nr. 49, løgdu løgtingskvinnurnar Ingrid Sondum, Jona Henriksen og Karin Kjølbro 6. apríl 1979 fyri løgtingið uppskot til samtyktar um, at løgtingið skuldi heita á landsstýrið um at seta ein javnrættindanevnd, ið skuldi ráðgeva myndugleikunum um, hvørji tiltøk vóru neyðug fyri at tryggja javnrættindi millum kynini á arbeiðsplássum og í samfelagslívinum sum heild.

Við 1. viðgerð 25. apríl 1979 var málið beint í sosialu nevndina, sum sama dag legði fram álit við uppskoti um, at orðið »javnrættindi« var broytt til »javnstøðu«.

Við 2. viðgerð 26. apríl 1979 var broytingaruppskotlið frá sosialu nevnd samtykt við 23-0 atkvøðum, og uppskotið soleiðis broytt var samtykt við 26-0 atkvøðum.

Í januar 1981 setti landsstýrið javnstøðunevndina fyri 4 ár. Landsstýrið valdi formannin, framsøgufólkið, og tilnevndi hinar limirnar eftir tilmæli frá Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Kvinnufelagssamskipan Føroya.

Í 1983 álegði landsstýrið javnstøðunevndini at gera uppskot til eina javnstøðulóg, og í 1986 setti landsstýrið javnstøðunevndina av nýggjum fyri verandi 4-ára skeiðið.

Í løgtingsmáli nr. 113/1986 um at lýsa ST-sáttmálan frá 18. desember 1979 um avtøku av øllum háttum av mismuni ímóti kvinnum at galda í Føroyum, samtykti løgtingið 31. mars 1987 við 19-0 atkvøðum at lýsa hendan sáttmálan at galda í Føroyum, og sáttmálin varð lýstur 11. juni 1987.

Framman fyri standandi uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn er gjørt í samsvari við umrøddu ST-sáttmála og alheims mannarættindasáttmálan, ið staðfestir, at øll menniskju eru fødd fræls, og at øll eiga rættin at liva í tign og trygd uttan mismun av nøkrum slagi, heldur ikki vegna kyn.

Mismunur, ið forðar øðrum kyninum at luttaka javnbjóðis hinum í politisku, sosialu, búskaparligu ella mentunarligu samfelagsskipanini, darvar framburði bæði í samfelagnum og heima við hús og ger tað torført hjá tí, ið er fyri mismuni at nýta evni og møguleikar sínar til fulnar, sær sjálvum, okkara landi og allari mannaættini at gagni. Tí hevur lógin til endamáls at styrkja støðuna hjá kvinnum eins væl og hjá monnum í øllum samfelagsviðurskiftum, har tørvur er á hesum.

Landsstýrið metir tað vera umráðandi, at alt undirvísingartilfar og annað tilfar, sum børn og ung nýta á stovnum og skúlum, ið fremja barnauppaling og

undirvísing, er gjørt út frá javnstøðuhugsjónini, so at børnini og tey ungu kunnu kenna seg aftur í fjølbroyttum lýsingum av teimum leikpørtum, sum kvinnur og menn kunnu hava í samfelagnum.

Samfelagið broytist støðugt, og neyðugt er, at øll børn til eina og hvørja tíð læra at nýta evni síni til fulnar. Við teirri vitan, vit í dag hava um, hvussu gentur og dreingir roynast í skúlunum, er neyðugt, at kunningin um lestrar- og starvsmøguleikar er so fjøltáttað, at bæði gentur og dreingir velja lestrargrein og starv eftir evnum og áhuga og ikki einans eftir vanabundnum siði.

Royndirnar, síðani javnstøðunevndin varð sett fyrstu ferð í 1981, vísa, at neyðugt er, at javnstøðuráðið framyvir hevur egna skrivstovu.

Í uppskotinum er m.a. ásett, at Javnstøðuráðið, tá klaga er komin til ráðið um kynsmismun, kann

1) heita á ákæruvaldið um at byrja revsirættarliga forfylging,
2) mæla til, at tann, hvørs rættindi eru brotin, fær fría rættargongd til rættarmál um endurgjald,
3) leggja sak ímóti viðkomandi borgarligum rættargangsskapi til viðurkenningardóm, at framferðarhátturin hevur verið í stríð við lógina,
4) tá talan er um almennan myndugleika ella stovn, heita á viðkomandi yvirskipaða stovn um at áleggja viðkomandi myndugleika ella stovni at broyta avgerð ella framferðarhátt.

Eftir galdandi rætti kemur tann, sum við vilja ella av misgáum brýtur lógina, undir endurgjaldsskyldu eftir vanligum reglum. Talan kann her vera um endurgjald fyri t.d. mista arbeiðsløn, og treytin er tá, at tann, ið hevur verið fyri mismuni vegna kyn, kann prógva, at hann ella hon hevur verið fyri tapi. Eisini kann talan vera um endugjald fyri tort.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1988 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur havt fund við formannin í Javnstøðunevndini um fyriliggjandi lógaruppskot.

Rættarnevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hans Jacob Debes, Jona Henriksen, Eilif Samuelsen og Jóannes Dalsgaard) heldur, at gjørdar eru so nógvar broytingar av tekniskum slagi, at greiðast er at seta fram nýtt lógaruppskot í staðin fyri uppskot landsstýrisins.

Meirilutin setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn.

lagtingslov om ligestilling mellem kvinder om mænd.

Kapittul 1
Vanligar reglur

§ *1.* Henda lóg hevur til endamáls at fremja javnstøðu kynjanna millum í øllum samfelagsviðurskiftum við tí serliga atliti at styrkja støðuna hjá kvinnum.

§ *2.* Eingin lóg skal kunna skerja javnrættindi kynjanna millum.

§ *3.* Allur kynsmismunur er bannaður.
Stk. 2. Tó eru tiltøk, sum miða ímóti at útvega tí kyninum, sum ur fyri vanbýti, javnstøðu, ikki mett brot á hesa lóg.
Stk. 3. Reglan í stk. 1 er heldur ikki til hindurs fyri, at kvinnur og menn hava ymisk rættindi í heilt ávísum viðurskiftum, til dømis viðvíkjandi barnsferð.

Kapitel 1
Almindelige bestemmelser

§ *1.* Denne lov har til formål at fremme ligestilling mellem kønnene i alle samfundsforhold med særlig henblik på at forbedre kvindens situation.

§ *2.* Ingen lov skal kunne begrænse ligestillingsretten mellem kønnene.

§ *3.* Al kønsdiskriminering er forbudt.
Stk. 2. Dog er foranstaltninger, der tilstræber at give det køn, der er forskelsbehandlet, ligestilling, ikke at regne som overtrædelse af denne lov.
Stk. 3. Regelen i stk. 1 er heller ikke til hinder for, at kvinder og mænd har forskellige rettigheder i helt bestemte forhold, f.eks. vedrørende barsel.

§ 4. Tá talan er um val av umboðum í almenn ráð, almennar nevndir og setan í almenn størv, skulu almennir stovnar og myndugleikar, sum velja og mæla til umboð, miða ímóti jøvnum kynsbýti.

§ 4. Når det drejer sig om valg af repræsentanter til offentlige råd, offentlige udvalg og ansættelse i offentlige stillinger, skal offentlige institutioner og myndigheder, som vælger og indstiller repræsentanter, tilstræbe ligelig kønsfordeling.

Kapittul 2
Arbeiðsmarknaðurin

§ 5. Kvinnur og menn skulu hava sama rætt til lønt arbeiði og somu løn fyri sama arbeiði.

Kapitel 2
Arbejdsmarkedet

§ 5. Kvinder og mænd skal have samme ret til lønnet arbejde og samme løn for samme arbejde.

§ 6. Tað er ikki loyvt arbeiðsgevara, hvørki almennum ella privatum, at gera mismun á løntakara eftir kyni. Hetta er galdandi fyri t.d.

1) starvsmetan,
2) lønarflokking,
3) starvssetan,
4) setan í annað starv,
5) setan í hægri starv,
6) farloyvi,
7) uppsøgn,
8) arbeiðsumstøður og
9) frammíhjárættindi.

§ 6. Det er ikke tilladt arbejdsgivere, hverken offentlige eller private, at gøre forskel på lønmodtagere efter køn. Dette er gældende f.eks. ved

1) arbejdsvurdering,
2) lønningskategori,
3) ansættelse,
4) ansættelse i anden stilling,
5) ansættelse i højere stilling,
6) orlov,
7) afskedigelse,
8) arbejdsforhold og
9) privilegier.

§ 7. Ikki er loyvt at lýsa størv ella gera starvslýsingar á ein slíkan hátt, at lýsingin/starvslýsingin er at skilja soleiðis, at arbeiðsgevarin helst vil hava starvsfólk av øðrum kynnum. Tá almenn og privat størv verða lýst leys, hava kvinnur og menn sama rætt at søkja.

2. stk. Tó er hetta loyvt, tá ið ætlan arbeiðsgevarans er at stuðla javnari kynsbýti á starvsøkinum. Hetta skal tá verða viðmerkt í lýsingini.

§ 7. Det er ikke tilladt at opslå stillinger eller formulere stillingsbeskrivelser på en sådan måde, at opslaget/stillingsbeskrivelsen kan forstås således, at arbejdsgiveren helst vil have personale af det ene køn. Når offentlige eller private stillinger bliver opslået, har kvinder og mænd samme ret at søge.

Stk. 2. Dette er dog tilladt, når arbejdsgiverens hensigt er at få en mere lige kønsfordeling. Dette skal da fremgå af opslaget.

§ 8. Hevur kvinna søkt starv, ið lýst hevur verið leyst, men maður verður settur, ella hevur maður søkt starv, og kvinna verður sett, og ivi er um tey førleikakrøv, sum hava verið grundarlag fyri setanini, kann javnstøðuráðið, um biðið verður um hetta, krevja arbeiðsgevaran eftir viðkomandi upplýsingum viðvíkjandi starvssetanini og leggja fyri landsstýrið grundgivnar metingar.

§ 8. Hvis en kvinde har søgt en opslået stilling, men en mand bliver ansat, eller har en mand søgt en opslået stilling, og en kvinde bliver ansat, og der er tvivl om de kvalifikationer, der har været grundlag for ansættelsen, kan ligestillingsrådet, når der anmodes herom, forlange at arbejdsgiveren udleverer de relevante oplysninger vedrørende stillingsbesættelsen og forelægge landsstyret begrundede vurderinger herom.

§ 9. Almennir og privatir arbeiðsgevarar skulu miðvíst virka fyri, at kynini hava somu støðu í fyritøku teirra ella stovni, og bera so í bandi, at størv ikki eru flokkað í konufólka- og mannfólkastørv.

§ 9. Offentlige og private arbejdsgivere skal målbevidst arbejde for, at kønnene har samme stilling i deres virksomhed eller institution, og sørge for, at stillinger ikke opdeles i kvinde- og mandsstillinger.

Kapittul 3
Undirvísing.

§ *10.* Skúlar og aðrir stovnar, sum fremja undirvísing og barnauppaling, skulu byggja á javnstøðu. Alt undirvísingartilfar skal vera so skikkað og nýtast soleiðis, at eingin óneyðugur missmunur verður gjørdur millum kynini.

2. stk. Lestrar- og starvskunning skal miða ímóti at broyta vanabundin lestrar- og starvsval í samsvari við endamálsgreinina í hesi løgtingslóg.

Kapitel 3
Undervisning

§ *10.* Skoler og institutioner, som meddeler undervisning og børneopdragelse, skal bygge på ligestilling. Alt undervisningsmateriale skal være af en sådan art og benyttes på en sådan måde, at der ikke gøres nogen unødig forskel mellem kønnene.

Stk. 2. Studie- og erhvervsorientering skal have til formål at ændre vanebundet studie- og erhvervsvalg, i overensstemmelse med formålsparagraffen i denne lagtingslov.

Kapittul 4
Javnstøðuráðið

§ *11.* Javnstøðuráðið er stovnur undir Føroya Landsstýri. Arbeiðssetningur ráðsins er:

1) at hava eftirlit við, at henda lóg verður hildin,

Kapitel 4
Ligestillingsrådet

§ *11.* Ligestillingsrådet er en institution, der sorterer under Færøernes Landsstyre. Rådets opgave er:

1) at have tilsyn med, at denne lov bliver overholdt.

2) at vera ráðgevi hjá myndugleikum, stovnum, feløgum og privatpersónum í javnstøðuspurningum,
3) at fylgja við, hvat fyriferst á javnstøðuøkinum hæði í Føroyum og í øðrum londum,
4) at geva Føroya Landsstýri tilmæli í javnstøðumálum,
5) at innsavna upplýsingar og javnstøðuspurningar og fáa hesar út til fjølmiðlar og felagsskapir,
6) at hava samskifti við tær javnstøðunevndirnar, sum verða settar eftir kap. 5 í hesi lóg,
7) at gera og geva út ársfrágreiðing.

§ *12.* Javnstøðuráðið hevur 5 limir, sum eftir tilmæli frá niðanfyri nevndu feløgum og stovnum verða tilnevndir av landsstýrinum: 1 umboðandi løntakarar, 1 umboðandi arbeiðsgevarar, 1 umboðandi Kvinnusamskipan Føroya, 1 umboðandi kommunurnar, og 1 umboðandi Føroya Landsstýri. Umboð landsstýrisins er formaður/forkvinna.
2. stk. Tiltaksumboð verða vald á sama hátt sum umboð sbr. stk. 1.
3. stk. Javnstøðuráðið verður valt fyri fýra ár. Umboð kunnu veljast aftur.
4. stk. Limirnir í ráðnum eru undir tagnarskyldu við tí, teir fáa at vita undir nevndararbeiðinum, og sum eftir síni náttúru ikki eigur at vera borið víðari.
5. stk. Føroya Landsstýri ger reglugerð fyri virki javnstøðuráðsins.

2) at virke som rådgiver for myndigheder, institutioner, foreninger og private i ligestillingsspørgsmål,
3) at gøre sig bekendt med, hvad der sker på ligestillingsområdet, både på Færøerne og andre lande,
4) at give udtalelse i ligestillingsspørgsmål til landsstyret
5) at indhente oplysninger i ligestillingsspørgsmål og formidle disse til massemedier og sammenslutninger,
6) at arbejde sammen med de ligestillingsudvalg, der nedsættes i henhold til kap. 5 i denne lov,
7) at udfærdige og udgive årsberetning.

§ *12.* Ligestillingsrådet består af 5 medlemmer, som efter indstilling fra nedennævnte foreninger og institutioner udnævnes af landsstyret: 1 repræsenterende lønmodtagere, 1 repræsenterende arbejdsgivere, 1 repræsenterende Kvinnusamskipan Føroya, 1 repræsenterende kommunerne, og 1 repræsenterende Føroya Landstyri. Landsstyrets repræsentant er formand/forkvinde.
Stk. 2. Suppleanter vælges på samme måde som medlemmer ifølge stk. 1.
Stk. 3. Ligestillingsrådet vælges for fire år. Repræsentanter kan genvælges.
Stk. 4. Medlemmerne af rådet er underkastet tavshedspligt med hensyn til forhold, de bliver bekendt med under udførelsen af hvervet, og som efter sin natur bør hemmeligholdes.
Stk. 5. Ligestillingsrådet udfærdiger vedtægter for ligestillingsrådets virksomhed.

Kapitul 5
Javnstøðunevndir í sýslunum

§ *13.* Til tess at fremja ætlanir í hesi løgtingslóg kunnu bý-/bygdarráðini í hvørjari sýslu velja javnstøðunevnd í sýsluni.

2. stk. Fyri Streymoyar sýslu kunnu verða valdar tvær javnstøðunevndir, ein fyri kommununrnar í Norðstreymoy og ein fyri kommununrnar í Suðurstreymoy.

3. stk. Í javnstøðunevndunum sita 3 ella 5 limir, sum skulu búgva í viðkomandi sýslu. Nevndirnar skipa seg sjálvar. Landsstýrið ásetir nærri reglur um, hvussu valt verður.

4. stk. Tiltakslimir verða valdir á sama hátt sum teir føstu limirnir.

5. stk. Limirnir í javnstøðunevndini verða valdir fyri 4 ár í senn.

6. stk. Tá val av javnstøðunevnd er farið fram, skal javnstøðunevndin boða javnstøðuráðnum frá inman 14 dagar, hvørji ið vald eru. Landsstýrið ásetir nærri reglur um virksemi nevndanna.

§ *14.* Limirnir í nevndini eru undir tagnarskyldu við tí, teir fáa at vita undir nevndararbeiðinum, og sum eftir síni náttúru ikki eigur at vera borið víðari.

§ *15.* Javnstøðunevndirnar samstarva við javnstøðuráðið, og tær senda klagur um kynsmismun til viðgerðar í javnstøðuráðnum.

Kapitel 5
Ligestillingsudvalg i syslerne

§ *13.* Med det formål at udføre hensigterne i denne lagtingslov kan by-/bygderådene i hver syssel vælge et ligestillingsudvalg i sysselen.

Stk. 2. For Streymoy syssel kan vælges to ligestillingsudvalg, en for kommunerne i Norðstreymoy og en for kommunerne i Suðurstreymoy.

Stk. 3. Ligestillingsudvalgene skal have 3 eller 5 medlemmer, der skal bo i vedkommende syssel. Udvalgene konstituerer sig selv. Landsstyret fastsætter nærmere regler om, hvordan valget skal foregå.

Stk. 4. Suppleanter vælges på samme måde som de faste medlemmer.

Stk. 5. Medlemmerne i ligestillingsudvalget vælges for 4 år ad gangen.

Stk. 6. Når valg af ligestillingsudvalget har fundet sted, skal ligestillingsudvalget inden 14 dage underrette ligestillingsrådet om, hvem der er valgt. Landsstyret fastsætter nærmere regler for udvalgenes virksomhed.

§ *14.* Medlemmerne af nævnet er underkastet tavshedspligt med hensyn til de forhold, de bliver bekendt med under udførelsen af hvervet, og som efter sin natur bør hemmeligholdes.

§ *15.* Ligestillingsudvalgene samarbejder med ligstillingsrådet, og de sender klager om kønsdiskriminering til behandling i ligestillingsrådet.

§ *16.* javnstøðunevndirnar skulu:

1) kanna, hvar og hvussu kynsmismunur fer fram í sýsluni,
2) seta fram uppskot til myndugleikararnar, hvat gerast kann fyri at loysa møguligar trupulleikararnar,
3) vekja ans fyri og skapa kjak bæði innan umsitingina og úti í sýsluni um trupulleikar um javnstøðuspurningar og
4) gera ársfrágreiðing, ið síðan verður samskipað við ársfrágreiðing javnstøðuráðsins.

§ *17.* Javnstøðunevndirnar kunnu í upplýsingararbeiðinum um javnstøðumál halda fundir og ráðstevnur.

Kapittul 6
Klagur til ráðið vegna kynsmismun

§ *18.* Tann, ið heldur seg hava verið fyri mismuni vegna kyn, kann klaga til javnstøðuráðið.

2. stk. Fær javnstøðuráðið grund til at halda, at mismunur fer fram, kann ráðið sjálvt taka málið upp.

3. stk. Um mál viðvíkjandi almennum myndugleikin ella stovnum verður lagt fram fyri ráðið, ella ráðið sjálvt tekur málið upp, hevur myndugleikin ella stovnurin skyldu til at vera ráðnum til hjálpar við teim upplýsingum, hann er førur at geva.

4. stk. Landsstýrið ásetir nærri reglur um málsviðgerð, kæruvegleiðing og kærufreistir v.m.

§ *16.* Ligestillingsudvalgene skal:

1) undersøge, hvor og om der sker kønsdiskriminering i sysselen,
2) fremsætte forslag til myndighederne om, hvad der kan gøres for at løse mulige problemer,
3) skabe opmærksomhed og debat indenfor forvaltningen og ude i sysselen om mulige vanskeligheder indenfor ligestillingsområdet og
4) skrive årsberetning, der siden bliver indbefattet i ligestillingsrådets årsberetning.

§ *17.* Ligestillingsudvalgene kan i deres oplysningarbejde afholde møder og konferencer.

Kapitel 6
Klager til rådet om kønsdiskriminering.

§ *18.* Den, der mener sig forskelsbe handlet på grund af køn, kan klage til ligestillingsrådet.

Stk. 2. Får ligestillingsrådet årsag til at mene, at der er diskriminering, kan ligestillingsrådet selv tage sagen op.

Stk. 3. Såfremt sager vedrørende offentlige myndigheder eller institutioner lægges for rådet, eller rådet selv tager sagen op, har myndigheden eller institutionen pligt til at være rådet behjælpelig med de oplysninger, man er i stand til at meddele.

Stk. 4. Landsstyret fastsætter nærmere regler om sagsbehandling, klagevejledning, klagefrister m.v.

§ *19.* Heldur javnstøðuráðið, at einstaklingur, felag, virki ella líknandi hevur brotið hesa lóg, skal javnstøðuráðið innan 14 dagar, eftir at málið er liðugt viðgjørt av ráðnum, senda áheitan til avvarðandi um at fáa lógarbrotið rættað innan 2 vikur.

Kapittul 7

Revsing og rættarviðgerð

§ *20.* Um ráðið heldur, at farið er fram á ein hátt sum er í stríð við lógina, og áheitan eftir § 19 ikki hevur havt nøktandi bata við sær, kann Javnstøðuráðið

1) heita á ákæruvaldið um at reisa ákæru,
2) mæla til, at tann, hvørs rættindi eru brotin, fær fría rættargongd til rættarmál um endurgjald,
3) leggja sak ímóti viðkomandi í borgarligum rættargangsskapi til viðurkenningardóm um framferðarhátturin hevur verið í stríð við lógina,
4) tá talan er um almennan myndugleika ella stovn, heita á viðkomandi yvirskipaða stovn um at áleggja viðkomandi myndugleika ella stovni at broyta avgerð ella framferðarhátt.

§ *21.* Um ikki hægri revsing er uppiborin sambært lóggávuni annars, verður tann revsaður við sekt, sum

1) Í stríð við § 7 við starvssetan ella annars í privatum arbeiðsviðurskiftum hevur gjørt mismun á løntakara eftir kyni.

§ *19.* Hvis ligestillingsrådet skønner, at person, forening, virksomhed eller lignende, har overtrådt denne lov, skal ligestillingsrådet inden 14 dage efter, at sagen er færdigbehandlet af rådet, sende henstilling til vedkommende om at rette lovovertrædelsen inden 2 uger.

Kapitel 7

Straf og retsbehandling

§ *20.* Såfremt rådet mener, at der er gået frem i strid med loven og henstilling efter § 19 ikke har ført til tilfredsstillende forbedring, kan rådet

1) opfordre anklagemyndigheden til at rejse sag,
2) anbefalde, at der bevilges fri proces til den, hvis rettigheder er krænket, til anlæggelse af erstatningssag,
3) anlægge sag mod vedkommende i den borgerlige retsplejes former til opnåelse af anerkendelsesdom for, at fremgangsmåden har været lovstridig,
4) når det drejer sig om offentlig myndighed eller institution, opfordre vedkommende overordnede myndighed til at pålægge den pågældende myndighed eller institution at ændre afgørelse eller fremgangsmåde.

§ *21.* Hvis ikke strengere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes med bøde den, der

1) i strid med § 7 ved ansættelse eller ivrigt i private arbejdsforhold har gjort forskel på lønmodtagere efter køn,

2) Í stríð við § 8 hevur lýst starv ella gjørt starvslýsing, ið er at skilja soleiðis, at persónur av øðrum kyninum fer at verða tikin framum,

3) ikki innan rímuliga tíð kemur við skrivligum upplýsingun, sum javnstøðuráðið hevur kravt við heimild í § 9,

4) í stríð við § 10 sum arbeiðsgevari hevur givið tilboð ella møguleika til framhaldsútbúgving, yrkisupplæring ella skeiðluttøku bert til annað kynið.

2. stk. Er lógarbrotið fram av einum partafelag, lutafelag ella líknandi, kann áleggjast sjálvum felagnum sekturábyrgd.

§ *22.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

2) i strid med § 8 har opslået stilling eller formuleret stillingsbeskrivelse på en sådan måde, at det fremgår at person af bestemt køn vil blive foretrukket,

3) ikke inden for rimelig tid er fremkommet med skriftlige oplysninger, som Ligestillingsrådet har forlangt med hjemmel i § 9,

4) i strid med § 10 som arbejdsgiver har givet tilbud eller mulighed for videreuddannelse, faglig oplæring eller kursusdeltagelse kun til det ene køn.

Stk. 2. Har et aktieselskab, andelsselskab eller lignende overtrådt loven, kan selskabet som sådant pålægges bødeansvar.

§ *22.* Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) er av teirri áskoðan, at føroyska samfelagið eftir lóggávu og siðvenju hevur bæði javnrættindi og javnstøðu millum mann og kvinnu.

Í orðaskiftinum hevur verið ført fram, at vit sambært lóggávu okkara hava javnrættindi, men ikki javnstøðu. Hetta er eftir minnilutans uppfatan ikki beint, tí javnstøðan fylgir fyri tað fyrsta av javnrættindunum og í tann mun, sum kvinur nýta sín rætt, hava tær eisini javnstøðu og øvugt. Við lóggávu kann ikki gerast meira á hesum øki, uttan so at onnur mannarættindi verða skerd.

Tað finst heldur ikki, eftir áskoðan minnilutans nakað í framlagda lógaruppskotinum, sum bøtir um korini hjá hvørki kvinnu ella manni ella hjá føroyska borgaranum í heila tikið.

Minnilutin kann tí ikki taka undir við uppskotinum, heldur ikki um tað verður broytt.

2. viðgerð 6. mai. § 1 í uppskotinum frá rættarnevndini fall við 15-0, málið sostatt burturfallið.

96 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Poul Michelsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður § 86, 2. stk., orðað soleiðis:

»Líkningarnevndin/bygda- (r) ráðið kann sambært teimum reglum, ið landsstýrið ger smb. § 84, 10. stk. lata kommunalu fyrisitingina gera álíkningar teirra vegna. Slíkar avgerðir tiknar av skattafyrisitingini kann skattgjaldarin kæra til líkningarnevndina sambært § 87. Kommuna, hvørs fyrisiting ger álíkning, fær endurgoldið skattafyrisitingarútreiðslur. Endurgjaldið verður ásett av landsstýrinum.«

§ *2.*

Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1988.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 86 fra 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer affattes § 86, stk. 2 således:

»Ligningskommissionen/-kommunalbestyrelsen kan efter regler, der fastsættes af landsstyret iflg. § 84, stk. 10, bemyndige skatteadministrationen at foretage ansættelser på dennes vegne. Afgørelser truffet af den kommunale skatteadministration kan af den skattepligtige indbringes for ligningskommissionen efter reglerne i § 87. Kommuner, hvis skatteadministration foretager ansættelser, får skatteadministrationsudgifterne refunderet. Størrelsen af refusionen afgøres af landsstyret.«

§ *2.*

Denne lov træder i kraft 1. april 1988.

Viðmerkingar:

Í samtíðarskattalógini frá 1983 er ein nýggj grein § 85, um deildarskrivstovur undir líkningarráð Føroya komin. Hon varð ætlað fyri tey øki ella kommunur

100. Fyrispurningar

Sí bls. 614

her á landi, sum ikki høvdu nakra skattafyrisiting. Tær kommunur, sum høvdu skattafyrisiting, eru umrøddar í § 86, 2. stk.

Nú umleið fýra ár eru runnin, síðan samtíðarskattalógin kom í gildi, vísir tað seg, at bert Tórshavnar kommuna stendur við egnari skattafyrisiting, meðan restin av Føroya kommunum hava latið skattafyrisitingina upp í hendurnar á líkningarráð Føroya og harvið hava latið nakað av kommunala sjálvstýrinum frá sær.

Tórshavnar kommuna er sannførd um, at størru kommunurnar, sum frálíður, sjálvar koma at standa fyri tí fyrisiting, ið náttúrliga liggur innan øki teirra (sí annars viðmerkingar til broytingaruppskot til løgtingslóg nr. 87). Eftirsum tað sambært § 86 í skattalógini er álagt bygda(r) ráðunum at skipa fyri skattaálíkningini í kommununi, kann eingin ivi vera um, at tað mest náttúrliga er, at kommunurnar sjálvar standa fyri skattafyrisitingini.

Fyri at javnstilla kommununrnar, hvat fyrisitingarútreiðslum viðvíkur, verður skotið upp, at landsstýrið ikki bert (gjøgnum deildarskrivstovur undir líkningarráðnum) rindar fyri skattafyrisitingina í teim kommunum, hvørs fyrisiting ger álíkning fyri líkningarnevndina, sambært § 86, 2. stk. Endurgjaldið eigur at verða áseett av landsstýrinum eftir góðkendum normeringum fyri skattafyrisitingina.

Ivi kann ikki vera um, at Føroya Løgting hevur ætlað at varðveitt kommunalar skattafyrisitingar, annars hevði 2. stk. í § 86 sjálvsagt ikki staðið í samtíðarskattalógini.

Nú skattalógin verður viðgjørd, kundi passandi verið víst á, at landsstýrið í kunngerð um starvsskipan fyri líkningarnevndir hevur »gloymt« reglurnar, sum umrøddar eru í § 86, 2. stk.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Poul Michelsen, løgtingsmanni 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 beint í skattanevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hilmar Kass, Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Agnar Nielsen) tekur undir við tí kommunala sjálvstýrinum, og metir, at reglurnar eiga at verða gjørdar smidligari soleiðis, at kommunurnar sjálvar ella í felag koma at umsita sínar skattafyrisitingar, og setir tí fram hetta:

uppskot

til

samtykt

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri løgtingið broyttar reglur, soleiðis at kommununa sjálvar, antin hvør sær ella í felag fleiri kommunur, røkja kommunalu skattaumsitingina.

Minnilutin (Agnar Nielsen) tekur í øðrum lagi undir við uppskoti Poul Michelsens.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) mælir løgtinginum til at samtykkja fyriliggjandi

lógaruppskot.

2. viðgerð 6. mai. § 1 í uppskotinum frá Poul Michelsen fall við 10-0. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum í skattanevndini fall við 8-0. Málið sostatt burturfallið.

97 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Poul Michelsen, løgtingsmaður fram soljóðandi

uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður § 5 orðað soleiðis:

»Vísandi til § 54 í samtíðarskattalógini verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 8 til 15 í sama lóg, og teirra í § 2 nevndu feløgum v.m., sum eru undir avmarkaðari skattaskyldu, ásettur til 49% av inntøkunum til landskassa og kommunur. Skatturin verður býttur við 40% sum kommunuskattur og 60% sum landskattur.«

§ 2.

Henda lóg fær gildi fyri skattir, sum verða líknaðir á inntøkur í tí roknskaparárinum, sum endar í álmanakkaárinum 1988 ella seinni.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 fra 1. september 1983 om fastsættelse af skat til kassen med senere ændringer affattes § 5 således:

»Under henvisning til § 54 i kildeskatteloven udskrives skatten for dem, der er omhandlet i nævnte lov § 1, nr. 8 til 15 og for de i § 2 nævnte selskaber m.v., der er undergivet begrænset skattepligt, til 49% af indtægten til landskassen og kommune. Skatten fordeles med 40% som kommuneskat og 60% som landsskat.

§ 2.

Denne lov træder i kraft for skatter, som pålignes på indtægter i det regnskabsår, som slutter i kalenderåret 1988 eller senere.

Viðmerkingar:

Higartil hava flest allir politisku flokkar í stevnuskrá síni sett sum mál, at føroyskar kommunu eiga at fáa meira sjálvsstýri. Ynskiligt hevði verið, at kommunur mest møguligt umsita mál, ið náttúrliga liggur innan øki teirra, og ætlanir hava
verið frammi um at geva kommununum hendan møguleikan við at broyta landsins lógir og geva kommununum fíggjarligt grundarlag, so hetta letur seg gera.

Tað eigur at ásannast, at soleiðis sum kommunurnar í dag eru í stødd og hava orku til, so er ikki heilt lætt at røkka hesum politiska máli.

Politisku flokkarnir eiga tó at gera upp við seg sjálvar, hvønn týdning teir leggja í at varðveita kommunur sum ein part av politisku og umsitingarligu skipanini.

Skal gangast út frá orðaskiftinum á tingi herfyri um umhvørvislógina, ið m.a. legði upp til at útihýsa kommunalari luttøku, so var boðskapurin frá politiskari síðu púra greiður: Føroysku kommununar skulu framyvir verða við at loysa og umsita týðandi samfelagsuppgávur.

Hóast hetta, so er týðuligt — nú meira enn nakrantíð — at kreftir virka fyri, at minst møguligt verður lagt út til kommununar at umsita. Nevnast kann her ítøkilig dømi á almenna líkningar-, umhvørvis-, býarlans- og brunatekniska økinum.

Skal tað nakrantíð eydnast at gevast kommununum størri ábyrgd, so er tað avgerðandi, at tær at umsita sum skjótast. Í meðan eigur eitt málvíst arbeiði at verða gjørt fyri neyðugum broytingum, sum kunnu skapa grundarlag fyri betri umsitingarorku hjá kommununum sum heild.

At kommununar sjálvar koma at umsita fleiri málsøki, kemur uttan iva at hava stóran týdning fyri eini betri málsviðgerð mótvegis borgaranum. Størri effektivitetur og betri grundarlag verður fyri støðutakan, og kann hetta soleiðis spara nógv um almennu umsitingarútreiðslurnar og samstundis gera, at kommunur politiskt og umsitingarliga fara at mennast.

Men inntøkugrundarlagið hjá kommununum er tó ikki í samsvari við politisku ætlanirnar her. Kommununanna partur av skattainntøkum í mun til landið gerst alt minni, og er tí rímuligt og rætt at broyta lutfallið soleiðis, at hetta samsvarar betri við tær uppgávur, ið kommununar umsita.

Í fyrstu atløgu eigur at verða rættað upp á tann miss, kommununurnar hava verið fyri hesi seinastu árini.

Men við ætlanini um størri kommunalari luttøku í almennari umsiting, eigur býtislutfallið av samlaða skattinum sostatt at verða broytt soleiðis, at samsvar verður við tær øktu kommunalu uppgávurnar.

Skotið verður tí upp beinanvegin at broyta býtið av partafelagsskatti til kommunur frá 30% til 40%.

Um býtið av tí persónliga skattinum millum landið og kommununar kann til samanberingar upplýsast, at hetta er o.u. 60% til landið og o.u. 40% til kommununar.

Upplýst er, at samlaði partafelagsskatturin fyri skattaárið 1987 er o.u. kr. 120.000.000, partur kommununnar (30%) er o.u. kr. 36.000.000.

Sum øllum tingmonnum kunnugt verða óvanliga nógvar fyritøkur, sum áður vórðu persónuliga riknar, nú reknar sum partafeløg, og eru flestu partafeløgini stovnað hesi seinastu árini. Vinningur av fyritøkum, sum varð uppgivin til skattingar sum skattskyldug persónlig inntøka, verður sostatt nú í stórum uppgivin sum vinningur av rakstri av partafeløgum.

Givið er, at kommunur, sum jú bert hava skattin sum inntøku, ikki sum frá líður kunnu tola, at máað verður undan hesum grundarlagi og tí ikki kunnu verða skattin frá fyritøkum fyri uttan, um tær sjálvstøðugt skulu røkja tær uppgávur, sum náttúrliga eru ella verða lagdar til eina kommunu at umsita. Verandi lógaruppskot miðar tí í móti at tryggja Føroya kommunum eitt óbroytt inntøkugrundarlag, hóast broytingar í mátanum at reka fyritøkur uppá.

Av omanfyristandandi sæst, at kommununar í 1987 vóru fyri einum skattamissi upp á o.u. kr. 12.000.000.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, og er ikki aftur komið haðani.

98 Lán úr íbúðagrunninum til smærri vistarheim í samband við vardar íbúðir.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at leggja fyri tingið, broytingar í lógini um íbúðagrunn, soleiðis at kommunur eisini kunnu læna úr hesum grunni til smærri vistarheim, sum verða bygd í sambandi við vardar íbúðir.

Viðmerkingar:

Gomul fólk, sum ikki klára at búgva heima hjá sær sjálvum, hava higartil í nógvum førum verið noydd til at flyta í aðrar bygdir at búgva teirra seinastu dagar, langt frá familju, tí eingi heim er til teirra í heimbygdini. Td. liggja fólk úr Norðurstreymoy í Vágum, fólk úr øllum bygdum í Suðuroy eru savnað saman á Tvøroyri, fólk úr øllum bygdum í Eysturoy eru savnað saman í Runavík, og fólk av Sandi liggja í Havn.

Í ásannan av, at tað er skeivt, at gomul fólk verða flutt úr heimbygdini, tá eingi serstakt skal verða gjørt fyri tey aðrastaðni, annað enn at tey verða væl passað, eru ætlanir um at byggja fleiri vistarheim um landið. Men allar kommunur mugu standa í bíðirøð eftir loyvi frá landsstýrinum, tí hitt almenna skal gjalda ein stórun part av kostnaðinum, og bíðast má eftir tí ráðfylgju, sum landsstýrið vil geva loyvi til.

Av tí av livialdurin er so nógv hækkaður, gerast alt fleiri og fleiri gomul. Fyri at kommununar kunnu hava møguleika til at syrgja fyri sínum gomlu sjálvar, hevði tað gjørt proceduruna av bygging av vistarheiminum nógv lættari og skjótari, um kommununar sluppu av avgera, hvussu nógv og nær tær byggja. Tað má vera líka so stórur rættur og ábyrgd hjá kommunum at syrgja fyri sínum gomlu, sum at byggja skúlar, vegir, havnir og ítróttarhallir til íbúgvarnar í kommuni.

Fyri at lætta um hendan møguleikan, verður skotið upp, at kommununar fáa loyvi til at læna úr íbúðargrunninum til bygging av vistarheimum í sambandi við vardar íbúðir.

Sum er hava kommununar møguleika at byggja vardar íbúðir við stuðuli frá

íbúðagrunninum. Ongar íbúðir fyri gomul eru enn bygdar eftir hesari lóg, tí tað ber illa til at byggja vardar íbuðir, uttan at hava ein miðdepul, hvar tey gomlu kunnu fáa tiltrongda hjálp til cina og hvørja tíð. Tað eigur eitt vistarheim at vera knýtt til íbúðirnar.

Kommununrnar eiga at reka vistarheimini við einum ískoyti til raksturin frá tí almenna. Tá avgera kommununrnar, hvørji kor teirra gomlu hava.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í almenna— og heilsunevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt av Framsóknarflokkinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 23. mars beint í løgtingsins almanna- og heilsunevnd.

Nevndin hevur havt fund eina ferð við avvarðandi landsstýrisk vinnu eins og almannastjóran.

Semja er um, at støðan framvegis ikki er nóg góð hjá okkara gomlu, og at ein millumloysn eigur at verða funnin ímillum hetta at búgva heima og so tað at vera á døgnstovni. Eisini verður hildið, at tað átti at verið gjørligt at funnið millumloysnir, ið ikki eru so kostnaðarmiklar sum tað, vit hava sæð higartil, tá talan er um ellis- og røktarheim. Eisini verður talað um raksturin, har upplýst verður, at eitt ellis- og røktarheim um dagin kostar um 1.000 kr. í rakstri, meðan eitt vistarheim liggur millum 500 og 700 krónur um dagin.

Víst verður á ein bólk av eldri fólki, ið klárar seg sámiliga heima einsamøll, men sum eru bangin um næturnar. Hesi høvdu kanska verið munandi longri heima, um tey høvdu høvi til at sett seg í samband við einhvønn stovn, har náttarvakt var. Í slíkum føri er tað, at eitt vistarheim við heimahjálp sum náttarvakt kundi verið hollur stuðul.

Uppskotsstillarin hevur ikki hugsað sær at smoygt nakað yvir lløvdið á kommunum, men tað verður hildið skilagott, um einhvør kommuna sum eina reynd í samráð við almannastovuna og heimahjálp fer undir eina slíka ætlan, har hugsað verður um lutvísa náttarvakt, lutvíst vask av klæðum, útbering av mati, møguligt uppihald um dagin og møgulig umsiting av heilivági var týðandi táttur.

Almanna- og heilsunevndin tekur undir við, at hetta eru mál, ið arbeitt eigur at vera við, og tað er tí ein samd almanna- og heilsunevnd, ið setir soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landstýrinum saman við Almannastovuni at kanna møguleikarnar fyri loysn á teim spurningum, ið umrøddir eru í hesum máli.

2. viðgerð 5. mai. Uppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt við 31-0 atkvøðum.

99 Setan av gerontologi.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

Til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta gerontolog, serlækan í sjúkum hjá eldri fólki, við heilsuverkið.

Viðmerkingar:

Sambært yvirlit frá fólkayvirlitinum vóru 16. mars 1987, 3503 fólk í Føroyum, sum vóru yvir 70 ára gomul.

Av hesum eru 228 innløgd á stovnar, umleið 400 fáa vitjan av heimasjúkrasystir og o.u. 950 heima fáa heimahjálp.

Eldri fólk og gomul hava veikleikar og sjúkur, sum einans tey hava. Men nógv kann gerast fyri, at gomul kunnu vera frísk og røsk sum longst. Nógv verður gjørt í øðrum londum fyri hetta. T.d. verður Diakonissestiftelsen í Keypmannahavn nú einans brúkt til upptreníng av gomlum fólki, so tey sum longst kunnu klára seg heima hjá sær sjálvum.

Serlæknar í sjúkum hjá gomlum fólki standa fyri hesum arbeiði.

Skotið verður upp at ein gerontologur verður settur við heilsuverkið til ráðgevara hjá øllum stovnum fyri gomul: - ellis- og røktarheimum, vistarheimum, heimahjálpar og heimasjúkrasystrastovni.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt av Framsóknarflokkinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 23. mars beint í almanna- og heilsunevndina.

Sum heild vóru fólk positivt sinnað fyri málinum. Dentur var lagdur á, at talan ikki er um at seta ein serlækna í geriatri (gamlamannasjúku) á landssjúkrahúsinum. Heldur er talan um ein serlækna, ið verður settur undir heilsuverkið, og sum virkar sum ráðgevi hjá landssjúkrahúsi og ellis- og røktarheimi. Spurningurin um serlækna í geritri hevur annars verið havdur framimi í samband við sjúkrahúsverk Føroya.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Karin Kjølbro, Jákup Lindenskov og Adolf V. Hansen) mælir løgtinginum til at taka undir við uppskoti framsóknarfloksins.

Minnilutin (Jógvan Sundstein og Flemming Mikkelsen) heldur, at málið hoyrir heima undir planlegging av heilsuverkinum og tekur ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 28. apríl. Uppskot Framsóknarfloksins samtykt við 19-0 atkvøðum.

101 Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.

§ 1.

Í løgtingsóg nr 52 frá 29 desember 1971 um skattligar avskrivingar v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5 a, stk. 1 verður orðað soleiðis:
»Útveganarpeningurin fyri persónbilar, sum bert verða nýttir vinnuliga, men sum eru skrásettir til privatan persónsflutning, verða ikki taldar við í tað í § 2 umrødda saldovirðið, um útveganarpeningurin fer upp um 150.000 kr.»
2. Í § 8, 2. stk., 2. punktum verður orðingin »§ 8, 2. stk. «broytt til:
»§ 7, 2. stk.»
3. § 17. stk. 1, litra a) verður orðað soleiðis:
»Bygningar, sum bert verða nýttir til handverk og ídnað, her íroknað neyðug skrivstovu og goymsluhøli.»
4. Óbroytt.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om skattemæssige afskrivinger m.v.

§ 1

I lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 5 a, stk. 1, affattes således:
«Anskaffelsesprisen for personbiler, som udelukkende benyttes erhvervsmæssigt, men som er registreret til privat personstransport, medregnes ikke i den i § 2 omtalte saldoværdi, hvis anskaffelsesprisen overstiger 160.000 kr.»
2) I § 8, stk. 2. punktum 2 ændres formuleringen »§ 8, stk 2.« til: »§ 7, stk. 2.».
3) § 17, stk. 1, litra a) affattes således:
»Bygninger, som udelukkende anvendes til håndværk og industri, herunder: medregnet nødvendige kontorer og lager«.
4) § 20, stk. 1, punktum 1 formuleres således:

5. Í § 39, 1. punktum verður strikað »og § 8, d og e í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 við seinni broytingum « og somuleiðis verða 2., 3. og 4. punktum strikað.

»På de i § 17, stk. 1, litra a) og b) nævnte bygninger kan der i anskaffelsesåret og hvert af de nærmest følgende 9 indkomstår foretages skattemæssige afskrivninger med indtil 7% af anskaffelsessummen.«

5) I § 39, punktum 1 udgår »§ 8 d og e i lagtingslov nr. 50 af 2 juli 1963 med senere ændringer« og ligeledes udgår punktum 2, 3 og 4.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter at den er bekendtgjordt.

Viðmerkingar:

Til § 5 a, stk. 1 1:
Broytingin er einans ein dagføring av orðalagnum í greinini, soleiðis at reglan fevnir um allar persónbilar, uttan mun til, hvør í virkinum nýtir teir.

Til § 8, stk. 2, 2. punktum:
Broytingin er ein dagføring, so ávísingin verður nágreinilig.

Til § 17, stk. 1, litra a):
Broytingin er ein nágreining av verandi reglu og mannagongd, hareftir bygningar, sum burturav verða nýttir til handverk og ídnað, her íroknað ncyðug skrivstovu og goymsluhøli, kunnu avskrivast eftir reglunum í § 20, um hesir verða nýtlir vinnuliga.

Til § 20, stk. 1, 1. punktum.
Broytingin er einans ein nágreining og dagføring ag galdandi mannagongd í tí danska lógartekstinum, so at tað er samsvar millum føroyska og danska orðalagið. Føroyski teksturin er sostatt óbroyttur.

Til § 39:
Hetta er ein dagføring, so ávísingin til 1963-skattalógina verður strikað.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir til ein samd skattanevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrins.

2. viðgerð 4. mai. § 1 varð samtykt við 30-0 atkvøðum. § 2 samtykt uttan atkvøðugreilu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 30-0 atkvøðum.

3. viðgerð 6. mai. Uppskot endaliga samtykt við 31—0 atkvøðum.

Lóg nr. 51 frá 26. mai 1988.

102 Broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum.

Árr 1988, hósdagin 17. mars legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 40 frá 17. apríl 1986 um skatt av vinningi í

lagtingslog om ændring i lagtingslov om skat af fortjeneste i forbindelse med salg af værdipapirer.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 40 af 17. april 1986 om skat i forbindelse med salg af værdi-

samband við sølu av virðisbrøvum verður gjørdar hesar broytingar:
1) § 1, stk. 3 verður strikað
2) § 1, stk. 4 verður § 1, stk. 3.

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

papirer foretages følgende ændringer:
1) § 1, stk. 3 udgår.
2) § 1, stk. 4 ændres til § 1, stk. 3.

§ 2.
Denne lov træder i kraft dagen efter at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:
§ 1, stk. 3 verður strikað, tá nágreining av vinningsbýti og útlutan stendur í § 30 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 3. mai legði fram sojóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 beint í skattanevndina.
Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd skattanevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 4. mai. § 1 samtykt við 28-0, § 2 við 30-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 30-0.

3. viðgerð 5. mai. Lógin endaliga samtykt við 32-0 atkvøðum.

Lóg nr. 50 frá 26. mai 1988.

103 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, 1. punktum verður orðað soleiðis:
»Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (samtíðarskattur) verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 1-6 í somu lóg og teirra, ið nevnd eru í § 2, stk. 1, litra c, d, e, f og g, til landskassan ásettur soleiðis:«
2) Í § 3, stk. 2, 2. punktum, verður aftaná: »og frá og við skattaárinum 1987 tó 12.000 kr. »sett:«, frá og við skattaárinum 1988 13.000 kr.»
3) Í § 3, stk. 2, 3. punktum verður aftaná:
»og frá og við skattaárinum 1987 tó 9.200 kr. »sett:«, frá og við skattaárinum 1988 10.200 kr.»

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1, punktum 1 affattes således:
»Under henvisning til § 54 i lagtingslov nr 86 af 1,. september 1983 om landsskat og kommuneskat (kildeskat) udskrives skatten for dem, der er omhandlet i nævnte lovs § 1 nr. 1-6 og for dem, der er omhandlet i § 2, stk. 1, litra c, d, e, f og g, til landskassen således:
2) I § 3, stk. 2, punktum 2 tilføjes efter: » og med virkning fra og med skatteåret 1987 dog kr. 12.000 «, og med virkning fra og med skatteåret 1988 kr. 13.000.»
3) I § 3, stk. 2, punktum 3 tilføjes efter: »og med virkning fra og med skatteåret 1987 dog kr. 9.200.«, og med virkning fra og med skatteåret 1988 kr. 10.2000.»
4) § 7 formuleres således: »Af royalty,

4) § 7 verður orðað soleiðis:
»Av nýtslugjaldi (royalty) sambært § 2, 1. stk. c) í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður ásett eitt fast gjald uppá 25%. Tann, ið rindar ella góðskrivar nýtslugjaldið skal halda aftur hetta avgjald og rinda peningin til Føroya Gjaldsstovu við tilskilan av navni og bústaði móttakarans. Rindan av avgjaldinum verður roknað at vera rættstundis, tá goldið verður í seinasta lagi við endan av mánaðinum, sum kemur aftaná tann mánaðin, sum avgjaldið er gjaldið komið. Verður býtt við 40% til avvarðandi kommunu og 60% til landskassan.
2. stk. Um avgjaldið ikki er goldið rættstundis sambært stk. 1 skal renta rindast av avgjaldinum við 1% um mánaðin frá gjaldkomudegi at rokna til goldið verður.
3. stk. Renta sambært stk. 2 kann ikki verða frádrigin skattskyldugu inntøkuni. Reglurnar í § 135, 3. stk. í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landskatt og kommunuskatt við seinni broytingum um rættin til at panta avgjaldið við aftratkomnum rentum, er galdandi í hesum førum.»

5) Sum nýggj § 8 verður sett: »Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 2, stk. 1, a), b), h) og i), sum eru undir avmarkaðari skattskyldu, ásettur til 35% av

jfr. § 2, stk. 1 c) i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer udskrives en fast afgift på 25%. Den, som udbetaler eller godskriver royalty skal indeholde denne afgift og indbetale beløbet til Føroya Gjaldsstova med oplysning om modtagerens navn og adresse. Indbetaling af royaltyafgift anses for rettidig, når den finder sted senest ved udløbet af den måned, der følger efter den måned, hvor royaltyafgiften er forfalden til betaling. Afgiften fordeles med 40% til pågældende kommune og 60% til landskassen.
Stk. 2. Er den i henhold til stk. 1 indeholdte afgift ikke indbetalt rettidigt, påløber der afgiften renter med 1% pr. påbegyndt måned fra sidste rettidige indbetalelsesdag at regne.
*Stk.*3. Den i stk 2 omhandlede rente kan ikke fratrækkes i den skattepligtige indkomst. Reglerne i § 135, stk. 3 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landskat og kommuneskat med senere ændringer om retten til udpantning af afgift med påløbne renter finder tilsvarende anvendelse.»

5) Som ny § 8 indsættes:
»Under henvisning til § 54 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer, udskrives skatten til dem, der er omhandlede i § 2, stk. 1, a), b), h) og i), med begrænset skattepligt, med 35% af bruttoindtægten. Skatten fordeles med 40% som kommune-

bruttoinntøkuni. Skatturin verður býttur við 40% sum kommunuskattur og 60% sum landsskattur.»

6) § 8 verður § 9.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi 1. januar 1988.

skat og 60% som landskat.»

6) § 8 bliver § 9.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1988.

Viðmerkingar:

Til § 1:

Broytingin er ein nágreining av, hvussu landsskatturin verður ásettur fyri tey, sum nevnd eru í § 2, stk. 1, litra c, d, e, f og g í skattalógini, og er somuleiðis ein fylgjubroyting stavandi frá nýggju § 8 í broyting nr. 5).

Til § 3, stk. 2:

Skotið verður upp, at hækka persónsdrádráttin fyri leysar persónar yvir 67 ár og leysar persónar, sum fáa avlmaids-, einkju- ella fólkapensjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini við 1.000 kr. úr 12.000 kr. í 13.000 kr. at galda frá og við skattaárinum 1988.

Somuleiðis verður skotið upp at hækka persónsfrádráttin fyri giftar persónar yvir 67 ár og giftar persónar, sum fáa avlamis- ella fólkapensjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini við 1.000 kr. úr 9.200 kr. í 10.2000 kr. at galda frá og við skattaárinum 1988.

Til § 7:

Reglur um nýtslugjald vórðu settar við løgtingslóg nr. 55 frá 8. mai 1987, sum kom í gildi í mai 1987. Í hesum lógaruppskoti verður nærri ásett, hvussu gjaldið av nýtslugjaldinum skal rindast til Føroya Gjaldsstovu, og avleiðingarnar av at upphæddin ikki verður goldin ella goldin ov seint.

Til § 8:

Ætlanin við uppskotinum er, at øll, sum sambært § 2, stk 1, a), b), h) og i), í skattalógini eru undir avmarkaðari skattskyldu, verða skattløgd við 35% av bruttoinntøkuni.

Í dag er skipanin tann, at t.d. ein útlendskur lækni teir fyrstu 180 dagarnar ongan frádrátt fær, og tí verður skattaður av bruttoinntøkuni. Aftaná 180 dagar

kemur hann undir fulla skattskyldu, og fær tá allar frádráttir, galdandi frá fyrsta degi, viðkomandi kom til Føroyar.

Nógv eru tey, ið bert dvølja her minni enn 180 dagar, og fyrisitingarliga hevði tað broytt arbeiðsumstøðurnar nógv, um hesi bert skuldu skattleggjast við 35% av bruttoinntøkuni eina ferð med alla.

Tey, ið dvølja her longri, koma altíð undir fulla skattskyldu, og skatturin verður roknaður eftir galdandi skattastiga.

Við hesum lógaruppskoti verður gingið á møti einum tørvi at skattloggja bólkar av fólki, ið higartil ongan skatt hava goldið til Føroyar, tí tey dvølja her minni enn 180 dagar, og tey eru mong, og higartil hevur eingin heimild verið at skattloggja henda bólk.

Til § 9:
Hetta er ein fylgibroyting stavandi frá broyting 5).

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina og er ikki afturkomið haðani.

F.L. j.nr. 430-12-45-16.

104 Happadráttarloyvi til Sjónvarp Føroya.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Lasse Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi.

Uppskot

til

løgtingslóg um happadráttarloyvi til sjónvarp Føroya.	*lagtingslov om tilladelse til lotterispil til Sjónvarp Føroya*
§ *1.* Landsstýrið fær heimild at geva Sjónvarpi Føroya loyvi til happadráttarspæl eftir nærri av landsstýrinum settum reglum.	§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at meddele Sjónvarp Føroya tilladelse til lotterispil på nærmere af landsstyret fastsatte betingelser.
§ *2.* Henda lóg kemur í gildi 1. mai 1988 og fer úr gildi 31. desember 1989.	§ *2.* Denne lov træderi i kraft 1. mai 1988 og træder ud af kraft 31. december 1989.

Viðmerkingar:

Sjónvarpið hevur bert eina inntøkukeldu, sum er sjónvarpsgjald. Tað er sjálvandi mark fyri, hvussu nógv hetta gjald kann hækkast aftrat, og skal Sjónvarpið hava fleiri inntøkur, er tí neyðugt at finna aðrar inntøkukeldur.

Stovnurin hevur søkt um loyvi til at royna happadráttarspæl í eina tíð fyri at útvega fleiri inntøkur. Gevur hetta nakað av týdningi av sær, kann ein partur setast í grunn til bygging av sjónvarpshúsi umframt tað, ið fer sum ískoyti til raksturin.

Landsstýrið heldur tað vera rímiligt at loyva Sjónvarpinum at hava happadráttarspæl í eina tíð og setir tí hetta uppskot fram.

Í viðhefta skrivi dagfest 9. mars 1988 gevur Sjónvarpið eina frágreiðing um tað ætlaða happadráttarspælið.

1. viðgerð 6. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 6. apríl 1988 beint í figgjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í 4 minnilutar.

Minnilutin (Jørgen Thomsen og Signar Hansen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til, at landsstýrið útvegar Sjónvarpi Føroya neyðugan pening við eykajáttan, og setir soljóðandi:

I Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at útvega Sjónvarp Føroya neyðugan pening við evkajáttan.

Minnilutin (Asbjørn Joensen og Ivan Johannesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Svend Aage Ellefsen) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) tekur undir við at geva sjónvarpinum happadráttarloyvi, tó treytað av at happadrátturin ikki verður til hingo ella V4 og setir fram soljóðandi:

II Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at gera reglugerð um happadráttarspæl til Sjónvarp Føroya, at happadrátturin ikki má umfata bingo ella V4.

2. viðgerð 6. mai.§ 1 í uppskoti landsstýrisins fall við 14-0, uppskotini til samtyktar I og II fullu við ávikavist 13-0 og 3-0. Málið sostatt burturfallið.

F.L. j.nr. 512-327.

105 Bygging av ferju til Strandfaraskip Landssins.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Lassi Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um bygging av ferju til Strandfaraskip Landsins.

lagtingslov om bygning af passagerfærge til Strandfaraskip Landins.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at byggja ferju til siglingina millum Sandoynna-Tórshavn-Gomlurætt og landskassans vegna at taka upp til 40 mió. kr. í láni til endamálið.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at bygge en passagerfærge til sejlads mellem Sandø-Thorshavn-Gomlurætt og på landskassens vegna at optage op til 40 mio. kr. i lån til dette formål.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ *2.* Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Landsstýrið nevndi í samband við keypið av »Dúgvuni« smbr. løgtingsmál

nr. 52/1984, at komast skuldi aftur til spurningin um eina endaliga loysn av siglingini til Sandoynna.

Seinasta heyst setti landsstýrið ein arbeiðsbólk, har manningin varð umboðað av báðum skiparunum og maskinmeistaranum, har leiðslan á Strandferðsluni eisini var umboðað og skuldi arbeiðsbólkurin koma til landsstýrið við einum uppskoti um bygging av einari nýggjari Sandoyarferju. Arbeiðsbólkurin hevur nú saman við P/F Havtøkni í Miðvági og verkfrøðinginum Kristini Rasmussen gjørt eitt projekt um bygging av eini ferju, ið mett verður at vera hóskandi til Sandoyarsiglingina.

Ferjan verður 40 metrar long, tað sama sum »Tróndur« og 10,40 metrar breið. Í brutto 345 tons og 155 tons netto. Um veturin kann hon flyta 180 ferðafólk og nakað meira um summarið, alt eftir manningartalinum og taka um 21 persónbilar. Ferjan skal hava 2 × 800 HK høvuðsmaskinur, eins og hon skal hava síðuskrúvu bæði aftan og framman, fyri at hon skal hava so góðar møguleikar fyri at »manerera« sum gjørligt, orsakað av teimum tvørligu innsiglingarmøguleikunum í Skopun á vetri.

Sostatt skuldi ferjan havt so góðar eginleikar og møgulcikar, sum tað nú einaferð er gjørligt, fyri at lúka krøvini og nøkta tørvin fyri nevndu sigling uppá Skopun.

Strandferðslan hevur innheintað tilboð um bygging av eini tílíkar, ferju, og liggur byggipeningurin, um hon verður t.d. bygd í Noregi, uppá uml. 40 mió. kr. og um hon verður bygd í Føroyum uppá umleið 45 mió. kr. og kunnu vit rokna við, at ferjan kann lagtast um eini 2-3 ár. Strandferðslan hevur nú rekt rutuna uppá Sandoynna í næstan 40 ár, við tað at landsstýrið lat byggja fyrstu »Rituna« til hesa sigling í 1949 í Keypmannahavn, samstundis sum rutan varð yvirtikin frá Th.M.&M. »Ritan« kundi flyta 50 ferðafólk, hóast hetta tal var størri tey fyrstu árini. Sum kunnugt sakk »Ritan« á Eystaru vág á vetri 1969, tá hon varð ásigld. Í 1971 lat landsstýrið næstu »Rituna« byggja í Hollandi og varð hon sett í rutuna í 1972. Henda »Ritan« kundi á sumri flyta 140 ferðafólk og um veturin 100 ferðafólk. Harumframt kundi hon flyta 3 persónbilar. Fyrst í 1980-unum var »Tróndur« settur til at sigla nakrar túrar millum Tórshavn og Skopun og so hvørt sum krøvini fyri flutningi av bilum øktist, gjørdi »Tróndur« alt fleiri og fleiri túrar. Tá »Dúgvan« á sumri 1985 varð keypt og sett inn í rutuna millum Havnina og Skálafjørðin, varð »Tróndur« burturav settur í sigling millum Havnina og Skopun.

Ábøtur er gjørdar á »Trónd« soleiðis at hetta skip nøktar tørvin hjá klassa og skipasýni fyri flutning av ferðafólki millum Havnina og Skopun, men havast má í huga, at hetta skip, ið er bygt í 1959 sostatt nærkast teimum 30 árunum, ið er ein høgur aldur fyri eitt ferðamannaskip.

1. viðgerð 8. apríl. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 8. apríl beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins.

Samferðslunevndin heitir á landsstýrið um at lata ferjuna byggja í Føroyum, um tað er gjørligt.

Byggingin eigur at fara fram í samráð við arbeiðsbólkin, sum nevndur er í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

2. viðgerð 3. mai. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 29-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 5. mai. Uppskotið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1800-1. Lóg nr. 79 frá 9. juni 1988.

106 Lóg um kommunalan lánigrunn.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

uppskot

til

løgtingslóg um kommunalan lánigrunn.

§ *1.* Kommunali lánigrunnurin hevur til endamáls at veita kommununum lagalig lán til at keypa lendi og at gera tað byggibúgvið, bøta um klokkviðurskifti og at veita lán til aðrar íløgur í tann mun komuna ikki fær studning ella lagalig lán aðrastaðni.

§ *2.* Grunnurin er ogn landskassans. Umframt ognirnar hjá verandi grunni, fær grunnurin fæið útvegað við játtanum á fíggjarløgtingslógum, rentuinntøku og løgtingslóg um býti av avlopi landskassans.
Stk. 2. Røkkur peningur grunsins ikki til tær láni veitingar, sum verða hildnar neyðugar, er landsstýrinum heimilað við góðkenning fíggjarnevndarinnar at taka upp neyðug lán.

§ *3.* Sett verður ein nevnd at viðgera lániumsóknirnar og at gera tilmæli til landsstýrið um lánijáttanir og onnur viðurskifti grunninum viðvíkjandi.
Stk. 2. Nevndin hevur tríggjar limir og tríggjar tiltakslimir. Landsstýrið setir limirnar og tiltakslimirnar. Nevndin verður vald fyri 4 ár. Landsstýrið til-

lagtingslov om kommunal lånefond.

§ *1.* Den kommunale lånefonds formål er at yde lån til kommuner på ferdelagtige vilkår til køb af jord og byggemodning, forbedring af kloakforhold og at yde lån til andre formål i det omfang, kommunerne ikke får tilskud eller andre lån på fordelagtige vilkår.

§ *2.* Fonden er landskassens ejendom. Foruden midlerne i den nuværende fond tilvejebringes midlerne gennem tilsagn på finanslagtingslov, renteindtægter og lagtingslov om fordeling af landskassens overskud.
Stk. 2. Hvis fondens midler ikke er tilstrækkelige til de låne-tilsagn, som anses for at være nødvendige, er landsstyret hjemlet med finansudvalgets godkendelse at optage lån i nødvendigt omfang.

§ *3.* Der nedsættes et udvalg, der skal behandle låneansøgninger og gøre indstillinger til landsstyret angående lånetilsagn og andre forhold vedrørende fonden.
Stk. 2. Udvalget har tre medlemmer og tre suppleanter. Landsstyret udnævner medlemmerne og suppleanterne.

nevnir formannin. Nevndin ger sjálv starvsskipan sína.
Stk. 3. Nevndin kann søkja sær serkkøna hjálp hjá Landsskrivstovuni.

Udvalget udnævnes for fire år. Landsstyret udnævner formanden. Udvalget fastsætter selv sin forretningsorden.
Stk. 3. Udvalget kan anmode Landsskrivstovan om bistand med ekspertise.

§ *4.* Landsstýrið umsitur grunnin og kann áleggja Gjaldstovuni, Landsbankanum ella øðrum almennum stovni ella grunni at umsita lánini.

§ *4.* Landsstyret administrerer fonden, og kan pålægge Gjaldstovan, Landsbanken eller andre offentlige institutioner eller fonds at administrere fondens lån.

§ *5.* Í sambandi við viðgerð av lániumsóknum eigur dentur at verða lagdur á tørvin fyri viðkomandi íløgu, fíggjarviðurskiftini í viðkomandi kommunu og stýringina av búskapinum í Føroyum sum heild.
2. stk. Landsstýrinum verður heimilað at seta nærri reglur fyri virki grunsins, herundir útlánsrentu og afturgjaldstíð.

§ *5.* Under behandling at låneansøgninger bør der tages hensyn til nødvendigheder af vedkommende investering, de økonomiske forhold i vedkommende kommune og styring af Færøernes økonomi som helhed.
Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at fastsatte nærmere regler for fondens virksomhed, herunder udlånsrente og tilbagebetalingstid.

§ *6.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd. Samstundis fara úr gildi løgtingslóg nr. 38 frá 26. apríl 1974 um veitan av láni til kommunur til keyp av jørð, sum broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 6. mai 1976.

§ *6.* Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 38 af 26. april 1974 om ydelse af lån til kommuner til opkøb af jord, som ændret ved lagtingslov nr. 31 af 6. maj 1976.

Viðmeringar:
Tá ið landsstýrissamgongan varð skipað í januar 1985, var ein av setningunum at økja um fíggjarorkuna hjá kommunala Lánigrunninum, so at grunnurin verður betur førur fyri at nøkta lánitørvin hjá føroysku kommunum.

Sett hevur verið meira av á fíggjarløgtingslógini á hvørjum ári, men fyrst við løgtingslóg nr. 29/1987 um býti av avlopi landskassans varð økt so munandi um ognina hjá Kommunala Lánigrunninum (umleið 51 mió. kr.), at landsstýrið

á heysti 1987 setti ein arbeiðsbólk at endurskoða lógina v.m. um grunnin.
Í arbeiðsbólkinum vórðu vald:
John P. Danielsen, formaður,
Ólavur Christiansen,
Petur F. Christiansen, umboð fyri Tórshavn Býráð,
Jógvan K. Mørkøre, umboð fyri Føroya Kommunufelag.
Sum skrivari varð sett Kristin Balle, fulltrúi.

Bólkurin fekk álagt at gera uppskot til broytingar í lóg og reglugerð fyri Kommunala Lánigrunnin við hesum fyri eyga:

1. At víðka um virkisøki grunsins til eisini at umfata annað enn byggilendi og bygibúning.

2. At betra um lánimøguleikarnar í Føroyum fyri á tann hátt at avmarka kommunala lántøku uttanífrá.

Frágreiðingin frá arbeiðsbólkinum er her hjáløgd eins og uppskot til reglugerð fyri Kommunala Lánigrunnin.

Vísandi til hjáløgdu viðmerkingar leggur landsstýrið við hesum fram uppskot til nýggja lóg fyri Kommunala Lánigrunnin.

Skjal 1.

Galdandi reglur

Kommunali lánigrunnurin varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 38 frá 26. apríl 1974. Endamálið var at veita lagalig lán til kommunur til keyp av jørð til byggilendi og til byggibúning.

Tey fyrstu árini vórðu játtaðar 1 mió. kr. árliga úr landskassanum til grunnin. Harafturat hevur grunnurin møguleika at lán tilsamans 4 mió. kr. Hesin lánimøguleiki er ikki brúktur.

Í 1982 varð fæ grunsins íroknað rentur av innistandandi peningi í peningastovnum komið upp á umleið 10 mió. kr., og avgjørdi landsstýrið tá at fara undir útlánsvirksemi.

Reglugerð fyri grunnin varð gjørd, jbr. kunngerð nr. 67/1982. Rentan varð sett til 8% p.a. og avdráttartíðin til 20 ár. Fyrsta árið søktu 13 kommunur um lán fyri tilsamans góðar 26. mió. kr. Umleið 6 mió. kr. vórðu játtaðar og fingu allar 13 kommunurnar lut í játtanini. Burtursæð frá hesum fyrsta árinum, grunnurin virkaði, hava bert fáar umsóknir um lán verið árliga, helst orsakað av, at avmarkaðu útlánsmøguleikarnir hava fingið kommunurnar at søkja sær lán aðrastaðni frá.

Figgjarorkan

Tann 4. mars 1988 varð fæ grunsins (partur av avlopi landskassans 1986 íroknað) 79,4 mió. kr.

Játtað eru lán fyri 17,6 mió. kr., men eru ikki øll játtaðu lánini goldin enn, tann 4. mars 1988 eru umleið 7,6 mió. kr. útistandandi sum lán.

Tøkur peningur aftaná, at avlop landskassans 1986 er flutt grunninum, verður sostatt 61,8 mió. kr., sum kunnu verða játtaðar sum lán.

Tá avlopið 1986 er flutt grunninum, verður rentuinntøkan uml. 6 mió. kr. um árið. Verður hildið áfram at játta 3 mió. kr. til grunnin árliga eins og seinastu árini, fer fæ grunsins at vaksa við umleið 9 mió. kr. um árið. Verða afturgoldnir avdráttir settir til t.d. 3 mió. kr. árliga, verður gjørligt at játta nýggj lán fyri einar 12 mió. kr. um árið aftaná, at tann í dag ikki útlánti parturin av fænum er lántur út (her er roknað við eini rentu upp á 8% p.a. og 20 ára afturgjaldingartíð).

Lánimøguleikin kann harafturat betrast við at brúka ta í lógini tilskilaðu heimild at lána pening til grunnin.

Viðkan av verandi útlánsvirksemi

1. Avmarkan av lántøku uttanlands.

Spurningurin um, hvussu nógv kommunali lánigrunnurin kann avmarka lántøku uttanlands hongur saman við lánitørvinum. Bert lítið taltilfar er til skjals, sum kann geva eina lýsing av lánitørvinum. Arbeiðsbólkurin hevur ikki hildið seg kunnu fáa til vega slíkt tilfar innanfyri ta tíð, bólkurin hevur fingið at arbeiða í.

Frá Landsskrivstovuni er upplýst, at kommunurnar seinastu 3 árini hava fingið hesi lániloyvi:

1985	188 mió. kr.
1986	342 mió. kr.
1987	203 mió. kr.

Ein partur av lánunum, serstakliga í 1986, vóru tikin frá donskum kredittfeløgum, m.a. til umfígging av øðrum lánum.

Leysliga mettar kann lántørvurin í løtuni setast til einar 200 mió. kr. um árið, harav uml. helmingurin kann takast í Føroyum frá tryggingarfeløgum og peningastovnum.

Skal grunnurin verða við at avmarka lántøkuna uttanlands, eigur at verða ansað eftir, at lánitreytirnar eru lagaligari enn fyri lán uttanlands.

2. Viðkað heimild at veita lán.

Undir viðgerðini av spurninginum um á hvønn hátt lániheimildin eigur at verða víðkað, hevur arbeiðsbólkurin kannað ymiskar kommunlar uppgávur

og serstakliga møguleikarnar fyri lagaliga fígging av hesum við studningi og lánum.

Kannað er m.a. lógir, kunngerðir og játtanir á fíggarløgtingslógini viðvíkjandi landsvegum, til bygging av ungdómshúsum, vegum, lendingum, havnum, heilsumiðstøðum, húsalánsgrunni, íbúðagrunni, barnagørðum, kirkjugørðum v.m.

Tá lán verða játtað, eigur at verða ansað eftir, at lán úr kommunala lánigrunninum saman við studningi og øðrum lagaligum lánum ikki verða meira enn 100% av viðkomandi íløgu, og tá kommuna selur t.d. byggilendi, sum hevur fígging úr kommunala lánigrunninum, eigur lánið at falla til gjaldingar uttan so, at tað kann flytast til aðrar íløgur hjá viðkomandi kommunu.

Mælt verður til ikki at avmarka lániheimildina til ávís endamál, men við tað at grunnurin framvegis ikki kann nøkta lánitørvin hjá kommununum, verður neyðugt við avmarkingum, herundir helst eisini at geva ávísum íløgum framíhjáræt.

Semja er um, at tað framvegis eigur at verða lagdur dentur á keyp og byggibúning av lendi til sethús, men eisini til íbúðar- og vinnubygging.

Haraftrat er semja um, at dentur eigur at verða lagdur á at veita lán til nýgerð og betran av kloakkviðurskiftunum, Heilsumyndugleikarnir hava javnan víst á tørvin á hesum ymsastaðni kring landið, og hava bygda- og býráðslimir yvirhøvur lyndi til at skjóta hesar íløgur út til fruma fyri aðrar íløgur, sum sýnast meira átrokandi.

Mælt verður eisini til at leggja dent á aðrar kommunalar uppgávur, sum fáa lítlan og ongan stuðul aðrastaðni frá, t.d. vatnveitingar, bruna- og umhvørvismál.

Tá lán verða veitt til íløgur, har kommuna verður stuðlað við studningi ella lagaligum lánum, eigur dentur at verða lagdur á fíggjarorkuna hjá viðkomandi kommunu, herundir íbúgvaratal, inntøkuviðurskifti og tænastustøði.

Spurningurin um stýring av og eftirlit við kommununum varð eisini viðgjørdur og verður hildið skilagott at ansa eftir undir viðgerð av lániumsóknum at lánijáttanir úr Kommunala Lánigrunninum ikki eru við til at skunda undir íløgur hjá kommununum, sum frammanundan hava eina lánibyrðu, sum er í hægra lagi, ella íløgur á økjum, har tænastustøðið í viðkomandi kommunu frammanundan má haldast at vera hóskandi samanborið við tænastustøðið sum heild.

Vísandi til frammanfyri standandi viðmerkingar verður hjálagt sent landsstýrinum til viðgerðar uppskot til nýggja lóg og reglugerð fyri Kommunala Lánigrunnin. Sum skjal fylgir eisini uppskot til nýggja reglugerð.

Tórshavn, tann 4. mars 1988

John P. Danielsen — Jógvan K. Mørkøre

Petur F. Christiansen — Ólavur Christiansen

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð tann 7. apríl 1988 beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgin Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen og Adolf V. Hansen) er av teirri áskoðan, at tann í § 3, 2. stk. upprødda nevnd skal hava 5 limir heldur enn 3, sum skotið upp av landsstýrinum. Meirilutin er av teirri áskoðan, at av hesum skal landsstýrið velja teir 3 og løgtingið 2.

Nevndi meiriluti setir sostatt fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins, § 3, 2. stk. verður orðað soleiðis:

»Nevndin hevur 5 limir og 5 tiltakslimir. Landsstýrið velur 3 limir og løgtingið 2. Nevndin verður vald fyri 4 ár. Landsstýrið tilnevnir formannin. Nevndin ger sjálv starvsskipan sína.«

»Udvalget har 5 medlemmer og 5 suppleanter. Landsstyret udnævner 3 medlemmer og lagtinget 2. Udvalget udnævnes for 4 år. Landsstyret udnævner formanden. Udvalget fastsætter selv sin forretningsorden.«

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, Eyðun Viderø og Ivan Johannesen) er av teirri áskoðan, at limirnir í nevndini skulu verða 3, av hesum skal løgtingið velja 2 og landsstýrið 1 og skal tann landsstýrisvaldi nevndarlimurin verða nevndarformaður. Nevndi minniluti setir sostatt soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins, § 3, 2. stk. verður orðað soleiðis:

»Nevndin hevur 3 limir og 3 tiltakslimir. Løgtingið velur 2 limir og landsstýrið 1. Nevndin verður vald fyri 4 ár. Landsstýrisvaldi limurin er formaður í nevndini. Nevndin ger sjálv starvsskipan sína.«

»Udvalget har 3 medlemmer og 3 suppleanter. Lagtinget udnævner 2 medlemmer og landsstyret 1. Udvalget udnævnes for 4 år. Det af landsstyret valgte medlem er udvalgsformand. Udvalget fastsætter selv sin forretningsorden.«

2. viðgerð 4. mai soleiðis broytt. Broytingaruppskot meirilutans samtykt við 17-0. § 1 uppskot landsstýrisins samtykt við 20-0, § 2 við 27-0 § 3 við 17-0, §§ 4-5 við 17-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 18-0.

3. viðgerð 5. mai. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 840-1. Lóg nr. 75 frá 9. juni 1988.

107 Broyting í løgtingslóg um eldsbruna o.a.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Svend Aage Ellefsen, løgtingsmaður, vegna Poul Michelsen og seg sjálvan fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eldsbruna oa.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um eldsbruna verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýggj § 1 verður innsett:
»Bý- og bygdaráðini hava ábyrgdina av øllum brunamálum í kommununi.
2. stk. Til at ráðgeva kommununum og myndugleikunum annars og til at hava eftirlit við umsitingini av málum, ið koma undir hesa lóg, verður Brunaráð sett við 5 limum, ið verða valdir fyri 4 ár. 2 av limunum verða valdir eftir uppskoti frá kommununi og ein eftir uppskoti frá løgregluni. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur fyri Brunarádið.
3. stk. Til ráðsins vegna at taka sær av dagliga eftirlitinum og ráðgevingini í brunamálum verður skipað ein brunaumsjón.
4. stk. Eftirlitið og ráðgeving fevnir m.a. um:
1. Tilbúgving og útgerð hjá sløkkiliðunum.
2. Gerð av brunareglugerð,
3. Vatnveiting til sløkkilið.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om brand m.v.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 78 af 12. juni 1986 om brand m.v. foretages følgende ændringer:

1) Som ny § 1 indsættes:
»By- og bygderådene har ansvaret for samtlige spørgsmål angående brandvæsenet i kommunen.
Stk. 2. Til at rådgive kommunerne og myndighederne iøvrigt og til at have eftersyn med administrationen af sager, som henhører under denne lov, nedsættes et brandråd med 5 medlemmer, der vælges for 4 år. To af medlemmerne vælges efter forslag fra kommunen, en efter forslag fra politiet. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler for brandrådet.
Stk. 3. Til rådets vegne at foretage den daglige kontrol og rådgivning i sagen angående brandvæsen etableres en brandinspektion.
Stk. 4. Tilsynet og rådgivningen omfatter bl.a.:
1. Brandvæsenets beredskab og materiel.
2. Udfærdigelse af brandvæsenet.
3. Vandforsyning til brandvæsenet.

4.Ávaringarskipan hjá sløkkiliðunum.

5.Útbúgving av manningini í sløkkiliðunum.

5. stk. Brunaumsjónin rekur umframt tey størv, ið verða løgd undir stovnin í lógini ella í teimum fyriskipanum, ið verða gjørdar sambært lógini.

6. stk. Landsstýrið kann leggja fleiri størv undir brunaumsjón landsins.,

2) § 2 verður orðað soleiðis:

»Fyrisitingin hjá brunaráðnum verður skipað soleiðis kring landið, at hon mest møguligt við beinleiðis sambandi kemur kommununum til hjálpar við eftirliti og ráðgeving.

2. stk. Um býar- og bygdarráð ikki ger tað, teimum er álagt sambært hesi lóg, kann brunaráðið geva brunaumsjónini heimild at taka avgerðir til at tryggja, at viðurskiftini koma í rættlag. Útreiðslur í hesum sambandi verða bornar av avvarðandi kommunun.

3. stk. Avgerðir, sum brunaumsjónin tekur í tílíkum málum, kunnu verða kærdar til landsstýrið.

4. stk. Landsstýrið kann hóast reglurna í 3. stk. áseta, at ávísar avgerðir, ið brunaumsjónin tekur, eru endaligar.«

3) Í § 3 verða 2., 3. og 4. stk. soljóðandi:

»*2. stk.* Brunaráðið kann eftir tilmæli frá brunaumsjónini heilt ella fyri ein part sleppa einari kommunu frá at halda sløkkilið um so er, at kommunan í semju við annað sløkkilið ella á annan hátt

4.Brandvæsenets alarmeringsordning.

5.Uddannelse af brandvæsenets personale.

Stk. 5. Brandinspektionen varetager herudover de funktioner, der tillægges institutionen i loven eller i de medfør af loven udfærdigede forskrifter.

Stk. 6. Landsstyret kan henlægge yderligere opgaver til landets brandinspektion.

2) § 2 formuleres således:

»Brandrådets forvaltning etableles på den måde på landsbasis, at den mest muligt med direkte kontakt er til hjælp for kommunerne med hensyn til tilsyn og rådgivning.

Stk. 2. Såfremt by- og bygderåd ikke udfører det, der er pålagt dem i denne lov, kan brandrådet give brandinspektionen hjemmel til at tage beslutninger til at sikre, at forholdene bringes i orden. Udgifter i denne forbindelse betales af vedkommende kommuner.

Stk. 3. Afgørelser, der træffes af brandinspektionen i sådanne sager, kan indbringes for landsstyret

Stk. 4. Landsstyret kan uanset reglen i stk. 3 fastsætte, at bestemte afgørelser, som brandinspektionen tager, er endelige.

3) I § 3 formuleres stk. 2, 3 og 4 således:

»*Stk. 2.* Brandrådet kan efter indstilling fra brandinspektionen helt eller delvis fritage en kommune for opretholdelse af et brandvæsen, såfremt kommunen ved aftale med et andet brandvæsen eller på

fær í lag fullgóða skipan av bjargingar- og sløkkiarbeiðinum í kommununi.

3. stk. Brunaráðið kann eftir tilmæli frá brunaumsjónini áseta, at kommunur innan fyrí avmarkað øki skulu taka avgerð, sbrt. 2. stk., um at hava sama sløkkilið, um tær ikki sjálvar vilja halda sløkkilið.

4. stk. Brunaráðið kann eftir tilmæli frá brunaumsjón loyva, at fleiri kommunur hava sama sløkkilið.«

4) § 5, 2. stk. verður orðað soleiðis:
»Býar- og bygdaráðið ger brunasamtyktina. Brunasamtyktin skal verða góðkend av brunaráðnum.«

5) § 6 verður soljóðandi:
»Í hvørjari kommunu setir býar- ella bygdaráðið ein brunaumsjónarmann. Fleiri kommunur kunnu vera saman um ein brunaumsjónarmann.

2. stk. Býar- ella bygdarráðið kann seta ein ella fleiri hjálparmenn at vera brunaumsjónarmanninum til hjálpar eftir somu reglum sum í 1. stk.

3. stk. Brunaumsjónarmaðurin hevur ta dagligu fyrisitingina av sløkkiliðinum í kommununi.

4. stk. Býar- ella bygdarráð eigur at gera reglugerð fyri brunaumsjónarmonn og hjálparar.

6) § 10 verður soljóðandi:
»Brunaráðið eigur at gera reglur, sum áseta slag av sløkkiamboðum og kranum, og áseta almennar reglur fyri nýtslu av opnum vatnveitingarstøðum.«

anden måde tilvejebringer en forsvarlig ordning af rednings- og slukningsarbejdet i kommunen.

Stk. 3. Brandrådet kan efter indstilling fra brandinspektionen bestemme, at kommuner indenfor et afgrænset område skal træffe aftale i henhold til stk. 2 med samme brandvæsen, såfremt de ikke selv ønsker at opretholde et brandvæsen.

Stk. 4. Brandrådet kan efter henstilling fra brandinspektionen tillade, at flere kommuner opretter fælles brandvæsen.«

4) § 5, stk. 2 formuleres således:
»By- og bygderådet udfærdiger brandvedtægten. Brandvedtægten skal godkendes af brandrådet.«

5) I hver kommune ansætter by- eller bygderådet en brandinspektør. Brandinspektøren kan være fælles for flere kommuner.

Stk. 2. By eller bygderådet kan ansætte en eller flere brandassistenter til hjælp for brandinspektøren efter samme regler som i stk. 1.

Stk. 3. Brandinspektører varetager den daglige ledelse af kommunens brandvæsen.

Stk. 4. By- eller bygderådet skal udfærdige et reglement for brandinspektører og brandassistenter.

6) § 10 formuleres således:
»Brandrådet kan påbyde anvendelse af ensartede typer af brandmateriel og brandhaner og fastsætter almindelige regler for udnyttelse af åbne vandforsyningssteder.«

7) § 12 verður í 1. stk., síðsta punktum ganga út orðini: »Skipanin skal verða góðkend av brunaumsjón landsins og fútanum«, og í staðin verður sett: »Skipanin skal verða góðkend av brunaráðnum«.
8) Í § 18, 2. stk. verður gongur út: »brunaumsjón landins«, og í staðin fyri verður sett: »Brunaráðið«.
9) Í § 22, 1. og 2. stk. verður orðingin »Brunaumsjón landsins« broytt til: »Býar- ella bygdarráðið«.
10) Í § 24, 2. stk. verður orðingin: »Brunaumsjón landsins« broytt til: »Býar- ella bygdarráðið«.
11) § 25, 2. stk. verður strikað.

7) I § 12, stk. 1, sidste punktum udgår: »Planen skal godkendes af Landets brandinspektion og landfogeden«, og i stedet indsættes: »Planen skal godkendes af brandrådet.«
8) I § 18, stk. 2 udgår: »Landets brandinspektion« og i stedet indsættes: »Brandrådet«.
9) I § 22, stk. 1, og 2 ændres »Landets brandinspektion« til: »By- eller bygderåd«.
10) I § 24, stk. 2, ændres ordene: »Landets brandinspektion« til: »By- eller bygderådet«.
11) § 25, stk. 2 udgår.

Viðmerkingar:

Tað var ongantíð ætlanin, at ábyrgd skuldi takast frá kommunalu myndugleikunum við brunalógini, sum nú hevur verið í gildi í umleið 2 ár. Tvørturímóti var tað hugsanin, at serliga tær kommunur, ið ikki høvdu nóg góðar umstøður í egnu umsiting síni, skuldu kunna fáa hjálp og vegleiðing hjá brunaumsjón landsins, so at tær fult út kundu átaka sær skyldur sínar sambært lógini.

Men síðani lógin varð lýst, er tað hent, at brunaumsjónin er løgd til landsverkfrøðingsstovnin at umsita, beint ímóti ynskjunum hjá øllum kommunum og beint ímóti lyftum, sum kommunurnar fingu, tá ið lógin varð fyrireikað. Royndirnar hesi bæði árini hava víst, at júst tað, sum kommunurnar ávaraðu ímóti, nú er um at gerast veruleiki. Landsverkfrøðingsstovnurin leggur minni dent á ráðgeving, men ynskir heldur at umsita sum ein góðkennandi myndugleiki oman fyri kommunurnar.

Tí verður tað hildið neyðugt at fasthalda, at tann umsiting, sum væl fær verið úti um landið hjá kommununum sjálvum, skal ikki savnast á einum stað, og tí er í lógaruppskotinum undirstrikað, at brunaumsjón landsins er ein vegleiðandi stovnur undir ábyrgd hjá brunaráðnum. Brunaumsjónin skal so gjøgnum brunaráðið hava eftirlit við, at kommunurnar halda sínar skyldur.

Lógaruppskotið er í stórum orðað sum verandi lógin. Broytingarnar snúgva seg um at gera tað heilt greitt:

1. at *býar og bygdaráðini* hava ábyrgdina,
2. at *brunaráðið* hevur eftirlitið, og
3. at *brunaumsjónin* hevur vegleiðing og dagligu umsiting ráðsins vegna.

1. viðgerð 13. apríl. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð framlagt av Poul Michelsen, løgtingsmanni, 17. mars 1988. Við 1. viðgerð 13. apríl varð málið beint í rættarnevndina.

Nevndin heldur uppskotið vera so umfatandi, og skotbráið so stutt nú beint fyri tingslit, at nevndin setir sær ikki fyri at viðgera tað til hítar.

Rættarnevndin setir tí fram soljóðandi:

UPPSKOT

TIL

SAMTYKTAR

Løgtingið áleggur rættarnevnd tingsins at halda fram við arbeiðinum við løgtingsmáli nr. 107/1987 um broyting í løgtingslóg um eldsbruna o.a. sum millumtinganevnd og at leggja fram álit í ólavsøkutingsetuni.

2. viðgerð 5. mai. Uppskot til samtyktar frá rættarnevndini um at nevndin verður gjørd millumtinganevnd hevur máli viðvíkjandi samtykt við 31-0 atkvøðum.

108 Løgtingslóg um eykajáttan til praktiskar fiskiroyndir.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jógvan I. Olsen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um eykajáttan til praktiskar fiskiroyndir.

§ *1.* Í fíggjarárinum 1988 verða úr landskassanum játtaðar 10 mió. kr. til § 16 í løgtingsins fíggjarlóg konto nr. 333074: Praktiskar fiskiroyndir, í grunn.

§ *2.* Upphæddin verður at taka við á eykafíggjarlóg fyri 1988.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ekstrabevilling til praktiske fiskeriforsøg.

§ *1.* I finansåret 1988 bevilges af landskassens midler 10 mio. kr. til § 16 i lagtingsfinansloven, konto nr. 333074: Praktiske fiskeriforøg, i fond.

§ *2.* Beløbet medtages på tillægsbevillingslov for 1988.

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tað er framhaldandi neyðugt hjá okkum at gera fiskiroyndir alla staðir, har mett verður, at møguleikar fíhnast fyri at skapa innløgur til føroyska samfelagið. Á fíggjarlógini í ár eru settar 5 mió. kr. til praktiskar fiskiroyndir, sum fiskirannsóknarstovnan hevur gjørt eina ætlan um, hvussu hesin peningur skal nýtast. Sambandsflokkurin heldur hesa upphædd verða ov lítla, tí er tørvur at gera fleiri royndir, við hava nú eisini fingið nýggj skip at fiska skeljar við at loyvi at royndarfiska í russiskum sjógvi. Flokkurin metir, at peningur eigur at verða játtaður til, at hesi bæði skipini kunnu gera nágreiniligar kanningar í tí russiska sjón-

um, so vit fáa eina ábending um, hvørjir møguleikar kunnu verða har fyri skeljafiskiskapi.

Eisini eiga fleiri royndir at verða gjørdar eftir kongafiski í ti sonevnda Irmingarhavinum, eins og aðrar royndir eftir tilráðing frá fiskirannsóknarstovuni.

1. viðgerð 19. apríl. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 19. apríl 1988 beint í figgjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen og Adolf V. Hansen) tekur ikki undir við málinum og vísir til ta verandi játtan á figgjarløgtingslógini fyri 1988.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Svend Aage Ellefsen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Ivan Johannesen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

2. viðgerð 5. mai. Uppskot Sambandsfloksins fall við 10-0.

109 Broyting í løgtinslóg um barnastyrk

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnastyrk.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 50 frá 5. mai 1987 um barnastyrk, sum broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 17. desember 1987 verður gjørd henda broyting:

Í § 14, 1. punktum, verða orðini: »avlamispensjón, einkjupensjón, fólkapensjón ella« sett inn aftanfyri orðið »fær« og frammanfyri orðið »hjálp«.

§ *2.*

Henda lóg fær gildi frá 1. oktober 1988.

lagtingslov om ændring i lagtinslov om børnetilskud.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 50 fra 5. maj 1987 om børnetilskud, som ændret ved lagtingslov nr. 104 af 17. december 1987 foretages følgende ændring:

I § 14, 1. punktum, indsættes ordene: »invalidepension, enkepension, folkepensin eller« efter ordet »modtager«.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft den 1. oktober 1988.

Viðmerkingar:

Tá lógin um barnastyrk varð gjørd, vórðu í § 14 gjørdar reglur um serligan eykabarnastyrk til teirra, sum fáa hjálp eftir §§ 9 og 13 í forsorgarlógini.

Royndir, ta tíð lógin um barnastyrk hevur verið í gildi, hava sýnt, at tørvurin á eykabarnastyrki er eins stórur hjá teimum, sum fáa almannapensjón, t.e. fólkapensjón ella avlamispensjón ella einkjupensjón.

Landsstýrið skjýtur tí upp, at reglan í § 14 í lógini um barnastyrk verður broytt á tann hátt, at heimildin verður víðkað til eisini at fevna um fólk, ið fáa avlamispensjón, einkjupensjón ella fólkapensjón.

Meiriútreiðslan av uppskotinum kann ikki roknast út heilt neyvt, men verð-

ur hon mett til o.u. 1.9 mió. kr. árliga. Tað er landskassaútreiðsla burturav.

1. viðgerð 21. apríl. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 21. apríl 1988 beint í almanna- og heilsunevndina.

Tá lógaruppskotið um barnastyrk í sini tíð kom sum ein familjuveiting, har øll foreldur við barni/børnum millum 1 og 15 ár skuldi hava almanna veiting, varð borið so í bandi, at eykabarnastyrkur varð veittur veikastu inntøkubólkunum við kr. 750 - fyri ársfjóðingin. Her verður hugsað um fólk, ið fingu hjálp eftir forsorgarlógini, § 9 ella § 13.

Síðan hevur tað víst seg órímiligt, at ikki aðrir bólkar við sosialari pensjón (tað er fólka-, avlamis og einkjupensjónistar) við børnum undir 16 ár skulu hava hesa veiting.

Tí er tað, at landsstýrið kemur við hesum uppskoti, ið verður mett at kosta 1,9 mió. kr. um árið.

Av tí at tað umsitingarliga er av stórum týdningi, at hesin eykabarnastyrkur verður útgoldin hvønn mánað heldur enn hvønn ársfjórðing, hevur almannastovan mælt til slíka broyting.

Tað er tí ein samd almanna- og heilsunevnd, ið tekur undir við uppskoti landsstýrisins viðvíkjandi broyting í hesi lóg og setir harumframt uppskot til broyting í § 14 í somu lóg um barnastyrk:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í løgtingslóg nr. 50 frá 5. mai 1987 um barnastyrk við seinni broytingum verður § 14 broytt soleiðis:

Orðingin: »750 kr. fyri fjórðingsárið. Eykabarnastyrkur verður goldin fyri tað fjórðingsárið« verður strikað og í staðin verður sett: »250 kr. um mánaðin Eykabarnastyrkur verður goldin eina ferð um mánaðin.«

I lagtingslov nr. 50 af 5. maj 1987 om børnetilskud med senere ændringer ændres § 14 således: »Ordene: »750 kr. i kvartalet. Det ekstra børnetilskud udbetales for det kvartal« udgår og i stedet for indsættes: »250 kr. om måneden. Det ekstra børnetilskud udbetales for den måned.«

2. viðgerð 5. mai. Broytingaruppskot frá samdari nevnd samtykt við 24-0. § 1 soleiðis broytt samtykt við 24-0, § 2 við 24-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 26-0.

3. viðgerð 6. mai. Málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 101-31. Lóg nr. 72 frá 9. juni 1988.

110 Stovnsetan av útbúgving av sjúkrahjálparum og pleygarum.

Ár 1988, hóadagin 17. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um útbúgving av sjúkrahjálparum og pleygarum.

§ *1.* Stovnsett verður útbúgving av sjúkrahjálparum og pleygarum.
2. stk. Landsskúlafyrisitingin fyriskipar og hevur ábyrgd av tí í 1. stk. nevndu útbúgving.
3. stk. Føroya læraraskúli hevur ta námsfrøðiligu umsitingina, ið skal vera á sama støði sum líknandi útbúgving í Danmark.

lagtingslov om uddannelse af sygehjælpere og plejere.

§ *1.* Uddannelse af sygehjælpere og plejere etableres.
Stk. 2. Landsskoleadministrationen administrerer og har ansvaret af den i stk. 1 nævnte uddannelse.
Stk. 3. Færøernes Lærerskole har den studiefaglige administration, der skal være på samme niveau som lignende uddannelse i Danmark.

4. stk. Útbúgvingin skal byrja prímo januar 1989.

§ *2.* Landsstýrið setir saman við Landsskúlafyrisitingini eina skjótt arbeiðandi arbeiðsbólk at tillaga útbúgvingina til føroysk viðurskifti.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Stk. 4. Uddannelsen starter primo januar 1989.

§ *2.* Landsstyret nedsætter sammen med landsskoleadministrationen en hurtigt arbejdende arbejdsgruppe til at tilpasse uddannelsen til færøske forhold.

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Føroyska heilsuverkinum hevur leingi trótað útbúnar sjúkrahjálparar og pleygarar. Útbúgvingin er higartil farin fram í Danmark. Umframt sjúkrahúsverkið eru aðrir stovnar, sum hava brúk fyri fólki við hesi útbúgving. Til dømis ellisheim, røktarheim, umlættingarheim og vistarheim. Trotið á útbúnum fólki hevur í longri tíð verið stórur. Hetta er komið fram, hóast cingin verulig kanning er gjørd. So veruliga er trotið væl størri enn mett av fyrstan tíð.

1. viðgerð 21. apríl. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Framsóknarflokkinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 21. apríl 1988 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin er kunnað um, at spurningurin um útbúgving av sjúkrahjálparum og pleygarum er umsitingarliga avgreiddur, og at henda útbúgving byrjar 1. januar 1989.

Nevndin er tí samd um einki uppskot at seta fram.

2. viðgerð 5. mai. Málið afturtikið.

111 Tiltøk innan fiskivinnustrukturin á landi at fáa meira burtur úr teimum nøgdum av fiski, sum eru til taks á heima- og nærleiðunum.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um strukturbroyting innan fiskivinnuna á landi.

Heimildir.

§ *1.* Landsstýrinum og fiskivinnuumsitingini verður heimilað sum eina langtíðarroynd at bjóða trimum virkjum og teim skipum og bátum, sum vanliga landa til hesi virkir, at fara burtur úr núverandi prís- og studningsskipan, og í staðin koma undir tá skipan, sum uppsett er í hesi lóg.

2. stk. Tey í 1. stk. nevndu virki, ið geografiskt skulu liggja í nánd av hvørjum øðrum, t.v.s. á somu oyggj, við sama fjørð ella sund, skulu virka sum 2 vátvirki og 1 turrvirki.

3. stk. Turrvirkinum skal ikki vera loyvt at keypa ella virka feskfisk. Tó skal turrvirkinum verða loyvt at innvoga fisk fyri vátvirkini frá t.d. smábátum.

4. stk. Bátar og skip, sum vanliga hava landað hjá tí virki, snm gjørt verður til turrvirki, skulu landa sín fisk til tey í 2. stk. nevndu vátvirki.

lagtingslov om strukturændring inden fiskerierhvervet på land.

Hjemmel.

§ *1.* Landsstyret og fiskeriadministrationen får hjemmel til som et langtidsforsøg at tilbyde tre fabrikker og de skibe og både, der sædvanligvis leverer fisk til disse fabrikker, at forlade nuværende den pris- og tilskudsordning og i stedet og at indgå i den ordning, der supuleret i denne lov.

Stk. 2. De i stk. 1 nævnte fabrikker, der geografisk skal være placeret i nærheden af hinanden, d.v.s. på samme ø, ved samme fjord eller sund, skal fungere som 2 vådfabrikker og 1 tørfabrik.

Stk. 3. Det er ikke tilladt for tørfabrikken at købe eller bearbejde fersk fisk. Dog har tørfabrikken tilladelse til at indhandle fisk for vådfabrikkerne fra f.eks. småbåde.

Stk. 4. Både og skibe, der fast har indhandlet hos den fabrik, der er ændret til tørfabrik, skal indhandle deres fisk til de i stk. 2 nævnte vådfabrikker.

Vátvirkini.

§ 2. Vátvirkini skulu virka eftir somu reglum sum higartil, tó so at í staðin fyri at avrokna við ráfiskagrunnin, verður fyribils avroknað við fiskivinnuumsitinina. Ráfiskanevndin skal hava umsjón við avrokningum og prísásetingum.

2. stk. Samlaða nettoúrslitið hjá vátvirkinum eftir avrokning skal vera hitt sama sum eftir núgaldandi skipan. Munurin, ið stavar frá, at innvigaðu nøgdirnar eru størri, verður eftir 1. stk. avroknaður til fiskivinnuumsitingina.

3. stk. Vátvirkini hava skyldu til at selja turrvirkinum alla sína framleiðslu fyri ein prís, sum fiskivinnuumsitingin ásetir.

Manningar og før.

§ 3. Fiskivinnuumsitingin ásetir fastar avreiðingarprísir, sum vátvirkini skulu gjalda fiskiskipum og útróðrarbátum.

2. stk. Avreiðingarprísirnir eftir 1. stk. skulu áseta soleiðis, at eir liggja ájavnt galdandi prísum íroknað prísískoytir (studningur).

Turrvirkið.

§ 4. Turrvirkið skal virka og góðska fiskaframleiðsluna til útflutnings.

2. stk. Turrvirkið hevur skyldu at selja sína framleiðslu og framleiðsluna, sum er endaliga góðskað hjá vátvirkinum, fyri hægsta nettoútflutningsprís, áðrenn møguligt bonus.

3. stk. Uttan mun til søluskylduna eftir 2. stk. er loyvt turrvirkinum at gera langtíðarsáttmála í upp til 6 mánaðir. Tílíkir sáttmálar mugu samanlagt

Vådfabrikker.

§ 2. Vådfabrikkerne skal arbejde efter samme regler som tidligere, dog således at i stedet for at afregne med råfiskefonden, afregnes forløbigt med fiskeriadministrationen. Styret for råfiskefonden skal have tilsyn med afregningerne og prisansættelserne.

Stk. 2. Det samlede nettoresultat for vådfabrikken efter afregning skal være det samme som efter gældende ordning. Forskellen, der hidrører fra de indhandlede mængder, er større, afregnes i henhold til stk. 1 til fiskeriadministrationen.

Stk. 3. Vådfabrikkerne har til at sælge tørfabrikken hele deres produktion til en pris, som fiskeriadministrationen fastsætter.

Mandskaber og skibe.

§ 3. Fiskeriadministrationen fastsætter indhandlingspriser, som vådfabrikkerne skal betale fiskeskibene og hjemmefiskebådene.

Stk. 2. Indhandlingspriserne efter stk. 1 skal fastsættes således, at de er på højde med de gældende priser incl. pristilskud (støtte).

Tørfabrikken.

§ 4. Tørfabrikken skal bearbejde og forædle fiskeproduktionen til export.

Stk. 2. Tørfabrikken har pligt til at sælge sin produktion og den produktion, der er endelig forædlet hos vådfabrikken, for højeste nettoeksportpris, før eventuelt bonus.

Stk. 3. Uden hensyn til salgspligten i henhold til stk. 2 er det tilladt tørfabrikken at indgå langtidskontrakter på op til 6 måneder. Sådanne kontrakter

umfata meiri enn 50% av samlaðu framleiðsuni og samlaðu søluni hjá turrvirkinum.

4. stk. Fiskivinnuumsitingin er heimilað at tryggja turrvirkinum ein ríniligan søluprís fyri nýggjar framleiðslur, sum kunnu metast við tíðini at fara at geva eitt hægri útflutnignsvirði.

5. stk. Landsstýrið útvegar turrvirkinum neyðugan kapital til umbygging til góðskingarvirki og til raksturin.

må ikke sammenlagt overstige 50% af den samlede produktion og det samlede salg hos tørfabrikken.

Stk. 4. Fiskeriadministrationen har hjemmel til at sikre tørfabrikken en rimelig salgspris for nye produkter, der kan skønnes til med tiden at give en højere eksportværdi.

Stk. 5. Landsstyret tilvejebringer tørfabrikken nødvendig kapital til ombygning til forædlingsvirksomhed og driften.

Umsiting v.m.

§ *5.* Fiskivinnuumsitingin hevur skyldu at hava besa roynd koyrandi uttan steðg í minsta lagi 10 ár og at gera eina árliga samanbering við raksturin á hinum virkjunum.

2. stk. Tá royndin hvílir í sær sjálvari uttan stuðul frá tí almenna, er fiskivinnuumsitingini loyvt at bjóða fleiri virkjum og førum inn í skipanina.

3. stk. Fiskivinnuumsitingini er loyvt at gera nærri reglur fyri royndini; tó skulu hesar reglur góðkennast av landsstýrinum saman við fíggjarnevndini/fiskivinnunevndini.

Administration m.v.

§ *5.* Fiskeriadministrationen har pligt til at holde dette forsøg i gang uden ophold i mindst 10 år og at foretage en årlig sammenligning med driften med de andre fabrikker.

Stk. 2. Når forsøget hviler i sig selv uden tilskud fra det offentlige, er fiskeriadministrationen bemyndiget til at opfordre flere fabrikker og skibe indgå i ordningen.

Stk. 3. Fiskeriadministrationen får bemyndigelse til at udfærdige nærmere regler for forsøget. Disse regler skal dog godkendes af landsstyret sammen med finansudvalget/fiskeriudvalget.

§ *6.* Henda lóg kemur í gildi 1. juni 1988.

§ *6.* Denne lov træder i kraft 1. juni 1988.

Viðmerkingar:

Royndirnar seinastu árini sýna heilt klárt, at náttúrliga ríkidømi føroyinga er minni enn upprunaliga mett, ella er tað eisini so illa røkt, at nú byrjar at sansa at.

Vit eiga at bera so í bandi, at møguligt er hjá okkum føroyingum at liva av tí fiski, sum kann veiðast á okkara grunnum, eisini tey vánaligu árini.

Vit føroyingar hava havt og hava framvegis siðvenju at veiða stórar nøgdir. Alt

gott um tað, men umstøðurnar eru vorðnar tær, at vit verða noydd at fara at hugsa í øðrum minni vanubundnum rásum.

Higartil hava vit kunnað sagt, at bara vit fáa tonsini, so gongur tað heila. Men í dag mugu vit broyta hetta til, at vit siga: Vit mugu hava sum mest fyri hvørt tonsið, skulu vit hugsa um at yvirliva sum heimastýrandi tjóð.

Tað, sum tikið verður úr sjónum, má minkast í stórum, skulu ikki fiskastovnarnir verða oyðilagdir. Er politiskur vilji til tess, so er helst nakað, ið gerast kann.

Long er tann tíðin, stór er tann orka og enn størri tað hugflog, sum flokkarnir brúka í orð og talu at hevja seg sjálvar upp um hvønn annan. Um nú øll tann tíðin, tann orkan og tað hugflog, sum soleiðis verður brúkt, í staðin varð brúkt til at finna loysnir at fáa okkara vinnulív aftur á føtur, so skuldi nokk spurst okkurt gott burturúr. Tað er júst tað, vit eru vald á ting til, hetta at fáa nakað gott burturúr fyri land og fólk.

Tað er júst tað, ið ætlanin er við hesum uppskot, og tað er vón og ynski floksins, at allir flokkar á tingi vilja vera við til at finna fiskivinnuni ein veg burtur úr teirri fíggjarligu naggatódn, vinnan hevur verið í nú í fleiri ár.

Uppskotið er kanska ikki fullfíggjað, men tað skuldi tó givið eina ábending um eina gongda leið. Tá einki annað uppskot um strukturbroyting innan fiskivinnuna á landi nakrantíð er lagt fyri tingið, er hugskotið eina roynd vert, tí tað kemur helst ikki at kosta tí almenna eitt oyra, men hinvegin inniber tað ein møguleika fyri heilt at sleppa burtur úr núverandi afturbering (studningsskipanini).

Um uppskotið kann stutt sigast:

1) Vátvirkini fáa eina størri fiskanøgd og koma harvið at kunna gjalda ein hægri avrokningarpris.
2) Turrvirkið fær eitt meira støðugt arbeiði. Arbeiðsfólkið eitt nosligari og javnari arbeiði.
3) Útflutningsvirðið veksur.
4) Tørvurin á landaðum tonsum fer at minka og harvið eisini tørvurin av fiskiskipum til landleiðina.
5) Vit fáa eina nátúrliga verju av fiskastovnunum.
6) Vit fara aftur at fáa størri fisk og harvið eitt hægri avreiðingar- og útflutningsvirði og minkandi framleiðslukostnað.
7) Tørvurin á studningi minkar.
8) Meira av okkara vinnandi fólki kemur at hava sílt virki á landi.
9) Vit fáa annan fylgiídnað, so sum emballaguvirki v.m.
10) Vit gerast minni bundin (afhængig) av fiskivinnuavtalum.

1. viðgerð 19. apríl. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Framsóknarflokkinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 19. apríl 1988 beint í ídnaðarnevndina.

Ídnaðarnevndin hevur viðgjørt lógaruppskotið. Nevndin er samd um, at lógin ikki kann samtykkjast í núverandi líki.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Poul Jacob Olsen, Sverre Midjord), er av teirri áskoðan, at viðmerkingarnar til lógaruppskotið er væl orðaðar, og kann nevndi meiriluti taka undir við viðmerkingunum, og setir tí fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum — fiskivinnuumsitingini í Tinganesi — at arbeiða víðari við hesum máli og tilevna eitt lógaruppskot, sum tekur støði í teimum ajónarmiðum, sum eru førd fram í viðmerkingunum.

Minnilutin (Olaf Olsen, Eilif Samelsen) tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

2. viðgerð 5. mai. Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í ídnaðarnevndini samtykt við 19-0 atkvøðum.

112 Samráðingar við Tórshavnar býráð um ogn Løgtingsins — Løgtingsskrivstovan.

Árið 1988, hósdagin 17. mars legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, vegna fleiri tinglimir í Suðurstreymoy fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at taka upp samráðingar við Tórshavnar Kommunu, um møguliga betri framtíðarloysn av hølisviðurskiftunum hjá løgtingsskrivstovuni.

Gomlu apotekshølini, ið løgtingið eigur í løtuni, og sum ætlanin er at nýta sum partur av hølum hjá løgtingsskrivstovuni, verða at nýta sum apoteksútsøla í miðbýnum.

Viðmerkingar:

Síðan 1983 hevur verið roynt at fáa løgtingið at lata gomlu apotekshølini varðveita. Heldur enn at nýta hølini til almenna skrivstovu, eigur at verða skipað so fyri, at hesi aftur kunnu nýtast til apoteksútsølu.

Í samráð við starvsfólk á Tjaldurs Apoteki siga hesi, at við nøkrum broytingum høvdu hølini verið væl nýtilig.

Ein tílík útsøla í miðbýnum, hevði hjálpt munandi um stóra avgreiðslutrýstið á Tjaldurs Apoteki. Somuleiðis kundi tænastustøðið í Havn hækkað munandi.

At hetta uppskot soleiðis verður lagt fram, skyldast sum nevnt, at slík loysn hevði tænt nógvum endamálum.

Síðan málið er komið alment fram, hevur almenningurin havt høvi til at gera vart við seg, og higartil hava fýra túsund borgarir sagt sína áskoðan, ið greitt talar fyri, at málið um apotekshølið á Vaglinum, eigur at koma til viðgerðar í tinginum.

1. viðgerð 14. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Poul Michelsen, Paula Ellefsen, Eilif Samuelsen, Jógvan Sundstein, Hilmar Kass og Jákup Lindenskov 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 14. apríl 1988 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

2. viðgerð 3. mai. Uppskotið til samtyktar, fyrri partur fall við 7-0 og seinni partur við 8-0. Málið sostatt avgreitt.

113 Lóg um ferðaavgjald.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um ferðagjald.

§ *1.* Fyri hvørt ferðafólk, sum verður flutt úr Føroyum, skal gjaldast 200 kr. til landskassan.

2. stk. Hvør einstøk flutningsfyritøka og umboðsfólk hennara í Føroyum, standur til svars fyri, at avgjaldið verður goldið landskassanum fyri tey ferðafólk, sum fyritøkan flytur úr Føroyum.

§ *2.* Avsláttur í ferðaavgjaldinum kann veitast lutfalsliga í samsvar við vanliga galdandi avsláttarskipanir hjá flutningsfeløgunum.

lagtingslov om rejseafgift.

§ *1.* For hver rejsende, som bliver transporteret fra Færøerne, skal der betales 200 kr. til landskassen.

Stk. 2. Hvert enkelt transportfirma og dets repræsentant på Færøerne, hæfter for, at afgiften bliver betalt til landskassen for de rejsende, som firmaet transporterer fra Færøerne.

§ *2.* Nedsættelse af afgiften kan bevilges forholdsmæssigt i overensstemmelse med transportfirmaernes sædvanligt gældende rabatordninger.

2. stk. Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri hvørjar avsláttarskipanir geva rætt til avsláttur í ferðaavgjaldinum.
3. stk. Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri inngjalding av avgjaldinum.

§ *3.* Undantikin frá gjaldinum eru:
1. børn undir 15 ár,
2. ferðafólk, ið eru í Føroyum, í transitt og
3. ferðafólk, ið ferðast við fari, sum ikki vanliga verður nýtt til ferðafólkaflutning, smb. § 1, stk. 2.

Brot á § 1, stk. 2, í lógini verður revsað við sekt. Í fyriskriftum, ið verða ásettar sambært § 2, kann verða ásett, at brot á fyriskriftirnar verður revsað við sekt.

§ *5.* Lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fellur burtur løgtingslóg nr. 23 frá 27. apríl 1987 um gjald fyri ferðing úr Føroyum.

2. stk. Landsstyret fastsætter nærmere regler for hvilke rabatordninger giver ret til nedsættelse af afgiften.
3. stk. Landsstyret fastsætter nærmere regler om indbetaling af afgiften.

§ *3.* Fritaget for afgiften er:
1. børn under 15 år
2. rejsende, som er på Færøerne, i transit og
3. rejsende med et fartøj, som ikke sædvanligvis benyttes til passagertransport, jfr. § 1, stk. 2.

§ *4.* Overtrædelse af § 1, stk. 2 i loven straffes med bøde. I forskrifter, der fastsættes i medfør af § 2, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelser af bestemmelser i forskrifterne.

§ *5.* Loven træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort. Samtidig træder lagtingsklov nr. 23. fra 27. april 1987 om afgift på rejser fra Færøerne ud af kraft.

Viðmerkingar:

27. apríl 1987 samtykti løgtingið løgtingslóg nr. 23 um gjald fyri ferðing úr Føroyum.

Lógin heimilar, at avtalur verða gjørdar við flutningsfeløgini um innkrevjing av avgjaldinum. Av tí at so langt var útliðið á várið, tá lógin kom í gildi, var tað bert eitt av skipafeløgunum, ið avtala varð gjørd við. Í tí førinum var avgjaldið goldið av ferðafólkinum upp í ferðaseðlaprísinum, og virkaði hetta sera væl.

Hóast feløgini hava havt stundir til at fingið eina skipan í lag fyri 1988, er tó enn okkurt felag, ið ikki vil samstarva. Hetta er ein ampi bæði fyri flutningsfelagið sjálvt, ferðafólkið og tollvaldið, ið skal fyrisita innkrevjingina.

Hjálagda uppskot miðar ímóti at bøta um hesi viðurskifti. Uppskotið samsvarar annars við lógina frá 1987.

Í uppskotinum verður álagt flutningsfeløgunum at gjalda landskassanum 200 kr. fyri hvørt ferðafólkið, sum tey flyta úr Føroyum. Hetta merkir, at tá ferða-

fólkið hevur goldið ferðaseðilin, so skal tað ikki eins og nú til at hugsa um ferðaavgjaldið. Heldur ikki skal tollvaldið halda skil á, um fólk hava goldið avgjaldið. Fyrimunirnir eru sostatt nógvir.

Ein onnur broyting í uppskotinum í mun til lóg nr. 23 frá 27. apríl 1987 er, at uppskotið eisini fevnir um skip og flogfør, ið ikki eru í fastari farleið, t.d. charterflogfør. Orsøkin, til at hesi før vóru undantikin í lógini frá 1987 var fyrisitingarlig. Við tí nýggju lógini fellur fyrisitingarliga fyrivarnið burtur. At taka tílík før við í lógina er eisini í samsvar við nýtslunavmarkandi endamálinum við avgjaldinum.

Ein triðja broyting er, at uppskotið heimilar at minka um ferðaavgjaldið fyri ferðandi, ið hava fingið avsláttur á ferðaseðilin úr Føroyum. Talan er um vanliga gjaldandi avskáttarskipanir, t.d. familjuavsláttur, grønur ferðaseðlar, ungdómsavsláttur. Er avslátturin fyri ferðaseðilin t.d. 33%, verður ferðagjaldið sett niður við 33%.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 beint í skattanevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirilutа og tvein minnilutar.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hilmar Kass og Heini O. Heinesen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) vísir í fyrsta lagi til støðu Fólkaflokksins í tingmáli nr. 10/1987, har flokkurin tekur undir við avtøku av ferðaseðlagjaldinum, í øðrum lagi verður tikið undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Agnar Nielsen) førir fram:

Tá hetta landsstýrið álegði eitt eykagjald uppá kr. 200 uppá hvønn ferðaseðil úr Føroyum, so var hetta ikki minni enn ein skomm fyri Føroyar, sum einasta land í Norðanlondum, har innkravt verður frá myndugleikunum ein eykaferðaseðil uppá kr. 200 fyri at sleppa av aftur landinum.

Eisini er eitt stórt tal av okkara ungdómi, sum má av landinum til víðari útbúgving. Ferðing millum Føroyar og útlandið er í dag sera dýr í mun til aðra staðir í heiminum. Tað er tí ikki rætt, at landsins myndugleikar tyngja hesa byrðu fyri okkara lesandi ungu, hvørja ferð tey koma at vitja heim, vinir og okkara vøkru oyggjar. Nevndi minniluti kann tí ikki taka undir við uppskotinum. Vist verður til uppskot Sambandsfloksins í tingmáli nr. 10/1987, sum inniber avtøku av kr. 200 eykagjaldinum.

2. viðgerð 5. mai. § 1 samtykt við 17-0, §§ 2-5 samtyktar við 17-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð 6. mai. Málið endaliga samtykt við 17 0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 440-1. Lóg nr. 37 frá 26. mai 1988.

114 Lán til tunnil um Vestmannasund.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Lasse Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um lán til tunnil um Vestmannasund.

lagtingslov om lån til tunnel over Vestmannsund.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán til gerð av undirsjóartunnli um Vestmannasund við hartil hoyrandi vegagerð við upp til 200 mió. kr.
Stk. 2. Landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur um gjøld fyri nýtslu av tunnlinum.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån i forbindelse med anlæg af undersøisk tunnel under Vestmannasund med tilhørende vejanlæg indtil 200 mió. kr.
Stk. 2. Landsstyret fastsætter i kundgørelserne bestemmelser om afgift for benyttelse af tunellen.

§ *2.*Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ *2.* Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Ynski um fast samband um Vestmannasund hevur verið frammi av og á tey seinastu 10-15 árini. Landsverkfrøðingurin gjørdi ávísar kanningar fyri nøkrum árum síðani, og í 1986 varð farið undir royndarboringar í havbotninum og uppi á landi báðumeðin sundið.

Eisini Felagskommunan í Vágum hevur saman við ráðgevarum sínum gjørt eitt stórt og dygdargott arbeiði fyri at lýsa ymiskar møguleikar um fast samband um sundið.

Havandi í huga, at hetta samband við so stórari íløgu neyvan verður loyst tey komandi 10 árini á sama hátt sum onnur samferðslumál í Føroyum, har íløgur verða goldnar um fíggjarlógina, hevur landsstýrið samtykt, at partar av fíggingini ella øll fígginginn skal grundast á nýtslugjald (bummpengar), at gerð av undirsjóartunli verður sett í verk í ár, og at farið verður undir víðari projekter-

ing beinanvegin, og at projekteringsábyrgdin og projekteringsleiðslan í hesum sambandi, skal liggja hjá landsverkfrøðingsstovnunum.

Landsstýrið heldur tað verða rímiligt, nú kommunurnar hava skipað felagsskap í hesum sambandi, at hesin felagsskapur fær høvi til at fylgja væl við hesum arbeiði í øllum liðum, og hevur tí sett ein samskipanarbólk, ið kann tæna sum samanbindingarlið millum lokalar myndugleikar og landsmyndugleikarnar.

Í hesum bólki sita umboð fyri landsstýri, landsverkfrøðingsstovnin og Í/F Vágatunnilin.

Samskipanarbólkurin skal kunna útvega sær fult innlit í alt tilfar, sum kemur at liggja til grund fyri valið av linjuføring, projektering, val av arbeiðshátti, møguligt útboðstilfar viðvíkjandi projektspørtum, setan av arbeiðsfólki (útlendsk/føroysk).

Samskipanarbólkurin skal hava møguleika fyri at tryggja sær, at øll tilboð um gerð av projektpørtum verða gjølla kannað og viðgjørd.

Samskipanarbólkurin skal viðgera uppskot um lántøku, fígging og fíggingarmynstur, herundir gera tilmæli um hvussu stórur partur av byggingini skal fíggjast við nýtslugjaldi.

Bólkurin skal eisini meta tær tíðarætlanir, sum nú fyriliggja, og kunnast um møguligar broytingar undir arbeiðinum og geva landsstýrinum frágreiðing um hetta.

Í sambandi við nýtslugjaldið er at siga, at tey fólk og teir bilar, sum skulu um Vestmannasund, sum er skulu gjalda fyri hetta, og landsstýrið metir, at ikki er órímuligt, um hesi í eina tíð gjalda tað sama fyri at nýta eitt fast samband. Tað at flogvøllurin liggur í Vágum, leggur stórt trýst á ferðsluna um Vestmannasund, og landsstýrið metir, at henda ætlan, samstundis sum hon lættir um ferðsluna til og frá flogvøllinum, fer at vísa, um hetta er ein brúklig loysn av stórum samferðsluíløgum av slíkum slag.

Kostnaðurin fyri gerð av føstum sambandi um Vestmannasund er grundaður á forhondsmetingar og tilboð fyri gerð av tunnli og veðagerð og tí, ið hartil hoyrir, mettur til 200 mió. krónur.

Viðmerkjast skal, at Felagskommunan í Vágum áður hevur fingið tilsøgn um neyðuga lánsfígging uttanlands.

Útreiðslur til viðlíkahald av sjálvum tunnlinum og teknisku installtiónum líkasum útreiðslur til el-nýtslu er ætlanin, at landskassin ber eftir somu reglum sum fyri landsvegakervið annars. Rakstur in av bunn-støð, innkrevjing av

bummpeningi, lønir til starvsfólk o.t., kemur samskipanarbólkurin við tilmæli um til landsstýrið. Roknað verður við, at eini fimm fólk fara at starvast á bummstøðini.

Afturrindan av íløgunum er grundað á, at bummpeningur verður tikin fyri nýtslu. Grundarlagið fyri afturrindan av íløgunum er verandi ferjutakstir + 5% vøkstur um árið. Í útrokningunum er eisini roknað við eini skipan fyri avsláttur fyri tey, ið nýta tunnilin meira enn 150 ferðir um árið.

Við hesi skipan er roknað við at kunna rinda lánini aftur innan 15 ár.

Búskapardeild landsstýrisins hevur gjørt eina kanning av málinum, og er høvuðsniðurstøðan hendan:

»1. Sæð yvir eitt 20-áraskeið er eitt tunnilssamband bíligari fyri samfelagið enn núverandi ferjusamband.

2. Um so er, at flogvøllurin eisinifranyvir fer at liggja á Vágoynni, má tó roknast við, at *annaðhvørt* verður ferðasambandið útbygt *ella* verður gjørt fast samband um Vestmannasund.

Í mun til eitt útbygt ferjusamband er eitt tunnilssamband munandi bíligari fyri samfelagið.

Við teimum ásettu kostnaðunum, so loysir tað seg tískil samfelagsbúskaparliga sæð, at gera tunnil um Vestmannasund. Fortreytin fyri hesi niðurstøðu er, at tunnilsarbeiðið ikki forðar fyri, at annað samfelagsbúskaparligt lønandi virksemi í landinum verður framt. Í tann mun, hetta hendir, má niðurstøðan broytast.«

Mett verður, at eitt tílíkt fast samband um Vestmannasund økir munandi um møguleikarnir hjá kommununum í Vágum og kommununum á vestursíðuni av Streymoynni og Kollafirði at samstarva um felags áhugamál eftir sama mynstri sum kommunurnar í Vágum frammanundan hava samstarvað. Serliga kunnu nevnast hesi mál:

skúlamál
havnamál
ítróttur
læknasamstarv,
ymsar sosialar og
almennar tænastur.

Hesi mál hava verið frammi á fundum millum felagskommununa í Vágum og kommunurnar á Streymoynni. Kommunurnar í hesum økjum hava eitt

íbúgvaratal uppá slakar 6.000 íbúgvar.

Landsstýrið leggur við hesum fram uppskot um lógarheimild til borgan fyri láni til gerð av undirsjóartunnli um Vestmannasund.

1. viðgerð 8. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Alit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 8. apríl 1988 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, tó at fíggjarnevndin er av teirri áskoðan, at tann í lógaruppskotinum § 1, 2. stk. ásetta regla skal orðast soleiðis, at ásetingin av nærri reglum um gjøld verður gjørd av landsstýrinum saman við fíggjarnevndinin og setir sostatt fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1. 2. stk. verður orðað soleiðis:	*§ 1, 2. stk.* formuleres således:
»Landsstýrið saman við fíggjarnevndini ásetir í kunngerð nærri reglur um gjøld fyri nýtslu av tunnlinum.»	»Landsstyret sammen med finansudvalget fastsætter i kundgørelse nærmere bestemmelser om afgift for benyttelse af tunellen.»

Við hesi broyting mælir nevndin tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 5. mai. Broytingaruppskot frá samdari nevnd § 1 samtykt við 31-0. Uppskot landsstýrisins soleiðis broytt samtykt § 1 við 31-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 31-0 atkvøðum.

3. viðgerð 5. mai. Lógin endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L. 1800. Lóg nr. 63 frá 9. juni 1988

115 Lóg um haruveiðu

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um haruveiðu.

§ *1.* Loyvt er at skjóta haru í tíðini 2. november til 31. desember, báðar dagar viðroknaðar.
Stk. 2. Innanfyri tilskilað umráði (oyggj ella part av henni) kann haran friðast eftir avgerð landsstýrisins fyri eitt ella tvey ár í senn eftir umsókn frá søknarstýri og eftir at øll søknarstýri í oynni hava givið ummæli í málinum.
Stk. 3. Landsstýrið letur tær eftir hesi grein fyrisettu friðingarreglur kunngera í tí blaði, sum løggilt er til almennar kunngerðir í Føroyum.

lagtingslov om harejagt.

§ *1.* Det skal være tilladt at skyde hare i tiden 2. november til 31. december begge dage medregnet.
Stk. 2. Indenfor et bestemt begrænset område (en ø eller en del af en ø) kan haren helt fredes efter landsstyrets bestemmelse for et eller to år ad gangen efter andragende fra et kommunalforstanderskab, og efter at der er indhentet erklæring om sagen fra samtlige kommunalforstanderskaber på vedkommende ø.
Stk. 3. Landsstyret foranstalter de i denne paragraf fastsatte fredningsbestemmelser kundgjort i det til offentlige bekendtgørelser på Færøerne autoriserende blad.

§ *2.* Viðvíkjandi veiðurættindum gelda reglurnar í 2. kapitli í fuglaveiðulógini.
Stk. 2. Haruveiðan má bert fara fram gerandisdagar og loyvt er bert at nýta høglbyrsu við hægst 2 skotum.

§ 2. Vedrørende jagtrettigheder gælder bestemmelserne i kapitel 2 i loven om fuglefangst.
Stk 2. Harejagt er alene tilladt på hverdage og tilladt er kun at benytte haglgevær med højst 2 skud.

§ *3.* Brot á § 1, stk. 1 og § 2 í hesi lóg ella tær fyriskipanir, sum verða givnar sambært lógini, verða revsað við sekt.

§ *3.* Overtrædelse af § 1, stk. 1 og § 2 i denne lov eller de i medfør af loven udstedte forskrifter, straffes med bøde.

§ 4. Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ *4.* Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 62/1987: Løgtingslóg um fuglaveiðu, er sett fram uppskot um nýggja fuglaveiðulóg og samstundis verður skotið upp at avtaka fuglaveiðulógina frá 1954 við seinni broytingum.

Núgaldandi fuglaveiðulóg inniheldur eisini reglurnar um haruveiðu, meðan uppskotið til nýggja fuglaveiðulóg ikki fevnir um hesa veiðu.

Sostatt verður sett fram uppskot um eina sjálvstøðuga lóg um haruveiðu og svarar hon til reglurnar um haruveiðu í galdandi lóg.

1. viðgerð 20. apríl. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 20. apríl 1988 beint í umhvørvisnevndina.

Málið er ein fylgja av uppskotinum um nýggja fuglaveiðulóg, og mælir nevndin tí til, at tað verður viðgjørt saman við uppskotinum um nýggja fuglaveiðulóg í millumtinganevndini í samband við tingmál nr. 62/1987.

Nevndin mælir tí til fylgjandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at umhvørvisnevndin sum millumtinganevnd arbeiðir víðari við tingmáli nr. 115/1987: Lóg um haruveiðu og leggur fram álit í málinum á Ólavsøku.

2. viðgerð 4. mai. Uppskotið til samtyktar frá umhvørvisnevndini samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 610-9-2.

116 Nýggj Príslóg.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um príseftirlit.

§ *1.* Lógin hevur til endamáls at forða fyri órímiligum prísi og vinningi, rongum vøruupplýsingum, órímiligum handilstreytum og kappingaravmarkandi tiltøkum, ið kunnu vera brúkarum ella vinnurøkjandi at bága.
Stk. 2. Lógin fevnir, har ikki serlig undantøk verða gjørd, um allan handil við vørum og alla tænastu fyri gjald, lønir undantiknar.

§ *2.* Ikki er loyvt at taka órímiligan prís og vinning ella hava órímiligar handils- og kappingartreytir og kappingaravmarkan, sum kunnu vera brúkarum, vinnurøkjandi ella almennum samfelagsáhugamálum at bága.
Stk. 2. Avtalur, samtykir og reglur, sum kunnu hava órímiligan prís ella vinning við sær, eru ikki loyvdar.
Stk. 3. Prísráðið skal fáa fráboðan um avtalur og samtyktir, sum hava ella kunnu hava týðandi árin á prís,- framleiðslu-, handils- ella flutningsviðurskifti í landinum øllum ella á avmarkaðum marknaðarøkjum.
Stk. 4. Prísráðið kann fyri ávís vøru-, tænastu- og flutningsveitingarøki ella fyri einstøk virki fyriseta, at prísráðið fær fráboðan um prísbroytingar.

lagtingslov om priskontrol.

§ *1.* Lovens formål er at forhindre urimelige priser og avancer, forkerte vareoplysninger, urimelige forretningsvilkår samt konkurrencebegrænsede tiltag, der har skadelige virkninger for forbrugere eller de erhvervsdrivende.
Stk. 2. Loven omfatter, hvor ikke særlige undtagelser er gjort, al handel med varer og alle tjenesteydelser mod betaling med undtagelse af lønninger.

§ *2.* Urimelige priser og avancer samt urimelige omsætnings og konkurrenceforhold samt konkurrencebegrænsninger, der har skadelige virkninger for forbrugere, erhvervsdrivende eller er til skade for almene samfundsinteresser er forbudt.
Stk. 2. Aftaler, vedtagelser og bestemmelser, som kan medføre urimelige priser og avancer er forbudt.
Stk. 3. Aftaler og vedtagelser, som udøver eller vil kunne udøve en væsentlig indflydelse på pris-, produktions-, omsætnings-, eller transportforhold i hele landet eller indenfor lokale markedsområder, skal anmeldes til prisrådet.
Stk. 4. Prisrådet kan for bestemte vare-, tjeneste- og transportydelsesområder eller for enkelte virksomheder foreskrive, at prisændringer skal indberettes til prisrådet.

Stk. 5. Ídnaðar-, handverks- og handilsvirki, sum fyri vørur, seldar her á landi áseta ella ráða til prís ella vinning fyri sølu í eftirfylgjandi søluliði, skulu boða prísráðnum frá, eisini um broytingar.

Stk. 6. Tær fráboðanir, ið fyriskipaðar eru í stk. 3, 4 og 5, skulu vera givnar innan 8 dagar eftir, at avvarðandi avtala ella samtykt er gjørd.

Stk. 5. Virksomheder indenfor industri, håndværk og handel, som for salg af varer her i landet fastsætter eller tilkendegiver priser eller avancer for salg i efterfølgende omsætningsled, skal anmelde disse og ændringer heri til prisrådet.

Stk. 6. De i stk. 3, 4 og 5 foreskrevne anmeldelser skal ske inden 8 dage efter, at den pågældende aftale eller vedtagelse er truffet.

§ *3.* At hava eftirlit við prísum og vinningum og øðrum viðurskiftum, sum eru nevnd í hesi lóg, verður sett eitt prísráð við 3 limum. Landsstýrið velur prísráðið fyri 4 ár. Ein av limunum skal umboða áhugamál brúkaranna, ein áhugamál seljaranna, og triðji limurin, sum ikki má vera beinleiðis heftur av frammanfyri nevndu áhugamálum, skal vera formaður. Fyri hvønn av limunum verður valdur varalimur.

Stk. 2. Prísráðið hevur príseftirlitið at taka sær av dagliga virksemini ráðsins.

Stk. 3. Prísráðið hevur ikki eftirlit við viðurskiftum, sum eru undir øðrum almennum eftirliti hjá landinum ella einari kommunu.

§ *3.* Til at føre kontrol med priser og avancer og andre forhold, som er nævnt i denne lov, nedsættes et prisråd med 3 medlemmer. Prisrådet vælges af landsstyret for 4 år. En af medlemmerne skal repræsentere forbrugerens interesser, en sælgernes interesser, medens det tredie medlem, som ikke må være direkte tilknyttet foranstående interesser, skal være formand. For hvert medlem vælges en suppleant.

Stk. 2. Priskontrollen udfører prisrådets daglige arbejde.

Stk. 3. Prisrådet fører ikke kontrol med forhold, der er underlagt anden offentlig kontrol under landet eller en kommune.

§ *4.* Ráðið skal av sínum eintingum hava eyga við príslagnum og kann kunngera almenninginum prís og prismun á týðandi vørubólkum, tó uttan at nevna navn virkisins.

Stk. 2. Prísráðið kann kanna prís og vinning hjá teimum einstøku virkjunum.

§ *4.* Rådet skal på eget initiativ følge med prisudviklingen og kan offentliggøre priser og prisforskelle på vigtige varegrupper, dog uden at nævne virksomhedens navn.

Stk. 2. Prisrådet kan undersøge priser og avancer hos de enkelte virksomheder.

Stk. 3. Áðrenn tílík kaning, sum nevnd er í stk. 2, verður sett í verk, skal prísráðið samráðast við virkið um grundarlagið undir kanningini. Áðrenn úrslitið eftir stk. 1 verður kunngjørt, skal prísráðið geva virkjum ella felagsskapum, ið hava tilknýti til kanningina, høvi at gera viðmerkingar til úrslitið.

Stk. 4. Prísráðið kann frá øllum virkjum og stovnum, almennum sum privatum, krevja allar upplýsingar, sum hava týdning fyri virki ráðsins.

§ 5. Prísráðið skal viðgera kærur um prís, vinning, samsýningar og gjøld viðvíkjandi vøru ella veitingum, ið kærarin heldur vera órímiligan.

Stk. 2. Kemur prísráðið til tað úrslit, at prísur, vinningur, samsýning ella gjald eru órímilig, skal ráðið eftir samráðingar við avvarðandi virki royna at fáa viðurskiftini í rættlag. Gevur hetta ikki nóg gott úrslit, skal ráðið taka til áseðingarnar í § 8. Prísráðið skal gera tann, ið kært hevur, kendan við úrslitið av kanningini.

Stk. 3. Áseðingarnar í stk. 2 koma eisini til nýtslu, um prísráðið í vanliga eftirlitsarbeiði sínum kemur fram á prís, vinning, samsýning, gjald ella handilstreyt, ið eru órímilig.

§ 6. Í metanini av, um ein prísur ella vinningur er rímiligur, skal prísráðið leggja til grund tær útreiðslur, sum seljarin hevur havt av vøruni, áðrenn hon er komin á goymslu, serliga innkeypspris, almenn gjøld, farmagjald, tryggingar o.t. Herumframt skal ráðið hava í huga møguleikan fyri spilli, goymslutíð og annars øll viðurskifti, sum hava týdning fyri prísásetan.

Stk. 3. Før en undersøgelse i henhold til stk. 2 iværksættes, skal prisrådet forhandle med virksomheden om grundlaget for undersøgelsen. Før resultater efter stk. 1 offentliggøres, skal prisrådet give virksomheder eller foreninger, der har tilknytning til undersøgelsen, lejlighed til at udtale sig.

Stk. 4. Prisrådet kan af alle virksomheder og institutioner, offentlige som private, kræve alle oplysninger, som er af betydning for rådets virksomhed.

§ 5. Prisrådet skal behandle klager over priser, avancer, honorarer og takster inden for vare eller ydelsesområde som af klageren anses for at være urimelige.

Stk. 2. Kommer prisrådet til det resultat, at en pris, avance, honorar eller takst er urimelig, skal rådet efter forhandling med den pågældende virksomhed forsøge at få forholdene i orden. Giver dette ikke et tilstrækkeligt resultat, skal rådet gå frem efter bestemmelserne i § 8. Prisrådet skal underrette klageren om resultatet af undersøgelsen.

Stk. 3. Bestemmelserne i stk. 2 finder også anvendelse, såfremt prisrådet som led i sit almindelige kontrolarbejde finder frem til, at priser, avancer, honorarer, takster eller forretningsbetingelser er urimelige.

§ 6. For vurderingen af, om en pris eller avance er rimelig, skal lægges til grund de udgifter, som sælgeren har haft af varen, før den er kommet på lager, specielt indkøbspris, offentlige afgifter, fragt, forsikringer o.l. Herudover skal rådet tage hensyn til mulighederne for spild, opbevaringstid og ellers alle forhold af betydning for prisafsættelse.

§ 7. Tað er ikki loyvt at handla ímillum handlandi í sama søluliði uttan so, at tílíkur handil ikki hevur dýrkan við sær.

Stk. 2. Tá vørur verða fluttar inn úr útlondunum, skal verða roynt at sleppa undan óneyðugum dýrkandi millumliðum, og skulu tílíkar vørur, har tað er gjørligt, verða innfluttar beinleiðis frá framleiðslulandinum. Prísráðið kann nokta at góðkenna óneyðugar millumhandlaraútreiðslur.

Stk. 3. Prísráðið kann seta bann ímóti innflutningi av vørum, sum føroyskur keypari ikki fær loyvi at innflyta beinleiðis úr framleiðslulandinum.

§ 8. Fyri vinnuliga sølu av vøru her á landi og fyri vinnuliga veiting av tænastu og flutningi her á landi kann prísráðið fyri upp í 6 mánaðir fyri ávísar vøru- og veitingarbólkar, heilar vinnugreinir ella stakfyritøku áseta:

1. at prísur, gjøld, samsýningar ella vinningur, ið galda ávísan dag, ikki mega verða hækkað, ella
2. at prísur, gjøld, samsýningar ella vinningur, ið galda ávísan dag, ikki mega verða hækkað meira enn upphæddir ella prosent, ið eru nærri uppgivin, ella
3. at ikki má verða farið upp um prís, gjald, samsýning ella vinning, ið nærri er uppgivin.

Stk. 2. Prísráðið kann á tí øki, ið stk. 1 fevnir um, eftir samráðing við avvarðandi stakfyritøkur, vinnugreinafelagsskapir ella feløg fyriskipa, at til at rokna út prís, gjøld, samsýningar og vinning skulu ávísar útrokningarreglur verða nýttar.

§ 7. Det er ikke tilladt at sælge varer mellem handlende i samme omsætningsled, medmindre sådan handel ikke medfører fordyrelse.

Stk. 2. Ved indførsel af varer fra udlandet, skal importøren forsøge at undgå unødvendigt fordyrende mellemled, og sådanne varer skal, hvor det er muligt, indføres direkte fra oprindelseslandet. Prisrådet kan nægte at godkende unødvendige mellemhandlerudgifter.

Stk. 3. Prisrådet kan sætte forbud mod indførsel af varer, som færøsk køber ikke får lov til at importere direkte fra oprindelseslandet.

§ 8. For erhvervsmæssigt salg af varer her i landet og for erhvervsmæssig levering af tjeneste- og transportydelser her i landet kan prisrådet for indtil 6 måneder for bestemte vare- og ydelsesområder, hele brancher eller enkeltvirksomheder bestemme:

1. at de en bestemt dato gældende priser, takster, honorarer eller avancer ikke må forhøjes eller
2. at de en bestemt dato gældende priser, takster, honorarer eller avancer ikke må forhøjes med mere end nærmere angivne beløb eller procenter, eller
3. at nærmere angivne priser, takster, honorarer eller avancer ikke må overskrides.

Stk. 2. Prisrådet kan inden for det af stk. 1 omfattede område efter forhandling med de pågældende enkeltvirksomheder, brancheorganisationer eller foreninger bestemme, at der ved beregningen af priser, takster, honorarer og avancer skal anvendes bestemte kalkulationsregler.

Stk. 3. Prísráðið kann eftir at avvarðandi stakfyritøkur, vinnugreinarfelagsskapir ella feløg hava havt høvi til at siga sína áskoðan, leingja ella broyta ásetingarnar sambært stk. 1 upp í 6 mánaðir í senn.
Stk. 4. Stk. 1-3 koma samsvarandi til nýtslu fyri prís og vinning, ið ásettir verða ella tilráddir til áframsølu í eftirfylgjandi keypsluliði.
Stk. 5. Henda grein viðvíkur ikki prísi, gjøldum og samsýningum, ið landið ella ein kommuna áseta ella góðkenna.

Stk. 3. Prisrådet kan, efter at de pågældende enkeltvirksomheder, brancheorganisationer eller foreninger har haft lejlighed til at udtale sig herom, forlænge eller ændre de i henhold til stk. 1 fastsatte bestemmelser for indtil 6 måneder ad gangen.
Stk. 4. Stk. 1-3 finder tilsvarende anvendelse for priser og avancer, der fastsættes eller tilkendegives for videresalg i efterfølgende omsætningsled.
Stk. 5. Denne paragraf vedrører ikke priser, takster og honorarer, der fastsættes eller godkendes af landet eller af en kommune.

§ *9.* Vørur, sum handlandi bjóða fram í sýnisglugga ella inni í krambúðini, skulu vera týðiliga prísmerktar. Eisini kann ráðið krevja, at prísir vera tilskilaðir, tá vørur ella tænastur verða bodnar fram í lýsingum.
Stk. 2. Prísráðið kann áseta nærri reglur um prísmerking, fakturering av vørum og útgreining av rokningum fyri gjørd arbeiðir.

§ *9.* Varer, som handlede fremviser i udstillingsvinduer eller inde i forretningen, skal være tydeligt prismærket. Rådet kan kræve, at priser også anføres, når varer eller tjenesteydelser tilbydes i annoncer.
Stk. 2. Prisrådet kan fastsætte nærmere bestemmelser om prismærkning, fakturering af varer og specifikation af regninger for udført arbejde.

§ *10.* Prísráðið kann krevja, at vørur, sum bert kunnu halda sær avmarkaða tíð, verða merktar annaðhvørt við framleiðsludegi ella seinast loyvda søludegi. Ráðið kann áseta nærri reglur fyri tílíkari merking.

§ *10.* Prisrådet kan forlange, at varer, som kun kan opbevares i begrænset tid, mærkes enten med fremstillingsdag eller sidst tilladte salgsdag. Rådet kan fastsætte nærmere bestemmelser for sådan mærkning.

§ *11.* Tá ið vøra ella tænasta verður boðin til sølu, er ikki loyvt at nýta rangar, villleiðandi ella ófullfíggjaðar upplýsingar, sum kunnu ávirka eftirspurningin.
Stk. 2. Tá ið vøra verður boðin til sølu fyri niðursettan prís, skal tann prísur, ið seinast var á vøruni, týðiliga verða tilskilaður sum fyrr prísur.

§ *11.* Ved udbydelse af varer og tjenesteydelser er det ikke tilladt at benytte urigtige, vildledende eller ufuldstændige oplysninger, som er egnet til at påvirke efterspørgselen.
Stk. 2. Ved udbydelse af varer til nedsat pris, skal varens seneste pris tydeligt angives som før pris.

§ *12.* Tað er ikki loyvt at bjóða garanti við sølu av vørum ella veitan av tænastu uttan so, at hesin garantiur gevur móttakaranum eina betri støðu, enn hann annars hevur eftir galdandi lóg.

§ *13.* Tað er ikki loyvt at geva vørum, sum verða fluttar inn úr útlondunum, heiti ella merki, sum er egnað at fáa keyparan at halda at vøran er framleidd í Føroyunum.

§ *14.* Prísráðið kann eftir kæru ella av sínum eintingum taka støðu til, um ein vøra ella eitt gjørt arbeiði lýkur tey góðskukrøv, sum rímiliga kunnu vera sett vørum ella arbeiði av slíkum slagi.
Stk. 2. Prísráðið hevur heimild til at fáa sær serkøna hjálp í teimum førum, tað metir neyðugt.

§ *15.* Hevur virki vunnið sær úrtøku av tiltøkum, sum eru ímóti avgerð, ið prísráðið hevur tikið, kann prísráðið gera av, at úrtøkan, ið vunnin varð ov mikið, verður drigin frá framtíðarvinningi.

§ *16.* Kærur um avgerðir prísráðsins kunnu verða lagdar fyri yvirprísráðið í seinasta lagi 14 dagar eftir, at prísráðið hevur hoðað frá avgerð sini.
Stk. 2. Yvirprísráðið hevur 3 limir, sum verða valdir av løgtinginum fyri 4 ár. Fyri hvønn av limunum verður valdur varalimur.
Stk. 3. Innsend kæra um avgerðir prísráðsins virka ikki festandi, uttan so er at yvirprísráðið tekur avgerð um annað.

§ *12.* Det er ikke tilladt at tilbyde garanti ved salg af varer eller ydelser af tjenester, medmindre denne garanti giver modtageren en bedre stilling, end han ellers har efter lovgivningen.

§ *13.* Det er ikke tilladt at give varer, som er importeret fra udlandet, betegnelse eller mærke, som er egnet til at få købere til at tro, at varen er fremstillet på Færøerne.

§ *14.* Prisrådet kan på grundlag af anke eller af egen drift afgøre, om en vare eller et udført arbejde opfylder de kvalitetskrav, som med rimelighed kan stilles til varer eller arbejder af den pågældene art.
Stk. 2. Prisrådet er bemyndiget til at antage sagkyndig hjælp på områder, hvor dette anses nødvendigt.

§ *15.* Har en virksomhed indvundet udbytte ved handlinger, der er i strid med en af prisrådet truffet afgørelse, kan prisrådet bestemme, at det for meget indvundne udbytte skal fradrages i fremtidige avancer.

§ *16.* Anke over prisrådets afgørelser kan forelægges overprisrådet senest 14 dage efter, at prisrådet har givet meddelelse om sin afgørelse.
Stk. 2. Overprisrådet har 3 medlemmer, der vælges af lagtinget for 4 år. For hvert medlem vælges en suppleant.
Stk. 3. Indgivelse af klage over prisrådets afgørelse har ikke opsættende virkning, medmindre overprisrådet bestemmer andet.

§ 17. Við sekt ella hefti verður revsaður tann, ið

1. brýtur §§ 2, 7, 9, 11, 12 og 13,
2. ger ikki eftir boðum ella brýtur bann, ið lagt er eftir § 8, stk. 1 og 2, § 9, stk. 1 og § 10 ella
3. gevur ikki upplýsingar, ið kravdar verða av honum eftir § 4, stk. 4 og § 9, stk. 1.

Stk. 2. Tann, sum í viðurskiftum, ið hoyra undir lógina, gevur prísráðnum ella yvirprísráðnum rangar ella villleiðandi upplýsingar ella tigur burtur viðurskifti, ið hava týdning fyri avgerð í málinum, verður revsaður við sekt ella hefti, uttan so er, at hann hevur uppiborið harðari revsing eftir borgarligari revsilóg.

Stk. 3. Í forskriftum, ið verða útgivnar sambært lógini, kann verða ásett revsing sum sekt ella hefti fyri at bróta ásetingar í forskriftunum.

Stk. 4. Er brot framt av partafelag, lutafelag ella slíkum, kann felagið sjálvt koma undir sektarábyrgd.

Stk. 5. Fyrningarfrest fyri revsiábyrgd er 5 ár.

Stk. 6. Við viðgerð av málum sambært hesi grein verða nýttar reglurnar í lóg um rættargang kap. 69 í sama mun sum í málum, sum ríkissakførin reisir.

Stk. 7. Letur einhvør vera við at lata inn fráboðan í rættari tíð sambært § 2 ella at geva prísráðnum umbidnar upplýsingar sambært § 4, stk. 4, kann landsstýrið eftir tilmæli ráðsins áleggja tí avvarðandi at gera skyldu sína hesum viðvíkjandi, ella kemur hann undir dagliga sekt ella sekt um vikuna, ið kann verða innheintað við panting.

§ 17. Med bøde eller hæfte straffes den, der

1. overtræder §§ 2, 7, 9, 11, 12 og 13,
2. undlader at efterkomme et påbud el- ler overtræder et forbud, udstedt efter § 8, stk. 1 og 2, § 9, stk. 1 og § 10, eller
3. undlader at meddele oplysninger, som opkræves ham efter § 4, stk. 4 og § 9, stk. 1

Stk. 2. Den, som i forhold, der er omfattet af loven, meddeler prisrådet eller overprisrådet urigtige eller vildledende oplysninger eller fortier forhold af betydning for den pågældende sags afgørelse, straffes med bøde eller hæfte, medmindre strengere straf er forskyldt efter borgerlig straffelov.

Stk. 3. I forskrifter, der udstedes i henhold til loven, kan der fastsættes straf af bøde eller hæfte for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

Stk. 4. Er en overtrædelse begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges virksomheden som sådan.

Stk. 5. Forældelsesfristen for strafansvaret er 5 år.

Stk. 6. Ved behandlingen af sager i henhold til denne paragraf anvendes reglerne i lov om rettens pleje kap. 69 i samme omfang som i sager, der påtales af statsadvokaten.

Stk. 7. Undlader nogen rettidigt at indgive anmeldelse i henhold til § 2 eller at meddele prisrådet en i henhold til § 4, stk. 4 begæret oplysning, kan landsstyret efter rådets indstilling pålægge den pågældende under en daglig eller ugentlig møde, der kan inddrives ved udpantning, at opfylde sin pligt i så henseende.

§ *18.* Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1988. Samtíðis fer løgtingslóg nr. 43 frá 23. juni 1978 um príseftirlit úr gildi. Tó verður § 4 í løgtingslóg nr. 25 frá 24. apríl 1952 framvegis í gildi, til onnur lóggáva um gjaldoyraviðurskifti er framd.

§ *18.* Denne lov træder i kraft, den 1. juli 1988. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 43 af 23. juni 1978 om priskontrol. Dog forbliver § 4 i lagtingslov nr. 25 af 24. april 1952 fortsat i kraft til anden lovgivning om valutaforhold er gennemført.

Viðmerkingar:

Galdandi lóg um príseftirlit er løgtingslóg nr. 43 frá 23. juni 1978.

Við skrivi dagfest 29. september 1987 setti Prísráð Føroya fram ynski um at fáa lógina endurskoðaða, serstakliga viðvíkjandi reglunum um handilskapping.

Landsstýrið setti tí ein arbeiðsbólk at endurskoða lógina við umboðum fyri Brúkarafelagið, Føroya Keymannafelag, Føroya Keypsamtøku, Felagið fyri Føroysk Farmaskip og Landsstýrið.

Í arbeiðsbólkinum vóru vald:

Erland Ludvig fyri Brúkarafelagið,

Valdemar Lützen fyri Keypmannafelagið,

Finn Nielsen fyri Føroya Keypsamtøku,

Torleiv Hoydal fyri Prísráðið,

Jógvan Johansen fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip og

Jalgrim Hilduberg fyri Føroya Landsstýri.

Sum skrivari hjá arbeiðsbólkinum varð settur Knút Nolsøe, prísansari.

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt fyriliggjandi uppskot til nýggja lóg um príseftirlit, sum landsstýrið tekur undir við.

Týdningarmestu broytingarnar eru reglurnar í §§ 1 og 2, har innbygdar eru neyðugar reglur í lógina um handilskapping.

Annars er øll lógin endurskoðað, og broytingar eru gjørdar í flestu greinunum.

Til tær einstøku broytingarnar verður vísst til fylgjandi viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1:

Í hesi grein, sum er endamálsgrein, eru komnar aftrat reglur, sum — eisini at forða fyri órímiligum handilstreytum og kappingaravmarkandi tiltøkum, bæði viðvíkjandi vinnurøkjandi og brúkarum.

Til § 2:

Í hesi grein er serliga dentur lagdur á fráboðanarskylduna um avtalur og samtyktir, sum kunnu viðføra ósunna handilskapping. Greinin umfatar nú eisini pris og kappingarviðurskifti innan flutningsøkið og tænasluveiting.

Til § 3:
Greinin snýr seg um heimildina til at hava eftirlit við handilsviðurskiftum.

Nýtt pætti um varalimir er komið við og nýtt stk. 2 um príseftirlitið er eisini komið við í uppskotið.

Til § 4:
Greinin snýr seg um prískanningar og kunngeran av prísum.

Nýtt í uppskotinum er tað, at úrslitini av kanningum skulu sendast teimum, sum kanningin umfatar, til viðmerkingar áðrenn kunngerðing.

Til § 5:
Her er viðgerðin um kæru umrødd, og uppskotið heimilar nú eisini viðgerð av kærum um samsýningar og gjøld viðvíkjandi tænastuveitingum v.m.

Til § 6:
Eingin broyting í nýggja uppskotinum.

Til § 7:
Einasta broyting, ið er gjørd í uppskotinum er, at fyrsta orðið í stk. 3 er broytt frá »landsstýrið« til »prísráðið«, t.v.s. at heimildin at sela forboð móti nevnda innflutningi verður flutt til prísráðið.

Til § 8:
Greinin umfatar ásetan av hámarksprísi og frá einans at hava umfatað prísir á vørum, so umfatar uppskotið nú prísir, gjøld, samsýningar og vinningar. Undir hesum er slíkt sum flutningur v.m.

Til § 9:
Greinin umfatar prísmerking og í uppskotinum fær prísráðið heimild at áseta nærri reglur um prísmerking, fakturering av vørum, afturímóti einans heimild at fyriskipa, hvussu rokningar fyri gjørd arbeiðir skulu verða útgreinaðar.

Til § 10:
Eingin broyting í uppskotinum.

Til § 11:
Greinin umfatar neyðugar upplýsingar, tá vøra ella tænasta verður boðin út til sølu.

Uppskotið umfatar nýtt stk. 2, ið áleggur handlandi, tá vøra verður boðin til sølu fyri niðursettan prís, týðiliga at tilskila fyrrprísin.

til § 12:
Eingin broyting í nýggja uppskotinum.

Til § 13:
Ongin broyting í nýggja uppskotinum.

Til § 14:
Í hesi grein er stk. 2 broytt soleiðis, at prísráðið í staðin fyri sorinskrivarin nú sjálvt hevur heimild til at tilnevna serkøna hjálp. Hetta orsakað av, at tað fyrikoma so nógv mál, har serkøn hjálp er neyðug, og eftir núverandi lóg útnevnir sorinskrivarin einans 3 serkønar (húsa-, bil- og jarnsmiðir).

Til § 15:
Greinin er nýggj í uppskotinum, og vil hon geva prísráðnum heimild at góðgera brúkarum við lækkaðum prísi, tað, ið ein handlandi hevur vunnið í úrtøku aftaná og ímóti avgerð ráðsins.

Til § 16:
Henda grein í uppskotinum er sama sum § 15 í núverandi lóg, men við teirri broyting, ið varalimir skulu veljast fyri yvirprísráðið.

Nýtt stk. 3 er skotið upp um, at avgerðir ráðsins virka ikki í frestandi, uttan so at yvirprísráðið sjálvt ásetir hetta.

Til § 17:
Henda grein í uppskotinum er sama sum § 16 í núverandi lóg. Í uppskotinum er greinin útbygd samsvarandi tí hefti ella sekt, sum áleggjast kann í sambandi við brot á lógina. Annars er stk. 5 um fyrningarfrest nýtt.

Til § 18:
Henda grein kemur fyri § 17 í núverandi lóg, og eru annars ongar viðmerkingar til hana.

1. viðgerð 6. apríl 1988. Málið varð beint í skattanevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 6. apríl 1988 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og ásannandi, at talan er um eitt sera umfatandi lógaruppskot, ið krevur nágreiniliga viðgerð, ið fer at verða tíðarkrevjandi, verður mælt til, málið fer í millumtinganevnd.

Sostatt setir skattanevndin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur skattanevndini at viðgera hetta mál, sum millumtinganevnd og at leggja málið aftur fyri tingið í Ólavsøkutingsetu 1988.

2. viðgerð 6. mai. Uppskotið til samtyktar um at gera nevndina til millumtinganevnd málinum viðvíkjandi varð samtykt við 24-0.

F.L. j. nr. 1115-22.

117 Broyting í løgtingslóg um dagpening í samband við barnsburð og sjúku.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening í sambandi við barnsburð og sjúku.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 25 frá 30. apríl 1987, sum broytt við løgtingslóg nr. 86 frá 2. oktober 1987 verða hesar broytingar gjørdar.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om dagpenge ved barsel og sygdom.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 25 af 30. april 1987 om dagpenge ved barsel og sygdom, som ændret ved lagtingslov nr. 86 af 2. oktober 1987, foretages følgende ændringer:

1) Í § 5, 1. stk., verður »20 vikur í einum 6 mánaða skeiði« broytt til: »26 vikur í einum 12 mánaða skeiði«.

2) Í § 5, 2. stk., verður »20 vikur í einum 12 mánaða skeiði« broytt til: »26 vikur í einum 24 mánaða skeiði«.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. oktober 1988.

1) I § 5, stk. 1, ændres »20 uger i en 6 måneders periode« til: »26 uger i en 12 måneders periode«.

2) I § 5, stk. 2, ændres »20 uger i en 12 måneders periode« til: »26 uger i en 24 måneders periode«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. oktober 1988.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 25 frá 30. apríl 1987 var tíðin fyri dagpening við sjúku og vanlukku longd úr 13 vikum til 20 vikur. Skotið verður upp at halda fram við at betra korini hjá teimum tímaløntu, tá sjúka berst á, og verður tí skotið upp, at tann longsta tíðin fyri dagpening verður longd uppaftur meira til eitt hálvt (½) ar. Av tekniskum orsøkum verða tíðarbilini, sum longsta tíðin skal roknast eftir, longd samsvarandi upprunaliga lutfallinum.

Meirútreiðslan av dagpeningi eftir uppskotinum kann bert metast leysliga, og verður mett til o.u. 2,8 mió. kr. árliga. Partur av teimum, sum fara at hava rætt til dagpening, fáa sum er hjálp eftir forsorgarlógini. Sparingin á útreiðslum til hjálp eftir forsogarlógini verður leysliga mett til o.u. 1,2 kr. og er 3/4 av hesum ella o.u. 0,9 mió. kr. landskassaútreiðslur. Nettoútreiðslan hjá landskassanum kann sostatt metast til o.u. 1,9 mió. kr. árliga. Harafturat koma øktar fyrisitingarútreiðslur.

1. viðgerð 21. apríl. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 21. apríl 1988 beint í almanna- og heilsunevndina.

Málið snýr seg um at bøta um korini hjá teimum tímaløntu í samband við sjúku og vanlukku. Eftir uppskotinum verður mælt til, at sjúkradagpeningur í 20 vikur verður øktur til 26 vikur. Eftir broytingaruppskotinum skal ein kunna fáa sjúkradagpening í 26 vikur í mesta lagi í einum 12 mánaða skeiði. Í øðrum stk. í § 1 snýr málið seg um fólka-, avlamis- og einkjupensjónistar. Her skal talan vera um broyting frá 20 vikum til 26 vikur í einum 24 mánaða skeiði.

Tað eru ógvuliga fáar viðmerkingar til uppskotið, men greitt er, at tekniskt brek er í. Hetta snýr seg um, yvir hvussu langa tíð ein í mesta lagi kann fáa 26 vikur. Í fyrsta stk. stendur í einum 12 mánaða skeiði, og í øðrum stk. stendur í einum 24 mánaða skeiði. Hetta skal ávikavist vera í einum 9 mánaða skeiði og einum 15 mánaða skeiði.

Nettoútreiðslan hjá landskassanum til hetta uppskot verður mett o.u. 1,9 mió. kr. árliga.

Tað er ein samd nevnd, ið tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men setir fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

u p p s k o t l a n d s s t ý r i s i n s

1) Í § 5, 1. stk. ganga út orðini: »20 vikur í einum 6 mánaða skeiði« og í staðin verður sett: »26 vikur í einum 9 mánaða skeiði«.
2) Í § 5, 2. stk. ganga út orðini: »20 vikur í einum 12 mánaða skeiði« og í staðin verður sett: »26 vikur í einum 15 mánaða skeiði«.

1) I § 5, stk. 1 udgår ordene: »20 uger i en 6 måneders periode« og i stedet indsættes: »26 uger i en 9 måneders periode«.
2) I § 5, stk. 2 udgår ordene: »20 uger i en 12 måneders periode« og i stedet indsættes: »26 uger i en 15 måneders periode.«

2. viðgerð 4. mai 1988. Broytingaruppskot til § 1 í landsstýrisins uppskoti frá almanna- og heilsunevndini varð samtykt við 29-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 29-0 atkvøðum, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Við 29-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 6. mai. Málið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1010-12-1. Lóg nr. 78 frá 9. juni 1988.

118 Lóg um útbygging av sjúkrahúsunum.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um útbygging av sjúkrahúsunum.

lagtingslov om udbygning af sygehusene.

§ *1.* Landsstýrið fær heimild til landskassans vegna at taka upp lán 200 mió. kr. til útbyggingar av sjúkrahúsverkinum í Føroyum.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån 200 mio. kr. til udbygning af sygehusvæsenet på Færøerne.

§ *2.* Í fíggjarárinum 1989 og fylgjandi fimm fíggjarár til og við 1994 verða árliga á fíggjarløgtingslógini avsettar 25 mió. kr. til sjúkrahúsútbygging at leggja í grunn.

§ *2.* For finansåret 1989 og de følgende fem finansår til og med 1994 afsættes hvert år på lagtingsfinansloven 25 mio. kr. til opførelse af sygehuse at henlægge i fond.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ *3.* Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Um 1979 vóru gjørdar útbyggingarætlanir fyri øll trý sjúkrahúsini og vóru útreiðslurnar í tátíðarprísum mettar til 376 mio. kr. tilsamans.

Hesar ætlanir vóru seinni skerdar nakað, og hesar seinnu ætlanirnar eru nú dagførdar til príslagið 1. januar 1988.

Eftir hesum metingum kunnu útreiðslutølini setast upp á henda hátt.

Landssjúkrahúsið	180,5 mió. kr.
Klaksvíkar Sjúkrahús	57,0 mió. kr.
Suðuroyar Sjúkrahús	72,0 mió. kr.
Sjúkrasystraskúli	60,5 mió. kr.
Tilsamans	370,0 mió. kr.

Ætlanirnar fevna hjá Landssjúkrahúsunum um nýmótansgerð av verandi húsum, bygging av nýggjari seingjardeild (í staðin fyri gamla hospitalið frá 1928, sum er vorðið ónýtiligt til sjúklingar) og gerð av fyribilstølum til ortopædkirurg og gynokoly. Hesi høli verða so tøk til annað endamál, tá bygging er liðug. Eisini er neyðugt at byggja vardan verkstað til psykiatriskar sjúklingar og verður slíkur partur av ætlanini. Í Klaksvik fevna ætlanirnar um gerð av nýggjum húsum og nútímansgerð av verandi húsum, og á Tvøroyri fevna ætlanirnar um nútímansgerð av verandi húsum og aftratbygging.

Ætlanin er ikki at økja um seingja talið, men at gera umstøðurnar hjá sjúklingum og starvsfólki betur, umframt at skapa betri fyritreytir fyri, at sjúkrahúsverkið kann virka sum ein heild. Í hesum viðfangi eigur at verða havt í huga, at kalla ongar ábøtur ella viðkanir eru gjørdar í nógv ár, hóast stór framstig eru gjørd í læknavísindaini og talið á læknum og starvsfólk annars á sjúkrahúsunum er økt munandi.

Ætlanin er at seta í verk nevnd útbyggingar, sum skulu fremjast í einum 8-ára skeiði og at fíggja tær á henda hátt:

Játtan á fíggjarlógini 1987 (ónýtt)	4,0 mió. kr.
Játtan á fíggjarlógini 1988	16,0 mió. kr.
Játtan á fíggjarlógini 1989 - 1994 (25,0 mió. kr. hvørt árið)	150,0 mió. kr.
Lántøka	200,0 mió. kr.
Tilsamans	370,0 mió. kr.

1. viðgerð 14. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 14. apríl 1988 beint í fíggjarnevndina.

Eftir áheitan frá fíggjarnevndarformanninum komu landsstýrismaðurin saman við sjúkrahússtjóranum, sum eisini er skrivari í serkønum sjúkrahúsnevndini á fund við fíggjarnevndina.

Framlagdar vórðu byggiætlanir saman við tekningum av teimum trimum sjúkrahúsunum, og var givin frágreiðing um ætlaðar byggingar.

Søknast var eftir frágreiðingini *»Sygehusstatestik for Færøerne 1985«*, ið er gjørd av Dansk Sygehusinstitut, og er hendan nú fingin til vega.

Fíggjarnevndin hevur eftir viðgerðina av málinum býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen, Anfinn Kallsberg, Eyðun Viderø) tekur undir við uppskoti landsstýrisins um bygging

av sjúkrahúsinum við teirri broyting, at ætlaða íbúðarbyggingin/skúlin verður minkað við uml. 1200m², soleiðis at kostnaðurin gerst 45 mió. kr. í staðin fyri tær 60,5 mió. kr., ið landsstýrið hevur skotið upp.

Harumframt mælir fíggjarnevndin til, at tann pedagogiski parturin av nevndu útbúgvingini verður lagdur undir landsskúlafyrisitinina, so sum gjørt er við aðrar skúlar.

Nevndi meiriluti setir fram soljóðandi:

I broytingaruppskot

Í § 1 verður upphæddin »200 mió. kr.« broytt til: »185 mió. kr.«

I § 1 ændres beløbet »200 mio. kr.« til: »185 mio. kr.«

II uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at leggja tann pedagogiska partin av sjúkrasystraskúlanum undir landsskúlafyrisitinaina.

Ein minniluti (Ivan Johannesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins um útbygging av sjúkrahúsinum, men kann ikki taka undir við at byggja sjúkrahússkúla fyri 60,.5 mió. kr. Minnilutin er av teirri áskoðan, at landsstýrið tekur alt projektið um sjúkrasystraskúlan upp til nýggja metan og leggur tað fram aftur í næstu tingsetu.

Nevndi minnilutin setir fram soljóðandi:

III broytingaruppskot

Í § 1 verður upphæddin »200 mió. kr.« broytt til: »140 mió. kr.«

I § 1 ændres beløbet »200 mio. kr.« til: »140 mio. kr.«

IV Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka projektið um sjúkrasystraskúla upp til nýggja metan og at finna eina meiri hóskandi bygging og leggja málið aftur fyri løgtingið á ólavsøku.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) er av teirri áskoðan, at øll skúlabygging eigur at vera undir landsskúlafyrisitingini og mælir tí til, at upphæddin 370 mió. kr. verður lækkað við 30 mió. kr., ið er tann parturin í kostnaðarætlanini, sum skúlin kostar.

Nevndi minniluti setir fram uppskot um, at sáttmálabundnar íbúðir fyri umleið 30 mió. kr. verða bygdar.

Tískil skal lánsupphæddin 200 mió. kr. í uppskoti landsstýrisins (sí § 1) minkast úr 200 mió. kr. til 170 mió. kr.

Fíggingin av sjálvum sjúkrasystraskúlanum verður at útvega yvir § 14 í fíggjarlógini.

Minnilutin setir fram soljóðandi:

V Uppskot

til

løgtingslóg um útbygging av sjúkrahúsunum.	*lagtingslov om udbygning af sygehusene.*
§ *1.* Landsstýrið fær heimild til landskassans vegna at taka upp lán 170 mió. kr. til útbyggingar av sjúkrahúsverkinum í Føroyum.	§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån 170 mio. kr. til udbygning af sygehusvæsenet på Færøerne.
§ *2.* Í fíggjarárinum 1989 og fylgjandi fimm fíggjarár til og við 1994 verða árliga á fíggjarløgtingslógini avsettar 25 mió. kr. til sjúkrahúsútbygging at leggja í grunn.	§ *2.* For finansåret 1989 og de følgende fem finansår til og med 1994 afsættes hvert år på lagtingsfinansloven 25 mio. kr. til opførelse af sygehuse at henlægge i fond.
§ *3.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	§ *3.* Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Herumframt setir sami minniluti fram soljóðandi:

VI Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at útvegað verður játtan 130 mió. kr. til sjúkrasystraskúlabygging yvir § 14 á løgtingsfíggjarlógini.

2. viðgerð 5. mai. Broytingaruppskot meirilutans til § 1 samtykt við 17-0, uppskot til samtyktar frá meirilutanum fall við 13-0, Broytingaruppskot minnilutans til § 1 fall við 4-0, uppskotið til samtyktar frá sama fall við 4-0. Lógaruppskot frá minnilutanum (Adolf V. Hansen) afturtikið, somuleiðis uppskotið til samtyktar.

§ 1 í landsstýrisins uppskot broytt samtykt við 26-0, §§ 2 og 3 við 27-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 28-0.

3. viðgerð 5. mai. Lógin endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

Lóg nr. 57 frá 9. juni 1988.

119 Broyting í skattalógini.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) Í § 33 verður pkt. 6 orðað soleiðis:
»Um so er, at skattauppgerðin eitt ár vísir hall, kann hetta verða drigið frá í skattaskyldugu inntøkuni tey næstu árini og soleiðis, at fyrsta árið verður alt hallið drigið frá, um inntøka er til tess og annars so nógv, sum inntøka er til. Hevur avlop verið innan 3 seinast undanfarin ár, kann skattaálíkningin verða gjørd umaftur fyri tey 3 árini ella partar av teimum, og hallið tikið inn í ta álíkningina. Hall í sambandi við trotabúgv, gjaldsteðg o.t. verður tó bert loyvt frádrigið í tann mun skuldin ella partar av henni er goldin. Tann goldni parturin kann tá dragast frá í gjaldingarárinum.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

1) I § 33 formuleres pkt. 6 således:
»Såfremt den for et indtægtsår opgjorte skattepligtige indkomst udviser underskud, kan dette fradrages i den skattepligtige indkomst for de næste år, og således, at det første år fradrages hele underskuddet, såfremt det kan dækkes af indtægten dette år og ellers så stor en del, der er dækning for. Såfremt der har været overskud, de seneste 3 foregående år, kan skatteansættelsen omgøres for disse 3 år eller dele af disse, og underskuddet inddrages i den skatteansættelse. Underskud i forbindelse med konkurs, betalingsstandsning og lignende kan dog kun fradrages i den udstrækning gælden eller dele af denne er betalt. Det således betalte beløb kan fradrages i det år, betalingen har fundet sted.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í uppskotinum eru tvímar broytingar. Tann eina er, at 3 ára markið fyri at draga gamalt hall frá dettur burtur. Hin er, at skattaálíkningin fyri 3 seinast undanfarin ár kann takast til nýggja viðgerð, og hallið takast við í tær álíkningarnar. Hetta týðir, at hjá bókhaldsskyldugum verður skattaálíkning ikki endalig, fyrr enn 3 ár eru farin aftur um bak.

Tað 3 ára markið, sum er í lógini nú, má sigast at vera sera óheppið. Hevur eitt virki eitt hall, sum er størri enn avlopið næstu 3 árini, so skal virkið 4. árið í roynd og veru gjalda skatt av einum halli (øll 4 árini tald saman), í og við at virkið ikki sleppur undan at gjalda hallið. Hetta er heldur ikki serliga rættvíst.

Við at kunna endurálíkna nøkur ár aftur í tíðina, slepst undan nøkrum umsóknum um kreppuhjálp. Hartil kemur, at ein tílík broyting førir við sær, at

færri íløgur verða gjørdar í skundi, bert fyri at sleppa undan skatti. Ein skattalóg, sum er kantut, er í alt ov stóran mun hugvekjari til íløgur, sum ikki eru bráðneyðugar. Ein fleksibilitetur á økinum um frádrátt av halli, minkar um tílíkan íløguhug. Broytingarnar skuldu kveikt hugin at konsolidera heldur enn at gera minni neyðugar íløgur í ótíð.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina og er ikki afturkomið haðani.

120 Lóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

lagtingslov om solidarisk arbejdsmarkedspensionsfond.

1. partur

Kapitel 1.

Endamál

Formål

§ *1.* Settur verður á stovn grunnur, ið hevur til høvuðsendamál at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn.

§ *1.* Der oprettes en fond med det hovedformål at sikre alle landets indbyggere arbejdsmarkedspension.

2. partur

Inngjaldingar í grunn

§ 2. Fíe grunsins verður fingið til vegu við, at allir løntakarar árliga rinda grunninum 3% av A- og B-inntøkunum og allir arbeiðsgevarar árliga rinda grunninum 3% av útgoldnu A inntøkunum. Tey, sum reka sjálvstøðuga vinnu, rinda grunninum 3% árliga av skattskyldugu inntøkunum stavandi frá sjálvstøðugari vinnu.

Stk. 2. Løntakarar og fólk, sum reka sjálvstøðuga vinnu, sum eru 67 ár ella eldri, rinda einki í grunnin.

Stk. 3. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um, hvussu og nær arbeiðsgevarar, løntakarar og tey, sum reka sjálvstøðuga vinnu, skulu rinda tey í stk. 1 nevndu gjøld og av hvørjum A-inntøkum løntakarar sleppa undan at rinda gjaldið.

Stk. 4. Tey í stk. 1 nevndu gjøld kunnu krevjast inn við panting.

Kapitel 2.

Indbetalinger til fonden

§ 2. Fondens midler tilvejebringes derved, at alle lønmodtagere årligt til fonden indbetaler 3% af A- og B-indkomst og alle arbejdsgivere årligt til fonden indbetaler 3% af udbetalte A-indkomster. Selvstændigt erhvervsdrivende indbetaler årligt til fonden 3% af de skattepligtige indkomster, der hidrører fra selvstændigt erhverv.

Stk. 2. Lønmodtagere og selvstændige erhvervsdrivende, der er 67 år eller derover, indbetaler ikke til fonden.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse nærmere regler om, på hvilken måde og hvilke tidspunkter arbejdsgivere, lønmodtagere og selvstændigt erhvervsdrivende skal indbetale de i stk. 1 nævnte afgifter, samt af hvilke A-indkomster lønmodtagere ikke skal betale afgift.

Stk. 4. De i stk. 1 omhandlede afgifter kan inddrives ved udpantning.

3. partur

Útgjaldingar úr grunninum

§ 3. Rætt til arbeiðsmarknaðareftirløn eigur hann ella hon, ið hevur fastan bústað í Føroyum og hevur fylt 67 ár.

Stk. 2. Rætturin tekur við hin fyrsta í mánaðinum, ið viðkomandi hevur fylt 67 ár. Rætturin heldur uppat mánaðin aftaná, at treytirnar eru burtur.

Kapitel 3.

Udbetalinger fra fonden

§ 3. Den, der har fast bopæl på Færøerne og er fyldt 67 år, har ret til arbejdsmarkedspension.

Stk. 2. Retten hertil indtræder den første i den måned, hvori vedkommende fylder 67 år. Retten ophører med udgangen af den måned, hvori betingelserne ikke længere er opfyldt.

§ 4. Arbeiðsmarknaðareftirløn verður útgoldin hvønn mánað frammanundan.
Stk. 2. Landsstýrið kann áseta reglur um, at arbeiðsmarknaðareftirløn verður útgoldin ókravd.

§ 4. Arbejdsmarkedspension udbetales månedlig forud.
Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om, at arbejdsmarkedspension udbetales uden begæring.

§ 5. Stýrið fyri grunnin ásetir árligu veitingina til eftirlønartakarar í seinasta lagi 1. oktober á hvørjum ári fyri álmanakkaárið eftir.
Stk. 2. Miðað verður eftir, at nýtt verða til eftirløn 95% av tí, sum í seinasta uppgjørda roknskaparári er inngoldið eftir reglunum í § 2.

§ 5. Fondens bestyrelse fastsætter størrelsen af den årlige ydelse til efterlønsmodtageren senest den 1. oktober hvert år for det følgende kalenderår.
Stk. 2. Det tilstræbes, at der til udbetaling af pension anvendse 95% af de beløb, der i senest afsluttede regnskabsår er indbetalt i henhold til reglerne i § 2.

§ 6. Stýrið fyri grunnin kann játta peningtil endamál, sum kunnu vera við til at fremja trivnað, menning og tryggleika á arbeiðsmarknaðinum.
Stk. 2. Til hetta endamál kann stýrið nýta ein triðing av rentuinntøkuni av stovnsfænum.
Stk. 3. Landsstýrið kann, aftaná at ummæli er fingið frá stýrinum, áseta nærri reglur um slíkar játtanir.

§ 6. Fondens bestyrelse kan bevilge tilskud til formål, der kan medvirke til at fremme trivsel, udvikling og sikkerhed på arbejdsmarket.
Stk. 2. Til dette formål kan bestyrelsen anvende en trediedel af indtægterne af renter af fondens kapital.
Stk. 3. Landsstyret kan efter indhentet erklæring fra bestyrelsen fastsætte nærmere regler om sådanne bevillinger

4. partur
Fyrisiting

Kapitel 4.
Forvaltning

§ 7. At sita fyri arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum verður stýri valt. Hetta hevur 11 limir. Formaðurin, sum skal vera løgfrøðingur, verður valdur av landsstýrinum. Fimm limir umboða løntakarafeløg. Fýra limir umboða privatar arbeiðsgevarar. Hesir verða valdir eftir reglum, sum landsstýrið ásetir. Ein limur umboðar tað almenna sum arbeiðsgevara, og verður valdur av landsstýrinum eftir samráð við Føroya Kommunufelag.

§ 7. Der vælges en bestyrelse til at forestå fonden. Den består af 11 medlemmer. Landsstyret vælger formanden, der skal være jurist. Fem medlemmer repræsenterer lønmodtagereorganisationer. Fire medlemmer repræsenterer private arbejdsgivere. Disse vælges efter regler, der fastsættes af landsstyret. Et medlem repræsenterer offentlige arbejdsgivere og vælges af landsstyret efter forhandling med Føroya Kommunufelag.

Stk. 2. Limirnir verða valdir fyri trý ár í senn.
Stk. 3. Stýrið ger uppskot til starvsskipan, sum skal góðkennast av landsstýrinum.

Stk. 2. Medlemmernes valgperiode er 3 år.
Stk. 3. Bestyrelsen udarbejder forslag til forretningsorden, der skal godkendes af landsstyret.

§ *8.* Um formaðurin ella tveir stýrislimir annars halda, at avgerð, sum stýrið hevur tikið, er ikki í samsvari við lógina, kunnu tey leggja avgerðina fyri landsstýrið. Avgerðin fær tá ikki gildi uttan so, at hon verður góðkend av landsstýrinum.

§ *8.* Såfremt formanden eller 2 andre bestyrelsesmedlemmer mener, at en af bestyrelsen truffet afgørelse ikke er i overensstemmelse med loven, kan de forelægge afgørelsen for landsstyret. Afgørelsen træder i så fald ikke i kraft, medmindre den godkendes af landsstyret.

§ *9.* Umsiting líkningarráðsins og Gjaldstovan hava um hendi inngjaldingar í grunnin sambært § 2.
Stk. 2. Almannastovan og gjaldstovan hava um hendi útgjaldingar av arbeiðsmarknaðareftirløn sambært §§ 3-5.
Stk. 3. Landsbankin umsitir stovnsfæ grunsins eftir reglum, sum landsstýrið ásetir.
Stk. 4. Grunnurin verður annars umsitin av eini avgreiðsluskrivstovu.

§ *9.* Ligningsrådets, forvaltning og Gjaldsstovan administrerer indbetalinger til fonden i medfør af § 2.
Stk. 2. Almannastovan og Gjaldstovan administrerer udbetalinger af arbejdsmarkedspension i medfør af §§ 3-5.
Stk. 3. Landsbanken forvalter fondens kapital efter regler, fastsat af landsstyret.
Stk. 4. Fonden administeres iøvrigt af et sekretariat.

§ *10.* Grunnurin rindar ikki fyri ta umsiting, sum umrødd er í § 9, stk. 1-3.

§ *10.* Fonden yder ikke betaling for den administration, der omhandles i § 9, stk. 1-3.

5. partur
Reglur annars

Kapitel 5.
Andre regler

§ *11.* Rættarsókn í krøv eftir lógini er ikki loyvd.

§ *11.* Krav efter loven kan ikke gøres til genstand for retsforfølgning.

§ *12.* Henda lóg fær gildi 1. januar 1990.

§ *12.* Denne lov træder i kraft 1. januar 1990.

Stk. 2. Fyri tíðarskeiðið 1. januar - 31. desember 1990 verður talið 1% í staðin fyri talið 3% í § 2.

Stk. 3. Fyri tíðarskeiðið 1. januar 1991 - 31. desember 1992 verður talið 1,5% í staðin fyri talið 3% í § 2.

Stk. 4. Fyri tíðarskeiðið 1. januar 1993 til 31. desember 1994 verður talið 2% í staðin fyri talið 3% í § 2.

Stk. 5. Fyri tíðarskeiðið 1. januar 1995 - 31. desember 1996 verður talið 2,5% í staðin fyri talið 3% í § 2.

Stk. 6. §§ 3-5 fáa gildi frá 1. januar 1991.

Stk. 7. Tá stýrið sambært § 5, stk. 1 ásetir upphæddina av arbeiðsmarknaðareftirløn fyri 1991, verður upphæddin ætlað.

Stk. 2. For perioden 1. januar - 31. december 1990 træder tallet 1% i stedet for tallet 3% i § 2.

Stk. 3. For perioden 1. januar 1991 - 31. december 1992 træder tallet 1,5% i stedet for tallet 3% i § 2.

Stk. 4. For perioden 1. januar 1993 - 31. december 1994 træder tallet 2% i stedet for tallet 3% i § 2.

Stk. 5. For perioden 1. januar 1995 - 31. december 1996 træder tallet 2,5% i stedet for tallet 3% i § 2.

Stk. 6. §§ 3-5 træder i kraft 1. januar 1991.

Stk. 7. Ved bestyrelsens fastsættelse i medfør af § 5, stk. 1, af arbejdsmarkedspensionen for 1991, anvendes anslåede tal.

Viðmerkingar:

Í mong ár hevur somja verið um, at fólkapensjónin er ov lág. Í sekstiárunum fóru grannalondini undir at seta í verk arbeiðsmarknaðareftirløn. Eisini í Føroyum tók hesin spurningur seg upp, og í 1965 varð samtykt á Føroya Løgtingi at seta eina nevnd, ið skuldi smíða eina lóg um eykaeftirløn til fólkapensjónina. Hetta arbeiðið varð ikki gjørt tá, og síðani hevur spurningurin verið frammi av og á. Seinastu árini hava fleiri fakfeløg fingið sær sína egnu eftirlønarskipan. Við seinastu lønarsamráðingar var spurningurin um arbeiðsmarknaðareftirløn nógv frammi. Tá varð boðað frá, at landsstýrið arbeiddi við hesum spurningi. Landsstýrið hevur sett eina faknevnd, ið skuldi smíða uppskot um lógir á arbeiðsmarknaðinum. Henda nevnd var saman við landsstýrismanninum kanningarferð í grannalondunum m.a. fyri at seta seg inn í skipanir um arbeiðsmarknaðareftirløn. Á ferðini kom fram, at skipanirnar eru rættiliga ymiskar, tá talan er um inngjalding í grunn, eins og veitingar úr grunnunum eisini eru rættiliga ymiskar. Felags fyri allar skipanirnar var, at tær kravdu eina rúgvismikla umsiting. Nevndin kom skjótt til tí niðurstøðu, at eingin av skipanunum í grannalondunum var egnað at seta í verk í Føroyum. Setningurin var, at vit skuldu hava eina so einfalda skipan sum gjørligt, og at tað eftir stuttari tíð skuldi gerast møguligt at fáa eina arbeiðsmarknaðareftirløn útgoldna, ið gjørdi mun sammett við fólkapensiónina í dag.

Eftir uppskotinum skulu øll lønarfólk uttan mun til aldur ella bústað gjalda

inn í eftirlønargrunnin. Arbeiðsgevarin skal rinda somu upphædd inn í grunnin sum lønarfólkið. Øll fólk, ið hava fastan bústað í Føroyum og eru 67 ár, fáa arbeiðsmarknaðareftirløn útgoldna. Henda eftirløn kann ikki arvast og heldur uppat, um pensjónisturin flytur av landinum ella doyr. Arbeiðsmarknaðareftirlønin fær ikki ávirkan á fólkapensjónina ella ískoytisveitingarnar til fólkapensjónina. Arbeiðsmarknaðareftirlønin er skattskyldug.

Hjálagt uppskotinum er skjal, ið vísir útrokningarnar yvir inngjaldingar til grunnin, eins og tað sæst, hvat fólk kunnu væenta sær í arbeiðsmarknaðaeftirløn, tá skipanin kemur at virka til fulnar.

Av londunum Íslandi, Noregi, Svøríki og Danmark er almenna eftirlønin hægst í Svøríki og næsthægst í Noregi. Kemur hetta uppskot at virka sum ætlað, so verður almenna eftirlønin í Føroyum, t.e. fólkapensjónin og arbeiðsmarknaðaeftirløn, at liggja millum norsku og svensku eftirlønina.

Lagt kann verða aftrat, at eftir føroysku skipanini, so fáa øll fólk, ið hava fastan bústað í Føroyum, og sum eru 67 ár, arbeiðsmarknaðareftirløn. Tað vil siga, at hæði tey, ið bert hava goldið lítið ella kanska einki, koma at fáa fulla arbeiðsmarknaðaeftirløn. Í Svøríki er skipanin hon, at tá talan er um eina heimaarbeiðandi húsmóðir, so fær hon hálvaaðru fólkapensjón og onga arbeiðsmarknaðaeftirløn. Eftir hesum uppskoti fær húsmóðirin umframt fólkapensjónina fulla arbeiðsmarknaðareftirløn.

Eftir uppskotinum verður byrjað við at gjalda inn í grunnin 1. januar 1990. Fyrsta útgjalding til pensjónistar verður í 1991. Men væntandi verður fulla upphæddin, ið ætlað er til arbeiðsmarkanðareftirlønina, ikki tøk fyrr enn í 1998. Til ta tíð skuldi arbeiðsmarknaðareftirlønin verið eins stór og fólkapensjónin.

Ætlanin er ikki við hesum lógaruppskoti at forða fyri, at fólkapensiónin verður regluliga javnførd.

Eftir uppskotinum er ætlanin, at partur av rentunum av stovnsfænum hjá grunninum skal nýtast til at fremja trivnað, menning og tryggleika á arbeiðsmarknaðinum.

Landsstýrið ætlar í komandi tingsetu at leggja lógaruppskot fyri tingið um eftirlit við arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1.

Høvuðsendamálið við lógaruppskotinum er at seta á stovn ein grunn til at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn. Við hesum verður óbeinleiðis sagt, at lógaruppskotið hevur eisini onnur endamál. Av § 5 samanhildin við § 6 framgongur nevniliga, at í minsta lagi 95% av tí peningi,

sum kemur inn í grunnin, eigur at verða goldið útaftur sum arbeiðsmarknaðareftirløn, meðan 1/3 av rentuinntøkuni av teimum í estandi 5% skulu nýtast til tey, sum framvegis eru í vinnu, nevniliga til at fremja trivnað, menning og tryggleika á arbeiðsmarknaðinum. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til § 6, har nærri verður greitt frá hesum.

Til § 2.

Í hesi grein verður skotið upp at fíggja raksturin av arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum á tann hátt, at:

1. Allir løntakarar árliga rinda 3% av A- og B-inntøkunum í grunnin.
2. Allir arbeiðsgevarar árliga rinda 3% av útgoldnu A-inntøkunum í grunnin.
3. Tey, sum reka sjálvstøðuga vinnu, rinda árliga 3% av skattskyldugu inntøkunum (B-inntøkunum) stavandi frá hesi vinnu í grunnin.

Løntakarar og fólk, sum reka sjálvstøðuga vinnu, halda uppat við at rinda í grunnin, tá tey eru fylt 67 ár.

Skotið verður upp, at landsstýrið skal áseta nærri reglur í kunngerð um, hvussu og nær gjøldini í arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum skulu rindast. Eisini skal landsstýrið við hesi kunngerð áseta reglur um, av hvørjum A-inntøkum løntakarar sleppa undan at rinda gjaldið.

Í frammanfyri nevndu kunngerð er ætlanin at gjøldini frá løntakarum og arbeiðsgevarum skulu rindast í grunnin saman við teimum leypandi lønarútgjaldingunum/lønarávísingunum. Gjøldini frá teimum, sum reka sjálvstøðuga vinnu, verða at útrokna við seinast kendu álíkning sum grundarlag og innkrevja sambært rokning.

Mælt verður til, at løntakarar sleppa undan at rinda arbeiðsmarknaðareftirlønargjald av ávísum inntøkum. Hugsað verður um fólkapensión, avlamispensjón og aðrar almannaveitingar.

Til § 3.

Sum nevnt í almennu viðmerkingunum verður hildið, at 67 ár eiga at verða avgjørt aldursmark fyri arbeiðsmarknaðareftirløn. Undantøk eiga ikki at verða, hvørki í skapi av almennum reglum ella í skapi av møguleika fyri serloyvi. Hetta er í samsvari við regluna í § 2, har treytaleyst er ásett, at skyldan til at rinda arbeiðsmarknaðareftirlønargjald hvílir á øllum løntakarum v.fl. undir 67 ár.

Somuleiðis eru treytirnar soleiðis, at tær eru lættar at handfara, t.v.s. at ein treyt — einasta treytin í so máta — er at viðkomandi hevur fastan bústað í Føroyum (er tilmeldaður fólkayvirlitinum í Føroyum). Hetta neyðuga sniðið ber annanvegin í sær, at fólk, sum ikki búgva í Føroyum, eiga ikki rætt til arbeiðsmarknaðareftirløn (hóast tey kanska hava latið til grunnin í nøkur ár) og ber

hinvegin í sær, at fólk, sum flyta til Føroya, eiga rætt til arbeiðsmarknaðareftirløn (hóast tey kanska hava ikki rindað arbeiðsmarknaðareftirløngargjald).

Til § 4.

Ætlanin er at skipa so fyri, 1) at fólk 67 ár og eldri, sum fáa fólkapensión, eisini fáa arbeiðsmarknaðareftirløn og 2) at fólk, sum fylla 67 ár fáa arbeiðsmarknaðareftirløn uttan um til, um tey ynskja fólkapensión.

Til § 5.

Ætlanin við uppskotinum er, at umleið 5% av árliga arbeiðsmarknaðareftirløngargjaldinum fer til at halda stovnsfæ grunsins á nøkunlunda sama lutfallsliga støði til lønir v.m. sum í byrjanini. Hin parturin — 95% — av arbeiðsmarknaðareftirløngargjaldinum verður at nýta til arbeiðsmarknaðareftirløni. Av tí verður neyðugt bert at miða eftir nevnda prosenttali. Um so verður at talið á fólki 67 ár og eldri ikki frammanundan kann verða upplýst heilt neyvt, at talið á eftirløntakarum økist á sama hátt sum talið á fólkapensjónistum í seinastu árunum, ber til at rokna við, at árliga veitingin til eftirløntakarar (arbeiðsmarknaðareftirlønin) verður ikki minkað ár undan ári.

Til § 6.

Umráðandi er, at arbeiðsmarknaðareftirløngrunnurin ikki einans verður til frama fyri tey, sum farin eru úr vinnuni, men eisini fyri tey, sum eru í vinnu.

Skotið verður tí upp, at ein triðingur av rentuinntøkunum kann nýtast til serligar játtanir, sum umrøtt í stk. 1. Hinir tveir triðingarnir verða at nýta til fyrisiting grunsins (avgreiðsluskrivstovuna) og uppbygging av stovnsfæunum sum umrøtt í viðmerkingunum til § 5.

Sum dømi um endamál, sum kunnu verða við til at fremja trivnað, menning og tryggleika á arbeiðsmarknaðinum kunnu verða nevnd skeiðvirksemi, granskking og trygdartiltøk, sum eru uttanfyri skyldu arbeiðsgevarans (bøta um arbeiðsumhvørvið). Skeið kunnu til dømis verða fyri álitisfólk, vanlig arbeiðsfólk, arbeiðsleiðarar, umboð fyri arbeiðsgevarar og fyri fólk annars, sum annars hava at gera við arbeiðsmarknaðarviðurskifti. Møguleiki kann verða fyri at lata løntakarum á skeiðum endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í vissan mun, t.d. ájavnt við sjúkrapening.

Sum dømi um granskingarøki kunnu nevnast tey heilsufrøðiligu, løgfrøðiligu, samfelagsfrøðiligu annars og sálarfrøðiligu økini.

Í reglunum fyri játtanum, sum ásettar verða við heimild í stk. 3 kann verða ásett, at serligar skeiðnevndir og granskingarnevndir verða settar við stýrislimum og/ella sakkønum uttan fyri stýrið at geva tilmæli til stýrið.

Avgreiðsluskrivstovu grunsins kann verða tillutað týðandi leiklut við at sam-

skipa, samuneta og gera granskingarúrslit lættskiljandi. Harafturat kemur eftirlit við nýtslu av játtaðum peningi til skeiðvirksemi.

Til § 7.

Skotið verður upp, at grunnurin verður stýrdur av nevnd við 11 limum, av hesum umboða 5 løntakararnar og 5 umboða arbeiðsgevararnar, 4 privatu arbeiðsgevararnar og 1 almennu arbeiðsgevararnar. Eink verður til hindurs fyri, at starvsnevndin hevur færri limir. Hetta verður so at áseta í starvsskipan, sum ásett verður sambært stk. 3.

Til § 8.

Neyðugt er við einum trygdarventili, soleiðis at formaðurin ella tveir limir kunnu skjóta avgerð stýrisins inn fyri landsstýrið, um teir halda, at avgerðin ikki er í samsvari við lógina.

Til § 9.

Dentur verður lagdur á, at fyrisitingin av skipanini eigur at verða so einføldsum gjørligt, at tessvegna eigur at verða løgd til verandi stovnar, sum hava royndir innan líknandi mál. Hetta kann gerast við, at umsitingin hjá Líkningarráðnum fyriskipar innkrevjningina av arbeiðsmarknaðareftirlønargjøldum saman við skattainnkrevjingini. Somuleiðis kann Almannastovan skipa fyri útgjalding av arbeiðsmarknaðareftirløn saman við fólkapensjón.

Tó fara viðkomandi stovnar at hava eykajáttanir fyri neyðini, bæði til starvsfólk og til aðrar útreiðslur annars. Harafturat koma eisini meiriútreiðslur til EDV, eins og stovnsetingarútreiðslur (gerð av skrá og broytingar í verandi skattaskráum (programmum)).

Tað verður sjálvsagt uppgáva landsbankans at umsita stovnsfæið. Landsstýrið ger í samráð við landsbankan reglur um, hvussu stovnsfæið hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum skal umsitast.

Til § 10.

Hildið verður, at inntøkurnar hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum mest møguligt skulu koma endamáli grunsins til góðar, og at grunnurin tí ikki eigur at lata avgjald fyri viðgerð av málum sínum hjá landsstovnum.

Til § 11.

Skotið verður upp, at kravánarar hjá honum ella henni, sum hava rætt til arbeiðsmarknaðareftirløn, kunnu ikki gera rættarsókn í hesi rættindi, eitt nú við mótrokning, beinleiðis fútamáli, lóghaldi o.s.fr. Somuleiðis hava kravánarar hjá teimum, sum hava skyldu at rinda inn í grunnin, ikki loyvi til at gera rættarsókn í hesi krøv.

Til § 12.
Skotið verður upp, at inngjaldingarnar skulu byrja 1. januar 1990, meðan útgjaldingarnar byrja 1. januar 1991.

Skotið verður upp, at inngjaldingarprosentini, sum ásett eru í § 2, verða hækkað stigvíst at byrja við 1% í 1990, 1,5% í tvey ára tíðarskeiðinum 1991-92, 2% í tvey ára tíðarskeiðinum 1993-94, 2,5% í tvey ára tíðarskeiðinum 1995-96 og síðani frá 1. januar 1997 og frameftir at vera 3%.

Hjálagt fylgir sum skjal útrokningar viðvíkjandi inn- og útgjaldingum fyri tíðarskeiðið 1990 og 1998.

1. viðgerð 15. apríl. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Føroya landsstýri 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 15. apríl 1988 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Marius Thomasen, aktuarur, var hiðin at koma til fundar í nevndini.

Nevndin býtti seg í ein meirilnta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Øssur av Steinum, Henrik Old, Thomas Arabo) er av teirri áskoðan, at procentásetingarnar í § 2 viðvíkjandi 2. parti í lógaruppskotinum: Inngjaldingar í grunnin eiga at broytast, at § 7 viðvíkjandi fyrisiting — 4. partur í lógaruppskotinum, at umsitingarreglan sbrt. § 9 eigur at verða broytt og at ásetingarnar sbrt. § 12 verða broyttar sum niðanfyri tilskilað og setir tí fram soljóðandi:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

u p p s k o t l a n d s s t ý r i s i n s

1) Í § 2 verður í øllum trimum førum »3%« broytt til: »2%«.

2) § 7, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»At sita fyri arbeiðsmarknaðarefti rlønargrunninum verður stýri valt. Hetta hevur 7 limir. Formaðurin, sum skal vera løgfrøðingur, verður valdur av landsstýrinum. 3 limir umboða løntakarafeløgini. 2 limir umboða privatar arbeiðsgevarar. Hesir verða valdir eftir reglum, sum landsstýrið ásetir. 1 limur umboðar tað almenna sum arbeiðsgevara og verður valdur av Føroya Kommunufelag.«

1) I § 2 ændres 3 steder »3%« til: »2%«.

2) § 7, stk. 1, formuleres således:
»Der vælges en bestyrelse til at forestå fonden. Det består af 7 medlemmer. Landsstyret vælger formanden, der skal vera jurist. 3 medlemmer repræsenterer lønmodtagerorganisationerne. 2 medlemmer repræsenterer private arbejdsgivere. Disse vælges efter regler, der fastsættes af landsstyret. 1 medlem repræsenterer offentlige arbejdsgivere og vælges af Føroya Kommunufelag.«

3) § 9, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Líkningarráð Føroya og Gjaldstovan hava um hendur inngjaldingar í grunnin sbrt. § 2.«

4) § 12 verður orðað:
»Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1990.
2. stk. Fyri tíðarskeiðið 1. januar 1990 - 31. december 1993 verður talið 1,00% í staðin fyri talið 2% í § 2.
3. stk. Fyri tíðarskeiðið 1. januar 1994 - 31. december 1995 verður talið 1,25% í staðin fyri talið 2% í § 2.
4. stk. Fyri tíðarskeiðið 1. januar 1996-31. december 1997 verður talið 1,50% í staðin fyri 2% í § 2.
5. stk. Fyri tíðarskeiðið 1. januar 1998 - 31. december 1999 verður talið 1,75% í staðin fyri talið 2% í § 2.
6. stk. §§ 3-5 fáa gildi frá 1. januar 1991.
7. stk. Tá stýrið sambært § 5, 1. stk. ásetir upphæddina av arbeiðsmarknaðareftirløn fyri 1991, verður upphæddin ætlað.«

3) § 9, stk. 1 formuleres således:
»Likningarråd Føroya og Gjaldstovan administrerer indbetalinger til fonden i medfør af § 2.

4) § 12 formuleres:
»Denne lov træder i kraft 1. januar 1990.
Stk. 2. For perioden 1. januar 1990 - 31. december 1993 træder tallet 1,00% i stedet for tallet 2% i § 2.
Stk. 3. For perioden 1. januar 1994 - 31. december 1995 træder tallet 1,25% i stedet for tallet 2% i § 2.
Stk. 4. For perioden 1. januar 1996 31. december 1997 træder tallet 1,50% i stedet for 2% i § 2.
Stk. 5. For perioden 1. januar 1998 - 31. december 1999 træder tallet 1,75% i stedet for tallet 2% i § 2.
Stk. 6. §§ 3-5 træder i kraft fra 1. januar 1991.
Stk. 7. Ved bestyrelsens fastsættelse i medfør af § 5, stk. 1, af arbejdsmarkedspensionen for 1991, anvendes anslåede tal.«

Ein minniluti (Ivan Johannesen) setur soljóðandi uppskot fram:

Uppskotna skipanin hevur nógv brek við sær millum annað kemur uppskotið at tyngja munandi um støðuna hjá løntakarunum, sum longu frammanundan hava ov lítið at liva av.

Eisini kemur hendan skipanin at skap ólag í verandi eftirlønarskipan, tí tey, ið longu hava eina eftirlønarskipan, koma ikki at hava ráð til at gjalda fleiri eftirlønir.

Uppskotna skipanin er at meta, sum ein hækking í fólkapensiónini, har løntakari og arbeiðsgevari gjalda 3% hvør.

Nevndi minniluti tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein annar minniluti (Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins.

Grundgevingin fyri hesum er m.a.

1. At uppskotna skipanin í sjálvum sær ikki er ein eftirlønarskipan, men heldur bert ein hækking av fólkapensjónini við eini skattahækking upp á 3 + 3% (nú broytt til 2 + 2%) av allari útgoldnari løn, umframt eina skattahækking til allar B-skattaborgarar upp á 3%. Tað vil siga, at landsstýrið og samgongan á hendan hátt lumpa løgtingið til at avtaka regluna um 50% skattaloftið.
2. Skipanin er eisini í stríð við vanligar tryggingar- og uppsparingarreglur, tí
   a. endurrindanin ikki er í samsvar við inngjaldingarnar,
   b. ongar reglur eru fyri avlamistrygd,
   c. ongar reglur eru fyri gjaldi til eftirlivandi hjúnafelaga við deyðsfall áðrenn 67 ár.
   d. ongar reglur eru fyri gjaldi til børn, um forsyrgjarin doyr.
3. Tann uppsparing, sum liggur í hesi skipan er bert ein flyting av uppsparingini frá verandi pensjónsskipanum, sum ikki verður ráð til longur. Helst verða núverandi uppsparingarskipanir eisini at minka meira, enn nýggja skipanin útvegar av uppsparing.
4. Persónligar eftirlønir- og uppsparingarskipanir geva eina stóra samanlagda uppsparing, sum er spjadd út á mangar eigarar. Hendan, sum landsstýrið nú skjýtur upp, samlar peningin í ein almennan grunn við 11 nevndarlimum, sum kann keypa meirilutan í stórum parti av okkara vinnulívi. Tað vil siga, at her er ein týðilig og miðvís sosialiseringarætlan í uppskotinum.
5. Umframt at verandi pensjónsskipanir í mongum førum mugu halda uppat ella minkast, áleggur uppskotið øllum arbeiðsgevarum, privatum og almennum, øktar útreiðslur upp á 2% og sum frálíður 2% afturat. Tað vil siga ein kostnaðarhækking upp á yvir 150 mill. kr. árliga.
6. Harnæst er at siga, at tá eingi samsvar er millum inngjaldingar og tað, sum útgoldið verður, verður tað tilvildarligt, hvar peningur hjá løntakara og arbeiðsgevara endar. Reglan verður tann, at treytin fyri at fáa úr grunninum er, at viðkomandi aftan á sítt 67 ár hýr í Føroyum. Tað vil siga, at ein, ið hevur búð her og goldið í grunnin, men so flytur, eingi fær úr grunninum. Hinvegin fáa útlendingar, sum uttan at hava goldið í grunnin, men sum flyta til Føroya á eldri árum, pensjón úr grunninum.

Samanumtikið er tí eingi, sum talar fyri at gjøgnumføra uppskotnu skipanina. Tvørturímóti verður hon til stóran skaða fyri føroyskt vinnulív og føroyska samfelagið. Vanligi borgarin fær eisini nógv minni burturúr enn við øðrum skipaðum veruligum eftirlønarskipanum.

Alternativið er tí,

1. at ein forsvarlig hækking av fólkapensjónini verður framd yvir eitt 5-10 ára skeið,
2. at fólkapensjónsviðbøturnar lækka spakuligari enn nú, tá onnur inntøka er,
3. at eingin skattur verður roknaður av fólkapensjóns grunduppheddini, soleiðis sum Fólkaflokkurin hevur skotið upp í tingmáli nr. 36/1987,
4. at partarnir á arbeiðsmarknaðinum fáa betur umstøður at gera eftirlønaravtalur incl. uvlamis- og deyðsfallsskipanir,
5. at privatar uppsparingarskipanir og tryggingar- og pensjónsavtalur fáa betri skattligar skipanir, soleiðis sum Fólkaflokkurin skeyt upp í seinastu tingsetu.

2. viðgerð 6. mai. Broytingaruppskot frá meirilutanum í arbeiðsmarknaðarmálanevndini pkt. 1-4 samtykt við 17-0. Uppskot landsstýrisins broytt § 1 samtykt við 17-0, §§ 2-12 samtyktar við 17-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 17 0 atkvøðum.

3. viðgerð 7. mai. Málið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1320 1. Lóg nr. 71 frá 9. juni 1988.

121 Stovnan av barna- og møðrahjálparstovni.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta á stovn ein barna- og møðrahjálparstovn, at skapa kvinnum eitt alternativ til abort, og fostrum rættin til lívið.

Viðmerkingar:

Talið av framprovokeraðum abortum í Føroyum er vaksið ónormalt nógv seinastu árini.

Í 1954 vóru 757 børn fødd í Føroyum. Sama ár vóru framdir 6 provokeraðir abortar, tað er 0,8% av føddum børnum.

Í 1959 vóru fødd 858 børn, 4 provokeraðir abortar, tað er 0,5%.

Í 1960 vóru fødd 800 børn, 14 provokeraðir abortar, tað er 1,75%.

Tølini fyri 1982 - 1986 vóru hesi:

1982: 729 børn - 74 provokaraðir abortar, tað er 10,2%

1983: 672 børn - 69 provokaraðir abortar, tað er 10,3%

1984: 693 børn - 83 provokaraðir abortar, tað er 12,0%

1985: 737 børn - 85 provokaraðir abortar, tað er 11,5%

1986: 789 børn - 79 provokaraðir abortar, tað er 10,0%

Hesi tøl vísa, at tíggjundi hvør føroyingum sleppur ikki í verðina, fær ikki rættin til lívið.

Hvør orsøkin er til henda stóra vøkstur í provokeraðum abortum, er ikki alment greitt frá. Lógin er hin sama í dag sum í 1959. Men tað er vael nøyvan nakar, ið vil halda fast um, at orsøkin skal vera, at barnakonur í dag eru tíggju ferðir so sjúkar og veikar, sum barnakonur vóru fyri tríati árum síðan.

Heldur kann hugsast, at kvinnur, vegna tørvandi útbúgving og vánaliga fíggjarliga støðu, biðja um abort.

Eingin kanning er gjørd í Føroyunn um tær, sum hava fingið abort. Úr øðrum londum frættist, at tað eru ikki allar kvinnur, sum hava tað so gott aftaná at hava fingið provokeraðan abort.

Komandi mammur í trongstøðu eiga at fáa møguleika fyri aðrarí hjálp enn abort.

So leingin eingin barna- og møðrahjálp er, kann samfelagið ikki sigast at hava roynt at hjálpa hesum mammum og børnum teirra nóg mikið.

Tað er tí mótsigandi, at føroyingar senda pening út í onnur lond til svong børn, meðan føroysk børn samstundis ikki fáa rættin til livið vegna vánalig fíggjarlig kor her.

Tí verður skotið upp, at stovnaður verður ein barna- og møðrahjálparstovnur.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fyri tingið 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 23. mars beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og m.a. havt fund við landsstýrismannin og Almannastovuna.

Almannastovan hevur nógvar mammur, ið eru einsamallir uppihaldarar sum viðskiftafólk. Viðvíkjandi spurningunum um stuðul og ráðgeving til teirra, ið søkja fosturtøku, verður víst á, at møguleikar liggja eitt nú á landssjúkrahúsinum, ið hevur sosialráðgeva. Annars hevur almannaverkið eisini samskifti við hesar kvinnur, tá tær søkja útbúgvingarhjálp. Henda síða av hjálparveitingini virkar sum ætlað. Verri er, tá talan er um bústað og barnaansing. Tá talan er um »abortus provocatus« í Føroyum, so skulu eftir okkara lóg tveir læknar taka støðu til spurningin. Seinastu árini hevur tað verið soleiðis, at tað vanliga er kommunulæknin hjá umsøkjaranum og ein lækni á landssjúkrahúsinum, ið taka avgerð í málinum. Eftir tí, nevndin hevur fingið upplýst, so er sosialráðgeving ikki fastur lutur í hesum arbeiði.

Á fundinum verður eisini umrøtt spurningurin um børn, fødd uttanfyri hjúnalag, ið øll verða skrásett hjá Føroya landfúta. Almannastjórin er spurdur, um ikki hetta var eitt arbeiðsøki fyri Almannastovuna. Svarið er, at Almannastovan hevur einki ímóti slíkum arbeiði, serliga tá hugsað verður um, at nógvar av teimum 250 mammunum, ið árliga fáa børn uttan fyri hjúnalag, eru viðskiftafólk hjá almannastovuni framman undan. Hetta er tó ikki nakað, ið kann gerast frá degi til dags.

Almannastjórin er hugaður fyri teimum spurningum, ið havdir eru frammi, men leggur dent á, at nógv framman undan liggur á láni hjá almannastovuni, ið, hóast tey hava framt broytingar í bygnaðinum og fingið nógv nýggj starvsfólk, enn ikki virkar sum ætlað. Í spurninginum um faðirskapsmál umsitin av Føroya landfúta, er semja í nevndini um at mæla til at seta ein arbeiðsbólk umboðandi Føroya landfúta, Almannastovuna og fólkakirkjuna, ið skal koma við einum uppskoti um, hvussu hesin spurningur verður loystur.

Við støði í uppskotinum frá Framsóknarflokkinum verður mælt til, at spurningurin um stuðul, ráð og vegleiðing til kvinnur, ið gerast við barn, verður meiri skipaður. Tó er greitt, at hesin spurningur tekur tíð. Innanfyri avmarkaða tíð verður hildið, at almannaverkið eigur at umhugsa, hvørjir møguleikar eru fyri ráð og vegleiðing til hesar kvinnur, soleiðis at henda vegleiðing kann fara fram, áðrenn kommunulæknin ger tilráðing til landssjúkrahúsið. Av tí at hesi mál ofta eru av slíkum slag, at tey hava skund, er umráðandi, at kommunulæknarnir í landinum hava eitt ávíst samskiftisfólk á almannastovuni at venda sær til í slíkum førum.

Almanna- og heilsunevndin er samd um, at spurningurin um ráð og vegleiðing í samband við barnsburð, eins og spurningurin um faðirskapsmál verða nærri kannaðir. Mælt verður tí til, at landsstýrismaðurin í almannamálum saman við Almannastovuni setir ein ella fleiri arbeiðsbólkar, ið fara undir nærri at útgreina viðurskiftini í samband við áðurnevndu spurningar. Samstundis verður mælt til, at lógargrundarlagið hjá almannastovuni, ið lutvíst er føroyskt og lutvíst er danskt, verður endurskoðað og einfaltgjørt.

Ein samd almanna- og heilsunevnd setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtykt

Landsstýrinum verður álagt at seta nevnd at gera uppskot um:

1) skipaða ráðgeving fyri kvinnur, ið gerast við barn og ynskja fosturtøku,

2) at flyta málsviðgerðir í faðirskapsmálum frá Føroya Landfúta til annan stovn.
3) einfaldgerð og endurskoðan av lógargrundarlagnum hjá Almannastovuni.

2. viðgerð 4. mai. Uppskotið til samtyktar frá samdari almanna- og heilsunevnd samtykt við 20-0 atkvøðum.

122 Stovnan av nevnd í endurbúgvingar- og hjálpartólamálum og kærunevnd í sosialum málum.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri, at nevnd verður sett at taka avgerðir í endurbúgvingar- og hjálpartólamálum, og at kærunevnd verður sett í Føroyum at viðgera tey kærumál, sum den sosiale ankestyrelse áður tók sær av.

Viðmerkingar:

Í Føroyum hevur Vanlukkutryggingarráðið verið revalideringS- og pensionsnævn. Men tá lógin um blokkstuðul varð viðtikin á Føroya løgtingi í september, vórðu allar avgerðir um endurbúgving og hjálpartól tiknar frá Vanlukkutryggingarráðnum og lagdar undir Almannastovuna, uttan at nøkur óvildarnevnd varð sett til at taka sær av hesum málum.

Áðrenn 1. januar kundu føroyingar kæra allar avgerðir hjá Vanlukkutrygging arráðnum um pesión, hjálpartól og endurbúgving til Den sosiale ankestyrelse í Keypmannahavn. Eftir blokkstuðulsskipanini er hesin møguleiki burturfallin, uttan at nøkur føroysk kærunevnd er sett í staðin.

Donsk lóg áleggur hvørjum amti at hava eina revalideringS- og pensiónsnevnd, sum skal taka avgerðir um pensión, endurbúgving og hjálpartól. Mál, sum revalideringS- og pensionsnævnet hevur havt til viðgerðar, kunnu kærast til Den sosiale ankestyrelse.

Donsku lógirnar hava meyvar reglur fyri, hvør ið skal sita í hesum nevndum.

RevalideringS- og pensionsnævnet verður valt soleiðis:

2 umboð fyri amtsráðið
2 umboð fyri kommunufelagið
2 umboð fyri arbeiðsmarknaðin
1 umboð fyri De samvirkende invalideorganisationer

Limirnir í Den sosiale ankestyrelse eru valdir úr:

1) Dansk arbejdsgivereforening
2) Landsorganisationen (LO) i Danmark
3) Amtsrådsforeningen i Danmark
4) Kommunernes landsforening
5) Folkepensionistforeningernes- og Invalideorganisationernes Kontaktudvalg
6) Københavns kommune
7) Frederiksbergs kommune

Í báðum førum skal formaðurin vera løgfrøðingur, figgjarfrøðingur ella líknandi.

Tað kann ikki vera rætt, at blokkstuðulsskipanin skal hava givið føroyingum øðrvísi lógarskipanir at liva undir, enn áðrenn blokkstuðulin kom í gildi.

Tí verður skotið upp, at líknandi lógir sum í Danmark, verða settar í gildi í Føroyum.

Tað hevði verið ein fyrimunur, um allar sýslur í landinum vórðu umboðaðar í hesum nevndum, so fólk við lokalkunnleika eru við til at taka avgerðirnar á sosiala økinum.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt av Framsóknarflokkinum hin 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 23. mars beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur havt fund bæði við avvarðandi landsstýrismann og almannastjórun.

Semja er um, at tørvur er á einum millumliði imillum almannastovuna og landsstýrið í spurningum í kærumálum. Eftir tí, ið er kent aðrar staðir, so eru í slíkari nevnd umboð við løgfrøðiligum/sosialum kunnleika eins og fólk við innliti í slíkum málum, ið eru útpeikað av fólkavaldum stovni. Nevndin er samd um at mæla landsstýrinum til í samráð við almannastovuna at fáa eina slíka kærunevnd skipaða, har omanfyrinevndu sjónarmið eru tikin við.

Samd almanna- og heilsunevnd, sum í staðin fyri uppskot Framsóknarfloksins setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri, at kærunevnd verður sett í Føroyum at viðgera tey kærumál, sum »Den Sociale Ankestyrelse« áður tók sær av.

2. viðgerð 28. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

123 Studningur til ávísar kommunur í sambandi við útbygging av havnaøkjum í avvarðandi kommunum.

Ár 1988, týsdagin 3. mai varð við kvalifiseraðum meiriluta (26-0 atkvøðum) givið loyvi til framløgu av málinum, sum síðani varð lagt fram av Lassa Klein, landsstýrismanni, vegna landsstýrið.

Uppskot

til

løgtingslóg
um
Studning til Viðareiðis/Hvannasunds, Runavíkar, Nes, Skála, Sjóvar, Sunda, Hósvíkar, Hvalvíkar, Kollafjarðar, Vestmanna, Miðvágs/Sandavágs, Skopunar, Froðbiar og Vágs kommunur til ávís arbeiði í sambandi við bygging ella útbygging av ídnaðar- ella øðrum virki á havnarøki í avvarðandi kommunu.

§ *1.* Úr landskassanum verður veittur studningur til niðanfyri nevndu kommunur til at fylla út ella sproingja burtur fyri grundøki við avvarðandi havn og byggibúna tað, til at regulera og festa øki uttan um ídnaðarbyggingar, soleiðis at viðurskiftini lúka tey krøv, ið galda fyri avvarðandi virki og til onnur tiltøk í sambandi við nútímansgerð av ídnaðar- ella øðrum virki. Studningurin er 65% av byggipeninginum, tó í mesta lagi 65% av niðanfyri tilskilaðu upphæddum, og verður hann goldin við eins stórum ársgjøldum í 3 fylgjandi fíggjarárum frá og við fíggjarárinum 1988 at rokna:

Lagtingslov
om
tilskud til Viðareiðis/Hvannasunds, Runavíkar, Nes, Skála, Sjóvar, Sunda, Hósvíkar, Hvalvíkar, Kollafjarðar, Vestmanna, Miðvágs/Sandavágs, Skopunar, Froðbiar og Vágs kommuner til visse arbejder i forbindelse med etablering eller udbygning af industri- eller anden virksomhed på havnearealet i den pågældende kommune.

§ *1.* Af landskassen ydes tilskud til nedenævnte kommuner til opfyldning eller udsprængning for grundareal ved vedkommende havn og til byggemodning af dette, til regulering og befæstelse af arealer uden om industribygninger, så forholdene opfylder de for vedkommende virksomhed gældende krav, samt til andre foranstaltninger i forbindelse med modernisering af en industrivirksomhed. Tilskudet andrager 65% af anlægsudgifterne, dog højst 65% af nedenfor anførte beløb, og udbetales i lige store årsrater i 3 på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1988 at regne:

Kommuna	kr.
Viðareiðis/Hvannasunds	500.000,00
Runavíkar	500.000,00
Nes	1.000.000,00
Skála	1.000.000,00
Sjóvar	500.000,00
Sunda	600.000,00
Hósvíkar	1.000.000,00
Hvalvíkar	1.800.000,00
Kollafjarðar	1.500.000,00
Vestmanna	1.500.000,00
Miðvágs/Sandavágs	1.500.000,00
Skopunar	4.000.000,00
Froðbiar	2.500.000,00
Vágs	3.300.000,00
Tils.	21.200.000,00

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Kommune	kr.
Viðareiðis/Hvannasunds	500.000,00
Runavíkar	500.000,00
Nes	1.000.000,00
Skála	1.000.000,00
Sjóvar	500.000,00
Sunda	600.000,00
Hósvíkar	1.000.000,00
Hvalvíkar	1.800.000,00
Kollafjarðar	1.500.000,00
Vestmanna	1.500.000,00
Miðvágs/Sandavágs	1.500.000,00
Skopunar	4.000.000,00
Froðbiar	2.500.000,00
Vágs	3.300.000,00
Ialt	21.200.000,00

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tey arbeiði, løgtingslógin snýr seg um, eru tey sum niðan fyri eru tilskilað undir avvarðandi kommunu.

Viðareiðis/Hvannasunds
Játtanin er ætlað til byggibúning í sambandi við gerð av egningarskúrum.

Runavík
Á havnarøkinum á Bakka er tørvur á viðkan av havnarøkinum til bygging og annað virksemi.

Nes
Í seinastuni hevur verið arbeitt við at planera økið millum P/F Nyk og ferjulegguna á Toftum. Játtanin er ætlað til framhald av hesum arbeiði.

Skáli.
Játtanin er ætlað til ábøtur á alt økið sunnanfyri Turkihúsið, ið er í vánaligum standi.

Strendur
Játtanin er ætlað til liðugtgerð av havnaøkinum á Heygsstøð.

Sunda.
Játtanin er ætlað til vatnleiðingar á Oyri og øki við Norðskála og við Áir.

Hósvík.
Í Hósvík er fylt út til nýggj havnarøki sunnanfyri asfaltbingini. Játtanin er ætlað til planering og annað arbeiði í sambandi við liðugtgerð av økinum.

Hvalvík.
Í 1987 var arbeiðið við gerð av bryggju við Kópasker liðugt. Eftir er regulering og asfaltering og annað á havnarøkinum, og er játtanin ætlað til hesi arbeiði.

Kollafjørður.
Ætlanin er at gera øki og veg sunnanfyri Oyruna, millum annað til alistøðirnar á Kollafirði.

Vestmanna.
Undir Holmsbakka fer byggibúning av havnarøkinum fram í sambandi við gerð av niðstaðarøki. Kjallarahæddin í bygninginum er til virksemi í sambandi við sjóvinnu, og er játtanin ætlað til útreiðslur til byggibúning í hesum sambandi.

Miðvágur/Sandavágur.
Studningurin er ætlaður til liðugtgerð av havnarøkinum undir Húsabakka.

Skopun.
Ætlanin er at nýta partar av tí tilfari, ið fæst frá dýpingini av Pollinum, til gerð av øki í tilknýti til havnina, og til atkomuveg millum hetta økið og havnina. Játtanin er ætlað til hetta endamál.

Froðba.
Tann útbygging, ið er farin fram á Drelnesi, fevnir um gerð av atløgubryggju og øki til ferjuleguna. Eftir er at gera økið byggibúgvið til goymsluhús til farmaskipini, og er játtanin ætlað til hetta endamál.

Vágur.
Á Oyrunum er tørvur á meiri øki í framhaldandi av tí, ið longu er gjørt, og røkkur játtanin til tann tørv, ið er í dag.

1. viðgerð 5. mai. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

Kommuna:	kr.	Kommune:	kr.
Sumbiar	300.000	Sumbiar	300.000
Tils.	21.500.000	Ialt	21.500.00

2. viðgerð 6. mai. Broytingaruppskot frá samferðslunevndini til § 1 samtykt við 28-0. Uppskot landsstýrisins broytt. samtykt § 1 við 28-0, § 2 við 28 0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 28-0.

3. viðgerð 7. mai. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

124 Fyriskipan móti dálking av firðum.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Eilif Samuelsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtykt

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta nevnd at kanna tørvin og teknisku og fíggjarligu møguleikarnar fyri at gera rørleiðingar ella aðra fyriskipan, ið kann

tryggja, at alt umhvørvisliga skaðiligt frárensl, ið kemur út í firðir við alivinnu, verður veitt út á streymasjógv ella verður gjørt óskaðiligt á annað hátt.

Viðmerkingar:

Til fyri fáum árum síðani kundi sigast um føroyingar sum heild, at teir sóu ljóst upp á framtíðina, hvat ið vinnumøguleikum viðvíkti. Tað hómaðust altíð nýggir, óroyndir møguleikar fyri framman, sum kundu geva øktar inntøkur til at gjalda tær hækkandi samfelagsútreiðslurnar við.

Einaferð var loysnin meira nútímans og meira effektiv fiskiskip meiri fiskur gav meiri pening.

So var tað fiskur á djúpum vatni.

Síðani var tað rækjurnar, jákupsskeljarnar og svartkjafturin o.s.fr.

Tey flestu munnu í dag vera á einum máli um, at mark er fyri, hvussu nógv størri meirivinningur kann fáast á hesum økjum, enn vit higartil hava fingið.

Samfelagsútreiðslurnar vaksa alsamt, men nú gerst alt verri at hóma nakra eyðsædda keldu til at økja inntøkurnar við — burtursæð frá oljuni í undirgrundini, (men tað er ein heilt onnur søga) og so alivinnuni.

Tey flestu munnu vera á einum máli um, at vit innan alivinnuna eru komin sera stutt enn, og at liggja stórir, ónýttir møguleikar fyri framman til at økja munandi um framleiðsluna.

Tað, sum mest darvar og hóttir hesa vinnuna, eru fiskasjúkurnar og dálkingin.

Dálkingin er størst á teimum bestu aliøkjunum: Sundalagnum, Skálafjørðinum, Kalbaksfirði og á øðrum av teimum longu fiðinum, serliga teimum, ið hava sokallaða gátt fyri. Tess meira, ið bygt verður av sethúsum, verksmiðjum og ídnaðarfyritøkum, tess hættisligari verður dálkingin.

Tað er eingin ivi um, at henda dálkingin fer at økjast komandi árini orsakað av størri nýtslu av kemiskum evnum, genspleysaðum vaskievnum o.t.

Spurningurin um at gera rørleiðingar á onkran hátt fram við hesar firðir og út á streymsjógv fer at gerast aktuellur, áðrenn langt um líður.

Nógv ivamál fara at taka seg upp í hesum sambandi, m.a.: Hvussu skal hetta gerast? Í hvønn mun skulu kommunurnar, landið, virkini vera uppií? Er tað í heila tikið neyðugt at gera hetta? Hjálpir tað nakað? o.s.fr.

Ætlanin við hesum uppskoti er at heita á landsstýrið um at skipa fyri, at spurningurin um at gera rørleiðingar ella aðrar fyriskipanir at halda firðir og sund frí fyri dálking, verður kannaður, so at vit kunnu tryggja, at alivinnan kann menna seg til ta høvuðsvinnu, sum hon hevur líkindi til at gerast.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1988 beint í umhvørvisnevndina.

Endamálið við uppskotinum er at áleggja landsstýrinum at kanna møguleikarnar fyri, at umhvørvisliga skaðiligt frárensl í firðir við alivinnu verður veitt út á streymasjógv.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Jóannes Dalsgaard, Hans J. Debes, Øssur av Steinum) vísir í fyrstu atløgu til MARPOL-konventiónina og í aðru atløgu til la umhvørvislóg, ið væntandi verður samtykt í hesi tingsetu. Bæði konventión og lóg áleggja myndugleikunum at forða dálking av firðum.

Meirilutin heldur tí uppskot Sambandsfloksins verður óneyðugt, hóast tað snýr seg um eitt týdningarmikið mál. Meirilutin setir tí einki uppskot fram.

Ein minniluti (Jóhs. M. Olsen) tekur undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Ein annar minniluti (Anfinn Kallsberg) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 5. mai. Uppskotið fall við 13-0 atkvøðum.

125 Minstaløn til fiskivinnuna.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Atli Þ. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn til fiskivinnuna við seinni broytingum.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn til fiskerierhvervet med senere ændringer.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 48 frá 28. mai 1984 við seinni broytingum verður § 2 broytt til:

»Treytin fyri, at sjómanni er tryggjað minsta løn er:

1) Við føroyskum fiskiførum, sum eru yvir 100 bruttotons og fiska uttan fyri føroysku landleiðina:
   At hann er mynstraður eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag.
   Er eingin tílíkur sáttmáli, er treytin fyri minstuløn at mynstrað er eftir sáttmála millum viðkomandi reiðara ella skipaeigara og viðkomandi yrkisfelag.
2) Við fiskiførum undir 100 bruttotons á útróðri á føroysku landleiðini:
   At fiskifarið hevur avreitt, og at manningin verður avroknað og í tali er sum vanligt er á staðnum, og at fiskifarið í minsta lagi hevur havt 18 útróðrardagar 3 teir seinastu mánaðirnar.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 48 af 28. maj 1984 med senere ændringer bliver 4 2 ændret til:

»Betingelser for at en sømand er sikret mindsteløn er:

1) Med færøske fiskefartøjer over 100 bruttotons og fartøjer, som fisker uden for det færøske fiskeriterritorium:
   At han er påmønstret efter aftale mellem Føroya Reiðarafelag og vedkommende fagforening. Såfremt sådan en overenskomst ikke foreligger, er mindstelønnen betinget af, at der er mønstret efter aftale mellem vedkommende reder eller ejer af fartøjet og vedkommende fagforening
2) Med fiskefartøjer under 100 bruttotons, som fisker på færøsk fiskeriterritorium:
   At fiskefartøjet har indhandlet, og at mandskabet bliver afregnet og i øvrigt i antal er som det er sædvanligt på stedet, og at fiskefartøjet i det mindste har haft 18 fangstdage de sidste 3 måneder.

§ 2.

§ 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:

»Minstaløn**in** er pr. 1. apríl 1988 12.200 kr. um mánaðin, hvør veiðuferð verður roknað fyri seg. Minstaløn**in** verður hækkað ella lækkað við 105 kr. um mánaðin fyri hvørji 3 stig prístalið fer upp ella niður (1.1.1983=100). Fellur prístalið niður um 100, verður eingin prístalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum. Fyri fiskifør undir 100 bruttotons, sum fiska á føroysku landleiðini, verður uppgerð send Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna fyri hvønn mánaða sær, og fyri hesi før er minstaløn**in** fyri hvønn útróðrardag 1/30 av minstuløn**ini** um mánaðin, tó so at fyri útróður við vanligari línu verður 1 útróðrardagur lagdur aftrat fyri hvørja veiðuferð. Minstaløn**in** verður ikki skerd av manningarstudningi eftir løgtingslóg nr. 31 frá 29. mai 1985«.

Stk. 2. Sum nýtt stk. 3 í § 3 verður sett:

»Lønjavningargrunninum verður heimilað at útvega neyðugar upplýsingar til fyrisiting av studlinum eftir stk. 1 og 2, og avvarðandi vinnufelag/fólk, fiskavirkir og stovnar hava skyldu at lata neyðugt prógtilfar í samband við útinningina av hesum stuðulsreglum.«

§ 3.

§ 4, stk. 1, 2, 4 og 5 ganga út.

§ 2.

§ 3, stk. 1 bliver formuleret således:

»Minstelønnen er pr. 1. april 1988 12.200 kr. om måneden, hver fisketur afregnet for sig. Mindstelønnen bliver forhøjet eller nedsat med 105 kr. hver gang pristallet stiger eller falder med 3 point (1.1.1983 = 100). Falder pristallet ned under 100 points, finder ingen pristalsregulering sted. Pristalsreguleringen finder sted hvert kvatal efter pristallet den 1. i kvatalet. For skibe under 100 bruttotons, som fisker på færøsk fiskeriterritorium, indsendes opgørelse over hver måned for sig og for disse fartøjer er mindstelønnen for hver fangstdag 1/30 af den månedlige mindsteløn, for fiskeri med almindelig langline bliver der dog for hver fisketur lagt en fangstdag til. Mindstelønnen reduceres ikke af mandskabstilskudene ifølge lagtingslov nr. 31 af 29. maj 1985.«

Stk. 2. Som nyt stk. 3 i § 3 sættes:

»Lønjavningargrunnurin har hjemmel til at tilvejebringe de nødvendige oplysninger til adminstration af støtten efter stk. 1 og 2, vedkommende fagforening, personer, fiskevirksomheder og institutioner har pligt til at udlevere nødvendigt bevismateriale i denne forbindelse.«

§ 3.

§ 4, stk. 1, 2, 4 og 5 udgår.

§ 4.

Henda lóg fær gidli frá 1. apríl 1988. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 51 frá 28. mai 1984 um minstuløn til útróðrarmenn.

§ 4.

Denne lov træder i kraft 1. april 1988. Samtidig træder ud af kraft lagtingslog nr. 51 af 28. maj 1984 om mindsteløn til hjemmefiskere.

Viðmerkingar:

Tær broytingar, sum verða skotnar upp í løgtingslóg um minstuløn hava til endamáls at:

1. Hækka minstuløninа frá 11.000 kr. til 12.200kr. í samljóð við tær hækkingar, sum hava verið í lønunum á arbeiðsmarknaðinum yvirhøvur.
2. Greitt at áseta, hvørjar treytirnar eru fyri at fáa minstuløn og á henda hátt at tryggja, at allir fiskimenn, sum hava fiskiskap sum vinnu, koma undir skipanina.
3. At skipa so fyri, at allir fiskimenn, sum reka vinnuligan fiskiskap, sama hvussu stórt fiskifarið, teir eru við, er, fáa somu sømdir.

Til hetta endamál verður fiskiflotin býttur upp í tveir partar:

a) Fiskifør oman fyri 100 tons og fiskifør, sum fiska uttan fyri føroysku landleiðina. Hesi skipini mynstra og minstalønarskipanin verður, sum hon hevur verið. Uppgjørt verður fyri hvønn túr sær.
b) Fiskifør undir 100 tons, sum fiska á føroysku landleiðini. Hesi før mynstra ikki og her verða ávísar treytir settar fyri, at sjómenn við hesum skipum koma undir minstuløn. Serliga er at nevna, at kravt verður, at fyri at sjómaður skal koma undir minstuløn, skal fiskifarið, hann er við, sama hvør støddin er, hava verið til fiskiskap 18 dagar seinastu 3 mánaðirnar. Av tí at ikki mynstrað verður, er avreiðingarseðilin við váttan frá vrakarastovninum prógv um, at maður hevur verið við, og hvussu nógvar dagar hann hevur verið við. Uppgjørt verður einaferð um mánaðin.

Við hesum uppskoti hvørvir minstiforvinningurin. Í staðin fáa sjómenn við teimum smærru fiskiførunum 1/30 av mánaðarminstuløninі fyri hvønn útróðardag. Hetta merkir eina stóra afturgongd, sammett við minstavinningin, fyri teir línubátar, sum rógva út dag um dag. Fyri at viga upp ímóti hesum, og tí tað má metast, at ein útróðrardagur við línu er at sammeta við tveir fiski dagar, verður skotið upp, at fiskifør undir 100 tons, sum rógva út við vanligari línu, fyri hvønn túr fáa minstuløn fyri ein dag eyka.

Samanumtikið verður mett, at henda broyting í lógini ger skipanina lætt-

ari at umsita og meira einsháttaða fyri allar fiskimenn, sama hvørjum fari teir eru við, og at trygdin kemur teimum, sum liva av fiskivinnuni burturav, til góðar. Somuleiðis verður mett, at lættari verður at sleppa undan misnýtslu.

1. viðgerð 19. apríl. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 19. apríl 1988 beint í fiskivinnunevndina.

Uppskotið miðar ímóti:

a) at hækka minstuløthings frá kr. 11.000 til kr. 12.200 samsvarandi teimum hækkingum, ið gjørdar eru á arbeiðsmarknaðinum yvirhøvur.

b) at áseta greitt, hvørjar treytirnar eru fyri at fáa minstuløn og soleiðis tryggja, at allir fiskimenn, sum reka vinnuligan fiskiskap, koma undir skipanina og

c) at skipa so fyri, at allir fiskimenn, sum reka vinnuligan fiskiskap, fáa somu sømdir.

Eftir hesum uppskoti verður fiskiflotin býttur upp í tveir partar. Annar parturin umfatar fiskifør, ið eru omanfyri 100 tons, sum fiska uttan fyri føroysku landleiðina. Hesi skip skulu mynstra, og minstaløthings skipan verður, sum hon hevur verið. Uppgjørt verður fyri hvønn túr sær.

Hin parturin umfatar fiskifør undir 100 tons, sum fiska á føroysku landleiðini. Hesi før mynstra ikki og her verða ávísar treytir settar fyri, at sjómenn við hesum skipum koma undir minstuløn.

Kravt verður, at fyri, at sjómaður skal koma undir minstuløn, skal fiskifarið hann er við, sama hvør støddin er, hava verið til fiskiskap 18 dagar seinastu 3 mánaðirnar. Av tí at ikki mynstrað verður, er avreiðingarseðilin við váttan frá vrakarastovninum prógv um, at maður hevur verið við, og hvussu nógvar dagar hann hevur verið við. Uppgjørt verður einaferð um mánaðin.

Sagt verður í viðmerkinginum, at við hesum uppskoti hvørvur minstiforvinningur. Í staðin fáa sjómenn við teimum smærru fiskiførunum 1/30 av mánaðarløninni fyri hvønn útróðrardag.

Tá talan er um línubátar av nevndu støddd, verður veitt teimum fyri hvønn dag, teir fáa minstuløn, ein dag eyka.

Landsstýrið heldur hesa broyting í lógini gera skipanina lættari at umsita og meira einsháttaða fyri allar fiskimenn, og at trygdin hjá teimum, sum liva av fiskivinnuni burturav gerst betur.

Í samband við hetta tingmál er skriv komið frá Meginfelag Útróðarmanna, ið varð beint í fiskivinnunevndina. Meginfelagið hevur í fiskivinnunevndini borið síni sjónarmið fram um hetta mál.

Felagið ynskir, at reglan um minstaforvinning verður varðveitt, tí felagið heldur hesa skipan hava riggað rættiliga væl, og bert við nøkrum heilt smærri broytingum gerst skipanin góð.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið og tekur undir við tí partinum av uppskoti landsstýrisins, har mælt verður til at hækka minstuløunina úr kr. 11.000 upp í kr. 12.200.

Viðmerkjast skal, at minstalønin er útroknað eftir vanligari tímaløn, sum er gjørd um til mánaðarløn. Ein vanligur mánaður er 21 arbeiðsdagar. Heitt verður á landsstýrið um at kanna møguleikarnar fyri at gera eina minstuløn arskipan, har fiski-/útróðrarmaður fær fulla mánaðarløn, sum hann hevur 21 sjódagar sambært mynstring/Fl-seðlum, tó soleiðis at tær kr. 12.200 framvegis eru minstaløn fyri 30 dagar, havandi í huga, at tilt er hjá t.d. línu- ella trolskipi, at fáa meiri enn 21-25 sjódagar innan 30 samanhangandi dagar. Í veruleikanum er minstalønin fyri hesi og onnur skip ikki meira enn 8-9.000 kr. um mánaðin.

Nevndin tekur ikki undir við tí parti av uppskotinum, har sagt verður, at treytin fyri, at sjómanni er tryggjað minstuløn, er m.a. hon, at fiskifarið í minsta lagi hevur havt 18 útróðrardagar 3 teir seinastu mánaðirnar.

Nevndin mælir til at varðveita skipanina við minstaforvinningi, tó soleiðis at fyri at koma undir hesa minstuforvinningarskipan, skulu 50% av ársinntøkuni stava frá fiskivinnuni, og verður hetta at galda fyri fiskifør upp til 20 tons. Nevndin heldur, at treyt fyri at fáa minstaforvinning má verða, at øll veiðan frá einum veiðidegi verður avreidd samstundis ella í einum sama degi ella, um farið verður um midnátt, tá næsti dagur íroknaður. Somuleiðis heldur nevndin, at undir serligum umstøðum kann landsstýrið víkja frá kravinum um 50%.

Út frá hesum setur fiskivinnunevndin fram soljóðandi:

l b r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 1, pkt. 2 verður orðingin: »og at fiskifarið í minsta lagi hevur havt 18 útróðrardagar teir seinastu 3 mánaðirnar« strikað.
2) § 2 verður orðað soleiðis:
»§ 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:

1) I § 1, pkt. 2, udgår ordene: »og at fiskerfartøjer i det mindste har haft 18 fangstdage de sidste tre måneder.«
2) § 2 formuleres således
»§ 3, stk. 1 formuleres således:

»Minstaløn er pr. 1. apríl 1988 12.200 kr. um mánaðin, hvør veiðuferð verður roknað fyri seg. Minstaløn verður hækkað ella lækkað við 105 kr. um mánaðin fyri hvørji 3 stig, prístalið fer upp ella niður (1.1.1983=100). Fellur prístalið niður um 100, verður eingin prístalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum. Minstaløn verður ikki skerd av manningarstuðningi eftir løgtingslóg nr. 31. frá 29. mai 1985.

Stk. 2. Sum nýtt stk. 3 í § 3 verður sett:

»Lønjavningargrunninum verður heimilað at útvega neyðugar upplýsingar til fyrisiting av stuðulinum eftir stk. 1 og 2, og avvarðandi vinnufelag/fólk, fiskavirkir og stovnar hava skyldu at lata neyðugt prógvtilfar í samband við útinningina av hesum stuðulsreglum.«

3) § 3 gongur út.

»Mindstelønnen er pr. 1. april 1988 12.200 kr. om måneden, hver fisketur beregnet for sig. Mindstelønnen stiger eller falder med 105 kr. om måneden for 3 point pristallet stiger eller falder (1.1.1983=100). Falder pristallet ned under 100, finder ingen pristalsregulering sted. Dyrtidsreguleringen finder sted hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet. Mindstelønnen reduceres ikke af mandskabstilskudene i henhold til lagtingslov nr. 31. af 29. maj 1985.«

Stk. 2. Som nyt stk. 3 i § 3 indsættes:

»Lønjavningargrunnurin har hjemmel til at tilvejebringe de nødvendige oplysninger til administration af støtten efter stk. 1 og 2, vedkommende fagforening, personer, fiske virksomheder og institutioner har pligt til at udlevere unødvendigt bevismateriale i denne forbindelse.«

3) § 3 udgår.

II Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

Í løgtingslóg nr. 48 frá 28. mai 1984 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður gjørd hendan broyting:

§ 4, stk. 2 verður orðað soleiðis:

»Treytin fyri at koma undir hesa skipan er

I lagtingslov nr. 48 af 28. maj 1984 om mindsteløn og anden støtte til fiskeriet foretages følgende ændring:

§ 4, stk. 2 formuleres således:

»Betingelsen for at komme under denne ordning er:

1) at viðkomandi persónur hevur havt mindst 50% av skattainntøku síni stavandi frá fiskivinnu frá árinum frammanundan. Landsstýrið kann geva undantaksloyvi í serligum førum. Hendan reglan er bert galdandi fyri manningar á veiðiførum upp til 20 bruttotons.
2) at øll veiða fyri ein veiðidag verður avreidd undir einum.
3) Landsstýrið kann loyva frávik frá kravinum um 50% sum nevnd undir pkt. 1 undir serligum umstøðum.

1) at vedkommende person har haft mindst 50% af sin skatteindtægt hidrørende fra fiskeri året i forvejen. I særlige tilfælde kan landsstyret dispensere. Denne regel gælder kun for mandskaber på fangstfartøjer på op til 20 tons brutto.
2) at hele fangsten for en dag indhandles på een gang,
3) landsstyret kan dispensere fra kravet om 50% som specificeret under pkt. 1, når særlige omstændigheder foreligger.

2. viðgerð 6. mai. Broytingaruppskot frá fiskivinnunevndini I, pkt. 1-3 samtykt við 29-0, løgtingslóg um broyting í § 4, 2. stk. samtykt við 25-0. Broyting til § 4 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 29-0. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 29-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3 viðgerð varð samtykt við 28-0.

3. viðgerð 7. mai. Málið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1539-2-1. Lógirnar nr. 32 frá 3. juni 1988 og 40 frá 20 mai 1988.

126 Løgtingslóg um ráfiskagrunn.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ráfiskagrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 15 frá 5. mai 1975 verða gjørdar hesar broytingar:

1. Sum nýggj § 1, stk. 4 verður sett:
   »Í hesi lóg merkir:
   »Fiskavirki«: Virki, sum virka fisk til útflutnings og eru løggild sambært løgtingslóg nr. 41 frá 22. januar 1972.
   »Feskur fiskur«:
   Óvirkaður fiskur, t.e. ókruvdur, kruvdur ella avhøvdaður fiskur, sama hvussu hann er goymdur.
   »Føroyski fiskiflotin«:
   Fiskifør, sum hava manning, sum sambært løgtingslóg nr. 48 frá 28. mai 1984 um minstuløn v.m. hevur rætt til stuðul úr Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.«
2. Í staðin fyri § 4, stk. 2 og 3 verður sett:
   »*Stk. 2.* Grundað á upplýsingar frá fiskaútflytarum um søluprísir v.m. og metan av framleiðsluútreiðslum, sølukostnaði og skiftisavlopi, útroknar nevndin avrokningarprísin millum fiskavirki og grunnin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om råfiskefond.

§ 1.

I lagtingslov nr. 15 af 15. maj 1975 foretages følgende ændringer:

1. Som ny § 1, stk. 4 sættes:
   »I denne lov betyder:
   »Fiskevirksomheder«:
   Virksomheder, som forarbejder fisk til eksport og som er autoriseret ifølge lagtingslov nr. 41 af 22. januar 1972.
   »Fersk fisk«: Uforarbejdet fisk, d.v.s. urenset, renset eller hoved kappet, uden hensyn til opbevaringsmetode.
   »Færøsk fiskefløde«:
   Fiskefartøjer, der har mandskab, som efter lagtingslov nr. 48 af 28. maj 1984 om mindsteløn m.m. har ret til støtte fra Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna.«
2. I stedet for § 4, stk. 2 og 3 indsættes:
   »*Stk. 2.* Med basis i oplysninger fra fiskeeksportører om salgspriser m.v. og skøn over produktionsomkostninger og dækningsbidrag udregner udvalget afregningsprisen mellem virksomheder og fondet.

Stk. 3. regluliga og í mindsta lagi 14. hvønn dag verða ásettir avrokningarprísir, grundaðir á ein av nevndini ásettan prosentpart av marknaðarvirðinum á tí fiskavøru, sum liggur til grund fyri ásetan av avrokningarprísi fyri tí einstaka fiskaslagnum og/ella støddarskiljinginí. Hesin prosentpartur verður grundaður á tær í stk. 2 nevndu upplýsingar.«

Stk. 3. Regelmæssigt og mindst hver 14. dag fastsættes afregningspriser, baseret på en af udvalget fastsat prosentdel af markedsværdien af den fiskevare, der danner grundlag for fastsættelse af afregningsprisen for den enkelte fiskeart eller størrelsesgruppe. Denne prosentdel bygge på de i stk. 2 nævnte oplysninger.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Nógv orðaskifti hevur verið um fiskaprísirnar seinastu árini. Víst hevur verið á, at núverandi prísásetingarskipanin (løgtingslóg nr. 15, 5. mai 1975, við seinni broytingum) er ov stirvin og tarnar menning innan framleiðslu av nýggjum fiskavørum við hægri virði og er ov lítið eggjandi fyri sølufyritøkunar til at útvega hægri prísir. Niðurstøðan á fiskivinnutinginum 1986 kann stutt samanfatast á henda hátt: Virkini skulu stimbrast til at fáa mest burtur úr og virka undir vanligum búskaparligum treytum, og tey skulu fáa vinning eftir arbeiðsdygd og -orku. Somuleiðis eiga prísskipanirnar at eggja sølufyritøkunum til størst møguligt virksemi.

Semja ræður yvirhøvur um, at neyðugt er at taka burtur nakrar av teimum forðingum, sum eru fyri at vinnan sjálv kann nýta allar møguleikar og økja um virðið úr tí avmarkaða rávørugrundarlagnum, vit mugu læra at liva við, og sum frá líður sleppa burtur úr tí studningsstøðu, hon er í.

Ósemja kann vera um, hvussu langt tað er møguligt at fara við fríari prísskipan í Føroyum. Í Íslandi verður í løtuni roynt at skipa uppboðssølur, hæði sum tær eru á meginlandinum og uppboðsskipan, har skipini selja veiðuna á feltinum og síðani sigla hana, har hon er keypt.

Frí kapping kann hava fylgjur fyri útjaðaraflakavirki og mugu tey tí verjast við serligum tiltøkum, men hetta noyðist ikki at tarna einari fríari prísskipan.

Mett verður, at umstøðurnar, ið hvussu so er ikki enn, eru til at hava púra fría prískapping um feskfisk í Føroyum. Neyðugt er í hvussu so er at áseta ein

minstaprís. Omanfyri tað er tað frítt at keypa fisk fyri ein og hvønn prís

Í høvuðsheitum er uppskotið annars hetta:

Í § 1 verður sett inn í nýtt stk. 4, lýsing av heitum, sum eru nýtt í lógini. Hetta verður gjørt, ti ivamál hava verið í seinastuni um, hvat kemur undir lógina. Umframt at lýsa, hvør fiskur kemur undir lógina, verður við hesum ásett, at rætt til studning úr ráfiskagrunninum hava bert vinnuligir fiskimenn, t.e. fiskimenn, sum uppfylla treytirnar at fáa minstuløn v.m.

Í § 4 fer tað pettið, sum varð sett inn í lógina í 1983, um at nevndin í prisásetingini skal hava í huga støðuna í fiskastovnunum, tikið burturúr. Hetta varð í 1985 lagt til nevndina fyri studningi til fiskivinnuna, løgtingslóg nr. 31 frá 29. mai 1985, og tað hóskar ikki væl, at hetta verður umsitið av tveimum ymiskum nevndum. Í staðin verður sett nýtt stk. 3, sum gevur nevndini fyri ráfiskagrunnin heimild at nýta ein prosentpart av søluvirðinum til virki og sølulið í staðin fyri nú fasta oyragjaldið.

Ein nevnd hevur arbeitt við øðrum møguleikum at broyta ráfiskaprísásetingina, men hevur ikki verið møguligt at koma fram til eitt uppskot, sum øðrumegin vinnan sjálv heldur vera eitt framstig og sum hinumegin kann umsitast á ein smidligan hátt.

Mett verður, at uppskotna lógarbroytingin gevur eitt meira rættvist býti av fyrimunum og byrðum millum tey ymisku liðini í fiskivinnuni og gevur eitt betri tamarhald á tí, sum fer inn í og út úr ráfiskagrunninum.

1. viðgerð 19. apríl. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 19. apríl 1988 beint í fiskivinnunevndina.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur landsstýrið m.a., at núverandi prísásetingarskipan verður hildin at vera ov stirvin og tarnar menning innan framleiðslu av nýggjum fiskavørum við hægri virði, samstundis sum hildið verður, at skipanin er ov lítið eggjandi fyri sølufyritøkurnar til at útvega hægri prísir.

Víst verður á ta niðurstøðu, fiskivinnutingið í 1986 kom til, sum í stuttum var tann, at virkini skulu stimbrast til at fáa mest burturúr og virka undir vanligum búskapurligum treytum, og at tey skulu fáa vinning eftir arbeiðsdygd og orku. Somuleiðis eiga prísskipanirnar at eggja sølufyritøkunum til størst møguligt virksemi.

Eftir hesum uppskoti verður lógin um ráfiskagrunnin broytt soleiðis, at vinnan sjálv kann nýta allar møguleikar og økja um virðið úr tí avmarkaða råvørugrundarlagnum. Somuleiðis verða møguleikar skaptir fyri einari fríari kapping um feskfiskin í Føroyum. Í hesum sambandi leggur landsstýrið dent á, at útjaðaravirkini verða vard við serligum tiltøkum, soleiðis at tey ikki verða við skerdan lut.

Eftir uppskotinum fær nevndin fyri ráfiskagrunnin heimild at nýta ein prosentpart av søluvirðinum til virki og sølulið í staðin fyri sum nú við einum føstum oyragjaldi.

Hildið verður, at uppskotna lógarbroyting gevur eitt rættvísari býti av fyrimunum og byrðum millum tey ymisku liðini í fiskivinnuni, og gevur eitt betri tamarhald á tí, sum fer inn og út úr ráfiskagrunninum.

Í samband við viðgerðina av hesum uppskoti hevur fiskivinnunevndin fingið skriv frá Føroya Reiðarafelag og frá Føroya Ráfiskakeyparafelag. Reiðarafelagið tekur undir við, at núverandi skipan eigur at endurskoðast, men heldur, at vinnan í felag átti at komið við einum uppskoti, sum stimbrar øllum at fáa sum mest burturúr.

Ráfiskafelagið heldur somuleiðis, at vinnan skuldi verið við til at gjørt eitt slíkt uppskot, um tað varð hildið neyðugt við broytingum.

Fiskivinnunevndin, ið hevur viðgjørt málið, hevur býtt seg í ein meirilutа og tveir minnilutar.

Meirilutin (Signar Hansen, Tórálvur M. Olsen, Hilmar Kass og Adolf V. Hansen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, og mælir løgtinginum til at samtykkja tað. Samstundis biður fiskivinnunevndin um at prísútroknингar, avroknингar og avreiðingarprísir verða lagdir fyri fiskivinnunevndina til kunningar.

Minnilutin (Olaf Olsen, Anfinn Kallsberg og Eilif Samuelsen) førir fram: Minnilutin kann ikki taka undir við landsstýrisuppskotinum. Fyri tað fyrsta, so stendur als einki í landsstýrisuppskotinum um, hvørja økonomiska ávirkan hetta hevur á virkini. Har stendur bert, at nevndin skal áseta ein prosentpart. Tað eru mong fiskavirkir í dag, sum ikki hava ráð at lata nakað sum helst burtur av sínum skiftisavlopi til nakran annan. Skal so eisini javnast millum tey ymisku flakavirkini, sum umtalað í viðmerkingunum, so sæst lítið til tað fyrimi kappingina.

Á fiskivinnutinginum, sum sipað verður til, var talan um, at henda skipan skal føra við sær, at hon kemur veiðiliðinum til góðar. Hetta sæst illa eftir hesum uppskoti, tí avroknингarprísurin skal ásetast 14. hvønn dag, meðan avreiðingar-

prísurin vanliga verður settur 4. hvønn mánaða, og hvør veit, um nakað verður sagt veiðiliðinum til góðar.

Eisini var frammi á fiskivinnutinginum, at tá ið prísurin gekk upp, so skuldi tað koma framleiðsluniliðinum til góðar, men í uppskotinum verður einki sagt um tað.

Lógaruppskotið gevur so stórar heimildir til at gripa inn í raksturin hjá vinnuni, at minnilutin kann ikki taka undir við tí. Tað einasta, sum hann kann taka undir við, er definitiónin uppá, hvat »feskur fiskur« er í samband við stuðulslóggávuna.

2. viðgerð 6. mai. § 1 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 17-0, § 2 við 17-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 17-0.

3. viðgerð 7. mai. Málið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 36 frá 20. mai 1988.

127 Løgtingslóg um studning til fiskivinnuna.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Atli Í. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um studning til fiskivinnuna.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 31 frá 29. mai 1985 verða gjørdar hesar broytingar:

1. Sum nýtt § 1, 2. stk. verður sett:
   »2. stk. Í hesi lóg merkir:
   »Føroysk fiskiskip«:
   Fiskifør sum hava manning, sum sambært løgtingslóg nr. 48 frá 28. mai 1984 um minstuløn v.m. hevur rætt til stuðul úr Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.«

lagtingslov om støtte til fiskeriindustrien.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 31 fra 29. mai 1985 foretages følgende ændringer:

1. Som nyt § 1, stk. 2 sættes:
   »Stk. 2. I denne lov betyder:
   »Færøske fiskeskibe«
   Fiskefartøjer, der har mandskab, som efter lagtingslov nr. 48 af 28. maj 1984 har ret til støtte på Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.«

Viðmerkingar:

Henda broyting verður gjørd fyri á sama hátt, sum í løgtingslóg nr. 48 um minstuløn til fiskivinnuna frá 28. mai 1994 og løgtingslóg nr. 15 frá 5. mai 1975 um ráfiskagrunn, at greina, at lógin fevnir um fiskimenn, sum reka vinnuligan fiskiskap.

1. viðgerð 19. apríl. Málið varð beint í fiskivinnunevndina og ikki aftur komið haðani.

128 8-ára ætlan fyri útbygging av havnunum.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Lasse Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg

um

8-ára ætlan fyri umbygging av havnunum.

8-årsplan for ombygning af havnene.

§ 1. Úr landskassanum verður veittur studningur til útbyggingar av havnunum í niðanfyri nevndu kommunum, soleiðis at studningurin verður til støddar í prosentum av byggipeningunum sum niðanfyri nevnt, tó í mesta lagi hesir sonu prosentpartar av niðanfyri tilskilaðu upphæddum (jvbr. tó § 2) og rindaður við eins stórum ársgjøldum í 8 fylgjandi fíggjarárum frá og við fíggjarárinum 1988 at rokna:

§ 1. Af landskassen ydes tilskud til udbygning af havnene i nedenfor anførte kommuner, således at tilskudet andrager nedenfor anførte procentdel af anlægsudgifterne, dog højst samme procentdel af nedenfor angivne beløb (jvfr. dog § 2), og udredes med lige store årsrater i 8 på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1988 at regne:

Kommuna	**%**	**kr.**
Hvannasunds/		
Viðareiðis	65	6.000.000
Klaksvík	65	35.000.000
Oyndafjarðar	70	4.000.000
Fuglafjarðar	65	25.000.000
Leirvíkar	65	15.000.000
Gøtu	65	15.000.000
Runavíkar	65	25.000.000
Nes	65	15.000.000
Skála	65	15.000.000
Sjóvar	65	15.000.000
Sunda	70	7.000.000
Eiðis	65	15.000.000
Haldarsvíkar	70	10.000.000
Hvalvíkar	70	10.000.000
Hósvíkar	70	6.000.000
Koilafjarðar	65	15.000.000
Vestmanna	65	20.000.000
At flyta		253.000.000

Kommune	**%**	**kr.**
Hvannasunds/		
Viðareiðis	65	6.000.000
Klaksvik	65	35.000.000
Oyndafjarðar	70	4.000.000
Fuglafjarðar	65	25.000.000
Leirvíkar	65	15.000.000
Gøtu	65	15.000.000
Runavíkar	65	25.000.000
Nes	65	15.000.000
Skála	65	15.000.000
Sjóvar	65	15.000.000
Sunda	70	7.000.000
Eiðis	65	15.000.000
Haldarsvíkar	70	10.000.000
Hvalvíkar	70	10.000.000
Hósvíkar	70	6.000.000
Kollafjarðar	65	15.000.000
Vestmanna	65	20.000.000
Transp		253.000.000

Flutt	253.000.000	Transp.	253.000.000
Tórshavnar 55	45.000.000	Tórshavnar 55	45.000.000
Nólsoyar 70	8.000.000	Nólsoyar 70	8.000.000
Miðvágs/ Sandavágs 65	20.000.000	Miðvágs/ Sandavágs 65	20.000.000
Miðvágs 65	7.000.000	Miðvágs 65	7.000.000
Sørvágs 65	15.000.000	Sørvágs 65	15.000.000
Sands 65	30.000.000	Sands 65	30.000.000
Skopunar 65	25.000.000	Skopunar 65	25.000.000
Skálavíkar 70	25.000.000	Skálavíkar 70	25.000.000
Hvalbiar 65	15.000.000	Hvalbiar 65	15.000.000
Tvøroyrar 65	20.000.000	Tvøroyrar 65	20.000.000
Porkeris 70	5.000.000	Porkeris 70	5.000.000
Vágs 65	35.000.000	Vágs 65	35.000.000
Sumbiar 65	5.000.000	Sumbiar 65	5.000.000
Tilsamans	508.000.000	Ialt	508.000.000

§ 2. Eingin studningur verður goldin ella bundin til gjaldingar, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi sett í samband við góðkenning av byggiætlan, eru loknar.

§ 2. Intet tilskud bliver udbetalt eller stillet som sikkerhed, førend samtlige betingelser, landsstyret måtte stille i forbindelse med en godkendelse af udbygningsplanen, er opfyldt.

§ 3. Landsstýrinum verður heimilað at veðhalda fyri lánum, kommunurnar mega taka í sambandi við fremjing av útbyggingunum sambært hesi løgtingslóg.

§ 3. Landsstyret bemyndiges til at garantere for de lån, kommunerne måtte optage i forbindelse med udbygningerne i henhold til denne lagtingslov.

§ 4. Landsstýrinum verður heimilað at prioritera fremjingina av byggingunum sambært hesi 8 ára ætlan fyri at sleppa undan teim samfelagsligu ampum og teim eykaútreiðslum hjá kommununum, sum kunnu standast av, at farið verður undir stóran part av arbeiðum í senn.

§ 4. Landsstyret bemyndiges til at prioritere igangsættelsen af arbejderne i henhold til denne 8 års plan for at undgå de samfundsmæssige gener og de merudgifter for kommunerne, der kan hidrøre fra, at en større del af arbejderne igangsættes samtidig.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 5. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Hjálagt er yvirlit tær havnagerðir, ið liggja til grund fyri hesari havnaætlan.

Tey arbeiði, sum farið verður undir, verða í nógvum førum øðrvísi enn tey, sum upprunaliga vóru havd í huga. Hetta kann hava ymiskar grundir; eitt nú at bygdaráðið, ið skal taka støðu til, hvat játtanin skal brúkast til, ikki er tað sama, sum tað ið var, tá ið havnaætlanin varð gjørd, at sjóvinnan í bygdini hevur verið fyri broytingum, at fíggjarorkan hjá kommununi ikki røkkur til ætlaðu byggingina, o.a.

Tað er tí so, at játtanirnar á havnaætlanunum ikki eru bundnar til ávís projekt, men verða nýttar eftir ti tørvi, ið er til eina og hvørja tíð.

Vónandi verður samfelagið framhaldandi fyri slíkari menning, at tørvur á meira byggiplássi og meira havnaøki eisini verður í framtíðini. Henda havnaætlan verður tí helst ikki tann seinasta.

Sí skjal nr. 20.

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint í Samferðslunevndina, sum legði fram soljóðandi:

Álit

Málið var framlagt av landsstýrinum 17. mars 1988 og við 1. viðgerð tann 12. apríl 1988 beint í samferðslunevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Havnaútbyggingin her á landi er fyri mestapartin farin fram eftir seinna heimsbardaga. Hesi góðu 40 árini, síðan gongd kom á bygging og úthygging av havnum, eru hesar farnar fram eftir fýra ætlanum. Fram til 1978/79 varð bygt eftir trimum 10-ára ætlanum og fram til 1984 eftir einum 6-ára ætlan. Síðan 1984 hava vit onga havnaætlan havt.

Hetta er sostatt fyrsta langtíðar havnaætlanin síðan 6-ára havnaætlanina frá 1978. Eftir 10-ára havnaætlanunum varð kostnaðurin lutaður við 50% til landið, 25% til statin og 25% til kommunurnar, meðan lutfallið eftir 6-ára ætlanini var ávikavist 65, 10 og 25%.

Henda ætlanin er tann fyrsta reint føroyska havnaætlanin, og leggur sostatt lunnar undir hvussu havnaætlanir skulu vera framyvir. Tað verður tí hildið skilagott at vísa varni tá upphæddir og lutføll skulu setast.

Upphæddirnar eru settar til tað, ið mett verður ráðiligt og svara til umleið ein triðing av tí, ið søkt er um. Nevndin heldur tað vera skilabest at varðveita eina serstaka studningsskipan til tær smærru havnirnar, har útbyggingin er fyri neyðini, men har fíggjarorkan hjá kommununi er avmarkað. Hesar havnir hava vanliga fingið 75% av byggipeninginum í studningi frá landinum burturav. Uppskot landsstýrisins er tí býtt í tvinnar ætlanir, eina fyri størri havnir og eina fyri smærri havnir, meðan upphæddir og studningsíkøst eru tey somu. Fyri tær størru havnirnar eru nýtt tvinni lutføll, soleiðis at Tórshavnar kommuna fær 55%, meðan hinar fáa 65%. Tær smærru havnirnar fáa allar 70%.

Undir 1. viðgerð varð m.a. ført fram, at landskassans árligi partur var lítið meira enn 1% av samlaðu fíggjarløgtingslógini. Hetta er rætt, men havast má í huga, at stórar havnaútbyggingar eru framdar, og at vit eru á einum vegamóti viðvíkjandi framtíðar havnastrukturi. Container- og Ro-Ro flutningurin fer helst at hava stóra ávirkan á mynstrið framyvir. Og er tí skilabest ikki at binda ov stórar upphæddir nú.

Til uppskot landsstýrisins setur meirilutin (Asbjørn Joensen, Heini O. Heinesen, Tórálvur M. Olsen, Johs. M. Olsen, Agnar Nielsen og Adolf V. Hansen) fram soljóðandi:

I *Broytingaruppskot*

LØGTINGSLÓG

um

8-ára ætlan fyri útbygging av havnunum.

§ *1.* Úr landskassanum verður veittur studningur til útbyggingar av havnunum í niðanfyri nevndu kommunum, soleiðis at studningurin verður 65%, fyri Tórshavnar kommunu tó 55% av byggipeninginum sum niðanfyri nevnt, tó í mesta lagi hesir somu prosentpartar av niðanfyri tilskilaðu upphæddum (jvfr. tó § 2), og rindaður við eins stórum ársgjøldum í 8 fylgjandi fíggjarárum frá og við fíggjarárinum 1988 at rokna:

8-års plan for udbygning af havnene.

§ *1.* Af landskassen ydes tilskud til udbygning af havnene i nedenfor anførte kommuner, således at tilskuddet andrager 65%, for Tórshavnar kommune dog 55% af anlægsudgifterne, dog højst samme procentdel af nedenfor angivne beløb (jvfr. dog § 2), og udredes med lige store årsrater i 8 på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1988 at regne:

Kommuna	kr.	Kommune	kr.
Klaksvíkar	35.000.000	Klaksvíkar	35.000.000
Fuglafjarðar	25.000.000	Fuglafjarðar	25.000.000
Leirvíkar	15.000.000	Leirvíkar	15.000.000
Gøtu	15.000.000	Gøtu	15.000.000
Runavíkar	25.000.000	Runavíkar	25.000.000
Nes	15.000.000	Nes	15.000.000
Skála	15.000.000	Skála	15.000.000
Sjóvar	15.000.000	Sjóvar	15.000.000
Eiðis	15.000.000	Eiðis	15.000.000
Kollafjarðar	15.000.000	Kollafjarðar	15.000.000
Vestmanna	20.000.000	Vestmanna	20.000.000
Tórshavnar	45.000.000	Tórshavnar	45.000.000
Miðvágs/Sandavágs	20.000.000	Miðvágs/Sandavágs	20.000.000
Miðvágs	7.000.000	Miðvágs	7.000.000
Sørvágs	15.000.000	Sørvágs	15.000.000
Sands	30.000.000	Sands	30.000.000
Skopunar	25.000.000	Skopunar	25.000.000
Hvalbiar	15.000.000	Hvalbiar	15.000.000
Tvøroyrar	20.000.000	Tvøroyrar	20.000.000
Vágs	35.000.000	Vágs	35.000.000
Tilsamans	422.000.000	Ialt	422.000.000

§ 2. Eingin studningur verður goldin ella bundin til gjaldingar, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi sett í sambandi við góðkenning av byggiætlan, eru loknar.

§ 2. Intet tilskud bliver udbetalt eller stillet som sikkerhed, førende samtlige betingelser, landsstyret måtte stille i forbindelse med en godkendelse af udbygningsplanen, er opfyldt.

§ 3. Landsstýrinum verður heimilað at veðhalda fyri lánum, kommunurnar mega taka í sambandi við fremjing av útbyggingunum sambært hesi løgtingslóg.

§ 3. Landsstyret bemyndiges til at garantere for de lån, kommunerne måtte optage i forbindelse med udbygningerne i henhold til denne lagtingslov.

§ 4. Landsstýrinum verður heimilað at prioritera fremjingina av byggingunum sambært hesi 8 ára ætlan fyri at sleppa undan teim samfelagsligu ampum og teim eykaútreiðslum hjá kommununum, sum kunnu standast av, at farið verður undir stóran part av arbeiðum í senn.

§ 4. Landsstyret bemyndiges til at prioritere igangsættelsen af arbejderne i henhold til denne 8 års plan for at undgå de samfundsmæssige gener og de merudgifter for kommunerne, der kan hidrøre fra, at en større del af arbejderne igangsættes samtidig.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 5. Denne lov træder i kraft straks.

II LØGTINGSLÓG

um

8-ára ætlan fyri útbygging av smærri havnum.

§ 1. Úr landskassanum verður veittur studningur til útbyggingar av havnunum í niðanfyri nevndu kommunum, soleiðis at studningurin verður 70% av byggipeninginum, tó í mesta lagi 70% av niðanfyri tilskilaðu upphæddum (jvbr. tó § 2), og rindaður við eins stórum ársgjøldum í 8 fylgjandi fíggjarárum frá og við fíggjarárinum 1988 at rokna:

8-års plan for udbygning af mindre havne.

§ 1. Af landskassen ydes tilskud til udbygning af havnene i nedenfor anførte kommuner, således at tilskuddet andrager 70% af anlægsudgifterne, dog højst 70% af nedenfor angivne beløb (jvfr. dog § 2), og udredes med lige store årsrater i 8 på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1988 at regne:

Kommuna	kr.
Hvannasunds/Viðareiðis	6.000.000
Oyndafjarðar	4.000.000
Sunda	7.000.000
Haldarsvíkar	10.000.000
Hvalvíkar	10.000.000
Hósvíkar	6.000.000
Nólsoyar	8.000.000
Skálavíkar	25.000.000
Porkeris	5.000.000
Sumbiar	5.000.000
Tilsamans	86.000.000

Kommune	kr.
Hvannasunds/Viðareiðis	6.000.000
Oyndarfjarðar	4.000.000
Sunda	7.000.000
Haldarsvíkar	10.000.000
Hvalvíkar	10.000.000
Hósvíkar	6.000.000
Nólsoyar	8.000.000
Skálavíkar	25.000.000
Porkeris	5.000.000
Sumbiar	5.000.000
Ialt	86.000.000

§ 2. Eingin studningur verður goldin ella bundin til gjaldingar, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi sett í sambandi við góðkenning av byggiætlan, eru loknar.

§ 2. Intet tilskud bliver udbetalt eller stillet som sikkerhed, førend samtlige betingelser, landsstyret måtte stille i forbindelse med en godkendelse af udbygningsplanen, er opfyldt.

§ 3. Landsstýrinum verður heimilað at veðhalda fyri lánum, kommununrnar mega taka í sambandi við fremjing av útbyggingunum sambært hesi løgtingslóg.

§ 3. Landsstyret bemyndiges til at garantere for de lån, kommunerne måtte optage i forbindelse med udbygningerne i henhold til denne lagtingslov.

§ 4. Landsstýrinum verður heimilað at prioritera fremjingina av byggingunum sambært hesi 8 ára ætlan fyri at sleppa undan teim samfelagsligu ampum og teim eykaútreiðslum hjá kommununum, sum kunnu standast av, at farið verður undir stóran part av arbeiðum í senn.

§ 4. Landsstyret bemyndiges til at prioritere igangsættelsen af arbejderne i henhold til denne 8 års plan for at undgå de samfundsmæssige gener og de merudgifter for kommunerne, der kan hidrøre fra, at en større del af arbejderne igangsættes samtidig.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 5. Denne lov træder i kraft straks.

Minnilutin (Eyðun Videro) tekur undir við, at havnirnar verða býttar upp í tvær ætlanir, nevniliga eina fyri størri havnir og eina fyri smærri. Munurin, ber er talan um, viðvíkur støddunum á kommununum heldur enn støddunum á havnunum, og verður munurin gjørdur við at smærru kommunurnar fáa størri part goldnan av landskassanum.

Tá talan er um at vísa liggjarligt varsemi, er minnilutin ikki samdur um, at hetta eigur at vera galdandi fyri eina framleiðsluskapandi fløgu sum havnir eins og aðrar fløgur, ið ikki eru framleiðsluskapandi. Minnilutin heldur tí, at hetta átti at verið ein 6 ára ætlan, men út frá tí, ið farið er fram í málinum, setir minnilutin ikki fram broytingaruppskot hesum viðvíkjandi.

Eftir uppskotinum frá landsstýrinum skulu í høvuðsheitunum tær størru kommunurnar fáa í studningi úr landskassanum 65% av kostnaðinum, meðan tær smærru fáa 70%.

Henda mun heldur samgongan vera rímuligan í mun til verru fíggjarorkuna hjá teimum smærru kommununum.

Fólkaflokkurin førdi fram undir fyrstu viðgerð, at tá Føroya Løgting gongur inn fyri at játtast skal peningur til gerð av veruligum havnum í smærru plássunum, so er eisini neyðugt, at játtanin til hesar kommunur er so munagóð, at hesar kunnu fremja gerðina av ætlaðu havnunum.

Minnilutin setir tí uppskot fram broyting í uppskoti II. frá meirilutanum í samferðslunevndini:

I § 1, verður »70%« broytt til »75%«.

Undir fyrstu viðgerð vísti Fólkaflokkurin eisini á, at ynskiligt var við uppískoytisjáttan at javna samsvarandi broytingunum í indeksinum fyri havnabyggingar, og setir minnilutin tí fram uppskot til broyting í uppskoti meirilutans:

Sum nýggj grein 2 verður sett:
»§ 2. Tann parturin av játtanini, sum ikki er arbeitt fyri, tá ið fíggjarár er komið at enda, verður við uppískoytisjáttan á løgtingsfíggjarlógini fyri fylgjandi ár javnaður samsvarandi broytingunum í indeksinum fyri havnabyggingar, sum gjørt er til útrokningar av føroysku tjóðarroknskapunum við føstum prísum sum grundarlag.«

Í uppskoti meirilutans nr. I verða hesar broytingar:

§ 2 verður § 3
§ 3 verður § 4
§ 4 verður § 5
§ 5 verður § 6.

Á sama hátt verður sett fram broytingaruppskot til uppskot II. frá meirilutanum:

»2. Tann parturin av játtanini, sum ikki er arbeitt fyri, tá ið fíggjarár er komið at enda, verður við uppískoytisjáttan á løgtingfíggjarlógini fyri fylgjandi ár javnaður samsvarandi broytingunum í indeksinum fyri havnabyggingar, sum gjørt er til útrokningar av føroysku tjóðarroknskapunum við føstum prísum sum grundarlag.«

Í uppskoti meirilutans nr. II verða hesar broytingar:

§ 2 verður § 3
§ 3 verður § 4
§ 4 verður § 5
§ 5 verður § 6.

Tá fíggjarløgtingslógin fyri 1988 var til viðgerðar í løgtinginum, gjørdi Fólkaflokkurin vart við, at avgerandi neyðugt fyri framburði í samfelagnum var,

at hóskandi játtan var til eina nýggja havnaætlan, og sett varð tí fram uppskot um at játtað varð kr. 40 mill. fyri 1988.

Samstundis setti meirilutin, samgongan, fram uppskot um at seta játtanina til nýggjar havnir í 1988 til 25 mill. kr. Hetta varð gjørt aftan á, at landsverkfrøðingsstovnurin hevði mælt til 42,5 mill., og at landsstýrið hevði skorið hetta niður til 30 mill. kr.

Sostatt er ikki samsvar millum tað framlagda uppskotið frá landsstýrinum, ella tað nú framlagda frá meirihlutanum í nevndini, og tað játtaðu upphæddina á fíggjarlógini.

Sambært uppskot landsstýrisins er partur landskassans fyri fíggjarárið 1988 kr. 41.181.250, meðan játtað er 25 mill. Her er sostatt eitt hall upp á kr. 16.181.250.

Sambært uppskot meirilutans í samferðslunevndini skal játtast fyri 1988 kr. 41.872.500. Her er sostatt talan um eitt hall í 1988 upp á kr. 16.872.500.

Uppskot minnilutans verður samlað upp á kr. 42.350.000.

Uttan mun hvat av omanfyri nevndu uppskotum verður samtykt, so mugu finnast útvegir fyri einum halli á fíggjarløgtingslógini 1988 fyri havnir upp á millum kr. 16.181.250. og kr. 17.350.000.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at koma við uppskoti um peningaútvega, so neyðugur peningur er tøkur til at meirinnýtslu, ið er í løgtingsmál nr. 128/1987 í mun til játtanina á fíggjarløgtingslógini 1988.

Sambært úttalilsi í fjølmiðlunum frá landsstýrismanninum í samferðslumálum, so hevur landsstýrið sett eina sokallaða »Havnaútbyggingarnevnd« at geva landsstýrinum tilmæli viðvíkjandi framtíðar havnaútbyggingum í landinum, men hóast áheitan bæði undir fyrstu viðgerð í løgtinginum og á fundi í nevndini, so hevur minnilutin ikki fingið samtykki frá nevndini um at fáa ein orienterandi

fund við havnaútbyggingarnevndina um teirra metan um tørvinum fyri framhaldandi havnaútbyggingum í landinum.

Minnilutin er tó sannførdur um, at neyðugt er við eini nýggjari havnaætlan og vil tí í aðru syftu mæla til at samtykkja uppskot meirilutans.

2. viðgerð 3. mai. Broytingaruppskot frá minnilutandum (Eyðun Viderø) §§ 1 og 2 fullu ávikavist við 10-0 og 7-0. Uppskotið til samtyktar frá sama fall við 5 0. Broytingaruppskot meirilutans I, § 1 samtykt við 28-0, §§ 2-4 við 29-0, § 5 uttan atkvøðugreiðslu og II, § 1 við 29-0, §§ 2-4 við 30-0, § 5 uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 30-0 atkvøðum.

3. viðgerð 4. mai. Uppskotini soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

Lógirnar nr. 60 og 61 frá 9. juni 1988.

129 Endurskoðan av galdandi tolllóg.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Johannes Martin Olsen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður Føroya Landsstýri at endurskoða galdandi tolllóg við tí endamáli at gera hesa meira smidliga, bæði mótvegis føroyskum vinnufyritøkum og einstaklingum.

Viðmerkingar:

Fyri ikki so langari tíð síðan framdi Føroya Løgting nmmandi broytingar í okkara tolllóggávu.

Ein av hesum broytingum var, at tollur v.m. bleiv roknaður av tí virði, vøran hevur, tá hon kemur inn um føroyskt landamark. Í sama viðfangi bleiv tann broyting framd, at farmagjald nú verður roknað við í hetta virðið. Hetta er heilt náttúrligt. Vanligt farmagjald hoyrir við til virðið av einari og hvørjari innfluttari vøru, sum verður seld í Føroyum.

Aftaná at nýggju reglurnar hava virkað eina tíð, vísir tað seg, at ymiskir trupulleikar standast av handfaringini av hesum nýggju reglunum.

Tað kemur t.d. ofta fyri, at føroyskar vinnufyritøkur hava tørv eftir einum reservaluti til eitt framleiðslutól e.l. Og tað hevur ofta serliga stóran týdning fyri viðkomandi virki at fáa lutin fram sum skjótast.

At fáa lutin fram til føroyska virkið nóg skjótt, førir ofta við sær munandi meiriútreiðslur enn vanligt farmagjald. Hýruvognur verður kanska sendur frá býi til bý. Kurertænasta verður kanska nýtt o.s.fr. Nevndu tænastur, eins og aðrar tænastur, hava tað til felags, at tær kosta pening.

Galdandi tollreglur verða umsitnar soleiðis, at viðkomandi virki, ella einstaklingur, kemur at gjalda fullan toll av hesum eykaútreiðslum, út um vanligt farmagjald, sum eru nýttar til at fáa eykalutin, ella aðra vøru, fram til tíðina, men sum í sjálvum sær ikki økja um virðið av eykalutinum, ella aðrari vøru.

Eisini aðrir vansar hava víst seg í sambandi við tollavgreiðsluna eftir galdandi tollreglum. Mælt verður til, at Føroya Landsstýri og ella tollavgreiðslan, setir seg í samband við umboð fyri produktivu vinnuna í Føroyum fyri nærri at kanna hesi viðurskiftir.

Út frá hesum viðmerkingum loyvir undirritaði sær at seta fram hetta.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum 17. mars 1988. og eftir 1. viðgerð 7. apríl. 1988 beint í fíggjarnevndina.

Sambandsflokkurin setur fram uppskot til samtyktar um at álagt verður Føroya landsstýri at endurskoða galdandi tolllóg við tí endamáli, at gera meiri smidliga, bæði mótvegis føroyskum vinnufyritøkum og einstaklingum.

Ein samd skattanevnd tekur undir við uppskot Sambandsfloksins.

2. viðgerð 5. mai. Uppskot Sambandsfloksins samtykt við 30-0 atkvøðum.

130 Løgtingslóg um brenni- og samskiftissstudning til ávísar pensiónistar v.fl.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Niels Pauli Danielsen landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensiónistar v.fl.

§ *1.* Í fíggjarárinum 1988 verður úr landskassanum veittur ein brenni- og samskiftisstudningur til pensiónistar við 1.800 kr. til hvønn pensiónist.

§ 2. Brenni- og samskiftisstudningurin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. september 1988 hava fingið játtað fólkapensión, avlamispensión ella einkjupensión ella hava sent inn umsókn um slíka pensión, tí at rætturin til hana er uppnáddur, og seinri fáa pensiónina játtaða.

lagtingslov om brændsels- og kommunikationstilskud til visse pensionister m.fl.

§ *1.* I finansåret 1988 ydes af landskassen et brændsels- og kommunikationstilskud til pensionister på 1.800 kr. til hver pensionist.

§ 2. Brændsels- og kommunikationstilskud ydes til personer, som inden den 1. september 1988 har fået bevilget folkepension, invalidpension eller enkepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

§ 3. Treytin fyri at fáa brenni- og samskiftisstudning er, at pensiónisturin hevur ikki hægri ársinntøku út um pensiónina enn 80.000 kr. fyri hjún og 60.000 kr. fyri støk. Til grund fyri útrokningini verður sløgd inntøkan, sum nýtt verður í sambandi við útrokning av pensiónini pr. 1. september 1988. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensiónistar, eiga ein part í felag.

§ 4. Í figgjarárinum 1988 verður út landskassanum eisini veittur ein brenni- og samskiftisstudningur við 1.800 kr. til fólk, sum tann 1. september 1988 fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlógini, undir somu treytum sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ 5. Brenni- og samskiftisstudningurin verður útgoldin av Føroya Gjaldstovu.
2. stk. Annars hevur Almannastovan fyrisitingina av brenni- og samskiftisstudninginum um hendi.
3. stk. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tingið, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

§ 6. Brenni- og samskiftisstudningur er ikki skattskyldugur.

§ 7. Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

Viðmerkingar:

Síðan 1980/81 hevur verið goldin brennistudningur til pensjónistar v.fl. sambært lóg, sum hevur havt gildi einans fyri viðkomandi (fíggjar) ár.

Seinastu árini hevur upphæddin verið 1.200 kr. (eina ferð árliga), og var treytin í 1987, at viðkomandi hevði ikki ársinntøku út um pensjónina, sum var meira enn 60.000 kr. fyri støk og 80.000 kr. fyri hjún. Landsstýrið heldur, at somu treytir skulu gilda fyri 1988.

3.285 húski fingu pr. 11. desember 1987 brennistudning.

Landsstýrið heldur, at líknandi studningur eisini eigur at verða latin til pen-

§ 3. Betingelsen for at få brændsels- og kommunikationstilskud er, at pensionisten ikke har højere årsindtægt udovere pensionen end 80.000 kr. for ægtepar og 60.000 kr. for enlige. Til grund for beregningen lægges den indtægt, der anvendes i forbindelse med beregning af pensionen pr. 1. september 1988. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ 4. I finansåret 1988 ydes af landskassen også et brændsels- og kommunikationstilskud på 1.800 kr. til personer, der den 1. september 1988 modtager hjælp efter forsorgslovens § 13, på samme betingelser som fastsat i § 3 i den ne lov.

§ 5. Brændsels- og kommunikationstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldstova.
Stk. 2. Iøvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændsels- og kommunikationstilskuddet.
Stk. 3. Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

§ 6. Brændsels og kommunikationstilskuddet er ikke skattepligtigt.

§ 7. Denne lov træder i kraft straks.

sjónistar v.fl. til partvísa rindan av samskiftisútreiðslum sum fast telefongjald, sjónvarpsgjald og útvarpsgjald. Landsstýrið vísir til, at uppskot um útvarps og sjónvarpsgjald til pensjónistar varð sent aftur út løgtinginum, tí at lógin varð hildin ov trupul at fyrisita. Samráðingar hava síðan verið við Telefonverk Føroya Løgtings, Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya og Almannastovuna, og semja er um at finna fram til eina ódýra umsitingarloysn.

Landsstýrið skjýtur tí upp, at heitið á lógini um brennistudning verður broytt til lóg um brenni- og samskiftisstudning og at stundingurin fyri 1988 verður 1.800 kr.

Annars víkur uppskotið ikki frá lógini fyri 1987.

Brenni- og samskiftisstudningurin er skattafríur á sama hátt sum árini frammanundan.

Útreiðslurnar av uppskotinum verða mettar til 5,8 mió. kr. Á fíggjarlógini fyri 1988 eru settar av 4,0 mió. kr. til brennistudning. Nettomeirútreiðslan verður sostatt 1,8 mió. kr.

1. viðgerð 21. apríl. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er framlagt av Føroya landsstýri 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 21. apríl 1988 beint í almanna- og heilsunevndini.

Í nøkur ár hevur á hvørjum ári verið veittur brennistudningur til ávísar pensjónistar. Spurningurin um stuðul til partvísa rindan av samskiftisútreiðslum (telefon, sjónvarp og útvarp) hevur ofta verið frammi, og í hesi tingsetu hevur eitt slíkt uppskot verið á tinginum, sum varð sent landsstýrinum aftur, tí tað var hildið ov tvørligt at umsita.

Almanna- og heilsunevndin heldur, at tað er ein snøgg og ódýr umsitingarloysn at hefta samskiftisgjaldið upp í brennistudningin, men er samd um, at upphæddin, ið veitt verður, eigur at vera 2.200 kr. í staðin fyri 1.800 kr. Samsvarandi hesum setir nevndin fram soljóðandi:

broytingaruppskot

Í § 1 og § 4 verður upphæddin »1.800 kr.« broytt til: »2.200 kr.«.	I § 1 og § 4 ændres beløbet »1.800 kr.« til: »2.200 kr.«

2. viðgerð 28. apríl. § 1 varð samtykt við 27-0 atkvøðum, § 2 við 26-0, § 3 við 27-0. Við 26-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 3. mai. Uppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1010-20-1. Lóg nr. 73 frá 9. juni 1988.

131 Veðhald fyri láni til frysti- og flakavirkir.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til frysti- og flakavirkir.

lagtingslov om garanti for lån til fryse- og filétanlæg.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til fiskimannasamtøkur og aðrar til bygging av frysti og flakavirkjum og kuldagoymslum. Veðhaldið verður givið fyri lánum upp til 30% av samlaðu íløgunum eftir meting. Lánið skal tryggjast við pantirætti í viðkomandi virki innanfyri 70% av virðinum.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån til sammenslutninger af fiskere og andre til anlæg af fryst- og filétvirksomheder samt kølehuse. Garantier ydes for lån op til 30% af virksomhedens værdi efter vurdering. Lånet skal sikres med pant indenfor 70% af virksomhedens værdi.

§ *2.* Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at veita lán ella veðhald fyri láni svarandi til kurstapið av lánum, sum verða veitt til frysti- og flakavirkir.
Stk. 2. Kurstapslán verður at tryggja við panti í virkinum innanfyri 100% av virðinum.

§ *2.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at yde lån eller garantere for lån svarende til kurstab af lån, som ydes til fryse- og filétanlæg.
Stk. 2. Kurstabslån skal sikres ved pant i anlægget indenfor 100% af værdien.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fara úr gildi løgtingslóg nr. 18 frá 25. apríl 1960 og løgtinslóg nr. 10 frá 5. mars 1976.

§ *3.* Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 18 af 25. april 1960 og lagtingslov nr. 10 af 5. marts 1976.

Viðmerkingar:

Í sambandi við uppskot til løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum, har heimildin at veita stuðulslán v.m. verður skerd, heldur landsstýrið

tað eisini vera rætt at minka um landskassaveðhald fyri lánum til bygging av frysti- og flakavirkjum.

Veðhaldið verður minkað úr 70% til 30% av byggikostnaðinum.

Samstundis fara lógirnar frá 1960 og 1976 úr gildi, sí løgtingsmál nr. 68/1959 og 45/1975.

1. viðgerð 19. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 19. apríl 1988 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd fíggjarnevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 28. apríl 1988. § 1 varð samtykt við 24-0 atkvøðum, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. Við 25-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 4. mai. Uppskotið varð samtykt við 26-0 og avgreitt.

F.L. j.nr. 1413-3. Lóg nr. 35 frá 20. mai 1988.

132 Hækkan av pensiónsinntøkumarkinum.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framsóknarflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at koma við lógaruppskoti um at hækka galdandi inntøkumark fyri, hvussu nógv pensionistar kunnu forvinna, áðrenn teir missa av viðbót og grundupphædd av fólkapensiónini og avlamispensiónini. Inntøkumarkið eigur at verða hækkað frá núverandi kr. 10.200,- fyri pensiónsviðbót og kr. 20.184,-, ávíkavist kr. 32.640,- fyri grundupphædd til kr. 50.000,- fyri hvørt.

Viðmerkingar:

Avlamisfólk og eldri menn hava leingi gramt seg um, at tað nyttar einki at royna at arbeiða afturat pensiónini. Tað verður lítið eftir til tey sjálv av hesari inntøku. Fyrst verður meiriinntøkan skattað við umleið helvt, og síðan verða pensiónsviðbøtur og partar av grundupphæddini tikin av pensiónini, tá inntøkan fer uppum ávíkavist kr. 10.200,- og 20.184,- fyri fólkapensionistar og kr. 32.640,- fyri amlamispensionistar.

Tað er ikki so løgið, um pensionistarnir eru ónøgdir við galdandi reglur. Teir fáa at kalla einki burturúr símum arbeiði.

Eftir hjáløgdu útrokning, sum er gjørd eftir upplýsingum frá Líkningarráðnum og Almannastovuni, hava tey sum eru undir 67 ár, einkjur og fólkapensionistar, umleið kr. 14.000,- eftir, og avlamin umleið kr. 17.000,-, tá tey hava forvunnið kr. 50.000,- útyvir pensjónina tí tá hava tey mist umleið kr. 18.000,- av pensjónini, umframt skattin av inntøkuni. Tey, sum hava fylt 67 ár, hava góðar kr. 23.000,- eftir, tá tey hava forvunnið kr. 50.000,-.

Tá veruleikin er, at tað er so nógv arbeiði í landinum, at útlendingar í hópatali eru komnir til landið fyri at arbeiða her og far aftur aftur landinum við peninginum, sum ikki altíð er skattaður, so kann tað ikki vera rætt, at tey eldru og avlamin ikki fáa høvi til at arbeiða, uttan at hitt almenna fer við nærum øllum peninginum antin sum skattur ella sum afturkravdir partur av pensjónini.

Tí verður skotið upp, at inntøkumarkið hjá pensionistum verður flutt, hækkað til kr. 50.000,- fyri bæði pensiónsviðbót og grundupphædd.

1. viðgerð 21. apríl. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Uppskotið er framlagt av Framsóknarflokkinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 21. apríl 1988 beint í almanna- og heilsunevndina.

Málið snýr seg um at hækka galdandi inntøkumark fyri, hvat pensjónistar kunnu forvinna uttan at missa burtur av viðbót og grundupphædd av fólkapensjón og avlamispensjón.

Hesin spurningur hevur ofta verið havdur frammi og verður hildin at vera serliga aktuellur nú, so stórur tørvur er á arbeiðsorku í Føroyum. Undir orðaskiftinum vóru tingmenn á einum máli um, at tað er gott fyri heilsuna hjá eldri fólki at arbeiða, eins og tað er samfelagsgagnligt. Arbeiðsinntøka hjá hesum bólki eigur ikki at skerja pensjónina í so stóran mun, at tað verður óhugnaligt at hava arbeiðsinntøku hjá pensjónistum.

Tingmenn eru ósamdir um, á hvønn hátt hesi spurningur verða loystur. Í hesum valskeiði hevur eitt uppskot verið frá Sambandsflokkinum, iuð viðgerð sama spurning. Hetta uppskot verður lagt í málið. Somuleiðis verður víst á uppskot Fólkafloksins nr. 36/1987, ið viðgerð skattaviðurskiftini hjá fólkapensjónistum. Hetta mál liggur í løgtingsins skattanevnd. Tað er ein samd almanna- og heilsunevnd, ið setir soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja uppskot fyri tingið á Ólavsøku, ið hevur til endamáls at tryggja fólka- og avlamispensjónistum eina støtri tøka peningaupphædd, tá talan er um arbeiðsinntøku.

2. viðgerð 28. apríl. Uppskotið til samtyktar frá nevndini varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

133 Broyting í løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 64 frá 5. juni 1984 um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima, verða hesar broytingar gjørdar:

1. Heitið á lógini verður broytt til »Løgtingslóg um samsýning fyri at ansa øðrum heima«.
2. Í § 1 verður sett sum nýtt stk. 5:
»Viðurlag verður eisini latið tí av foreldrunum, sum ansar barni heima, tá ið tað eftir læknaligari meting er neyðugt, at ein av foreldrunum ikki er til arbeiðis uttan fyri heimið. Landsstýrið ásetir reglugerð um, hvørji børn viðurlag kann latast fyri.«

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. oktober 1988.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag for pleje af ældre og hjælpeløse personer hjemme.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 64 af 5. juni 1984 om vederlag for pleje af ældre og hjælpeløse personer hjemme foretages følgende ændringer:

1. Lovens titel ændres til:
»Lagtingslov om vederlag for pleje af andre hjemme«.
2. I § 1 indsættes som nyt stk. 5:
»Vederlag kan også ydes den at et barns forældre, der plejer et barn hjemme, da det efter et lægeligt skøn er nødvendigt, at en af forældrene ikke arbejder uden for hjemmet. Landsstyret fastsætter reglement for, hvilke børn vederlag kan ydes for.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. oktober 1988.

Viðmerkingar:

Í forsorgarlógini er í § 17 heimild at veita studning fyri mistan arbeiðsforvinning hjá foreldrum at brekaðum børnum. Landsstýrið er av tí áskoðan, at nevnda heimild eigur at verða víðkað og heldur vera í lógin um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima. Av útreiðslunum av forsorgarlógini heldur ríkiskassin 25% og útreiðslur eftir lógini um ansing av eldri og óhjápnum eru landskassaútreiðslur burturav. Veiting eftir hesi lóg eer skattskyldug, meðan veiting eftir § 17 í forsorgarlógini er skattafrí.

Grundað á hesa áskoðan setir landsstýrið fram uppskot um, at samsýning eisini ikann verða veitt, tá ið talan er um børn og tað er neyðugt, at foreldur eru heima.

1. viðgerð 21. apríl. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 21. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Uppskotið er lagt fram av av Føroya landsstýri 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð hin 21. apríl 1988 beint í almanna- og heilsunevndina.

Málið snýr seg um at veita endurgjald fyri mista inntøku hjá foreldrum at brekaðum børnum.

Undir viðgerðini av málinum er nevndin komin ásamt um, at heimildir eru eftir § 17 í forsorgarlógini til at veita hendan stuðul, og at ilt er at vísa á nakað dømi um at, at tørvurin ikki er nøktaður við hesi heimild. Um so er, at heimildin skal víðkast, verður hildið, at ein neyvari lýsing skal gerast um, hvørji sjúkueyðkenni ella brek, lógin skal fevna um, tí heimildir ikki eru eftir § 17 í forsorgarlógini. Í slíkum førum eigur eisini at vera komið við eini kostnaðarmeting.

2. viðgerð 4. mai. Uppskot landsstýrisins til samtyktar fallið við 0.

134 Løgtingslóg um bygging av ávísum skúlum.

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

Løgtingslóg um bygging av ávísum skúlum.

lagtingslov om bygning af visse skoler.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at fara undir bygging av niðanfyri nevndu skúlum á tilskilaðu plássum:

1) Ástøðis- (HF- og studenta-) skúla í Eysturoy **í Gøtudali,**

2) Ástøðis- (HF-) skúla í Norðoyggjum **í Klaksvík,**

3) Ástøðis- (HF-) og Sjóvinnuskúli í Suðuroy **í Hovi í Hovs kommunu,**

4) Føroya Yrkisskúli fyri siskaídnað og havbúnað í Norðurstreymoy **í Vestmanna** og í Eysturoy **í Runavík,**

5) Maskinskúla **í Tórshavn og**

6) Skeiðháskúla í Sandoynni **á Sandi.**

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at iværksætte hygning af nedenfor nævnte skoler de anførte steder:

1) Gymnasial (HF- og gymnasie-) skole på Eysturoy **i Gøtutdali,**

2) Gymnasial (HF-) skole på Norðoyggjum **i Klaksvík,**

3) Gymnasial (HF-) og Søfartsskole på Suðuroy **i Hovi i Hovs kommune,**

4) Færøernes erhvervsskole for fiskeindustri og akvakultur i Norðstreymoy **i Vestmanna og i Eysturoy i Runavík,**

5) Maskinskole **i Thorshavn** og

6) Kursushøjskole på Sandoynni **i Sandi.**

§ *2.* Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ *2.* Denne lov træder **i kraft** dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Tað er almannakunnugt, at føroyska skúlaverkinum tørvar munagóðar ábøtur og útbyggingar. Serstakliga er hetta galdandi fyri tann partin av útbúgvingarverkinum, sum fevnir um yrkisútbúgvingar og aðrar framhaldandi útbúgvingar.

Hóast lógargrundarlagið fyri innihaldinum í teimum ymsu yrkisútbúgvingunum yvirhøvur er fingið til vega, virka nógvir av yrkis- og framhaldsskúlunum undir sera trongum og ótíðarhóskandi umstøðum.

Allur spurningurin um bygnaðin og vavið á studentaskúlunum og hf-skeiðunum er til viðgerðar hjá skúlamyndugleikum og landsstýri.

Endamálið við hesari viðgerð og at samskipa studentaskúlarnar og hf-skeiðini, soleiðis at Føroyar fáa eina ástøðiliga (gymnasiala) skúlaskipan, ið betur hóskar til føroyska samfelagið, samstundis sum hon lýkur allar upptøkutreytir til hægri lærustovnar í Føroyum og uttanlands.

Almenna orðaskiftið, sum nú í mong ár hevur verið um útbyggingina av nevndu skúlaformum, hevur sýnt, at breið semja er um, at útbyggingin í so stóran mun sum gjørligt verður løgd um landið.

Út frá hesum fortreytum hevur landsstýrið evnað til uppskot um bygging og staðfesting av skúlum og metir landsstýrið, at uppskotið gongur hesum sjóarmiðum á møti.

Í einum riti »Tilmæli til útbúgvingar« við undirheitinum« Tilmæli um útbúgvingar og stað hjá skúlum hesum viðvíkjandi«, sum landsskúlafyrisitingin hevur gjørt í mars 1987, og sum er hjálagt hesum løgtingsmáli sum skjal, sigur landsskúlafyrisitingin seg hava gjørt hetta tilmæli, tí mikið orðaskifti fer fram um, hvar verandi skúlar, sum hava innivist í fyribils hølum, og komandi skúlar skulu vera, og eisini tí tað oftast er trupult at viðgera spurningin fyri ein einstakan skúla í senn, viðhvørt úrslitaleyst, og hinvegin betur fyri heildina og samstarvið skúlanna millum um lærarar og annað, at spurningurin verður viðgjørdur fyri fleiri skúlar undir einum.

Landsstýrið tekur undir við hesum sjónarmiðum, og hevur sostatt við stuði í umrødda riti samtykt at biðja løgtingið um heimild til, at farið verður undir bygging av skúlum til veraandi útbúgvingar, sum fer fram í fyribils hølum, og til tær útbúgvingar, sum heimild er at fara undir, ella sum ætlanin er at útvega heimild til, samsvarandi frammanfyri standandi uppskoti til løgtingslóg.

Uppskotið er í høvuðsheitum í samsvari við tilmælið frá landsskúlafyrisitingini, sum er sett á kort á bls. 76 í ritinum. Tó hevur landsstýrið miðað ímóti í enn størri mun enn uppskotið hjá landsskúlafyrisitingini at miðspjaða skúlarsamstarvi við vinnuliví og aðrar stovnar verður havdur í huga.

Landsstýrið hevur samtykt, at byggingin av HF- og studentaskúla í Eysturoy fer fram í Gøtudali á matr. nr. 27 og 28a, ávikavist 11.700 m² og 27.900 m² til støddar.

Landsstýrið fer í hvørjum einstøkum føri at ogna sær neyðturvuligt lendi til

bygging av øllum teimum umrøddu skúlum og samráðast við avvarðandi kommunur um møguligar neyðugar broytingar í búarplanum og byggisamtyktum í hesum sambandi.

Í teimum førum, har tørvur verður á næmingabústøðum til umrøddu skúlar, er landsstýrið sinnað, at hesi verða bygd samsvarandi løgtingslóg um bústaðahús til fólk í útbúgvingar.

Á skeiðháskúlanum á Sandi er ætlanin at hava ymiskt skeiðvirksemi, t.d. innan listahandverk, leguskúla, eftirútbúgvingarskeið og annað.

Herumframt er ætlanin, at útbúgving av sjúkrahjálparum skal fara fram í sambandi við ellis- og røktarheimið í Vágum eftir tørvi.

Í teimum førum, har peningur ikki er tøkur í grunni til bygging av umrøddu skúlum, fer landsstýrið at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um heimild at læna neyðugan pening í hvørjum einstøkum føri á vanligan hátt.

Hóast lógaruppskotið ikki umfatar skúlan í Hoydølum, ásannar landsstýrið, at kostdeildin, studentaskúlin og HF-skeiðið í Hoydølum hava útbygging av nútíðmansgerð fyri neyðini. Landsstýrið hevur til viðgerðar umsókn um bústaðarhús til ung undir útbúgving. Somuleiðis er ætlan landsstýrisins skjótast til ber at nútímansgera og útbyggja sjálvan skúla í Hoydølum, sum nú í nøkur ár hevur fingið játtan til tess á løgtingsfiggjarlógini.

SÍ SKJAL NR.??????

1. viðgerð 6. apríl. Málið útsett.

Framhaldandi 1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint í skúlanevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 12. apríl 1988 beint í mentanar- og skúlanevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jóannes Dalsgaard, Hergeir Nielsen og Asbjørn Joensen) skal loyva sær at føra fram fylgjandi:

Tað má haldast at vera í tøkum tíma, at nakað verður gjørt við teir álvarsomu høli strupulleikar, sum valda á teimum skúlum, sum talan er um í lógaruppskotinum. Trupulleikarnir á Eysturoyar Studentaskúla, við Suðuroyar HF, og maskinskúlanum a.a. eru væl kendir — nakað, sum eisini er týðuliga kom fram undir

fyrstu viðgerð av málinum á løgtingi. Meirilutin heldur tað tí vera sera gott, at tað nú av álvara verður gjørt nakað við hesar trupulleikarnar. Meirilutin tekur tí sum heild undir við tí byggiætlan, sum landsstýrið mælir til við lógaruppskotinum.

Viðari skal meirilutin vísa á, at tað leingi hevur veri ivi um, hvar ávísar skúlar skulu verða í framtíðini. Eisini henda óvissa verður beint burtur við at samtykkja lóg um, hvar hesir ávísu skúlar skulu vera í framtíðini. Meirilutin heldur hesa óvissu hava verið til stóran ampa fyri skúlarnar og heldur meirilutin tað tí vera beint at fastleggja plaseringarnar við lóg. Tað er eingin ivi um, at onkur skúli kundi verið øðrvísi plaseraður, men meirilutin er sjálvsagt vitandi um, at hesar plaseringar eru tær, sum sejma kundi fáast um og heldur meirilutin, at tær væl kunnu góðtakast bæði út frá einum fakligum og bygdamenningarligum sjónarmiði.

Um sjálvt lógaruppskotið skal meirilutin tó loyva sær at viðmerkja, at tað ikki í nóg stóran mun tekur hædd fyri teimum bygdnaðarligu (strukturellu) broytingum, sum eru á veg innan tann gymnasiala skúlaskapin. Hesar broytingar eru longu farnar fram í okkara grannalondum. Meirilutin hevur tí broytt lógaruppskot landsstýrisins, so lógin uttan nýggjar broytingar kann verða grundarlag undir útbyggingini av gymnasiala skúlaskapinum, eftir at hesin hevur fingið nýggjan bygnað. Hesin bygnaður er ikki heilt greiður enn, men so mikið liggur fast, at hann kemur at fevna um **sjálvstøðugar 3 ára gymnasialar útbúgvingar** í Klaksvík og Suðuroy eins og í Hoydølum og í Gøtudali. Hetta merkir við øðrum orðum, at landsstýrinum við uppskoti meirilutans verður heimilað at stovnseta studentaskúlar eisini í Norðuroyggjum og í Suðuroy. Nevndin hevur frá skúlamyndugleikunum fingið at vita, at henda skipan kann byrja frá og við skúalárinum 1989. Tá tað ikki kann byrjast longu í ár, kemst hetta av, at næmingarnir longu eru tiknir upp og vildi tað ført til stórar trupulleikar at broytt hetta nú — samstundis sum havt verður í huga, at nýggi innihaldsbygnaðurin ikki er heilt liðugur enn.

Tó skal meirilutin gera vart við, at teir næmingar, sum byrja IIF í hesum skúlaári, eiga at fáa tilboð um eitt triðja ár oman á HF-prógv, so teimum verður tryggjað sama støði, sum studentsprógv. Meirilutin skal eisini gera vart við, at tað er altumráðandi, at nýggi innihaldsbygnaðurin kemur í gidli longu frá skúlaárinum 1989 og mælir tí landsstýrinum til at skunda undir arbeiðið við hesum spurningi. Samstundis leggur meirilutin landsstýrinum eina við at ansa eftir, at nýggi bygnaðurin tryggjar øllum, sum velja ta gymnasialu leiðina sama støði, sum studentsprógv í heinum Norðurlondunum.

Meirilutin tekur annars sum nevnt undir við lógaruppskotinum sum heild, hóast meirilutin hevur uppskot um eina eitt sindur øðrvísi orðing — eina orðing, ið sum nevnt bert hevur til endamáls at gera lógartekstin greiðari.

Um hinar í uppskotinum nevndu skúlar skal meirilutin annars viðmerkja, at tað uttan iva er stórur tørvur á nýskipanum og bøtan av høli strupulleikunum. Meirilutin heitir á landsstýrið um at bera skjótt at við fyrireikingararbeiðunum, so endamálið við uppskotinum um ávísar skúlar kann verða rokkið innan eitt rímuligt tíðarmark.

Meirilutin skal eisini gera vart við, at stórur tørvur er á føroyskt talandi lærarum innan hægra skúlaskapin og heitir á landsstýrið um at gera nakað munagott fyri at eggja føroyingum til at útbúgva seg við skúlaembætisprógvi.

Meirilutin heldur tað vera eina fortreyt fyri, at lógin um ávísar skúlar skal kunna virka eftir endamálinum at landsstýrið fær neyðturviligar lániheimildir, samstundis sum fysiska bygnaðurin verður fastlagdur og hevur tí tikið upphædd fyri hesum í sínum uppskoti.

Í staðin fyri uppskot landsstýrisns mælir meirilutin til at samtykkja fylgjandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um ávísar skúlar.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at seta á stovn niðanfyri nevndu nýggju útbúgvingar.

2. stk. Landsstýrinum verður heimilað at fara undir projektering og bygging av skúlabygningum til niðanfyri nevndu verandi útbúgvingar og komandi útbúgvingar:

1) Gymnasiala útbúgving í Gøtudali í Eysturoy.

2) Gymnasiala útbúgving í Klaksvík í Norðoyggjum.

3) Gymnasiala útbúgving í Hovi í Hovs kommunu í Suðuroy.

4) Sjóvinnuskúli í Hovi í Hovs kommunu í Suðuroy.

5) Yrkisskúla fyri fiskaídnað og havbúnað í Vestmanna í Norðurstreymoy við deild í Vágum.

lagtingslov om bestemte skoler.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at etablere følgende nye uddannelser, som angivet nedenfor.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at påbegynde projektering og bygning af skolebygninger til nedenfor nævnte værende og kommende uddannelser:

1) Gymnasial uddannelse i Gøtudali i Eysturoy.

2) Gymnasial uddannelse i Klaksvík på Norderøerne.

3) Gymnasial uddannelse i Hov i Hovs kommune på Suderø.

4) Fiskeriskole i Hov i Hovs kommune på Sunderø.

5) Fagskole for fiskeriindustri og fiskeopdræt i Vestmanna på Nordstrømø med afdeling på Vágø.

6) Yrkisskúli fyri fiskaídnað og havbúnað í Runavík í Eysturoy.
7) Maskinskúli í Tórshavn.
8) Skeiðháskúla á Sandi í Sandoy.
9) Sjúkrahjálparaskúla í Vágum.

§ *2.* Landsstýrinum verður heimilað at byggja næmingaheim við teir í § 1 nevndu skúlar.
2. stk. Landsstýrinum verður heimilað eftir tilmæli frá leiðslunum fyri nevndu skúlum, skúlafyrisitingini, LFÚ ella øðrum góðkendum næmingafelagsskapum at stíla fyri bygging av næmingaheimum eftir lógini um bústaðarhús fyri fólk í útbúgving (lóg nr. 63 frá 23. juni 1983).

§ *3.* Landsstýrinum verður heimilað saman við løgtingsins fíggjarnevnd at taka upp neyðturvilig lán til tær í hesi lóg nevndu projekteringar og byggingar.

§ *4.* Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er vorðin kunngjørd.

6) Fagskole for fiskeriindustri og fiskeopdræt i Runavík på Østerø.
7) Maskinskole i Tórshavn.
8 Kursushøjskole i Sande på Sandø.
9) Sygehjælperskole på Vágø.

§ *2.* Landsstyret bemyndiges til at bygge elevboliger til de i § 1 nævnte skoler.
Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til efter indstilling fra ledelserne for de nævnte skoler, skoleadministrationen, LFÚ eller andre godkendte elevorganisationer at forestå bygning af elevhjem i henhold til loven om kollegier til folk under uddannelse (lov nr. 63 af 23. juni 1983).

§ *3.* Landsstyret bemyndiges til sammen med lagtingets finansudvalg at optage nødvendige lån til de i denne lov nævnte projekteringer og byggerier.

§ *4.* Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Ein minniluti (Óli Breckmann) hevur hesa tilráðing, at bygging av nýggjum maskinskúla hevur bráðskund. Alt ov leingi hevur maskinmeistaraútbúgvingin liðið undir av trongum hølisumstøðum. Her er talan um tann skúlan í landinum, sum gevur eina hina hægstu útbúgvingina til eitt vinnuligt yrki, sum er lívsneyðugt fyri eitt sjófarandi fólk, hóast møguleikarnir skipsyvirmonnum eru nógv versnaðir, eftir at vit mistu farmaflotan.

Minnilutin ávarar tó ímóti at leggja maskinskúla undir liðina á ella sum deild av sjómansskúlanum, tí gamla kappingin millum »skipara og kokk«, sum tikið verður til, verður til bága fyri báðar partar. Maskinskúlin hevur nær felags við tekniskan skúla, men má standa púra sjálvstøðugur.

UM studentaskúlan og HF-ið í Eysturoy hava polisiktarar sag A við at seta hann á stovn og hava skýldu til at siga B við at útvega næmingunum hóskandi bygning.

HF-skeiðið í Suðuroy er spjatt sum er og eigur at verða savnað til bestu nýtslu av teim kreftum, sum næmingar, lærarar og samfelagið leggja í hesa frálæru.

Um vinnuskúlarnir heldur minnilutin tað vera betri at fylgja upprunaliga tilmælinum frá Landsskúlafyrisitingini, soleiðis at Fiskivinnuskúlin verður bygdur í Runavík við deildum av hesi frálæru í Suðuroy, knýtt at HF-skúlanum í Hovi og í Vágum.

Mælt verður til, at lærugreinin »útflutningslæra« gerst partur av pensum á fiskivinnuskúlanum, sum eisini umfatar havbúnað, tí tað ber illa til at halda fram sum ein hin mest útflutningshefti búskapur í heiminum uttan holla bókliga útbúgving í hesi handilslærugrein.

Sjóvinnuskúlin verður at leggja í Vestmanna.

Við hesum minnilutauppskoti verður einki øki í landinum við skerdan lut, sum tilfellið er við landsstýrisins uppskoti.

Samanumtikið førir minnilutin tó fram, at fyriliggjandi lógaruppskot er at skilja sum ein byggiætlan, sum tíverri hevur tey brek, at tey hvørki eru ein raðfesting ella kostnaðarmeting.

Kortini tekur minnilutin undir við, at ein byggiætlan er samtykt á løgtingi, so myndugleikarnir frameftir hava eitt støði at ganga út frá og lógarfesta ætlan at halda seg til.

Hetta lógaruppskot hevur tíbetur við sær, at hvør einstøk skúlabygging verður aftur løgd fyri løgtingið til viðgerðar og samtyktar einsæris.

Fylst verður tó á tann mismun, sum landsstýrið ger á vinnulívinum og vinnuskúlunum. Fólkaflokkurin tekur undir við hesum uppskoti við nevndu broytingum, tí holl vinnulig útbúgving er fortreyt fyri eini dyggar arbeiðsorku. Men eitt niðurkoyrt vinnulív er ikki nóg gott grundarlag fyri stásiligum og dýrum vinnuskúlum.

Samsvarandi hesum tekur minnilutin undir við uppskoti lógaruppskoti meirilutans, tó soleiðis at skotið verður upp soljóðandi:

Broytingaruppskot

1) Í § 1, 2. stk. gongur pkt. 4 út, og í staðin verður sett sum nýtt:	*1)* I § 1, stk. 2 udgår pkt. 4, og i stedet indsættes som nyt:
»4) Sjóvinnuskúli í Vestmanna.«	»4) Somandsskole i Vestmanna.«

2) Í § 1, 2. stk. gongur pkt. 6 út og í staðin verður sett sum nýtt:

»6) Yrkisskúla fyri fiskaídnað og havbúna í Runavík við deildum av hesi frálæru í Suðuroya, knýtt at HF-skúlanum í Hovi og í Vágum.«

2) I § 1, stk. 2 udgår pkt. 6 og i stedet indsættes som nyt:

»6) Fagskole for fiskeriindustri og fiskeopdræt i Runavík med afdelinger af denne undervisking i Suðuroy i tilsknytning til HF skolerne i Hov og i Vágar.«

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum frá komandi skúlaári at skipa fyri frálæru í fiskivinnu- og havbúnað í teim tøku hølunum á Tvøroyri og í Vágum eins og avvarðandi bygda- og býráð hava mælt til, at tøkur peningur er avsettur til á løgtingsfíggjarlógini.

Ein annar minniluti (Eilif Samelsen) førir fram, at sitandi samgonga ongan veruligan vilja hevur sýnt at fáa bygt nakran av nevndu skúlum í hesum valskeiðinum. Eingin peningur av týdningi er settur av til bygging og ongar fyrireikingar annars eru gjørdar til at fremja tey ymsu byggimálini, t.d. útvegna av grundøki, tekningar o.s.fr.

Uppskotini til plasering av teimum ymsu skúlunum sýnast tilvildarlig og hissini, og einasta leiðandi sjónarmiðið tykist at hava verið, at hvørt av teim seks valdømunum, ið eru umboðað í samgonguni, skuldi fáa sín bita av krásini. M.a. framgongur ikki av nakrari planlegging, at nýggjur HF skúli skal byggjast í Klaksvík, ella at fiskiídnaðarskúli skal byggjast í Vestmanna, tíansheldur at sjúkrahjálparaútbúgving skal verða í Vágum, men henda ílylla mátti til, fyri at rossahandilin skuldi ganga upp. Og hetta ber ikki júst prógv um nakran serliga seriøsan skúlapolitikk.

Uppskotini um plasering heldur fordða enn fremja einum samarbeiði skúlanna millum.

Vit eiga at gera okkum greitt, at skulu vit her á landi gera okkum nakra vón um í framtíðini at hava ráð til at reka teir skúlar, vit nú hava, og haraftrat at stovnseta og reka fleiri nýggjar, so mugu vit fyrst og fremst stremba eftir at gera hesar úthúgvingar so rationellar og so bíligar í rakstri sum gjørligt. Hesum sjónarmiði gongur landsstýrisins uppskot als ikki á møti.

Hetta uppskotið um plasering av skúlum, sýnist einans at vera ein roynd

í seinastu løtu at bøta um landsstýrisins ringu samvitsku fyri eitki at hava gjort í skúlanum hesi skjótt fýra árini.

Føroyska vinnulívið og samfelagið sum heild kann ikki vera nøgt við í staðin fyri skúlar bert at fáa innantónar politiskar menifestatiónir og føroyskur ungdómur kann heldur ikki lata sær lynda bert at fáa pappírsskúlar.

Minnilutin tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men setir fram hetta.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at taka lógaruppskotið aftur og lata upp í hendurnar á komandi samgongu bæði at loysa teir fíggjarligu spurningarnar og at avgera, hvørjir skúlar skulu byggjast og hvar, id teir skulu verða.

2. viðgerð 5. mai. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum í mentannar og skúlanevndini (Óli Breckmann) fall við 11-0 og broytingaruppskotið frá sama fall við 9-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum (Eilif Samuelsen) fall við 4 ja-atkvøðum, 4 nei-atkvøðum, 23 atkvøddu ikki, 1 var burturstaddur.

Atkvøtt varð við navnakalli solceiðis:

Ja atkvøddu:	Ivan Johannesen, Agnar Nielsen, Edmund Joensen, Eilif Samuelsen.
Nei atkvøddu:	Henrik Old, Sverre Midjord, Tummas Arabo, Hergeir Nielsen.
Atkvøddu ikki:	Óli Breckmann, Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Svend Aage Ellefsen, Eyðun Videro, Jógvan Sundstein, Poul Michelsen, Flemming Mikkelsen, Johannes Martin Olsen, Tórálvur Mohr Olsen, Joannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Signar Hansen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes, Adolf V. Hansen, Tordur Niclasen.
Burturstaddir:	Pauli Ellefsen.

Lógaruppskotið frá meirilutanum í nevndini § 1 samtykt við 26-0, §§ 2 3 samtyktar við 17-0, § 4 uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 28-0.

6. mai legði Adolf V. Hansen , løgtingsmaður fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Bygdin Gjógv hevur verið stór »leverandøra« av lærdum fólki til føroysku samfelagið, teirra millum mangir lærarar. Bygdin er nú vorði so lítil, at verður eink munagott gjørt, so er vandi fyri at hon doyr út.

Skal bygdin mennast aftur, verður neyðugt at fremja nakað í bygdini, sum fær upprunafólk at flyta til bygdina aftur. Tað er nærliggjandi at hugsa, at besti aktivitetur, sum kundi komið til bygdina var ein skúli.

Føroyingar hava eftirskúla og liggur hesin so fjart sum í Danmark. Ein eftirskúli virkar mest í vetrarhálvaráinum. Tað er tí ikki óhugsandi, at ein eftirskúli kundi verið lagdur við Gjógv.

Gjáargarður verður lítið brúktur í teir 8-9 myrkastu mánaðirnar. Eigararnir hava helst einki ímóti at leiga garðin til eftirskúla uttanfyri teir 9 mánaðirnar einki ferðafólk er.

Við Gjógv hevur bygdarráðið samtykt at leggja lendi av til møguligan skúla.

Kemur ein eftirskúli til bygdina, og nakrir lærarar flyta til bygdina, so er vón fyri, at bygdin skal mennast. Tí verður sett fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna møguleikarnar at seta ein eftirskúla á stovn við Gjógv. Miðað eigur at vera móti, at skúlin kann byrja í september. Neyðugt lógaruppskot leiggur landsstýrið fyri tingið á Ólavsøku.

3. viðgerð 6. mai. Broytingaruppskot frá Adolf V. Hansen fall við 16-0 atkvøðum. Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2151-1. Lóg nr. 62 frá 9. juni 1988.

135 Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1988.

Ár 1988, mikudagin 23. legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu semju dagfest 7. mars 1988 um sínámillum fiskirættindi í 1988 millum Føroyar og Týska Demokratiska Lýðveldið (DDR).

Viðmerkingar:

Heilt síðan at fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar í 1977, hevur Týska Demokratiska Lýðveldið biðið um og fingið loyvi til at reka svartkjaftaveiðu í føroyskum sjógvi.

Í 1980 byrjaðu føroyskur toskafiskiskapur í Eystrasalti og varð tá sett sum treyt fyri fiskiskapin hjá skipum úr Týska Demokratiska Lýðveldinum undir Føroyum, at føroyingar fingu eina toskakvotu á teirra havøki.

Í 1980 fingu føroyingar eina kvotu uppá 400 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 2.800 tons av svartkjafti undir Føroyum.

Í 1981 fingu føroyingar eina kvotu upp í 800 tons av toski á landleiðini hjá DDR og DDR eina kvotu uppá 6.600 tons av svartkjafti undir Føroyum. Loyvda skipatalið hjá DDR varð samstundis hækkað úr 2 í 3. Samstundis varð skipatalið hjá føroyingum hækkað úr 2 í 5. Av kvotuni uppá 800 tons av toski kundi 400 tons av toski verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t.d. upp í 600 tons av síld.

Í 1982 fingu føroyingar eina kvotu uppá 975 tons av toski á landleiðini hjá

Av tí hækkaðu kvotuni kundu 500 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 750 tons av sild. Talið av føroyskum skipum varð samstundis hækkað úr 5 í 7.

Í 1983 fingu føroyingar eina kvotu uppá 1.300 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 10.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av toskakvotuni kundu 650 tons verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av sild. Føroyska skipatalið varð samstundis hækkað úr 7 í 10.

Í 1984, 1985 og 1986 fingu føroyingar eina kvotu uppá 1.300 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 10.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av toskakvotuni kundu 650 tons verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av sild. Føroyska skipatalið var tó í 1985 hækkað úr 10 í 15 og DDR fekk skipatalið 4 før.

Føroyska toskakvotan var í 1987 hin sama sum í 1984, 85 og 86, nevniliga 1.300 tons. Av hesi kvotu kunnu 650 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av sild. Talið á føroyskum skipum var óbroytt, 15 før. Av hesum førunum hava í mesta lagi 12 loyvi at fiska samstundis á landleiðini hjá DDR.

DDR fekk í 1987 loyvi at veiða 10.000 tons av svartkjafti og fyri fyrstu ferð kunnu í staðin fyri 1.000 tons av svartkjafti 1.500 tons av makreli verða veidd av DDR-førum. Skipatalið var óbroytt.

Vanliga hava føroysk fiskifør havt ógvuliga lítlan áhuga fyri at fiska í DDR-sjógvi. Hóast tað at rættiliga stórar nøgdir verða veiddar av toski í vestara partinum av Eystrasalti, tykist hetta ongantíð at hava havt áhuga føroyinga, helst tí fiskimøguleikarnir hava verið ríkiliga góðir eystanfyri.

Í 1987 veiddu føroysk før bert uml. 100 tons burtur úr 1.300 tonsa kvotuni. DDR veiddi uml. 4.500 tons burtur úr síni 10.000 tons svartkjaftakvotu.

Hetta merkir, at í 1987, sum onnur ár, er ógvuliga lítil javnvág í sáttmálanum.

DDR bað um samráðingar seinast í desember 1987 og fyrsta samráðingarumfarið var 7.-8. januar 1988.

Á hesum fundi sýndu veiðutøl og annað, at ógvuliga lítil javnvág er í sáttmálanum og reistu føroysku umboðini tá spurningin, hvussu betri samsvar kann fáast í sáttmálan. Vist varð til grein V í sáttmálanum um sínámillum fiskivinnuviðurskifti.

Fleiri møguleikar vóru førdir fram. Serliga vóru DDR-myndugleikarnir spurdir, um teir fór at loyva, at Føroyar lótu kvotuí DDR sjógvi til onnur lond, sum Føroyar hava fiskivinnusáttmála við. Øll árini hava sýnt, at føroyskir fiskimenn ikki hava áhuga fyri at veiða á DDR-øki, meðan hinvegin fiskimenn úr øðrum londum veiða væl av toski har. Sjálvt nú, tá toskastovnurin í eystara parti er í stórari afturgongd, meðan stovnurin í vestara parti er væl fyri, er føroyski

áhugin ikki vaksin. DDR kundi ikki ganga við til hetta og vísti á sína fiskivinnulóggávu, sum ikki loyvir hesum.

Í seinna samráðingarumfari 7. mars 1988 samdust partarnir um at gera sáttmála á heldur lægri stigi enn árini undan. fyri at koma føroyskum ynskjum um frægari javnvág á møti, góðtóku DDR-umboðini, at býtislutfallið svartkjaftur-toskur varð heldur frægari. Øll árini undan hevur tað verið 7,7 kilo av svartkjafti móti einum kilo av toski. Hetta verður nú 6,7 kilo av svartkjafti móti einum kilo av toski.

Sendinevndirnar samdust um at leggja hjálagda uppskot til sáttmála fyri sín ar myndugleikar.

Kvota

Føroyar			DDR		
		Uppskot			Uppskot
	1987	1988		1987	1988
Toskur 1 (1 50% kunnu skiftast um við sild í býtislutfallinum 2:3)	1.300	750	Svartkjaftur 2 (2 10% kunnu skiftast um við makrel í býtislutfallinum 2:3)	10.000	5.000

Tal av fiskiloyvum hjá DDR og Føroyum vera óbroytt ávikavist 4 og 15 (12 í senn).

Partarnir samdust um, nú so mikið er útliðið, at royna at fáa sáttmálaviðurskiftini avgreidd skjótast gjørligt og sostatt loyva fiskiskapinum at byrja í 1988.

Sáttmálarnir á týskum, føroyskum og donskum eru heftir upp í tingmálið.

1. viðgerð 6. apríl. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 23. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd marknaðarnevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 12. apríl. Uppskot landsstýrisns endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

136 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1988, hósdagin 17. mars legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, nr. 4) verða orðini »hevur dvalt« broytt til: »dvølur«.

2) § 2, stk. 1, litra c) verður orðað soleiðis: »fáa gjald fyri nýtslugjald (royalty) úr Føroyum. Málbering-in nýtslugjald merkir í hesi grein gjalding av øllum slag, sum fæst sum samsýning fyri at nýta ella hava rættin til at nýta hvønn ein upphavsrætt til bókmentalig, listarligt ella vísindaligt verk, heruppií spælifilmar, filmar og bond til útvarps- og sjónvarpssendingar, øll einkarrættindi, vørumerki, mynstur ella fyrimyndir, tekningar, loyniligan formála (»formel«) ella framleiðsluhátt ella fyri at brúka ella hava rættin til at brúka ídnaðar, handils- ella vísindaligan útbúna (m.a. leasing), ella fyri upplýsingar um ídnaðar-, handils- ella vísindaligar royndir.«

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 1, nr. 4) ændres ordene »har opholdt« til: »opholder«.

2) § 2, stk. 1, litra c) affattes således: »oppebærer royalty hidrørende fra Færøerne. Udtrykket »royalty« betyder i denne artikel betaling af enhvert art, der modtages som vederlag for anvendelsen af eller retten til at anvende enhver ophavsret til et litterært, kunstnerisk eller videnskabeligt arbejde, herunder spillefilm og bånd til radio eller fjernsynsudsendelser, ethvert patent, varemærke, mønster eller model, tegning, hemmelig formel eller fremstillingsmetode, og for anvendelse af eller retten til at anvende industrielt, kommercielt eller videnskabeligt udstyr (bl.a. leasing), eller få oplysninger om industrielle, kommercielle eller videnskabelige erfaringer.«

3) Í § 2, stk. 1, verður sett sum litra i):
»fær inntøkur, sum ikki eru umfatað av litra a), b), d) ella h), fyri arbeiði, gjørt í Føroyum fyri vinnuvirki, sum eru umfatað av litra d) og stk. 3.«

4) Sum § 2, stk. 3, verður sett:
»Reglarnar í stk. 1, litra d) eru eisini galdandi fyri byggi-, nýgerðar-, innleggingar- ella uppsetingarætlanir, ið vara longur enn 30 dagar. Sama er galdandi fyri virksemi, sum fevna um ráðlegging, eftirlit, ráðgeving ella aðra persónliga hjálp í samband við slíkar ætlanir.«

5) § 4, stk. 4 verður orðað soleiðis:
»Hjún verða mett at liva hvørt sær alsamt, tá annað teirra hevur fastan bústað uttanlands, ella tá tey hava búð hvørt sær í 2 ár í skytsta lagi, og hetta stendst av yrki hjúnanna.«

6) Í § 10, stk. 2 verða orðini »sambært § 4, 4. stk.« strikað.

7) Í § 21 verður stk. 3 orðað soleiðis:
»Hóast reglurnar í stk. 1 kann 1. roknskaparskeið ikki fevna um meira enn 18 mánaðir og kann ikki røkka afturum 1. januar í tí álmanakkaári, felagið er stovnað.«

8) § 24, stk. 2, 2. punktum, verður orðað soleiðis:
»Er inntøkuuppgerðin fyri eitt styttri tíðarskeið enn eitt ár, verður útroknaða skattskylduga inntøkan umroknað soleiðis, at hon svarar til eina heilársinntøku.«

3) I § 2, stk. 1, indsættes som litra i):
»oppebærer indkomst, der ikke er omfattet af litra a), b) d) eller h) for arbejde, udført på Færøerne, for erhvervsvirksomhed, omfattet af litra d) og stk. 3.«

4) Som § 2, stk. 3 indsættes:
»Et bygnings-, anlægs-, installations- eller monteringsprojekt, der varer mere end 30 dage, er omfattet af stk. 1, litra d). Det samme gælder for virksomhed, der består i planlægning, kontrol, rådgivning, eller anden hjælpende personaleindsats i forbindelse med et sådant projekt.«

5) § 4, stk. 4 affattes således:
»Ægtefæller betragtes som levende til stadighed adskilt, når en af parterne har fast bopæl i udlandet eller når adskillelsen har varet i mindst 2 år, og er nødvendiggjort af begge ægtefællers erhverv.«

6) I § 10, stk. 2 udgår ordene »jfr. § 4, stk. 4«.

7) I § 21 affattes stk. 3 således:
»Uanset bestemmelserne i stk. 1 kan 1. regnskabesperiodes længde ikke omfatte mere end 18 måneder og kan ikke strække sig længere tilbage end til 1. januar i det kalenderår, selskabet er stiftet.«

8) § 24, stk. 2, 2. punktum, affattes således:
»Omfatter indkomstansættelsen en kortere periode end et indkomstår, omregnes den skattepligte indtægt således, at denne svarer til en helårsindtægt.«

9) Í § 24, stk. 3, verður 2. punktum strikað.

10) Í § 25, nr. 3) verður aftaná orðið »partafeløgum« skoytt uppí: »lutafeløgum o.ø. skrásettum í Føroyum sambært § 1 nr. 8-15.«

11) § 27, 2. punktum verður orðað soleiðis:
»Selir hin skattskyldugi fasta ogn og hevur hon verið ogn hansara styttri enn 2 ár, má ætlast, at hann hevur ognast hana til tess at selja aftur við ágóða, uttan prógvað verður, at so er ikki«.

12) Í § 29, nr. 12) verður skoytt uppí sum nýtt 3. punktum: »styrkveiting sambært játtan á løgtingsins fíggjarlóg og styrkveiting úr hjálpargrunninum til óarbeiðsførar fiskimenn,«

13) Sum nýggj § 29 nr. 16) verður sett:
»Barnastyrkur smb. § 11 og eykabarnastyrkur smb. § 14 í løgtingslóg nr. 50 frá 5. mai 1987 um barnastyrk við seinni broytingum.«

14) § 30, stk. 3 verður orðað soleiðis:
»Fyri vinningsbýti av partabrøvum, lutaprógvum o.ø.m. verður roknað alt, ið partaeigarar, lutahavarar o.a.m. fáa útgoldið sum part av avlopi felagsins í síðsta roknskaparári ella undanfarnum árum, annaðhvørt hetta avlop er tilkomið sum innvunnið rakstaravlop, av sølu ella uppskriving av ognum felagsins, ella á annan hátt, og annaðhvørt tað er útgoldið sum vinningsbýti, sum útlutan, tá felagið er avtikið, ella tílíkt.«

9) I § 24, stk. 3 udgår 2. punktum.

10) I § 25, nr. 3) tilføjes efter ordet »aktieselskaber«: »andelsselskaber o.a. registreret på Færøerne jfr. § 1, nr. 8-15.«

11) § 27, 2. punktum formuleres således:
»Sker salg af fast ejendom inden 2 år efter erhvervelsen, anses spekulationshensigt at have forligget, medmindre det modsatte godtgøres at være tilfældet.«

12) I § 29, nr. 12) tilføjes som nyt 3. punktum:
»understøttelse i henhold til bevilling på lagtingets finanslov og understøttelse fra hjælpefonden til uarbejdsdygtige fiskere,«

13) Som ny § 29 nr. 16) indsættes:
»Børnetilskud i henhold til § 11 og ekstra børnetilskud i henhold til § 14 i lagtingslov nr. 50 af 5. maj 1987 om børnetilskud med senere ændringer.«

14) § 30, stk. 3 affattes således:
»Som udbytte af aktier, andelsbeviser og andet anses alt, hvad der udbetales aktionærer, andelshavere og andre som en del af selskabets overskud i det sidste eller tidligere regnskabsår, hvad enten dette overskud er fremkommet som indtjent driftsoverskud, ved realisation eller opskrivning af selskabets aktiver eller på anden måde, og hvad enten udbetaling finder sted som dividende, som udlodning ved selskabets likvidation eller lignende.«

15) § 30, stk. 4 verður orðað soleiðis:
»Fyri vinningsbýti tá felag verður avtikið, verður roknað alt, sum verður útlutað avvarðandi partaeigara, luthavara og øðrum meira enn av inngoldnum partapeningi, lutapeningi o.øm.«

16) § 33, nr. 5) verður orðað soleiðis:
»Útreiðslur til provisión, stovningarprovisión ella premiu í sambandi við lántøku ella ábyrgd til vinnuvirki,«

17) § 46, stk. 2, verður orðað soleiðis:
»Rentur, provisión, stovningarprovisión ella premia, sum ikki koma undir frádrátt eftir § 33, nr. 1) ella nr. 5) í hesi lóg, verða frádrigin í útroknaða kommunuskattinum við 14% av upphæddini. Hjúnafelagar gera sjálvir av, hvussu upphæddin, sum ikki kemur undir frádrátt eftir § 33, nr. 1) ella nr. 5) í hesi lóg skal býtast teirra millum. Tó má samanlagdi frádrátturin, tey fáa í kommunuskatti, ikki fara upp um 14% av samanløgdu upphæddini. Um so er, at samanlagdi kommunuskatturin hjá hjúnafelagunum aftaná, at 14% af samanløgdu upphæddina er drigin frá, tá vísir hall, kann hetta verða drigið frá í kommunuskattinum 3 tey næstu árini og soleiðis, at fyrsta árið verður alt hallið drigið frá, um kommunuskattur er til tess og annars so nógv, sum kommunuskattur er til.«

15) § 30, stk. 4 affattes således:
»Som udbytte ved selskabers likvidation anses alt, hvad der udloddes den pågældende aktionær, andelsbevishaver og andre udover den indbetalte kapital.«

16) § 33, nr. 5) affattes således:
»udgifter til provision, stiftelsesprovision eller præmie i forbindelse med optagelse af lån eller kaution til erhvervsvirksomheder,«

17) § 46, stk. 2, affattes således:
»Rente, provision, stiftelsesprovision eller præmie, der ikke kan fradrages efter § 33, nr. 1) eller nr. 5) i denne lov fradrages i den udregnede kommuneskat med 14% af beløbet. Ægtefællerne bestemmer selv, hvorledes beløbet, det ikke kan fradrages i henhold til § 33, nr. 1) eller nr. 5) i denne lov, skal fordeles mellem dem. Det samlede fradrag i kommuneskatten må dog ikke overstige 14% af det sammenlagte beløb. Hvis nu ægtefællernes samlede kommuneskat bliver negativ efter fradrag af 14% af det samlede beløb, kan det negative beløb fradrages i kommuneskatten de 3 følgende år og således, at i det første år bliver alt beløbet trukket fra, såfremt kommuneskatten tillader det og ellers så meget, som kommuneskatten tillader.«

18) § 60, stk. 1, nr. 1) verður orðað soleiðis:
»Alt, sum er lagt inn í peningi og í hesum sambandi frítt vistarhald fyri persónligt arbeiði í tænastu fyri onnur, heruppií løn, frítíðarløn, samsýningar, tantieme, provisión og tílíkar samsýningar.«

19) Í § 76, 2. punktum verður »31. mars « broytt til: »31. mai«.

20) Í § 78, stk. 3, 1. punktum, verða orðini »og ógoldnum rentum eftir § 135« strikað.

21) Í § 79, stk. 2 verða orðini »og við frádrátti av møguligum ógoldnum rentum eftir § 135« strikað.

22) Í § 83, stk. 2 verður 5. punktum orðað soleiðis: »Er munurin millum samanlagda inngoldna kommunu- og kirkjuskattin og ta upphædd, sum kommunan hevur fingið sum forskot, kommuni til góðar, verður hann útgoldin.«

23) Í § 83, stk. 2, verður 6. punktum orðað soleiðis:
»Er munurin landskassanum til góðar, verður hann eftirhildin í mánaðaruppgerðini ella eftirhildin í fylgjandi mánaðaruppgerð, um hann ikki rúmast í avrokningini.«

24) § 83, stk. 3 verður orðað soleiðis:
»Við byrjan av hvørjum mánaði verður huraftrat uppgjørt og avroknað í kommunu- og kirkjuskatti tað, sum er inngingið fyri eldri ár síðani seinastu avrokning, og harumframt upphæddir, sum vegna broyting í álíkning, eftirgeving av skatti, skattur, ið ikki fæst inn, ella av aðrari orsøk er lagdur afturat ella drigin frá síðan seinastu avrokning.«

18) § 60, stk. 1, nr. 1) affattes således:
»Enhver form for vederlag i penge samt i forbindelse hermed ydet fri kost og logi for personligt arbejde i tjenesteforhold, herunder løn, feriegodtgørelse, honorar, tantieme, provision og lignende ydelser.«

19) I § 76, punktum 2 ændres »31. marts« til: »31. maj«.

20) I § 78, stk. 3, punktum 1 udgår ordene »og eventuelle skyldige renter efter § 135«.

21) I § 79, stk. 2 udgår ordene »og med fradrag af eventuelle skyldige renter efter § 135«.

22) I § 83, stk. 2 affattes punktum 5 således:
»Udviser differencen mellem den samlede indbetalte kommune- og kirkeskat og de forskudsvis til kommunen udbetalte beløb, et tilgodehavende til kommunen, udbetales dette.«

23) I § 83, stk. 2, affattes punktum 6 således:
»Viser differencen landskassen et tilgodehavende, tilbageholdes dette i månedsafregningen, eller følgende månedsafregninger, såfremt disse ikke kan indeholdes i foregående afregninger.«

24) § 83, stk. 3 affattes således:
»Den 1. i hver måned sker der endvidere afregning af de beløb af kommunal indkomst og kirkeskat, der siden sidste afregning er indgået for ældre år, samt beløb, der som følge af ændringer i skatteansættelserne, bevillingsmæssig eftergivelse, uerholdelighed eller af andre grunde er ført i tilgang eller afgang siden forrige afregning.«

25) § 83, stk. 4 verður strikað.
26) § 83, stk. 5 verður stk. 4.
27) § 83, stk. 6 verður stk. 5 og orðað soleiðis:
»Kommununnar partur av inntøkuskattinum av deyðsbúgvum verður avroknaður av landskassanum saman við avrokningini eftir stk. 2 og 3.«
28) § 83, stk. 7 verður stk. 6 og verður litra b) orðað soleiðis:
»Upphæddir, sum vegna broyting í álikning verða lagdar aftrat ella drignar frá skattinum hjá feløgum síðani seinasta avrokning, verða avroknaðar kommununum eftir reglunum í stk. 3.«
29) Í § 135, stk. 1 verður 1. punktum broytt soleiðis:
»Hevur skattgjaldari ikki goldið skattin, áðrenn gjaldsfreistin er úti, skal hann til landskassan gjalda rentu av tí skatti, hann skyldar, 1% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjaldsdegi.«
30) Óbroytt.
31) Í § 135, stk. 1, 2. punktum verður orðið »árið« strikað, og í staðin sett: »mánaðin«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Føroya Landsstýri ásetir við kunngerð, nær punktini 20)-31) í hesi lóg koma í gildi.
Stk. 2. Reglurnar um avgjaldið av nýtslugjaldinum í punkt 2) av »at brúka ella hava rættin til at brúka iðnaðar-, handils- ella vísindaligan útbúnað, (m.a. leasing), ella fyri upplýsingar um iðnaðar- handils- ella vísindaligar royndir« eru bert galdandi fyri sáttmálar gjørdir aftaná 17. mars 1988. Broytingar av verandi sáttmálum verða roknaðar sum nýggir sáttmálar.

25) § 83, stk. 4 udgår.
26) § 83, stk. 5 bliver stk. 4.
27) § 83, stk. 6 bliver stk. 5 og affattes således:
»Kommunens andel af indkomstskatten af dødsboer afregnes af landskassen samtidig med afregningen efter stk. 2 og 3.«
28) § 83, stk. 7 bliver stk. 6 og affattes litra b) således:
»Beløb, der som følge af ændringer i påligningen hos selskaber, er ført i tilgang eller afgang siden forrige afregning, afregnes til kommunerne efter reglerne i stk. 3.«
29) Uændret.
30) I § 135, stk. 1, punktum 1 udgår ordene: »efter denne lov«.
31) I § 135, stk. 1, punktum 2 udgår ordet »året« og erstattes af: »måned«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort. Færøernes Landsstyre fastsætter ved kundgørelse ikrafttrædelsestidspunktet for punkterne 20)-31) i denne lov.
Stk. 2. Reglerne om afgift af royalty i punkt 2) af »for anvendelse af eller retten til at anvende industrielt, kommercielt eller videnskabeligt udstyr, (bl.a. leasing), eller for oplysninger om industrielle, kommercielle eller videnskabelige erfaringer« er kun gældende for kontrakter indgået efter 17. marts 1988. Ændringer af gældende kontrakter anses for nye kontrakter.

Viðmerkingar:

Flestu broytingarnar eru útgreiningar og dagføringar av upprunalógini.

Av tílíkum broytingum skal nevnast »definitión« av nýtslugjaldi« (royalty). Upprunalógin ásetir, at nýtslugjald, ið føroysk virki gjalda útlendskum virkjum, er avmarkað skattskyldugt í Føroyum, men lógin sigur einki um, hvat nýtslugjald umfatar. Í hesum lógaruppskoti verður nýtslugjald definerað á sama hátt sum gjørt er í dupultskattasáttmálanum millum Føroyar og Danmark og í OECD modelkonventiónini fyri dupultskattasáttmálar.

Annars skapar uppskotið heimild til at skatta útlendsk virki og persónar, ið arbeiða fyri tílík virki, ið gera byggiarbeiði v.m. í Føroyum, ið vara meira enn 30 dagar, men minni enn 6 mánaðir. Henda broyting fær týdning fyri útlendsk virki, donsk undantikin. Viðvíkjandi donskum virkjum er ásett í dupultskattasáttmálanum, at um arbeiðið varar minni enn 180 dagar, skal virkið skattast í tí parti av ríkinum, har tað hevur fast rakstrarstað.

Í § 76 eru broytingar gjørdar í renturokningini av skyldugum skatti, soleiðis at renturokningin verður munandi lættari at umsita hjá skattavaldinum og lættari at skilja hjá skattaborgarunum.

Eisini eru reglurnar um avrokning av skatti til kommununrnar broyttar soleiðis, at álíknaður kommunuskattur framyvir kann avroknast einaferð um mánaðin og ikki sum nú einaferð um árið.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1, 4):

Broytingin í § 1, 4) er orsakað av, at ordingin frá fyrstan tíð hevur verið ógreið. Í viðmerkingunum til lógina er gingið út frá, at í teimum førum, har tað ikki við byrjan av flytingini til Føroyar kann verða avgjørt, um eitt styttri tilhald fer at verða meira enn 180 dagar, verður skattur fyribils eftirhildin hjá slíkum persónum eftir reglunum fyri avmarkað skattskyldug. Eftir núgaldandi orðing »hevur dvalt«, er ikki heimild til, at innan 6 mánaðir, at lata ein persón koma undir fulla skattskyldu beinanvegin, sjálvt um persónurin ætlar sær at verða her meira enn 180 dagar. Greinin hevur eisini týdning fyri teir útlendingar, sum sigla við føroyskum bátum, sum sostatt kunnu koma undir fulla skattskyldu beinanvegin, og fyri útlendingar, sum koma higar at arbeiða, uttan at teir eru útleigaðir.

Til § 2, stk. 1, litra c):

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt var

ásett í grein 2, stk. 1, litra c), at persónar og feløg uttanlands skulu verða avmarkað skattskyldug í Føroyum av nýtslugjaldi (royalty).

Tá nevndu persónar og feløg hóast hetta ikki góvu upp til skattingar í Føroyum, varð ásett at nýtslugjaldið skuldi kelduskattast í Føroyum. Hetta var gjørt í 1987 við løgtingslóg nr. 55 um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Tað hevur víst seg at vera ivi millum skattaborgarar, hvussu málberingin »nýtslugjald« skal skiljast. Landsstýrið vil tí hervið skjóta upp at definera nýtslugjald á sama hátt, sum gjørt er í dupultskattasáttmálanum millum Føroyar og Danmark, sum aftur byggir á OECD modelkonventiónina um dupultskattasáttmálar.

Ivi hevur verið millum skattaborgarar, um nýtslugjald eisini umfatar gjald fyri brúk ella rættin til at brúka ídnaðar-, handils ella vísindaligar royndir. Ásett verður tí í gildisreglunum, at ikki skal gjaldast gjald av nýtslugjaldi, har sáttmáli er gjørdur áðrenn 17. mars 1988.

Til § 2, 1. stk. og § 2, 3. stk.:
Í § 2, 1. stk. verður nýtt litra i) innsett, sum sigur, at persónar, sum arbeiða fyri útlendsk virkir, sum í Føroyum fara undir byggi-, nýgerðar-, innleggingar- ella uppsetingarætlanir, ella sum arbeiða fyri virkir, sum fevna um ráðlegging, eftirlit, ráðgeving ella annað persónligt hjálpararbeiði í sambandi við slíkar ætlanir, koma undir avmarkaða skattskyldu til Føroyar.

Ætlanin við uppskotinum er at áleggja útlendingum, sum í Føroyum arbeiða fyri útlendskar fyritøkur av omanfyri nevnda slagi, avmarkaða skattskyldu, um virksemi hjá hesum fyritøkum varir longri enn 30 dagar. 30 daga reglan her gevur skattavaldinum heimild til at áleggja virkjunum skattskyldu frá fyrsta degi.

Í løtuni eru útlendingar, sum arbeiða í Føroyum fyri útlendskar fyritøkur, ikki skattskyldugir, um uppihald teirra her er styttri enn 180 dagar, og eru fyritøkurnar heldur ikki skyldugar at ávísa løn v.m. sum A-inntøku um afturhaldsskipanina, tá tey ikki hava heimating her ella hava fast rakstrarstað. Í skattalógini, sum hon er orðað í dag, er einki ásett um, hvussu leingi ein útlendsk fyritøka kann arbeiða í Føroyum, áðrenn roknast kann við, at hon hevur fast rakstrarstað, men kann hert metast út frá ymiskum »objektivum kriterium«

um fast rakstrarstað er, og kunnu hesi verða, um skrivstova er, verkstaður, deild ella stað, har fyritøkan verður stjórnað frá. Verður í lógini ásett, at virksemi, sum varir longri enn 30 dagar verður avmarkað skattskyldugt, er heimild at áleggja teimum ávísingarskyldu av allari løn o.ø.m. Møguleiki er tá eisini til, longu frá 1. degi, at áleggja hesum fyritøkum ella virkjum ávísingarskyldu, um metast kann, beinanvegin virksemi byrjar, at hetta fer at vara longri enn 30 dagar.

Í nýggjum stk. 3 í § 2 í skattalógini verður orðingin løgd inn, sum áleggur hesum útlendsku virkjunum avmarkaða skattaskyldu til Føroyar, um frammanfyri nevndu treytir, um hvussu leingi virksemi varar, og hvat slag av virksemi tað snýr seg um, eru uppfyltar.

Her skal tó havast í huga, at henda nýggja lógarregla ikki í síni heild kann nýtast mótvegis donskum fyritøkum, tá í tvískattasáttmálanum millum Danmark og Føroyar er avrátt, at fast rakstrarstað ikki er fyrr enn virksemið hevur vart í meira enn 6 mánaðir, og tað snýr seg um byggi-, og nýgerðar- og uppsetingarætlanir. Snýr tað seg um innleggingarætlanir, virksemi sum fevnir um ráðlegging, eftirlit, ráðgeving ella aðra persónliga hjálp í sambandi við slíkar ætlanir, kunnu reglurnar í lógaruppskotinum nýtast.

Til § 4, 4. stk.
§ 4, 4. stk. umfatar tey hjún, sum liva hvørt sær, antin tí annað hevur tikið bústað uttanlands, ella tí tey hava búð hvørt sær í stytsta lagi 2 ár, og hetta stendst av yrki hjúnanna eitt nú í hvørt sínari kommunu í Føroyum, uttan tey tó av hesum grundum hava slitið sambúð sína.

Til § 10, 2. stk.
Her verður hugsað um hjún, sum slíta sambúð sína, tó uttan at vera sundurlisin ella skild. Um sannað verður, at tey veruliga eru flutt frá hvørjum øðrum, og allur sambúðarfelagsskapur er hildin uppat, at tá nýtt inntøkuár byrjar, verða tey sett í skatt hvørt fyri seg.

Til § 21, 3. stk.:
Eftir núgaldandi reglum kann 1. roknskaparskeið ikki fevna um meira enn tvey almanakkaár. Hetta hevur borið í sær, at feløg hava verið stovnað, hvar 1. roknskaparskeið hevur rokkið aftur um ein 1. januar í stovningarárinum. Úrslitið av hesum hevur verið, at skattafyrisitingin hevur verið noydd at gera endaligar álíkningar um aftur fyri lokin roknskaparár, hvar roknskapur og sjálvuppgávur eru latnar inn til líkingarvaldið og endaliga álíknaðar.

Nú verður skotið upp, at fyrsta roknskaparskeið ikki kann fevna um meira enn 18 mánaðir, og ikki kann farast afturum 1. januar í ti álmunakkaári, felagið er stovnað í. Hetta vil siga, at feløg kunnu stovnast til eina og hvørja tíð í álmanakkaárinum við 1. roknskaparskeið upp til 18 mánaðir, men tó onguntíð aftur í eitt lokið inntøkuár.

Sambært »kunngerð um minstukrøv til bókhald«, so kann 1. roknskaparskeiðið hjá einum partafelag ikki vera longur enn 18 mánaðir.

Til § 24, 2. stk., 2. punktum:
Broytingin hevur til endamáls at nágreina galdandi mannagongd, so tað greitt verður orðað í lógini, at er inntøkuuppgerðin fyri eitt styttri tíðarskeið enn eitt ár, verður útroknað skattskylduga inntøkan umroknað soleiðis, at hon svarar til eina heilársinntøku.

Til § 24, stk. 3, 2. punktum:
Í hesi grein er ásett, at um eitt felag v.m. broytir roknskaparskeið, sum tað higartil hevur nýtt, og eitt inntøkuskeið av hesi orsøk verður styttri ella longri enn 12 mánaðir, so skal skattskylduga inntøkan umroknast soleiðis, at hon svarar til inntøkuna í 12 mánaðir.

Skotið verður upp at strika hetta punktum í lógargreinini, soleiðis at øll inntøka verður skattað, tá roknskaparskeiðið verður broytt, uttan mun til um inntøku tíðarskeiðið av hesi orsøk verður styttri ella longri enn 12 mánaðir.

Henda lógarregla kemur tá eisini at verða í tráð við skatlingina av fyrsta roknskaparskeiði hjá nýstovnaðum feløgum v.m., soleiðis sum ásett er í § 21, 1. stk., har sagt verður, at nýstovnað felag ella aðrir stovnar verða settir í skatt av allari inntøku í roknskaparskeiðinum, sama hvussu langt tað er.

Til § 27, 2. punktum:
Broytingin er neyðug fyri, at samsvar skal vera millum hesa grein og »løgtingslóg nr. 40 um skatt av vinningi í sambandi við sølu av virðisbrøvum frá 17. aprfl 1986«. Partabrøv og tilík almenn virðisskjøl eru tí strikað, tá tey verða skattað sambært nevndu lóg.

Til § 29, nr. 12).
Her verður skotið upp sum nýtt punktum at seta, at styrkveiting sambært játtan á løgtingsins fíggjarlóg, og styrkveiting úr hjálpargrunninum fyri óarbeiðsførar

fiskimenn verða undantikin skatting. Praksis hevur verið, at hesar báðar veitingarnar hava ikki verið skattaðar. Her er tí bert talan um at fáa tað lógarfest.

Til § 29, nr. 16:
Broytingin er ein fylgja av løgtingslóg nr. 50 frá 5. mai 1987 um barnastyrk við seinni broytingum.

Til § 30, 3. og 4. stk.:
Greinin umfatar nú eisini vinningsbýti av lutaprógvum o.ø.m. og alt sum verður útlutað avvarðandi luthavara meira enn av inngoldnum lutapeningi o.ø.m.

Til § 33, nr. 5).
Sambært hesi lógargrein er nú heimild til at draga frá í inntøku útreiðslur til provisión, stovningarprovisión ella premiu í samband við lántøku ella ábyrgd. Hetta førir við sær, at øll renta, stovningarprovisión o.a.m., eisini í samband við privata skuld, kann dragast frá í inntøkuni. Her er ætlanin, at tær provisiónir o.a.m., sum hava samband við privata lántøku og ábyrgd, kunnu dragast frá við ávikavist 14% og 28% í tí útroknaða kommunu- og landsskattinum.

Skotið verður tí upp, at uppískoyti verður sett til nr. 5), soleiðis at hesin frádráttarrættur verður avmarkaður til provisión o.l. í samband við vinnuvirki.

Til § 46, 2. stk.
Sum fylgja av broytingini til § 33, 5) verður gjørd broyting til § 46, 2. stk., soleiðis at uppí rentu, sum ikki kemur undir reglurnar í § 33, 1) og 5), verður roknað tann provisión v.m., sum stendst av privatari lántøku ella ábyrgd.

Til § 60, 1. stk. nr. 1).
Henda broyting er gjørd fyri at javnstilla persónar, sum undir avmarkaðari skattskyldu í Føroyum fáa frítt vistarhald við teir persónar, sum sambært nýggja nr. 8) í hesum stykki, sum útleigað arbeiðsmegi úr útlondum til Føroyar, skulu skattast av fríum vistarhaldi, meðan teir eru undir avmarkaðari skattskyldu.

Til § 76.
Í § 76 verður skotið upp at leingja freistina fyri sjálvbodnari inngjalding av fyribilskatti við 2 mánaðum.

Hetta er gjørt út frá tí sjónarmiði, at tíðin er stutt frá tí, at sjálvuppgávan skal vera inni aftur hjá skattavaldinum, og at freistin fyri sjálvboðnum inngjaldi gongur út, ca. 14 dagar. Ein sannroynd er eisini, at fleiri og fleiri av teimum, sum eru í sjálvstøðugari vinnu nýta grannskoðarar til at geva upp fyri seg. Her er tí talan um eina stóra miðsavnan av arbeiðinum hjá grannskoðarum og bókahaldsvirkjum, sum kunnu gera tað knipið, at rokna út ella gera upp, upp á so stutta tíð.

Til § 78, stk. 3 og § 79, stk. 2:
Ætlanin við uppskotnu broytingini í §§ 78 og 79 hevur til endamáls at gera ársuppgerðina meira einfalda og lætta at lesa. Við broytingini í stk. 3 verður renta av ov seint goldnum skatti tikin úr uppgerðini og løgd til vanligu innkrevjingini.

Til § 83.
Sambært verandi lóg avroknar landskassin kommunum teirra part av inngoldna fyribilsskattinum eina ferð um mánaðin.

Í november í álíkningarárinum verður gjørt upp, og hevur ein kommuna tá fingið ov lítið í mun til álíkningina, so skal hon hava restina eftir ávísum reglum. Hevur hon fingið ov nógv, skal hon gjalda tað aftur yvir 12 mánaðir. Síðan verður bert gjørt upp eina ferð um árið. Tað merkir, at tær broytingar, sum henda í einum álíknaðum ári, og tað, sum inngoldið verður av írestandi skatti o.ø. meira, verður standandi inni hjá landskassanum í eitt heilt ár.

Við broytingini í § 83 verður skotið upp, at kommunurnar verða avroknaðar eina ferð um mánaðin, eisini fyri tey gomlu árini. Hetta er eitt ynski frá Tórshavnar kommunu og kommunufelagnum. Tað má eisini sigast at vera meira rímiligt at uppgjørt verður hvønn mánaða, so kommunurnar kunnu fáa sín pening í staðin fyri at koyra við stórum kassakredittum.

Til § 135, 1. stk. 1. punktum.
Her verður skotið upp at broyta føroyska tekstin, so at hann samsvarar við danska tekstin, sum í hesum føri er tann rætti. Danski teksturin er óbroyttur.

Í sama stað í danska tekstinum verður skotið upp at broyta danska tekstin, tí samsvar er ikki millum føroyska og danska tekstin. Føroyski teksturin er her tann rætti og verður óbroyttur.

Til § 135.

Við broytingini í § 135 verður skotið upp, at rentarokningin av ov seint goldnum skatti verður gjørd eina ferð um mánaðin (á sama hátt sum fyri árið 1984,) og at hon gongur inn í vanligu rykkjara- og inngjaldingaskipanina hjá innkrevjingarvaldinum. Tað er ikki minst henda broyting, sum skal gera endaligu ársuppgerðina meira einfalda og lættari skiljandi hjá vanliga skattaborgaranum.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 5. mai legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og eru tað trinni ávís viðurskifti, ið eiga at vera broytt í mun til uppskot landsstýrisins.

Tað fyrsta er, at sambært § 2 í uppskotinum fær lógin gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Skattanevndin mælir til, at hetta verður broytt til, at lógin fær gildi 1. juli 1988.

Síðani eru tvær broytingar av tekniskum slag og tað fyrst viðvíkjandi § 1, pkt. 18, sum fær eina nýggja orðing viðvíkjandi § 47, 1. stk. í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, og sum seinasta broyting verður um pkt. 18 í uppskoti landsstýrisins, nú broytt til pkt. 19 viðvíkjandi § 60, 1. stk., nr. 1 í omanfyrinevndu løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum. Raðfestingin av punktunum frá 18 - 31 verður sostatt broytt til 19 - 32.

Sostatt mælir ein samd skattanevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum broytingum.

I) Í § 1, pkt. 18, verður orðingin 1. pkt. í § 47, 1. stk. soleiðis: »Allar skattskyldugar inntøkur, sum eru funnar eftir reglunum í hesari lóg, undantiknar tær, sum nevndar eru í § 2, 1. stk. a), b), h) og i), verða skattaðar við prosent (líkningarprosentinum), sum er tað sama fyri allar persónligar skattgjaldarar í kommununi.«	*I)* I § 1, pkt. 18, affattes 1. punktum i § 47, stk. 1 således: »Samtlige i henhold til reglerne i denne lov udfundne skattepligtige indtægter, bortset fra de i § 2, stk. 1, a), b), h) og i) nævnte, beskattes med en for samtlige personlige skatteydere fælles procent (ligningsprocenten).«

2) § 60, stk. 1, nr. 1) verður orðað soleiðis:
»Alt, sum er lagt inn í peningi, og í hesum sambandi frítt vistarhald og fría ferðing til og úr Føroyum, fyri persónligt arbeiði í tænastu fyri onnur, heruppií løn, frítíðarløn, samsýningar, tantiémc, provisión og tílíkar samsýningar.«

3) Punktini 18 - 31 verða 19 - 32.

4) Í § 2 verður 1. punktum orðað soleiðis:
»Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1988.»

2) § 60, stk. 1, nr. 1) affattes således:
»Enhver form for vederlag i penge, samt i forbindelse hermed ydet fri kost og logi samt frie rejser til og fra Færøerne, for personligt arbejde i tjenesteforhold, herunder løn, ferigodtgørelse, honorar, tantiéme, provision og lignende ydelse.«

3) Punkterne 18 - 31 bliver til 19 - 32.

4) I § 2, formuleres 1. punktum således:
»Denne lov træder i kraft 1. juli 1988.«

2. viðgerð 5. mai. Broyting frá samdari nevnd til § 1 samtykt við 27-0, § 4 við 25-0. Uppskot landsstýrisins broytt § 1 við 27 0, § 2 samtykt við 31-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 27-0.

3. viðgerð 13. apríl. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2128-5-8-1. Lóg nr. 49, 5. mai 1987.

137 Val av álitsmonnum og nevndum.

Ár 1988, týsdagin 19. apríl varð við 29-0 atkvøðum samtykt, at málið kundi leggjast fram:

sí bls. 8

138 Vegir og lendingar.

Ár 1988, týsdagin 3. mai legði samferðslunevndin fram soljóðandi:

Álit

Samferðslunevndin hevur viðgjørt tær o.u. 150 umsóknirnar, sum innkomnar eru.

A.

I: Vegir:

Á fíggjarløgtingslógini eru settar av undir gr. 13.1 107,2 mió. kr., til vegagerðir, umsiting av landsvegunum o.a...

Viðvíkjandi nýtsluni av hesum peningi skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi:

U P P S K O T

til samtyktar

Til útbygging av og ábøtur á landsvegakervini og umsiting teirra:

Harumframt til brýr, ferjulegur o.a.	87.207.142 kr.
Bundið í ikki nýttu játtanum o.u.	12.676.858 kr.
Til niðanfyri nevndu vegagerðir	7.316.000 kr
	107.200.000 kr.

Kommuna	**til**	**Studningur 3/4 av kr.**
Fugloyar	— dyrkingarveg niðan í Eystfelli í Hattarvík	50
	— vegastrekkið uppi í Króki	100
Svínoyar	— umvælingar av vegnum frá bygdnini út til bátahylsvegin	100
		250

Kommuna		Studningur 3/4 av kr.
	Flutt	**250**
Svínoyar	— dyrkingarveg Eystur í Hagan	100
Viðareiðis	— Dalavegin	200
Hvannasunds	— veg í sambandi við alivinnu s.f. bygdina	200
	— bygdaveg í Hvannasundi	50
	— bygdaveg í Norðdepli	100
	— breiðking av vegi til skúlan á Fossanesi	100
Klaksvíkar	— veg út á Torvadal	200
Kunoyar	— veg norður frá bygdini í Haraldsund.	100
	— vegbrúgv um Skarðalsá í Kunoy	100
	— veg í sambandi við iðnøki í Kunoy	100
Mikladals	— dyrkingarveg, Glaðingar-steini niðan á Háls	150
Húsa	— veg til Knúksdal	100
	— útstykkingarveg á Húsun	100
Elduvíkar	— útstykkingarveg í Elduvík	100
	— umbygging av íbindingar vegi í Funningsfirði	75
Oyndafjarðar	— veg norður í Bø	150
Fuglafjarðar	— atkomuveg til iðnaðar- og sethúsuøki á Kambsdali	100
	— Innandalsvegin í Fuglafirði	100
	— veg til smoltstøð hjá P/F Laksá	100
Gøtu	— íbindarveg í landsveg úr Syðrugøtu	100
	— íbindingarveg í landsvegin undir Gøuteiði	100
	At flyta	2675

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
	Flutt	**2675**
Gøtu	— veg fram við ídnaðarøkinum í Norðagøtudali	150
Runavíkar	— vegur ur á Glyvrudal	75
	— framhald og umbygging av bygdarvegnum í Rituvik	100
	— vegaíbinding til sethúsaøkið millum Sandheyggj og Høgarheyggj á Glyvrum	100
Nes	— Vegin úti á Nesi	100
	— vegin á Brekkukletti	100
	vegin niðan á stadionøkið á Svangaskarði	200
Skála	— búsetingarveg úti á Fløtum	120
	— búsetingarveg úti í Sjóvartúni	75
	— búsetingarveg í Gamla Gerði	75
Sjóar	— vegagerð til vinnuøki á Lághálsum	100
	— vegagerð til ovara Follond	100
Sunda	— húsa- og útstykkingarveg á Oyri	100
	— veg til útstykking (Langheyggur)	100
	— útstykkingarveg á Oyrabakka	75
Eiðis	— hústaðarvegir á Eiði	100
	— bústaðarveg í Svínáum	100
	— dyrkingarveg við Ljósá	50
	— veg til laksaringar í Sveitaskálanum norðanvert Svínáir	100
Gjáar	— vegbrúgv við Hulduheyggin við tilhoyrandi vegi	100
Funnings	– bygdarvegin	150
Hvalvíkar	— útstykking í Hvalvík	100
	at flyta	4945

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
	Flutt	**4945**
Hvalvíkar	— útstykking í Streymnesi	100
Hósvíkar	—útstykking	150
Kvívíkar	— framhald av ovara vegi í Leynum	100
	— framhald av vegi til útstykking frammi í Gerði	100
	— breiðking av vegi úti í Nesi og brúgv um Válagil	75
Vestmanna	— vegin í Fjalsgerði	100
	-- ovara veg Gerðisheyggur Fjørðurin	150
Tórshavnar	— dyrkingarveg niðan á Skørð	120
Argja	— dyrkingarveg í Syðradali	120
Kirkjubøur	— dyrkingarveg út á Glyvurs nes	100
	— framhald av útstykkingarvegi undir Borgarhálsi á Velbastað	100
	— veg til nýggja útstykking innan fyri bøin í Kirkjubø	100
Hests	— ábøtur á verandi bygdarveg n.f. bygdina og veg til kirkjugarðin	200
Sandavágs	— nýgerð av nesavegnum	75
	— nýgerð av vegi omanfyri Fútaklett	75
	— veg út á Trøð	100
Miðvágs	— veg til sethúsaøki á Vatnsoyrum og brúgv um Heimaru Gjógv	100
	— veg úr Húsi og inn á Váglið-Nes	75
	— veg til sethúsaøkið við Týkarheyg	100
Sørvágs	— veg til Úttrinðigsbøin (meirjáttan)	100
	at flyta	7085

Kommuna	til	Stondingur 3/4 av kr.
	Flutt	**7085**
Sørvágs	— veg norður í Húsadal (meirjáttan)	75
	— veg uppi í Mýru	75
Bíggjar	ábøtur á bygdavegin í Gásadali	75
Sands	— Søltuvíkarvegin	150
	— veg cy. og n.f. Sandsvatn	75
	— veg til Skálsafjørðing	100
Skopunar	— brúgvagerð um Stóra	150
	— Høvdarhagavegin í sinb, við uppdyrking	100
Skálavíkar	— gerð og asfaltering av Heimastahagavegnum	150
	— Uppdyrkingarveg inni á Fituni	100
Húsvíkar	— nýggja brúgv um Stóra heiman fyri Oyragarð í Dali	120
Skúvoyar	— veg til rætt norðri á Leiti	100
Hvalbiar	— veg vestur móti røðini í Sandvík	75
	— veg til traðirnar í Prestafjalli	50
	— nýgerð av vegi frá Krógv til Hvalbiar skúla	100
	— breiðking og nýgerð av vegi omanvert húsini í Leirum til Toftir	50
	— uppdyrkingarveg eystur í bøin í Sandvík	75
	— veg til byggiøkið í Grímsfjalli	50
Tvøroyrar	— veg niðan á Nakk í Froðba	75
	— veg í Heiðunum í Froðba	100
	— veg á Ahlen økinum í Trongisvági	100
Hovs	— veg til nýtt sethúsaøki cystalaga í bygdini	100
	at flyta	9130

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
	Flutt	9130
Hovs	— ábøtur á vegin til Vatnsnes	75
Porkeris	— liðugtgerð av vegi út á Gráanvíkshellur	75
	— veg vestur í Dal	75
Vágs	— dyrkingarveg í Toftahaga	100
	— veg inni á Bakka í Vági	150
Sumbiar	— veg í Víkarbyrgi	150
	tilsamans	9755
		— 7316

II

Leudingar:

Játtanir fyri fíggjarárið 1988, sum samtyktar eru áður, eru hesar:

Kommuna	TIL	STUDNINGUR 3/4 av kr.
Svínoyar	Batahyl í Glógvansuðr (3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	600.000
Viðareiðis	Vegin undir leiti (2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	150.000
Hvannasunds	Atkomuvegur og planering av havnaøki á Norðtoftum (6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	200.000
	Leinging av bryggjuni í Norðdepli (4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	400.000
	Ábøtur á »Nýggjubrúgv« o.a. í Sandoyarbugi (Viðareiðis- og Hvannasunds kommunu í felag) (3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	250.000
	Leingjan av atløgubryggju undir Frostvirkinum (Viðareiðis- Hvannasunds kotmunur í felag) (2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	400.000
Klaksvíkar	Bátahyls í Borðoyarvík (6. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	400.000
	Bátahyl á Borðoyarvík (4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	700.000
	Bátaarmar í Klaksvík (2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	140.000
	Bátahavnina á Borðoyarvík (2. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	650.000
	at flyta	3.890.000

KOMMUNA	TIL	STUDNINGUR 3/4 av kr.
	flutt:	**3.890.000**
Kunoyar	Bátahavn n.f. lendibrúnna í Haraldsundi (3 ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Bátahavn í Haraldsundi (2 ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	150.000
Húsa	Planering av øki í Knúksdali (3. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	250.000
Elduvíkar	Bátahyl í Funningsfirði (5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	300.000
	Leinging av atløgustíðuni í Funningsfirði (2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt.	200.000
Oyndafjørður	Dekksbátahavnina (2 ársgjald av 6 ára játtan) bygt.	250.000
Fuglafjarðar	Smábátahavnina (4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt.	250.000
	Smábátahavnina (3. ársgjald av 4 ára játtan bygt	100.000
	Smábátahavnina (2. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	100.000
Gøtu	Bátahylin undir Gøtueiði (2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
Runavíkar	Bryggjubygging á Bakka á Glyvrum (4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	400.000
	Lending í Rituvík (4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	300.000
	Bátahyl á Glyvrum og atkomuveg (3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
	Lending í Lamba (3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	250.000
	Lending í Rituvík (3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	200.000
	Lendingina í Lamba og veg oman (2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	100.000
	at flyta	7.340.000

KOMMUNA	TIL	STUDNINGUR 3/4 av kr.
	flutt:	**7.340.000**
Runavíkar	Bátahylur og lendingarveg á Bakka, Glyvrum (2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
Nes	Deksbáta og bátahavn í Oyrunum (3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	150.000
	Deksbátahavnina og bátadrátt í Oyrunum (2. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	250.000
Skála	Bátahyl í Skálafirði (3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Sjóvar	Lending og atkomuveg Innan Glyvur (3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Útbygging av bátahylinum í Heyggstøð (2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	150.000
Sunda	Bátahylin á Oyrabakka (3 ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	100.000
	Meirikostnað viðv. Skeljavirkinum og til drátt norðan fyri virkið (3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	150.000
	Veg í sambandi við økið til fóður- og slakti s.f. havnin á Oyri (í grønisáum) (3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Bátahylin á Oyrabakka (2. ársgjald av 6 ára játan) í gerð	200.000
	Grótkastið úti á Oyri (2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	250.000
Eiðis	Atløguplass til útróðrarbátar á Eiði (6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	150.000
	Bátabrúgv á Eiði (4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	400.000
	Lendingina við Ljósá (3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	100.000
	Bátahylin við Ljósá (2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	200.000
	at flyta	10.040.000

KOMMUNA	TIL	STUÐNINGUR 3/4 av kr.
	flutt:	10.040.000
Funnings	Lendingina í Funningi (2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	100.000
Haldarsvikar	Ábøtur á atløgusiðu í Vík (2. ársgjald av 4 ára játtan)	200.000
Hvalvíkar	Havnaarbeiði, eykajáttan og til vatnveitning (4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	300.000
	Vatnveiting til havnalagið (3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	100.000
	Betongdekk o.a. á Kaiøkið (2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	300.000
Hósvíkar	Havnaøki og atløgusíðu (4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	300.000
	Atløgubryggju fram við vegnum í bátahylinum í Hósvík og stoyping av dekki (2. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	200.000
Kollafjarðar	Leinging av ytra armi o.a. í bátahylinum við Sjógv (2. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	150.000
	Veg til havnaøki s.f. Oyruna (2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	150.000
Kvívíkar	Bátahavnina í Kvívík (7. ársgjald av 7 ára játtan) bygt	600.000
	Bátahavnina (5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	300.000
	Brimskaða (3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
Vestmanna	Bátahylin Inni á Fjørð (2. ársgjald av 7 ára játtan) í gerð	200.000
	at flyta	13.040.000

KOMMUNA	TIL	STUDNINGUR 3/4 av kr.
	flutt:	**13.040.000**
Tórshavnar	Bátahyl í Kaldbak (3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Argja	Bátahavn (4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	400.000
Kirkjubøur	Lendingina á Velbastað (3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	200.000
	Leinging av brimgarðinum o.a. á Velbastað (2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
Hests	Vegin frá lendingini niðan á bakkan í Koltri (2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð	200.000
Sandavágs	Bátahavn (2. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt	800.000
Miðvágs	Øking um bátahylin (3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Viðkan av bátahylinum (2. ársgjald av 7 ára játtan) ikki bygt	150.000
Sørvágs	Bátahylin (6. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	150.000
	Bátahylin (5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	250.000
	Regulering av grótkasti, el- og vatnveiting í bátahavnini (3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	100.000
	Dýping av bátahylinum (2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	150.000
Biggjar	Ábøtur á lendingina og trappur niðan í Bø (2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	50.000
Mykines	Bøting um lendingarviðurskiftini (3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	500.000
	at flyta	16.490.000

KOMMUNA	TIL	STUDNINGUR 3/4 av kr.
	flutt	**16.490.000**
Sands	Atløgusíða til bátar (3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	200.000
	Atløgusíða til bátar (2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	200.000
Skálavíkar	Veg út eftir Bakka (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	100.000
	Dekkið eystan fyri fiskahúsið (2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	150.000
Húsavíkar	Lendingina á Skarvaskeri (5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	300.000
	Brimskaða í Húsvík (4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	400.000
	Lendingina í Dali (3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Bátahavn innanfyri skarvasker (3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	400.000
	Lendingina á Skarvaskeri (2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	300.000
Skúvoyar	Bátahyl (3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	500.000
Hvalbiar	Ábøtur á havnina í Nesi (6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	50.000
	Ábøtur á havnaviðurskiftini í Nesi (5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	250.000
	Lending í Nesi (4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	700.000
	Meirkostnað og bátasíðu í Nesi (3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	300.000
	Bryggju í Sandvík (3. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Bátaspæl í Nesi (2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	50.000
	Leingjan av bryggju í Sandvík (2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	350.000
	at flyta	21.040.000

KOMMUNA	TIL	STUDNINGUR 3/4 av kr.
	flutt:	**21.040.000**
Hvalbiar	Lendingina í Nesi (2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	150.000
Tvøroyrar	Bátahylin undir Tvørábakka (6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	100.000
	Bátahylin undir Tvørábakka (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	100.000
	Bátahylin í Trongisvági (2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Øki við Bærentshavnið (2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Famjins	Brimverja og brimskaða (2. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	75.000
Hovs	Portur ella grótkast og teymar (6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	75.000
	Lendingina í Tjaldavík (2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
Porkeris	Veg til grótkast (3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Vágs	Ábøtur á lendingina á Nesi (4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	50.000
	Bátahylin (4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	200.000
	Øki við bátahavnina í Oyrunum (2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	250.000
Sumbiar	Bátahyl í Sumba (5. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	400.000
	Bátahyl í Pollinum (3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	300.000
	Brimskaða o.a. í Pollinum (2. ársgjald av 7 ára játtan) bygt	300.000
	at flyta	23.440.000

ell/sd 117

KOMMUNA	TIL		STUDNINGUR 3/4 av kr.
		flutt:	**23.440.000**
Sumbiar	Atløgusiðu til bátar, planering og stoyping undir neystum og bátadrátt í Lopra (2. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		100.000
	Brimverja av smoltstøðini í Víkarbyrgi og veg til hana (2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt		200.000
	Tilsamans	3/4 av	23.740.000
		=	17.805.000

Játtað frammanundan fyri 1988 til lendingar ..... 17.805.000 kr
Ikki nýttar gjaldkomnar játtanir pr. 31.12.1987 ..... 31.886.351 kr.

49.691.351 kr
Av játtanum fyri 1988 er goldið ÷ 2.428.968 kr

47.262.383 kr.

Í grunni pr. 31.12.1987	30.250.051 kr.	
játtað 1988	25.000.000 kr	55.250.051 kr

Til góðar ..... 7.987.668 kr.

Viðvíkjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

U P P S K O T

———————

til samtyktar

Kommuna	**til**	**Studningur 3/4 av kr.**
Svínoyar	— bátahyl í Glógvansurð 3/4 av 700.000 kr/árið í 8 ár	700.000
Hvannasunds/ Viðareiðis	— Leinging av atløgubryggjuni undir flakavirk. í Norðdepli 3/4 av 400.000 kr/árið í 8 ár	400.000
Klaksvíkar	— bátabrúgvar, asfaltering, ljós, vatn v.m. við bátahylin á Borðoyarvík 3/4 av 400.000 kr/árið í 8 ár	400.000
Elduvíkar	— bátaspæl og ábøtur á flotbrúgv í Funningsfirði 3/4 av 100.000 kr/árið í 2 ár	100.000
Oyndafjarðar	— sunnara vegin omaru á havnina o.a. 3/4 av 100.000 kr/árið í 4 ár	100.000
Leirvíkar	— keyp og útlegging av flotbrúgv	420.000
Runavíkar	— lendingina í Rituvík 3/4 av 100.000 kr/árið í 6ár	100.00
	—brimskaði á lendingina í Lamba	480.000
	— bátahylin á Glyvrum 3/4 av 100.000 kr/árið í 8 ár	100.000
	at flyta.....	2.800.000

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
	Flutt	**2.800.000**
Nes	— Brimskaða á verjugarðin og dýping av deksbátahavnini í Oyrunum 3/4 av 400.000 kr/árið í 8 ár	400.000
Skála	— bátahyl í Skálafirði, molhøvd og dýping av bátahylinum á Skála 3/4 av 300.000 kr/árið í 8 ár	300.000
Sjóvar	— bátahylin á Heygsstøð 3/4 av 100.000 kr/árið í 4 ár	100.000
	— lendingina á Morskranesi 3/4 av 100.000 kr/árið í 6 ár	100.000
	— atløgusíður o.a. í bátahylinum á Selatrað 3/4 av 100.000 kr/árið í 6 ár	100.000
Sunda	— brimskaða á grótkastið á Oyri 3/4 av 500.000 kr/árið í 4 ár	500.000
Eiðis	— lendibrúnna í Svínáum 3/4 av 150.000 kr/árið í 4 ár	150.000
	— bátahylin við Ljósá 3/4 av 150.000 kr/árið í 6 ár	150.000
Gjáar	— ábøtur á lendingina	100.000
Funnings	— ábøtur á lendingina í Funningi 3/4 av 100.000 kr/árið í 3 ár	100.000
Hvalvíkar	— liðugtgerð av bátahylinum 3/4 av 200.000 kr/árið í 8 ár	200.000
Kollafjarðar	— bátahavn á Signabø 3/4 av 300.000 kr/árið í 8 ár	300.000
	at **flyta**	5.300.000

Kommuna	til	Stuðningur 3/4 av kr.
	Flutt	**5.300.000**
Argja	– Framhald av bátahavnsarbeiðinum á Argjum 3/4 av 1.000.000 kr/árið í 8 ár	1.000.000
	— lendingina í Norðadali 3/4 av 100.000 kr/árið í 2 ár	100.000
Hests	lendingarvegin í Koltri 3/4 av 400.000 kr/árið í 2 ár	400.000
Nólsoyar	— brimverju millum Hørgina og Eiði 3/4 av 200.000 kr/árið í 6 ár	200.000
Sandavágs	— bátahavn í Sandavági 3/4 av 1.000.000 kr/árið í 8 ár	1.000.000
Miðvágs	— víðkan um bátahylin 3/4 av 300.000 kr/árið í 8 ár	300.000
Húsavíkar	— bátahavnina 3/4 av 300.000 kr/árið í 8 ár	300.000
Skúvoyar	— bátahyl í Skúvoy 3/4 av 800.000 kr/árið í 8 ár	800.000
Hvalbiar	— leinging av bryggjuni í Sandvík 3/4 av 200.000 kr/árið í 8 ár	200.000
	— planering av lendingarøki í Nesi 3/4 av 100.000 kr/árið í 4 ár	100.000
Tvøroyrar	— bátahylin undir Tvørábakka 3/4 av 100.000 kr/árið í 4 ár	100.000
Famjins	— brimverju og leinging av brimgarðinum 3/4 av 100.000 kr/árið í 6 ár	100.00
	at flyta	9 900 000

Kommuna	til	Stuðningur 3/4 av kr.
	Flutt	**9.900.000**
Hovs	— bátabryggju til fiskualarar 3/4 av 200.000 kr/árið í 5 ár	200.000
Sumbiar	— Pollin, bátahavn, brim- og bakkaverju 3/4 av 500.000 kr/árið í 8 ár	500.000
	3/4 av kr.	10.600.000
	=	7.950.000

Viðmerkingar:
Í samsvar við samtyktina í løgtingsmáli nr. 116/1986 eru fylgjandi upphæddir avsettar sum ískoyti til kommununnar part.

Svínoyar kommuna, bátahylur í Glógvansurð		
10% av 700.000 kr/árið í 8 ár	70.000	
10% av játtanini frá 1985	180.000	250.000
Mykines kommuna, lendingin í Mykinesi		
25% av játtanini frá 1985		375.000
Skúvoyar kommuna, bátahylur í Skúvoy		
10% av 800.000 kr/árið í 8 ár	80.000	
10% av játtanini frá 1985	150.000	230.000
Hests komuna bátahavn í Hesti		
10% av	3.250.000	
		Tilsamans kr. 9.130.000

UPPSKOT

til samtyktar

B. 1. Viðvíkjandi samferðsluviðurskiftunum til Dals.
Ásannandi, at vegasambandið til Dals gongur gjøgnum brattlendi, verður álagt Landsverkfrøðinginum at kanna, hvussu bøtt kann verða um samferðsluviðurskiftini til Dals, íroknað kanningar um møguliga gerð av tunnli.

2. Viðvíkjandi samferðsluviðurskiftunum til Gjáar.
Nú Funningur hevur fingið beinleiðis samband inn í Funningsfjørð og ásannandi at vegasambandið til Gjáar er eftir hálendi, verður álagt Landsverkfrøðinginum at kanna, hvussu samferðsluviðurskiftini kunnu betrast.

3. Viðvíkjandi samferðsluviðurskiftunum til Norðadals.
Í sambandi við skriv frá Argja kommunu verður álagt Landsverkfrøðinginum at kanna, hvussu Norðadals bygd verður fyri samferðsluliga, tá ið høvuðsferðslan verður løgd fram við Kaldbaksfirði.

4. Viðvíkjandi lendingum í Fugloynni.
Álagt verður Landsverkfrøðinginum at gera kanningar av umsløðunum viðvíkjandi betran av lendingarviðurskiftunum í Fugloy, íroknað kanningar um møguliga gerð av bátahyli.

3. mai legði Edmund Joensen, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Í uppskotinum til samstyktar undir nýjáttanum verður játtanin til Sunda kommunu soljóðandi:

»Sunda — brimskaða á grótkastið á Oyri
3/4 av 600.000/árið í 6 ár 600.000 kr.«

Eftir sum Sunda kommuna er tann einasta, sum er blivin skerd eftir uppruna uppskotinum, sum varð útbytt til limirnar í samferðslunevndini, har Sunda kommuna stóð við 600.000 kr. í 6 ár, og er nú broytt til 500.000 kr. í 5 ár.

Sunda kommuna hevur stóran tørv fyri hesum peningi til sína útbygging, og verður tí hetta broytingaruppskotið sett fram.

1. viðgerð 5. mai. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 5. mai 1988 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av samferðslunevndini 3. mai 1988 og eftir 1. viðgerð 5. mai 1988 beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og setir ein samd samferðslunevnd fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

samtyktar

Vegir			3/4 av
	Vegur til sethúsaøki í Lopra		200
		Tils.	7516
Lendingar			3/4 av
	Dýpan av bátabyli		100
		Tils.	9.230

6. mai løgdu tingmenninir Svend Aage Ellefsen, Ivan Johannesen, Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen, Asbjørn Joensen og Adolf V. Hansen fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at byrja at bora Gásadalsbergholið í seinasta lagi 1. juli 1988.

Viðmerkingar:

Víst verður til svar frá Lassa Klein, landsstýrismanni til fyrispurning frá undirritaða viðvíkjandi sama máli, tingmál nr. 100-12/1987.

2. viðgerð 6. mai. Broytingaruppskot frá samferðslunevndini samtykt við 25 0. 3 uppskot til samtyktar í álitinum frá samferðslunevndini A øll samtykt við 29-0. Broytingaruppskot frá Edmund Joensen fall við 12-0. Broytingaruppskot frá Heina O. Heinesen, Poul J. Olsen, Svend Aage Ellefsen, Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen og Adolf V. Hansen fall við 13 ja-atkvøðum, 16 atkvøddu ikki, 3 burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu:	Dánjal Pauli Danielsen, Svend Aage Ellefsen, John Petersen, Jógvan Sundstein, Essa Arge, Pauli Ellefsen, Ivan Johannesen, Agnar Nielsen, Edmund Joensen, Johs. Martin Olsen, Eilif Samuelsen, Heini O. Heinesen, Adolf V. Hansen.
Atkvøddu ikki	Flemming Mikkelsen, Henrik Old, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes.
Burturstaddir:	Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Tordur Niclasen.

139 Lóg um mynstring. (nr. 104/1986)

Ár 1988, hósdagin 28. apríl legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi:

Álit

Løgtingsmál nr. 104/1986: Lóg um mynstring varð tann 12. mars 1987 lagt fram av landsstýrinum.

Eftir fyrstu viðgerð varð málið beint í fiskivinnunevndina. Í apríl mánaða 1987 legði fiskivinnunevndin fram álit við tilmæli um, at fiskivinnunevndin arbeiddi víðari við málinum, og varð tað samtykt.

Undir nevndarviðgerðini kom til sjóndar, at orðalagið í uppskotinum um mynstringarlóg var ikki í samsvar við tær løgtingslógir, ið løgtingið hevði samtykt um sjóvinnu, um sjómenn og um manning av skipum.

Fiskivinnunevndin setir tí fram annað uppskot enn tað, ið landsstýrið legði fram tann 12. mars 1987, og sum samsvarar við tær sjóvinnulógir, ið tingið hevur samtykt.

Ein samd fiskivinnunevnd mælir til at samtykkja framlagda uppskot í staðin fyri uppskot landsstýrisins frá 12. mars 1987.

Sí skjal nr. ?????

2. viðgerð 3. mai. § 1 samtykt við 26-1 atkvøðum, §§ 2-8 samtyktar við 26-1, § 9 uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 27-1 .

3. viðgerð 4. mai. Uppskotið endaliga samtykt við 29-1 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1609-7. Lóg nr. 67 frá 9. juni 1988.

140 Landsstýrismál, (29/1986).

Ár 1988, hósdagur 28. apríl legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 28. oktober 1988 og eftir 1. viðgerð 10. apríl 1988 beint í landstýrismálanevndina.

Málið var við 2. viðgerð tann 13. apríl 1987 beint aftur í landsstýrismálanevndina. Orsøkin var orðaskiftið millum løgmann og Óla Breckmann um orðaljóðið í álitinum hjá seinast nevnda.

Óli Breckmann varð ikki afturvaldur í nevndina, og ein samd nevnd sær onga orsøk til at broyta orðaljóð hansara vegna tess, at hann ikki sjálvur er nevndarlimur, og leggur nevndin tí málið aftur til tingsins viðgerð.

141 Løgtingslóg um aling av fiski v.m. (103/86)

Ár 1988, mikudagin 4. mai legði ídnaðarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 13. mars 1987 og eftir 1. viðgerð 28. mars 1987 beint í ídnaðarnevndina.

Undir 2. viðgerð 14. apríl 1987 varð samtykt at gera ídnaðarnevndina til millumtinganevnd at viðgera fyriliggjandi lógaruppskot og leggja málið aftur fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni 1987.

Ídnaðarnevndin hevur havt fleiri fundir við Havbúnaðarfelagið og Alirádið.

Eisini hevur landsstýrismaðurin í alimálum verið á fundi í nevndini.

Til viðmerking landsstýrisins § 3, pkt. 4 - »økið«, er at siga, at meirilutin í ídnaðarnevndini ikki tekur undir við ti seinasta reglubrotinum, men leggur tann týdning í orðið »økið«, at tað heldur snýr seg um viðurskifti, ið eru átøk lunnindum, soleiðis at tey, ið búgva á staðnum, eiga fyrsta rætt at gera nýtslu av teimum náttúrgivnu møguleikunum.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum broytingum:

broytingaruppskot

1) § 1 verður orðað soleiðis:
»Alivirksemi í hesi lóg fevnir um alt virksemi, har ein fóðrar eila fer um fisk, onnur djórasløg ella plantur, sum liva í vatni ella sjógvi, til framleiðslu av mati, fóðuri ella yngli,«

2) § 2, 1. punktum, verður orðað soleiðis:
»Loyvi frá landsstýrinum krevst til at byggja, gera til, umskipa, víðka, keypa, reka, ella eiga týðandi partar í stød til alivirksemi,«

3) § 3 verður orðað soleiðis:
»Aliloyvi sambært § 2 kann ikki verða givið, um
1) alistøðin ber við sær serligan vanda fyri spjaðing av sjúku.
2) alistøðin ber við sær skaðilig árin á vistskipanina,
3) alistøðin kemur at liggja til ampa fyri umhvørvið ella øðrum virksemi á økinum.
2. stk. Tá ið aliloyvi sambært § 2 verður givið, eigur at vera farið eftir
1) hvussu góðan kunnleika umsøkjarin hevur til alivirksemi,

1) § 1 formuleres således:
»Opdrætsvirksomhed i denne lov omfatter al virksomhed, hvor man fodrer eller passer fisk, andre dyrearter eller planter, der lever i vand eller havvand, til produktion af madvarer, foder eller yngel,«

2) § 2, 1. punktum formuleres således:
»Der kræves tilladelse fra landsstyret til at bygge, indrette, omordne, udvide, købe, drive, eller eje betydelige dele i station til opdrætsvirksomhed,«

3) § 3 formuleres således:
»Opdrætstilladelse kan ikke gives, såfremt
1) opdrætsstationen medfører særlig fare for spredning af sygdomme,
2) opdrætsstationen medfører skadelige følger for den økologiske struktur,
3) opdrætsstationen kommer til at ligge til ulempe for miljøet eller anden virksomhed i området.
Stk. 2. Når opdrætstilladelse i henhold til § 2 meddeles, bør denne bero på
1) i hvilket omfang ansøgeren har gode kundskaber til opdrætsvirksomhed,

2) at møguleikar kunnu verða givnir alivinnuni til javnari og skynsamari menning á tryggum fíggjarligum og vísindaligum støði í øllum liðum,
3) at teir, sum avgerðarrættin skulu hava á alistøðini í fyrsta lagi búgva á staðnum, har aliloyvið verður givið, í øðrum lagi hava serligt tilknýti til staðið og í triðja lagi eru fastbúgvandi í Føroyum,
4) at eingir av eigarunum av ætlaðu støðini eiga týðandi part í meira enn tveimum ali- ella smoltstøðum.«

4) § 4, pkt. 3 verður orðað soleiðis:
»tá eigarar av alistøð eiga týðandi part í meira enn tveimum ali- ella smoltstøðum.«

5) § 7 verður orðað soleiðis:
»Vaktar- og bjargingartænastan kann við merking, eitt nú við boyum og skeltum, seta forboð fyri at veiða fisk nærhendis alistøð, tá hesin av óvart er sloppin út, soleiðis at eigarin hevur møguleika at veiða fiskin aftur.«

2) at muligheder kan gives opdrætsvirksomheden til jævn og rationel udvikling på et betryggende finansielt og videnskabeligt grundlag i alle led,
3) at de, som har bestemmelsesret til på opdrætsstationen primært skal bo på stedet, hvor opdrætstilladelsen meddelse, sekundært har særlig tilknytning til stedet og tertiært er fasthoende på Færøerne.
4) at ingen af ejerne af den planlagde opdrætsstation har betydelige andele i mere end to opdrætseller smoltsstationer.«

4) § 4, pkt. 3 formuleres således:
»hvis ejere af opdrætsstation ejer betydende del i mere end to opdrætsstationer.«

5) § 7 formuleres således:
»Vaktar- og Bjargingartænastan kan ved afmærkning, f.eks. med bøjer og opslag sætte forbud for at fange fisk i nærheden af en opdrætsstation, når denne uforvarende er sluppet fri, således at ejeren har mulighed for at fange fisken igen.«

2. viðgerð 5. mai. Broytingaruppskot frá samdari nevnd samtykt pkt. 1 við 28-0, 2-5 við 29-0, § 1 í uppskoti landsstýrisins broytt samtykt við 29-0, §§ 2-3 við 30-0. § 4 30-0, §§ 5-8 við 30-0, §§ 8-14 31-0, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð við 30-0.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F. L. j.nr. 1509-17. Lóg nr. 70 frá 9. juni 1988.

142 Viðvíkjandi eykamanning til ferðslupolitiið. (Lm. 68/1986).

Ár 1988, týsdagin 3. mai legði rættarnevndin fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum 3. februar 1987 og varð við 1. viðgerð 3. mars beint í rættarnevndina, sum legði fram álit 10. apríl við uppskoti um, at nevndin skuldi arbeiða við málinum sum millumtinganevnd, sum skuldi leggja málið aftur fyri tingið í ólavsøkutingsetuni.

Í uppskotinum verður mælt til at seta 5 eykapolitiskar afturat serstakliga at taka sær av ferðsluni.

Nevndin hevur havt fund fyri fútaembætið, sum ikki heldur nevnda uppskot loysa trupulleikar, men mælti til størri samstarv millum løgregluna og Bilcftirlitið.

Umboð fyri politistafelagið hava á fundi og í skrivi til nevndina avgjørt mælt frá at seta óútbúgvið fólk í polititænastu.

Nevndin hevur fingið skriv frá landslæknanum, Ungtemplarabandi Føroya, Heilbrigdi og einstaklingum.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hans J. Debes, Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov og Eilif Samelsen) mælir til, at soljóðandi uppskot til samtyktar at málið verður sent landsstýrinum sum partur av tí tilfari, sum skal verða grundarlagk fyri størri trygd í ferðsluni og setur samsvarandi hesum fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Málið verður sent landsstýrinum sum partur av tí tilfari, sum skal verða grundarlagk fyri størri trygd í ferðsluni

Minnilutin (Jógvan Sundstein) mælir til at samtykkja uppskot Fólkafloksins.

2. viðgerð 4. mai. Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í rættarnevndini samtykt við 30-0 atkvøðum.

143 Broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna. (26/1986)

Ár 1988, hósdagin 5. mai legði fíggjarnevndin fram soljóðandi:

Álit

Fleiri ferðir er víst á, at báðir skrivararnir í løgtinginum eisini áttu at fingið løn fyri tað eyka arbeiðið, ið hesir hava fram um vanligar tingmenn. Sum er fáa formaðurin og fyrsti skrivari eyka løn.

Hin 29. oktober 1986 legði formansskapur løgtingsins fram løgtingsmál nr. 26/1986: Broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.

Hetta uppskot fekk ikki undirtøku í tí líki, sum tað varð framlagt, men øll tóku undir við, at annar skrivari átti at fingið samsýning.

Spurningurin um løn til tingnevndir eigur at viðgerast av skrivstovustjóra og formanskapi løgtingsins skjótast, í øllum føri í hesi tingsetuni.

Ein samd fíggjarnevnd tekur ikki undir við uppskotinum, men mælir kortini tinginum til at samtykkja, at annar løgtingsskrivari fær samsýning afturvirkandi frá fyrst í hesum valskeiði, og samsvarandi hesum setir nevndin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 51 frá 9. mai 1976 um samsýning løgtingsmanna,

1) Í § 1, 3. stk. verður sett aftan á orðini »Løgtingsformaðurin, fyrsti«: »og annar«.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag til lagtingsmænd.

§ *1.*

I lagtingslog nr. 51 af 9. maj 1976 om vederlag til lagtingsmænd

1) I § 1, stk. 3, indsættes efter ordene: »Der tillægges lagtingsformanden, første«: »og anden«.

2) § 5 verður orðað soleiðis:
»Varamaður fyri løgtingsmann fær samsýning frá tí degi, hann hevur fingið tingsins góðkenning, ella um hann tekur við seinri, so frá hesum degi til hann fer frá, ella tá løgtingssetan endar.
2. stk. Samsýningin er kr. 225 um dagin, leygardagar, sunnudagar og aðrar halgidagar undantiknar, uttan so at tingið er saman hesar dagar. Tíma- og dagpening fær hann eftir somu reglum, sum galdandi eru fyri tænastumenn.«

2) § 5 affattes således:
»Udbetales suppleant før en lagtingsmandsvederlag fra den dag, han har modtaget lagtingets godkendelse, eller når han tiltræder på et senere tidspunkt så fra denne dag, til den dag han fratræder, eller til lagtingssamlingen afsluttes.
Stk. 2. Vederlaget er kr. 225 pr. dag, dog ikke for lørdage, søndage og helligdage, såfremt tinget ikke er samlet disse dage. Time- og dagpenge udbetales efter samme regler, som gælder for landets tjenestemænd.«

§ 2.
Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó hvat viðvíkir ásetanini av samsýning til 2. skrivara, fær lógin gildi frá 8. november 1984

§ 2.
Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse, dog vedrørende ansættelsen af løn til 2. tingsekretær træder loven i kraft fra 8. november 1984.

1. viðgerð 6. mai. Málið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 7. mai. Lógaruppskotið frá fíggjarnevndini § 1 samtykt við 29-0, § 2 við 26-0. Við 26-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

5. mai legði ein samd fíggjarnevnd fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, pkt. 2, verður orðað soleiðis:
§ 5 verður orðað:
»Varamaður fyri løgtingsmann fær í samsýning 225 kr. um dagin frá tí degi, hann hevur fingið tingsins góðkenning ella, um hann tekur við seinni, so frá hesum degi, til hann fer frá, ella tá løgtingsetan endar. Tíma- og dagpening fær hann eftir somu reglum, sum galda fyri tænastumenn.

§ 1, pkt. 2, formuleres således:
§ 5 formuleres:
»Der udbetales en suppleant for en lagtingsmand i vederlag 225 kr. pr. dag, han har modtaget lagtingets godkendelse eller, når han tiltræder på et senere tidspunkt, så fra dette til den dag, han fratræder eller til lagtingssamlingens afslutning. Time- og dagpenge udbetales efter samme regler, som gælder for landets tjenestemænd.

2. *stk.* Frá og við 15. degi verður samsýningin kr. 175 um dagin, leygardagar, sunnudagar og aðrir halgidagar undantiknir, uttan so at tingið er saman hesar dagar.«

Stk. 2. Fra og med 15. dag er vederlaget kr. 175 pr. dag, lørdage, søndage og andre helligdage undtaget, såfremt tinget ikke er samlet disse dage.«

3. viðgerð 7. mai. Broytingaruppskotið frá figgjarnevndini samtykt við 25-0. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lóg nr. 66 frá 9. juni 1988.

144 Løgtingslóg um landsjørð. (142/86)

Ár 1988, hósdagin 5. mai legði landbúnaðarnevndin fram soljóðandi:

Álit

Málið var framlagt av landsstýrinum tann 21. marts 1986 og við 1. viðgerð tann 4. apríl 1986 beint í landbúnaðarnevndina.

Av tí at málið var framlagt so seint í tingsetuni, fekk nevndin ikki stundir til at viðgera málið, og skeyt nevndin tí upp, at nevndin heldur fram sum millumtinganevnd til viðgerð av málinum. Hetta uppskotið varð samtykt.

Galdandi lóg um landsjørð er lóg nr. 174 frá 24. mai 1937 »om Landbrugets Fremme« við nøkrum smærri broytingum. Sigast má, at galdandi lóg og reglugerð fyri jarðarráðið eru ótíðarhóskandi og treingja til broytingar, tí tær í nógvum førum ikki hóska til viðurskiftini í dag.

Fyriliggjandi uppskot avloysir tær fyrstu 27 greinirnar í galdandi lóg, sum hevur 61 greinir.

Endamálið við lógarbroytingini er, at gera tað møguligt at menna um framleiðsluna úr landsjørðini.

Festibrúkarar býti seg út í hesi bruk:

Landsjørð:				
27 bruk millum	0-1 merkur	15 mrk.	8 gl.	5 sk.
50 bruk millum	1-2 merkur	62 mrk.	3 gl.	0 sk.
51 bruk millum	2-3 merkur	120 mrk.	0 gl.	12 sk.
43 bruk millum	3-4 merkur	135 mrk.	12 gl.	14 sk.
16 bruk millum	4-5 merkur	191 mrk.	6 gl.	0 sk.
28 bruk millum	5-6 merkur	148 mrk.	0 gl.	0 sk.
31 bruk millum	6-7 merkur	187 mrk.	14 gl.	0 sk.
8 bruk millum	7-8 merkur	57 mrk.	12 gl.	0 sk.
10 bruk millum	8-9 merkur	81 mrk.	8 gl.	0 sk.
3 bruk millum	9-10 merkur	27 mrk.	12 gl.	0 sk.
4 bruk millum	10-11 merkur	41 mrk.	4 gl.	0 sk.
3 bruk millum	11-12 merkur	33 mrk.	6 gl.	0 sk.
2 bruk millum	12-15 merkur	28 mrk.	8 gl.	0 sk.
1 bruk millum	15-20 merkur	20 mrk.	0 gl.	0 sk.
310 bruk	um	1150 mrk.	14 gl.	11 sk.

Prestajørð:				
18 bruk millum	0-½ merkur	5 mrk.	0 gl.	0 sk.
39 bruk millum	½-1 merkur	20 mrk.	0 gl.	0 sk.
28 bruk millum	1-1½ merkur	28 mrk.	4 gl.	0 sk.
10 bruk millum	1½-2 merkur	16 mrk.	4 gl.	0 sk.
2 bruk millum	2-3 merkur	4 mrk.	0 gl.	0 sk.
2 bruk millum	3-4 merkur	7 mrk.	0 gl.	0 sk.
7 bruk millum	4-5 merkur	28 mrk.	12 gl.	0 sk.
3 bruk millum	8-9 merkur	24 mrk.	0 gl.	0 sk.
1 bruk millum	9-10 merkur	9 mrk.	12 gl.	0 sk.
110 bruk til		144 mrk.	0 gl.	0 sk.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við jarðarráðið um uppskotið og onnur spurningar jarðarbrúkinum viðvíkjandi. Eftir hevur nevndin eftir áheitan fingið skrivlig ummæli frá jarðarráðunum, bondafelagnum, búnaðarfelagnum og Føroya Kommunumfelag, sbrb. skjal 1-4.

Í uppskotinum hjá landsstýrinum verður samkvæmt § 1 mett neyðugt at samanleggja smáverk festi, fyri at mála endamálið við loguni.

Nevndin heldur, at samanlegging av slíkum smá verkum bygdunum kann

fora til avtolting, og heldur nevndin, sum tíðirnar eru broyttar, at tað ikki fellur fornuft gova bestu samfelagsligu tiltøkunum at leggja brúk saman.

Mjólkaframleiðslan er nógv vaksin seinastu árini og verður mett, at við lítlari øking í neytatalinum aftrat og við hækkandi framleiðslu pr. kúgv, kemur ikki at ganga long tíð, til torvurin á drekkimjólk er noktaður. At fara at framleiða mjólk, ið má nýtast til smør- ella ostaframleiðslu verður ógvuliga stuðningskrevjandi.

Niðanfyri er yvirlit yvir innvegaðu mjólkamongdina til mjólkavirki Búnaðarmannna, síðani virkið byrjaði.

Stabbamyndi, ið vísir ta samlaðu innvegaðu mongdina fyri hvort árið, síðani virkið byrjaði.

Stabbamyndin skal inn her!!!!!
manuskriptsíða nr. 873

Skal fotog. niður

Í 1987 vaks mjólkaframleiðslan 12% í mun til framleiðsluna í 1986. Samlaði torvurin av drekkimjólk og mjólk til súrmjólkavirdráttir verður metur til 7,4 mió. lítrar.

Viðvíkjandi valinum av jarðarráðnum, har skotið verður upp, at landsstýrið velur allar limirnar, heldur nevndin tað vera meira rímiligt, at løgtingið velur limirnar, so andstoðan eisini kann fáa umboðan í ráðnum.

Nevndin heldur eisini, at skipanin í § 5 við álitsmonnunum um land ikki er hóskandi longur, nú tað, við tí góða ferðasambandi, við havi í dag, er gjørligt hjá Jarðarráðnum sjálvum ella fess umsiting at kanna viðurskiftini á staðnum. Annars verður eisini mett, at álitismenninir á staðnum ofta eru inhabilir til at útbýta seg um viðurskiftini á staðnum. Skotið verður tí upp at taka hesa skipan, men verður framvegis møguligt hjá Jarðarráðnum at taka sær serkanna hjálp til ávís endamál.

Í § 10 um framtíðarrætt- til festi hevur nevndin skotið upp at seta eina yvirgangsreglu, soleiðis at onkur, sum í longri tíð hevur lagnað sína viðurskifti

við ti fyri eyga at yvirtaka eitt ávist festi, skal verða viðgjordur eftir higartil galdandi reglum. Skotið er upp, at henda yvirgangsskipan verður galdandi í 10 ár aftur á at lógin er komin í gildi.

Ásetingarnar í § 12, stk. 5, § 14 og § 20, stk. 1, heldur nevndin verða óneyðugar, og eiga tær ti at verða strikaðar.

Sum reglurnar um endurgjald til fráfarandi festarar eru orðaðar í § 13, stk. 1, í uppskotinum, fær fráfarandi festarin bert endurgjald fyri egnar íløgur, sum góðkendar eru av Jarðarráðnum frammanundan. Nevndin skjýtur upp at broyta orðingina soleiðis, at endurgjald kann veitast eftir meting fyri íløgur, sum hava givið festinum eitt varandi virði.

Nevndin mælir landsstýrinum til at koma við uppskoti um íjorføring av lógini og at gera nýggja reglugerð fyri Jarðarráðið og Jarðargrunnin.

Nevndin hevur viðgjort málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Ein meiriluti (Henrik Old. Øssur av Steinum, Heini O. Heinesen, Jógvan Olsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og setir vísandi til frammanfyristandandi fram fylgjandi:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) § 1 verður orðað soleiðis:
»**§ 1.** Endamálið við hesi lóg er, at tað fyrisitingarliga skulu skapast møguleikar fyri at menna framleiðsluna av landsjørðini.«
2) Í § 2, 1. stk., verður orðið »støv« broytt til: »málsøkir«.
3) Í § 2, 2. stk., verða orðini »kann fyriskipa« broytt til: »fyriskipar«.
4) Í § 3, 1. stk. verður orðið »landsstýrinum« broytt til: »løgtinginum«.
5) Í § 3, 4. stk. verður skoytt uppí: »millum teir av løgtinginum valdu limir«.
6) § 5 verður orðað soleiðis:
»**§ 5.** Jarðarráðið er heimilað at taka sær hjálp til serstakar uppgávur«.

1) § 1 affattes således:
»**§ 1.** Formålet med denne lov er administrativt at skabe muligheder for at udvikle produktionen på den offentlige jord.
2) Uændret.
3) I § 2, stk. 2, ændres ordene »kan foreskrive« til: »foreskriver«.
4) I § 3, stk. 1, ændres ordet: »landsstyret« til: »lagtinget«.
5) I § 3, stk. 4 tilføjes »mellem de af lagtinget valgte medlemmer«.
6) § 5 affattes således:
§5. Landbrugsrådet er bemyndiget til at antage hjælp til specielle opgaver.«

7) Í § 10, 2. stk., verður skoytt uppí: »Jarðarráðið er heimilað fyrstu 10 árini aftana at henda lóg fær gildi, at lata festi til tann, ið hevði framíhjárættin eftir áður galdandi reglum«.

8) Í § 10, 4. stk., verður aftaná orðini »við landsjørð« sett: »ið er hóskandi brúkseind«.

9) Í § 10, 5. stk., verður aftaná orðini »síggja burtur frá framíhjárættinum« sett: »um talan er um hóskandi brúkseindir«.

10) Í § 10, stk. 6, verða orðini »tikið avgerð« broytt til: »kunnað viðkomandi um avgerðina.«

11) § 12, 5. stk., gongur út.

12) Í § 12, stk. 6, 3. punktum, verður aftaná orðini »leiga øðrum« sett: »stykki at velta í til húsbrúk.«

13) § 13, 1. stk., verður orðað soleiðis: »**§ 13.** Fráfarandi festarin hevur rætt til endurgjald frá nýggja festaranum eftir meting fyri egnar íløgur, sum gjørdar eru á festinum, um so er, at íløgan verður mett at geva festinum eitt varandi virði. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um, hvussu endurgjaldið verður áset.«.

14) § 14 gongur út. §§ 15-16 verða §§ 14-15.

15) Í § 15, 5. stk. nr. 1, verður skoytt uppí: »og eftirsitandi hjúnafelagi ikki er«.

16) § 17 gongur út. §§ 18-21 verða §§ 16-19.

7) I § 10, stk. 2, tilføjes: »Landbrugsrådet er bemyndiget til de første 10 år efter denne lovs ikrafttræden, at overgive fæstet til den, der havde fortrinsretten efter hidtil gældende bestemmelser.«

8) I § 10, stk. 4, tilføjes efter ordet »landsjord«: »der har passende brugsstørrelse«.

9) I § 10, stk. 5, tilføjes efter ordene »se bort fra forhåndsretten«: »hvis der er tale om brug af passende størrelse«.

10) I § 10, stk. 6, ændres ordene »truffet afgørelse« til: »underrettet vedkommende om afgørelse«.

11) § 12, stk. 5, udgår.

12) I § 12, stk. 6, 3. punktum, tilføjes efter ordene »at udleje«: »jordstykke til dyrkning af afgrøder til eget brug«.

13) § 13, stk. 1, affattes således
»**§ 13.** En afgående fæster er berettiget til erstatning fra den nye fæster efter vurdering for egne investeringer, der er tilført fæstet, såfremt investeringen kan anses for at give fæstet en vedvarende værdi. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler for, hvorledes erstatningen fastsættes.«

14) § 14 udgår. §§ 15-16 bliver herefter §§ 14-15.

15) I § 15, stk. 5, nr. 1 tilføjes: »og der ikke er nogen eftersiddende ægtefælle.«

16) § 17 udgår. §§ 18-21 bliver herefter §§ 16-19.

17) § 20 verður orðað soleiðis:
»**§ 20.** Liggur ognarjørð í órokt, og er innangarðsjørðin gott dyrkt lendi, kann Jarðarráðið við landsstýrisins góðkenning keypa hesa ognarjørð at útleiga ella festa sambært reglunum í hesi lóg.«

18) Í § 21, 2. stk., verður skoytt upp:
»og lóg nr. 56 frá 30. apríl 1891 »om afhændelse af troer og grundstykker af statens fæstegods på Færøerne«.

17) § 20 affattes saaledes:
»**§ 20.** Foreslåes utrøgtet odelsjord med fæetopdyrkelig indhegningsjord, kan Landsbrugsrådet med landsstyrets godkendelse opkøbe saadan odelsjord til udlejning eller bortpagtning efter bestemmelserne i denne lov.«

18) I § 21, stk. 2, tilføjes:
»og lov nr. 56 af 30. april 1891 om afhændelse af troer og grundstykker af statens fæstegods på Færøerne.«

Nevndin setir hernumframt hetta

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at koma við uppskoti um ujavrðing av restini av lógini og gera nýggja reglugerð fyri Jarðarráðið og jarðargrunnin.

Ein minniluti (John Petersen tl. Eyðun Videroð) heldur ikki, at lógin er til nóg stóran bata fyri føroyskt jarðabrúk, men tekur tó fyrst endaliga støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 6. mai. Broytingaruppskot frá meirilutanum í landbúnaðarnevndini pkt. 1 (nýggj § 1) samtykt við 19-0, pkt. 2-6 samtykt við 18-0, pkt. 7-13 við 19-0, pkt. 14 við 18-0, pkt. 15 við 19-0, pkt. 16 við 18-0, pkt. 17 fall við 15-0, pkt. 18 við 18-0. Uppskot til samtyktar samtykt við 17-0. Uppskot landsstýrisins §§ 2-3 samtyktar við 19-0, §§ 4-5 við 18-0, §§ 6-9 við 17-0, § 10 við 19-0, § 11 við 18-0, § 12 við 17-0, §§ 13-14 við 18-0, §§ 15-20 samtyktar við 19-0, § 20 fall við 14-0, § 21 við 18-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 18-0 atkvøðum.

3. viðgerð 7. mai. Málið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

EL, j.nr. 1700-9. Lóg nr. 59 frá 9. juni 1988.

Løgtingsmál nr. 145/1987: Lóg um føroyskt lóggávuvald og stýrisskipan innan fyri danska kongaríkið (heimastýrisskipan) (LM 31/1986).

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum 28. oktober 1986 og eftir 1. viðgerð 5. november 1986 beint í serligu 6-mannanevnd. Við 1. viðgerð varð málið eftir uppskoti frá Tjóðveldisflokkinum beint í sevstaka nevnd við einum limi úr hvørjum flokki (Jógvan Sundstein úr Fólkaflokkinum, Pauli Ellefsen úr Sambandsflokkinum, Jørgen Thomsen úr Javnaðarflokkinum, Hilmar Kass úr Sjálvstýrisflokkinum, Hans Jacob Debes úr Tjóðveldisflokkinum, Tordur Niclasen úr Kristiliga Fólkaflokkinum Framburðs og Fiskivinnuflokkinum og Adolf Hansen fyri Framsóknarflokkinum.) Nevndin skipaði seg við Hans Jacob Debes sum formann. Málið varð lagt fram sum breitt samráðingargrundarlag.

Nevndin hevur viðgjørt uppskotið. Á nevndarfundi 2. mai 1988 lagði umboð Tjóðveldisfloksins fram broytingaruppskot. Hini nevndarlimirnir á fundinum høvdu sínar viðmerkingar til uppskotini og viðmerkingar til uppskotnar broytingar.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í 7 minnilutar.

Minnilutin (Hans Jacob Debes) setir í fyrsta lagi fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið velur eina nevnd at samráðast við donsku ríkisstjórnina um stovnseting av føroyska tjóðveldinum.

Í øðrum lagi er Hans Jacob Debes samdan við Jógvan Sundstein um at seta fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting samtykkir, at tiknar verða upp samráðingar við donsku stjórnina um ávísar broytingar í Lov om Færøernes Hjemmestyre af 23. marts 1948 við hesum uppskoti sum grundarlag:

Ásannandi, at Føroyar eru eitt land og føroyingar ein tjóð við øllum tjóðareyðkennum, hevur fólkatingið eftir samtykt á Føroya Løgtingi samtykt hesa lóg.

§ *1.* Føroyingar eru ein sjálvstýrandi tjóð innan Danmarkar Ríki. Innan karmarnar av hesi lóg yvirtekur føroyska fólkið við fólkavalda umboðsstovni sínum, Føroya løgtingi og eiuum umboðsvaldi, sum Føroya Løgting velur, Føroya Landsstýri, lóggávuvald og útinnandi vald í øllum málum, sum heimastýrislógin umfatar.

§ *1.* Færinger er en selvstyrende nation inden for Danmarks Rige. Indenfor rammerne af denne lov overtager det færøske folk gennem sin folkevalgte repræsentation, Færøernes Lagting og en forvaltning, som Færøerne lagting vælger, Færøernes Landsstyre, lovgivningsmagt og udøvende magt i alle sager, der omfattes af hjemmestyreloven.

§ *2.* Øll málsøki uttan tey, sum nevnd eru undir § 3, eru føroysk sermál. Føroya Løgting ger av, hvørji mál verða yvirtikin sum føroysk sermál, og nær yvirtøkan fer fram. Ríkismyndugleikar kunnu krevja yvirtøkur framdar.

2. stk. Føroyar yvirtaka útreiðslurnar av yvirtiknum sermálum. Tó kunnu ríkismyndugleikar eftir nærri avtalu við Føroya Landsstýri og Føroya Løgting eitt ávíst tíðarskeið veita Føroyum fíggjarligan stuðul.

§ 2. Alle sagsområder undtagen de i § 3 nævnte, er færøske særanliggender. Færøernes Lagting beslutter, hvilke sager, der skal overtages som færøske særanliggender, og hvornår overtagelsen skal ske. Rigsmyndighederne kan kræve, at der sker overtagelser.

Stk. 2. Færøerne overtager udgifterne af overtagne særanliggender. Dog kan rigsmyndighederne efter nærmere aftale med Færøernes Landsstyre og Færøernes Lagting i en bestemt periode yde Færøerne økonomisk støtte.

§ 3. Hesi mál verða fyribils at rokna sum felagsmál:
1. Dóms- og rættarviðurskifti.
2. Uttanríkisviðurskifti.
3. Verju og hernaðarviðurskifti.
Hóast hesi mál eru felagsmál, kunnu avtalur verða gjørdar um føroyskt ræði og avgerðarrætt á teim undir 2 og 3 nevndu málsøkjum.

§ 3. Disse sager skal forløbig henregnes til fællesanliggender:
1. Doms- og retsforhold.
2. Udenrigsforhold.
3. forsvars- og militærforhold.
Selvom disse anliggender er fælllesanliggender, kan der indgås aftaler om færøsk magt og beslutningsret vedrørende de under 2 og 3 nævnte sagsområder.

§ 4. Millumlanda sáttmálar, ríkislógir og aðrar rættarreglur viðvíkjandi teim málsøkjum, sum nevnd eru undir § 3 fáa ikki gildi í Føroyum, fyrr enn eftir samtykt Føroya Løgtings. Føroyar eiga rætt til umboð í øllum samráðingum, sum hava týdning fyri Føroyar. Føroyar fáa observatørstøðu í Felagi Sameindu Tjóða.

§ 4. Internationale aftaler, rigslove og andre retsregler vedrørende de sagsområder, der er nævnt under § 3, er ikke gyldige på Færøerne før efter samtykke af Færøernes Lagting. Færøerne ejer ret til repræsentation i alle forhandlinger, der har betydning får Færøerne. Færøerne får observatørstatus i De Forenede Stationer.

§ 5. Í yvirtiknum málsøkjum hevur Føroya Løgting lóggávuvaldið og Føroya Landsstýri tað útinnandi valdið. tær lógir, sum Føroya Løgting samtykkir, og sum løgmaður staðfestir, eita løgtingslógir.

§ 5. I overtagne sagsområder har Færøernes Lagting lovgivningsmagten og Færøernes Landsstyre den udøvende magt. De love, som Færøernes Lagting vedtager, og som lagmanden stadfæster, kaldes lagtingslove.

§ 6. Gjørd verður skipan um føroyskan heimarætt.
2. stk. Føroyingar hava sjálvstøðugt pass. Í tí verður upplýst, at viðkomandi persónur tjóðskaparliga er føroyingur, men hevur danskan ríkisborgararætt.

§ 6. Der etableres en ordning om færøsk hjemmeret.
Stk. 2. Færinger har selvstændig pas. I det oplyses, at vedkommende person nationalt set er færing, men har dansk statsborgerret.

§ 7. Føroyskt er høvuðsmálið í Føroyum. Í almennum viðurskiftum kann tó danskt mál nýtast.

§ 7. Færøsk er hovedsproget på Færøerne. I offentlige anliggender kan dansk sprog dog anvendes.

§ 8. Føroyar hava sjálvstøðugan umboðsmann í danskum útlendskismálaráðnum. Hesin umboðsmaður er føroyskur borgarafulltrúi. Føroyar hava umboð í donskum sendistovum, har Føroya Landsstýri heldur tað vera neyðugt. Føroya Landsstýri setir umboðsstovur á stovn, har hetta verður hildið hentast. Útreiðslur til mailtum landa umboðan verða rindaðar úr landskassanum.

§ 8. Færøerne har selvstændig repræsentant i det danske udenrigsministerium. Denne repræsentant er færøsk tjenestemand. Færøerne har repræsentation på danske ambassader, der hvor dette anses for mest nødvendigt. Færøernes Landsstyre etablerer repræsentationskontorer, hvor dette anses mest formålstjenstligt. Udgifter til international repræsentation er holdes af landskassen.

§ 9. Føroyar hava egið flagg. Fyriskipanir viðvíkjandi flagginum verður í settur við serstakari løgtingslóg. Ríkismyndugleikar kunnu loyva danskt flagg.

§ 9. Færøerne har eget flag. Regler vedrørende flaget fastsættes ved særlig lagtingslov. Rigsmyndighederne kan dog anvende dansk flag.

§ 10. Ríkismumboðsmaðurin umboðar Danmarkar Ríki í Føroyum. Hann hevur rætt at vera á fundi í Føroya løgtingi og hevur talurætt í felagsmálum, men ikki atkvøðurætt. Ríkismumboðsmaðurin fær eintak av løgtingslógum og ørnurs teimum ræðiligum, sum heimastýrið hevur sett í verk.

§ 10. Rigsombudsmanden repræsenterer Danmarks Rige på Færøerne. Han har ret til at møde i Færøernes Lagting og har taleret i forhandlingerne, men ingen stemmeret. Rigsombudsmanden får et eksemplar af lagtingslovene og iøvrigt de retsregler, som hjemmestyreloven sætter i kraft.

§ 11. Føroya Landsstýri setir føroyskan sendiharra í Keypmannahavn at røkja samskifti millum føroyskar og danskar myndugleikar.

§ 11. Færøernes Landsstyre ansætter en færøsk ambassadør i København, der skal administrere anliggender mellem færøske og danske myndigheder.

§ 12. Allar í lotuni í Føroyum galdandi fyriskipanir, sum ikki eru í stríð við hesa lóg, verða verandi í gildi, tíl tær verða broyttar ella settar úr gildi av rættum myndugleikum.

§ 12. Alle for tiden på Færøerne gældende regler, der ikke strider mod denne lov, forbliver gyldige indtil de ændres eller sættes ud af kraft af rette myndighed.

§ 13. Henda lóg fær gildi 1. januar 1989. Samstundis fer úr gildi lóg nr. 137 frá 23. mars 1948 um »Føroyarnes Hjemmestýre«.

§ 13. Denne lov træder i kraft 1. januar 1989. Samtidig træder ud af kraft lov nr. 137 af 23. marts 1948 om »Færøernes Hjemmestyre«.

Viðmerkingar til tær einstoku greinirnar:

viðv. Inngangi. Hildið verður ikki neyðugt við tjóðskaparligum, søguligum og landafrøðiligum grundgevingum fyri, at Føroyar eru eitt land og føroyingar ein tjóð. Hetta eru veruleikar, sum allir føroyingar viðurkenna.

viðv. § 1. Til ommur skipan er gjørd, yvirtekur føroyska fólkið innan karmarnar av hesi lóg við fólkavalda umboðsstovni sínum, Føroya logtingi, og umboðsvaldi sínum, Føroya landsstýri, tað lóggávuvald og útinnandi vald, sum heimilað er í hesi lóg, og stýrisskipanarmál.

viðv. § 2. Til tess at fáa gongd á broytingar í heimastýrisskipanini verða tey mál, sum nevnd eru undir § 3, fyribils viðurkend sum felagsmál. Sbr. lø § 1. Øll ommur mál verða at rokna sum sermál, millum teirra ravfiskurin til rævni í undirgrund og havbotni. Henda broyting er ein náttúrlig avleiðing av teirri nýggju lilskotsskipanini.

viðv. § 4. Út frá royndum av, at samtyktir Føroya logtings og avgerðir Føroya landsstýris hava ikki verið virdar av ríkismyndugleikum, visandi til, at uttanríkismál og verju- og hernaðarmál eru uttan fyri myndugleika heimastýrisins, má Føroya logting nú krevja, at ongar rættarreglur, sum nevndar eru undir hesi grein, fáa gildi í Føroyum uttan samtykt Føroya logtings eftir viðgerð í uttanríkisnevndini tingsins, sum verður stovnað við broyting í deild IV, § 6 í tingskipan Føroya logtings um tingnevndir. Tað má í allar máttar vera óhoskandi, at Marknaðarnevndin, sum sjálvsagt hevur tær uppgávur at rokja, sum navnið sigur, tekur sær av øðrum uttanríkismálum enn marknaðarmálum, Uttanríkis- og verjumál hoyra heima í heild aðrari nevnd við heild øðrum uppgávum, serstakliga eftir at føroyingar av náttúrligum og neyðugum orsøkum noyddust at átaka sær alsamt størri ábyrgd av nevndu økjum.

Tað er ein sjálvsøgd troyt fyri trygd okkara og vilan okkara um millumtjóða viðurskifti, sum hava týdning fyri okkum, at føroyingar eru við, har sum føroysk áhugamál verða umrødd og avgjørd.

Umboð sum observatørur í Félagi sameindu Tjóða er partur av sama máli.

viðv. § 6. Sum nevnt frammanfyri, hevur spurningurin um føroyskan heimarætt fleiri ferðir verið reistur á tingi, men hevur ongantíð vunnið fram. At ein danskur ríkisborgari búsettur í Føroyum harvið er føroyingur er í móti øllum tjóðskaparreglum og í móti inngangimum til og sjálvari grundgevingini fyri hesi lóg. Neyðugt verður tí at gera skipan um føroyskan heimarætt, kanska við at

liti til ta álendsku skipanina. Til hon er gjørd, verður galdandi regla óbroytt. Sjálvstøðugt føroyskt pass er ein náttúrleiðing av ti omanfyri nevnda. Málið hevur verið frammi fyrr. Ein onnur grund til hesa broyting er, at »danskt« pass er ikki til longur, síðan danir hin skiftu til EEC-pass. Eitt føroyskt pass má tí gevast út av føroyskum myndugleika.

ad. § 7. Henda broyting ger móðurmálið til høvuðsmálið, so sum verandi heimastýrislóg ásetir. Danskt kann tó sum nú nýtast í almennum viðurskiftum. Hvørji mál — ella hvørjar lærugreinir — skulu lærast í skúlunum eigur at verða ásett í skúlalóg og ikki í stýrisskipanarlóg, tann ásetanin verður tí tikin burtur.

ad. § 8. Sum grundgeving verður fyrst vist til viðm. til § 4. So hvørt sum samskifti okkara við aðrar tjóðir veksur, gerast serstøk føroysk umboð alt neyðugari. Tað skuldi borið til í teimum førum, hetta verður hildið hentast, at samstarva við danskar umboðsstovur og møguliga eisini umboðsstovur hjá øðrum Norðurlondum til tess at tryggja áhugamál okkara so væl sum gjørligt.

Víst verður eisini til samtykt í Tingmannaráði Útnorðurs í Tórshavn í september 1987 við tilmæli til limalondini um at seta á stovn umboðsstovur hvørt land hjá øðrum.

Uttanríkisumboðsmenn Føroya mugu hava ábyrgd fyri føroyskum myndugleikum og mugu tí verða føroyskt løntir tænastumenn.

ad. § 9. Føroyskt flagg er viðurkent. Ríkismyndugleikar kunnu tó nýta danskt flagg. Øll onnur skulu nýta føroyskt flagg.

ad. § 11. § 14 í núverandi heimastýrislóg um ríkisdagsumboðan er ikki tikin við. Eftir okkara hugsan eigur føroyska fólkatingsumboðanin at verða avtikin, og tí er tað av stórum týdningi, at reglan fer úr heimastýrislógini. Síðani má finnast út av at broyta ásetanina í grundlógina, eins og møguliga aðrar grundlógarbroytingar.

Haldas má, at føroyskt áhugamál mótvegis donum verða betur røkt av einum almennum føroyskum sendiharra í Keypmannahavn, hann verður føroyskur tænastumaður.

Ein minniluti (Jørgen Thomsen) fører fram:

Eitt grundleggjandi sjónarmið hjá javnaðarflokkinum er, at heimastýrislógin hevur roynst føroyska samfelagnum væl og verið eitt sømiligt og hent amboð í samstarvinum millum Føroyar, Danmark og Grønland.

Tað er eisini javnaðarfloksins sjónarmið, at hóast mong av teim rættindum, heimastýrislógin veitti okkum, eru vunnin í útfyllan av heimastýriskarminum, er hesin enn so rúmur, at lógin væl kann verða karmur um samvinnuna millum hesar tjóðir mong ár fram í tíðina.

Hinvegin broytist alt — øll lívsins viðurskifti eru undir broytingunum lóg. Eisini viðurskiftini millum teir ymsu ríkispartarnar. Júst í hesum valskeiði eru farnar fram stórar broytingar í bestu semju millum Føroyar og ríkismyndugleikarnar. Hesar broytingar eru eftir javnaðarfloksins sannføring til stórt gagn fyri Føroyar.

Allar hesar broytingar vóru avtalaðar ímillum teir flokkar, sum nú skipa samgongu.

Teir settu sær setning á hesum øki — sum kundi útfylla karmin enn meira — og flestu av hesum málum eru loyst, serliga er tað umskipanin frá 72 ymsum ríkisstudningum til heildarveiting, sum má metast týdningarmikil.

Undirgrundarspurningurin er kortini ikki loystur, og metir javnaðarflokkurin tað óheppið at taka hann burtur úr teirri fyrireikingar- og samráðingarstøðu, vit eru í, so sum fólkafloksuppskotið mælir til. Javnaðarflokkurin heldur, at samráðingarleiðin skal troytast munandi meira, og heldur, at samtykt av fólkafloksuppskotinum vil ørkymla hesar samráðingar.

Javnaðarflokkurin vil sláa fast, at hann sjálvsagt altíð er til reiðar positivt at viðgera heimastýrislógina. Eingin lóg er galdandi í ævir og kann í hesum sambandi verða víst til donsku grundlógina, sum er broytt mangur ferðir síðan hon kom í gildi fyri 139 árum síðani. Heimastýrislógin hevur nú verið í gildi í 40 ár og einki óvanligt er í at endurskoða hana og gera møguligar neyðturvuligar ábøtur og dagføringar.

Men tað eigur at verða havt í huga, at einhvør viðgerð av heimastýrislógini er eitt ógvuliga stórt mál, so stórt, at tað ikki ber til at viðgera tað og tey uppskot, sum eru framkomin við so stuttum skotbráði, sum tingið nú hevur eftir til tingslit.

Tað eru neyðugar broytingar, sum beinanvegin eru sjónligar — og sum fedrar lógarinnar longu í 1948 kravdu — t.d. at fáa orðið »fólk« ella »nation« í danska tekstinum fram um »selvstyrende folkesamfund«, meðan aðrar eru so grundleggjandi, at tær mugu umhugsast og viðgerast sera gjølla. Tað ber t.d. ikki til bert at avskriva sær lut í lóggávuarbeiði, sum er felags, uttan at okkurt verður sett í staðin.

Eisini má her havast í huga, at her fremist ikki broyting, uttan grundlógarbroyting samstundis verður gjørd.

Eisini er neyðugt at umhugsa, hvussu føroyingar skulu fáa ávirkan á tey málsøkini, sum eisini eftir tjóðveldisuppskotinum framvegis verða felagsmál,

t.v.s. dóms- og rættarviðurskifti, útlendingaviðurskifti og verjuviðurskifti, tað er ein stórur spurningur, um føroysk atvirkan er nóg væl tryggjað í § 4 í uppskotinum.

Tað er forvitnisligt og hóskar fríi møguleika fyri einum sakligum orðaskifti, at eisini fjóðveldisflokkurin arbeiðir út frá ti politiska veruleika, at meiriluti er í Føroyum fyri ríkisfelagsskapi, men sjálvmeldi ber ikki til at hava orðið »fyribils« inni í lógargrein.

Javnaðarflokkurin ynskir ikki fyribils loggávu á hesum øki, men langtíðarloysnir, og javnaðarflokkinum líkar ikki hugtakið »heimarættur«, sum er sett fram í uppskoti fjóðveldisfloksins.

Kundu hesi uppskot og onnur borið í sær, at semja fekst ímillum allar flokkar um eina nýggja »heimastýrislóg« ella »samstarvsáttmála«, var tað politiskur fyrimunur fyri føroyingar so væl sum danir. Javnaðarflokkurin heldur tí, at málið sum heild eigur at liggja frammi til alment orðaskifti, so flokkarnir fáa hóvi til at viðgera allan spurningin til bólins. Fyri javnaðarflokkin sum heild er tað ein fortreyt, at allur spurningurin verður viðgjørdur í felagsum, floksleiðslu og starvsstjórn, umframt í tingbólki floksins.

Hartil er tað avgjørt ein fortreyt, at allar politiskar og logfrøðiligar avleiðingar eru lýstar út í æsir.

Hetta metir javnaðarflokkurin ikki nóg væl upplýst í fyriliggjandi uppskotum og setir tí eingi uppskot fram.

Minnilutin (Eilif Samuelsen) førir fram, at Sambandsflokkurin var við til at orða og at samlykkja heimastýrislógina frá 1948. Flokkurin viðurkennir, at hann var við til at skapa tær møguleikar, sum liggja í lógini fyri broyting og framburði.

Ásannast má, at nógvar broytingar eru hendar og alstórar framburðir hevur verið í Føroyum seinastu fýrati árini. Alt hetta er hent innan fyri karmarnar í heimastýrislógini. Ongantíð er tað komið fyri, at heimastýrislógin hevur fordømt nakrum framburði ella nakrari broyting, sum føroyingar hava havt ynski um at fremja. Við samráðingum millum Føroya landsstýri og ríkisstýrið hevur í øllum førum verið gjørligt at koma til semju um eina loysn.

At ein loysn ikki er fimmin á ávísum mátum, t.d. navnaloggávu og undirgrund, hevur tað ikki heilt einfalt av, at ummáðhvørt hava ongar samráðingar verið, ella eru tær ikki loknar enn.

Tær tríggir heimastýrisflokkarnar, Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, kunnu vera ørvir av at hava verið við til at gera eina so umfatandi lóg sum heimastýrislógina, ið enn 40 ár eftir ikki er fordømdi, men heldur virkar fremjandi fyri framburði og frælsi hjá føroysku fjóðini.

Eingin iyi er um, at vit í mongár fram í tiðina kunnu nevnna og útbyggja okkara land á allum økjum, uttan at heimastýrislógin leggur nakrar forðingar í vegin.

Tí heldur Sambandsflokkurin, at eingin skilagóð orsok er til at gera nakrar broytingar í lógini og setir ti einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Hilmar Kass) forir fram:

Sjálvstýrisflokkurin var ein av teim flokkum, sum fingu tilevnað og samtykt heimastýrislógina.

Lógin hevur virkað framúr væl, men 40 ár eru liðin, so ikki er at undrast á, um okkurt treingir ábøt.

Frá byrjan hevur Sjálvstýrisflokkurin vist á, at umboðan okkara í fólkatingin-um átti at verið øðrvísi, men fólkatingssessir okkara eru bryggjaðir í grundlógini, so umboðanin har er ikki lætt at broyta. Vit eiga at vera til reiðar, um dannir av øðrum orsøkum broyta grundlógina.

Reglurnar fyri vali til fólkatingið eru ikki fyriskrivaðar í grundlógini, so royn eigur at verða at fáa løgtinginum heimild at velja umboð føroyingar í fólkatingið, hetta hevði bætt um støðuna.

Uppskot fólkafloksins um broytingar í heimastýrislógini er av slíkum slag, at vit kundu tikið undir við tí mesta, tó eru broytingar, sum ikki hevdu verið hepnar.

Bert ein slík broyting skal verða nevnd her.

Mælt verður til at skipa serligum føroyskum heimarætt.

Føroyar eru smáar. Ein av størstu fyrimunum okkara er, at føroyingar, sum flyta til Danmarkar, frá fyrsta degi hava øll rættindi sum fólkið, har býr. Skerja vit rættindini hjá donum í Føroyum, so verða vit skerdir á sama hátt í Danmark. Hetta hevði verið føroyingum til stórar skaða.

Tá samgongan varð skipað eftir løgtingsvalið í 1984, varð avtalað gjørd millum samgongufloksins um tvær broytingar, tá samráðast skuldu um við donsku myndugleikarnar, í samarbeiðinum landanna millum.

Blokkstøðulin og undirgrundin vóru størstu málini. Semja er gjørd um blokk støðulin, men torført hevur gingið at fáa semju um undirgrundina. Samráðingar hava verið og fyri reikingar verða gjordar, sum gera okkum betur fórar fyri at verja áhugamál okkara.

Um uppskot fólkafloksins verður samtykt, so skulu samráðingarnar um undirgrundina, ti tær eru partur í løgaruppskotinum.

Tað verður hildið at vera skeivt at skoðga hesum samráðingum, sum verða fyrireikaðar við serkunnari hjálp.

Vísandi til viðmerkingarnar setir minnilutin, Hilmar Kass, einki uppskot fram.

Minnilutin Adolf V. Hansen og minnilutin Tordur Niclasen tuka støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 7. mai. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum (Hans Jacob Debes) fall við 7 ja-atkvøðum, 7-nei-at-kvøðum, 15 atkvøddu ikki, 3 vóru burturstaddir. Atkvøtt varð við navnkalli soleiðis:

Ja atkvøddu:	Eliesar Arge, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum og Hans Jacob Debes.
Nei atkvøddu:	Pauli Ellefsen, Ivan Johansen, Flemming Mikkelsen, Agnar Nielsen, Edmund Joensen, Johs. Martin Olsen, Adolf V. Hansen.
Atkvøddu ikki:	Dánjal P. Danielsen, Svend Aage Ellefsen, John Petersen, Jógvan Sundstein, Eilif Samolsen, Henrik Old, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass.
Burturstaddir:	Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen og Tordur Niclasen.

Uppskotið til samtyktar frá Hans Jacob Debes og Jógvan Sundstein við lógaruppskoti fall við 12 ja-atkvøðum, 17 atkvøddu ikki, 3 vóru burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu:	Dánjal P. Danielsen, Svend Aage Ellefsen, John Petersen, Jógvan Sundstein, Eliesar Arge, Jóannes Dalsgaard, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes.
Atkvøddu ikki:	Pauli Ellefsen, Ivan Johansen, Flemming Mikkelsen, Agnar Nielsen, Edmund Joensen, Johs. Martin Olsen, Eilif Samuelsen, Henrik Old, Sverre Midjord, Tórálvur Mohr Olsen, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Adolf V. Hansen.
Burturstaddir:	Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Tordur Niclasen.

146 Uppskot til samtyktar viðvíkjandi flogvallarviðurskiftunum (21/1986).

Ár 1988, hósdagin 5. mai legði samferðslunevndin fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Svend Aage Ellefsen í ólavsøkutingsetuni 3. september 1986 og varð við 1. viðgerð 28. oktober 1986 beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin setti fram uppskot um at gera nevndina til millumtinganevnd í hesum máli.

Síðani hevur samferðslunevndin sett luftferðslumyndugleikunum 4 spurningar.

Svar fyriliggur ikki fyrr enn í september 1988, og setir tí ein samd nevnd fram:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur samferðslunevndini at halda fram við fyriliggjandi málsviðgerð sum millumtinganevnd og at leggja málið aftur fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni 1988.

2. viðgerð 6. mai. Uppskot til samtyktar um, at samferðslunevndin verður millumtinganevnd hesum máli viðvíkjandi varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

147 Lóg um endurrindan til fiskivinnuna.

Ár 1988, fríggjadagin 3. juni legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um endurrindan til fiskivinnuna.

lagtingslov om tilbagebetaling til fiskerierhvervet.

§ *1.* Játtaðar verða í fíggjarárinum 1988 kr. 130 miliónir til fiskivinnuna, soleiðis at kr. 55 miliónir verða til at umsita av Ráfiskagrunninum, kr. 40 miliónir av Nevndini fyri Studningi til Fiskivinnuna og kr. 35 miliónir í grunn til landsstýrinum saman við løgtingsins fíggjarnevnd at ráða yvir til at nýta har, sum tørvurin er størstur og har lað munar best at stuðla.

§ *1.* Der bevilges i finansåret 1988 kr. 130 millioner til fiskerierhvervet, således at kr. 55 millioner bliver administreret gennem råfiskefonden, kr. 40 millioner af Udvalget for Støtte til Fiskeriet og kr. 35 millioner lægges i en fond som landsstyret råder over sammen med lagtingets finansudvalg til at bruge, hvor det er mest nødvendigt, og hvor støtte er til mest hjælp.

§ *2.* Upphæddin verður fíggjað við kr. 75 miliónum av landskassans yvirskoti 1987 og kr. 60 miliónum úr oljugrunninum.

§ *2.* Beløbet finansieres med kr. 75 millioner fra landskassens overskud 1987 og kr. 60 millioner fra oliefondens midler.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Hin 1. mars 1988 legði Fólkaflokkurin fram uppskot um endurrindan til fiskivinnuna.

Uppskotið, sum var væl undirbygt við ymiskum taltilfari viðvíkjandi fiskiflotanum, snúði seg um at veita 120 mill. kr. til fiskivinnuna, býtt upp í tríggjar partar: 40 mill. kr. til ráfiskagrunnin, 40 mill. kr. at umsita av Nevndini fyri Studningi til Fiskivinnuna og 40 mill. kr. til at taka eftir tørvi.

Uppskotið varð felt í tinginum hin 4. mai 1988.

Aftaná, at tingsetan er endað, er komið fram, at samgongan innanhýsis hevur

gjørt avtalu um, at fiskaprísirnir skulu hækka við 5% 1. juni 1988 og aftur 5% 1. oktober 1988. Fyribils hevur hetta víst seg á tann hátt, at avreiðingarprísirnir pr. 1. juni 1988 eru óbroyttir, hóast nevndin fyri ráfiskagrunnin metti, at prísirnir áttu at lækka við 70 oyru pr. kg í meðal. Hendan prísáseting setir tí krøv um meirjáttan. Um prísirnir harafturat skulu hækkast við 5%, er uppaftur meira neyðugt við cykajáttanum.

Tað verður ásannað av øllum, at størsti parturin av fiskiflotanum er í kreppustøðu í dag. Orsøkirnar eru fleiri, bæði minni fiskiskapur og í løtuni lægri útflutningsprísir. Men eisini ov lítil endurrindan til fyrstu hands vinnuna í mun til strukturin. Her kann vísast til viðmerkingarnar í tingmáli nr. 71/1987, har sagt verður, at tað kostar millum 2 og 3 krónur fyri kg at fáa fisk upp á land í Føroyum.

Tað má tí eisini ásannast, at neyðugt er við størri endurrindan til fiskiflotan fyri at bøta um nevndu viðurskifti.

Eisini er neyðugt við nógv størri samstarvi millum vinnulívið og politisku myndugleikarnar fyri, at planlegging og effektivitetur og harvið lønsemi hjá vinnulívinum kann vera so gott sum møguligt.

Tað at fáa virkað fiskin til eina dýrari vøru, verður meira og meira gjørt við. Tí vil sum frálíður eksportvirðið vaksa. Men økingin kemur hóast alt líðandi. Fyri at ikki stoðgur skal koma í, og skipini gleppa okkum av hondum, er neyðugt at bjarga teimum.

Fyri at útvega tær neyðugu heimildirnar til størri útgjaldingar til fiskivinnuna, heldur Fólkaflokkurin tað vera neyðugt við eini lóg um hesar veitingar. Eftir uppskoti okkara verða veittar tilsamans 130 mill. kr. í fíggjarárinum 1988, og verða upphæddirnar sundurgreinaðar soleiðis:

Til ráfiskagrunn	55 mill.
Nevndin fyri studning til fiskivinnuna	40 mill.
At taka til eftir tørvi	35 mill.
	130 mill.

Tann seinasti parturin, kr. 35 mill., er ætlaður í grunn, sum landsstýrið og fíggjarnevndin í felag kunnu nýta, har serligur tørvur er. Hesin grunnur skal kunna flytast fram til nýtt roknskaparár, um hann ikki er brúktur.

Í 1986 og 1987 hevur landskassin havt stór yvirskot, eins og peningur er lagdur í oljugrunnin. Rímiligt er tí, at hendan meirveiting til fiskivinnuna verður fíggjað av landskassans yvirskoti 1987 og úr oljugrunninum.

1. viðgerð 7. juni. Uppskot var um at beina málið í fíggjarnevndina. Hetta fall

við 10-0. Málið varð síðani beint í fiskivinnunevndina, sum 13. juni legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum 3. juni 1988 og eftir 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Skotið verður upp at, at játtaðar verða í figgjarárinum 1988 130 mill. til fiskivinnuna, soleiðis at 55 mill. verða til at umsita av ráfiskagrunninum, 40 mill av studningsnevndini og tær seinastu 35 mill. verða settar í grunn, ið landsstýrið saman við løgtingsins figgjarnevnd skulu ráða yvir til at nýta har, ið tørvur er størstur, og har tað munar best at stuðla.

Mælt verður til at hesar 130 mill. verða figgjaðar við 70 mill. av landskassans yvirskoti í 1987, 60 mill úr oljugrunninum.

Undir málsviðgerðini hevur umboð fyri studningsnevndina givið frágreiðing. Somuleiðis hevur umboð fyri ráfiskagrunnin verið á fundi í fiskivinnunevndini.

Umboðið fyri ráfiskagrunnin greiddi frá, at grunnurin skal hava umleið 104 mill. játtaðar, um grunnurin skal verða førur fyri at halda teir somu avreiðingarprísir, ið galdandi eru. Verður talan um at hækka avreiðingarprísirnar við 5% sum ætlanin er, tørvar ráfiskagrunninum 120 mill. árið út.

Fiskivinnunevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Signar Hansen, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Kass og Adolf V. Hansen) førir fram:

Tíðliga í vár varð greitt, at teir skjótt lækkandi prísirnir á heimsmarknaðinum bóru í sær, at játtanin til ráfiskagrunnin fór at verða í minna lagi í 1988.

Landsstýrið boðaði tá frá, at søkt fór at verða um cykajáttan, men at grundarlgið fyri endaligum metingum um tørv fór at verða betri seinni á ári. Tá fór at vera meira vitan um gongdina í dollaravirðinum, útboði av saltfiski, ávirkan frá bíligum fiskasløgum, sum komu í staðin fyri okkara framleiðslu (Alaska upsi, lýsingar o.a.) o.s.fr.

Leingi hevur eisini verið arbeitt við at broyta lógargrundarlagið undir virksemi ráfiskagrunnsins, soleiðis at byrðarnar av prisfalli betur verða javnaðar út á framleiðsluliðini og landskassan, og soleiðis at veruligi útflutningsprísurin heldur enn metingar um søluútliti eru avgerandi fyri studningsupphæddirnar og ymiskt í útrokningunum hjá ráfiskagrunninum kemur á beinari leið, t.d. so at betri samsvar verður millum roknaða og veruliga skiftisavlopið.

Í seinastu tingsetu eru ávísar broytingar gjørdar í lógini um ráfiskagrunn. Nýggj nevnd er vald, og formaður er eisini nývaldur. Nevndin er farin til verka

at meta um prísútlitið fyri hvørt fiskaslag sær og um hvørjar broytingar í útrokningarhátti kunnu bøta um støðuna.

Meirilutin heldur eisini at umhugsað eigur at verða, hvussu stórar studningsupphæddir ein kann lata til ávís fiskasløg uttan at talan verður um beinleiðis hall landsbúskaparliga, t.v.s. um ískoytið til bruttotjóðarúrtøkuna gerst so lítið, at studningur ikki munar longur.

Nevndin hevur boðað frá, at neyvari metingar valla verða tøkar fyrrenn seint í juni, og hevur nevndin lagt tíðarætlan fyri virksemi sítt fram til 25. juni.

Meirilutin heldur tað vera rætt, at landsstýrið verður kunnað um tað arbeiðið, ið nevndin ger, áðrenn endaliga støða verður tikin um upphæddina.

Meirilutin heldur tað ikki vera nóg mikið at játta ráfiskagrunninum størri upphædd til studning. Tær samtyktir, sum gjørdar eru um økta meskavídd, stongdar leiðir, reglur fyri fiskiloyvi og reglur fyri útskifting av fiskiførum eru tiltøk, ið fara at muna mest, sum frálíður, og mælir tí til at fremja onnur tiltøk. Tað er ein sannroynd, at júst í ár hevur tað verið trupult at fáa sum mest burturúr landaðu veiðuni vegna fólkatrot, ov langar túrar og vánaliga góðsku. Fiskivinnuumsitingin, landsstýrið og fiskivinnunevndin eiga sum skjóast at áseta mest loyvda fiskidagatalið fyri fisk, sum kann koma undir góðskumeting (og harvið studning) t.d. 10 dagar á landleiðini og 14 dagar uttan fyri landleiðina.

Trároyndin eftir smáfallandi upsa ber í sær, at upsastovnurin ikki mennist tað, hann kundi.

Meirilutin mælir til, at landsstýrið, fiskivinnuumsitingin og fiskivinnunevndin bera so í bandi, at minstamátið fyri upsa I verður hækkað úr 55 cm upp í 60 cm. Støddkanningar sýna, at í løtuni er umleið triðingurin av landaða upsanum í tali millum 55 cm og 60 cm, t.v.s. umleið 10-15% í vekt.

Á løgtingsfíggjarlógini eru avsettar 40 mill til upphøggingargrunn. Reglugerð er samtykt fyri grunnin. Undir viðgerðini í fiskivinnunevndini er nevndi upphøggingargrunnur og tær reglur, ið eru galdandi fyri hann, umrøddar. Meirilutin heldur ikki at tann peningaupphæddin, ið er sett á fíggjarlógina er nóg mikið, um hon skal muna nakað. Meirilutin skjýtur upp, at veittar verða grunninum 30 mill afturat. Meirilutin mælir soleiðis landsstýrinum og fíggjarnevndini til at taka reglugerðina fyri grunnin upp til nýggja viðgerð, tí hildið verður, at reglurnar fyri grunnin eru ikki nóg smidligar til, at tað veruliga fer at bera til at keypa veiðuorku burtur úr flotanum.

Tað er eyðsæð, at summar framleiðslur av frystivørum geva ov lítlan avroknингarprís, og at sama vøra útflutt sum ísað flak, skráskorin ella heilur fiskur hevði givið munandi meira. Landsstýrið eigur tí at umhugsa eina økta játtan til studningsnevndina at nýta til útflutningsískoyti (fraktstudning, útflutnings-

premiu oa.) Skipanin kundir verið roynd fyri kongafiskaflak, skráskornan olla fsaðan kongafisk, men eigur ikki at fevna um beinleiðis landingar uttanlands. Í hjálagda lógaruppskoti eru gjørdar heimildir til at fremja hesi tiltøk.

Ilt er at meta um, hvussu stórur studningstørvurin er í løtuni. Fyri at landsstýrið skal hava ábendingar um peningaupphæddina og fer at halda seg, skal meirilutin føra fram, at hann ikki metir tørvin liggja oman fyri 120 mill. kr, men helst ímillum 80 og 120 mill. kr., alt eftir hvussu nógv verður nýtt til frammanundan nevndu tiltøk. Meirilutin áleggur landsstýrinum at fáa skipanina viðv. upphøggingargrunninum, at virka sum skjótast, soleiðis at studningsupphæddirnar minka samsvarandi.

Meirilutin (Signar Hansen, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Kass og Adolf V. Hansen) setir í staðin fyri uppskot Fólkaflokksins soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um eykajáttan til grunnar og nevndir viðvíkjandi fiskivinnu.

lagtingslov om ekstrabevilling til fonds og udvalg vedrørende fiskerierhvervet.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veita ráfiskagrunninum neyðugan pening, til tess at avreiðingarprísurin hækkar upp til 5% við gildi frá 1. juni 1988. Eisini verður landsstýrinum heimilað at økja játtanina til aðrar grunnar og nevndir, hvørs endamál eru at minka um veiðutrýstið á landleiðina, stuðla veiðihættum, ið minka um orkuna í botnfiskaveiðuni undir Føroyum, hækka um virkingarstigið og økja um útflutningsvirðið.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at yde Räfiskefonden nødvendige beløb med det formål, at indhandlingsprisen forhøjes med op til 5% med gyldighed fra 1. juni 1988. Endvidere bemyndiges landsstyret til forøge bevillingen til at andre fonds og udvalg, hvis formål det er at formindske fangstpresset på fiskeriterritoriet, støtte fangstmetoder, der formindsker kapaciteten i bundfiskeriet under Færøerne, forhøjer beskæftigelsesgraden og øger eksportværdien.

§ *2.* Peningurin verður at gjalda av avlopi landskassans í 1987 og 1988.

§ *2.* Pengene udbetales af landskassens overskud i 1987 og 1988.

§ *3.* Landsstýrinum verður heimilað at læna upp til 30 mill. kr. til upphøggingargrunnin. Hesin peningur kann lænast úr oljugrunninum.

§ *3.* Landsstyret bemyndiges til at låne op til 30 mio. kr. til kondemneringsfonden. Dette beløb kan lånes af oliefonden.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og fer úr gildi, tá peninga upphæddin, neyðug til endamálini í § 1., er ásett í serligari lóg, ið landsstýrið loggur fyri løgtingið á Ólavsøku 1988.

§ 4. Denne lov træder i kraft straks og træder ud af kraft, når det beløb, der er nødvendigt til färmålsbestemmelserne i § 1, er fastsat i særlig lovgivning, som landsstyret fremlægger straks, efter at Olaitingssamlingen 1988 er sat.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) kann ikki taka undir við uppskoti meirilutans, sum gevur landsstýrinum óavmarkaða heimild, og er beinleiðis í stríð við lóg um stýrisskipan Føroya í sermálum.

Havafturat er tað fløkt, tí tað greinar ikki út, hvussu og hvar peningurin skal nýtast. Sagt verður eisini, at peningurin skal gjaldast av avlopi landskassans í 1987 og 1988. Landskassaroknskapurin 1987 kemur væntandi at vísa avlop uppá ca. 175 mill. kr., men eftir øllum at døma kemur roknskapurin fyri 1988 at vísa hall, so her verður ikki nógv at taka av.

Vit hava fyrr fingið at vita, at samgongan arbeiðir álvarsliga við málinum, og vil útvega sær taltilfar, so eitt haldgot uppskot kann leggjast fyri tingið.

Nú eru tøl komin á borðið frá Ráfiskanevndini, sum vísa, at tað sum samgongan hevur samtykt at veita fiskivinnuni, kostar 135 mill. kr. afturat tí, sum áðrenn er játtað til hetta fíggjarárið.

Uppskot Fólkafloksins í vár var uppá 120 mill. kr., meðan tað sum tingformaðurin kallaði løgtingið saman til at viðgera, var uppá 130 mill. kr., so sigast má, at uppskot Fólkafloksins hava verið á góðari leið.

Fólkaflokkurin kann tí ikki taka undir við uppskoti meirilutans, men mælir til at samtykkjat uppskot Fólkafloksins frá 3. juni 1988. Í hesum uppskoti er heimildin avmarkað til ávísar upphæddir, sum samanlagt nøkta tørvin meginpartin av 1988. Um viðurskiftini broytast nógv seinni í ár, eigur nýggj heimild at leggjast fyri tingið.

Minnilutin Jógvan I. Olsen førir fram:

Samgongan, sum tók við eftir valið 1984, var sera samd um eitt, og tað var at minka um afturberingina av samfelagságóðanum til fiskivinnuna.

Sambandsflokkurin tók ikki undir við hesum politikki, men hevur á hvørjum ári síðani tá havt uppskot um eina størri játtan til fiskivinnuna, tí hon hevði

hesa játtan á fíggjarlógini fyri neyðini.

Harafturat hava vit havt uppskot um at frítaka fiskivinnuna fyri ávís gjøld, hon rindar inn í landskassan. Tí vit halda, at tað kann ikki vera skilagott at lata studning við aðrari hondini og við hinari krevja ein stóran part inn aftur í tolli og avgjøldum. Hetta hevur eisini størri útreiðslur í umsitingini.

Sum dømi kann nevnast, at vit í farnu tingsetu løgdu fram uppskot um at avtaka eykainnflutningsgjaldið á olju uppá 6%, sum vildi minka munandi um oljuútreiðslurnar hjá fiskivinnuni.

Vit hava lagt uppskot fram um at avtaka serligt gjald á brenniolju og smyrjiolju uppá ávikavist 50 og 70 oyru fyri liturin, sum millum annað vildi minka um útreiðslurnar hjá virkjunum, og harvið kundu tey givið ein hægri prís fyri fiskin.

Vit hava lagt fram uppskot um at avtaka toll, sum er á útgerð, sum verður nýtt innan fiski- og alivinnuna.

Vit hava lagt fram uppskot um eykajáttan til Ráfiskagrunnin bæði sum serstakt løgtingsmál, sum broytingaruppskot til løgtingsins fíggjarlóg og eisini skotið upp eina broyting av býtinum av teimum 260 mill. kr., sum eru á løgtingsins fíggjarlóg, til »minstaløn og annan stuðul til fiskivinnuna« til frama fyri Ráfiskagrunnin.

Men øll hesi uppskot hevur samgongan felt.

Kreppan í fiskivinnuni er ikki ikomin frá degi til dags, men er versnað alla tíðina, síðani verandi samgonga tók við, og er fyri ein stóran part orsakað av tí førda fiskivinnupolitikkinum.

Og hesin førdi fiskivinnupolitikkur kemur at hava hjáárin mong ár framyvir og kemur at hátta tann føroyska búskapin sum heild.

Nú er so tingið kallað saman til eykatingsetu fyri at viðgera eitt uppskot frá Fólkaflokkinum um endurrindan til fiskivinnuna uppá 130 mill. kr. býtt við 55 mill. kr. til ráfiskagrunnin, 40 mill. kr. til studningsnevndina at ráða yvir og 35 mill. kr. í ein grunn, sum landsstýrið saman við løgtingsins fíggjarnevnd skal ráða yvir at stuðla við, har mett verður, at tað er mest tiltrongt.

Vit hava fingið eina meting frá Ráfiskagrunninum, at um verandi avreiðingarprísir skulu standa við og ein hækking uppá 5% 1. juni og ein hækking uppá 5% frá 1. oktober, so kostar hetta umleið 130 mill. kr. hetta árið út.

Havandi í huga førda fiskivinnupolitikkin og ta fløkju og ósemju í samgonguni, sum kom undir fyrstu viðgerð av hesum máli, setir minnilutin fram uppskot um at játta Ráfiskagrunninum 130 mill. kr. og at heita á landsstýrið um at fáa lógina um serlán uppá 150 mill. kr. at virka

rímuligt og skjótt.

Og síðani eiga vit at taka málsøkið fram aftur á Ólavsøku hvat meir verður neyðugt hjá løgtinginum at gera við fiskivinnuna sum heild.

Og setur fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ *1 verður orðað soleiðis:*	§ 1 formuleres således:
»§ *1.* Játtaðar verða í fíggjarárinum 1988 130 mill. kr. til Ráfiskagrunnin at umsita«.	»§ *1.* Der bevilges i finansåret 1988 kr. 130 mill. der administreres af Råfiskefonden«.

2. viðgerð 13. juni. Atkvøtt var um minnilutauppskot frá Jógvan I. Olsen í álitinum, sum fall við 6-0 atkvøðum.

Atkvøtt var um minnilutauppskot frá Anfinni Kallsberg og Olaf Olsen í álitinum, sum fall við 6-0 atkvøðum.

Atkvøtt varð við navnakalli um § 1 frá meirilutanum í fiskivinnunevndini.

Ja atkvøddu 20, 9 atkvøddu ikki, og 3 vórðu burtur staddir.

Atkvøtt varð soleiðis:

Ja atkvøddu: Óli Breckmann, Svend Åge Ellefsen, Henrik Old, Hilmar Bech, Tórálvur Mohr Olsen, Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Gullak Gullaksen, Jørgen Thomsen, Tummas Arabo, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Sigurd Hansen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Karin Kjølbro, Øssur av Steinum, Hans Jacob Debes, Adolf V. Hansen, Tordur Niclasen.

Atkvøddu ikki: Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Jógvan Sundstein, Poul Michelsen, Pauli Ellefsen, Ivan Johannesen, Agnar Nielsen, Jógvan I. Olsen, Eilif Samuelsen.

Burturstaddir: Eyðun Videro, Flemming Mikkelsen og Johannes Martin Olsen.

§§ 2, 3 og 4 frá meirilutanum í fiskivinnunevndini vórðu samtyktar við 20-0 atkvøðum.

At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 20-0.

Formaðurin bað um loyvi til frávik til 3. viðgerð.

Samtykt var við 21-0 atkvøðum at geva loyvi til frávik.

Broytingaruppskotið frá meirilutanum í fiskivinnunevndini varð samtykt við 17-0 atkvøðum. Uppskotið frá meirilutanum í fiskivinnunevndini samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 94 frá 14. juli 1988.

148 Upploysing av tinginum.

Á r 1988, týsdagin 7. juni legði Tordur Niclasen, løgtingsmaður, vegna Kristiliga Fólkaflokkin fram soljóðandi:

U p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til § 9 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 við seinri broytingum um stýrisskipan Føroya í sermálum samtykkir løgtingið, at løgtingið verður upployst.

Vísandi til sumu lógargrein heitir løgtingið á løgmann um, at nývalið verður hildið 26. juli 1988.

Viðmerkingar:

Eftir at ein av samgonguflokkunum hevur »suspenderað« landsstýrissamgonguna, og at sostatt eingin meiriluta-samgonga er longur, má einasta rætta loysn av parlamentarísku viðurskiftunum haldast at vera, at tingið verður upployst og nýval útskrivað skjótast møguligt.

Um uppskotið verður samtykt, hevur løgmaður skyldu til beint aftaná at útskriva nýval.

Valið kann haldast 6 vikur aftaná at kunngerð um hetta er lýst. Hildið verður tí, at ein hóskandi valdagur er týsdagin 26. juli 1988.

1. viðgerð 9. juni. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 13. juni legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið varð lagt fram hin 7. juni 1988 av Tordi Niclasen vegna Kristiliga Fólkaflokkin - Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk.

Við 1. viðgerð hin 9. juni 1988 varð málið beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin Hans Jacob Debes, Jørgen Thomsen og Jákup Lindenskov tekur ikki undir við uppskotinum og setir onki uppskot fram.

Minnilutin Jógvan Sundstein og Eilif Samuelsen tekur við uppskotinum men við teirri broyting at skotið verður upp at valið skal fara fram tann 11. august 1988, og setir sostatt fram soljóðandi

Uppskot

til

samtykt

Vísandi til § 9 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 við seinri broytingum um stýrisskipan Føroya í sermálum samtykkir løgtingið, at løgtingið verður upployst, og at heitt verður á løgmann um at útskriva nýval at verða hildið tann 11. august 1988.

Formaðurin bað um loyvi til frávik av tíðarfreistini.

Atkvøtt var um minnilutauppskotið frá Jógvan Sundstein og Eilif Samuelsen, sum fall við 12-0 atkvøðum.

Tordur Niclasen fráfall upprunauppskotið, grundað á, at minnilutauppskotið fall.

149 Broyting í vallógini.

Ár 1988, hósdagin 9. juni legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Føroya Løgting

§ *1.*

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya løgting verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, 1. stk. verður »32« broytt til: »34«.
2) Í § 1, 3. punktum verður »5 limir« broytt til: »7 limir«.
3) Í § 32, 1. stk., verða orðini: »teimum 5 eykaumboðunum« broytt til: »teimum 7 eykaumboðunum«.
4) Í § 32, 5. stk. verður »5« broytt til: »7«.

§ *2.*

Hendan lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om valg til Færøernes Lagting.

§ *1.*

I lagtingslov nr. 49 af 20. juli 1978 om valg til Færøernes Lagtings foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 1, ændres »32« til: »34«.
2) I § 1, 3. punktum, ændres »5 medlemmer« til: »7 medlemmer«.
3) I § 32, 1. stk., ændres ordene »de 5 tillægsmandater« til »de 7 tillægsmandater«.
4) I § 1, stk. 5 ændres »5« til: »7«.

§ *2.*

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Sum ávíst í tingmáli nr. 53/1986 kann tað við núverandi vallóg væl hendа, at matematiska býtið av tingmonnum millum teir ymisku flokkarnar eftir atkvøðutali teirra ikki verður rætt. Hetta hendi t.d. 1978.

Fyri at bøta um hesi viðurskifti og gera tað minni sannlíkt, at slíkur ójavni aftur kemur fyri, setir Fólkaflokkurin tí fram omanfyrinevnda uppskot um at hækka talið av møguligum eykavaldum tingmonnum frá 5 til 7. Møguliga samlaða talið av tingmonnum kann sostatt, um uppskotið verður samtykt, verða 34.

1. viðgerð 13. juni. Málið varð beint í rættarnevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum tann 9. juni 1988 og eftir 1. viðgerð tann 13. í sama beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, men heldur vegna tíðartrot, at ikki er beint í løtuni at avgreiða málið vísandi til tey sjónarmið, ið komu fram undir 1. viðgerð í tinginum.

Ein samd rættarnevnd mælir tí tinginum til at samtykkja, at nevndin arbeiðir við málinum sum millumtinganevnd og setir fram soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur rættarnevndini at arbeiða víðari við málinum sum millumtinganevnd og at leggja álit fram í ólavsøkutingsetuni.

2. viðgerð 14. juni. Uppskotið til samtyktar frá samdari nevnd um, at rættarnevndin verður gjørd til millumtinganevnd hesum máli viðvíkjandi, varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

150 Yvirtøka av málsøkinum flogferðsla.

(Ikki framlagt)

151 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Ár 1988, mánadagin 13. juni legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, 1. punktum verður orðað soleiðis:
»Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (samtíðarskattur) verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 1-6 í somu lóg og teirra, ið nevnd eru í § 2, stk. 1, litra c, d, e, f og g, til landskassan ásettur soleiðis:«
2) Í § 3, stk. 2, 2. punktum, verður aftaná: »og frá og við skattaárinum 1987 tó 12.000 kr.« sett:«, frá og við skattaárinum 1988 13.000 kr.«
3) Í § 3, stk. 2, 3. punktum verður aftaná: »og frá og við skattaárinum 1987 tó 9.200 kr.« sett:«, frá og við skattaárinum 1988 10.200 kr.«.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1, punktum 1 affattes således:
»Under henvisning til § 54 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat (kildeskat) udskrives skatten for dem, der er omhandlet i nævnte lovs § 1 nr. 1-6 og for dem, der er omhandlet i § 2, stk. 1, litra c, d, e, f og g, til landskassen således:«
2) I § 3, stk. 2, punktum 2 tilføjes efter: »og med virkning fra og med skatteåret 1987 dog kr. 12.000« », og med virkning fra og med skatteåret 1988 kr. 13.000.«
3) I § 3, stk. 2, punktum 3 tilføjes efter: »og med virkning fra og med skatteåret 1987 dog kr. 9.200.«, »og med virkning fra og med skatteåret 1988 kr. 10.200«.

4) § 7 verður orðað soleiðis:
»Av nýtslugjaldi (royalty) sambært § 2, 1. stk. c) í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður ásett eitt fast gjald uppá 25%. Tann, ið rindar ella góðskrivar nýtslugjaldið skal halda aftur hetta avgjald og rinda peningin til Føroya Gjaldstovu við tilskilan av navni og bústaði móttakarans. Rindan av avgjaldinum verður roknað at vera rættstundis, tá goldið verður í seinasta lagi við endan av mánaðinum, sum kemur aftaná tann mánaðin, sum avgjaldið er gjaldkomið. Avgjaldið verður býtt við 40% til avvarandi kommunu og 60% til landskassan.
2. stk. Um avgjaldið ikki er goldið rættstundis sambært stk. 1 skal renta rindast av avgjaldinum við 1% um mánaðin frá gjaldkomudegi at rokna til goldið verður.
3. stk. Renta sambært stk. 2 kann ikki verða frádrigin skattskyldugu inntøkuni. Reglurnar í § 135, 3. stk. í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum um rættin til at panta avgjaldið við aftratkommum rentum, er galdandi í hesum førum.«

4) § 7 formuleres således:
»Af royalty, jfr. § 2, stk. 1 c) i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer udskrives en fast afgift på 25%. Den, som udbetaler eller godskriver royalty skal indeholde denne afgift og indbetale beløbet til Føroya Gjaldstova med oplysning om modtagerens navn og adresse. Indbetaling af royaltyafgift anses for rettidig, når den finder sted senest ved udløbet af den måned, der følger efter den måned, hvor royaltyafgiften er forfalden til betaling. Afgiften fordeles med 40% til pågældende kommune og 60% til landskassen.
Stk. 2. Er den i henhold til stk. 1 indholdte afgift ikke indbetalt rettidigt, påløber der afgiften renter med 1% pr. påbegyndt måned fra sidste rettidige indbetalesesdag at regne.
Stk. 3. Den i stk. 2 omhandlede rente kan ikke fratrækkes i den skattepligtige indkomst. Reglerne i § 135, stk. 3 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer om retten til udpantning af afgift med påløbne rente finder tilsvarende anvendelse.«

5) Sum nýggj § 8 verður sett:
»Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 2, stk. 1, a), b), h) og i), sum eru undir avmarkaðari skattskyldu, og sum í inntøkuárinum bert hava A-inntøku, ásettur til 35% av bruttoinntøkuni. Skatturin verður býttur við 40% sum kommunuskattur og 60% sum landsskattur.«

5) Som ny § 8 indsættes:
»Under henvisning til § 54 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer, udskrives skatten til dem, der er omhandlede i § 2, stk. 1, a), b), h) og i), under begrænset og som i indkomståret kun har haft A-indtægt, med 35% af bruttoindtægten. Skatten fordeles med 40% som kommuneskat og 60% som landsskat.«

6) § 8 verður § 9.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi 1. juli 1988.

6) § 8 bliver § 9.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. juli 1988.

Viðmerkingar:

Til § 1:

Broytingin er ein nágreining av, hvussu landsskatturin verður ásettur fyri tey, sum nevnd eru í § 2, stk. 1, litra c, d, e, f og g í skattalógini, og er somuleiðis ein fylgjubroyting stavandi frá nýggju § 8 í broyting nr. 5).

Til § 3, stk. 2:

Skotið verður upp, at hækka persónsfrádráttin fyri leysar persónar yvir 67 ár og leysar persónar, sum fáa avlamis-, einkju- ella fólkapensión ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini við 1.000 kr. úr 12.000 kr. í 13.000 kr. at galda frá og við skattaárinum 1988.

Somuleiðis verður skotið upp, at hækka persónsfrádráttin fyri giftar persónar yvir 67 ár, sum fáa avlamis ella fólkapensión ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini við 1.000 kr. úr 9.200 kr. í 10.200 at galda frá og við skatlaárinum 1988.

Til § 7:

Reglur um nýtslugjald vórðu settar við løgtingslóg nr. 55 frá 8. mai 1987, sum kom í gildi í mai 1987. Í hesum lógaruppskoti verður nærri ásett, hvussu gjaldið av nýtslugjaldinum skal rindast til Føroya Gjaldsstovu, og avleiðingarnar av, at upphæddin verður goldin ov seint.

Til § 8.

*Á*tlanin við uppskotinum er, at øll, sum sambært § 2, stk. 1, a), b), h), og i), í skattalógini eru undir avmarkaðari skattskyldu, verða skattløgd við 35% av bruttoinntøkuni.

Í dag er skipanin tann, at t.d. ein útlendskur lækni teir fyrstu 180 dagarnar ongan frádrátt fær, og tí verður skattaður av bruttoinntøkuni. Aftaná 180 dagar

kemur hann undir fulla skattskyldu, og fær tá allar frádráttir, galdandi frá fyrsta degi, viðkomandi kom til Føroyar.

Nógv eru tey, ið bert dvølja her minni enn 180 dagar, og fyrisitingarliga hevði tað broytt arbeiðsumstøðurnar nógv, um hesi bert skuldu skattleggjast við 35% av bruttoinntøkuni eina ferð með alla.

Tey, ið dvølja her longri, koma altíð undir fulla skattskyldu, og skatturin verður roknaður eftir galdandi skattastiga.

Við hesum lógaruppskoti verður gingið á møti einum tørvi at skattleggja bólkar av fólki, ið higartil ongan skatt hava goldið til Føroyar, tí tey dvølja her minni enn 180 dagar, og tey eru mong, og higartil eingin heimild verið til at skattleggja hendan bólk.

Til § 9:

Hetta er ein fylgibroyting stavandi frá broyting 5).

— — — — — — — — — —

Hetta uppskot er ein endurtøka av løgtingsmáli nr. 103/1987, ið aftur innihelt lutvísar reglur, sum vórðu lagdar fyri tingið í løgtingsmáli nr. 45/1987.

Í viðgerðini í seinastu tingsetu eru málini blandað saman, soleiðis at løgtingsmál nr. 45/1987, ið skuldi takast aftur, er viðtikið í staðin fyri løgtingsmál nr. 103/1987, sum sostatt er burturdottið.

Í viðgerðini av málinum í skattanevndini var ósemja um skattaprosentið, sum er viðtikið í løgtingsmáli nr. 45/1987, men uppskotið innihelt aðrar reglur, sum ikki vórðu viðgjørdar.

Tí verður hetta uppskot sett fram aftur, av tí at løgtingsmál nr. 45/1987 umfatar øll undir avmarkaðari skattskyldu, meðan hetta uppskotið bert umfatar ávísar persónar undir avmarkaðari skattskyldu.

1. viðgerð 13. juni. Málið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 13. juni. Málið varð samtykt við 28-0 atkvøðum. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 14. juni. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 430-12-45-16. Lóg nr. 84 frá 28. juni 1988.

152 Løgtingslóg um endurgjald í samband við avtøku av furunkulosusmittaðum smolti.

Ár 1988, mánadagin 13. junil legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot

til

løgtingslóg um endurgjald í samband við avtøku av furunkulosusmittaðum smolti.

lagtingslov om erstatning i forbindelse med aflivning af furunkulosesmittet smolt.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at nýta upp til 6 mió. kr. til endurgjald til teir alarar, ið ikki kundu keypa smolt orsakað av sjúkuni furunkulosu og at leggja peningin úr landskassanum.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at bruge op til 6 mio. kr. til erstatning til de opdrættere, der ikke kunne købe smolt på grund af sygdomme furunkulose og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ *2.* Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Í samband við avtøku av furunkulosusmittaðum smolti varð gjørd ein semja við alarar (samanber løgtingsmál nr. 107/1986).

Pkt. 2 í semjuni áleggur landsstýrinum at leggja uppskot um ein trygdargrunn fyri løgtingið. Hesin trygdargrunnur, sum umframt annað skuldi nýtast til, at alarar, sum ikki fingu smolt orsakað av furunkulosu, fingu ávíst endurgjald.

Endurgjaldið var í tveimum.

1. Smoltstøðir, har smoltið var avlívað.
   Hetta varð viðgjørt við serligari lóg og í eini serligari nevnd, sum arbeiðir á sama hátt sum húsdjóranevndin.

2. Endurgjald til teir sjógvalarar, sum ikki fingu smolt.

Hetta hevur ikki nakra lógarheimild ella nakað fyridømi í samband við neyðslakting av djórum sambært húsdjóralógini, men í somjuni bant landsstýrið seg til at tryggja hesum alarum ávíst endurgjald.

Hetta skuldi gerast í einum trygdargrunni, har alararnir skuldu gjalda sín part og landsstýrið sín.

Løgtingið tók uppskotið um trygdargrunn burtur úr lógaruppskotinum og lat standa eftir bert ein endurgjaldsgrunn, sum skal nýtast til endurgjald, har neyðslaktið fer fram.

Sostatt er eingin lógarheimild komin at endurgjalda sjógvalarum, sum ikki fingu smolt, og er landsstýrið sostatt bert bundið av einum almennum lyfti um ávíst endurgjald.

Á fundi 28. mars við umboð fyri alarar, umboð fyri Havbúnaðarfelagið og umsitingina hjá Føroya Landsstýri í alimálum bleiv avgjørt sambært løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987, um sjúkur hjá fiski, skeljadórum og krabbadjórum at seta niðanfyri standandi metingarnevnd: *Jógvan Joensen, Marius Thomasen, Jákup Sverre Joensen.*

Nevndin varð liðug við arbeiði sítt 22. apríl og kom fram til eitt samlað endurgjald uppá 13.215.169 kr.

Eftirsum landsstýrið ikki metir, at landsstýrið skal gjalda fyri mistan vinning er fylgjandi uppskot gjørt út frá tí, metingarnevndin er komin fram til, til landsstýrið at taka støðu til:

1. Smoltkeyp ..... 0 kr.

2. Útreiðslur, ið ikki verða spardar
(sí hjálagda skjal)
8,45 × 658.782 kg. ..... 5.566.709 kr.

3. Mistur vinningur
(eigur landsstýrið ikki at gjalda fyri) ..... 0 kr.

4. Burturbeiningarkostnaður
Hesin má gjaldast eftir rokning

Tilsamans 8,45 × 658.782 kr. ..... 5.566.709 kr.

Sostatt verður skotið upp, at løgtingið heimilar landsstýrinum at nýta upp til 6,0 mió. kr. til teir alarar, ið ikki kundu keypa smolt orsakað av sjúkuni furunkulosu.

Útreiðslur ið ikki verða spardar.

Meðalframleiðsluprísurin pr. kr. er hesin:

Smolt (22 × 1, 20) / (5 × 0,88)		5,80
Fóður		14,23
Løn		4,27
Trygging		1,50
Heilivágur		0,40
Rakstrarútreiðslur excl. trygging		3,47
		29,67
Renta av íløguláni	1,10	
Avskriving	1,43	2,53
		32,20
Renta av rakstrarláni		3,82
Framleiðsluprísur		36,02

Tær útreiðslur, ið alistøðirnar spara fult út eru hesar:

Smolt		5,80
Fóður		14,23
Trygging		1,50
Lønir	50%	2,14
Heilivág		0,40
Rakstrarrentur		
Smolt	0,64	
Útreiðslur excl. smolt	2,01	2,65
Avskriving av ringunum		0,86
Spardar útreiðslur		27,57

1. viðgerð 13. juni. Samtykt við 21-0 atkvøðum, at málið skuldi fara uttan nevndarviðgerð til 2. viðgerð.

2. viðgerð 13. juni. Málið varð samtykt við 21-0 atkvøðum. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 21-0 atkvøðum.

3. viðgerð 14. juni. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1509-3-5-2-2. Lóg nr. 95 frá 14. juli 1988.

Fyrispurningar

100 - (1-27)

100-1 Viðvíkjandi avgreiðslutíð hjá almennum stovnum.

Ár 1987, týsdagin 29. september boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi til løgmans frá Jógvan Sundstein, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Vil løgmaður, sum tann, ið hevur ábyrgdina av landsfyrisitingini, skipa soleiðis fyri, at stovnar undir landinum avgreiða viðskiftafólk alla tíðina í vanligari skrivstovutíð, tað vil siga í tíðini 8.00 (9.00) - 12.00 og 13.00 - 16.00 (17.00).

Viðmerkingar:

Øll almenn fyrisiting eigur at vera fólksins tænari og ikki fólksins hurri.

Hetta ber í sær, at avgreiðslan á landsins stovnum er soleiðis skikkað, at viðskiftafólkini, og tað eru allir landsins íbúgvar, fáa eina slíka tænastuveiting á stovnunum, sum teir hava rímuligt krav uppá.

Vanlig skrivstovutíð í Føroyum er frá kl. 8 ella 9 á morgni til kl. 4 ella 5 seinnapartin. Vanligt er eisini enn at hava døgurðasteðg millum kl. 12 og 13. Tað má haldast at vera rímuligt, at fólk, sum hava ørindi á landsins stovnum kunnu verða avgreidd innanfyri hesar tíðir.

Tíverri vísir tað seg, at mangan, tá ið fólk venda sær til ymiskar skrivstovur í telefon, t.d. kl. 9 um morgunin, klokkan hálvgum tvey ella klokkan hálvgum fýra, sum hvør sær er besta tíð á degnum, fáa eina telefonsvararødd í høvdið, um at avgreiðslutíðin bert er tann og tann, t.v.s. einar 4 tímar um dagin. Dømi eru um, at hon er frá 10-12 og 14-15.30 ella 13-15.

Hetta er at vísa fólki vanvirðing og eigur at verða broytt skjótast gjørligt.

Tí verður frammanfyristandandi spurningur settur.

Við 18-0 atkvøðum skuldi verða svaraður.

11. desember svaraði løgmaður soleiðis

SVAR

Jógvan Sundstein, løgtingsmaður hevur 29. september 1987 sett mær fyrispurning, um løgmaður, sum tann, ið hevur ábyrgdina av landsfyrisitingini, vil skipa soleiðis fyri, at stovnar undir landinum avgreiða viðskiftafólk alla tíðina í vanligari skrivstovutíð, tað vil siga í tíðini 8.00 (9.00) - 12.00 og 13.00 - 16.00 (17.00).

Tað, at alt fleiri almennir stovnar eru farnir undir ta skipan ikki at avgreiða viðskiftafólki pr. tlf. uttanfyri ávísar tíðir á degnum, kemst ikki av, at hesir stovnar ynskja at lækka um tænastustøðið. Orsøkin er, at hetta hevur víst seg neyðugt, fyri at starvsfólkið á stovninum skal fáa høvi at avgreiða dagligu uppgávur sínar útyvir at svara viðskiftafólki í telefon.

Krøvini til almennu fyrisitinginina verða alt størri, meðan almennu stovnar-

nir hinvegin hava torført við at fáa nóg mikið av starvsfólki.

Eg eri samdur við Jógvan Sundstein í, at tað hevði verið ynskiligt, um tænastustøðið hevði verið betur, og at almennir stovnar høvdu longri avgreiðslutíð, og verður tí sett ein kanning í verk av hesum viðurskiftum. Tá kanningin er liðug, verður vent aftur til spurningin. 28. apríl 1988 ger løgmaður Jógvan Sundstein eitt uppískoytissvar, sum var soljóðandi:

Uppískoytissvar

Tann 11. desember 1987 svaraði eg fyrispurningi frá Jógvani Sundstein viðvíkjandi avgreiðslutíð hjá almennum stovnum, løgtingsmál nr. 100-1/1987, og varð í svarinum sagt, at landsstýrið vildi seta kanning í verk av hesum viðurskiftum og at vent verður aftur til spurningin, tá kanningin er liðug.

Sent varð skriv til allar almennar stovnar tann 16. desember 1987, har stovnarnir vórðu bidnir um at upplýsa skrivstovutíð og avgreiðslutíð pr. telefon. Um so var, at telefonin ikki verður svarað allan dagin, varð biðið um grundgeving fyri hesum.

Stovnarnir hava svarað landsstýrinum og vísir tað seg, at flestu stovnar hava avgreiðslutíð somu tíð, sum starvsfólkið er til arbeiðis, tvs. frá kl. 8 á morgni til kl. 16 ella 16.30 við einum tíma til døgurða ella frá kl. 9 til 16 og so er eisini avgreiðsla í døgurðatímanum, og er hetta í tráð við ynski Jógvan Sundsteins.

Tað eru tó nakrir stovnar, og eru hetta tíverri teir einstøku stovnar við nógvum avgreiðslum av viðskiftafólki, ið hava avmarkað avgreiðslutíðina frá kl. 10 til 12 og frá kl. 13 til 15 ella 15.30.

Hesir stovnar eru Almannastovan, Líkningarráðið, Landsskúlafyrisitingin, herundir Lærurráðið og Matrikulstovan. Grundgeviningin fyri, at hesir stovnar hava avgjørt at avmarka avgreiðslutíðina, er tann sama, sum nevnd var í svarinum uppá fyrispurning tann 11. desember í fjør. Stovnarnir siggja seg ikki førar fyri bæði at avgreiða viðskiftafólki allan dagin, samstundis sum aðrar uppgávur skulu røkjast. Eisini verður víst til tey vánaligu húsaviðurskiftini, summir av hesum stovnum liva undir.

Landsstýrið hevur fyri sín part roynt at kanna, um stovnarnir fstaðin fyri ein automatiskan telefonsvarara kundu svarað telefonini, og sagt viðskiftafólki ið avgreiddi málið, fyrrenn kl. 10 ávikavist kl. 13. Hetta siga stovnarnir kemur at krevja, at fleiri fólk passa vekslaran.

Landsstýrið fer til komandi fíggjarlóg at biðja um neyðugt starvsfólk til telefonavgreiðslu.

100-2 Viðvíkjandi útleiging av høllini hjá Føroya Ídnaðargrunni til postverkið.

Ár 1987, týsdagin 29. september boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi til løgmans frá Jógvan Sundstein, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Nær flytur Postverkið út úr høllini hjá Føroya Ídnaðargrunni?

Viðmerkingar:

Fyri meir enn einum ári síðani flutti Postverkið inn í høllina hjá Føroya Ídnaðargrunni Uppi á Hálsi.

Hendan høllin varð ætlað til framsýningar av tí, sum ídnaðurin í Føroyum framleiddi og annars hevði at vísa fram, varð sagt av Ídnaðargrunninum og landsstýrismanninum Vilhelm Johannesen.

Men alt í einum varð høllin útleigað til Postverk Føroya við tí grundgeving, at ídnaðurin hevði ongan áhuga fyri høllini. Hetta er fullkomiliga skeivt. Men tá ið spurt varð, hvør ætlanin var, søgdu teir, sum høvdu leigað høllina út, at tað kom ikki upp á tal at leiga høllina út longur enn í mesta lagi eitt ár.

Nú er meir enn eitt ár farið, og tí seti eg henda spurning fram.

Við 18-0 atkvøðum varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

10. november varð fyrispurningurin svaraður av Lassa Klein soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Nær flytur Postverkið út úr høllini hjá Føroya Ídnaðargrunni?

Sum tað helst er bæði løgtingi og almenningi kunnugt, so hevur Postverk Føroya í mong ár havt stórar hølistrupulleikar, og hava hesir verið størstir í Havnini.

Longu tá ið byggingin av Posthúsinum í Havn varð liðug í fimtiárunum, varð mett, at húsini vóru ov tronglig.

Seinnu árini hevur verið arbeitt við ymsum møguleikum til loysn av hølistrupulleikunum, og hevur Postverkið í hesum sambandi verið noytt a leiga seg inn, har sum møguleiki var.

Eisini hava ætlanir verið frammi um keyp av verandi bygningum, men ætlanunum er einki vorðið burturúr, ið hvussu so er ikki enn.

Tá ið Postverkið fyri góðum ári síðani fekk leigumál við Føroya Ídnaðargrunn, var tað í teirri vón, at Postverkið innan eitt ár hevði funnið aðra loysn, so at flytast kundi burtur úr høllini hjá Ídnaðargrunninum.

Hetta hevur ikki eydnast enn. Her skal tó verða sagt, at bæði Landsstýrið og Postverkið arbeiða við ætlanum, sum meira permanent kunnu loysa hølistrupulleikarnar, og hava vit vónir um, at hetta arbeiðið, áðrenn langt um líður, fer at føra til ítøkilig úrslit.

Tó má viðgangast, at sum er, verður tað sera torført hjá Postverkinum at flyta úr høllini hjá Ídnaðargrunninum.

100-3 Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi matvørulógini.

Ár 1987 týsdagin 10 november, boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Eilif Samuelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

1. Hvør er orsøkin til, at eingin partur av matvørulógini enn er settur í gildi?
2. Nær ætlar landsstýrismaðurin at lata partar av matvørulógini koma í gildi, og í hvørjari raðfylgju fer hetta at henda?

Viðmerkingar:

Í 1975 sendi deildardjóralæknin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni landsstýrinum uppskot um eina lóg viðvíkjandi matvørum og drekkivatni og eitt álit um matvørueftirlit.

Í 1977 setti landsstýrið ein arbeiðsbólk at viðgera hesi uppskot, og í 1981 var uppskot til eina matvørulóg handað landsstýrinum.

Eftir at uppskotið hevði verið til ummælis hjá áhugabólkum og feløgunum, var tað í 1984 lagt fyri tingið og samtykt nærum einmælt 27. mars 1985.

Lógin er ein rammulóg, sum í § 54 gevur landsstýrinum heimild at seta lógina í gildi so við og við so hvørt, sum kunngerðir verða gjørdar á teimum ymsu økjunum.

Tað gingu sostatt 10 ár frá tí, at uppskotini vóru løgd fyri landsstýrið, til lógin varð samtykt, og um tað mundið vóru ongar kunngerðir gjørdar, varð sligið fast í álitinum frá rættarnevndini.

Nú eru hálvt triðja ár farið, síðani lógin var samtykt, og enn er eingin partur av matvørulógini settur í gildi.

Lógin fevnir um alt, ið er ætlað fólki at eta og drekka, og meiningin við lógini var, at gerast skuldu reglur fyri eitt nú vatnveitingum, kjøti og kjøtúrdráttum, mjólk og mjólkarúrdráttum, margarini, eggum, flogfenaði, fiski og fiskaúrdráttum o.ø., sum ongar ella bert ófullfíggjaðar reglur eru um frammanundan.

Frá monnum síðani hevur verið víst á, at tað er av stórum týdningi at fáa fastar reglur fyri eftirlitinum við matvørum, bæði teimum, ið verða framleiddar her á landi, og ikki minst teimum, ið innfluttar verða.

Víst hevur verið á, at so leingi Føroyar eru utttan reglubundið matvørueftirlit, kann vandi vera fyri, at vørur, sum ikki kunnu verða seldar í framkomnum londum, av tí at illgrunaverd evni eru blandað uppí, skulu sleppa inn í okkara handlar.

Fólk geva sær alt meira og meira far um, hvat innihald er í teimum matvørum, tey keypa í handlunum.

Føroyingar eiga eisini at kunna fáa høvi at tryggja sær, hvørji tilsetingarevni o.t. eru í vørunum og um hesi eru góðkend av landsstýrinum. Somuleiðis eigur nú at gerast greitt, hvørjar upplýsingar, liðugt pakkaðar matvørur skulu merkjast við, so sum matvøruslag, vekt, datomerking, uppruna stað, føðsluvirði o.a.

Út frá hesum viðmerkingum loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum hesar fyrispurningar.

11. desember svaraði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Spurt verður:

1. Hvør er orsøkin til, at eingin partur av matvørulógini enn er settur í gildi?
2. Nær ætlar landsstýrismaðurin at lata partar av matvørulógini koma í gildi og í hvørjari raðfylgju fer hetta at henda?

Ad 1:
Orsøkin til at lógin ikki enn er sett í gildi er, at hølisviðurskiftini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni ikki eru í lagi. Setast kunnu ikki fleiri fólk á stovninum til eisini at taka sær av matvørulógini, tí tað rúmast ikki fleiri fólk í hølunum.

Ætlanin er, at húsaspurningurin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni skal loysast á tann hátt, at starvsstovan yvirtekur allan bygningin so hvørt sum Landsskjalasavnið og Fróðskaparsetrið flyta út.

Í 1975 varð Heilsufrøðiliga Starvsstovan stovnað við tí høvuðsendamáli at gera kanningar av matvørum og drekkivatni í breiðasta týdningi.

Um hetta mundið varð lóg um løggilding og eftirlit við fiskavirkjum, ið virka fisk til matna (útflutnings), sett í gildi, og hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan við hjálp frá vrakarastovninum umsitið hesa lóg síðani.

Hvat viðvíkur matvørum, ið eru ætlaðar føroyingum at eta t.v.s. antin innfluttar matvørur, ella matvørur, framleiddar her á landi til heimamarknaðin, eru nærum bert heilsusamtyktirnar galdandi.

Í tíðini frá 1975 og til nú er tørvurin á starvsstovuarbeiði nógv øktur, og hevur landsstýrið í hesum tíðarskeiði álagt stovninum nógvar størri uppgávur, uttan at viðurskiftini hjá stovninum at arbeiða undir eru broytt samsvarandi. Harafturat kemur, at stovnurin ger hópin av umbidnum arbeiði fyri bæði almennar stovnar, kommunur og privatur fyritøkur.

Ad 2:
Um landsstýrið fær tey vánaligu høligsviðurskiftini í rættlag verður mett, at partar av matvørulógini kunnu setast í gildi á sumri 1988.

Inntil tá arbeiðir Starvsstovan við ymiskum fyrireikingum, partvís á kemiska og mikrobiologiska laboratoriinum, og partvís við at gera ymiskar fyrireikingar til kunngerðir og reglugerðir í samband við:
— innflutningseftirlit
— góðkenning/løggilding av matvøruvirkjum
— kjøteftirlit
— drekkivatnsveitingar
— merking av liðugtpakkaðum matvørum
— vørulýsingar og innihald v.m.

Haraftrat kemur, at reglur í samband við framleiðslu av fiski og fiskaúrdráttum til útflutnings skulu gerast meira fullfíggjaðar og nútímans.

100-4 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann. Breiðkan av vegastrekki Kollafjørð — Hósvík

Á 1987, týsdagin 10. november boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Terja Davidsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Nær verður av álvara farið undir at breiðka vegastrekkið Kollafjørð - Hósvík, og nær ætlast arbeiðið at verða liðugt?

Viðmerkingar:

Í samband við, at ferðslan er økt munandi seinastu árini, og bilarnir eru vorðnir størri og breiðari, er breiddin á nevnda vegastrekki vorðin ótíðarhóskandi.

Samstundis kann roknast við, at ferðslan kemur at økjast enn meir komandi árini, serliga í samband við at tunnilin millum Kalbaksbotn og Oyrareingir verður opnaður.

Sum er má ferðslan nærmast kallast ótrygg.

11. november varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin verður at svara.

23. februar svaraði Lassi Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin er soljóðandi:

Nær verður av álvara farið undir at breiðka vegastrekkið Kollafjørð - Hósvík, og nær ætlast arbeiðið at verða liðugt?

Tað er eingin ivi um, at mett út frá tí ferðslumynd vit hava, áttu høvuðsvegirnir í Streymoynni og Eysturoynni at ligið á odda í útbyggingarætlanunum, og verður tá serliga hugsað um vegastrekkini frá Kollafirði til Hósvíkar og frá tunnilsvegnum millum Fjarða og til Skipanes.

Ætlanir hava verið frammi í mong ár um at fara undir hesi vegarbeiði; men eru onnur kostnaðarmikil arbeiði tikin fram um av skiftandi samgongum.

Tá farið verður undir umbygging av vegum við so nógvari ferðsla sum her, eigur hetta at gerast innan fyri so stutt tíðarskeið sum møgulígt fyri at tarna

ferðsluni sum minst.

Strekkið millum Kollafjørð og Hósvík er 5,8 km, til longdar og kann gerast í eini 3-4 ár fyri o.u. 40 mió. kr.

Tær 1,5 mió. kr., sum eru settar av til hesa vegagerð á verandi fíggjarløgtingslóg, eru at rokna sum ein byrjan.

100-5 Fyrispurningurin til Lassa Klein, landsstýrismann, viðv. hækkan av tænastustøðinum hjá Bygdaleiðum í Kollafirði.

Ár 1987, týsdagin 10. november boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Terja Davidsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

Fyrispurningur

1: Hvussu langt er landsstýrið komið við fyrireikingunum við at hækka tænastustøðið hjá Bygdaleiðum í Kollafirði.

2: Nær kann roknast við at ein r(mulig skipan verður sett í verk?

Viðmerkingar:

Síðan Bygdaleiðir átók sær koyringina millum bygdir í eystara parti av Norðstreym, hevur tænastustøðið ligið ov lágt í Kollafirði.

Í fyrsta lagi bleiv Signabøur tikin úr skipanini, og seinni var so hildið uppat við at koyra eftir bygdarvegnum gjøgnum bygdina. Hetta hevur við sær tað, at sera langt er hjá fólki at koma til bussin. Nógv gera ti ikki nýtslu av Bygdaleiðum. Heldur ikki er møguligt at boða frá nakað stað og á tann hátt fáa bussin at koyra gjøgnum bygdina, um tørvur skuldi verið, og kemur hetta sera illa við.

11. november varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin verður at svara.

23. februar 1988 svaraði Lassi Klein fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin er soljóðandi: **Svar**

1. Hvussu langt er landsstýrið komið við fyrireikingunum við at hækka tænastustøðið hjá Bygdaleiðum í Kollafirði?
2. Nær kann roknast við at ein rímulig skipan verður sett í verk?

Tænastustøðið hjá Bygdaleiðum í Kollafirði er fult á hædd við tænastustøðið aðrastaðni í landinum.

Aðrastaðni eru bæði býlingar og bygdir við eins nógvum og fleiri íbúgvum enn Kollafjørður, har ikki verður koyrt heilt tætt fram við húsunum. Stutt kunnu nevnast bygdirnar Hvalvík, Streymnes, Eiði, Fuglafjørður, Syðrugøta, Saltangará og Søldarfjørður.

Bygdaleiðir koyrdi í byrjanini eftir bygdavegnum gjøgnum Líðina í Kollafirði. Ofta var trupult at koyra henda vegin vegna hálku og skeivt settar bilar. Ferðafólk úr hinum bygdunum fingu óneyðuga seinking, samstundis sum bert hendingar ferðafólk kom við á hesum strekki. Samráðingar hava verið millum Bygdaleiðir um ynski hjá bygdaráðnum í Kollafirði um koyringina gjøgnum Líðina, men enn fyriliggur eingin ætlan um hesa koyring frá Bygdaleiðum.

Høvuðsábøtir allastaðni er at fáa skýli fyri tey ferðandi, sum bíða eftir bussunum.

Ætlanin er at seta 6 skýli í Kollafirði, og at gera tríggjar busslummar. Mett verður, at ein busslummi og tvey skýli koma upp í ár.

Komið verður væntandi á mál við uppsetan av skýlum og busslummum í Kollafirði um eitt til trý ár, alt eftir hvussu skjótt neyðugar játtanir fáast.

Bygdaleiðir koyra tvær ferðir um dagin til Signabø. Roynt hevur verið at økt hesa tænatu. Samráðingar hava verið við kommununa og busseigarar um eina loysn samskipað við verandi skúlabarnaflutning, men ikki er funnið fram til nakra loysn. Tað er ikki avgjørt um onnur stig skulu takast ella roynt skal verða at taka samráðingarnar uppaftur.

100-6 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi samferðsluviðurskiftum

Ár 1987, hósdagin 12. november boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Hergeir Nielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Kann landsstýrið í hesi tingsetu skipa fyri eini løgtingsviðgerð av samferðsluviðurskiftum og -útbyggingum í Føroyum við serligum atliti til eina tíðarfesting av fløgum grundaðum á upplýsandi tilfar av sundurgreinaðum verkætlanum og kostnaðinum av hesum?

Viðmerkingar:

Samferðslumál verða roknað til 13% av samlaðu fíggjarætlanini fyri fíggjarárið 1988. Henda upphædd er 365 milj.-kr. og ætlast hon nýtt til virksemi, tað eru íløgur og rakstur hjá Landsverkfrøðingingsstovninum, Strandfaraskipum Landsins og Bygdaleiðum.

Føroya løgting tekur endaliga støðu til hesar upphæddir í sambandi við samtyktina av fíggjarlógini seinast í hesum árinum.

Sum nakað nýtt her á landi eru nú eisini kommunur og kommunufelagsskapir farin undir ætlanir innan samferðsluøkið á rættiliga kostnaðarmiklum slagi. Vit hava hoyrt um tvinnanda undirsjóvartunnilsætlanir og ein flogvøll.

Eftir tí, ið skilst, so eru hesar verkætlanir komnar áleiðis og ivaleyst fara aðrar av líknandi slagi eisini at koma í ljósmála.

Um ella í hvussu stóran mun landsstýrið ella landsstovnar eru við í hesum ætlanum er ikki kunnugt, men Føroya løgting hevur ikki enn verið inni í myndini í hesum størstu íløgum innan samferðsluútbygging her á landi nakrantíð.

Hugsandi er, at teir, ið valdir eru at stjórna hesum landi, teir sum sita í samgongu, og teir, sum sita í andstøðu, hava áhuga fyri at fáa nærri innlit í tað virksemi, ið fer fram innan fyri samferðslu okkara uppi á landi, í luftini, í og undir sjónum var sett landsstýrismanninum í samferðslumálum.

18. november varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skal verða svaraður.

8. apríl svaraði Lassi Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin er soljóðandi:

Kann landsstýrið í hesi tingsetu skipa fyri eini løgtinsviðgerð av samferðsluviðurskiftum og -útbyggingum í Føroyum við serligum atliti til eina tíðarfesting av íløgum grundaðum á upplýsandi tilfar av sundurgreinaðum verkætlanum og kostnaðinum av hesum?

— — —

Íløgur til landsvegir, havnir v.m. vórðu í juli 1987 av landsverkfrøðingsstovninum ætlaðar soleiðis fyri 1986 (verulig tøl) og 1987-1990 (ætlaði tøl):

Mió. kr.	1986	1987	1988	1989	1990
Vegir (skjal 1)	37,2	34,0	35,0	33,0	28,5
Tunnlar (skjal 1)	37,8	52,0	55,0	55,0	55,0
Havnir, lendingar (skjal 2)	78,5	109,0	134,0	125,0	123,0
Annað (skjal 1)	49,7	41,5	49,0	49,0	44,0
Tilsamans	203,0	236,5	273,0	262,0	250,5

Í skjali 1 og 2 eru tølini nærri útgreinað.

Omanfyri standandi uppgerð er frá juli 1987 og fevnir tískil ikki um eitt nú tunnilin undir Vestmannasundi og ta nýggju havnaætlanina.

Sum kunnugt verða íløgur í samferðslunetið í stóran mun gjørdar við atliti til at tryggja øllum íbúgvum í samfelagi okkara rímilig samferðsluviðurskifti.

Við teimum støðugt betri samferðsluviðurskiftunum og við tí búskaparligu gongdini, vit hava sæð í Føroyum tey seinastu árini, er tað vorðið meira neyðugt at meta um tær búskaparligu fylgjurnar av hvørjari einstakari ætlan.

Tunnilsgerðin undir Vestmannasundi er t.d. kannað við atliti til landsbúskaparligu fylgjurnar, og vísir hon seg at vera ein lønandi íløga.

Slíkar landsbúskaparligar lýsingar eiga at vera ein fastur táttur í viðgerðini av samferðsluíløgunum, men sanniliga eisini av øðrum málsøkjum, og niðanfyri standandi yvirlit yvir býtið av landskassa útreiðslunum fyri 1988 er væl eitt týðuligt prógv um hetta.

Men tann búskaparliga lýsingin kann kortini bert vera ein partur av avgerðargrundarlagnum, tí serstakligu tey lokalu viðurskiftini eru av stórum týdningi, og kunnu ikki altíð bert metast út frá einum búskaparligum sjónarmiði.

100-7 Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, viðvíkjandi útbýting av avlopi hjá Dansk Tipstjeneste í Føroyum.

Ár 1987, týsdagin 24. november boðaði formaðurin frá omanfyri nevndu fyrispurningi frá Óla Breckmann, landsstýrismanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurniugur

Hevur landsstýrið umhugsað at seta bannið móti útluting av avlopinum hjá Dansk Tipstjeneste úr gildi.

Viðmerkingar:

Hesin fyrispurningur varð settur fram á løgtingi 1986, men var ongantíð svaraður, og loyvi eg mær tí at seta hann fram av nýggjum.

Tá P/f Ítróttarvedding við løgtingslóg nr. 50 frá 1983 fór undir at virka frá Ólavsøku í 1984, varð bannað øðrum ítróttarveddingum í Føroyum at virka.

Dansk Tipstjeneste gavst frá ársloki 1985 at útluta part av avlopi sínum til vælgerandi endamál í Føroyum. Sostatt datt burtur ein inntøkukelda hjá fleiri ungdóms-, ítróttar- og øðrum feløgum, sum P/f Ítróttarvedding ikki kundi veita viðurlag fyri.

Síðan er tað hent, at Ítróttarvedding er dottin niðurfyri av tørvandi undirtøku og áhuga frá almenningsins síðu, soleiðis at føroyskur ítróttur hevur mist í bæði borð.

Sum fólkatingslimur hevur undirritaði fingið áheitan frá m.ø. ÍSF um at heita á donsku stjórnina at biðja um hennara tilmæli til, at Dansk Tipstjeneste aftur kann fara undir at útluta part av avlopinum í Føroyum. Tipstænastan hevur fingið somu áheitan til tess at fáa hennara tilsøgn um at taka uppaftur henda sið, tí hann kom so mongum føroyskum tiltøkum og felagsskapum væl við.

Í svarbrævi tann 18. august í fjør sendi stjórin fyri Tipstænastuni, Frank Howitz, Mentamálaráðnum sítt tilmæli um, at tænastan er sinnað til aftur at fevna um Føroyar.

Forsætisráðharrin svarar somuleiðis í brævi 4. september 1986, at hann einki hevur ímóti, at Føroyar aftur fáa lut í avlopinum, men at hetta kann bert fáast aftur í lag, um løgtingslógin um P/f Ítróttarvedding verður sett úr gildi.

Føroyingar vedda í donsku Tipstænastuni fyri einar 10-15000 kr. hvørja viku, og í 1984 vórðu útlutaðar 355.000 kr. til endamál í Føroyum.

Nú komandi oyggjaleikir eru ásettir at verða í Føroyum í 1989, standa stórar íløgur fyri durum, og tá koma allar inntøkur væl við.

Eftirsum uppafturtøka av hesi útbýtingarskipan í Føroyum er ynski hjá ÍSF

og mongum øðrum felagum, lyvir undirritaði at spyrja landsstýrismannin, um landsstýrið hevur umhugsað at avsiga lóg nr. 50 frá 1983.

5. mai svaraði Jóngerð Purkhús fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningur var soljóðandi:
Hevur landsstýrið umhugsað at seta bannið móti útluting av avlopinum hjá Dansk Tipstjeneste úr gildi?

Í samarbeiði við Í.S.F. varð í 1983 gjørt eitt uppskot til eina løgtingslóg um ítróttarvedding. Frammanundan høvdu ítróttaráhugað heitt á landsstýrið um at loyva Dansk Tipstjeneste at seta eina deild á stovn í Føroyum ella at sett varð á stovn eitt føroyskt veddingarfelag.

Tá málsøkið var yvirtikið sum sermál, og eitt sjálvstøðugt veddingarfelag varð mett at koma at geva ítróttarfeløgunum í Føroyum hægri inntøku, enn tann studningur, ið frammanundan varð veittur frá Dansk Tipstjeneste, varð hildið rættast at fara undir sjálvstøðuga ítróttarvedding í Føroyum.

Tíanverri eydnaðist hetta tiltakið í fyrsta umfari ikki.

Landsstýrið metir, at kanningar eiga at verða gjørdar um at fáa veddingina í gongd aftur undir øðrum formi.

Landsstýrið heldur tað ikki vera rætt, at taka eina løgtingslóg, ið er galdandi á einum øki, ið er yvirtkið, av, hert fyri møguliga at kunna fáa nakrar krónur í studningi frá Dansk Tipstjeneste.

100-8: Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi telefonviðurskiftunum í Eysturoynni.

Ár 1987, mikudagin 25. november var boðað frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jógvan I. Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Vit í Eysturoynni kenna alt ov nógv til at hava eina telefon, sum ikki virkar sum hon skal. Hetta óskil hevur nú vart í ov langa tíð, og nú frættist, at gomul, brúkt og ótíðarhóskandi telefonútgerð úr Havn skal setast upp í Eysturoynni, og harvið kemur okkara telefon framhaldandi at vera langt aftanfyri og ótíðarhóskandi í mun til aðrastaðir í Føroyum.

Av hesi orsøk verða settir hesir spurningar:

1. Er nakað í tíðindunum um, at ætlanin er at seta gamla ótíðarhóskandi telefonútgerð úr Havn upp í Eysturoynni.
2. Hvat verður annars gjørt fyri at bøta um telefonviðurskiftini í Eysturoy.

8. december varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin verður at svara.

8. apríl 1988 svaraði Lassi Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1) Er nakað í tíðindunum um, at ætlanin er at seta gamla ótíðarhóskandi telefonútgerð úr Havn upp í Eysturoynni?
2) Hvat verður annars gjørt fyri at bøta um telefonviðurskiftini í Eysturoy?

Telefonverk Føroya Løgtings setti í juni 1987 nýggja automatstøð til í Tórshavn, og grundgevingin var tann:

— at øll numrini í Tórshavn vóru uppbrúkt í støðini sum var,

— at kostnaðurin av eini víðking av hesi støð vildi verið órímuliga høgur (tann nýggja støðin er bíligari pr. felaga enn prísurin, vit nú kunnu fáa tann fyrrverandi teknikkin fyri), og at betra kvalitetur fekst í transmissiónini til millumbygdastøðirnar og bygdastøðirnar, eisini í Eysturoynni.

Tann støðin í Tórshavn, sum við hesum varð tikin úr nýtslu, varð uppsett í 1981, og er ein tann rakstrarliga besta støðin, sum L.M. Ericsson (leverandørurin) hevur framleitt.

Ein slík støð hevur vanliga ein »livialdur« uppá 30-40 ár.

Tað merkir, at hendan støðin hevur bert verið í brúk í 6 ár, 15-20% av »livitíðini«. Støðin er sostatt teknikkur í besta standi. Umframt eru innkoyringartrupulleikarnir, sum altíð eru í sambond við nógv framkomnan og samansettan teknikk, burturbeindir ta tíðina, hon hevur staðið í Tórshavn.

Landsfíggjarliga og TFL-fíggjarliga er tað ein góð loysn at flyta tann teknikkin, sum framvegis er í besta standi, men er vorðin ov lítil til tørvin á einum stað, í hesum føri Tórshavn, har felagstalið, sum framvegis er í besta standi, men er vorðin ov lítil til tørvin á einum stað, í hesum føri til Søldarfjarðar við 875 feløgum og Runavíkar við 1.550 feløgum, umframt til víðking av Klaksvíkar støð 2.000 felagar nú), ið er av sama slag sum fyrrverandi støðin í Tórshavn.

Tá tað snýr seg um at fáa lut í teknisku framgongdini í landinum skal sigast, at telefonverkið bjóðar øllum kundum sínum í Føroyum somu tænastur bæði telefon og aðrar tænastur, t.d. datatransmissión, uttan mun til bústað, við tað at eftirspurningurin kemur at avgera útbyggingina. Soleiðis kemur útbyggingin av tí digitalu transmissiónsútgerðini at hava serliga týdning fyri datatransmissión og harvið fyri vinnulívið og verður hon eisini útbygd í Eysturoynni í tann mun, eftirspurningurin er eftir henni.

Støðirnar, sum verða uppsettar í Søldarfirði og Runavík eru av slíkum slag, at tær eru virknar uttan mun til møguligar feilir og trupulleikar í telefonnetinum aðrastaðni í landinum.

100-9 Fyrispurningur til Atla P. Dam, løgmann viðvíkjandi organisatiónsskipan viðv. landsfyrisitingini.

Ár 1987, fríggjadagin 11. december varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at omanfyrinevndi frá Jógvan Sundstein løgtingsmanni, fyrispurningur skuldi verða svaraður:

Fyrispurningur

Í sambandi við lýsingar eftir stjórum til nýggjar deildir á landsskrivstovuni verður løgmaður spurdur, um nøkur organisatiónsskipan er gjørd fyri landsfyrisitingina, sum kann vera forsvarligt grundarlag undir stovnan av hesum deildum og játtanunum til nýnormeringar í hesum sambandi.

Viðmerkingar:

Í lýsing í bløðunum seinastu tíðina hevur verið søkt eftir skrivstovustjóra, løntur í 37. lønarflokki, til at umsita almanna- og heilsumál í landsstýrinum.

Á síðu 24 í viðmerkingunum til fíggjarløgtingslógina 1988 verður sagt frá, at ætlanin er, at Landsskrivstovan skal býtast upp í fleiri deildir (departementir) við hvørt sínum stjóra. Ein fiskivinnustjóri er longu settur eins og ein fyri lógardeildina og ein fyri starvsfólka- og lønardeildina. Ætlanin er síðani í fyrstu syftu at skipa tríggjar deildir afturat.

Almanna- og heilsudeildin er helst ein av hesum trimum deildum. Kortini stendur í starvslýsingini, at starvsøkið kann verða broytt.

Tað sær soleiðis út, at tað ræður um fyri landsstýrið í skundi at seta nakrar stjórar fyri nýggjar deildir, sum enn ikki eru nágreiniliga lýstar, tá ið tað viðvíkur teirra arbeiðsøki. Tað sær eisini út at vera ein mótsøgn millum skundin at seta hesi nýggju størvini, og so tað drál, ið landsstýrið vísir, tá tað snýr seg um at seta eina høvuðsstjóra í staðin fyri tann fráfarna.

Tá ið landsstýrið í fíggjarlógarviðmerkingunum sigur, at ætlanin er at skipa seks departmentir og søkir um játtan til departementsstjórarnar, so kundi ein rokna við, at ein nágreinilig organisatiónsskipan fylgdi við. Ein skipan, sum lýsti, hvat hesar deildir skuldu umsita, ætlaða arbeiðsøkið og ætlaða talið av meðarbeiðarum, og hvussu núverandi meðarbeiðarar skuldu skipast í hesi ætlan.

Mær vitandi hevur eingin slík ætlan verið framløgd, hvørki fyri tinginum, fíggjarnevndini ella aðrari tingnevnd.

Stórur vandi er tí fyri, at tingið við bindi fyri eygunum kemur at samtykkja eina fíggjarlóg við starvsnormeringum, sum eingin veit, hvussu tær skulu virka.

Av hesum kann tí standa stórt spill av arbeiðstilfeingi, og at landsumsiting okkara kann gerast enn meira fløkt og ineffektiv.

Eg eftirlýsi tí eini fullfiggjaðari organisatiónsskipan, áðrenn byrjað verður at seta fleiri fólk í starv.

Vísandi til grein 20 í tingskipanini (har tað stendur, at svarast skal, áðrenn 10 dagar eru farnir) seti eg tí svarar løgmanni, sum umsitur fyrisitingarmál, framinnanfyrinevnda fyrispurning.

28. apríl svarar løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Jógvan Sundstein hevur sett fram fyrispurning, um tað samband við lýsingar eftir stjórum til nýggjar deildir á landsskrivstovuni er gjørd organisatiónsskipan fyri landsfyrisitingina, sum kann vera forsvarligt grundarlag undir stovnan av hesum deildum og játtanin til nýormeringar í hesum sambandi.

Fyri umleið einum ári síðani samtykti landsstýrið eina nýggja organisatiónsskipan fyri landsskrivstovuna.

Eftir landsstýrisins meting er henda organisatiónsskipan forsvarlig og hevur figgjarnevndin eisini tikið undir við hesum undir viðgerðini av figgjarløgtingslógini fyri 1988.

Eftir skipanini skal landsskrivstovan í høvuðsheitinum átaka sær departementsuppgávur og skal hon býtast upp í departementir. Hetta er ætlanin, men er tað ið hvussu so er ikki enn møguleiki fyri at skilja departements- og direktoratsuppgávurnar heilt frá hvørjum øðrum, hvørji í landsstýrinum ella úti á stovnunum eisini tí, at teir leiðarar, ið settir vera, eiga at koma at hava ávirkan á, hvussu skipanin verður framyvir.

Í hjálagda skjali sæst, hvat tað er fyri skipan, landsstýrið hevur góðkent og sum arbeitt verður fram eftir. Fyribils er leiðari settur fyri lógardeild, fiskivinnudeild, almanna- og heilsudeild og lønar- og starvsfólkadeild.

Í galdandi figgjarlóg er játtanin fyri 2 deildarstjórum afturat og verður í næstum lýst eftir stjóra til samskiftisdeildina og møguliga mentanardeildina. Eftir er so figgjardeildin, men verður bíðað við at skipa hesa deild endaliga, til endalig skipan er gjørd fyri landsbankan, og nýggjur leiðari er settur fyri hagdeildina.

Eitt øki, sum eg meti av stórum týdningi, er kommunala eftirlitið. Hetta er ein funktión, sum eigur at verða styrkt munandi um, men eru uppgávur tess í nýggju skipanini býttar út á ymsar deildir. Møguliga átti at verið skipað serlig deild at taka sær av hesum málum.

Nevnast skal, at tað framhaldandi verður arbeitt við skipanini á landsskrivstovuni og at smærri broytingar helst koma at verða gjørdar innan fyri karmin á tí, sum samtykt er. Hetta er orsøkin til, at tað í lýsingini eftir stjórum er tikið fyrivarni fyri broytingar í starvsøkinum.

Í viðmerkingunum til fyrispurning verður eisini spurt, hvør orsøkin er til tað drál, landsstýrið vísir, tá tað snýr seg um at seta ein høvuðsstjóra ístaðin fyri tann fráfarna. Starvið varð lýst leyst í góðari tíð, áðrenn Johan Djurhuus fór úr starvi 1. oktober 1987 og samráðst varð longu tá við ein eftir landsstýrisins tykki kvalificeraðan umsøkjara, men tá hetta ikki førdi til eitt fyri partarnar nøktandi úrslit, samtykti landsstýrið í staðin at fyrihilsseta Jalgrim Hilduberg, stjóra á lógardeildini, sum hevur hollar royndir innan landsumsitingina.

Eisini verður spurt, hví landsstýrið ikki hevur lýst nágreiniliga organisatiónsskipan fyri tingið, fíggjarnevnd ella aðra nevnd.

Hetta er ikki gjørt, tí eg meti, tað at landsstýrisins uppgáva í samarbeiði við starvsfólkið at skipa umsitingina og er hetta eisini í tráð við lógina um umboðsvald Føroya, men sjálvandi kunnu løgtingið og nevndir tess fáa nærri upplýsingar um hetta, um ynski er um tað.

Sí skjal 23.

100-10 Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann. Viðvíkjandi býti av stuðli til politiska upplýsing.

Ár 1988, 27. januar boðaði formaðurin frá niðanfyri standandi fyrispurningi frá Aoldf V. Hansen, løgtingsmanni, til Jóngerð Purkhús, landsstýrismannin, sum 28. januar varð við 21-0 atkvøðum samtykt at fyrispurningurin skuldi verða svaraður. Hann var soljóðandi:

Fyrispurningur

1) Hví fær Framsóknarflokkurin ikki part í býtinum av játtanini á løgtingsfíggjarlógini til politiska upplýsing?

2) Hvør ella hvørji hava fingið tær kr. 227.088,22, sum í hesum valskeiði sambært anda lógarinnar áttu at verið tillutaðar Adolf V. Hansen/Framsóknarflokkinum?

Viðmerkingar:

Í 20 ár hava flokkarnir fingið tillutaðan stuðul yvir løgtingsfíggjarlógina at gjalda útreiðslur við, sum standast av at móttaka/geva politiska upplýsing. Í byrjanini vóru upphæddirnar smáar, tilsamans kr. 130.000, at býta í mun til flokkanna atkvøðutal. Hetta tal er við árunum vaksið til ta núverandi upphædd, ið er 3 mió. kr. Upprunaliga varð játtað á serstakari løgtingslóg, men seinnu árini hevur játtanin bert verið ein viðmerking á løgtingsfíggjarlógini.

Ætlanin við (ella andin í) lógini um at gjalda flokkunum ávísar upphæddir til politiskan stuðul var at útjavna valútreiðslurnar á so mong sum gjørligt. Upphæddirnar hava verið býttar millum flokkarnar í mun til ta atkvøðutal, sum er grundarlag undir tingmannamandatunum. Soleiðis hava teir stóru flokkarnir fingið mest, meðan teir smærru hava fingið lutfallsliga minni. Tá val er, eru ávísar felags útreiðslur, so sum leiga av fundarhølum (ítróttarhøllum v.m.), lýsingar í bløðunum og kunngerðir í útvarpi um fundartíðir og -støð. Hesar hava verið lutaðar javnt millum flokkarnar, t.v.s. at allir flokkar hava goldið líka.

Stuðulin til politiska upplýsing hevur ikki bert verið játtaður áðrenn/aftaná valár, men hevur verið fastur táttur á løgtingsfíggjarlógini. Hetta helst tí, at ein ávís upplýsing eisini er farin fram tey millumliggjandi árini. Í hesum sambandi kunnu nevnast útreiðslur til politiskar fundir, blaðútgáva og ferðing til millumlanda fundir, so sum serfundir innan Norðurlanda Ráðið, sum flokkarnir sjálvir skulu gjalda. Júst í hesum døgum er komin innbjóðing til føroysku flokkarnar um at luttaka á eini ungdómsstevnu innan Norðurlanda Ráðið.

Framsóknarflokkurin fær ikki lut í býtinum av stuðli til politiska upplýsing, hóast Framsóknarflokkurin er góðkendur av Føroya Løgtingi at verða umboðaður á tingi við tí eftir vallógini neyðuga atkvøðutali aftanfyri seg. Um góðkenningin ikki eisini umfatað eitt til mandatið neyðugt atkvøðutal, so kundi flokkurin, sum stovnarin av nýggjum flokki fer úr, gjørt krav upp á mandatið, tí atkvøðurnar kunnu ikki eftir einari lóg hoyra einum flokki til og eftir aðrari lóg hoyra øðrum flokki til. Flokkurin er góðkendur at verða umboðaður aftan á síðsta løgtingsval, tí ein flokkur kann ikki verða umboðaður á tingi við grundarlagi í atkvøðum til komandi val, hóast Framsóknarflokkurin ikki sleppur undan at taka lut í felags útreiðslunum til komandi løgtingsval við 1/7, tað vil siga á líkafóti við hinar tingflokkarnar og hetta uttan at taka lut í inntøku flokkanna, hvørki á líkafóti ella lutfalsliga, hóast Framsóknarflokkurin um landsstýrið hevur fingið áheitan um at senda ungdómsumboð til Oslo at fylgja við (fáa politiska upplýsing) á rástevu Norðurlanda Ráðsins í døgunum 7.-11. mars í ár, og hóast Framsóknarflokkurin er stovnaður sum ein beinleiðis fylgja av, at núverandi 17-manna samgonga kleiv gamla Framburðsflokkin við at seta formann floksins uttanfyri samgongu

arbeiðið, samstundis sum nývaldi tingmaður floksins varð tikin við í samgonguna.

Niðurstøðan má vera, at verður flokkur klovin í partar, eigur hvør partur sær at varðveita sínar lutfalsliga skyldur og rættindi. Tí átti Adolf V. Hansen/Framsóknarflokkurin at havt fingið eitt lutfall av kontoini til politiska upplýsing, svarandi til 733 atkvøður, t.v.s. 733/25177 partar av 7,8 mió. kr., sum samanlagt er útgoldið av nevndu konto. Hetta svarar til kr. 227.088,22 fyri valskeiðið 1985-88.

28. januar varð við 21-0 atkvøðum samtykt at fyrispurningurin skuldi verða svaraður. *Fyrispurningurin varð ikki svaraður.*

100-11 Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann. Viðvíkjandi vinnu- og havnarøkinum á Sundi.

Ár 1988, 17. februar boðaði formaðurin frá niðanfyri standandi fyrispurningi, frá Dánjal Larsen, løgtingsmanni.

Fyrispurningur

Nær ætlar Føroya Landsstýri at geva endaligt loyvi til vinnu og havnarøkið uppi á Sandi.

Viðmerkingar:

Tað sigst at arbeiðið upp á tann partin av Sundsætlanini, ið fevnir um sjálva havnabyggingina, og sum Føroya Landsstýri longu hevur góðkent, gongur so

mikið væl, at tað helst verður líðugt, áðrenn tíðarfreistin um summarið 1989 er úti.

Hetta hevur gjørt sítt til, at framtakshugað fólk í Suðurstreymoy, sum tað tí betur ikki skortar á, nú spyrja seg fyri, og eisini fyri ein part søkja um vinnuøki uppi á Sundi.

Sjálvur meti eg, at loyvið til at fremja sjálva havnagerðina uppi á Sundi er at vokna sum eitt fyribilsloyvi til at gera ein part av eini heild.

Tosað hevur verið um, at einans virki, ið framleiða til útflutning vera á Sundi, og at havnin har uppi skal nýtast sum útflutningshavn burturav.

Kann hetta praktiserast, so er tað óivað í lagi. Men enn fyriliggur so ikki nakað endaligt um, hvat slag av framleiðslu og virksemi, ið kann vera har uppi, og hvat ikki kann vera.

Sum longu nevnt, so meti eg Sundsætlanina, sum eina heild, og tað er út frá hesum, at spurningurin verður veittur.

29. februar varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður. *Fyrispurningurin varð ikki svaraður.*

100-12 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann viðvíkjandi bergholi til Gásadals.

Ár 1988, 24. februar boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Ivan Johannesen og Svend Ange Ellefsen, løgtingsmonnum, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Nær verður farið undir bergholið til Gásadals.

Viðmerkingar:

Í svarinum til ein fyrispurning viðvíkjandi Gásadalsbergholinum í tingsetuni 1986, lovaði landsstýrismaðurin, at farast skuldi undir bergholið til Gásadals á vári 1988.

Upphæddirnar, sum í hesum valskeiðnum eru falnar úr landskassanum vestur í Vágar, eru so smáar, at tað alsaikki er meira enn rætt og rímuligt, at berg-

holið til Gásadals byrjar nú, so at Gásadalur skjótast gjørligt verður knýttur til landsvegakervið.

Náttúrliga átti Gásadalsbergholið at verið tað fyrsta, sum farið varð undir í hesum valskeiðinum — klárt sum tað var at bora — men nú er mestsum skeiðið at enda komið, uttan at nakað røkist fyri, at gongd kemur á.

Í vón um eitt skjótt og greitt svar loyva vit okkum at seta landsstýrismanninum fyrispurningin.

25. februar varð við 17-0 atkvøðum samtykt, at Lasse Klein, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

6. mai svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:
Nær verður farið undir bergholið til Gásadals?

Tá projektið til Gásadalstunnilin varð slept í 1980, vantaðu nakrar kanningar, áðrenn endalig støða kundi takast til linjuføring.

Hesar kanningar — boriroyndir — verða gjørdar í løtuni, og samstundis er ætlanin at fara undir vegagerðina frá Bø og vestureftir, tí tað verður hildið neyðugt at bøta nakað um hetta vegastrekkið, áðrenn farið verður undir sjálvt tunnilsarbeiðið.

100-13 Fyrispurningur til Atla Dam, løgmann og fiskimálaráðharra. viðvíkjandi íløgunum í og úrslitinum hjá svartkjaftavinnuni.

Ár 1988, 1. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Paula Ellefsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Hvussu stórar upphæddir eru í hesum valskeiðnum gjørdar í svartkjaftavinnuna, og hvussu eru úrslitini higartil av hesum íløgum?
Herundir verða ynsktar upplýsingar um m.a.:

1. Hvørji skip eru og verða bygd og keypt, og hvat kosta tey?
2. Hvussu nógv av hesum keyps- og byggipenigi hongur landskassin uppá?
3. Hvussu leingi hava hesi skip verið í vinnu, og hvussu nógv hava tey fiskað?
4. Hvussu nógv hevur tað almenna latið í stuðli til hesa veiðu?
5. Hvussu nógv av fiskaðu veiðuni er selt og til hvørjar prísir?
6. Hvørjar nevndir eru settar til at taka sær av »Almenna« rakstrinum av svartkjaftaskipunum?
7. Hvørji tiltøk hava hesar nevndir framt, og hvørji eru úrslitini?
8. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið viðvíkjandi framhaldandi svartkjaftavinnu?

Viðmerkingar:

Tað var landsstýrið frá 1978 til 1980, við Atla Dam sum løgmanni, sum av álvara legði til rættis royndir at nýta svartkjafti til matna. Innflutningsloyvi varð givið til M/t Giljanes og M/S Gullfinn.

Aftaná komandi landsstýri helt fram við at stuðla royndir á hesum øki, bæði á sjógvi og á landi.

Útlitini til hesa framleiðslu vóru so mikið fræg, at innflutningsloyvi varð givið til M/t Reynsatind. Hin vegin varð, hóast politiskt trýst, ikki givið loyvi til at byggja risastór svartkjaftavirkir í Kollafirði og Gøtu.

Arbeitt varð við møguleikunum fyri størri íløgum, vísti tað seg, at svartkjaftaroyndirnar góvu nóg góð úrslit.

Við endan av valskeiðnum 1980-84 var enn einki, sum bendi á, at tað var fíggjarliga forsvarligt at gera fleiri stórar íløgur í framleiðslu av svartkjafti til matna.

Sitandi landsstýri og samgonga høvdu eina heilt aðra metan um hendan spurning.

Ein rød av innflutningsloyvum, byggiloyvum, veðhaldum og staðfesti annars, varð av landsstýri og figgjarnevnd veitt til byggjan av stórum og dýrum svartkjaftaskipum.

Hesum íløgum kundi Sambandsflokkurin ikki taka undir við.

Tað hevur eisini tíverri víst seg, at grundarlagið undir hesum íløgum ikki hevur verið nóg gott.

Álíkavæl hevur Sambandsflokkurin tikið undir við at gera framhaldandi royndir á hesum øki.

Tingbólkur Sambandsfloksins hevur sostatt víst og vísir framvegis stóran áhuga fyri hesum royndum, sum nátúrligt er.

Hinvegin vísir tað seg at vera sera torført at fáa nóg greiðar upplýsingar um gongdina innan svartkjaftavinnuna.

Skrivingin í dagspressuni er ofta meira villleiðandi enn upplýsandi, og torført er at fáa upplýsingar frá tí almenna.

Annars hevur serliga Atli Dam, løgmaður og fiskimálaráðharri, gjørt nógv við at viðgera vansarnar við verandi søluskipan. »Almenni raksturin« av svartkjaftaskipunum átti at givið landsstýrinum serliga góðar møguleikar fyri at gera royndir og at vísa fyridømi innan sølu av svartkjaftaúrdráttum.

Úrslitini av hesum royndum hava sera stóran áhuga. Út frá hesum loyvir undirritaði sær at seta fram omanfyri nevnda fyrispurning.

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

5. mai svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Hjálogd eru skjøl sum greiða frá:

1. Skip komin inn í svartkjaftaflotan í hesum valskeiði, kostnaðurin, ábyrgdir landskassans, veiðitíð, fiskiskapur nøgd framleidd.

2. Kostnaðurin av svartkjaftaroyndunum við Andriasi í Hvannasundi og Polarfarinum.

Í hesum valskeiði eru játtaðir 4 frystitrolarar við serligum denti á svartkjaft, men tó við øðrum møguleikum eisini. Teir eru Andrias í Hvannasundi TG 700, sum kom í mars 1986, Raðhamar, seinni Polarfarið KG 570, sum kom í februar 1987, Skálafjall FD 373, sum kom í november 1987. Hin seinasti er báturin til p/f Heygar. Figgingin til henda bát er tó ongantíð komin í rættlag og er tí ikki endaligt avgjørt at hesin verður svartkjaftabátur.

Harumframt eru tvey skip komin inn í flotan, sum eisini dúva upp á svartkjaft, men mest til ídnað. Tey eru Háborg, sum kom í august 1987 og Tróndur í Gøtu, sum kom í mars 1987. Háborg hevur møguleikar at virka svartkjaft.

Sum tað sæst av yvirliti nr. 1, so er heildarídløgan fyri hesi skip 430.7 mió og av hesum eru teir triggir »reinu« frystitrolararnir 273.8 mió.

Í tí sum eftir er av svarinum vera bara teir »reinu« frystitrolararnir viðgjørdar og fyri tíðina upp til royndirnar byrjaðu 10. november 1987. Viðmerkjast skal tó, at Háborg var seldur á tvingsilssølu í summar og gjørdust tá 14 mió veðhald effektivt fyri landskassan.

Av yvirliti nr. 1 sæst hvørjar ábyrgdir landskassin hevur í skipunum og eisini sæst talið av fiskidøgum og uppgivna veiðan, ta tíðina skipini hava verið í vinnu og hagtøl eru fyri.

Almennur stuðul til veiðuna hjá frystiskipunum

Hesi skipini hava ongantíð fingið rakstrastuðul. Fram til sept. 1986 varð latin ein manningarstudningur upp á millum 15 og 25 oyru upp á kilo av lidnari vøru. Frá 1. juli 1987 hava manningarnar á hesum skipum verið undir dagsstudningsskipanini.

Í 1986 eru tølini fyri stuðuli (minstaløn ikki uppíroknað) uml. 300.000 kr í 1987 fram til 10. november 948.000 kr. Uml. 65-70 mans hava verið við tilsamans við teimum báðum skipum, sum hava verið í drift.

Søla av veiðu og prisir.

Løgd eru hjá almennu útflutningstølini fyri svartkjaftavørur. Av teimum sæst ikki, hvat er framleitt á sjónum, og hvat er framleitt á landi.

Landsstýrinum kunnugt eru enn óseld — hjá teimum skipum, sum vera viðgjørd her — 645 tons av butterflyfløkum hjá Radhamari, sum DDR ikki vildi taka ímóti. Tað, sum er framleitt seinni, mest fars, verður selt til Onglands eftir sáttmála, og cif-prísurin liggur millum 8-9 kr.

Almenna stýringin í royndartíðini.

Ein bólkur av serkønum innan fyri figgjarspurningar gjørdi tær figgjarætlanirnar, sum peningur til royndartíðina 10. november 1987 til 10. mai 1988 varð

játtaður eftir. Sjálvar teknisku royndirnar legði ein nevnd av serkønum til rættis. Ein dagligur fíggjarligur leiðari hevur havt almennu játtanini til royndirnar um hendi.

Úrslit av teknisku royndunum.

Tá royndirnar byrjaðu var ætlanin at fáa bæði skipini før fyri at fáa meira burtur úr rávøruni og fyri at skera beinfrítt skræðuleyst flak. Umborð á A. í Hv. varð hetta gjørt við at gera ábøtur á ísing og skiljing og arbeiðsgongdina fram til maskinurnar. Harumframt vóru VMK maskinurnar broyttar eftir skipanini hjá Jóan Paula Frederiksen og serliga við hansara skráknívum. Umborð á Polarfarinum vórðu ymisk smærri ting rættað. Høvuðsbroytingin var nýggir knívar hjá VMK og nýggir VMK skrædlarar.

Umframt hetta varð ætlanin við at seta roynd verksmiðjufólk umborð at fáa arbeiðsgongdina so góða sum gjørligt. Royndirnar vísa, at skipanin á verksmiðjuni av arbeiðinum er púra avgerandi fyri møguleikarnar hjá hesum skipum.

Ætlanin var eisini at kanna ymiskar møguleikar at nýta smáttfallandi svartkjaft og ryggjafurs til at økja um úrtøkuna. Hesar royndir eru lítið álcið komnar og spurningurin er, um bæði skipini í núverandi líki hava møguleika at gera nakað við hetta.

Bæði skipini eru í dag før fyri at framleiða næstan feilfrítt skræðu- og beinfrítt flak. Okkurt bendir á, at tilpassingarnar av skipanini hjá Jóan Paula Frederiksen geva sera góða úrtøku, men bæði fyri hansara loysn umborð á Andriasi í Hvannasundi og reinu VMK loysnini umborð á Polarfarinum resta veruligar royndir at framleiða beinfrítt og skræðuleyst flak eitt longri tíðarskeið við fullari orku.

Sama hvussu góð tekniska skipanin er, so er eftirlitið á verksmiðjuni ein stórur spurningur. Tá so stórt tal av fløkum skal gjøgnum maskinuna, kostar hetta fólk, mett 2 fólk fyri hvørja linju, og sjálvt tá er tað ivingarsamt, hvussu dygt hetta eftirlit kann verða. Mark er tí fyri, hvussu góð trygd kann útvegast fyri dygdini, og er prísurin tí ikki sum roknað varð við 19 kr fyri kilo, men heldur umleið 10-12 kr. fyri kilo.

Skipini eru før fyri við einum fiskiskapi millum 60-70 tons at framleiða uml. 17 tons um samdøgrið av lidnari vøru í tíðini nov-apríl. (uml. 130 fiskidagar). Vil hava ikki royndir, sum fyri vist kunnu siga, hvussu stórur partur av hesum kann vera beinfrítt og skræðuleyst flak.

Í tí fíggjarætlan, sum varð nýtt tá landsstýrið og fíggjarnevndin játtaðu pening til royndirnar, varð roknað við, at skipini kláraðu at fiska fyri uml. 8 mió. hvørt í tí 6 mánaðar royndarskeiðinum. Hetta hevði givið uml. 8 mió fyri bæði skipini til royndirnar, tá parturin hjá manningin varð farin av. Inntøkurnar hava tó verið nógv smærri. Metast kann, at fram til 1. apríl verða inntøkurnar til royndirnar heldur uml. 5,0 mió enn 8 og írestandi peningur má tí útvegast.

Høvuðsorsøkin til, at inntøkurnar eru lakari enn ætlað, er, at fiskitíðin hevur verið stytri, tí tíðin til umvælingarnar, umframt ymiskt havarí, hava verið longri enn ætlað. Av hesi orsøk fór størri parturin av januar og februar fyri skeyti.

Yvirlit yvir útreiðslur og inntøkur, samanbornar við fíggjarætlanina, fram til 9. apríl eru lagdar hjá sum skjal 2.

Framtíðarútlit.

Ein av týdningarmestu niðurstøðunum av royndunum er, at tað neyvan er gjørligt at fáa nóg stórar inntøkur til at forrenta svartkjaftafrystitrolararnar, uttan at øll veiða, sum kemur inn um hekkuna, kemur til sættis. Sum er, er tann prosentpartur sum kemur gjøgnum verksmiðjuna ov lítil. Orsøkirnar til hetta eru smáttfallandi fiskur og eisini, at fiskur verður ov gamal til at virka. Hevði hesin partur, umframt annað, sum er eftir, tá fiskurin er virkaður, kunnað verið nýttur t.d. til fóður ella annan ídnað, so hevði raksturin havt væl betri tjans at goldið hvørjum sítt. Eisini er enn nógv at bøta um í arbeiðsgongdini frá pumpu til verksmiðjuna og eisini í at bøta um møguleikarnar at goyma fiskin betri umborð. Um hesi ting kunnu gerast umborð á teimum skipum, vit hava í dag, er ikki púra greitt.

Hóast tey bakkast, sum hava verið, og sum vera styrkt av tí lina fiskamarknaðinum, sum er í løtuni, metir landsstýrið, at enn eru góðar vónir at finna fram til ein lønandi veg at fáa nyttu burtur úr okkara størsta róvørutilfeingi. Í hesum sambandi er eisini prinsipptilsøgn givin til ein surimiverksmiðjutrolara.

Sí skjal 24.

100-14 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi telefonviðurskiftunum í Vágunum og Mykinesi.

Ár 1988, týsdagin 1. mars varð fráboðaður omanfyrinevndi fyrispurningur frá Ivan Johannesen og Svend Aage Ellefsen, løgtingsmonnum, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Nær kann væntast, at telefonin til Vágarnar og Mykines fær slíkar ábøtur, at trygdarliga kann roknast við telefonini.

Viðmerkingar:

25. november 1985, løgtingsmál nr. 100-6/1985, settu undirritaðu Lassa Klein, landsstýrismanni, fyrispurning, um telefonóskilið í Vágum, og nær ábøtur kundu væntast.

Eftir svarinum tá varð roknað við, at ábøtur komu um ikki so langa tíð, men nú uml. 2½ ár seinni er einki hent hesum viðvíkjandi.

Eisini felagskommunan í Vágum hevur yvirfyri Telefonverki Føroya Løgtings gjørt vart við tey ótolandi telefonviðurskiftini í Vágum.

Tað er einkult telefonsamband til Vágarnar, og støðin í Vágum verður stýrd av telefonstøðini í Tórshavn.

Tað, sum ofta er hent, er at ein kápul millum Tórshavn og Velbastað er í ólagi, og so virkar eingin telefon í Vágum, hvørki innanbíggja ella til Tórshavnar.

Sum eitt dømi kann nevnast 16. til 17. februar í ár lógu Vágarnar uttan telefon í 11 tímar.

Tað kann undir ongum umstøðum góðtakast, at í 1988 skulu allar bygdirnar í Vágunum – Mykines, Flogvøllurin og VHF-støðin, ið stendur í Mykinesi, ið er til skipini vestan fyri Føroyar, skal liggja uttan telefon í heilar dagar.

Brandfráboðanin í Vágum er eins og flest aðrastaðni í Føroyum; ringjast skal til »000«, so er tað telefonstøðin í Tórshavn, ið gevur boðini viðari, men tá eingin telefon er heilar dagar, so er eingin trygd í hesi skipan.

Tað er bráðneyðugt at fáa hesi viðurskifti í rættlag, tí verður hesin fyrispurningur settur fram.

Við 18-0 atkvøðum var 17. mars samtykt, at omanfyri nevndi fyrispurningur verður, at svara.

8. apríl svaraði Lassi Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Spurningurin er soljóðandi:

Nær kann væntast, at telefonin til Vágarnar og Mykines fær slíkar ábøtur, at trygdarliga kann roknast við telefonini?

— — — —

25. november 1985 settu somu løgtingsmenn úr Vágum undirritaða fyrispurning um sama evni. Tá varð víst til, at uppskot telefonverksins um útbygging og heimild til fíggjan jústá landsstýri og løgtingi. Men orsakað av tí drúgvu politisku viðgerð kom naggatódn í telefonútbyggingina í næstan tvey ár frá 1984 til 1986. Ikki fyrr enn við lóg nr. 46 frá 2. mai 1986 varð útbyggingarætlanin góðtikin við neyðugum heimildum til telefonverkið.

Beinan vegin varð farið til verka, og longu í januar 1987 varð nýggja digitalstøðin í Havn tilsett og bøtti hetta munandi um telefontrafikkin. At nýggju digitalstøðini eru í løtuni hesar bygdastøðir samanbundnar: *Vágarnar, Sand, Nólsoy, Velbastað, Kollafjørður, Vestmanna, Nesvík og Eiði.*

Hetta ber í sær, at síðan juni 1987 hevur støðin í Vágunum verið vælvirkandi, men til tíðir kunnu álvarsligir feilir vera, ið bera í sær, at støðin, ja allar støðir, steðga upp. Bara partvíst ber til at verja seg móti hesum. Ábøtur eru gjørdar og ábøtur verða gjørdar. Í Vágunum er, eins og nógva aðrastaðni hjá TFL, sett upp ein neyðstreymsveiting, ið, ofta er tørvur á. Til Vágarnar er eitt dupult radiosamband, sum gongur um Velbastað og gjøgnum kaðal millum Velbastað og Havnina. Orsakað av nógva vega- og útstykkingararbeiðinum í Havnadali er komið fyri, at kaðalin er skaddur. Í 1989 verður eitt radiosamband aftrat sett upp til Vágarnar, ið verður óheft av verandi sambandi. Hetta bøtir trygdarliga um telefonina; men full trygd fæst ongantíð fyri sambandi í einum telefonkervi. Tá er neyðugt at nýta aðrar møguleikar, til dømis:

neyðbylgju hjá skipum og bátum,

bilradio,

politiradio,

og um ikki so langa tíð kemur eisini NMT (Nordisk Mobil Telefon) — telefonin.

Men framhaldandi verður arbeitt við at nútímansgera og tryggja verandi telefonnet um alt landið.

100-15 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi telefonviðurskiftunum í Svínoy. *(frá Anfinni Kallsberg).*

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

1. Verða ábøtur gjørdar á telefonnetið til/frá Svínoy.
2. Um so er, nær verða tær loknar.

Viðmerkingar:

Fyrsta treytin fyri at skapa trivnað og arbeiðsmøguleikar í eini bygd, og serliga á eini útoyggj er, at samskiftisviðurskiftini eru í lagi. Fyrst og frenst mugu skipast flutningsmøguleikar, sum eru rímiligir, men telefonviðurskiftini hava so sanniliga eisini stóran týdning.

Í Svínoy eru telefonviðurskiftini ikki í lagi og hava ikki verið tað í fleiri ár.

Tað er nevnliga ómøguligt at fáa eina telefon úti í Svínoy. Við tí útbygging, sum fer fram har úti bæði innan alivinnuna og landbrúk er neyðugt at fáa hesi viðurskifti í rættlag beinanvegin.

Í einum svari á løgtingi í december 1985, sigur landsstýrismaðurin, at tær stóru útbyggingarnar, sum skuldu fingið hesi viðurskifti í rættlag, skuldu verið frá hondini á vári 1986.

Tí er umráðandi at fáa at vita, um Svínoy var við í hesari útbygging ella um ætlanin er slept at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

6. mai svaraði Lassi Klein, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Verða ábøtur gjørdar á telefonnetið til/frá Svínoy?
2. Um so er, nær verða tær loknar?

Í Svínoy hava í nøkur ár allar tær higartil møguligu 30 telefonlinjurnar verið í brúki.

Tá løgtingið í mai 1986 viðtók eina íløgu- og útbyggingarætlan fyri Telefonverk Føroya Løgtings, sum umfataði allar partar av telefonnetinum, gjørdist tað eisini møguligt at fara í holt við eina útbygging av telefonsambandinum til smá-

plássini, har telefoneftirspurningurin í fleiri bygdum var farin upp um tað møguliga talið av linjum (felagum), eins og telefonverkið hevði boðað frá frammanundan.

Við í hesi útbyggingarætlan, sum TFL nú hevur framt partar av, er útbyggingin av telefonini til småplássini. Soleiðis er útgerð til Svínoyar sett í ordra og verður leverað soleiðis, at víðkaðir møguleikar fyri at gerast telefonfelagi í Svínoy verða til staðar fyrrapartin av heystinum 1988.

100-16 Fyrispurningar til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi smoltstøð og alivinnu í Vestmannasundi

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi, frá Svend Aage Ellefsen og Vilhelm Johannesen sum var soljóðandi:

Fyrispurningar

1. Nær verður umsóknin um smoltstøð í Miðvági avgreidd?
2. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið viðvíkjandi alivinnu í Vestmannasundi?

Viðmerkingar:

Longu undir seinasta landsstýri varð umsókn send inn um loyvi at fara undir stóra smoltstøð í Miðvági.

Ætlanin var at leiga vatn úr Leitisvatni til tess at tryggja støðina móti vatntroti.

Landsstýrið sendi umsóknina til ummælis hjá SEV, og hevur SEV fyrst í hesum valskeiðnum svarað, at teir einki hava ímóti, at umsóknin verður játtað.

Málið er sera áhugavert ikki minst tí, at talan er um at gera tunnul til vatntøringina og gera laksutruppur inni í tunnlinum, so sjósíl og laksur kann koma niðan í vatnið, hetta seinasta kanska eisini við havbiti fyri eyga.

Seinasta landsstýrið gav nøkur aliloyvi á Sørvágsfirði, og hevur alingin har hepnast hamiliga væl.

Undir hesum landsstýrinum er purt einki gjørt til frama fyri alivinnuna í Vágum.

Fleiri umsóknir fyriliggja t.d. um loyvi til aling framvið landi Vágamegin í Vestmannasundi, uttan nakað røkist fyri, at umsóknirnar verða avgreiddar.

Sum tingmenn fyri Vágarnar kundi vit hugsað okkum at fingið svar uppá hesar spurningar.

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

27. apríl svaraði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Nær verður umsóknin um smoltstøð í Miðvági avgreidd?
2. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið viðvíkjandi alivinnu í Vestmannasundi?

Ad 1.:

P/F Fiskaaling varð stovnað í 1970. Edmund Joensen, sum byrjaði hjá Júst í Túni í 1969, arbeiddi øll 70-árini hjá P/F Fiskaaling, m.a. eisini við smoltframleiðslu.

Tá fyrstu 6 privatu alistøðirnar byrjaðu í 1980, hevði Edmund Joensen longu út frá erfaringum, vunnar hesi 10 ár, gjørt sær hugsanir um, hvussu eini komandi alivinnu kundi tryggjast gott og bíligt smolt í stórum tali, og legði fyri landsstýrið uppskot um gerð av stórari smoltstøð í Miðvági, sum gjøgnum tunnil fekk vatn úr bestu og størstu vatnkeldu í Føroyum til hetta endamál.

Tá »arbeiðsbólkurin viðvíkjandi alistøðum og fiskaaling« hevði sín fyrsta

regluliga fund, var »projektið viðvíkjandi smoltstøðini í Miðvági« til viðgerðar (sí skjal 1). Við at blaða ígjøgnum skjal 1 fæst mynd av gongdini í málinum. Støðin varð viðmæld av Akvaforsk (A.K.) og Fiskaaling (A.R.), var fyri í »Nevndini viðvíkjandi Fiskaaling« 17. januar 1984, 13. februar 1984. Nevndin fór ferð til Noregs at fáa vissu fyri; at vatngrundarlagið og uppleggið var í lagi (2.-7. apríl 1984).

Í fundarfrásøgn frá fundi aftaná hesa ferð 17. mai 1984 stendur: »Nevndin er til reiðar at geva umsóknini viðmæli sítt....avrátt at M. Helmsdal innan næsta fund skal tosa við Klæmint Weihe um málið«. Somja um málið fekst ikki við S.E.V. fyrrenn 30. september 1985.

Tá Aliráðið í 1986 fór undir at viðgera umsóknir um loyvi at ala smolt, bað formaðurin í ráðnum, Akvaforsk, sum helst størsti sakkunnleiki á hesum øki, og kendur við føroysk viðurskifti, um at ráðgeva Aliráðnum um, hvussu best og tryggast var at viðka smoltalingina í Føroyum framyvir. Álitið frá Akvaforsk er viðlagt sum skjal 2.

Tað mælir til fyrst at byggja støðina í Miðvági, og í øðrum lagi stóra støð í samband við SEV á Eiði, um tørvur bleiv á meira smolti.

Landsstýrið/meirilutin í aliráðnum valdi tó at leggja umsóknirnar um stóru støðirnar til síðis og gav ístaðin loyvi til 6 smærri støðir aftrat. Umsóknin um smoltstøð í Miðvági liggur sostatt enn í Aliráðnum óviðgjørd saman við fleiri øðrum umsóknum.

Ad 2.:

Aliráðið hevur fingið 2 umsóknir um aling í Vestmannasundi og eina fyrispurning frá Sandavágs kommunu.

Vestmannasund liggur meira ella minni ímóti opnum havi, og um tað skal nýtast til aling, krevjast nágreiniligar kanningar av aldu, streymi og botni at verða gjørdar fyrst. Haraftrat krevst serstøk útgerð. Í øllum førum eigur møgulig útbygging á hesum øki at vera varislig og møguliga kann eitt loyvi verða givið sum ein roynd. Roknast má við, at alistøðir á hesum øki verða kostnaðarmiklar í íløgum og rakstri, og tí má roknast við størri alistøðum enn tær, vit higartil kenna.

Royndir og kanningar verða helst kostnaðarmiklar, men hinvegin liggur hetta

øki soleiðis fyri, at árinið á umhvørvi ikki verður stórt, og um røyndirnar eydnast, má roknast við eini stórari framleiðslu.

Sí skjal 25.

100-17 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi samferðsluviðurskiftunum í Norðoyum.

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Anfinni Kallsberg, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

1. Er ætlanin at økja tænastustøðið við tyrluflúgving til útoyggjarnar.
2. Eru nakrar ætlanir um at bøta um flutningsmøguleikarnar sjóvegis til Svínoy.
3. Eru nakrar ætlanir um at umleggja vegin frá Hvannasund til Viðareiði.
4. Verður arbeitt við siglingarmøguleikum norðureftir í Hvannasundi.
5. Eru kanningarnar á bergholinum á Borðoy gjørdar, og hvørja loysn metir sakkunnleikin, er tann besta.
6. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvat gjørt er fyri at siglandi verður aftur ígjøgnum Haraldssund. Kunnu vit fáa upplýsingar um tíðarætlanina, nær arbeiðið verður framt. Hvat projekt verður framt, og hvat verður samlaði kostnaðurin.
7. Hvussu langt er planurin um fergulegu á Syðradali K. komin.
8. Hevur landsstýrið ella Strandferðslan ætlanir um at bøta um flutningsmøguleikan um Kallsoyarfjørð.
9. Eru kanningar gjørdar av smábátahavn í Knúksdali á Kallsoy.

10. Er nakað nýtt um undirsjóvarberghol um Lorvíkarfjørð.
11. Hvussu gongur við stovnsetan av tilkallivutu hjá Bygdaleiðum frá Norðtoftum.

Viðmerkingar:

1. Fyrst í hesum árinum »leasaði« landsstýrið eina tyrlu afturat Snipuni. Tað varð ført fram sum undirgeving fyri hesum »keypi« at vit fingu betur møguleika at geva útoyggjunum eina betur tænastu. Enn hava vit ikki sæð so nógv til hesa tyrlu, men er ætlanin at økja túratalið?
2. 3. mars 1987 setti eg fram fyrispurning um Samferðsluviðurskiftini til Svínoy, men svar landsstýrismansins var sera negativt. Eg fari tí at spyrja uppaftur í tí treysti, at onkur samgongumaður hevur tikið í nakkan á landsstýrismanninum og álagt honum at fremja tær samtyktir, ið løgtingið hevur gjørt í 1985 og 1986.
3. 17. juli 1987 vendi bygdarráðið á Viðareiði sær til landsmynduleikarnar og bað um at fáa vegasambandið um Hvannasund umlagt frá vestursíðuni til eystursíðuna á Viðoy, av tí at tað neyvan er dagur uttan omanlop á núverandi vegaføring.

   Í fyrstu syftu verður søgt um um at fáa vegin frá Viðareiði inn í Dalar til landsveg. Tað hevði verið áhugavert at fingið upplýst um meira er gjørt við málið.
4. Samtykt er í landsstýrinum, at siglingarrenna skal fremjast í Haraldssundi. Í hesum sambandi tekur spurningur seg upp, um ikki eisini skal fremjast ein útbygging í Hvannasundi. Tað er eingin loyna, at tippingin í Hvannasundi hevur skert útróðrarmøguleikarnar norður og vestureftir ógvuliga nógv. Undirritaði hevur sæð í einum blaði nú um dagarnar, at landsstýrismaðurin kannar møguleikarnar.
5. 5. mars legði 1987 legði undirritaði fram uppskot um løgtingslóg um dupultsporað berghol Eystur um Fjall á Borðoy. Málið vann ikki frama á tingi. Meirilutin í samferðslunevndini vísir í álití sínum á, at Landsverkfrøðingurin ger kanningar viðvíkjandi bergholum í Norðoyggjum, og verða kanningarnar lidnar í 1987. Tað kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvat hesar kanningar siga, tí fyri, okkum, sum vanliga nýta hesa farleið, er støðan sera kaotisk.

   Í sama álití verður álagt landsstýrinum at biðja Landsverkfrøðingin um alt fyri eitt at seta í verk tørvskanningar og at útvega uppskot um, hvussu ferðsluviðurskiftini í bergholum kunnu loysast.

   Eru hesar kanningar gjørdar í Borðoyar bergholinum, og hvørja niðurstøðu eru tit komnir til fyri at loysa truplu ferðsluna, serliga av stórum akførum, ið ikki fáa hildið sína víkiskyldu.
6. Øll minnast toganina um, hvør loysn skuldi fremjast, í samband við sambindingina av Borðoy og Kunoy. Endin var at landsstýrið á fundi 21. juni 1985 samtykti, at siglingarrenna skuldi gerast í samband við byrgingina um Haraldsund.

Útróðrarmenn í Klaksvík hava mótmælt at farleiðin Norður á hav ígjøgnum Haraldssund er stongd, og lovaði landsstýri tá, at Haraldsund skuldi opnast aftur sum skjótast.

Nú gongur á triðja ári síðani farleiðin ígjøgnum Haraldssund var stongd, og onki røkist fyri, at nakað sum helst fyrireikingararbeiði er gjørt at fremja landsstýrisins samtykt.

7. Á fíggjarlógini fyri 1987 og 1988 er peningur settur av til ferjulegu á Syðradali.

Løgtingið hevur samtykt, at Landsverkfrøðingurin saman við skiparanum á Ternuni gera kanningar, hvar ferjulegan skal gerast.

Vit tingmenn hava eitt projekt sæð, men í bløðunum síggja vit, at nú skal arbeiðið setast í gongd. Tað hevði tí verið áhugavert at fingið frágreiðing um hetta projekt, og hvussu flutningurin um Kallsoyarfjørð skal skipast í framtíðini.

8. Vit hava fingið tey fyrstu ídnaðarvirkini sett á stovn á Kallsoy. Ein stórur trupulleiki hjá hesum virkjum er flutningsmøguleikarnir til og frá.

Í seinastu viku var »Barskorð« til eftirlit og nýggja »Súlan« røkti flutningin til Kallsoy ístaðin. Hetta skipið er als ikki egnað til hendan flutning, soleiðis at avskipingarmøguleikar vóru ikki tilstaðar.

Heldur ikki »Barskorð« er væl egnaður til hendan flutning.

Nú eru ætlanir um ferjulegu á Syðradali, men tað gongur helst rúm tíð, til hesar ætlanir eru veruleiki, tí stór vegagerð skal eisini fremjast frá Húsum suður til Syðradals, áðrenn hetta flutningssamband kann takast í nýtslu.

Spurningurin er tí, um onnur loysn eigur at finnast fyribils.

9. Á fíggjarlógini 1983/84 vóru 300.000 kr. avsettar til kanningar av smábátahavn í Knúksdali. Eru hesar kanningar gjørdar, og hvat var úrslitið.

10. Fyri 1/2 ári síðani sendu allar kommunur í Norðoyum skriv til landsmyndugleikarnar um at kanna møguleikarnar fyri undirsjóvar bergholi um Lorvíksfjørð. Er nakað gjørt við málið.

11. Í september í fjør reisti eg spurningin um at fáa í lag eina tilkallikoyring til Norðtoftir.

Nú skúlabørn eru í bygdini, sum ganga á framhaldsskúla í Klaksvík, skuldi tað verið ein uppgáva hjá Bygdaleiðum, at flutt hesar næmingar til og frá síni heimbygd. Soleiðis er tað ikki hjá skúlabørnunum á Norðtoftum. Tey verða slept upp á fjall í Depli, og tað kann mangan verða ótespiligt, ja, beinleiðis vandamikið at skula streva seg út á Norðtoftir.

Her átti ein skipan at kunna fingist í lag, um vilji var til tess.

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

Fyrispurningurin varð ikki svaraður.

100-18 Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, viðvíkjandi broyting í toll og avgjaldsreglum fyri bilar við ABS-bremsuskipan.

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Johannes Martin Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Hvussu langt er landsstýrið komið við viðgerðini av løgtingsmáli nr. 95/1986 frá Sambandsflokkinum, um broyting í toll- og avgjaldsreglunum fyri bilar við ABS bremsuskipan.

Tann 3. mars 1986 legði undirritaði vegna Sambandsflokkin uppskot fram um broyting í toll og avgjaldsreglunum fyri bilar við ABS bremsuskipan.

Uppskotið varð framlagt orsakað teimum alt ov mongu ferðsluóhappum og trupulleikum í ferðsluni og ætlað sum ein hart tiltrongd ábót.

Hóast alt tað, sum gjørt verður fyri at tryggja bilferðsluna á okkara veganeti, so mugu vit ásanna, at samstundis sum bilatalið økist og ferðslan harvið gerst tættari á vegnum, hava vit fingið nógv fleiri deyðsvanlukkur í ferðsluni, umframt at øll tey sum fáa mein, ofta brek fyri lívið, av ferðsluvanlukkum, og er hetta ein sorgarleikur fyri tann í raktur verður og tey, ið avvarða, harumframt verður alt samfelagið útsett fyri beinleiðis tapi.

Umrødda mál var við fyrstu viðgerð beint í løgtingsins skattanevnd, har ein meiriluti mælti til at beina málið í landsstýrið. Løgtingið samtykti við aðru viðgerð 31. mars 1986 við 26 atkvøðum at beina málið í landsstýrið, men síðani hevur tingið einki frætt aftur um málið.

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

6. mai svaraði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:
Hvussu langt er landsstýrið komið við viðgerðini av løgtingsmáli nr. 95/1986 frá Sambandsflokkinum um broyting í toll- og avgjaldsreglunum fyri bilar við ABS bremsuskipan?

Tað er sjálvandi av stórum týdningi, at bilar hava útgerð, ið tryggjar bilferðsluna sum best.

Slík útgerð er í vissum førum lógarásett og í øðrum førum framd av bilframleiðarunum fyri at tey akfør, teir framleiða, tøknifrøðiliga koma á eitt hægri støði. Sæð frá sjónarmiði framleiðarans styrkir hetta teir í kappingini við aðrar framleiðarar.

Eitt er at ivast í, at umframt trygdarkrøv frá myndugleikunum, so eru mangar trygdarskipanir á bilum eitt úrslit av tøknifrøðiligu kanningunum hjá bilframleiðarunum. Onkur av hesum úrslitum eru ivaleyst endað sum krøv til bilarnar.

Nevnast kann, at í Danmark verða givnir ymsir frádráttir fyri eyka trygdarútgerð, t.d. ABS-bremsur, fyri tilsamans upp til 10.200 kr.

Í føroysku toll- og avgjaldsskipanini fyri bilar hevur ikki higartil verið givin avsláttur í avgjaldsgrundarlagnum vegna serliga útgerð, tað veri seg trygdarella onnur útgerð.

Havast má eisini í huga, at um bilurin ikki hevur ABS-bremsur sum standardútgerð, soleiðis sum einstøk merkir hava í dag, so kann útgerðin fáast sum eykaútgerð aftaná skráseting og tá til innflutningsgjald sum eykalutir (28%).

Við undantaki av ávísari útgerð verður sjálvandi inntøkan av bilskrásetingini lækkað og má hetta fáast innaftur aðrar vegir.

100-19 Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann, broyting av reglugerð hjá Menningargrunninum

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá, Annfinni Kallsberg, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

1. Nær kunnu vit rokna við broytingum í reglugerðini hjá Menningargrunninum vísandi til løgtingsmál nr. 16/1987.
2. Verða hesar broytingar í tráð við uppskot okkara um Oyggjarmenningargrunn.

Viðmerkingar:

Í 1985 løgdu vit fram uppskot um Oyggjarmenningagrunn. Uppskotið varð felt, og segði meirilutin, at Menningargrunnurin kundi veita betur sømdir enn okkara uppskot, og settu tí einki uppskot fram.

Í 1987 løgdu vit uppskot okkara fram av nýggjum, tí tað vísti seg, at nú vóru virkir stovnað, sum høvdu fingið bíliga fígging eftir okkara uppskoti, men høvdu lítlar ella ongar sømdir fingið frá Menningargrunninum.

Hesaferð segði meirilutin í Ídnaðarnevndini, at her var ein trupulleiki, og bað menningargrunnin koma við broytingum í reglugerðini.

Grunnurin kom eisini við einum uppskoti, men meirilutin helt hesa ikki loysa spurningarnar til fulnar.

Nú er tað ikki Ídnaðarnevndin og løgtingið, sum hevur heimild at gera ella broyta reglugerðina fyri Menningargrunnin, men landsstýrið.

Tí fari eg at loyva mær at spyrja landsstýrismannin um nakrar ætlanir eru at broyta reglurnar fyri Menningargrunnin og í so fall, verða hesar broytingar til fyrimuns fyri útoyggjarnar í sama mun sum uppskot okkara um Oyggjarmenningargrunn.

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

28. apríl svaraði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Nær kunnu vit rokna við broytingum í reglugerðini hjá Menningargrunninum?
2. Verða hesar broytingar í tráð við uppskot okkara um Oyggjarmenningargrunn?

Vísandi til fyrispurning frá Anfinni Kallsberg um broyting í reglugerðini fyri Menningargrunnin skal sigast frá, at tað er í umbúnað at broyta lógina soleiðis at kappingarføri hjá virkjum í útjaðaraøkjum kann styrkjast.

Tær broytingar ið eru í umbúnað eru t.d.:
1) Umframt tann studningur ið samb. viðtøku grunnsins § 13, stk. 2 verður latin,

kann studningur veitast upp til 15% av íløgukostnaðinum til stovnan av virkjum í útjaðaraøkinum, um ein flytur virkið frá meginøkinum til útjaðaraøki, kann sama studningsupphædd játtast.

2) Lán sambært viðtøkunum § 13, stk. 3 og 4 ið verður veitt til virki í útjaðaraøkinum, kann veitast við einari rentu, ið er 2% undir vanligu útlánsrentu grunnsins.

3) Harumframt kann studningur veitast til flutning av virki og virkisgøgnum úr meginøkjunum til útjaðaraøkini. Hesin studningur kann tó ikki fara upp um 70% av flutningskostnaðinum.

Uppskotið um broytingina í lógini er sent til ummælis hjá Menningarstovninum. Av somu orsøk hevur tað ikki verið møguligt at fáa tað við millum tey lógaruppskot ið eru løgd fram í hesari tingsetuni.

Ætlanin er tó at fáa uppskotið viðgjørt í ólavsøkutingsetuni.

100-20 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi lyftum umborð á Strandfaraskipum Landsins og millumbygda bussum (Adolf V. Hansen).

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

1. Hevur landsstýrið í hyggju at seta koyristólalyftur umborð á strandfaraskipini og í millumbygda bussarnar.
2. Um svarið uppá spurning 1 er játtandi, hvussu langt eru hesar ætlanir komnar, og nær verða tær settar í verk.

3. Um svarið til spurning, 1 er noktandi: Hví hevur landsstýrið einki gjørt á hesum øki.

Viðmerkingar:

Nú er long tíð gingin, síðani altjóða ár teirra brekaðu fór afturum. Burtursæð frá at nakrar krónur eru avsettar á løgtingsfíggjarlógini, er at kallað einki hent á almenna økinum, sum veruliga ger tilveru teirra brekaðu lættari og meira líkari teirra tilveru, ið vanligi borgarin kann liva.

Tað er ein óverdug støða hjá einum, sum bundin er at koyristóli, ikki at kunna fara í ein buss uttan at skula verða borin av øðrum. Ella hetta, at koma inn á bildekkið á eini ferju við sínum koyristóli, men ikki kunna sleppa upp ella niður á matstovu ella sitihøli, uttan at skula verða borin, og harvið til óneyðuga skoðan.

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

6. mai svaraði Lassi Klein, landsstýrismaður, fyrispurninum soleiðis:

Svar

Fyrispuringurin var soljóðandi:

1. Hevur landsstýrið í hyggju at seta koyristólalyftur umborð á strandfara skipini og í millumbygda bussarnar?
2. Um svarið uppá spurning 1 er játtandi, hvussu langt eru hesar ætlanir komnar, og nær verða tær settar í verk?
3. Um svarið til spurning 1 er noktandi: Hví hevur landsstýrið einki gjørt á hesum øki?

A. »Smyril« og »Teistin« hava lyftur, men eru hesar ikki egnaðar til fólk, sum sita í koyristóli.
B. Hvat »Dúgvuni« viðvíkur fyriliggur eitt projekt uppá installatión av eini lyft frá Brødur Petersen uppá 2 mió. kr., sum liggur til støðutøku í landsstýrinum.
C. Í øðrum skipum liggur tað illa fyri at fáa installeraðar lyftur, tá hesi skip ikki eru so stór, og tað tí fer at taka ov nógv av plássi.
D. Mælt verður til, at nevndin, ið fyriskipar landgangsviðurskiftini hjá ferjunum, samstundis fær til uppgávu at installera lyftur, ið sambond við landgangirnar á landi.

Um lyftur í millumbygda bussum:

Fyri at bussar forsvarliga skulu kunna flyta koyristólar er neyðugt at hava festi á dúrkinum á bussinum til at festa koyristólar.

Fyri at fáa koyristólar í bussarnar, er neyðugt at hurðin er nóg breið, men fyri flestu koyristólar er standardbreiddin 70 cm nóg nógv.

Koyristólar kunnu fáast í bussin á tríggjar mátar:

1. Fólk lyftir teir upp, 2. eftir rampu, 3. við lyft.

Fyrsti hátturin krevur onga eykaíløgu, rampan kostar áleið 2.000 kr., meðan lyftirnar eru sera kostnaðarmiklar, uml. 100.000 kr.

Í fleiri av bussunum, sum koyra fyri bygdaleiðir, eru festir ísett, og rampa er tøk. Í teimum smáu bussunum er ikki gjørligt at taka koyristólar við, men í øllum teimum stóru bussunum er gjørligt at seta festi í og fáa gjørt rampu uttan at hetta gerst kostnaðarmikið ella kemur at norva raksturin.

Mælt verður frá at seta lyft í, tí hesar eru kostnaðarmiklar og fylla nógv.

Fólk í koyristólum hava ikki koyrt nógv við Bygdaleiðum, og tá fyrispurningar hava verið, hevur altíð verið gjørligt at sett buss inn við festi og rampu. Tað er tí ikki beinleiðis neyðugt við útbygging av hesari tænastu, men sum áður sagt er sera ódýrt at seta rampur í teir stóru bussarnar, sum ikki enn hava fingið hesar ísettar.

100-21 Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, um tollavgreiðslu í Norðstreymoy.

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Agnari Nielsen, løgtingsmunni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

1. Nær ætlar landsstýrið at fyriskipa tollavgreiðslu í Norðstreymoy?
2. Og á hvønn hátt?

Viðmerkingar:

Í Norðstreymoy er tollavgreiðsla farin fram líka síðani fyrst í 1900 talinum í samband við sýsluskrivstovuna. Ihnn broyting, sum er farin fram innan hetta starv í Føroyum, hevur ført við sær, at tollavgreiðslan hevur verið uppsøgd.

Eisini fyri Norðstreymoyar sýslu hevur fútin sagt tollavgreiðsluna upp fyri tíð síðani, tí tað liggur á landsstýrinum at taka sær av hesi avgreiðslu. Øll hesi mongu ár hevur tollavgreiðsla verið í Vestmanna, og tað má tí vera eitt rímuligt

krav, at tænastustøðið verður á somu hædd í framtíðini í Vestmanna.

Í Kollafirði verður vøl av vøru uppskipað og tey, sum búgva á eystursíðuni á Norðstreymoy eru í dag noydd at fara til Havnar ella Vestmannar at avgreiða sín toll. Hetta er ov lágt tænastustøði fyri hendan av partin av Norðstreymoy. Høvuðsavgreiðslan — tollstovan — eigur at liggja í Vestmanna og haðani avgreiða ávísar tíðir av degnum ella ávísar dagar í viku, so hevði tænastustøðið eisini fyri eystarapartin av Norðstreymoy verið nøktað.

Við hesi viðmerking loyvi eg mær at seta fyrispurningar fram.

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

3. mai svaraði Jóngerð Purkhús, landsstýriskvinna, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Nær ætlar landsstýrið at fyriskipa tollavgreiðslu í Norðstreymoy?
2. Og á hvønn hátt?

Í Norðstreymoy hevur Kollafjarðar kommuna tíðliga í 1987 sett fram ynski um, at Kollafjørður verður klareringshavn (sb. kunngerð nr. 23 frá 11. februar 1950) og at tolleftirlit kann fara fram í Kollafirði.

Tollstovan (tá Gjaldstovan) viðmælti, at Kollafjørður verður eftirlitshavn, men hinvegin at tolleftirlitið í Norðstreymoy, herundir eisini Vestmanna, verður framt av tolleftirlitinum í Tórshavn.

Tá var einki beinleiðis nevnt um tollavgreiðslu (tollstovudeild) í Kollafirði, men hetta hevur verið borið uppá mál í samrøðum við kommunustýrið og løgtingsmenn úr Norðstreymoy.

Í oktober 1987 skrivaði landfútin til Landsstýrið við ynski um, at tollavgreiðsla á sýsluskrivstovunum í Vestmanna og á Sandi verður tikin av.

Í desember 1987 skrivaði Vestmanna Kommuna, sum hevði frætt um tað, sum er sagt frammanfyri, at Vestmanna avgjørt er ímóti, at tollavgreiðslan fer úr bygdini.

Hesir her nevndu spurningar hava síðani aftur verið lagdir fyri tollstovuna undir einum, og hevur tollstovan í mars 1989 gjørt tilmæli í málinum.

Í hesum verður mælt til at

1. Kollafjørður verður klareringshavn,
2. tollstovudeild verður sett á stovn í Norðstreymoy við avgreiðslustøðum í Vestmunna við avgreiðslutíð t.d. ávikavist fyrrapart og seinnapart,

3. tollstovudeild verður sett á stovn í Sandoynni.

Tollstovan hevur í tilmælinum gjørt metingar um kostnaðin av at seta hesar deildir á stovn.

Tilmæli verður lagt fyri landsstýrið í næstum til støðutøku og síðani — um landsstýrið tekur undir við at fremja málið í hesum árinum — má málið leggjast fyri fíggjarnevndina fyri at fáa eykajáttan.

100-22 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, og Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, viðvíkjandi samferðsluviðurskiftunum í Eysturoynni

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

I Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Johannes Martin Olsen og Jógvan I. Olsen um undirsjóvartunnil millum Strendur og Saltnes.

Fyrr í hesum valskeiði hava undirritaðu vegna Sambandsflokkin lagt fram uppskot um at planleggja útbyggingina av landsvegakervinum í Eysturoynni og at lata gera skitsur og kostnaðarætlan av slíkum framtíðarætlanum, m.a. varð

nevnt: berghol úr Kambsdali yvir í Millum Fjarða, vegur millum Selatrað og Oyri, millum Toftir og Runavík og undirsjóvartunnil millum Saltnes og Strendur. Annars varð heitt á Landsverkfrøðingin um at taka aðra vegagerðir við, sum teir mettu, hoyrdu við til eitt heildar landsvegakervi í Eysturoy.

Vit vístu munnliga á tunnil millum Funning og Gjógv, Fuglafjørð og Hellurnar, eins og á nýggjan landsveg omanfyri Skipanes, Søldarfjørð, Glyvrar, Saltangará o.s.fr.

Hetta uppskot okkara varð tíverri felt.

Vit hava verið varir við, at kanningar kortini eru gjørdar av botninum tvørturum fjørðin millum Strendur og Toftalandið, har fjørðurin er smalur og grunnur, og hetta kunnu vit bert fegnast um og siga takk fyri.

Um ráðini verða, so er ætlanin, at í framtíðini verða fleiri undirsjóvartunlar í Føroyum, og hetta eru risastórar íløgur, talan er um, og vit hava ikki nakrar slíkar royndir sjálvir, hevði tað ikki verið skilabetri at byrja við einum lítlum undirsjóvartunnli fyrst, sum t.d. millum Strendur og Saltnes sum eina roynd, áðrenn farið verður undir teir stóru undirsjóvartunnlarnar.

Undirritaðu loyva sær tí at spyrja:

1. Hvat úrslit góvu botnkanningarnar á Skálafjørðinum millum Strendur og Saltnes?

2. Um kanningarnar vísa, at góðir møguleikar eru fyri undirsjóvartunnlí har, nær hevur landsstýrið ætlan um at seta arbeiðið í verk?

// Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, viðvíkjandi sjúkraflutningi í Eysturoy, frá Jógvan I. Olsen.

Tað hevur ofta verið gjørt vart við, at sjúkraflutningur í Eysturoynni ikki er nøktandi, m.a. hevur Kongshavnar Kvinnufelag fleiri ferðir latið við seg koma um syndarligu støðuna í Eysturoynni viðvíkjandi ambulansatænastuna. Hetta felag hevði fund við allar kommunulæknar, stjóran fyrí Ellis- og Røktarheimið í Runavík, landsstýrismannin, og allar tingmenninar fyri Eysturoynna tann 2. februar 1987.

Millum annað varð tá víst á, at landsstýrið í mars 1984 eftir tilmæli frá sjúkrahússtjóranum samtykti at seta ein arbeiðsbólk at viðgera málið um sjúkraflutning. Hesin bólkur byrjaði sítt arbeiði sama ár, men einki álit var komið aftur frá honum.

Á hesum fundi var eisini hildið fram, at ambulansatænastan í Eysturoynni hevði ymiskar møguleikar fyri bygnaði, og eitt uppskot til eina ætlan varð sett fram, sum gekk út upp á:

1) at ambulansi verður keyptur til Eysturoynna, sum skal hava tilhald á Heilsumiðstøðini í Runavík
2) at tveir portørar verða settir, sum hava fast starv á Ellis- og Røktarheiminum í Runavík,
3) at starv teirra eisini fevnir um at vera húsavørðinum á Ellis- og Røktarheiminum til hjálpar í dagliga arbeiði hansara.

Tað hevur ljóðað, at peningur er settur av á løgtingsins fíggjarlóg í ár til endamálið, men í fylgisskjølunum til fíggjarlógina stendur undir landssjúkrahúsinum: »Uppskot landsstýrisins er at leggja afturat til skipan av ambulansatænastu um landið »1 mió. kr., men einki verður sagt, hvat nágreiniliga verður hugsað um, at hesin peningur skal nýtast til.

Eg loyvi mær tí at seta fram hesar spurningar:

1. Hevur landsstýrið samtykt at seta á stovn eina ambulansatænastu í Eysturoynni?
2. Um svarið er játtandi, nær kann væntast at hon byrjar?

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

6. mai svaraði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

Svar

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrið samtykt at seta á stovn eina ambulansutænastu í Eysturoynni?
2. Um svarið er játtandi, nær kann væntast at hon byrjar?

Samráðst hevur verið um betring av ambulansatænastuni í Eysturoynni sum partur av spurninginum um batar á sjúkraflutningin kring alt landið.

Landsstýrið hevur sett arbeiðsbólk at kanna málið um sjúkraflutning.

Serliga viðvíkjandi Eysturoynni hava fleiri uppskot verið frammi, eitt nú at tílík tænasta verður skipað í samband við Røktarheimið í Runavík, sum spyrjarin eisini umrøður. Ein annar møguleiki er, at ambulansutænasta í Eysturoynni verður skipað sum partur av ti ambulansutænastu, sum til er frammanundan, undir Landssjúkrahúsinum. Ein triðji møguleiki er, at tænastan verður skipað á kommunalum og privatum grundarlagi.

Landsstýrið arbeiðir framhaldandi við málinum, og fer at taka støðu, tá allar

tørvandi upplýsingar og øll sjónarmið eru framkomin og útgreinað.

Tá landsstýrið hevur tikið støðu, fer tænastan at byrja so skjótt sum allar neyðugar fyrireikingar eru gjørdar.

6. mai svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvat úrslit góvu botnkanningarnar á Skálafjørðinum millum Strendur og Saltnes?
2. Um kanningarnar vísa, at góðir møguleikar eru fyri undirsjóvartunnli har, nær hevur landsstýrið ætlan um at seta arbeiðið í verk?

Sum øllum tingmonnum kunnugt er avgerð tikin um, at farast skal undir at gera Vágatunnilin longu í ár.

Royndirnar hiðani, bæði tekniskt og fíggjarliga, koma at verða alt avgerandi fyri, hvussu møguleikarnir fyri líknandi projektum verða mettir.

Gongur alt væl, og kostnaðurin ikki verður ov høgur, er eingin ivi um, at áhugi verður fyri at koma um sund og firðir á henda hátt fleiri aðrastaðni kring landið.

Hvussu skjótt og í hvørjari rød hesi arbeiði skulu gerast, má bíðast við at taka støðu til.

100-23 Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, viðvíkjandi fríhavn /transithavn á Drelnesi.

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Hergeir Nielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Tvøroyrar Býráð hevur søkt um landsstýrisins loyvi til gerð og nýtslu av fríhavn/transithavn á Drelnesi á Trongisvágsfirði.

Hevur landsstýrið kannað møguleikarnar fyri hesum, og hvussu langt er landsstýrið komið í hesum máli?

Viðmerkingar:

Tað er nú rættiliga rúm tíð síðan, at býráðið á Tvøroyri bað um landsstýrisins

loyvi til gerð av fríhavn ella transithavn frá Drelnesi og úteftir.

Møguleikarnir fyri hesum virksemi eru rættiliga góðir á hesum øki, og kønir menn meta, at serliga transithavnarmøguleikarnir, skuldu verið eitt rættuliga gott búskaparligt íkast.

Mett verður, at farmaskipaferðslan í Norðatlantshavi er so mikið stór og fjølbroytt, at tørvurin á eini transithavn við m.a. frytigoymslu, er til staðar og kundi sostatt eitt ávíst virksemi og búskaparlig úrtøka staðist av fremmandari skipaferðslu um okkara leiðir.

Økið, har býráðið ætlar at leggja fríhavnina/transithavnina er væl hóskandi til endamálið. Økið við atløgumøguleikum er til taks, og væl ber til at víðka hesi uppi á landi eins væl og fram við sjónum og lagt kann vera afturat, at eingin dálking stendst av hesum virksemi.

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

5. mai svaraði Jóngerð Purkhús fyrispurninginum solciðis:

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Tvøroyrar Býráð hevur søkt um landsstýrisins loyvi til gerð og nýtslu av fríhavn/transithavn á Drelnesi á Trongisvágsfirði.

Hevur landsstýrið kannað møguleikarnar fyri hesum, og hvussu langt er landsstýrið komið í hesum máli?

Landsstýrið hevur ikki endaliga viðgjørt fyrispurningin frá Tvøroyrar Býráð um loyvi til gerð og nýtslu av fríhavn ella transithavn á Drelnesi.

Høvuðsorsøkin til, at málið ikki hevur fingið gjølliga viðgerð, hevur verið, at eingin heimild hevur verið í tolllógini at geva slíkt loyvi.

Í teirri broyting í tolllógini, sum er til viðgerðar á løgtingi í løtuni (tingmál nr. 87/1987) er skotið upp, at landsstýrið fær heimild til at seta á stovn fríhavnir og frígoymslur. Nærri reglur verða ásettar við kunngerð.

Um nevnda lógarbroyting verður framd, er landsstýrið sinnað beinanvegin at kanna spurningin nærri um og hvussu frígoymsla ella transitgoymsla kann skipast.

100-24 Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, viðvíkjandi íløgum og avkast í inniverandi valskeiði.

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Paula Ellefsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Kann landsstýrislimurin í fíggjarmálum upplýsa:

1. Hvørjar íløgur eru í inniverandi valskeiði framdar í Føroyum innan tey ymisku samfelagsøkini?

2. Hvørja ávirkan hava hesar íløgur havt uppá útflutning Føroya ella nettoinntjening Føroya uttanífrá?

Viðmerkingar:
Áðrenn og beint aftaná sitandi landsstýri tók við leiðslu landsins, bleiv ført fram, at okkara samfelag hevði stórar fíggjarligar trupulleikar.

Fremsta eyðkenni fyri sitandi løgmann og sitandi landsstýrismenn hevur tó, næstan síðan byrjanina av valskeiðnum, verið at sagt frá framgongd á nærum øllum økjum innan føroyska samfelagið tey seinastu skjótt 4 árini.

Td. ávaraði løgmaður í byrjanini av landsstýrisskeiðnum ímóti einari milliard krónum, sum »gekk leys« innan okkara samfelag. Somuleiðis hevur Jóngerð Purkhús, fíggjarmálaráðharri, í tíð og ørtið í fjølmiðlunum sagt okkum frá støðugt vaksandi peningastreymi inn í landskassan, og annars fíggjarligari framgongd innan tey flestu føroysku samfelagsøkini.

Vit eru nakrir løgtingslimir, sum ivast eitt sindur í, um upplýsingarnir frá løgmanni og frá fíggjarmálaráðharra geva eina sanna mynd av gongdini og støðuni innan føroysk fíggjarviðurskiftir og føroyskan búskap í heila tikið.

Ikki soleiðis at skilja, at vit ikki trúgva uppá, at inntøkurnar hjá landskassanum eru sera nógv øktar tey seinastu árini. Sjálvandi eru tær tað. Bert tær týdningarmiklu inntøkulógirnar, sum sitandi samgonga hevur samtykt, merkja ovurstóran vøkstur í inntøkum landskassans. Samtíðarskattaskipanin, framd undir undanfarna landsstýri, hevur eisini merkt ein framúr stóran vøkstur í likviditeti landskassans. Talan er um fleiri hundrað mió kr.

Ein fær ta fatan, at sitandi landsstýri og samgonga royna at billa okkum fólki inn, at økti likviditeturin, fyrst og fremst hjá landskassanum, men eisini innan onnur samfelagsøkir, er orsakaður av einari framgongd innan primeru og produktívu føroysku vinnuna.

At flyta peningaorku frá privata økinum yvir til tað almenna, tað styrkir neyvan um føroyska búskapin sum sovornan.

Tað sum har aftur ímóti hevði styrkt um okkara búskap, hevði verið at framl. íløgur í útflutningsskapandi vinnulig tiltøk.

Sitandi samgonga og landsstýri hava elvt til veldugar íløgur, bæði innan almennu, men eisini, og serliga innan privatu samfelagsøkini. Tíverri sær tað út til, at tær allar flestu av teimum íløgum, sum sitandi landsstýri hevur stílað fyri, eru miseydnaðar.

Út frá hesum loyvir undirritaði sær at seta oman fyri nevndu spurningar fram:

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

6. mai svaraði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, fyrispurninginum solciðis:

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvørjar íløgur eru í inniverandi valskeiði framdar í Føroyum innan tey ymisku samfelagsøkini?
2. Hvørja ávirkan hava hesar íløgur havt uppá útflutning Føroya ella nettoinntjening Føroya uttanífrá?

— - - —

Í skjali 1A og 1B eru sýndar tær framdu íløgurnar í tíðarskeiðinum 1980-87. Tað sæst, at íløgurnar falla innan nógv ymisk samfelagsøki.

Tær samlaðu íløgurnar vaksa serstakliga nógv frá 1982 - 1984 úr 1.049 mió. kr. upp í 2.046 mió. kr. Orsøkin til vøksturin var fyrst og fremst íløgurnar í farmaskip og fiskiskip. Síðani 1984 hava tær samlaðu íløgurnar verið fallandi fyrst og fremst, tí tær privatu íløgurnar hava verið fallandi. Aftaná 1984 verða tær fallandi íløgurnar í farmaskip stórt sæð mótsvaraðar av einum vøkstri í íløgum til fyrst og fremst fiskiskip, flakavirkir og privat og almennt byggivirksemi.

Samanumtikið kann sigast, at vøksturin í samlaðu íløgunum roknað í krónum fyrst og fremst gekk fyri seg frá 1982-84. Síðan tá hava tær verið nærum óbroyttar og enntá fallandi, um ein roknar søluna av farmaskipunum í 1987 uppí.

Nú er tað so, at búskapurin hevur verið í støðugum vøkstri í øllum tí viðgjørda

tíðarskeiðinum. Sostatt vaks bruttofaktorinntøkan úr 2.373 mió. kr., í 1980 uppí 5.250 mió. kr. í 1987.

Sum partur av bruttofaktorinntøkuni vuksu tær privatu íløgurnar úr umleið 20% í 1980 uppí uml. 38% í 1984. Síðani tá er parturin fallin niður í 23%.

Tær almennu íløgurnar hava ligið um 10-14% í øllum tíðarskeiðinum.

Í mun til okkara fíggjarorku eru íløgurnar sostatt vaksnar frá 1982-84, men eru síðani minkaðar.

Viðvíkjandi íkasti til samfelagsbúskpin, so er tað ikki at ivast í, at ein orsøk til at bruttofaktorinntøkan er vaksandi so nógv hesi árini, er tað stóra íløguvirksemið.

Okkara útflutningur er eisini vaksin nógv hesi árini, úr 1.268 mió. kr. í 1980 upp í 2.755 mió. kr. í 1987. Hjá summum vinnum, eitt nú alivinnuni, kann ein vænta, at úrslitið av íløgunum ikki kemur fyrr enn tey komandi árini. Hetta m.a. tí smoltframleiðslan ikki er komin í rættlag fyrr enn nú. So heilt forsømdar eru okkara útflutningsvinnur ikki.

Viðvíkjandi nettoinntjeningini hjá Føroyum, so hevur hon í fleiri ár verið negativ. Hetta vísir okkara gjaldsjavnahall. Serstakliga illa gekst frá 1982-84, har útflutningur Føroya vaks væl, men tíverri vaks innflutningurin uppaftur meira. Tískil vaks gjaldsjavnahallið,úr 156 mió. kr. í 1982 upp í 724 mió. kr. Síðani tá er útflutningurin vaksin støðugt, meðan vøksturin í innflutninginum er minkaður, frá 1984-85 minkaði innflutningurin enntá. Hetta sæst aftur í gjaldsjavnahallið, sum ið 1987 verður mett at vera uml. 280 mió. kr.

Sum partur av bruttofaktorinntøkuni vaks gjaldsjavnahallið úr uml. 5% í 1982 upp í uml. 17% í 1984. Í 1987 var tað aftur uml. 5%.

Tá alt hetta er sugt, so skal tó verða sagt, at vit ikki eru komin á mál, tí gjaldsgjavnahallið er enn ov stórt.

Tað, sum skal til, er at minking í íløgum umframt ein minking í nýtslu. Av tí, sum er skrivað omanfyri, er hetta í ávísan mun eydnast.

Inntøkulógirnar í 1986 vóru eitt lið í royndum landsstýrisins at bøta um støðuna.

Sjálvsagt hevur hetta ført við sær eitt betri likviditet hjá landskassanum. Tað tykist ótrúverdugt tá Pauli Ellesen bæði finst at gjaldsjavnahallinum og eisini at, at nakað verður gjørt við hetta.

Somuleiðis rímar tað illa, at Pauli Ellefsen sigur, at fíggjarorka verður flutt frá tí privata yvir til tað almenna, samstundis við at hann sigur, at landsstýrið hevur elvt til veldugar íløgur »serliga innan privatu samfelagsøkini«.

Sí skjøllini 26 A-D.

100-25 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ferðsluni Eystur um Fjall.

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Heina O. Heinesen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin greiða tinginum frá, hvussu langt er komið við at regulera ferðsluna í bergholinum Eystur um Fjall?
2. Er nakað gjørt við at projektera nýtt berghol Eystur um Fjall á Borðoynni?

Viðmerkingar 1.:
Øll, sum koyra ígjøgnum bergholini Eystur um Fjall, vita hvussu vandamikið tað er, tá ið ferðslan er nógv og tú t.d. møtir einum stórum bussi ella lastbili — ella tveir slíkir skulu nøtast í bergholinum.

Eg skal í hesum sambandi vísa til álit í løgtingsmál nr. 96/1986. Har er eitt uppskot til samtyktar frá meirilutanum í samferðslunevndini, sum er samtykt. Tað er út frá hesum, eg seti henda fyrispurning.

Viðmerkingar 2.:
Nú eru longu fleiri ár síðani, at menn vóru greiðir yvir, at bergholini Eystur um Fjall ikki kundu klára ta ferðslu, sum er neyðug at halda eitt framkomið samfelag gangandi. Um ikki nakað verður gjørt við hetta nú, er stórur vandi fyri, at tann framburðurin, sum er komin, síðani bergholini Eystur um Fjall vórðu opnað, heilt fer at steðga upp.

Vit eru vitandi um, at tað er stórur mangul upp á grót til tey arbeiði, ið eru í gongd fyri ikki at tala um øll tey arbeiði, ið skulu setast í verk í nærmastu framtíð her norðuri.

Spurningurin er tí, um tað ikki hevði verið skilagott at havt hetta berghol liðugt projekterað longu nú.

6. mai svaraði Lasse Klein fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:
1. Kann landsstýrismaðurin greiða tinginum frá, hvussu langt er komið við at regulera ferðsluna í bergholinum Eystur um Fjall?
2. Er nakað gjørt við at projektera nýtt berghol Eystur um Fjall á Borðoynni?

Sum komið verður inn á í viðmerkingunum til fyrispurningin, er ein tann størsti ampin fyri ferðsluna í hesum trongu tunnlunum, at stórir bilar — lastbilar og bussar — hava sera trupult við at møtast inni í tunnlunum. Hugsað hevur verið um at regulera ferðsluna við ljósum, men verður ikki hildið, at hetta er ein heppin loysn, ti ov leingi verður at bíða eftir at sleppa igjognum. Mett verður, at tann fraegasta loysnin er at víðka um nokur av vikiplássunum og seta frámerki á hesi, so førararnir á teim stóru bilunum kunnu siggja, hvar ber til at møtast.

Sum framtíðarloysn eru tveir møguleikar at velja: Antin at víðka um verandi tunnlar ella at byggja ein nýggjan.

Nakað hevur verið arbeitt við hesum báðum moguleikum, men enn er ikki komið til nakra niðurstøðu.

100-26 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi siglingar-møguleikunum ígjøgnum Haraldsund og Hvannasund.

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Heina O. Heinesen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

1. Hvør er grundin, at landsstýrismaðurin ikki heldur seg til tær samtyktir, sum eru gjørdar um siglingarvennu í Haraldssundi, samtykt á landsstýrisfundi 20. mars 1986?

2. Er nøkur kanning gjørd av Hvannasundi, síðani tað varð tipt fyri skjótt mongum árum síðani, her hugsi eg serliga um dálkingarvandan og siglingarmøguleikarnar?

Viðmerking til 1:
Í juni mánað eru 4 ár síðani byrjað varð at fylla grót út í Haraldsund í sambond við aling, varð sagt.

Hetta var í tráð við løgtingsmál nr. 36/1980, pkt. 3, á bls. 227 í Tingtíðindum sama ár.

Hetta mál varð framlagt av undirritaða, tí talan var um at gera grótkast í sambandi við ta aling, ið fór fram í Kunoyarnesi tá. Ístaðin fyri at leggja grótkast suður úr Nesinum, varð hildið rættast at byrja upp á byrgingina um Haraldsund.

Nú liggja so tvey alibrúk suðuri í Kunoyarnesi. Um streymurin verður reguleraður við eini siglingarrennu, gevast teir bestu alimøguleikarnir, sum eru í Føroyum. Um rætt verður farið fram, t.v.s. at vit fremja ta samtykt, sum er gjørd í hesum máli, so kunnu vit útbyggja alingina í Haraldssundi munandi við fleiri alibrúkum, bæði sunnanfyri og norðanfyri byrgingina. Herafturat kemur, at Sundið verður opið fyri sigling aftur, og er hetta nakað, sum er lovað útróðrarmonnum.

Tað skuldi tí ikki verið nakað ivamál at sett hesa samtyk í verk so skjótt sum gjørligt. Hetta kemur at fáa landsbúskaparligan týdning í framtíðini.

26. juni 1985 varð ein nevnd vald av landsstýrinum — hin sokallaða Haraldssundsnevndin. Hvat er vorðið av hesi nevnd? Er hon liðug við arbeiðið sítt?

Viðmerkingar til 2:
Tað kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvussu henda tipping hevur ávirkað umhvørvið í sundinum og eisini, hvussu skilið verður um nøkur ár.

Tað kann ikki vera nakar ivi um, at tað hevur stóran týdning fyri útróðurin, um tað gjørdist siglandi ígjøgnum Hvannasund aftur.

Nú er tað soleiðis, at eingin vil hava streymin aftur í sundið, men tað hevði verið gott, um tað gjørdist møguligt at regulera streymin í sundinum.

Hetta kundi latið seg gjørt, um ein byrging varð gjørd aftrat í sambandi við eitt alibrúk (ella bátahavn).

Hendá byrging skuldi ikki verið til bilferðslu, men bert til at regulera streymin í Sundinum. Á miðjuni skuldi verið eitt portur, sum kundi opnast til sigling. Eisini skuldu rør verið løgd í botnin báðumegin við, soleiðis at nakað av streymi kundi verið allu tíðina.

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

Fyrispurningurin varð ikki svaraður.

100-27 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi Múlavegnum (Heini O. Heinesen).

Ár 1988, hósdagin 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Hvussu ber tað til, at arbeiðið upp á Múlavegin er steðgað, nú bert 300-400 metrar eru eftir í bygdarvegin í Múla.

Viðmerkingar.
Nú eru fleiri ár síðani farið varð undir at gera veg til Múla. Arbeitt hevur verið fyri ávísa upphædd á hvørjum ári, 1 til 2 mió. kr.

Tá ið byrjað varð við hesi vegagerð, var stórur dentur lagdur á, at hesin vegur skuldi verða lagdur Norður í erva, soleiðis at komast kundi í allar dalarnar á veg norður og serliga dalurin omanfyri Múlabygd er gott dyrkilendi, men hvat hendir, tá ið komið er norður á endan á Svarthamri, verður farið oman av vegnum í vegin inn á lendingina í Múla. Hetta ger so tað, at her kemur at vera ein sera brøtt hrekka, sum ikki verður tespilig í frosti.

Grundgevingin fyri hesi avgerð, skal vera at koma skjótari til Múla við vegnum.

Fyrst at fara oman av við vegnum, soleiðis at hann ikki kemur at gagna Múlabygd til helvtar, tað hann kundi gjørt, um hildið varð fram Norður í erva, og so sum krúnan á verkinum, at leggja arbeiðið stilt, nú bert 300-400 metrar eru eftir. Hetta er seigpíning, sum forslær.

Út frá hesum loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum omanfyrinevnda fyrispurning.

22. mars 1988 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

6. mai svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar


Fyrispurningurin var soljóðandi:
Hvussu ber tað til, at arbeiðið uppá Múlavegin er steðgað nú bert 300-400 metrar eru eftir í bygdarvegin í Múla?

Síðan farið varð undir hesa vegagerð í 1982, hevur verið arbeitt nakrar mánaðir á hvørjum ári — frá summri og út á heystið — fyri ta avsettu upphæddina, sum hevur verið 1-2 mió. kr.

Á fíggjarløgtingslógini fyri í ár eru avsettar 2 mió. kr. til hetta arbeiðið, og er mett, at frægast fæst burtur úr at arbeiða fyri hesa upphædd í summarhálvárinum.


Annars kann upplýsast, at koyrandi verður til Múla í ár, men væl av arbeiði verður eftir at gera, áðrenn vegurin kann sigast at vera liðugur.

RED: 10 X



Nasjonalbibliote

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12



LØGTINGS-TIDINDI

1987

LØGTINGSTÍÐINDI 1987

Løgtingstíðindi

1987

Bind B

Skjøl til Løgtingstíðindi

TÓRSHAVN 1991

Løgtingstíðindi 1987 — Bind B.
© Føroya Løgting.
Lagt til rættis: Esther Bech.
Fotosatsur, umbróting: P/f Blaðstarv.
Prent: Havnar Prent.
Hefting: Bókavirkið.

INNIHALDSYVIRLIT

Bind B

Skjøl til løgtingstíðindi

1987

Skjal	Løg-tings-mál		Bls.
1		Landskassaroknskapur 1987	7
2		Fylgiskjøl til løgmansrøðuna 1987	49
3	1	Ymsar lógir at seta í gildi innan almannaverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini.....	108
	2	Ymsar lógir at seta í gildi innan heilsuverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini.....	170
5	3	Ymsar lógir at seta í gildi innan undirvísingarverkið í samband við broyting í stuðulsskipanini.....	203
6	5	Lóg um yvirtøku av serforsorgini í Føroyum.....	231
7	6	Fíggjarløgtingslóg 1988.....	243
8	8	Alment kunngerðablað.....	354
9	23	Løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág (LM.119/86).	355
10	36	Broyting í skattaviðurskiftunum hjá fólkapensiónistum.	356
11	40	Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1988.....	372
12	41	Regulering av veiðuni av laksi sambært viðtøkunum í Norðuratlantisku Laksakonventiónini (NASCO).	381
	46	Umhvørvislóg.....	382
14	47	Broytingar í lógini um ferðamannamiðstøð.....	448
15	48	Skipan millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi í 1988.....	451
16	50	Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1988.....	454
17	62	Løgtingslóg um fuglaveiðu.....	460
18	67	Løgtingslóg um megin-, fólka- og skúlabókasøvn.....	466
19	83	Lán til telefonverkið.....	505
20	128	8-ára ætlan fyri útbygging av havnunum.....	507

21	134	Løgtingslóg um bygging av ávísum skúlum.....	512
22	100-6	Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðv. samferðsluviðurskiftum (Hergeir Nielsen).....	560
23	100-9	Skjal til fyrispurning til løgmans viðvíkjandi organisatiónsskipan viðvíkjandi landsfyrisitingini (Jógvan Sundstein).....	566
24	100-13	Skjal til fyrispurning til Atla Dam, løgmann, viðvíkjandi íløgunum í og úrslitinum hjá svartkjaftavinnuni (Pauli Ellefsen).....	570
25	100-16	Skjal til fyrispurning til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann, frá Svend Aage Ellefsen og Ivan Johannesen, løgtingsmonnum viðv. smoltstøð í Miðvági og alivinnu í Vestmannnasundi	576
26	100-24	Skjal til fyrispurning til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, frá Paula Ellefsen, løgtingsmann viðvíkjandi íløgum og avkast í inniverandi valskeiði	595

LANDSKASSIN

Rakstrarroknskapur 1987

og

fíggjarstøða pr. 31. desember 1987

Viðmerkingar til landskassaroknskapin 1987

Fylgjandi **ognir,** sum eru fíggjaðar yvir § 13: Nýggir vegir, brýr, breiðkan og umsiting av vegum, eru ikki upptiknar í landskassans roknskapi:

Skerv- og asfaltverk

	Byggi-kostnaður	Niðurskrivað til pr. 31.12.87
Skervverkið í Porkeri	9.010.991,00	5.191.418,00
Skervverkið á Sandi	1.419.318,00	302.120,00
Skervverkið í Sandavági	4.094.860,00	1.948.244,00
Skervverkið í Hundsarabotni	30.198.320,00	16.812.469,00
Skervverkið á Lambareiði	51.855.879,00	27.827.112,00
Bitumengoymslan í Porkeri	562.552,00	293.625,00
Bitumengoymslan á Sandi	340.511,00	247.302,00
Bitumengoymslan í Hósvík	11.752.810,00	4.360.469,00
Asfaltverkið í Hundsarabotni	7.611.049,00	3.095.198,00
Asfaltverkið á Lambareiði	8.008.638,00	3.472.376,00
	124.854.928,00	63.550.333,00

Smiðjur og goymsluhús

	Byggi-kostnaður	Niðurskrivað til pr. 31.12.87
Maskinmiðstøðin í Kollafirði	8.550.000,00	4.693.000,00
Goymsluhús í Kollafirði	2.000.000,00	1.398.000,00
Smiðjan á Lambareiði	500.000,00	475.000,00
Nýggja smiðja í gerð, Lambareiði	2.000.000,00	2.000.000,00
Smiðjan í Norðdepli (gamla)	80.000,00	17.000,00
Smiðjan í Hvannasundi	1.000.000,00	817.000,00
Smiðjan á Sandi (gamla) umvald	500.000,00	451.000,00
Smiðjan á Sandi (nýggja)	2.200.000,00	1.928.000,00
Smiðjan í Øravík	3.000.000,00	2.707.000,00
Smiðjan á Kallsoynni	100.000,00	56.000,00
Goymsluhús í Havnardali	200.000,00	162.000,00
Goymslu- og vaktarhús í sb. við kavagr. á Oyggjarv.	250.000,00	204.000,00
Goymsluhús norðuri við Streymin	200.000,00	171.000,00
Goymsluhús á Grind á Eiði	200.000,00	171.000,00
Servicekontainari á Lambareiði	275.000,00	235.000,00
Servicekontainari í Haraldsundi	400.000,00	343.000,00
Goymsluhús á Stykkinum	200.000,00	166.000,00
Goymsluhús í Sørvági	200.000,00	166.000,00
at flyta	21.855.000,00	16.160.000,00

flutt	21.855.000,00	16.160.000,00
Arbeiðsbygningur í Lopransdali	550.000,00	522.000,00
Arbeiðsbygningur í Kaldbaksbotni	550.000,00	522.000,00
Sethús við Ánirnar	400.000,00	400.000,00
Sethús við Marknagilsvegin, Tórshavn	2.000.000,00	2.000.000,00
	25.355.000,00	19.604.000,00

Fylgjandi **skuld** pr. 31. des. 1987 er ikki bókførd í landskassans roknskapi:

Keyp av maskinum upp á avgjald	14.041.750,00
Keyp av útgerð til skervverk	7.990.000,00
	22.031.750,00

Landskassans **uttanlandaskuld** tann 31. desember 1987 sær soleiðis út:

		Skuld 31.12.87	Bókførd skuld	Skuld við kursi 31.12.87
Export Finans	Nkr.	3.761.450,60	3.342.610,86	3.720.826,34
Kreditbank, Luxembourg	Bfr.	8.000.000,00	1.200.000,00	1.475.920,00
Westdeutsche Landesbank	DM	4.360.000,00	10.067.307,56	16.817.828,00
Algemene Bank, Holland	Hfl.	7.272.727,26	21.884.614,35	24.938.180,88
N. V. Bank voor Nederland	Hfl.	16.000.000,00	44.627.292,27	54.864.000,00
Nordfinanz Bank, Zürich	Sfr.	10.000.000,00	41.876.625,00	47.375.000,00
Nordic Bank, London	Sfr.	1.914.285,52	7.806.074,29	9.068.925,18
Yamaiche Sec., Tokyo	Yen	3.000.000.000,00	138.600.000,00	147.429.000,00
			269.404.524,33	305.689.680,40

Viðvíkjandi landskassans **veðhaldsskyldum** er at siga, at smb. yvirlit (fylgiskjal til landskassaroknskapin) veðheldur landskassin 31.12.87 fyri kr. 2.263.208.945,00, og av hesum eru kr. 130.056.777,00 gjaldkomnar.
Tað er gjaldstovuni kunnugt, at roknskapurin viðvíkjandi landskassans veðhaldsskyldum ikki eru eftirfarandi á ávísum økjum m.a. orsakað av tørvandi upplýsingum, ið ikki eru komnir gjaldstovuni í hendi.

Undir landskassans bruttoinntøkum framgongur, at endurgjøld ríkiskassans eru 377.609.360,45 kr., men her skal tilskilast, at 146.546.697,01 kr. ikki er við í nevndu upphædd. Hetta er ríkiskassans partur av rakstrinum av sjúkrahúsunum, sum hava sjálvstøðugt on-line roknskaparhald við edv-systeminum hjá gjaldstovuni.

Eykajáttanir í 1987
Fylgjandi eykajáttanir eru skrásettar í landskassans roknskapi:

§ 10	Løgtingshúsið	250.000,00
§ 11	Føroya Gjaldstova	2.210.000,00
	Trygdareftirlitið	280.000,00
§ 15	Tónleikur og sangur	100.000,00
§ 16	Til upplýsing um grind	1.125.000,00
	Serlig veiting til fiskivinnuna	16.500.000,00
§ 18	Ferðaendurgjald til lærupláss	300.000,00
§ 19	Landsstýrinnum at ráða yvir	61.000,00
	Skúlin á Trøðni	174.000,00
		21.000.000,00

Tað er ivasamt, um gjaldstovan hevur fingið boð um allar eykajáttanir, sum fíggjarnevndin játtaði í 1987.

Hesin roknskapur er prentaður soleiðis:

400 eintøk av ársroknskapinum 1987
12 eintøk av kontolistum
12 eintøk av rakstrarstøðum, tó ikki § 13-1
12 eintøk av rakstrarstøðum § 13-1
12 eintøk av landskassans veðhaldsskyldum
12 eintøk av landskassans grunnum

Rakstrarroknskapur landskassans fyri fíggjarárið 1987

(Samandráttur)

		Roknskapur	Fíggjarlóg
Inntøkur:			
(§ 1)	Skattir	1.113.044.754,62	1.015.000.000,00
(§ 2)	Toll- og framleiðslugjøld	1.076.987.263,23	972.000.000,00
(§ 3)	Onnur gjøld	11.080.498,82	1.700.000,00
(§ 4)	Inntøkur av spæli	967.430,25	1.100.000,00
(§ 5)	Rentur og vinningsbýti v.m.	÷22.218.388,78	÷35.545.000,00
(§ 6)	Landsstovnar	÷46.261.318,71	÷31.590.000,00
(§ 7)	Partur av avlopi danska tjóðarbankans	31.657.434,00	15.000.000,00
(§ 8)	Ymsar inntøkur	15.097,25	5.000,00
		2.165.272.770,68	1.937.670.000,00
Útreiðslur:			
(§ 6)	Landsstovnar (sjá undir inntøkum)		
(§ 10)	Løgtingið	12.392.067,23	11.678.000,00
(§ 11)	Landsumsitingin	129.478.420,28	121.516.000,00
(§ 12)	Heilsumál	143.476.275,38	125.591.000,00
(§ 13)	Samferðslumál	225.919.630,16	219.600.000,00
(§ 14)	Skúlamál	174.170.892,95	173.347.000,00
(§ 15)	Vísind, bókmentir og list	80.979.236,16	84.959.000,00
(§ 16)	Fiskivinna, sigling o.t.	394.951.179,00	375.709.000,00
(§ 17)	Landbúnaður og matrikulering	41.809.321,39	41.195.000,00
(§ 18)	Handil, ídnaður v.m.	40.025.763,60	37.874.000,00
(§ 19)	Almannamál	334.840.099,97	294.917.000,00
(§ 20)	Pensjónsútreiðslur	6.201.350,93	5.615.000,00
(§ 21)	Effektivar veðhaldsbindingar	80.000.000,00	80.000.000,00
(§ 22)	Aðrar og óvissar útreiðslur	5.809.240,43	3.735.000,00
(§ 23)	At leggja í ymsar grunnar v.m.	120.792.808,72	40.220.000,00
(§ 24)	Avdráttir av lánum	1.831.754,15	19.000.000,00
(§ 25)	Avskrivingar	50.656.672,46	60.200.000,00
(§ 26)	Ymsar ognarútreiðslur	524.956,62	300.000,00
	Rakstrarvinningur	321.413.101,25	242.214.000,00
		2.165.272.770,68	1.937.670.000,00

Fíggjarstøða landskassans pr. 31. des. 1987

(Samandráttur)

		Aktiv	Passiv
(§ 30)	Kassa-, banka-, sparikassa- og giro-peningur	271.668.403,23	
(§ 31)	Virðisbrøv	13.060.631,00	
(§ 32)	Útlán úr landskassanum (inc. ferðaforskot, tollkredit og alimentatión)	131.541.301,08	
(§ 33)	Inntøkueftirstøður	431.268.904,12	
(§ 34)	Aktiv hjá grunnum (innistandandi, útlán v.m.)	1.132.800.726,01	
(§ 35)	Aktiv hjá deponentum	21.411.388,23	
(§ 36)	Millumrokningar við kommunur		49.944.420,85
(§ 36)	Millumrokningar við landsstovnar og refusiónsmillumrokning	24.514.959,44	
(§ 37)	Fastar ognir og anlegg	23.076.452,36	
(§ 38)	Skip	76.314.215,08	
(§ 39)	Millumrokningar við nýtt fíggjarár	27.862.854,73	
(§ 40)	Millumrokningar, skuld		54.333.186,42
(§ 41)	Lán		437.398.366,29
(§ 42)	Deposita		18.012.059,27
(§ 44)	Grunnar		1.358.209.526,64
(§ 45)	Íløgur fíggjað við lánum	104.954.878,58	
(§ 46)	Kapitalkonto		54.379.277,36
(§ 50)	Refusiónsmillumrokningar	45.655,16	
(§ 52)	Heilsufr. Starvsst., Kovin og Aliráðið	7.706.765,37	
(§ 60)	Útreiðslueftirstøður		284.600,00
(§ 61)	Bileftirlitsstøð og aðrir byggiroknskapir	27.747.403,69	
	Rakstrarvinningur		321.413.101,25
		2.293.974.538,08	2.293.974.538,08

Viðvíkjandi ábyrgdum sjá undir fororðinum.

FØROYA GJALDSTOVA, tann 13. desember 1988.

Heri Mohr Jákup Augustinussen

Specifikatión til 3000/6800 (§ 13)

3000	Anlegg av vegum		33.626.330,29
3100	Kommunal arbeiði		÷0,00
3200	Tunnil og tunnilsgerð		81.960.000,00
3300	Ábøtur av vegum		5.794.569,55
3400	Viðlíkahald av vegum		15.118.851,46
3500	Vegarekkverk		1.859.845,92
3600	Kavagrevstur		4.726.875,83
3700	Vegstudningur		11.821.785,41
3800	Ferjulegur, viðlíkahald		÷714.178,83
3900	Asfaltering, gamlir vegir		4.527.208,12
5600	Mobil amboð - rakstur/keyp		26.470.393,38
5700	Smiðjur		12.441.900,26
5800	Skervverk		10.811.954,83
5900	Asfaltverk		2.320.795,74
6000	Havnir	83.108.355,80	
6100/6800	Lendingar og bátahavnir	27.080.359,35	
	Mótrokningar	÷110.188.715,15	0,00
			210.766.331,96

Specifikatión

til rakstrarroknskapin fyri fíggjarárið 1987

INNTØKUR

			Roknskapur	Fíggjarlóg
(§ 1) **Skattir:**				
1108	Samtíðarskattur A & B	951.285.062,38		
1108	Partafelagsskattur	81.828.948,00	1.033.114.010,38	975.000.000,00
1108	Skattur áðrenn 1/4/84		7.753.251,00	
1108	40%-skattur		÷899,29	
1108	Royalty-avgjald		3.655,00	
1108	P/F-vinningsgjald 20%		9.770.458,45	
1108	Eftirlønargjald 35%		199.417,57	
1108	Sjómansskattur		5.703.950,00	8.000.000,00
1804	Vegskattur		28.244.800,37	18.000.000,00
1702	Rentuskattur		28.256.111,14	14.000.000,00
			1.113.044.754,62	1.015.000.000,00
(§ 2) **Toll- og framleiðslugjøld:**				
2017	Tollgjøld		952.369.124,82	950.000.000,00
2041	Brennioljugjald		93.367.176,79	100.000.000,00
2055	Brennioljugjald (sjá §§ 23 og 44)		0,00	÷100.000.000,00
2708	Framleiðslugjøld		28.419.061,62	22.000.000,00
2713	Umskrásetingargjald		2.831.900.00	0,00
			1.076.987.263,23	972.000.000,00
(§ 3) **Onnur gjøld:**				
3052	Spiritusskamtanarkort		191.935,00	200.000,00
3102	Loyvisgjøld		84.300,00	90.000,00
3154	Gjald fyri ferðing úr Føroyum		8.414.350,00	0,00
3204	Arvagjøld		2.301.839,82	1.300.000,00
3256	Lestagjøld		88.074,00	80.000,00
3501	Bøtur		0,00	30.000,00
			11.080.498,82	1.700.000,00
(§ 4) **Inntøkur av spæli:**				
4011	Happadrátturin		254.800,00	550.000,00
4058	Burturlutingargjøld		233.953,55	100.000,00
4096	V-4 og totalisatorspæl		478.676,70	450.000,00
			967.430,25	1.100.000,00

6) gevur ikki upplýsingar, fremur ikki kanningar ella gevur ikki royndir eftir § 40 ella fráboðar sum nevnt í § 41,
7) gevur ikki fráboðan, sum ásett í reglum ásettum eftir § 44,
8) ger byggi- og tilgerðararbeiði ímóti § 67, 3. stk.
ella
9) heldur ikki treytir tengdar at loyvi eftir § 67, 3. stk.

2. stk. Revsingin kann herðast til hefti ella fongsul í upp til 1 ár, um brotið er framt við vilja ella av grovum ósketni, og um tað við brotinum er

1) voldur skaði á umhvørvið ella elvdur vandi fyri hesum, ella
2) fingin ella ætlaður peningaligur fyrimunur fyri viðkomandi ella

§ 38, stk. 2.

3) tilsidesætter vilkår knyttet til en tilladelse efter § 15, stk. 2, eller § 16 eller til en godkendelse efter §§ 26 - 28,
4) anlægger, påbegynder eller driver virksomhed uden godkendelse efter § 26,
5) undlader at indhente godkendelse efter § 26 eller § 28,
6) undlader at meddele oplysninger, at gennemføre undersøgelser eller at afgive prøver efter § 40 eller at give underretning som nævnt i § 41,
7) undlader at indgive anmeldelse, der er foreskrevet i regler udfærdiget efter § 44,
8) gennemfører bygge- og anlægsarbejder i strid med § 67, stk. 3.
eller
9) tilsidesætter vilkår knyttet til en dispensation efter § 67, stk. 3.

Stk. 2. Straffen kan stige til hæfte eller fængsel i indtil 1 år, hvis overtrædelsen er begået forsætligt eller ved grov uagt-

onnur, her uppi í við sparing.

3. stk. Í reglum, sum ásettar verða við heimild í § 4, § 5, § 6, § 10, § 15, 2. stk., § 17, § 23 og § 57, 3. stk. kann ásetast revsing við bót. Somuleiðis kann ásetast, at revsingin kann herðast til hefti ella fongsul upp til 1 ár undir somu umstøðum sum nevndar í 2. stk.

4. stk. Fyri brot, sum gjørd verða av partafeløgum, lutafeløgum ella tílíkum, kann felagnum verða áløgd bót. Er brotið gjørt av kommunu ella kommunalum felagsskapi, kann kommununi ella kommunala felagsskapinum verða áløgd bót.

5. stk. Verður ikki lagt hald á vinning, sum fingin er við broti á hesa lóg ella tær við heimild í lógini ásettu reglur, verður við áseting av bótini, herundir eykabót, serliga at hava í huga støddin á peningaliga vinninginum ella ætlaða peningaliga vinninginum sbr. 2. stk. nr. 2.

6. stk. Fyrningarfreistin fyri revsiábyrgd er 5 ár fyri brot v.m., sum nevnd eru í 1. stk. nr. 1, 2, 3

somhed, og hvis der ved overtrædelsen er

1) voldt skade på miljøet eller fremkaldt fare derfor eller
2) opnået eller tilsigtet en økonomisk fordel for den pågældende selv eller andre, herunder ved besparelser.

Stk. 3. I regler, der udstedes i medfør af § 4, § 5, § 6, § 10, § 15, stk. 2, § 17, § 23 og § 57, stk. 3, kan der fastsættes straf af bøde. Der kan endvidere fastsættes, at straffen kan stige til hæfte eller fængsel i indtil 1 år under tilsvarende omstændigheder, som anført i stk. 2.

Stk. 4. For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, andelsselskaber eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar. Er overtrædelsen begået af en kommune eller et kommunalt fællesskab, kan der pålægges kommunen eller det kommunale fællesskab bødeansvar.

Stk. 5. Sker der ikke konfiskation af udbytte, som er opnået ved en overtrædelse af denne lov eller de i medfør af loven

og 4.

udfærdigede bestemmelser, skal der ved udmåling af bøde, herunder tillægsbøde, tages særligt hensyn til størrelsen af en opnået eller tilsigtet økonomisk fordel, jfr. stk. 2, nr. 2.

Stk. 6. Forældelsesfristen for strafansvaret er 5 år for overtrædelser m.v. som omhandlet i stk. 1, nr. 1, 2, 3 og 4.

§ 80. Málini verða viðgjørd sum løgreglumál. Rættarmeðalini í rættargangslógarinnar kapitlum um at leggja hald á og rannsókn kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

§ 80. Sagerne behandles som politisager. Retsmidlerne i retsplejelovens kapitler om beslagslæggelse og ransagning kan anvendes i samme omfang som i statsadvokatsager.

§ 81. Myndugleikar og persónar, sum útinna uppgávur eftir lógini, eins og hvør, sum annars veitir stuðul til hetta, hevur tagnarskyldu eftir § 152 og 264 b í borgarligu revsilógini.

§ 81. Myndigheder og personer, der udøver opgaver efter loven, samt enhver, der i øvrigt yder bistand hertil, er underkastet tavshedspligt efter borgerlig straffelovs § 152 og § 264 b.

§ 82. Landsstýrið ásetir, nær lógin fær gildi.

§ 82. Landsstyret fastsætter tidspunktet for lovens ikrafttrædelse.

§ 83. Hesar lógarreglur verða settar úr gildi,

§ 83. Følgende lovbestemmelser ophæves, jfr. dog

smb. tó § 84
1) lł. nr. 38 frá 5. juli 1973 um heilsusamtyktir,
2) lł. nr. 40 frá 1. juni 1961 um oyðing av rottu.

2. stk. Landsstýrinum verður heimilað at seta úr gildi § 1, 4. stk. í lóg nr. 95 frá 14. apríl 1893, sum broytt við lł. nr. 22 frá 1. mai 1973.

3. stk. Landsstýrinum verður heimilað at seta úr gildi §§ 9 og 10 í lóg nr.169 frá 18. mai 1937.

4. stk. Uppgávur, sum sambært aðrari lóggávu verða røktar av heilsunevndini, verða lagdar undir kommunustýrið, um ikki annað verður ásett.

§ 84. Reglur, ásettar við heimild í lógunum nevndar í § 83, verða verandi í gildi til nýggjar reglur eru komnar í staðin við heimild í hesi lóg.

2. stk. Avgerðir tiknar eftir teimum reglum, ið nevndar eru í § 83, hava gildi, til tað við heimild í lógini ella reglum ásettum við heimild í

§ 84

1) lł. nr. 38 af 5. juli 1973 om sundhedsvedtægter,
2) lł. nr. 40 af 1. juni 1961 om bekæmpelsen af rotter.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at ophæve § 1, stk. 4 i fiskerilov nr. 95 af 14. april 1893, som ændret ved lagtingslov nr. 22 af 1. maj 1973.

Stk. 3. Landsstyret bemyndiges til at ophæve §§ 9 og 10 i lov nr. 169 af 18. maj 1937.

Stk. 4. Opgaver, der i henhold til anden lovgivning varetages af sundhedskommissionen, overtages af kommunalbestyrelsen, medmindre andet fastsættes.

§ 84. Regler, der er fastsat med hjemmel i de i § 83 nævnte love, forbliver i kraft, indtil de afløses af regler fastsat med hjemmel i denne lov.

Stk. 2. Afgørelser truffet efter de regler, som er nævnt i § 83, bevarer deres gyldighed, indtil der i medfør af loven eller regler udstedt med

lögini verður tikin nýggj avgerð. Brot á slíkar avgerðir verður revsað sambært higartil galdandi reglum.

hjemmel i loven træffes ny afgørelse. Overtrædelse af sådanne afgørelser straffes efter de hidtil gældende regler.

Skjal 13B

Listi yvir fyritøkur, virkir og útbúnaðir, ið koma undir kapittul 5 í umhvørvisverndarlógini.

A. Framleiðsla og tilevning úr jarni, stáli ella metali.

1. Metalstoypivirkir.
2. Fyritøkur og virkir til yvirflatuviðgerð av evnum úr jarni, stáli ella metali.
3. Stálskipasmiðjur og flótidokkir.
4. Maskinverksmiðjur og maskinverkstaðir.*
5. Ilatsverksmiðjur og rørverksmiðjur.
6. Ravmagnstøknligar fyritøkur.*
7. Ravleðuverksmiðjur.

B. Nám og tilevning av steini, koli og tílíkum.

1. Glarullsverksmiðjur og steinullsverksmiðjur.
2. Grótbrot.
3. Sementstoypivirkir og betongblandivirkir.
4. Fyritøkur til framleiðslu av postalíni, glaraðari leirvøru ella leirvørum.*
5. Kolanám.

C. Nám og viðgerð av steinolju, steinoljuúrdráttum, asfalti, náttúrgassi og koli.

1. Virkir til tilgerð av asfalti og virkir til framleiðslu av vegtilfari.
2. Virkir til reinskan ella oyðing av spillolju ella øðrum burturkasti av reinsivirkisúrdráttum.
3. Goymslurúm við flótandi gassi (kolbrintu).*
4. Goymslur við steinolju ella flótandi steinoljuúrdráttum.*

D. Evnafrøðilig framleiðsla v.m.

1. Goymsla við lívrunnum ella ólívrunnum frumevnafrøðiligum evnum.
2. Sápuverksmiðjur, vaskievnisverksmiðjur og reingerðarevnisverksmiðjur.
3. Litverksmiðjur og lakkverksmiðjur.

(*) Sí grein 26, 3. stk.

4. Ljósmyndaíðnaður og ljósmyndastarvsstovur.*
5. Fyritøkur til at lata burtur úr ella pakka evnafrøðilig evni ella úrdráttir, sbr. D. 1-3.
6. Fyritøkur til kroysting og tæðrabrynjing av plastvørum og plastálegging.
7. Verksmiðjur til framleiðslu av skúmplasti og øðrum polymerum tilfari.

E. Tilvirking av planturávørum.

1. Træverjuvirkir.
2. Rotatións-, offset-, silki- og bókprentsmiðjur.*
3. Pappírsvøruverksmiðjur, pappdósverksmiðjur.*
4. Sagverk, virkir til framleiðslu av finérplátum ella fipurplátum, møblaverksmiðjur og maskinsnikkaravirkir.*
5. Gummivøruverksmiðjur.*
6. Klædnablikingarvirkir og klædnalitingarvirkir.
7. Vevstovur, spunavirkir, klædnaverksmiðjur og snørisvirkir.*
8. Reinsarí og vinnuliga rikin vaskarí.
9. Fyritøkur til viðgerð ella tilgerð av fóðurevnum.
10. Heilsølubakarí (her uppi í breyðverksmiðjur).
11. Bryggjarí og sodavatnsverksmiðjur.

F. Tilvirking av rávørum úr djórum.

1. Sláturvirki og kjøtvirki.*
2. Kjøtfóðurverksmiðjur(fyribeiningarstøðir) og beinmjølaverksmiðjur.
3. Garvarí og onnur skinnvirki.
4. Virkir til reinsingar av djórafitievnum.
5. Mjólkarvirkir, fyritøkur til framleiðslu av osti ella ostapulvuri umframt konsumísverksmiðjur og turrmjólkarverksmiðjur.
6. Margarinverksmiðjur.
7. Fyritøkur til framleiðslu av fiskaúrdráttum.*
8. Virkir til turking ella knúsing av skeljum.
9. Fóðurevnisverksmiðjur.
10. Leðurvøruverksmiðjur.

G. Goymsla; varðveitsla ella viðgerð av burturkasti annars.

1. Virkir til goymslu ella varðveitslu av burturkasti, her uppi í tyrvingarstøð, ruskdungar og serligar goymslur til evju ella ilsku, móttøkumiðstøð ella móttøkupláss til oljuburturkast ella evnafrøðiligt burturkast umframt ruskbrennistøðir.
2. Virkir til viðgerð ella tilvirking av burturkasti, her upp í spillvatnsreinsiverk, umskipingarmiðstøðir, knúsivirki, plantuleivdarvirki og bilupphøggingarpláss.

H. Orku- og hitaframleiðsla.

1. Orkuverk og hitaframleiðandi virkir.*
2. Vindmyllur.*

I. Virkir fyri motorakfør og onnur flutningstól.

1. Motorbreytir og prutlbreytir umframt koyritøknilig virkir, afturlatnir venjingarvøllir undantiknir, ið einans verða nýttir til koyrifrálæru.
2. Floghavnir og flogvøllir.
3. Bilhús og pláss til koyriamboð í sambandi við arbeiðstakara- ella bileigarafyritøkur, her uppi í stað (støðlar) hjá bussum. Bjargingarstøðir.*
4. Fyritøkur og virkir til veitingar ella umvælingar av motorakførum - prutl undantikin - tá hesar fyritøkur ella virki fremja yvirflatuviðgerð við liti ella lakki.*

J. Djórahald og goymsla ella viðgerð av húsdjóratøðum.

1. Flogfenaðagarðar.*
2. Felddjóragarðar.*
3. Svínahald.
4. Fiskaaling.

K. Aðrar fyritøkur.

1. Skótvøllir.

Skjal 13C

Liste over virksomheder, anlæg og indretninger, som er omfattet af miljøbeskyttelseslovens kapitel 5.

A: Fremstilling og forarbejdning af jern, stål eller metaller.

1. Metalstøberier.
2. Virksomheder og anlæg for overfladebehandling af emner af jern, stål eller metal.
3. Stålskibsværfter og flydedokke.
4. Maskinfabrikker og maskinværksteder.*
5. Beholderfabrikker og rørfabrikker.
6. Elektrotekniske virksomheder.*
7. Akkumulatorfabrikker.

B. Udvinding og forarbejdning af sten, kul og lignende.

1. Glasuldfabrikker og mineraluldsfabrikker.
2. Stenknuserier.
3. Cementstøberier og betonblanderier.
4. Virksomheder til fabrikation af porcelæn, fajance eller lervarer.*
5. Kulminer.

C. Indvinding og behandling af mineralolie, mineralolieprodukter, asfalt og naturgas.

1. Anlæg for tilberedning af asfalt og anlæg til fremstilling af vejmaterialer.
2. Anlæg for oparbejdning eller destruktion af spildolie eller andet affald af raffinaderiprodukter.
3. Lagre af flydende gas (kulbrinter).*
4. Overjordiske oplag af mineralolie eller flydende mineralolieprodukter.*

D. Kemisk fabrikation m.v.

1. Oplagring af organiske eller uorganiske grundkemikalier.
2. Sæbefabrikker, vaskemiddelfabrikker og rengøringsmiddelfabrikker.
3. Farvefabrikker og lakfabrikker.

(*) Se paragraf 26, stk. 3.

4. Fotografisk industri og fotografiske laboratorier.*
5. Virksomheder for aftapning eller pakning af kemikalier eller produkter, jfr. D.1-3.
6. Virksomheder for presning, ekstrudering, fiberarmering af plastvarer og belægning med plast.
7. Fabrikker til fremstilling af skumplast og andre polymere materialer.

E. Oparbejdning af vegetabilske råvarer.

1. Træimprægneringsanstalter.
2. Rotations-, offset-, silke- og bogtrykkerier.*
3. Papirvarefabrikker, kartonnagefabrikker.*
4. Savværker, anlæg for fremstilling af finérplader eller fiberplader, møbelfabrikker og maskinsnedkerier.*
5. Gummivarefabrikker.*
6. Tekstilblegerier og tekstilfarverier.
7. Væverier, spinderier, tøjfabrikker og rebslagerier.
8. Renserier og erhvervsmæssigt drevne vaskerier.
9. Virksomheder for behandling eller forarbejdning af foderstoffer.
10. Engrosbageriet (herunder brødfabrikker).
11. Bryggerier og mineralvandsfabrikker.

F. Oparbejdning af animalske råvarer.

1. Slagterier og kødvarevirksomheder.*
2. Kødfoderfabrikker (destruktionsanstalter) og benmelsfabrikker.
3. Garverier, pelsberederier.*
4. Anlæg for raffinering af animalske fedtstoffer.
5. Mejerier, virksomheder for fremstilling af ost eller ostepulver samt konsumisfabrikker og tørmælkfabrikker.
6. Margarinefabrikker.
7. Virksomheder for fremstilling af fiskeprodukter.*
8. Anlæg for tørring eller formaling af skaller.
9. Foderstoffabrikker.
10. Lædervarefabrikker.

G. Oplagring, deponering eller behandling af affald iøvrigt.

1. Anlæg for oplagring eller deponering af affald, herunder fyldpladser, lossepladser og specialdepoter til slam eller slagger, modtagestationer eller modtagepladser for olieaffald eller kemikalieaffald samt affaldsforbrændingsanlæg.
2. Anlæg for behandling eller oparbejdning af affald, herunder spildevandsanlæg, omlastningsstationer, formalingsanlæg, komposteringsanlæg og bilophugningspladser.

H. Kraft- og varmeproduktion.

1. Kraftværker og varmeproducerende anlæg.*
2. Vindmøller.*

I. Anlæg for motorkøretøjer og andre transportmidler.

1. Motorbaner og knallertbaner samt køretekniske anlæg bortset fra lukkede øvelsespladser, der udelukkende benyttes til køreundervisning.
2. Lufthavne og flyvepladser.
3. Garageanlæg og pladser til kørende materiel i forbindelse med entreprenør- eller vognmandsvirksomhed, herunder endestationer, terminaler og remiser for busser. Redningsstationer.*
4. Virksomheder og anlæg for service for eller reparation af motordrevne køretøjer - bortset fra knallerter - når disse virksomheder eller anlæg udfører overfladebehandling med farve eller lak.*

J. Dyrehold samt oplagring eller behandling af husdyrgødning.

1. Fjerkræfarme.*
2. Pelsdyrfarme.*
3. Svinehold.
4. Fiskeopdræt.

K. Andre virksomheder.

1. Skydebaner.

Skjal 13D

F N U (Føroya náttúru- og umhvørvisverndarfelag)
Dr. Dahlsg. 15 - FR 100 T ó r s h a v n (Faroe Islands)
Tlf.: 11567* - Telefax: 16176 - Telex: 81382 tormod

08.12.1987.

Jóngerð Purkhús, umhvørvismálaráðharri,

Tinganes,

T ó r s h a v n

LØGTINGSLÓG UM UMHVØRVISVERND

Vit takka fyri senda uppskot til løgtingslóg um umhvørvisvernd við áheitan um at senda okkara viðmerkingar.

Hóast dagfest 25. nov. var uppskotið okkum ikki í hendi fyrr enn 31. nov., so ásetta freistin at svara - 10. des. - tykist okkum sera tepur til eitt so týdningarmikið og fjølbroytt mál. Okkara viðmerkingar verða av somu grund meira almennar.

1. Verandi føroyskar lógir um mál viðgjørd í umhvørvislógini.

Eftir áheitan hevur Føroya kommunufelag latið okkum fingið eitt eintak av sínum viðmerkingingum til uppskotið, og hevur hetta verið okkum til stóra hjálp við viðgerðina. Hetta ikki minst tí kommunufelagið í sínum viðmerkingum kann vísa á verandi lógir sum viðgera fleiri av teimum málum sum nýggja umhvørvislógaruppskotið fevnir um.

Ein spurningur - um umhvørvislógin verður samtykt í tí líki hon er nú - verður tí: Verða tær gomlu "samsvarandi" lógirnar tá strikaðar?

Eftir okkara metan átti rætta mannagongdin her verið, at arbeiðsbólkurin fyrst fann fram á allar tær lógir, lýstar samtyktir v.m., ið umrøða/viðgera somu mál, sum tey umhvørvislógin fevnir um, áðrenn farið var undir at smíða nýggju lógina.

Henda spurningin tykist arbeiðsbólkurin als ikki at hava hugsað um.

Kommunufelagið viðger sjálvandi lógaruppskotið sæð frá einum kommunupolitiskum sjónarmiði, men yvirhøvur eru vit í FNU samd í teimum sjónarmiðum, felagið førir fram í sínum viðmerkingum.

2. Umhvørvisdeildin.

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at skipað verður ein umhvørvisdeild, sum er fyrsti myndugleiki í flestum málum sambært lógini. Deildin skal samstundis virka sum ráðgevi landsstýrisins, hjá øðrum myndugleikum, ja, hjá øllum landsins fbúgvum í málum um umhvørvisvernd. Hon skal somuleiðis geva landsstýrinum tilmæli um ásetan av ymiskum fyriskipanum, kunna seg um dálkingarviðurskifti kring landið og ansa eftir, at umhvørvislógin verður hildin.

Sum gongur fram av lógarorðingini í fleiri greinum, skal, so sum vit skilja hesar orðingar, umhvørvisdeildin í ein stóran mun sjálv góðkenna egnar avgerðir, atgerðir, ráðgeving o. s. fr.

Slíkt ber sjálvandi ikki til í einum landi við demokratiskari stýrisskipan.

Vit hava annars hesar almennu viðmerkingar til "umhvørvisdeildina":

"Umhvørvisdeildin" skal sjálvandi ikki vera ein "deild" (í onkrum). Heitið má tí vera Umhvørviseftirlitið.

Líka sjálvandi skal umhvørviseftirlitið ikki vera partur av Heilsufrøðiligu Starvsstovu, so sum arbeiðsbólkurin skýjtur upp (tvørtur ímóti kann tað koma fyri, at Umhvørviseftirlitið verður at krevja ávísar ábøtur framdar á Starvsstovuni).

Umhvørviseftirlitið skal vera ein sjálvstøðugur stovnur.

3. Umhvørviskærunevndin.

Arbeiðsbólkurin skýjtur upp, at umhvørviskærunevndin verður samansett av einum ávísum tali av limum tilnevndum av landsstýrinum fyri 4 ár í senn og at formaðurin skal vera løgfrøðingur.

Sjálvandi eigur ein umhvørviskærunevnd ikki at verða vald politisk. Kærunevndin eigur at avmynda okkara samfelag so væl tað letur seg gera. Hin vegin skal talið av nevndarlimum sjálvandi ikki vera ov stórt.

Vit loyva okkum at skjóta upp at hesi mynda umhvørviskærunevndina:

Føroya landsstýri	: 1 lim
Kommunurnar	: 1 lim
Heilsuverkið	: 1 lim
Arbeiðara- og fiskimannafeløgini	: 1 lim
Arbeiðsgevara- og reiðarafeløgini	: 1 lim
L I S A	: 1 lim
F N U	: 1 lim
Tilsamans	: 7 limir

Uppskot til skipan o.a.

Limirnir við persónligum tiltakslimum verða valdir fyri 2 ár í senn. Tó fara 3 limir við tiltakslimunum frá á fyrsta ársaðalfundi aftaná stovnan - hinir 4 limirnir við tiltakslimunum á næsta fundi o. s. fr.

Limir og tiltakslimir kunnu verða afturvaldur. Tó eigur limur, ið hevur verið afturvaldur 2 ferðir, ikki at kunna veljast aftur í kærunevndina fyri næstu 2 árini.

Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni. Landsstýrið tilnevnir skrivaran.

4. Tær einskildu lógargreinirnar.

Vit hava savnað saman hópin av táttum, ið vit meta áttu at verið tiknir við í lógini - eitt nú:

- upprudding eftir grind
- asfaltdálking
- dálking frá bilum
- geislavirkin evni
- luktvansar
- parabolantennur o.t.
- o. s. fr.

Hin vegin eru tættir í lógini, ið eftir okkara metan eru upp á seg ov nógv "umrøddir", sum t.d. í sambandi við:

- rottur (§ 5: "ala villar rottur ....."!!)
- "kortlegging"
- "landsstýrið kann tó"
- "landsstýrið verður heimilað"
- "í serligum førum"
- o. s. fr.

Tann eftir okkara áskoðan sera vánaligi og ivingasami málburðurin og villandi orðingin í uppskotinum ger tó, at vit meta okkum ikki før fyri at seta fram haldgóð og endalig broytingaruppskot til tær einskildu greinirnar við tí skotbrái, ið okkum er unist.

5. Samanumtikið.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður sagt: "Arbeiðsbólkurin samdist um at brúka eina av norðurlendsku umhvørvisverndarlógunum í arbeiðnum at gera eina føroyska, og varð danska umhvørvisverndarlógin kosin til hetta endamál".

Hetta tulka vit soleiðis, at arbeiðsbólkurin hevur borið saman lógirnar í hinum norðurlondunum, og er komin til tað úrslit, at tann danska var hon, ið hóskaði best til okkara viðurskifti.

Men harfrá og síðani trælbundið at fylgja/umseta donsku lógina stig fyri stig, so sum arbeiðsbólkurin eyðsæð hevur gjørt, er eftir okkara áskoðan ovboðið! - Og at tað í hinum norðanlondunum (t.d. í Íslandi og Noregi) ikki skulu kunna finnast greinir um umhvøvisviðurskifti, ið hóska betur til okkara viðurskifti enn samsvarandi danskar, nokta vit at góðtaka.

Sagt verður, at fleiri broytingar eru gjørdar (í donsku orðingini?), "ið standast av at føroyska og danska samfelagið eru ólík", og sum dømi verður m.a. drigið fram føroyska vinnulívið. "Føroyski vinnulívslistin", ið er lagdur við lógini sum serskilt skjal, ber í hvussu so er ikki boð um rótføroyskt vinnulív. Okkara fiskavirkir hava fingið heitið: "Fyritøkur til framleiðslu av fiskaúrdráttum" og eru bólkað sum nr 7 undir teignum "Tilvirking av rávørum úr djórum" aftan á slátur- og kjøtvirkir, garvarí, virkir til reinsingar av djórafitievnum og margarinverksmiðjur. Hvar eru grindin og vágirnar, egnigarskúrarnir, súrhoygjbrunnarnir, brunnarnir til seyðavask, fjósini, bjørgini o.s.fr.?

Men arbeiðsbólkurin kann eisini vera tjóðskaparligur við lít tá dálkingarspurningurin verður alment umrøddur. Tá eitur tað knappliga sum t.d. í § 2: ".... dálking av luftini, jørðini, áum, vøtnum ella føroyska sjóøkinum".
Her skal sjálvandi "føroyska" strikast.

Tað vil altíð vera lætt at finnast at einum lógaruppskoti um umhvørvi - ikki minst tí "umhvørvi" í sjálvum sær bæði er eitt nýtt (í dagligari talu) føroyskt orð, og tí vit heilt fram til byrjanina av "SEV- og ruskmálunum" fyri 8 - 10 árum síðan, nærum als ikki hugsaðu um "umhvørvi". Tá var "jørð" mold og mógvur, "luftin" rein og frísk, "ljóðið" brim og fuglasongur og "sjógvurin" bláur og við ørgrynni av fiski!

Men júst tí at her er talan um eitt nýtt serføroyskt málsøki, áttu vit, heldur enn eintáttað at leitað okkum kunnleika um umhvørvisspurningar í strongdum ("stressaðum") og heilt øðrvísi londum sum t.d. Danmark, roynt at hugsað okkum aftur til støðuna undan "SEV- og ruskmálunum", og sett okkum sjálvum spurningin:

> "Hvussu skulu vit sum best við tí tilfeingi, ið er tøkt, basa teimum dálkingarkeldum, ið eru og væntast at koma, so vit kunnu birta vónir í okkara fólk um aftur at kunna liva í einum reinum og óspiltum umhvørvi við einum fjøltáttaðum djóra- og plantulívi"?

Við hesum setningi sum grundarlag skuldu vit so bygt upp nýggju føroysku umhvørvislógina.

NIÐURSTØÐA.

Føroya náttúru- og umhvørvisverndarfelag (F N U) mælir frá at góðkenna uppskotið til "løgtingslóg um umhvørvisvernd" í tí líki, tað liggur fyri í dag

Tórshavn 8. des. 1987.

FNU

Tormóður Dahl
(form.)

11 DEC. 1987

F. L. j. nr. 937-7 / 13

ØSSUR AV STEINUM
Kollafirði.

16. juni 1987

Viðvíkjandi umhvørvislógini.

I sambandi við nevndararbeiði er starvsnevndin biðin um at taka støðu til nakrar spurningar um nýggju lógina.

Lógin verður rættuliga víttfevnandi og kemur eisini inn á øki, sum nú eru í øðrum lógum - natúrfriðingarlógini, lógini um heilsusamtyktir, fuglaveiðulógini, rottulógini o.ø.

Starvsnevndin heldur at teir partar av hesum lógum, sum fevna um umhvørvisvernd, eiga at verða tiknir uppí umhvørvislógina, men at lógirnar annars eiga av verða varðveittar.

Umhvørvislógin.

Umhvørvislógin skal verja alt umhvørvi móti teimum eitringum, sum koma frá virkjum, skipum, landbúnaði og húsarhaldum. Hetta er ein lóg, sum skal verja livandi verur (eisini menniskju) móti tí eitran, sum kemur frá okkara framleiðslu í orðsins víðastu merking.

Natúrfriðingarlógin.

Skilt eigur at verða ímillum natúrfriðingarlógina og umhvørvislógina.

Natúrfriðingarlógin er um tað, sum vit halda er vakurt, uttan fyri bygda øki. Starvsnevndin skjýtur upp, at natúrfriðingarlógin verður broytt soleiðis, at bygdirnar ella bygda øki ikki eru friðað eftir natúrfriðingarlógini. Hetta kann verða gjørt á tann hátt, at eitt øki verður tekna inn á eitt kort, sum sýnir hvar bygdin er. §2, 2. stk. í natúrfriðingarlógini verður tikið burtur, tí hetta ger at natúrfriðingarnevndin verður tann veruligi byggimyndugleikin.

Friðing kann framvegis verða gjørd í bygdum øki, men hetta eigur at verða býarskipanarlógini ikki eftir natúrfriðingarlógini. Tá býarskipan verður gjørd, eigur at verða ansað eftir, at ikki verður bygt ov nær vøtnum, ám ella vakrari strond.

Um tað í bygdum øki eru støð, sum hava serligt virði, eiga hesi øki at verða nevnd, og ásetingar gjørdar um hvussu stórt øki er friðað uttanum, um eingin býarplanur er.

Skjal 13F

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um umhvørvisvernd.

Tørvurin á eini føroyskari umhvørvisverndarlóg hevur verið støðugt vaksandi og nógv umrøddur seinastu árini. Landsstýrið setti tí við ársbyrjan 1986 ein arbeiðsbólk at gera uppskot til eina slíka.

I arbeiðsbólkinum komu at sita:

Jórun í Dali, arkitektur, fyri Føroya náttúru- og umhvørvisverndarfelag,
Marjun Hanussardóttir, deildarleiðari, seinni
Asmundur Guðjónsson, fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna,
Øssur av Steinum, løgtingsmaður, fyri Føroya Kommunufelag,
Tóri í Hoyvík, býargartnari, fyri Tórshavnar kommunu,
Justinus Olsen, djóralækni,
Mogens Nepper Christensen, fúti, seinni
Finn Ougaard, varafúti, fyri Føroya Landfúta og
Hegni Debes Joensen, landslækni, ið varð valdur til formann

Sum skrivara hjá bólkinum setti landsstýrið Trygva Jacobsen, advokat.

Fyrsti fundur hjá arbeiðsbólkinum var 12. mars 1986 og hevur bólkurin, nú arbeiðið er lokið, hildið tilsamans 35 fundir.

Arbeiðsbólkurin samdist um at brúka eina av norðurlendsku umhvørvisverndarlógunum sum grundarlag í arbeiðnum at gera eina føroyska, og varð danska umhvørvisverndarlógin kosin til hetta endamál.

Nógvar broytingar eru í tekstinum í mun til donsku lógina. Til dømis eru um leið helmingurin av greinunum í donsku lógini heilt ella lutvíst strikaðar í uppskotinum.

I aðrar mátar eru fleiri broytingar gjørdar, ið standast av, at føroyska og danska samfelagið eru ólík, tá ið tað snýr seg um eitt nú fólkatal, kommunuskipan, jarðfrøðislig viðurskifti, slag av vinnulívi og umhvørvi.

Uppskotið er ein heimildar- og rammulóg, ið er soleiðis tillagað, at landsstýrið kann áseta reglur um burturkast, djórahald og onnur viðurskifti, tá ið hetta er neyðugt til fyribyrgingar og basing av óheilsufrøðiligum viðurskiftum ella tíðandi ampum fyri umhvørvið. Somuleiðis verður landsstýrinum heimilað til fyribyrging av dálking at áseta reglur eitt nú fyri dálking frá virkjum, reinsivirkjum, ruskplássum, vandamiklum tilbúningum v.m. Landsstýrið kann sambært uppskotinum gera ásetingar um krøv um dygd á yvirflatuvatni, luft, jørð, strondum og sjógvi.

Uppskotið ber í sær, at ein umhvørvisdeild verður skipað sum ein deild á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Deildin tekur avgerð sum fyrsti myndugleikin í flestu málum sambært hesa lóg. Hon skal virka sum ráðgevi landsstýrisins og hjá øðrum myndugleikum viðvíkjandi spurningum um umhvørvisvernd. Deildin skal geva landsstýrinum tilmæli um ásetan av ymiskum fyriskipanum við heimild í lógini. Somuleiðis skal deildin kunna seg um dálkingarviðurskiftini kring landið og verða ansin um framkomu av nýggjum dálkingarkeldum. Eisini skal umhvørvisdeildin ansa eftir, at lógin verður hildin, at avgerðir um boð ella forboð verða lýddar og at treytir, ásettar í sambandi við góðkenningar, verða hildnar.

Kommunurnar skulu sambært uppskotinum antin sjálvar ella saman við umhvørvisdeildini gera ætlanir fyri, hvussu frálopsvatn skal fáast burtur, her uppi í reglur viðv. reinsiverkum v.m. I lógaruppskotinum eru reglur um, hvussu kortlegging og planlegging verður framd við atliti til dálkingarkeldur. Hetta arbeiði skal gerast av komm-

unalu myndugleikunum saman við umhvørvisdeildini.

Avgerðir, ið kommunurnar taka við heimild í lógini, kunnu kærast til umhvørvisdeildina.

I uppskotinum er ásett, at ein umhvørviskærunevnd verður sett á stovn sum kærustovnur. Til hesa nevnd kunnu kærast tær avgerðir, ið umhvørvisdeildin tekur avgerð um sum fyrsti myndugleiki.

Tá ið lógin er samtykt eiga beinanvegin reglur at verða gjørdar viðvíkjandi góðkenningarskipanini við heimild í grein 33, um burturkast, djórahald, skaðadjór, skaðaplantur v.m. við heimild í grein 4 til 6 og um mál viðv. spillvatni við heimild í grein 17. Hetta er ein fyritreytin fyri, at lógin kann fara at virka eftir ætlan.

Umráðandi er, at umhvørvisdeildin er mannað sama dag, sum lógin verður lýst at koma í gildi. Tá ið umhvørvisdeildin verður sett á stovn má verða havt í huga, hvussu deildin skal mannast umframt høllisspurningurin og útbúnaður. Mett verður, at 6 - 8 fólk skulu starvast á umhvørvisdeildini í fyrsta umfari. Av hesum eigur ein at vera løgfrøðingur, ein lívfrøðingur og ein sivilverkfrøðingur. Harumframt 2 - 3 teknikarar og 1 - 2 skrivarar.

Umhvørvisdeildin er ætlað, tá ið hugsað verður um virkisøkið hjá stovnúnum, at hava eitt neyvt samstarv við landsverkfrøðingsstovnin og arbeiðseftirlitið við serligum atliti til kortleggingararbeiðið og ávísar mátingar av dálking.

Lógin eigur, eini 2 - 3 ár eftir, at hon er sett í gildi, at verða endurskoðað við atliti til broytingar í mun til tær royndir, ið eru vunnar hetta tíðarskeið.

Arbeiðsbólkurin hevði 14. - 16.11.87 eftir avtalu við landsstýrið 4 fundir við tvey umboð frá danska umhvørvisstýrinum, Jørgen Bierring, skrivstovustjóra og Aase Kougshede. Uppskotið til føroyska lóg um umhvørvisvernd var saman við fylgisskjali og viðmerkingum gjøgnumgingið saman við nevndu umboðum.

Viðmerkingar til tey einsteku kapittlini.

1. Kapittul

1. kapittul greiðir í almennum vendingum frá, hvat endamál lógin hevur, og hvat hon umfatar.

Endamálið er at fyribyrgja og minka um alt slag av dálking, uttan mun til, hvar hon kemur fyri. Lógin skal sostatt nýtast til at tryggja eginleikar í náttúruni, sum hava týdning fyri fólk og náttúruna sjálva. Harumframt skal lógin nýtast til at fáa til vega neyðugar kanningar, sum skulu verða grundarlag undir fyrisitingini av lógini.

I hesi lóg kann dálking vera:
- ferningur av føstum, flótandi ella luftvorðnum evnum til luft, jørð, vatn ella sjógv

- óljóð og ristingar

- ljós og onnur geisling

- hitaávirkan.

Sum dálking er eisini at skilja alt, sum kann elva til, at áður elvd dálking ferir við sær øktan skaða ella ampa.

I sjálvum lógartekstinum er eingin allýsing gjørd av hugtakinum dálking av teirri orsøk, at dálking í framtíðini eisini kann koma at fevna um dálkingarfyribrygdi, vit ikki kenna til í dag. Men í viðmerkingunum er tó allýst dálking í dagsins merking.

Lógin fevnir um alt virksemi, sum kann elva dálking.

Hetta setir ávísar treytir til tey, sum ætla sær undir virksemi, sum nevnt er omanfyri. Tey hava skyldu at bera so í bandi, at virksemi dálkar sum minst, at staðið er valt á skynsaman hátt v.m. Fyri flestu virki eru krøvini meira ítøkiliga lýst í kap. 5.

Lógin byggir á tað grundsjónarmið, at persónar ella virki ið dálka, skulu gjalda fyri tey tiltøk ímóti dálking, ið eru neyðug.

2. Kapittul

2. kapittul fevnir um vanligar reglur og heilsufrøðiligar staðfestingar, um rottutýning og um heimildirnar hjá Føroya Landsstýri at gera reglugerðir um dálking frá virkjum, um brennievni og maskinur, um vandamikil evnir og vandamiklan flutning, og eisini um innflutning av ivasomum evnum, um havna- og vegagerð, óljóð o. s. fr.

Tær í 2. kapitli nevndu reglur og heilsufrøðiligu staðfestingar skulu avloysa núverandi heilsusamtyktirnar. Ein bági við standard-heilsusamtyktunum er, at tulkingin av teimum er misjøvn frá kommunu til kommunu.

§§ 4 og 6 fevna um nýggjar heilsuligar meginreglur, sum heimila Føroya Landsstýri at gera reglugerðir, ið eru eins fyri alt landið. Aðrir partar av heilsusamtyktini koma undir aðra lóggávu, t.d. matverulógina.

Lógin fer át geva Føroya Landsstýri heimild at geva umhvørvisdeilini víðkaðar møguleikar at virka fyri at fremja fyribyrgjandi og bráfengis tiltøk móti óheilsusomum viðurskiftum. Eisini verður heimilað at áseta markvirðir.

Dentur verður lagdur á, at lógin eisini skal fevna um skaðaplantur, ið kunnu flyta plantusjúkur til landið.

3. Kapittul

Hesin kapittul snýr seg um vatnveitingaráhugamál, her uppi í verjuskir, boð og forboð í sambandi við slík. Tá ið umhvørvisdeildin gevur loyvi til, at eitt vatnveitingarvirki tekur vatn frá áum, løkum, keldum ella vøtnum, kann verða skipað fyri einum verndarøki rundanum virkið, har tað ikki er loyvt at reka vinnulívsvirki, stovnar, kampingpláss ella tílíkt, ið kann dálka vatnveitingarøkið.

4. Kapittul

Hesin kapittul snýr seg um vernd av omanávatni. I hesi lóg er omanávatn, vatn í løkum, áum, vøtnum og føroyskum sjóøkið. Sum

heild er ikki loyvt at dálka hetta ella goyma dálkandi evni nærhendis.

Landsstýrið kann geva undantaksloyvi hesum viðvíkjandi. Restin av kapitlinum snýr seg um, at kommunum verður álagt at gera eina etlan fyri, hvussu frálopsvatnið skal fáast burtur, her uppi í reglur viðvíkjandi privatum reinsiverkum, útreiðslum, viðgerð og rakstri av almennum og felagsprivatum reinsiverkum, ognartøku o.ø.

5. Kapittul

Hesin kapittul verður mettur sum sera týdningarmikil í lógini.

Góðkenningarmyndugleiki er umhvørvisdeildin, sum eisini umsitur og skipar fyri eftirlitinum.

Grundreglan í góðkenningarskipanini er, at ávís serliga dálkandi virki o.t. skulu hava eina góðkenning, áðrenn farið verður undir gerð, broyting ella víðkan av slíkum.

Hjálagt lógini er sum fylgiskjal ein listi. Hesin listi fevnir um virksemi, virki, útbúnað og innrettingar, ið koma inn undir umroddu góðkenningarskipan. Listin er gjørdur við atliti til føroysk viðurskifti.

Lógin tilskilar, at landsstýrið skal áseta reglur um, at verandi fyritøkur, virkir og útbúnaðir, ið nevnd eru í fylgiskjalinum, skulu søkja um góðkenning innan eina nærri ásetta freist.

6. Kapittul

Kapittulin lýsir umhvørvisdeildina og hennara uppgávur mótvegis landsstýrinum og øðrum myndugleikum.

7. Kapittul

Umhvørvisdeildin hevur eftirlitið við, at lógin verður hildin. Føroya Landsstýri kann áleggja øðrum stovnum at luttaka í eftirlitinum.

5. Kapittul
Hesin kapittul verður mettur sum sera týdningarmikil í lógini.

Góðkenningarmyndugleiki er umhvørvisdeildin, sum eisini umsitur og skipar fyri eftirlitinum.

Grundreglan í góðkenningarskipanini er, at ávís serliga dálkandi virki o.t. skulu hava eina góðkenning, áðrenn farið verður undir gerð, broyting ella víðkan av slíkum.

Hjálagt lógini er sum fylgiskjal ein listi. Hesin listi fevnir um virksemi, virki, útbúnað og innrættingar, ið koma inn undir umrøddu góðkenningarskipan. Listin er gjørdu við atliti til føroysk viðurskifti.

Lógin tilskilar, at landsstýrið skal áseta reglur um, at verandi fyritøkur, virkir og útbúnaðir, ið nevnd eru í fylgiskjalinum, skulu søkja um góðkenning innan eina nærri ásetta freist.

6. Kapittul
Kapittulin lýsir umhvørvisdeildina og hennara uppgávur mótvegis landsstýrinum og øðrum myndugleikum.

7. Kapittul
Umhvørvisdeildin hevur eftirlitið við, at lógin verður hildin. Føroya Landsstýri kann áleggja øðrum stovnum at luttaka í eftirlitinum.

Eftirlitið hevur atgongd til neyðugar upplýsingar. Upplýsingarskyldu hevur tann, ið ábyrgdina hevur. Avvarðandi kann verða álagt at senda royndir til kanningar.

Føra rakstrartrupulleikar ella annað við sær týðandi dálking ella vanda fyri slíkari, skal tann, ið ábyrgdina hevur, beinanvegin geva eftirlitsmyndugleikunum boð.

8. Kapittul
Kapittulin snýr seg um løggilding av privatum starvsstovum.

9. Kapittul
Hesin kapittul snýr seg um kortlegging av dálkingarstøðuni í Føroyum, sum hon verður framd av umhvørvisdeildini í samstarvi við kommunalu myndugleikarnar.
Kortleggingin skal nýtast sum grundarlag undir planlegging — bæði á lands- og kommunustigi. Planleggingin skal umfata dygdina á øllum viðkomandi recipi-

entum umframt burturkast.

Reglurnar um burturkast fevna um alt slag av burturkasti, eisini spillolju, kemikaliir, sjúkrahúsburturkast og tílíkt.

10. Kapittul
Sum áður nevnt verður á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni skipað ein umhvørvisdeild.

Í hesum kapittuli verður ásett, hvussu farast skal fram, tá umhvørvisdeildin tekur sínar avgerðir.

Ásett verður:

at vanliga skal fráboðast skrivliga til tann ella tey, sum varða av, um avgerðir deildarinnar.

at avgerðirnar samstundis verða fráboðaðar landslæknanum, øðrum avvarandi myndugleikum, privatpersónum, sum mugu ætlast at hava einstaklinga, týðandi áhuga fyri avgerðini og feløgum, sum hava kærurætt.

at fráboðanin skal tilskila tær meginætlanir, ið hava ligið til grund fyri avgerðini, til hvønn myndugleika kærast kann til og kærufreistina.

11. Kapittul
Hesin kapittul ásetur tær vanliga reglurnar um kæru, her uppi í kærufreistina og týdning hennara.

12. Kapittul
Hesin kapittul snýr seg um kæru av avgerð kommununar til umhvørvisdeildina, sum hevur endaligu avgerðina.

13. Kapittul
Settur verður á stovn nýggjur kærustovnur — umhvørviskærunevndin.

Ásett verður:
— hvørjar avgerðir kunnu kærast til umhvørviskærunevndina,
— hvør kann kæra til nevndina,
— hvussu nevndin er skipað, og hvussu avgerðirnar verða tiknar.

14. Kapittul
Í hesum kapitli eru ásettar revsireglur, at landsstýrið ásetur, nær lógin fær gildi, og hvørjar lógarreglur verða settar úr gildi beinanvegin ella seinni.

Skjal 13 G
Skjal 46.3

FNU (Føroya Náttúru- og umhvørvisverndarfelag)
Dr. Dahlsg. 15 - FR-100 Tórshavn (Faroe Islands)
Tlf.: 11567* - Telefax: 16176 - Telex: 81382 tormod

08.12.1987.

Jóngerð Purkhús, umhvørvismálaráðharri,
Tinganes,
T ó r s h a v n

Løgtingslóg um umhvørvisvernd

Vit takka fyri senda uppskot til løgtingslóg um umhvørvisvernd við áheitan um at senda okkara viðmerkingar.

Hóast dagfest 25. nov. var uppskotið okkum ikki í hendi fyrr enn 31. nov., so ásetta freistin at svara — 10. des. — tykist okkum sera tepur til eitt so týdningarmikið og fjølbroytt mál. Okkara viðmerkingar verða av somu grund meira almennar.

1. Verandi føroyskar lógir um mál viðgjørd í umhvørvislógini.
Eftir áheitan hevur Føroya Kommunufelag latið okkum fingið eitt eintak av sínum viðmerkingum til uppskotið, og hevur hetta verið okkum til stóra hjálp til viðgerðina. Hetta ikki minst tí kommunufelagið í sínum viðmerkingum kann vísa á verandi lógir sum viðgera fleiri av teimum málum sum nýggja umhvørvislógaruppskotið fevnir um.
Ein spurningur — um umhvørvislógin verður samtykt í tí líki hon er nú — verður tí: Verða tær gomlu »samsvarandi« lógirnar tá strikaðar?
Eftir okkara metan átti rætta mannagongdin her verið, at arbeiðsbólkurin fyrst fann fram á allar tær lógir, lýstar samtyktir v.m., ið umrøða/viðgera somu mál, sum tey umhvørvislógin fevnir um, áðrenn farið varð undir at smíða nýggju lógina.

Henda spurningin tykist arbeiðsbólkurin als ikki at hava hugsað um.

Henda spurningin tykist arbeiðsbólkurin als ikki at hava hugsað um.

Kommunufelagið viðger sjálvandi lógaruppskotið sæð frá einum kommunupolitiskum sjónarmiði, men yvirhøvur eru vit í FNU samd í teimum sjónarmiðum, felagið førir fram í sínum viðmerkingum.

2. Umhvørvisdeildin.

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at skipað verður ein umhvørvisdeild, sum er fyrsti myndugleiki í flestum málum sambært lógini. Deildin skal samstundis virka sum ráðgevi landsstýrisins, hjá øðrum myndugleikum, ja, hjá øllum landsins íbúgvum í málum um umhvørvisvernd. Hon skal somuleiðis geva landsstýrinum tilmæli um ásetan av ymiskum fyriskipanum, kunna seg um dálkingarviðurskifti kring landið og ansa eftir, at umhvørvislógin verður hildin.

Sum gongur fram av lógarorðingini í fleiri greinum, skal, so sum vit skilja hesar orðingar, umhvørvisdeildin í ein stóran mun sjálv góðkenna egnar avgerðir, atgerðir, ráðgeving o.s.fr.

Slíkt ber sjálvandi ikki til í einum landi við demokratiskari stýrisskipan.

Vit hava annars hesar almennu viðmerkingar til »umhvørvisdeildina«:

»Umhvørvisdeildin« skal sjálvandi ikki vera ein »deild« (í onkrum). Heitið má tí vera Umhvørviseftirlitið.

Líka sjálvandi skal umhvørviseftirlitið ikki vera partur av Heilsufrøðiligu Starvsstovu, so sum arbeiðsbólkurin skjýtur upp (tvørtur ímóti kann tað koma fyri, at Umhvørviseftirlitið verður at krevja ávísar ábøtur framdar á Starvsstovuni).

Umhvørviseftirlitið skal vera ein sjálvstøðugur stovnur.

3. Umhvørviskærunevndin.

Arbeiðskærunevndin.

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at umhvørviskærunevndin verður samansett av einum ávísum tali av limum tilnevndum av landsstýrinum fyri 4 ár í senn og at formaðurin skal vera løgfrøðingur.

Sjálvandi eigur ein umhvørviskærunevnd ikki at verða vald politisk. Kærunevndin eigur at avmynda okkara samfelag so væl tað letur seg gera. Hinvegin skal talið av nevndarlimum sjálvandi ikki vera ov stórt.

Vit loyva okkum at skjóta upp at hesi mynda umhvørviskærunevndina:

Føroya landsstýri .....:1 lim
Kommunurnar .....:1 lim
Heilsuverkið .....:1 lim
Arbeiðara- og fiskimannafeløgini .....:1 lim
Arbeiðsgevara- og reiðarafeløgini .....:1 lim
LISA .....:1 lim
FNU .....:1 lim
Tilsamans .....:7 limir

Uppskot til skipan o.a.

Limirnir við persónligum tiltakslimum verða valdir fyri 2 ár í senn. Tó fara 3 limir við tiltakslimunum frá á fyrsta ársaðalfundi aftaná stovnan — hinir 4 limirnir við tiltakslimunum á næsta fundi o.s.fr.

Limir og tiltakslimir kunnu verða afturvaldur. Tó eigur limur, ið hevur verið afturvaldur 2 ferðir, ikki at kunna veljast aftur í kærunevndina fyri næstu 2 árini.

Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni. Landsstýrið tilnevnir skrivaran.

4. Tær einskildu lógargreinirnar.

Vit hava savnað saman hópin av táttum, ið vit meta áttu at verið tiknir við í lógini — eitt nú:

— upprudding eftir grind
— asfaltdálking
— dálking frá bilum
— geislavirkin evni
— luktvansar
— parabolantennur o.t.
— o.s.fr.

Hin vegin eru tættir í lógini, ið eftir okkara metan eru upp á seg ov nógv »umrøddir«, sum t.d. í sambandi við:

-rottur (§5: »ala villar rottur...«!!)
— »kortlegging«
— »landsstýrið kann tó«
— »landsstýrið verður heimilað«
— »í serligum førum«
— o.s.fr.

Tann eftir okkara áskoðan sera vánaligi og ivingarsami málburðurin og villandi orðingin í uppskotinum ger tó, at vit meta okkum ikki før fyri at seta fram haldgóð og endalig broytingaruppskot til tær einskildu greinirnar við tí skotbrái, ið okkum er unist.

5. Samanumtikið.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður sagt: »Arbeiðsbólkurin samdist um at brúka eina av norðurlendsku umhvørvisverndarlógunum í arbeiðnum at gera eina føroyska, og varð danska umhvørvisverndarlógin kosin til hetta endamál«.

Hetta tulka vit soleiðis, at arbeiðsbólkurin hevur borið saman lógirnar í hinum norðurlondum, og er komin til tað úrslit, at tann danska var hon, ið hóskaði best til okkara viðurskifti.

Men harfrá og síðani trælbundið at fylgja/umseta donsku lógina stig fyri stig, so sum arbeiðsbólkurin eyðsæð hevur gjørt, er eftir okkara áskoðan ovboðið!
— Og at tað í hinum norðanlondunum (t.d. í Íslandi og Noregi) ikki skulu kunna finnast greinir um umhvørvisviðurskifti, ið hóska betur til okkara viðurskifti enn samsvarandi danskar, nokta vit at góðtaka.

Sagt verður, at fleiri broytingar eru gjørdar (í donsku orðingini?), »ið standast av at føroyska og danska samfelagið eru ólík«, og sum dømi verður m.a. drigið fram føroyska vinnulívið. »Føroyski vinnulívslistin«, ið er lagdur við lógini sum serskilt skjal, ber í hvussu so er ikki boð um rótføroyskt vinnulív. Okkara fiskavirkir hava fingið heitið: »Fyritøkur til framleiðslu av fiskaúrdráttum« og eru bólkað sum nr. 7 undir teignum »Tilvirking av rávørum úr djórum« aftan á slátur- og kjøtvirkir, garvarí, virkir til reinsingar djórafitievnum og margarinverksmiðjur. Hvar er grindin og vágirnar, egningarskúrarnir, súrhoyggjbrunnarnir, brunnarnir til seyðavask, fjósini, bjørgini o.s.fr.?

Men arbeiðsbólkurin kann eisini vera tjóðskaparligur við lít, tá dálkingarspurningurin verður alment umrøddur. Tá eitur tað knappliga sum t.d. í § 2: »....dálking av luftini, jørðini, áum, vøtnum ella føroyska sjóøkinum«. Her skal sjálvandi »føroyska« strikast.

Tað vil altíð vera lætt at finnast at einum lógaruppskoti um umhvørvi — ikki minst tí »umhvørvi« í sjálvum sær bæði er eitt nýtt (í dagligari talu) føroyskt orð, og tí vit heilt fram til byrjanina av »SEV- og ruskmálunum« fyri 8 - 10 árum síðan, nærum als ikki hugsaðu um »umhvørvi«. Tá var »jørð« mold og mógvur, »luftin« rein og frísk, »ljóðið« brim og fuglasongur og »sjógvurin« bláur og við ørgrynni av fiski!

Men júst tí at her er talan um eitt nýtt serføroyskt málsøki, áttu vit, heldur enn eintáttað at leitað okkum kunnleika um umhvørvisspurningar í strongdum (stressaðum«) og heilt øðrvísi londum sum t.d. Danmark, roynt at hugsað okkum aftur til støðuna undan »SEV- og ruskmálunum«, og sett okkum sjálvum spurningin:

»Hvussu skulu vit sum best við tí tilfeingi, ið er tøkt, basa teimum dálkingarkeldum, ið eru og væntast at koma, so vit kunnu birta vónir í okkara fólk um aftur at kunna liva í einum reinum og óspiltum umhvørvi við einum fjøltáttaðum djóra- og plantulívi?«

Við hesum setningi sum grundarlagi skuldu vit so bygt upp nýggju føroysku umhvørvislógina.

NIÐURSTØÐA

Føroya náttúru- og umhvørvisverndarfelag, (FNU) mælir frá at góðkenna uppskotið til »løgtingslóg um umhvørvisvernd« í tí líki, tað liggur fyri í dag

Tórshavn 8. des. 1987

FNU Tormóður Dahl *(form.)* 11. DEC. 1987

F.L. j.nr. 937-2-1[19]

FØROYA KOMMUNUFELAG

P.O. Boks 73
3850
Føroyar (Faroe Islands)
Tlf. (042) 47600

Skjal 13 H.
Glyvrar

Dato:
09/12-87

Føroya Landstýri

Viðv.: Umhvørvislógini
Í brævi dagf. 25. nov. 1987 hevur felagið fingið uppskotið um umhvørvislóg sent til ummælis.

Felagið hevur gjørt sínar viðmerkingar, og verða tær hervið sendar landsstýrinum.

Felagsins vegna

Jens M. Dalsgaard, skr.

11. DEC. 1987

F.L. j.nr. 937-2-1[18]

Umhvørvislógin viðmerkingar 09/12-87

Viðvíkjandi umhvørvislógini.

Almennar viðmerkingar.

Eingin ivi er um, at tað er tørvur á eini føroyskari umhvørvislóg, sum tekur teir tættir upp viðvíkjandi dálking, har ongar ásetingar eru í dag.

Hinvegin er ein stórur partur, sum lógaruppskotið tekur upp, longu nú reguleraður við lógum. Tað eru lógir um:

— Vatnveiting:
Lov nr. 63 fra 1. april 1909 for Færøerne om vandledninger. (Lógin gevur heimild at gera tiltøk, sum verja vatn móti dálking og ognartøku til vatnleiðingar).

— Frárenning:
Lov nr. 169 fra 18. maj 1937 for Færøerne om benyttelse af indsøer og vandløb. (Lógin ger ásetingar um frárenning).

Umframt eru ásetingar um hesi viðurskifti í Heilsusamtyktunum.

Endaliga skulu hesi viðurskifti eisini verða lýst, tá ein býarskipan/byggisamtykt verður gjørd. Býarskipanarlógin §3, 2. petti, 3 hevur ásetingar um veitingar av ymsum slag. Í uppskotinum verður víst meira til eina ikki verandi landsplanlegging enn til verandi býarskipanarlóg, ið er einasta planleggingaramboð, sum vit hava.

Endamálið við lógini er fyri ein part at savna alla umhvørvislóggávu í eina lóg, umframt at fáa gjørt ein vælvirkandi stovn, ið skal taka sær av hesum viðurskiftum.

Talan er um eina rammulóg, har landsstýrið og umhvørvisdeildin skulu gera nærri ásetingar. Í slíkum førum eru viðmerkingarnar til lógina av avgerandi týdningi, men tíverri eru ikki aðrar viðmerkingar enn eitt yvirlit, sum sigur nakað um, hvat tey einstøku kapitlini eru um, og tað er als ikki nóg mikið. Eisini skulu uppskot um reglugerðir fylgja við uppskotinum, tá tað verður lagt fram.

Greinarnar eru leyst orðaðar uttan viðmerkingar til nakra einstaka grein. Serstakliga leysar orðingar eru um, hvørjar heimildir Heilsufrøðiliga Starvsstovan skal hava í sínum virki fyri kommununum. Tað kann væl vera, at nevndin veit,

hvat teir hugsaðu um, tá teir gjørdu uppskotið, men hvør veit tað um 5 ella 10 ár?

Í viðmerkingunum verður einki sagt um, undir hvørjum umstøðum umhvørvisdeildin kann grípa inn yvirfyri kommununum.

Umframt kemur umhvørvisdeildin at virka bæði sum ráðgevingarstovnur, góðkenningarstovnur, útinnandi stovnur, samstarvsstovnur og samráðingarstovnur yvirfyri kommununum. Í fleiri førum kemur stovnurin at góðkenna sína egnu avgerðir, og tað stríðir ímóti øllum umsitingarligum grundreglum.

Tað at umhvørvisdeildin verður sett í eina tílíka støðu, at hon beinleiðis kann seta eina kommunu undir umsiting (t.v.s gera arbeiðir fyri kommununnar rokning), ger at bygdarráðslimirnir missa virðingina fyri arbeiði sínum og koma at kenna minni skyldu fyri tí, teir eru valdir til. Hetta er tann vanliga misfatanin umaftur, nevniliga at aðrir myndugleikar kunnu gera tað, ið við lóg er álagt kommununum at gera — so er ikki. Um ein kommuna ikki ger tað, sum við lóg er álagt henni, kann landsstýrið, sum er kommunalt eftirlit, við §42 í kommunulógini noyða bygdaráðsslimirnir at fáa tað gjørt, ið gerast skal — aðrar leiðir eru ikki umsitingarliga gongdar.

Umhvørvisligar ásetingar eiga at verða gjørdar í býarskipanini, ið er eitt amboð, kommunurnar brúka til eina heildarætlan. Býarskipanin skal umframt umhvørvisligar ásetingar eisini hava ásetingar um náttúrfriðing, friðing av fornminnum. Hon skal vísa, hvar størri tiltøk sum vegir og havnagerðir verða framdar. Og hóast tað ongantíð er brúkt, so kann landsstýrið eisini krevja, at ætlanir fyri frárenning (kloakkir) og vatnveiting eisini verða gjørdar.

Í lógini verður eisini víst til »landsplanlegging«, men veruleikin er, at vit onga landsplanlegging hava og heldur onga lóg hava á hesum øki, og tí verður tað torført at fáa lógini at virka tann vegin.

Til kap. V, sum er um serliga vandamikil virkir, hava vit ikki gjørt nógvar viðmerkingar, tí endamálið við okkara viðmerkingum er at fáa samskipa umhvørvislógina við býarskipanarlógina, ið er tað kommunurnar skulu planleggja út frá.

Kap. V er um góðkenning av virkjum. Tílík góðkenning eigur einans at vera um virksemi á virkinum, og eigur ikki at verða brúkt til at taka byggimyndugleikan frá kommunum. Um so er at virksemi í einum verandi virki verður broytt, so er tað eisini ein skylda hjá kommununi, at ansa eftir at virkið verður góðkent.

Hinvegin kann tað undir kap. V koma fyri, at tiltøk skulu verða gjørd móti virkj-

um, har vandi er fyri fólki. Men tá er talan um óvanligar umstøður, ið heldur fella undir eldverjulógina.

Viðmerkingar til einstakar lógargreinar.
§ 3. Tann, ið ætlar at byrja virki, skal velja eitt slíkt stað at útinna hetta, at vandin fyri dálking verður avmarkaður so væl sum til ber.

Viðmerk.: Her eigur at verða farið fram eftir byggisamtyktini á staðnum og ikki umvent, at byggisamtyktin verður gjørd útfrá hvar ídnaður verður lagdur. Byggisamtyktin ella býarskipanin skal verða gjørd soleiðis, at loyvir til dálkandi ídnað eisini kunnu verða givin eftir samtyktini.

Hetta samsvarar heldur ikki við greinarnar seinni í lógini, har tað verður gingið útfrá, at umhvørvis viðurskiftini skulu samsvara við fyriliggjandi ætlanir. Her verður hugsað um §§ 53, 54, 55 og 58.

§ 11. Landsstýrið kann áseta reglur um, at ætlanir um vega- og havnagerðir skulu leggjast fyri landsstýrið, áðrenn farast kann undir arbeiðið.

Viðmerk.: Her skal standa, at tað longu er ásett í býarskipanarlógini, at størri tiltøk skulu leggjast alment fram í býarskipan og byggisamtykt. Tað vil siga, at landsstýrið longu hevur heimild til at krevja, at kommunurnar gera og leggja hetta fram. Fyri at fáa býarskipanarlógina at virka, átti heldur at verði víst til býarskipan í hesi lógini. Ein býarskipan skal verða góðkend av umhvørvisdeildini, tá tað snýr seg um viðurskifti, sum umhvørvislógin fevnir um.

§ 12. Umhvørvisdeildin kann fyri vatnveitingarvirki, ið tekur vatn frá áum, løkum, keldum og fjallavøtnum, skipa eitt verndarøki, har ikki er loyvt at reka vinnulívsvirki ella tílíkt ella kunnu verða goymslur fyri evni, ið kunnu dálka vatnveitingarvirki.

Viðmerk.: Umhvørvisdeildin skal góðkenna tey verndarøki, sum kommunurnar leggja uttan um vatnsavningarøki (t.d. við eini býarskipan). Ístaðin fyri at umhvørvisdeildin er útinnandi stovnur, so eigur umhvørvisdeildin at vera góðkenningarstovnur.

Umframt eiga at verða ásetingar um, at kommunurnar kunnu ognartaka til tílík lendi, og ikki bara at eigarin kann krevja, at tað verður ognartikið. Núverandi lóggáva gevur heimild til ognartøku.

§ 12, 4. stk. Umhvørvisdeildin kann seinni gera broytingar í verndarøkinum og góðkenna einstøk viðurskifti, ið bannið sambært 1. stk. fevnir um.

Viðmerk.: Hetta eigur at verða broytt, soleiðis at landsstýrið kann áleggja eini kommunu at víðka um verndarøki. Tað kann verða gjørt eftir býarskipanarlógini og eftir lóg nr. 63 frá 1909.

Umhvørvisdeildin kann ikki vera ein útinnandi stovnur, sum skal góðkenna sínar egnu avgerðir, og tað verður hon eftir núverandi orðing.

§ 18, 1. stk. Kommununan skal gera eina heildarætlan um, hvussu spillivatnið í kommununi skal fáast burtur.

Viðmerk.: Her eigur at standa, at kommunan skal í býarskipan ella byggisamtykt gera heildarætlan um, hvussu frárensl skal verða skipað.

Hetta er nakað sum hoyrir við í býarskipan og tað er eisini við í núverandi lóg um býarskipan (§ 3), at kommunurnar skulu gera eina tílíka ætlan. Landsstýrið kann eisini eftir núverandi lóg áleggja kommununum at gera tílíkar ætlanir.

§ 18. 3. stk. Um so er, at ognararnir av minsta lagi helvtini av teimum bygdu ognunum í einum øki, ið kommununnar til eina ætlan sambært 1. stk. sum fyritreyt hevur kloakering, mótmæla hesum, tekur umhvørvisdeildin upp samráðingar við kommununa um spurningin.

Viðmerk.: Spurningurin um mótmæli eigur bert at koma fyri, um so er at eigararnir skulu gjalda fyri kloakeringina. Um kommunan rindar fyri arbeiðið av kloakeringini, so er ongin orsøk til, at eigararnir skulu hava rætt til at mótmæla hesum.

§ 20. Hevur ein kommuna ikki innan tá tíðaráseting, ið er ásett í eini ætlan, sum nevnt í § 18, gjørt ella skipað fyri gerð av einum verki, ið er upptikið í ætlanina, kann landsstýrið áleggja kommununi at gera verkið ella fáa hetta gjørt innan ásetta tíðarfreist.

2. stk. Fer kommunan út um eina freist, ið er ásett sambært 1. stk., kann landsstýrið fáa verkið gjørt fyri kommununnar rokning.

Viðmerk.: Her eigur at verða strikað, at landsstýrið kann gera hetta fyri kommununar rokning, tí at tað tekur fullkomuliga myndugleika- og ábyrgdarkenslu frá bygdarráðslimunum burtur.

Í slíkum førum skal heldur verða farið fram eftir § 42 í kommunulógini, har landsstýrið, um kommunurnar ikki gera eftir lógini, kann áleggja bygdaráðslimunum tvingsilsbøtur.

§ 22. Útreiðslur við gerð, rakstri og viðlíkahaldi av almennum og felags privatum spillivatnsreinsiverkum, her uppi í útreiðslurnar til felags leiðingar, avskerandi leiðningar, reinsiverk, ognartøkur og nýtsluavmarkingar, verða at rinda og býta sambært reglur, ið kommunan ásetir, samanber tó § 23.

Viðmerk.: Her skal verða nevnt, at kommunurnar kunnu gera reglur um gjald fyri at gera og reka kloakkir, og at landsstýrið t.d. skal góðkenna eina tílíka reglugerð. Í lógini kunnu ymsar leiðbeiningar verða gjørdar viðvíkjandi hesum gjøldum.

§ 23. Verður ósemja millum avvarðandi kommunur, kann landsstýrið taka avgerð um gerð og býti av útreiðslum til felags spillivatnsreinisverk. Landsstýrið kann somuleiðis gera standardsamtyktir, reglugerðir og tílíkt.

Viðmerk.: Um kommunur gera eitt felags reinsiverk, skal landsstýrið góðkenna sáttmálan. Í sáttmálanum eigur at verða ásett hvussu kommunurnar skulu gjalda útreiðslurnar, heldur enn at fara aftur umaftur. Eisini skulu viðskiftini viðvíkjandi uppsøgn av sáttmálanum góðkennast.

Um greinin sipar til ósemju undir stovnanini av slíkum felag, tá er grundarlagið fyri samstarvi so vánaligt, at neyvan nakar sáttmáli verður at taka støðu til. Tá verða kommunurnar at klára seg sjálvar, men skyldan at reinsa frárensl fellur ikki burtur. Eftir lógini skal tað vera ein skylda at halda reint, men at starvast saman um hetta ein møguleiki.

§ 25. Umhvørvisdeildin kann krevja eitt mál um útstykking freistað, til avgerð er tikin um spillivatnsavlopið.

Viðmerk.: Her eigur at standa, at áðrenn byggiloyvi verður givið, skulu frárenningarviðurskiftini vera í lagi. Bygdarráðið hevur ábyrgdina av at viðurskiftini eru í lagi, og um bygdarráðið gevur byggiloyvi, uttan at viðurskiftini eru í lagi, so verður tað teirra ábyrgd, at fáa hetta í rættlag.

Núverandi orðing ger, at umhvørvisdeildin kann brúka hetta til at fáa onnur viðurskifti ígjøgnum við at steðga eini útstykking.

§ 35. Umhvørvisdeildin verður skipað sum ein deild undir Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og er ráðgevi landsstýrisins og aðra myndugleika viðvíkjandi spurninginum um umhvørvisvernd.

Viðmerk.: Umhvørvisdeildin er ein deild sum hevur alt ov stórar heimildir. Hon er samstundis ein góðkenningar-, ráðgevingar- og útinningarstovnur, og tað kann als ikki verða talan um.

Umhvørvisdeildin kann bara vera ein ráðgevingar- og góðkenningarstovnur, sum áleggur øðrum myndugleikum at gera tiltøk innanfyri lógarkarmarnar. Soleiðis sum hetta er sett upp, verður umhvørvisdeildin eitt reint einaveldi.

§ 36. 2. stk. Landsstýrið kann gera av, at eftirlitið í ávísum førum verður framt av øðrum myndugleikum.

Viðmerk.: Har vantar ein viðmerking um, hvørjir myndugleikar ið kunnu fremja eftirlitið.

§ 48. Umhvørvisdeildin kann í samstarvi við kommununa fremja eina kortlegging av óljóðinum í kommununi.

Viðmerk.: At eftirlitsmyndugleikin skal starvast saman við tí útinnandi myndugleikanum er heilt burtur við.

Hetta er nakað, ið verður álagt kommununi at gera, men einans um serligar umstøður tala fyri tí – ikki fyri at hav eina kanning standandi á hyllini.

§ 49. Umhvørvisdeildin fremur við stuðli frá kommununum eina kortlegging av dálkingarstøðuni og trýsti frá teimum einstøku dálkingarkeldum á áir o.s.frv.

Viðmerk.: Sama sum til § 48.

§ 50. Landsstýrið kann eftir samráðing við kommunalu myndugleikarnar áseta reglur um, at umhvørvisdeildin við stuðli frá kommununum skal fremja eina kortlegging av luftdálkingini, her uppi í eina kortlegging av dálkingarkeldunum og ætlan um luftdygdina.

Viðmerk.: Sama sum til § 48.

§ 51. Landsstýrið kann eftir samráðing við kommunalu myndugleikarnar áseta nærri reglur um kortlegging eftir §§48-50 og um fremjing av hesi.

Viðmerk.: Sama sum til § 48.

§ 52. Kortleggingin sambært §§48-50 skal verða ein stuðul undir planleggingini sambært hesum kapitli og undir lands- og kommunuplanlegging.

Viðmerk.: Um kortlegging ikki skal verða eitt planleggingarreiðskap, so er neyvan nøkur grund til at gera hana. Tær kortleggingar, sum verða gjørdar, skulu sjálvandi vera gjørdar við atliti til býarskipanina.

Landsplanlegging finnst ikki og tí er nærum óneyðugt at nevna tað.

§ 53. Við kortleggingini eftir § 49 sum grundarlagi ger umhvørvisdeildin eina ætlan fyri góðskuna av vatnøkjunum í landinum.

Viðmerk.: Hendan greinin er ógviliga ivasom. Har er tað umhvørvisdeildin sum bæði ger eina ætlan og skal góðkenna hana. Tað stríðir ímóti øllum vanligum umsetingarligum grundreglum.

Tað má heldur vera so at, um umhvørvisdeildin ger eina ætlan, so má tað vera landsstýrið, sum góðkennir hana.

§ 54. Við kortleggingini eftir §§ 48-50 sum grundarlagi ger umhvørvisdeildin eftir samráðing við kommunurnar eina ætlan fyri støðu av virki v.m., har vegna fyribyrging av dálking serlig støðukrøv mugu ásetast.

Viðmerk.: Hetta eigur at verða lagt inn í býarskipanirnar. Tað er ikki umhvørvisdeildin, sum skal gera ætlanirnar, men bert góðkenna tær og vita um tær eru samsvara teimum kanningum, sum eru gjørdar.

Hetta er umhvørvisdeildin verður ein trí- ella fýrafaldur stovnur, sum skal góðkenna sítt egna virksemi og avgerðir, ger eina umsitingarliga fløkju.

§ 54, 3. stk. Ætlanin má ikki stríða ímóti landsplanleggingini.

Viðmerk.: Her verður aftur bent á, at tann einasta planlegging, ið er, er kommunal.

§ 55. Landsstýrið kann taka avgerð um, at umhvørvisdeildin sum lið í landsplanleggingini skal fáa til vega fyribils kanningar og metingar av teimum umhvørvisligu avleiðingunum í sambandi við gerð av størri einstøkum virkjum. Landsstýrið kann taka avgerð um, at gerast skal ein meting av ymiskum støðumøguleikum fyri slík virkir.

Viðmerk.: Hetta leggur beinleiðis upp til misbrúk og eigur helst at verða strikað. Er í hvussu so er ógvuliga ivasom.

§ 56. Umhvørvisdeildin ger í samstarv við kommunurnar eina kortlegging av fyribeiningini av burturkastinum. Kortleggingin skal fevna um skráseting av innsavningini, flutninginum, viðgerðini og endaskipan, her uppi í endurnýtslu av burturkastinum. Við kortleggingini sum støði ger umhvørvisdeildin eftir samráðing við kommunurnar eina frágreiðing viðvíkjandi fyribeining av burturkastinum.

Viðmerk.: Samstarv millum kommunurnar og góðkenningarmyndugleikan er ógvuliga ivasamt. Tað kann verða álagt kommununum at gera eina skráseting.

§ 57. Umhvørvisdeildin ger eftir samráðing við kommunalu myndugleikarnar eina ætlan um fyribeining av burturkasti.

Viðmerk.: Umhvørvisdeildin skal góðkenna ætlanirnar men ikki gera tær.

§ 57, 4. stk. Landsstýrið kann taka avgerð ella áseta reglur um skyldur kommununnar at stovna ella fara upp í felagskommunalar fyritøkur innan øki viðvíkjandi fyribeining av burturkasti og um støðuna hjá slíkum felagskommunalum fyritøkum.

Viðmerk.: Tað stríðir ímóti øllum grundreglum, at landsstýrið skal noyða kommunurnar inn í felagsskapir, sum hava við burturkast at gera. At noyða kommunurnar upp í felagsskapir ber ikki til.

Lógin skal áseta, at kommunurnar hava skyldu at halda reint. Um kommunurnar hava hug at arbeiða sama, so eru tað tær, ið taka avgerðina um hetta.

Tað einasta, ið talan kann vera um, er at um kommunurnar stovna eitt felag, so skal landsstýrið góðkenna viðtøkurnar.

§ 70. Avgerðir hjá kommununi eftir hesi lóg ella eftir reglum við heimild í lógini kunnu kærast til umhvørvisdeildina, sum hevur endaligu fyrisitingarligu avgerðina.

Viðmerk.: Umhvørvisdeildin er uppi í nógvum av tí arbeiði ið kommunurnar gera. Tí er tað burtur við, at kommunan skal kæra til umhvørvisdeildina, sum hevur ta endaligu fyrisitingarligu avgerðina.

§ 74. Umhvørviskærunevndin er samansett av einum formanni, einum ella fleiri tiltakslimum fyri hendan og eitt ávíst tal av tilnevndum serkønum limum.

Viðmerk.: At umhvørviskærunevndin ikki hevur ásett limatal er ógvuliga løgið tá hugsað verður um, at hetta skal vera endaligur kærustovnur.

Tað má í hvussu so er verða sagt bæði, hvat slag av nevnd talan er um, hvør skal velja hann, og hvørjir kunnu verða valdir í nevndina.

Hetta má verða ásett í lógini og ikki lagt til, at landsstýrið skal gera hesar reglur.

Tað verða so mikið álvarsamir spurningar, sum skulu viðgerast, at spurningurin um nevndina skal vera viðgjørdur í løgtinginum.

§ 76. Avgerðir í umhvørviskærunevndini verða tiknar eftir atkvøðumeiriluta.

2. petti. Formaðurin ella tiltaksmaður hansara kann í serligum førum taka avgerðir nevndarinnar vegna.

Viðmerk.: Her má standa í hvørjum málum, formaðurin kann taka avgerðir. Tað kann ikki vera so, at tað bara er ein metingarspurningur hjá honum.

Niðurstøða.
Starvsnevndin mælir frá at góðkenna uppskotið í núverandi líki. Sum longu sagt, eru nógv av hesum viðurskiftum at finna í verandi lógum, og verður tí mælt til at broyta uppskotið, so tað samsvarar við verandi lógir. Sum eitt hent amboð í útinnanini, áttu fleiri viðmerkingar at verið gjørdar til tær einstøku greinarnar.

Í sambandi við umhvørvislógina eigur eisini náttúrfriðingarlógina at verða tikin upp. Serstakliga við atlitið til:

1. at samskipa náttúrfriðing við býarskipan,
2. avgerðir, sum friðingarnevndin tekur, ikki av sær sjálvum verða koyrdar til yvirfriðingarnevndina og
3. samansetingin av yvirfriðingarnevndini.

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVA
HYGIENIC INSTITUTE
Fisheries & Veterinary Department
100 Tórshavn — Faroe Island
Tlf. 15300 & 15301

Skjal 13 I

Tórshavn, tann 9. december 1987

Føroya Landsstýri
Tinganes
100 Tórshavn

Viðmerkingar til uppskot um lóg um umhvørvisnevnd

Víst verður til brævi frá Føroya Landsstýri dagfest 25. november 1987, har Heilsufrøðiliga Starvsstovan verður biðin um at gera viðmerkingar til uppskotið ··m lóg um umhvørvisvernd.

Uppskotið er viðgjørt á fleiri fundum á stovninum, og eru niðanfyri nevndu viðmerkingar eitt úrslit av hesum.

Vegna tað stutta skotbráið fingið er til viðgerðina, er sjálv orðingin ikki viðgjørd út í æsir, eins og vit ikki koma við nøkrum ítøkiligum alternativi til teir partar av uppskotinum, vit ikki eru nøgd við.

Støðið í norðurlendskum umhvørvislógum

Arbeiðsbólkurin er vorðin samdur um at brúka eina av norðurlendsku umhvørvislógunum sum grundarlag, og er tann danska kosin til endamálið. Tær norðurlendsku umhvørvislógirnar hava stórt sæð sama endamálið. Tær norðurlendsku umhvørvislógirnar hava stórt sæð sama endamál og fevna um stórt sæð sama øki. Harumframt eru tær í altjóða høpi kendar at vera á høgum støði. Sostatt meta vit tað vera skilagott at leggja seg upp at hinum norðurlondunum.

Hóast tað tískil er rætt at brúka tær sum fyrimynd í síni heild, kunnu trupulleikar stinga seg upp, tá **ein** ávís verður tikin burtur úr og brúkt sum eitt **ítøkiligt** grundarlag.

Givið er jú, at tann danska lógin er vorðin til í einum donskum veruleika — sum ikki er tann sami sum tann føroyski. Tað skal nevnast, at danskarar høvdu nógvar smáar »umhvørvislógir«, tá umhvørvisverndarlógin varð gjørd. Hetta setti sjálvsagt sín dám á danska tekstin. Harafturat hevur danska lógin verið

ígjøgnum nógvar parlamentariskar nevndir og fólkatingið, sum hava havt árin á upprunaliga uppskotið.

Mannagongdin viðvíkjandi tí føroyska uppskotinum verður neyvan sum tann danska, so lagnan hetta uppskotið fær, kenna vit ikki, men givið er, at lógarteksturin hevði verið nógv smidligari og beinraknari, sum bólkurin hevði latið vera við at tikið eina føroyska týðing av donsku lógini sum eitt ítøkiligt grundarlag.

Viðmerkingar til lógartekstin

Endamál, øki v.m. (kap. 1 - 5)

Sum heild eru hesi kapittul í lagi. Tey greiða frá endamálinum, lógarinnar øki og tí týdningarmiklu meginreglu um, at dálkandi virkir skulu góðkennast av almennum myndugleikum.

Vit halda tað vera skilagott, at vit her á landi leggja PPP-meginregluna (polluter — pay principle) sum fíggjarligt stýringsgrundarlag undir lógini. Hetta er í tráð við bæði altjóða og norðurlendskan umhvørvispolitikk.

Somuleiðis er tað skilagóð broyting í mun til donsku lógina, at meira dentur verður lagdur á burturkast og at fremja endurnýtslu við at nevna tey í § 1. Hetta út frá tí fatan, at tann »estetiska dálskingin« er eitt stórt vandamál her á landi. Harafturat gevur hetta rúm fyri broyting í áskoðanini frá at fata burturkast sum burturkast til at fata tað sum eitt tilfeingi. Eisini gevur hetta møguleika fyri at taka stig til endurnýtsluverkætlanir .

Ein onnur broyting í mun til danska tekstin er, at spillvatnsreinsiverk koma undir kap. 5 og eru sostatt at fata sum dálkandi virkir. Hetta er ein skerping, sum kemur umhvørvinum til góðar.

Myndugleikar, eftirlit v.m. (kap. 6 og 7)

Viðvíkjandi myndugleika og harvið eisini eftirliti brýtur tann føroyska lógin við ta donsku.

Sambært donsku lógina liggur **primera eftirlitið** undir ábyrgd kommunnar og fyri mál, sum røkka út um kommunumark, hjá amtinum. Staturin hevur ein yvirordnaðan leiklut, sum kærustovnur, faklig servitan og at syrgja fyri, at politiskar avgerðir verða framdar.

Í føroyska lógaruppskotinum eru kommunurnar burtur sum **primert eftirlit,** og øll fyrisitingin av lógini centraliserað og koyrd í eina deild á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Harumframt skal henda deild eisini virka sum faklig servitan, ráðgevi hjá Føroya Landsstýri o.m.a.

Vit eru sannførd um, at myndugleikabygnaðurin í uppskotinum er skeivur:

1. Tað er skeivt, at øll heimild og ábyrgd í lógartekstinum er løgd á ávísa deild á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Hetta er sum at stovnseta ein nýggjan stovn á verandi stovni. Í lógini eigur at standa Heilsufrøðiligu Starvsstovan, har tað nú stendur umhvørvisdeildin. Síðan má tað verða til Føroya Landsstýri og leiðsluna á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, hvussu umhvørvisarbeiðið dagliga verða skipað.

2. Kommunalir myndugleikar hava bert tvær uppgávur sambært lógina — 1) at seta avgjøld (§ 22) og 2) planleggingar- og kortleggingargávur. Hetta er skeivt av tveimum grundum. Í fyrsta lagi er tað ein **grundlógartryggjaður rættur** hjá kommunalum myndugleikum at hava eftirlit við ytri viðurskiftum, sum raka allar íbúgvarnar í kommununi. At taka henda rætt frá kommununum hevur uttan iva við sær ábyrgdarloysi frá kommunalari síðu mótvegis umhvørvinum, og fer hetta ivaleyst eisini at elva til trupulleikar í samarbeiðnum millum centralu myndugleikarnar og kommunurnar. Í øðrum lagi eigur tað at vera ein **skylda** hjá kommununum at taka sær av umhvørvinum innan kommunumark. Higartil hava kommunurnar tikið sær av »umhvørvismálum« sambært heilsusamtyktina, og eigur hetta at útbyggjast og skipast betur heldur enn at niðurleggjast. Møguliga áttu tær smærru kommunurnar at tikið seg saman í størri eindir fyri betur at kunna røkja hesar uppgávur.

3. At Heilsufrøðiliga Starvsstovan skal hava ábyrgd av tí primera eftirlitinum, halda vit vera óneyðugt, og hevur hetta við sær, at eftirlitið ikki verður so virkið sum tað kundi verið. Okkara royndir við løggildingsarbeiðnum og øðrum í samband við útflutning av fiski vísa greitt, at neyðugt er at styrkja eftirlitið á staðnum. Umhvørvislógin kemur at ávirka allar íbúgvar, øll virkir og allar kommunur í landinum, og er tað tí givið, at ein centralur stovnur fær trupulleikar við at røkja uppgávurnar til fulnar.

4. Um umhvørvislógin verður samtykt, so eru tvær paralellar lógir, har Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur centralan leiklut. Hin er matvørulógin. At hesar lógir hava hvør sín bygnað, halda vit vera óheppið, bæði tí tað er óneyðugt, og tí tað kemur at geva fyrisitingarligar trupulleikar. Í aðrari lógini eru kommunalu myndugleikarnir ein hornasteinur, og í hinari eru teir burtur. Í tí dagliga koma hesar báðar lógirnar at arbeiða í tráð við

hvørja aðra, so tað er eyðsæð, at her kemur okkurt at halta. Bygnaðurin í matvørulógini er brúkiligur, tí at hesin tryggjar eina ávísa ábyrgd og eftirlitsskyldu á staðnum og teir centralu stovnarnir fáa yvirorðnaðan leiklut. Tí halda vit, at Føroya Landsstýri átti at hugt eftir bygnaðinum í matvørulógini og viðgjørt umhvørvisbyggi av nýggjum.

Kæruskipan (kap. 11-13)

Orsakað av ymiskum bygnaði verður kæruskipanin hjá matvørulógini og umhvørvislógini ymisk. Viðvíkjandi tí fyrru verður tað í flestu førum Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sum kemur at avgreiða flestar kærur, meðan tað í umhvørvislógini verður ein kærunevnd, sum fær hesa uppgávu.

Nú er tað at siga, at í donsku lógini er eisini ein kærunevnd. Kærunevndin var ikki í tí upprunaligu uppskotinum um danska lóg, men var tað ein treyt frá ávísum politiskum flokki, at kærunevndin skuldi við. Sostatt eru tað ikki bara landsins myndugleikar, sum taka sær av kærum, men eisini ein nevnd, har ídnaðurin sjálvur er umboðaður.

Spurningurin hjá okkum er í fyrsta lagi, um tað er neyðugt við hesari kærunevnd í Føroyum, og annars hví vit ikki kunnu gera kæruskipanina fyri báðar lógirnar líka.

Leikluturin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni

Sum áður nevnt, halda vit tað ikki vera skilagott at primera eftirlitið liggur á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni — tað eigur at liggja decentralt.

Uppgávurnar, Heilsufrøðiliga Starvsstovan eigur at hava í samband við umhvørvislógina, eru hesar (ófullfíggjað):

1. At vera ráðgevandi hjá Føroya Landsstýri og teimum lokalu umhvørvis-eindunum í umhvørvisspurningum.
2. At røkja sambandið úteftir (internationalt)
3. Saman við lokalu eindunum at smíða reglugerðir, rundskriv o.a.
4. At samskipa og gera líka arbeiðið hjá teimum lokalu eindunum, og saman við teimum geva umhvørvispolitiskum avgerðum eitt ítøkiligt innihald.
5. Saman við lokalu eindunum at stíla fyri ymiskum umhvørvisverkætlanum.
6. Gera og standa fyri starvsstovukanningum.
7. At syrgja fyri at allir neyðugir starvsstovuhentleikar eru tøkir, og at starvsstovan er á einum altjóða støði.

8. At virka sum kærustovnur fyri avgerðir tiknar av lokalu eindunum.
9. At átaka sær at hava primert eftirlit saman við lokalu eindunum, har tær ikki hava neyðugar hentleikar ella servitan til taks.

Hetta bert fyri at nevna nøkur dømi um leiklutin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum í hesum føri er at sammeta við eitt umhvørvisstýri.

Niðurstøða

Út frá okkara dagligu arbeiði á stovninum kunnu vit staðfesta, at tørvur er á eini umhvørvislóg, og er hetta lógaruppskot bæði viðvíkjandi endamáli og øki í lagi

Bygnaðurin í lógaruppskotinum er ikki rættur, og vit vísa á, at:

— kommunalir myndugleikar eiga og skulu hava eina medábyrgd av lógini,

— at dagliga fyrisitingin eigur at uppbyggjast decentralt, og Heilsufrøðiliga Starvsstovan fær leiklut sum umhvørvisstýri,

— at kæruskipanin eigur at endurskoðast.

Vit heita á Føroya Landsstýri um at taka hetta til eftirtektar og broyta kapitlarnar 6, 7 11, 12 og 13 samsvarandi omanfyri nevndu viðmerkingum.

f. Heilsufrøðiligu Starvsstovuna
Marjun Hanusardóttir,
stjóri

Umhvørvisverndarlógin og Sílaveiðufelagið

Sílaveiðufelagið í lógaruppskotinum:

Í gr. 77, 3. stk. stendur, at »Sílaveiðufelagið, Meginfelag Útróðrarmanna og Havbúnaðarfelagið kunnu kæra tær í 2. stk. nevndu avgerðir, tá talan er um dálking av vatni og sjógvi.«

Í gr. 77, 2. stk. stendur, at »Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag kann kæra avgerðir um góðkenning, boð og forboð eftir 5. kapitli í lógini.«

5. kapittul umrøður viðgerð av serligum dálkandi virkjum, v.m.

Í gr. 83, 2. stk. stendur, at »landsstýrinum verður heimilað at seta úr gildi gr. 1, 4. stk. í lóg nr. 95 frá 14. apríl 1893 (fiskarílógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 22 frá 1. mai 1973.« Hetta er soljóðandi: »Tað er ikki loyvt at veita eiturevni ella onnur evni, eitt nú seyðavask, sum kann skaða síl ella laks, í vøtn, áir ella løkir.«

Av beinleiðis áhuga fyri Sílaveiðufelagið í listanum yvir fyritøkur, virkir og útbúnaður, ið koma inn undir kapittul 5 í umhvørvisverndarlógini, kann nevnast J4, fiskaaling. Her kann so Sílaveiðufelagið kæra avgerðir um góðkenning av sjógvaliloyvum og loyvum til smoltstøðir. Hetta er í sjálvum sær ikki uttan týdning, og fyri Sílaveiðufelagið at fegnast um. Spurningurin er tó so bert tann, hvussu kæruviðgerðin fer fram. Reglurnar um hesa, jbr. gr. 74, 3. stk., har sagt verður »Landsstýrið kann áseta nærri reglur fyri virki hjá umhvørviskærunevndini, her uppi í reglur fyri málsviðgerðini og reglur fyri avgjald fyri framløgu av málum«, eru helst ikki gjørdar. Onnur serliga dálkandi virkir v.m., sum eru nevnd í listanum, tykjast ikki at hava Sílaveiðufelagsins »ómiddulbara« áhuga, men Sílaveiðufelagið hevur harafturímóti stóran áhuga í at fáa annað serliga dálkandi virksemi við køstum og súrhoyggjabrunnum) og taðing, ið fer fram soleiðis, at tað dálkar áir, løkir og vøtn. Óneyðugt er í hesum sambandinum at vísa á fjósini fram við Stórá í Hvalvík, Fjarðará í Skálabotni, Sandá í Tórshavn og í Trøðum á Sandi.

So kann verða spurt, um annað er sum Sílaveiðufelagið kundi havt áhuga at gjørt vart við seg í, tá avgerðir verða tiknar um umhvørvisligan ávirkan á vatn og sjógv. Ja, tað fer ikki at bera til at melda eftir fyrr umrøddu gr. 1, stk. 4, í fiskaríløgini. Hvørjar reglur koma í staðin, hvør kann melda eftir teimum, og hvussu verður eftirlitið skipað, kann verða spurt.

Í sama viðfangi kann Sílaveiðufelagið ynskja sær upplýst, hvørji evni hugsað verður um í gr. 15, 2. stk., 1. punktum, tá sagt verður, at »Landsstýrið kann áseta reglur um ella taka avgerð um, at evni í serligum førum kunnu verða leidd í áir, løkir, vøtn, strond ella føroyskt sjóøki.«

Vatnorkuútbyggingar, vegagerðir v.m. kunnu koma tvørt fyri, tá hugsað verður um gr. 1, 2. stk., har tað stendur, at »lógin skal serliga nýtast til at tryggja teir eginleikar í ytra umhvørvinum, ið eru av týdningi fyri heilsufrøðiligu og rekreativu lívskorunum hjá menniskjum og fyri varðveiting av einum fjøltáttaðum djóra- og plantulívi.« Í samband við viðgerð av avgerðum at loyva vatnorkuútbygging v.m. út frá hesum viðurskiftum fær hvørki Sílaveiðufelagið ella annar, ið ikki ætlast at hava týðandi seráhugamál í málsúrslitinum, høvi til at gera vart við síni sjónarmið. Sum higartil skulu hesi sjónarmið so einans kunna viðgerast eftir natúrfriðingarlógini.

Við tí stutta skotbrái, ið tað hevur unst Sílaveiðufelagnum at fingið til at ummælt lógina, er helst okkurt, ið vit ikki hava gáað um, sum felagið náttúrliga átti at havt viðmerkingar um.

Sílaveiðufelagið hevur sum er tí bert hesi broytingaruppskot:

1. Gr. 77, 3. stk. fær hetta orðaljóð:
   »Sílaveiðufelagið, Meginfelag Útróðrarmanna og Havbúnaðarfelagið kunnu kæra tær í 2. stk. nevndu avgerðir, tá talan er um dálking av vatni og sjógvi, og tær avgerðir, ið verða tiknar sbrt. gr. 16 í lógini.«

2. Í listan yvir fyritøkur, virkir og útbúnaði, ið koma inn undir kapittul 5 í umhvørvisverndarlógini, verður undir J. Djórahald og goymsla ella viðgerð av húsdjóratøðum sett:
   5. Fjós (herundir køstar og súrhoyggjabrunnar).
   6. Taðing.

3. Gr. 83, 2. stk., verður strikað.

4. Mælt verður til at umhugsa um ikki heiti/orðafelli »**vistfrøðiliga javnvágin**« í størri mun átti at verið nýtt og tengt upp í orðið **dálking,** serstakliga tá talan er um vøtn, áir, løkir og sjógv.

Vinarliga Føroya Sílaveiðifelag
Jákup Dahl

ALIRÁÐIÐ
HOYVÍKSVEGUR 51
100 Tórshavn
Tlf. 16944

Skjal 13 K

Tórshavn, hin 7. december 1987

Føroya Landsstýri
Tinganes 100
Tórshavn

Viðmerkingar til umhvørvislóg.
§ 1 stk. 1 verður nevnt dálking, uttan at definera orðið. Orðið »dálking« er væl ógvuliga torført at allýsa og veldst um, hvør lýsir orðið. Tann, ið dálkar ella »umhvørvisturin«.

Ístaðin kundi orðaljóðið verið: At fyribyrgja at vistfrøðiliga javnvágin verður broytt, og harvið fyribyrgja og minka um dálking av luft, vatni og jørð.

Hervið er ein lýsing av endamálum meira greið.

§ 26, stk. 3, 5. kap. Ráðið metir, at F7 í listanum yvir fyritøkur, virkir og útbúnað, ið koma undir kap. 5 í umhvørvislógini, eigur at gerast greiðari, og stjørnan strikast. Smitta kann berast til alistøðir, um sløging av alifiski verður framd tætt við brúkini.

Framleiðslan av alifiski eigur at verða nevnd í viðlagda lista.

Ráðið metir eisini at betur var at strika nógvar av stjørnunum, sum eru á síðu I-II og III, harvið eisini fáa góðkenning frá myndugleikunum. Hesi eru: A4, B4, C4, D4, E2, E5, F1, H1, I3 og I4.

§ 53, 54.
Her verður nevnd ætlan fyri góðsku av vatnøkjunum í landinum og dygdarætlan, tó uttan at nevna, hvussu dygd og góðska skal uppfatast.

Har er ikki sett tíðarmark fyri, nær §§ 49 - 55 skulu verða lidnar.

Aliráðið saknar reglur fyri, hvussu lógin skal virka í tíðini frá, hon er komin í gildi, og til dygdarætlanir eru gjørdar fyri landið sum heild.

§ 83 stk. 2
Føroya Landsstýri eigur ikki at seta úr gildi § 1 stk. 4 í lóg nr. 95 frá 14. apríl 1893, sum broytt við nr. 22 frá 1.mai 1973 uttan tilráðing frá Aliráðnum.

Spurningar, sum Aliráðið metir Føroya Landsstýri eigur at kanna:
Undir hvørjari lóg kemur dálking frá bátum/skipum undir 400 BRT?
Metingin er, at hvørki umhvørvislógin ella KGL anordning nr. 318 frá 26. juni 1985 fevnir um omanfyrinevndu bátar/skip.

Aliráðið vil við hesum viðmerkingum seta fram ynski um at vera við til at endurskoða lógina, aftaná hon hevur verið í gildi í 2 ár.

R.v.
Andrias Reinert
Formaður

Skjal 13 L
Tórshavn tann 7. dec. 1987

Til:
Føroya Landsstýri
att: Jóngerð Purkhús
Tinganes FR-100 Tórshavn

Viðv. uppskot til løgtingslóg um umhvørvisvernd.
Í skrivi Landsstýrisins dagfest 25. nov. 1987, verður Arbeiðseftirlitið biðið um møguligar viðmerkingar til omanfyrinevnda uppskot.

Tað er at fegnast yvir, at arbeiðsbólkurin, sum hetta Landsstýrið setti, nú er komin so langt áleiðis, at eitt uppskot til eina lóg um umhvørvisvernd nú er klárt til viðgerðar. Hetta er ein lóg, sum stórur tørvur er á, og sum eigur at verða sett í verk skjótast gjørligt.

Arbeiðseftirlitið metir, at arbeiðsbólkurin hevur gjørt eitt dygdargott arbeiði, og hava vit ongar viðmerkingar at gera til sjálva lógina, burtursæð frá grein 35 um skipan av umhvørvisdeildini, og viðmerkingarnar til lógina, har manningin av hesi deild verður umtalað.

Sum kunnugt umsitur Arbeiðseftirlitið lógina um arbeiðaravernd, sum umfatar øll virkir og arbeiðspláss í Føroyum. Hendan lógin vil í nærmastu framtíð blíva avloyst av eini arbeiðsumhvørvislóg, sum Arbeiðsumhvørvisráðið ger uppskot til.

Arbeiðseftirlitið metir tað ógvuliga óheppið at skilja innanhýsis og uttandura umhvørvismál frá hvørjum øðrum, tá tey í roynd og vera bert eru tvær síður av somu søk. Hetta hava vit mangan merkt í okkara dagliga arbeiði, har okkara lóggáva bert røkkur til sjálvt arbeiðsplássið, og har vit einki kunnu gera, tá tað snýr seg um viðurskiftir uttandura.

Vit kunna upplýsa, at vit eru hampuliga væl útgjørdir við mátiútgerð til at máta innandura umhvørvisárin av flest øllum evnum í ídnaðinum, vit hava eitt sera gott samstarv við umhvørvisstovnar uttanlands, har vit kunnu fáa tað neyðugu hjálp, tá vit ikki sjálvir røkka.
Tá okkara arbeiðslæknin væntandi verður settur, frá 1. apríl -88 at rokna, hava vit í honum ein serkønan mann, tá tað snýr seg um toksiska dálking av umhvørvinum, og tað árin hetta hevur á fólk og fæ.

Arbeiðseftirlitið hevur longu nú øll virkir skrásett eftir einum evnislista, soleiðis at lætt er at fáa eitt yvirlit yvir øll dálkandi virkir.

Arbeiðseftirlitið hevur deildir kring landið, við eftirlitsfólki og skrivstovufólki, og kemur tann 5. og seinasta deildin vónandi at virka frá 1. jan. 1989.

Út frá omanfyristandandi, og út frá einari skilagóðari sameining av hesum arbeiði, vilja vit loyva okkum at vísa Landsstýrinum á møguleikan at leggja umhvørvisdeildina undir Arbeiðseftirlitið.

Hervið skuldi í fyrstu atløgu bert verið neyðugt at sett 4 fólk, nevniliga ein deildarleiðara, sum kundi verið ein evnis- ella sivilverkfrøðingur, ein løgfrøðing, sum Arbeiðseftirlitið eisini kundi brúkt til ymiskar saksviðgerðir, og 2 mátiteknikarar.

Hetta vildi verið ein væl bíligari loysn, tá 2-4 størv vildu verið spard, í mun til fyriliggjandi uppskot.

Við hesi skipan kundi Heilsufrøðiliga Starvsstovan eisini virka sum kærustovnur í umhvørvismálum, sum higartil, og annars tikið sær av at analysera tær mátingar, sum verða gjørdar.

Velur landsstýrið harafturímóti skipanina í fyriliggjandi uppskoti, eru vit sjálvandi fúsir at samstarva mest møguligt við umhvørvisdeildina.

Við heilsan
Arbeiðseftirlitið
Eli Davidsen.

Avrit av hesum skrivi er sent til:
Vilhelm Johannesen, landsstýrismann.

Skjal 13 M

Menningarstovan
Hoyvíksvegur 51
Postsmoga 1287
110 Tórshavn

9. december 1987

Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum,
frú Jóngerð Purkhús,
Landsskrivstovan
Tingaanes
100 Tórshavn

Viðv.: Uppskoti til umhvørvisverndarlóg.

Sum limur í Aliráðnum havi eg fingið sendandi eintak av uppskotinum til umhvørvisverndarlóg. Í viðgerðini her havi eg hildið meg til teir partar av uppskotinum, ið beinleiðis kunnu sigast at koma Aliráðnum við.

Tað eru tó aðrir partar í uppskotinum, ið eg hvørki sum menningarstjóri ella persónur kann lata fara óumrøddar aftur við borðinum.

Tó at vit kunnu vera samd um, at umhvørvisverndin eigur at verða ment, so reisir uppskotið spurningin, hvørt umhvørvisvernd eigur at ganga framum fólkaræðisspurningar. Tað tykir mær, at nevndin, ið hevur evnað uppskotið til, er rættiliga sannførd um, at tann tekniskt tryggasta umsitingin og viðgerðin av umhvørvisspurningum hevur meira at týða enn, at hon tryggjar fólkaræðislig innlit og medvit.

Skjal 13 N

Fiskimannasóknarstovan..

Tórshavn, 10. desember 1987

Føroya Landsstýri
Jóngerð Purkhús, landsstýriskvinna
Tinganes

Í brævi dagfest 25/11 1987 biður Landsstýrið okkum gera viðmerkingar til uppskot um umhvørvislóg áðrenn 10. des. 1987.

Við so stuttum skotbráði hava vit ikki havt møguleika at kanna uppskotið til fulnar, og vit kunnu tí bert gera nakrar fyribils viðmerkingar. Tað stendur okkum ikki greitt, í hvønn mun henda lóg nertir føroyskan sjógv. Orðingin »føroyskt sjóøki« verður nýtt nakrar ferðir, og vit rokna við, at hetta merkir økið úr á 3 fjórðingar, men um so er, so viðger lógaruppskotið henda part av umhvørvinum lítið samanborið við spurningar á landi (rottur t.d.) Ein fær ta fatan, at lógin fremst er gjørd til umhvørvið á landi, og so er »føroyskt sjóøki« skoytt uppí ymsastaðni (tó ikki allastaðni; t.d. ikki í grein 9); men lógin sigur ógvuliga lítið um dálking á føroyskum firðum.

Heldur ikki stendur okkum greitt, hvat samband henda lóg hevur við

millumtjóða avtalurnar, sum eru um havdálking, Oslo-, London-, Paris- og Marpol konventiónina t.d.; men umráðandi er, at vit eru so væl tryggjað, sum til ber viðvíkjandi »dumping« í sjógvi í nánd av Føroyum.

Vit hava, sum áður er nevnt, ikki havt umstøður at viðgera hetta lógaruppskot nóg væl, men sum heild tykir lógin hvat sjónum viðvíkur, ikki at vera nóg fulfíggjað.

Vinarliga
J.S. Joensen, Fiskirannsóknarstovan

Skjal 13 O.

Føroya Náttúrugripasavn
Debesartrøð
100 Tórshavn - Tlf. 12306

Tórshavn
9/12-87.

Føroya landsstýri
Tinganes
100 Tórshavn

Viðvíkjandi uppskoti til umhvørvislóg.
Tað er gleðiligt, at vit nú fáa eina umhvørvislóg. Vit hava ikki havt nógva tíð at kanna lógaruppskotið, men skulu tó gera nakrar viðmerkingar.

1. Hóast nógv sløg av dálkandi virkjum verða nevnd, so verður einki sagt um landbúnaðin. Í øðrum londum, verður nútímans **landbúnaður** mettur at vera ein hin álvarsamasta dálkingarkelda. **Taðing** og frárensl frá **súrhoyggjabrunnum** hava í fleiri førum í Føroyum dálkað illa og dripið lív í áum. Taðing við flótandi myrkju fram við vegirnar kann eisini nevnast.

2. Heldur ikki verður nakað sagt um flakavirki, ella onnur flakavirki, hóast vit vita, at tey dálka illa.

3. Lógin átti kanska at verið **meira desentral.** tað verður helst torført hjá umhvørvisdeildini í Havn at fylgja við øllum, ið fer fram úti um landið.

4. Fyri at lætta um átti grein 35 og grein 36 at verið fluttar fram til beint aftaná kapittul 1, so vit beinanvegin fáa at vita, hvat umhvørvisdeildin er fyri nakað.

Hetta er í stuttum nakrir lutir, sum vit hava lagt til merkis við at lesa lógaruppskotið. Annars er helst rætt, sum stendur í viðmerkingunum, at viðgera lógina aftur, tá hon hevur virkað eini 2-3 ár.

Jóhannes Jóhansen.

Skjal 13 P.

Tórshavnar Býráð

Tekniska Deild
jpj/emp

Tórshavn, tann 8. des. 1987
J.nr. 34/45-1987

Føroya landsstýri
att.: Jóngerð Purkhús
Tinganes
100 Tórshavn

Borið bræv

Uppskotið til nýttja umhvørvislóg var til viðgerðar á fundi í teknisku nevnd býráðsins mánadagin 7. desember 1987.

Uppskotið er sent býráðnum 26. november 1987.

Av tí at tilfarið er so rúgvusmikið, helt nevndin seg ikki kunna taka eina skilagóða støðu til uppskotið við so stuttum skoðbrái.

Nevndin helt tó, at uppskotið tekur alt ov nógv frá kommununum — og vildi hava betri stundir at kunna seg við uppskotið. Tí verður biðið um, at freistin fyri at senda landsstýrinum viðmerkingar verður longd til 15. januar 1988.

NV.
V. Guttesen
Ronald F. Poulsen
formaður.

14: Skjal til løgtingsmál nr. 47: Broytingar í lógini um ferðamannamiðstøð

Reglugerð

fyri

Ferðamiðstøð Føroya

§ 1. Ferðamannamiðstøð Føroya er stovnur undir Føroya Landsstýri.
2. stk. Ferðamannamiðstøðin hevur til endamáls: pkt. 1-15 (sí álit um føroysk ferðamannaviðurskifti, bls. 134 (§7).

§ 2. Landsstýrið skal góðtaka allar størri broytingar í virkseminum hjá ferðamannamiðstøðini.

§ 3. Stýrið, sum er sett sambært § 3 í lógini, verður skipað av landsstýrinum. Limirnir verða valdir fyri trí ár í senn. Tó er meinigi limurin á vali aftaná eitt ár frá fyrsta vali og næstformaðurin aftaná tvey ár. Allir kunnu veljast aftur fyri eitt tríára skeið.

§ 4. Stýrið fyri ferðamannamiðstøðina setir eftir góðkenning landstýrisins stjóra, ið hevur um hendi dagligu leiðsluna av ferðamannamiðstøðini.
2. stk. Stjórin setir og loysir úr starvi starvsfólkið. Tó skal stýrið góðtaka setanina av møguligum leiðandi starvsfólki.
3. stk. Talið av starvsfólki verður sett av landsstýrinum.

§ 5. Stýrið ger starvslýsing fyri starvsøki stjórans.

§ 6. Stýrið verður kallað til fundar av formanninum ella í hansara stað næstformanninum, Stýrið er viðtøkuført, um meirilutin av limunum eru møttir. Avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.

§ 7. Stjórin ger fíggjarætlan, sum skal góðtakast av stýrinum, áðrenn hon verður send landsstýrinum.

§ 8. Skuldbindingar skulu góðtakast av stýrinum, og eru bert gildugar við undirskrift stjórans og formansins.
2. stk. Útreiðslur, sum fara upp um 20.000 kr., skulu leggjast fyri stýrið til góðkenningar.

§ 9. Ferðamannamiðstøðin kann í støðum, har tað tykist skilagott, stuðla rakstrurin av kunningarstovum, ið virka eftir viðtøkum, góðkendar av ferðamannamiðstøðini.

§ 10. Ferðamannamiðstøðin kann veita ferðamannastovum almenna góðkenning um so er, at tær lúka tær reglur, sum Ferðamannamiðstøðin ásetur.

§ 11. Í minsta lagi eina ferð um fjórðingsárið skal formaðurin kunna stýrið um fíggjarstøðuna.

§ 12. Stjórin skal regluliga kunna stýrið um dagliga virksemið.

§ 13. Limirnir í stýrinum fáa fundarpening eftir avtalu við landsstýrið.

§ 14. Limirnir í umboðsráðnum fáa ferða- og dagpening fyri luttøku á fundum sambært avtalu um ferða- og dagpening millum Føroya Landsstýri og Tænastumannafelag Landsins.

§ 15. Limirnir í stýrinum, stjóri og starvsfólk á ferðamannamiðstøðini hava tagnarskyldu í málum, har hetta kann skaða vinnuna, starvs- ella viðskiftafólk hennara. Henda tagnarskylda heldur ikki uppat hóast viðkomandi er farin úr starvi.

Skjal 15: Skjal til løgtingsmál nr. 48/1987: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1988.

Protokol

fra

drøftelser mellem færøske og norske myndigheder i København den 14. december 1987 om gensidige fiskerirettigheder i 1988.

Den 14. december 1987 drøftede en færøsk delegation, ledet af lagmand Atli P. Dam, og en norsk delegation, ledet af fiskeridirektør Hallstein Rasmussen, færøsk fiskeri i Norges fiskerizoner og norsk fiskeri i færøsk fiskerizone i 1988. Mødet i København var er fortsættelse af tidligere drøftelser i Bergen den 3.-4. december 1987. Drøftelserne var baseret på aftalen om gensidige fiskerirettigheder undertegnet 7. februar 1979.

De to parters delegationer fremgår af bilag 1.

Parterne blev enige om:

I. Færøsk fiskeri i Norges fiskerizoner.
A. I den økonomiske zone nord for 62° N. Br.

1. a) 3400 tons torsk
   b) 950 tons kuller (hyse)
   c) 850 tons andre arter, rødfisk (uer), sej, hellefisk (blåkveite).

2. Overført fra de færøske kvoter i USSR's økonomiske zone.*)
   a) 6500 tons torsk
   b) 1800 tons kuller (hyse) og andre arter: Rødfisk (uer), sej, hellefisk (blåkveite).

* Giver ikke grundlag for fiskeri i fiskeværnzonen ved Svalbard af det totale kvantum af kuller (hyse) og andre arter nævnt under punkt 1(c) og 2(b) er det kun tilladt at fiske indtil 500 tons af hver af arterne rødfisk (uer), sej og hellefisk (blåkveite).

De kvanta kuller (hyse), der er nævnt under 1(b) og 2(b) skal dække bifangsten i fiskeri efter torsk. Uundgåelige bifangster af andre arter indgår i totalkvanta af kuller (hyse) og andre arter.

3. 3000 tons makrel.

4. Indtil 5000 tons blåhvilling (kolmule) som forsøgsfiskeri i et nærmere afgrænset område.

50% af de enkelte færøske torskefangster i det tilstødende område i Barentshavet, som grænser op til Norges og USSR's fastlandskyster, skal afregnes på de færøske kvoter, tildelt af Norge.

På grund af den ressourcemæssige situation for loddebestanden i Barentshavet har Norge og Sovjetunionen aftalt, at der ikke skal fiskes lodde i Barentshavet i 1988. Derfor kunne man fra norsk side ikke give Færøerne nogen loddekvote. Dette vil ikke præjudicere spørgsmålet om en tildeling til Færøerne af en loddekvote i senere år.

B. I den økonomiske zone syd for 62°N Br.

1. 22.000 tons sperling (øyepål), tobis, blåhvilling (kolmule) og brisling, hvoraf indtil 2.000 tons brisling. Kvoten omfatter også bifangst af andre arter, dog ikke af sej og sild.

2. 1500 tons sej, inklusive bifangst i andre fiskerier.
3. 1600 tons sild, inklusive bifangst i andre fiskerier.

På grund af den lave totalkvote i 1988 for makrel i Nordsøen, kunne man fra norsk side ikke give Færøerne nogen makrelkvote. Dette vil ikki præjudicere spørgsmålet om en tildeling til Færøerne af en makrelkvote i senere år.

Dersom tobisfiskeri i henhold til anbefaling fra ACFM af bestandsmæssige hensyn begrænses for norsk fiskeri, skal samme begrænsning også gælde for færøsk fiskeri.

C. I fiskerizonen ved Jan Mayen

5.000 tons blåhvilling (kolmule).

På grund af den generelle ressourcesituation i norsk loddefiske kunnu man fra norsk side ikke give Færøerne nogen loddekvote ved Jan Mayen. Dette vil ikke præjudicere spørgsmålet om en tildeling til Færøerne af en loddekvote i senere år.

D. I fiskeværnzonen ved Svalbard

Fra færøsk side erklærer man sig villig til at begrænse sit fiskeri i fiskeværnzonen ved Svalbard til maksimum 800 tons torsk og indtil 300 tons andre arter, væsentligt rødfisk (uer) og hellefisk (blåkveite), indenfor den tredjelands kvote, som er aftalt mellem Norge og Sovjetunionen for fiskeværnzonen ved Svalbard.

De færøske myndigheder påtager sig at begrænse det færøske rejefiskeri i fiskeværnzonen ved Svalbard til 11 fartøjer, gennemsnitlig 7 fartøjer i fiskeriet samtidig.

Den norske part kan med kort varsel etablere områder i fiskeværnzonen ved Svalbard, hvor det af hensyn til bevaring af yngel skal være forbudt at drive trawlfiskeri.

II. Norsk fiskeri i færøsk zone

1. 6000 tons bundfisk (lange, brosme, sej, blålange). Inden for denne kvote må sejfangsterne ikke overstige 1150 tons. Kvoten omfatter også bifangst af andre bundfiskearter op til 1200 tons tilsammen. Heraf må bifangst på en enkelt fangstrejse ikke overstige 35%. Fiskeriet forudsættes drevet med henholdsvis sejgarn og bankline. Færøske myndigheder vil overveje at tillade, at sej fiskes med trawl. Svar om dette vil blive afgivet senest 10. januar.
2. 12000 tons makrel.
3. 60000 tons blåhvilling (kolmule). Blåhvilling kann fiskes med trawl eller not. Antal fartøjer med licens til trawlfiskeri: 55. Antal trawlfartøjer samtidig: 22, desuden 13 på forsøgsfiskeri (fiskeleting) uden for det hovedfelt som til enhver tid defineres af den færøske fiskeriinspektion.
4. 100 tons brugdelever.

III. Licensspørgsmål

Parterne blev enige om inden 1. februar 1988 at senda hinanden en liste over de fartøjer, som ønsker at deltage i fiskeriet i den anden parts zone. Det vil være muligt at efteranmelde fartøjer.

Fartøjer, som har haft tilladelse til at fiske i hinandens zoner i 1987, kan benytte samme tilladelse indtil videre i 1988.

IV. Andre sprøgsmål

Blåhvilling (kolmule).

Parterne var enige om behovet for fastsættelse af en TAC for denne bestand i lys af videnskabelig rådgivning.

København, den 14. december 1987.

Atli P. Dam

Hallstein Rasmussen

16: Skjal til løgtingsmál nr. 50: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1988.

Felagsætlan viðvíkjandi vísindaligum samstarvi millum Føroyar og Sovjetsamveldið

Í 1987 hava sovjetsk vísindalig rannsóknar- og leitingarskip hildið fram við kanningum av fiskastovnunum og av teimum serstøku viðurskiftunum, ið eru galdandi fyri fiskastovnarnar svartkjaft, makrel og høgguslokk á føroyskum fiskiøki. Harumframt vórðu gjørdar ekkómetingar av svartkjaftastovninum í opnu økjunum í Norska-havinum, á norskum og føroyskum havøki. Kanningar av atlanto-skandiskari sild eru farnar fram á gýtingarøkjunum.

Partarnir tosaðu um úrslitini av felags rannsóknum og løgdu serligan dent á nyttuna av neyvum samstarvi og á **týdningi av lívfrøðiligum tilfari fyri at loysa praktiskar** spurningar viðvíkjandi havfiskiskapinum.

Partarnir komu ásamt um hesa ætlan fyri rannsóknarsamstarvið í 1988.

1. **Rannsóknarferðir fyri at meta um svartkjaftastovnin og savnan av havrannsóknarligum og lívfrøðiligum tilfari.**

   Í 1988 (mars-juni) er ætlanin at fara undir metingararbeiði viðvíkjandi svartkjaftastovnunum á gýtingarøkjunum og akustiska kanning av svartkjaftastovnunum í vakstrartíðini. Arbeiðið við at betra aldursgreiningarnar av svartkjafti verður ført víðari samsvarandi tilráðingum frá svartkjaftaarbeiðsbólkinum í ICES.

2. **Rannsóknarferðin til kanning og meting av makrel- og høgguslokkastovnunum og savnan av havrannsóknarligum og lívfrøðiligum tilfari.**

   Í 1988 er ætlanin at halda fram við felagsarbeiði til meting av makrel- og høgguslokkastovnunum á føroyskum sjóøki. Rannsóknirnar skulu verða gjørdar av einum sovjetskum havrannsóknarskipi við luttøku av føroyskum serfrøðingum.

3. **Kanning av útbreiðslu og gýtingareffektiviteti hjá atlantoskandiskari sild.**

Báðir partar skulu seta í verk kanningar av sildaeindum sambært ætlanunum hjá viðkomandi fiskirannsóknarstovum.

Føroysku myndugleikarnir loyva royndarfiskiskapi av atlanto-skandiskari sild við einum skipi við drívgørnum á føroyskum sjóøki. Í hesum sambandi kunnu føroyskir serfrøðingar vera umborð. Partarnir senda hvør øðrum úrslitini av kanningunum við posti.

3. **Havrannsóknir til kanning av lívfrøðiligum ríkidømi av ráevni á dýpdum størri enn 500-700 m.**

Á vetri og vári 1988 heldur eitt sovjetiskt havrannsóknarskip fram við kanningunum av djúphavsfiskastovnum á føroyskum sjóøki. Við Outher Bailey Banka halda fram kanningar av fiskasløgum, ið liva á markinum ímillum grunt og djúpt vatn (500-2000 m), fyri at meta um fiskastovnarnar og veiðumøguleikarnar har. Rannsóknirnar verða gjørdar við einum sovjetiskum havrannsóknarskipi við luttøku av føroyskum serfrøðingum.

Partarnir geva hvør øðrum upplýsingar um úrslitini av hesum fiskirannsóknum á næsta regluliga fundi í føroysku-sovjetisku felagsnevndini.

5. **Samstarv um kunngerð av rannsóknarúrslitum.**

Teir sovjetisku og føroysku serfrøðingarnir fara at skriva greinir um svartkjaft, djúphavsfisk og oceanografi á sjóøki Føroya við tí í hyggju at kunngera greinirnar í vísindaligum tíðarritum. Umbýti av havfrøðiligum tilfari, sum er innsavnað á fiskiveiðiøkjum partanna, verður gjørt á næsta regluliga fundi í føroysku-sovjetisku felagsnevndini.

V á t t a ð f r á s ø g n

frá ellivta fundinum í føroysku-sovjetisku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál.

I. Eftir innbjóðing frá stjórn Sovjetsamveldisins og sambært sáttmála frá 27. november 1977 millum stjórn Sovjetsamveldisins øðrumegin og stjórn Danmarkar og Føroya Landsstýris hinumegin um sínámillum fiskirættindi Føroyar-Sovjetsamveldið varð ellivti fundurin í Føroysku-Sovjetsku felagsnevndini hildin í Moskva í døgunum 30. november - 2. desember 1987.

II. Sum umboð fyri sáttmálapartarnar tóku lut í 11. fundi í felagsnevndini:

Fyri Føroyar í felagsnevndini:
Kjartan Hoydal,
Hjalti í Jákupsstovu.

Fyri Sovjetsamveldið í felagsnevndini:
Mikhail J. Kargin.

Á ellivta fundinum í felagsnevndini tóku tær í skjali 1 nevndu samráðingarnevndirnar lut fyri Føroyar og fyri Sovjetsamveldið.

III. Felagsnevndin samtykti hesa dagsskrá:

1. Fundarseta.
2. Samtykt av dagsskrá.
3. Frágreiðing um sínámillum fiskiveiðu partanna í farna partinum av 87
4. Frágreiðing um sínámillum royndarfiskiskap og fiskiroyndir partanna í farna partinum av 1987.
5. Ásetan av kvotum fyri sínámillum fiskiveiðu í 1988.
6. Ásetan av tali av loyvum fyri 1988.
7. Reglur viðvíkjandi loyvum fyri sínámillum fiskiveiðu í 1988. Fráboðan frá fiskiskapi í sovjetskum sjóøki og í føroyskum sjóøki og lúkan av treytum fyri fiskiskapi.
8. Umrøða av felagsætlanini viðvíkjandi royndarfiskiskapi og fiskirannsóknarligum arbeiði í 1988.
9. Ymiskt.
10. Fundarslit.

IV. Viðvíkjandi máli 3 á dagsskránni góvu partarnir hvør øðrum upplýsingar um fyribils úrslitini í 1987 av ávikavist sovjetsku veiðuni á fiskiveiðuøki Føroya og føroysku veiðuni á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti. Báðir partar tóku hesar upplýsingar til eftirtektar.

V. Í sambandi við mál 4 á dagsskránni, góvu partarnir hvør øðrum upplýsingar um úrslitini av sínámillum rannsóknum og royndarfiskiskapi í 1987 og skiftu um sínámillum vísindaligar upplýsingar.

VI. Viðvíkjandi máli 5 á dagsskránni komu partarnir ásamt um at geva hvør øðrum hesar sínámillum veiðumøguleikar í 1988:

a. Føroysku myndugleikarnir loyva sovjetskum skipum at fiska upp til 142.000 tons av svartkjafti til matna í føroyskum fiskiøki. Uppií hesi kvotu fyri svartkjaft er hjáveiða av makreli, ið ikki slepst undan. Aftaná samráðingarnar millum partarnar yvir telex kunnu føroysku myndugleikarnir loyva, at veidd verða aftrat upp til 20.000 tons av svartkjafti.

b. Sovjetsku myndugleikarnir loyva føroyskum skipum at veiða 26.500 tons av toski og hýsu, íroknað hjáveiða av øðrum fiskasløgum, 20.000 tons av lodnu og 2.500 tons av rækjum í búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti, uttan fyri 12 fjórðingar. Av nevndu 26.500 tonsum av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu, kunnu 16.000 tons veiðast í felagsøkinum í Barentshavinum og 5.500 tons í Eystrasalti, og økið har loyvt er at fiska írestandi 5.000 tonsini av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu, verður kunngjørt føroyskum myndugleikum seinni.
Eitt hvørt av nevndu tølum av toski og hýsu íroknað hjáveiða verður eftir avtalu partanna millum hækkað, um so er, at eitt ella tvey av hinum tølunum verða lægri.
Viðvíkjandi møguleikunum hjá føroyskum skipum at veiða upp til 20.000 tons av lodnu í Búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum, skulu nærri samráðingar verða millum partarnar gjøgnum telex.

VII. Viðvíkjandi máli 6 á dagsskránni komu partarnir ásamt um hetta:

a. Sovjetisku myndugleikarnir loyva føroyskum skipum alt árið 1988 at veiða tosk, hýsu og rækjur á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og Eystrasalti.

b. Føroysku myndugleikarnir geva 24 sovjetskum skipum loyvi at veiða svartkjaft í tíðarskeiðinum 1. apríl til 31. oktober 1988 (av hesum kunnu á økinum ásett í punkti VIII b í tíðarskeiðinum 15. apríl til 31. mai 1988, tó í mesta lagi vera 15 skip og 15 sovjetiskum skipum í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. mars og 10 í tíðarskeiðinum 1. november til 31. desember 1988 á føroyskum fiskiøki.

VIII. Viðvíkjandi máli 7 á dagsskránni varð hetta nevnt:

a. Báðir partar gjørdu hvør annan kunnugan við tær reglur, ið galda fyri fiskiskap ávikavist á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti og á føroyskum fiskiøki.

b. Hvør partur ansar eftir, at skip hansara halda tær lógir og reglur, ið galda fyri fiskiskap á økjum, ið eru undir lóggávu hjá hinum partinum. Serligar reglur kunnu verða settar í verk í tíðarskeiðinum mars til og við juni fyri svartkjaftaveiðuna á føroyskum fiskiøki fyri

at sleppa undan troðkan, meðan fiskiskapurin fer fram á einum lutfalsliga avmarkaðum øki.

c. Viðvíkjandi mannagongdini at geva loyvi til fiskifør til sínámillum fiskiskap á økjum undir sovjetskari og føroyskari lóggávu komu partarnir ásamt um, at teir fyri árið 1988, ikki seinni enn 15 dagar áðrenn fiskiskapurin skal byrja, skulu senda yvirlit yvir tey skip, talan verður um.

d. Partarnir komu ásamt um, at neyðug umbøn um umskiftan av loyvum til skip skal fara fram pr. telex, sum verður sent til Murmansk, Riga ella Tórshavn, eftir somu mannagongd sum í 1987, áðrenn fiskiskapurin byrjar.

e. Báðir partar skulu nýta telex til loysn av øllum operativum spurningum í sambandi við sínámillum fiskiskapin.

f. Partarnir vóru samdir um, at skipini í samband við loyvisspurningar helst skulu nýta Murmansk, Riga ella Tórshavn sum atløguhavn.

IX. Viðvíkjandi máli 8 á dagsskránni komu partarnir ásamt um fylgjandi:

Føroysku myndugleikarnir geva 5 sovjetskum skipum loyvi til royndarfiskiskap á føroyskum fiskiøki djúpri enn 700 m. Upp til 3 skip kunnu fáa loyvi samstundis.

Frá føroyskari síðu verður loyvt einum av teimum trimum omanfyri nevndu skipum at reka djúpvatnsroyndarfiskiskap á Outher Bailey Banka á dýpi ímillum 500 og 700 m, tó soleiðis, at har í mesta lagi verða veidd 200 tons av botnfiski.

Føroysku myndugleikarnir loyva 5 sovjetskum skipum at reka makrelfiskiskap og royndarfiskiskap eftir høgguslokki á føroyskum fiskiøki á teimum leiðum, har tað er loyvt sovjetskum skipum at veiða svartkjaft. Við hesum skipum kunnu vera upp til 4 føroyskir serfrøðingar. Samlaða veiðan av makreli má ikki fara upp um 5.000 tons, og royndarveiðan av høgguslokki ikki upp um 2.000 tons.

Um so er, at einki er til av makreli og høgguslokki, kunnu nevndu skip í juni — august veiða av samlaðu svartkjaftakvotuni, sum sovjetisk skip hava á fiskiøki Føroya. Tá lagt verður um til annan fiskiskap, skulu skipararnir á nevndu skipum, í góðari tíð boða avvarðandi føroysku myndugleikunum frá hesum.

Sovjetsku myndugleikarnir loyva tveimum føroyskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir hørpuskel (Chlamys islandica) á sovjetskum búskaparøki í Barentshavinum í 1988.

Sovjetiskir myndugleikar fara, ikki seinni enn 1. apríl 1988 at siga føroyskum myndugleikum frá, á hvørjum leiðum og í hvørjum tíðarskeiðum hesin royndarfiskiskapur kann vera.

Á hesum skipum kunnu vera 2 sovjetiskir serfrøðingar.

Partarnir komu ásamt um — um so er at møguleikar verða — at kanna spurningin um at reka royndarfiskiskap eftir atlanto-skandiskari sild á fiskiøkjunum hvør hjá øðrum.

Hvør parturin skal í góðari tíð gjøgnum telex leggja ætlanirnar fyri tílíkum royndararbeiðum fram fyri hin partin.

X. Í sambandi við mál 9 á dagsskránni, ymist, søgdu partarnir frá, at teir mettu víðkan av vísindaliga samstarvinum at vera eftirynskjandi, harímillum luttøku partanna í fleirlanda vísindaligum samstarvi viðvíkjandi svartkjafti og sild, millum annað við tí í hyggju at áseta TAC fyri hesar veiður.

Viðvíkjandi atlanto-skandisku sildini eru partarnir samdir um at boða frá einum og hvørjum tilburði av veiðu av hesum fiskaslag undir fiskiskapi, royndarfiskiskapi ella havrannsóknum á fiskaøkjunum hvør hjá øðrum.

Partarnir løgdu dent á tey góðu úrslitini av royndunum at fáa í lag onnur slag av samstarvi á fiskivinnuøkinum og søgdu frá áhuga í at halda fram við hesum samstarvi.

XI. Partarnir samdust um, at tólvti fundurin í felagsnevndini skuldi haldast í Føroyum í seinnu helvt av 1988.

Dagsskráin fyri tólvta fundin í felagsnevndini verður løgd til rættis ígjøgnum stjórnarumboð.

Henda frásøgn er skrivað í Moskva 2. desember 1987 á føroyskum, donskum og russiskum. Allir tekstir hava sama gildi.

Umboð fyri Føroyar
í felagsnevndini

Kjartan Hoydal

Umboð fyri stjórnina í
Samveldinum av Socialistiskum Sovjetríkjum í
felagsnevndini:
Mikhail Kargin

Tafla 1

Verandi lóg 1. apríl 1988

Lengd er at skýla hesar fuglar.

Tíðarskeið tá lengd er at skýla

JAN. | FEB. | MARS | APRÍL | MAI | JUNI | JULI | AUG. | SEPT. | OKT. | NOV. | DES.

Havhestur

Súla

Skarvur

Kjógvi

Skúgvur

Øll máseslóg

Lomvigi

Álka


Lundi

Kráka

Ramma

Skipað til Løgtingsmál nr. 69: Løgtingslóg um fuglaveiði

Skjal 17


Tabla 2.
DES.
NOV.
OKT.
SEPT.
AUG.
JULI
JUNI
MAI
APRIL
MARS
FEB.
JAN.

LOMVIGABJØRG 1987




10 km

RITUBJØRG 1987




10 km

SÚLUBJØRG 1987



Lunda lond.

62 *The Puffin outside Britain and Ireland*



15 The main Puffin colonies in the Faeroe Islands (E. Mortensen). Smaller numbers nest on the marked coasts.

Skjal 18: Skjal til løgtingsmál nr. 67: Løgtingslóg um megin-, fólka- og skúlabókasøvn.

Alt

um

almanna- og skúlabókasøvn

Greitt úr hondum hevur nevndin, Føroya Landsstýri setti november 1986.

Tórshavn
Juli 1987

INNIHALD

Inngangur
Viðmerkingar

1. Bókasavnsstjóri
2. Meginbókasøvn
3. Bókastova
4. Almanna- og skúlabókasøvn
5. Bókasavnsgjald
6. Serjáttan felags bókasavnsuppgávum til frama

Uppskot til lóg um almanna- og skúlabókasøvn
Forslag til lov om folke- og skolebiblioteker
Uppskot til kunngerð um skúlabókasavn

Skjøl

I. Bræv frá Føroya Landsstýri, dagf. 14. nov. 1986
II. Galdandi løgtingslóg um fólkabókasøvn, samtykt 27. mai 1968, broytt 21. mai 1980.
III. Fólkatal op, 31.12 1986
IV. Løgtingslóg um fólkaskúlan nr. 21, § 25, 22. 3. 1979
V. Løgtingslóg um skúlafyrisiting nr. 58, § 10, 2. 10. 1978.
VI. Bræv frá Skúlabókasavnsfelagnum, dagf. 7. jan. 1987
VII. Bræv frá Føroya Lærarafelag, dagf. 24. febr. 1987

II. Sum umboð fyri sáttmálapartarnar tóku lut í 11. fundi í felagsnevndini:

Fyri Føroyar í felagsnevndini:
Kjartan Hoydal,
Hjalti í Jákupsstovu.

Fyri Sovjetsamveldið í felagsnevndini:
Mikhail J. Kargin.

Á ellivta fundinum í felagsnevndini tóku tær í skjali 1 nevndu samráðingarnevndirnar lut fyri Føroyar og fyri Sovjetsamveldið.

III. Felagsnevndin samtykti hesa dagsskrá:

1. Fundarseta.
2. Samtykt av dagsskrá.
3. Frágreiðing um sínámillum fiskiveiðu partanna í farna partinum av 87
4. Frágreiðing um sínámillum royndarfiskiskap og fiskiroyndir partanna í farna partinum av 1987.
5. Ásetan av kvotum fyri sínámillum fiskiveiðu í 1988.
6. Ásetan av tali av loyvum fyri 1988.
7. Reglur viðvíkjandi loyvum fyri sínámillum fiskiveiðu í 1988. Fráboðan frá fiskiskapi í sovjetskum sjóøki og í føroyskum sjóøki og lúkan av treytum fyri fiskiskapi.
8. Umrøða av felagsætlanini viðvíkjandi royndarfiskiskapi og fiskirannsóknarligum arbeiði í 1988.
9. Ymiskt.
10. Fundarslit.

IV. Viðvíkjandi máli 3 á dagsskránni góvu partarnir hvør øðrum upplýsingar um fyribils úrslitini í 1987 av ávikavist sovjetsku veiðuni á fiskiveiðuøki Føroya og føroysku veiðuni á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti. Báðir partar tóku hesar upplýsingar til eftirtektar.

V. Í sambandi við mál 4 á dagsskránni, góvu partarnir hvør øðrum upplýsingar um úrslitini av sínámillum rannsóknum og royndarfiskiskapi í 1987 og skiftu um sínámillum vísindaligar upplýsingar.

VI. Viðvíkjandi máli 5 á dagsskránni komu partarnir ásamt um at geva hvør øðrum hesar sínámillum veiðumøguleikar í 1988:

a. Føroysku myndugleikarnir loyva sovjetskum skipum at fiska upp til 142.000 tons av svartkjafti til matna í føroyskum fiskiøki. Uppií hesi kvotu fyri svartkjaft er hjáveiða av makreli, ið ikki slepst undan. Aftaná samráðingarnar millum partarnar yvir telex kunnu føroysku myndugleikarnir loyva, at veidd verða aftrat upp til 20.000 tons av svartkjafti.

b. Sovjetsku myndugleikarnir loyva føroyskum skipum at veiða 26.500 tons av toski og hýsu, íroknað hjáveiða av øðrum fiskasløgum, 20.000 tons av lodnu og 2.500 tons av rækjum í búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti, uttan fyri 12 fjórðingar. Av nevndu 26.500 tonsum av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu, kunnu 16.000 tons veiðast í felagsøkinum í Barentshavinum og 5.500 tons í Eystrasalti, og økið har loyvt er at fiska írestandi 5.000 tonsini av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu, verður kunngjørt føroyskum myndugleikum seinni.
Eitt hvørt av nevndu tølum av toski og hýsu íroknað hjáveiða verður eftir avtalu partanna millum hækkað, um so er, at eitt ella tvey av hinum tølunum verða lægri.
Viðvíkjandi møguleikunum hjá føroyskum skipum at veiða upp til 20.000 tons av lodnu í Búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum, skulu nærri samráðingar verða millum partarnar gjøgnum telex.

VII. Viðvíkjandi máli 6 á dagsskránni komu partarnir ásamt um hetta:

a. Sovjetisku myndugleikarnir loyva føroyskum skipum alt árið 1988 at veiða tosk, hýsu og rækjur á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og Eystrasalti.

b. Føroysku myndugleikarnir geva 24 sovjteskum skipum loyvi at veiða svartkjaft í tíðarskeiðinum 1. apríl til 31. oktober 1988 (av hesum kunnu á økinum ásett í punkti VIII b í tíðarskeiðinum 15. apríl til 31. mai 1988, tó í mesta lagi vera 15 skip og 15 sovjetiskum skipum í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. mars og 10 í tíðarskeiðinum 1. november til 31. desember 1988 á føroyskum fiskiøki.

VIII. Viðvíkjandi máli 7 á dagsskránni varð hetta nevnt:

a. Báðir partar gjørdu hvør annan kunnugan við tær reglur, ið galda fyri fiskiskap ávikavist á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti og á føroyskum fiskiøki.

b. Hvør partur ansar eftir, at skip hansara halda tær lógir og reglur, ið galda fyri fiskiskap á økjum, ið eru undir lóggávu hjá hinum partinum. Serligar reglur kunnu verða settar í vrk í tíðarskeiðinum mars til og við muni fyri svartkjaftaveiðuna á føroyskum fiskiøki fyri

at sleppa undan troðkan, meðan fiskiskapurin fer fram á einum lutfalsliga avmarkaðum øki.

c. Viðvíkjandi mannagongdini at geva loyvi til fiskifør til sínámillum fiskiskap á økjum undir sovjetskari og føroyskari lóggávu komu partarnir ásamt um, at teir fyri árið 1988, ikki seinni enn 15 dagar áðrenn fiskiskapurin skal byrja, skulu senda yvirlit yvir tey skip, talan verður um.

d. Partarnir komu ásamt um, at neyðug umbøn um umskiftan av loyvum til skip skal fara fram pr. telex, sum verður sent til Murmansk, Riga ella Tórshavn, eftir somu mannagongd sum í 1987, áðrenn fiskiskapurin byrjar.

e. Báðir partar skulu nýta telex til loysn av øllum operativum spurningum í sambandi við sínámillum fiskiskapin.

f. Partarnir vóru samdir um, at skipini í samband við loyvisspurningar helst skulu nýta Murmansk, Riga ella Tórshavn sum atløguhavn.

IX. Viðvíkjandi máli 8 á dagsskránni komu partarnir ásamt um fylgjandi:

Føroysku myndugleikarnir geva 5 sovjetskum skipum loyvi til royndarfiskiskap á føroyskum fiskiøki djúpri enn 700 m. Upp til 3 skip kunnu fáa loyvi samstundis.

Frá føroyskari síðu verður loyvt einum av teimum trimum omanfyri nevndu skipum at reka djúpvatnsroyndarfiskiskap á Outher Bailey Bańka á dýpi ímillum 500 og 700 m, tó soleiðis, at har í mesta lagi verður veidd 200 tons av botnfiski.

Føroysku myndugleikarnir loyva 5 sovjetskum skipum at reka makrelfiskiskap og royndarfiskiskap eftir høgguslokki á føroyskum fiskiøki á teimum leiðum, har tað er loyvt sovjetskum skipum at veiða svartkjaft. Við hesum skipum kunnu vera upp til 4 føroyskir serfrøðingar. Samlaða veiðan av makreli má ikki fara upp um 5.000 tons, og royndarveiðan av høgguslokki ikki upp um 2.000 tons.

Um so er, at einki er til av makreli og høgguslokki, kunnu nevndu skip í juni — august veiða av samlaðu svartkjaftakvotuni, sum sovjetisk skip hava á fiskiøki Føroya. Tá lagt verður um til annan fiskiskap, skulu skipararnir á nevndu skipum, í góðari tíð boða avvvarðandi føroysku myndugleikunum frá hesum.

Sovjetsku myndugleikarnir loyva tveimum føroyskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir hørpuskel (Chlamys islandica á sovjetskum búskaparøki í Barentshavinum í 1988.

Sovjetiskir myndugleikar fara, ikki seinni enn 1. apríl 1988 at siga føroyskum myndugleikum frá, á hvørjum leiðum og í hvørjum tíðarskeiðum hesin royndarfiskiskapur kann vera.

Á hesum skipum kunnu vera 2 sovjetiskir serfrøðingar.

Partarnir komu ásamt um — um so er at møguleikar verða — at kanna spurningin um at reka royndarfiskiskap eftir atlanto-skandiskari sild á fiskiøkjunum hvør hjá øðrum.

Hvør parturin skal í góðari tíð gjøgnum telex leggja ætlanirnar fyri tílíkum royndararbeiðum fram fyri hin partin.

X. Í sambandi við mál 9 á dagsskránni, ymiskt, søgdu partarnir frá, at teir mettu víðkan av vísindaliga samstarvinum at vera eftir ynskjandi, harímillum luttøku partanna í fleirlanda vísindaligum samstarvi viðvíkjandi svartkjafti og sild, millum annað við tí í hyggju at áseta TAC fyri hesar veiður.

Viðvíkjandi atlanto-skandisku sildini eru partarnir samdir um at boða frá einum og hvørjum tilburði av veiðu av hesum fiskaslag undir fiskiskapi, royndarfiskiskapi ella havrannsóknum á fiskaøkjunum hvør hjá øðrum.

Partarnir løgdu dent á tey góðu úrslitini av royndunum at fáa í lag onnur slag av samstarvi á fiskivinnuøkinum og søgdu frá áhuga í at halda fram við hesum samstarvi.

XI. Partarnir samdust um, at tólvti fundurin í felagsnevndini skuldi haldast í Føroyum í seinnu helvt av 1988.

Dagsskráin fyri tólvta fundin í felagsnevndini verður løgd til rættis ígjøgnum stjórnarumboð.

Henda frásøgn er skrivað í Moskva 2. desember 1987 á føroyskum, donskum og russiskum. Allir tekstir hava sama gildi.

Umboð fyri Føroyar
í felagsnevndini

Kjartan Hoydal

Umboð fyri stjórnina í
Samveldinum av Sovialistiskum Sovjetríkjum í
felagsnevndini:
Mikhail Kargin

Inngangur

Við skrivi dagfest 27. februar 1984 setti landsstýrið ein arbeiðsbólk at kanna spurningin, um løgtingslóg um fólkabókasøvn v.m. nr. 44 frá 27. mai 1968 sum broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 21. mai 1980 eigur at verða endurskoðað við tí fyri eyga, at skúlabókasøvn koma undir lógina og — um arbeiðsbólkurin metti, at nevnda løgtingslóg átti at verið endurskoðað sum tilskilað — at tilevna eitt uppskot um hetta.

Arbeiðsbólkurin fekk hesar limir:

Sverre Egholm, landsbókavørð, umboðandi Føroya Landsbókasavn,
Hensar Ellingsgaard, táverandi námsfulltrúa, umboðandi Landsskúlafyrisitingina, og,
Bjørg Matras Jensen, skúlabókavørð, umboðandi Skúlabókasavnsfelagið.

Sverri Egholm, sum var formaður í arbeiðsbólkinum, bað í februar 1986 landsstýrið um at verða loystur frá hesari uppgávu, og Bókavarðafelagið hevur eitt á landsstýrið um at fáa umboð í arbeiðsbólkin.

7. november 1986 samtykti landsstýrið at seta arbeiðsbólkin av nýggjum við teirri starvsskrá at endurskoða fólkabókasavnslógina sum heild, heruppií við tí fyri eyga, at skúlabókasøvn koma undir lógina.

Arbeiðsbólkurin fekk nú niðanfyrinevndu limir:

Martin Næs, settan landsbókavørð.
Hensar Ellingsgaard, landsskúlastjóri,
Bjørg Matras Jensen, skúlabókavørð, Skúlabókasavnsfelagið,
Petur Simonsen, bygda- og skúlabókavørð,
Eldbjørn Joensen, skúlabókavørð,
Onnu Brimnes, býarbókavørð, Býarbókasavnið.
Karina Olsen, bókavørð, Føroya Landsbókasavn,
Randi Nolsøe, bókavørð, Bókavarðafelagið.

Uppgávan hjá arbeiðsbólkinum hevur verið at endurskoðað fólkabókasavnslógina, og at miða ímóti, at skúlabókasøvn koma undir lógina.

Arbeiðsbólkurin helt sín fyrsta fund 15. januar 1987, og semja var um at royna at gera eina felags lóg um alt bókasavnsvirkið.

Limirnir samdust tá eisini um, at skúlafólkini gjørdu eitt uppskot um eina skipan fyri skúlabókasøvn, og at bókavørðirnir tóku táttin upp um almannabókasøvn.

Síðani hevur verið roynt at samskipa tilfarið, og er arbeiðið nú endað við einum felags uppskoti til lóg um almanna- og skúlabókasøvn.

Saman hevur arbeiðsbólkurin hildið 7 fundir.

Meðan arbeitt hevur verið við hesum máli, hevur arbeiðsbólkurin fingið tvey skriv, bæði stílað til Føroya Landsstýri, annað frá Skúlabókasavnsfelgnum og hitt frá Føroya lærarafelagi, har hesi feløg mæla frá, at skúlabókasavnsmálið »verður flutt í bókasavnslógina«. Arbeiðsbólkurin var samdur um at lata skrivini liggja, meðan arbeitt varð við málinum. Skrivini verða nú saman við uppskotinum til lóg um almanna- og skúlabókasøvn, send landsstýrinum til støðutakan.

Verður hetta uppskot til lóg um almanna- og skúlabókasøvn samtykt, má løgtingslóg nr. 31 um landsbókasavn v.m. frá 2. mai 1952 endurskoðast beinanvegin, og samstundis fer løgtingslóg um fólkabókasøvn v.m. nr. 44 frá 27. mai 1968, broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 21. mai 1980, úr gildi.

Tórshavn, juli 1987

Martin Næs
settur landsbókavørður

Hensar Ellingsgaard
landsskúlastjóri

Bjørg Matras Jensen
skúlabókavørður,
Skúlabóksavnsfelagið

Petur Simonsen
bygda- og skúlabókavørður

Eldbjørn Joensen
Skúlabókavørður

Anna Brimnes
býarbókavørður,
Býarbókasavnið

Karin Olsen
bókavørður,
Føroya landsbókasavn

Randi Nolsøe
bókavørður
Bókavarðafelagið

Viðmerkingar:

1. BÓKASAVNSSTJÓRI.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at tær uppgávur, sum Landsbókasavnið í dag hevur mótvegis bygdabókasøvnunum verða lagdar yvir á ein bókasavnsstjóra, sum verður settur av landsstýrinum at taka sær av almannabókasavnsmálum, m.a. at skipa fyri skeiðvirksemi og endurútbúgving annars, og samstundis vera millumliður ímillum almannabókasavnsskipanina og landsstýrið. Mælt verður til, at bókasavnsstjórin, ið skal vera útbúgvin bókavørður, fær sum sítt virkisøki tað, sum á Løgtingsins fíggjarlóg í dag eitur konto § 15-15202 Fólkabókasøvn.

2. MEGINBÓKASØVN.

Meginbókasavnsdømi.

Til tess at miðfirra bókasavnstænastuna í Føroyum, mælir arbeiðsbókurin til, at landið verður skipað í 7 meginbókasavnsdømi. Í hvørjum meginbóksavnsdømi verður eitt væl útgjørt meginbókasavn, sum tekur sær av bókasavnstænastuni á staðnum og í døminum, um ikki annað er avrátt.

Ætlanin við meginbókasavnstankanum er at fáa bókasøvnini út, soleiðis, at allir landsins íbúgvar fáa, so frægt sum til ber, somu sømdir, tá ið tað snýr seg um bókasavnstænastu.

Meginbókasøvn.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at meginbókasøvnini verða á hesum støðum:
eitt í Suðurstreymoy, sum skal vera í Havn.
eitt í Sandoynni, sum skal vera heima á Sandi.
eitt í Suðuroy, sum skal vera á Tvøroyri.
eitt í Vágoynni, sum skal vera í Miðvági.
eitt í Norðurstreymoy + Norður Eysturoy, sum skal vera í Hvalvík.
eitt í Suður Eysturoy, sum skal vera á Glyvrum.
eitt í Norðoyggjum, sum skal vera í Klaksvík.

Uppgáva.
Meginbókasavnið skal, umframt at taka sær av bókasavnstænastuni í kommununi, har tað er, eisini skipa fyri, at bygdir í meginbókasavnsdøminum fáa eina líkinda bókasavnstænastu.

Eisini hevur meginbókasavnið í økjum, har sjúkrahús, ellisheim, ella aðrir tílíkir stovnar eru, skyldu til at royna at fáa í lag avtalur við hesar stovnar um bókaútlán.

Meginbókasavnið kann eisini gera avtalur um bókaútlán til skip.

Meginbókasavnið skal, í samráð við avvarðandi bý/bygdarráð og bókasavnsstjóran, stovna bókasøvn í bygdum, har einki almannabókasavn er frammanundan, ella á annan hátt syrgja fyri, at fólkinum verður veitt hóskandi bókasavnstænasta, t.d. við bókabili, ferðabókasøvnum, o.s.fr. Bókavørður frá meginbókasavninum skal hava ábyrgd av bókasavnstænastuni á teimum bókasøvnum, sum ikki hava bókavørð við útbúgving.

Innihald.

Meginbókasavnið skal lúka ávísar nærri ásettar treytir, sum landsstýrismaðurin í mentamálum lýsir í kunngerð viðvíkjandi tilfari, hølisviðurskiftum og manning, soleiðis at bókasavnstænastan kann verða røkt væl og virðiliga.

Meginbókasavnið skal vera soleiðis fyri, at tað kann veita almannabókasøvnunum í døminum bæði bókasavnstekniska og fakliga ráðgeving og hjálp. Meginbókasavnið skal eisini kunna læna ella útvega almannabókasøvnunum í meginbókasavnsdøminum bøkur og annað tilfar.

Starvsfólk.

Í øllum meginbókasøvnum skal leiðarin vera útbúgvin bókavørður við fullum arbeiðstímatali. Honum til hjálpar skal verða sett annað neyðugt starvsfólk. Við bókavørð er at skilja tann, sum kann skjalprógva at hava lokið útbúgving í bókasavnsfrøði frá viðurkendum læristovni. Undantak frá hesi treyt kann bert verða givið av landsstýrismanninum í mentamálum, tá ið bókasavnsstjórin og bókavarðafelagið í felag mæla til.

Fígging / Rakstur.

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at til nýstovnan av meginbókasøvnum letur landið 50% í landskassastudningi og til rakstur verða latin 60%, restina rinda bý/bygdarráðið, har meginbókasavnið er.

Tær meiriútreiðslur, ið standast av, at bókasavnið eisini er meginbókasavn, verða goldnar av bý/bygdarráðunum og landinum í felag eftir einari nærri ásettari stuðulsskipan.

Bókasavnsráð.

Av stórum týdningi fyri virksemið hjá meginbókasøvnunum er, at neyvt samstarv verður teirra millum, soleiðis at tey kunnu styðja hvør annað við í felag at skipa fyri almannabókasavnsrakstrinum í landinum og leggja hann til rættis. Leiðararnir á meginbókasøvnunum mynda í felag eitt bóksavnsráð, ið hevur fund í minsta lagi tvær ferðir um árið, har tey taka sær av bókasavnsmálum.

Í tíðarskeiðnum til meginbókasøvnini eru skipað, velja meginbókasavnsdømini, ímillum bygdabókavørðirnar, eitt umboð í bókasavnsráðið.

Bókasavnsráðið er hægsti myndugleiki í almannabókasavnsmálum og skrivari ráðsins er bókasavnsstjórin.

Meginbókasavnsnevnd.

Fyri hvørt meginbókasavn verður skipað ein meginbókasavnsnevnd, ið hevur ábyrgdina av rakstrinum av meginbókasavninum. Nevndin verður samansett av umboðum úr bý/bygdarráðum í meginbókasavnsdøminum, tó soleiðis at bý/bygdarráðið, har meginbókasavnið er, altíð hevur í minsta lagi ein lim í nevndini. Hinir limirnir verða valdir upp á skift ímillum bókasavnsnevndirnar í økinum.

Í meginbókasavnsnevndini verða 3, 5 ella fleiri, men altíð strakt tal av limum.

3. BÓKASTOVA.

Eitt tað fyrsta, arbeiðsbólkurin staðfesti, var, at sett eigur at verða á stovn ein bókastova, sum kann samskipa bókakeypið til almanna- og skúlabókasøvn, sum kann skráseta, binda inn og gera greitt alt tað føroyska tilfarið, sum bókasøvnini eins og nú mugu gjalda fyri.

Bókastovan er hugsað sum ein almennur stovnur.

Umráðandi er serliga, at bókastovan fær ein væl útgjørdan bókbindaraverkstað, sum kann binda inn eins skjótt og væl og teir útlendsku verkstaðirnir, sum higartil hava bundið inn og greitt meginpartin av tilfarinum til tey føroysku bókasøvnini. Hóast, at kalla, alt tað útlendska tilfarið framvegis verður keypt innbundið og bókasavnsgreitt uttanlands, verður kortini nógv spart, um so er, at allur tann føroyski parturin verður viðgjørdur í Føroyum.

Skráseting, avgreiðsla og annað upplýsandi virksemi.

Umframt at avgreiða, skráseta, binda inn og gera alt tað føroyska tilfarið greitt til øll bókasøvn í landinum, skal bókastovan eisini fremja upplýsandi tiltøk, so sum at gera listar, plakatir og annað.

Til tess at taka sær av hesum virksemi: skrásetingararbeiðinum, kortframleiðsluni, tilboðslistunum, avgreiðsluni av bókum og øðrum tilfari til bókasøvnini og til annað upplýsandi virksemi verður roknað við hesum størvum:

2	bókavørðum	
3	skrivstovufólkum	
1	pakkifólki	kr. 940.000

Bókbindaraverkstaður.

Mett verður, at í 1987 er samlaði innbindingartørvurin hjá almanna- og skúlabókasøvnunum 120 titlar × 200 eintøk = 24.000 bøkur.

Til tess at binda hesar bøkur inn og annars gera tær greiðar, er neyðugt at bókastovan hevur ein vælútgjørdan bókbindaraverkstað við hesum amboðum:

Heftimaskinu	kr.	50.000 x)
Knívi	kr.	60.000
Hydrauliskari pressu	kr.	30.000
Pappsaksi	kr.	20.000
Gyllingarpressu	kr.	30.000
Stavum	kr.	30.000
Stokkpressu	kr.	10.000
Límsmyrjimaskinu	kr.	10.000
Arbeiðsborði, brettum, handamboðum o.ø	kr.	20.000
		kr. 260.000

x) Prísirnir eru fyri brúktar maskinur í góðum standi.

Í hesum sambandi kann verður nevnt, at sum er, leigar Landsbókasavnið bókabindaramaskinum við lagaligum treytum. Um neyðugt, ber til hjá bókastovuni at langtíðarleiga somu maskinur.

Til tess at binda inn 24.000 bøkur um árið verður roknað við hesum størvum:

2	bókbindarum		
1	lærlingi		
1	arbeiðsfólki	kr.	570.000
	Tilfarið til bókabindaraverkstaðin	kr.	150.000

Høli.
Til bókastovuna krevst høli, ið er soleiðis til støddar:

Bókbindaraverkstaður	60 m²	
Skrivstovur	50 m²	
Pakkirúm	30 m²	
	140 m²	
Húsaleiga kr. 8.200.- × 12	kr.	98.400

Til bókastovuna sum heild er tað at siga, at eitt sindur er longu fingið til vega á Landsbókasavninum, bæði av amboðum til bókbindaraverkstaðin, størvum, umframt arbeiðsroyndum. Landsbókasavnið eigur í løtuni bókbindaraútgerð fyri uml. kr. 50.000 og hevur ein hálvan bókbindara í settum starvi.

Tá ið bókastovan er sett á stovn, verður ikki neyðugt hjá Føroya Landsbókasavni við egnum bókbindaraverkstaði, so tá kunnu amboð og møgulig størv verða flutt.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at bókastovan verður sett á stovn beinanvegin og at útbyggingin av henni verður gjørd yvir eitt tríáraskeið frá 1988 til 1991.

Fyri at bókastovan kann fara undir virksemi sítt, mugu hesi størv setast har beinanvegin:

1	bókavørður
1	skrivstovufólk
1	bókbindari
1	arbeiðsfólk . . . . . kr. 660.000

Landsstýrið ger serliga reglugerð um bókastovuna, virki hennara og samstarv við Landsmiðstøðina fyri undirvísingaramboð, Landsbókasavnið og øll bókasøvnini annars.

4. ALMANNA- OG SKÚLABÓKASØVN.

Í teimum førum, har bókasavnshølið er í skúlanum og er felags høli fyri almanna- og skúlabókasavn, skulu hølini bert brúkast til bókasavnstænastu. Um so er, at bókasavnið kortini verður brúkt til annað virksemi, verður rakstrarstudningurin minkaður samsvarandi hesum.

Almanna- og skúlabókasavnið skal hava eitt fjølbroytt úrval av tilfari, sum skal vera til taks bæði hjá børnum og hjá vaksnum.

Meginbókasavnið í døminum hevur ábyrgdina av almannabókasavnspartinum av einum samskipaðum, bæði almanna- og skúlabókasavni.

Tað er umráðandi, at tá ið tilfar verður keypt, verður hugsað um báðar partar av bókasavnsskipanini, bæði almanna- og skúlabókasavnspartin.

Í teimum førum har almanna- og skúlabókasavn húsast saman, hava tey eisini felags rakstrarroknskap, tó soleiðis, at bøkur og annað hóskandi tilfar, sum verður keypt at hava til taks á almanna- og skúlabókasavninum, verða bókað hvørt sær alt eftir til, hvat savnið tilfarið er keypt.

Í teimum førum har almanna- og skúlabókasavnið húsast hvørt sær, halda tey hvør sín rakstrarroknskap.

5. BÓKASAVNSGJALD.

Eins og í galdandi bókasavnslóg við broytingini frá 21. mai 1980 verður í hesi lóg tryggjað teimum, sum skriva á føroyskum og hvørs bøkur eru til taks á almanna- og skúlabókasøvnum eitt rímiligt endurgjald, nevnt bókasavnsgjald.

Hetta gjald eigur eisini at verða latið fyri týðingar og myndir. Haraftrat eigur bókasavnsgjaldið eisini at umfata bøkurnar á Føroya Landsbókasavni. Í sambandi við hesa lógargrein skal reglugerð gerast fyri býti av hesum bókasavnsgjaldi. Høvuðsbroytingin í reglugerðini verður viðvíkjandi sjálvum býtinum til aðrar bólkar enn rithøvundar, sum t.d. fyri týðingar og myndir og til eftirsitandi hjúnafelaga.

Orsakað av, at bókasavnsgjaldið eftir hesum skal verða latið fleiri bólkum enn rithøvundum, og tað sostatt verða fleiri, ið skulu hava hetta gjald, mælir arbeiðsbólkurin til at hækka prosentupphæddina upp í 8% av allari játtanini til almanna- og skúlabókasavnsraksturin og av játtanini til Føroya Landsbókasavn.

6. SERJÁTTAN FELAGS BÓKASAVNSUPPGÁVUM TIL FRAMA.

Við hesari serjáttan er hugsað um, at tað á hvørjum ári á fíggjarløgtingslógini verður játtað ein peningaupphædd, sum svarar til 10% av allari játtanini til almanna- og skúlabókasøvn og av játtanini til Føroya Landsbókasavn.

Peningurin verður settur í serligan bókasavnsgrunn landsstýrinum at ráða yvir til loysn av felags bókasavnsuppgávum og til serligar bókasavnstænastur, eitt nú til stovnan av bókabiltænastu, bókasavnstænastu til skip, til ljóðbókatænastu, telduútgerð, bókastovu o.a., sum kann koma fleiri bókasøvnum til gagns.

Landsstýrið ásetir nærri reglur fyri virksemi grunsins.

Sverri Egholm, sum var formaður í arbeiðsbólkinum, bað í februar 1986 landsstýrið um at verða loystur frá hesari uppgávu, og Bókavarðafelagið hevur eitt á landsstýrið um at fáa umboð í arbeiðsbólin.

7. november 1986 samtykti landsstýrið at seta arbeiðsbólkin av nýggjum við teirri starvsskrá at endurskoða fólkabókasavnslógina sum heild, heruppií við tí fyri eyga, at skúlabókasøvn koma undir lógina.

Arbeiðsbólkurin fekk nú niðanfyrinevndu limir:

Martin Næs, settan landsbókavørð.
Hensar Ellingsgaard, landsskúlastjóri,
Bjørg Matras Jensen, skúlabókavørð, Skúlabókasavnsfelagið,
Petur Simonsen, bygda- og skúlabókavørð,
Eldbjørn Joensen, skúlabókavørð,
Onnu Brimnes, býarbókavørð, Býarbókasavnið.
Karina Olsen, bókavørð, Føroya Landsbókasavn,
Randi Nolsøe, bókavørð, Bókavarðafelagið.

Uppgávan hjá arbeiðsbólkinum hevur verið at endurskoðað fólkabókasavnslógina, og at miða ímóti, at skúlabókasøvn koma undir lógina.

Arbeiðsbólkjurin helt sín fyrsta fund 15. januar 1987, og semja var um at royna at gera eina felags lóg um alt bókasavnsvirkið.

Limirnir samdust tá eisini um, at skúlafólkini gjørdu eitt uppskot um eina skipan fyri skúlabókasøvn, og at bókavørðirnir tóku táttin upp um almannabókasøvn.

Síðani hevur verið roynt at samskipa tilfarið, og er arbeiðið nú endað við einum felags uppskoti til lóg um almanna- og skúlabókasøvn.

Saman hevur arbeiðsbólkurin hildið 7 fundir.

Meðan arbeitt hevur verið við hesum máli, hevur arbeiðsbólkurin fingið tvey skirv, bæði stílað til Føroya Landsstýri, annað frá Skúlabókasavnsfelgnum og hitt frá Føroya lærarafelagi, har hesi feløg mæla frá, at skúlabókasavnsmálið »verður flutt í bókasavnslógina«. Arbeiðsbólkurin var samdur um at lata skrivini liggja, meðan arbeitt varð við málinum. Skrivini verða nú saman við uppskotinum til lóg um almanna- og skúlabókasøvn, send landsstýrinum til støðutakan.

Verður hetta uppskot til lóg um almanna- og skúlabókasøvn samtykt, má løgtingslóg nr. 31 um landsbókasavn v.m. frá 2. mai 1952 endurskoðast beinanvegin, og samstundis fer løgtingslóg um fólkabókasøvn v.m. nr. 44 frá 27. mai 1968, broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 21. mai 1980, úr gildi.

Tórshavn, juli 1987

Martin Næs
settur landsbókavørður

Hensar Ellingsgaard
landsskúlastjóri

Bjørg Matras Jensen
skúlabókavørður,
Skúlabóksavnsfelagið

Petur Simonsen
bygda- og skúlabókavørður

Eldbjørn Joensen
Skúlabókavørður

Anna Brimnes
býarbókavørður,
Býarbókasavnið

Karin Olsen
bókavørður,
Føroya landsbókasavn

Randi Nolsøe
bókavørður
Bókavarðafelagið

24. aug. 1987

F.L. j.nr.

Viðmerkingar:

1. BÓKASAVNSSTJÓRI.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at tær uppgávur, sum Landsbókasavnið í dag hevur mótvegis bygdabókasøvnunum verða lagdar yvir á ein bókasavnsstjóra, sum verður settur av landsstýrinum at taka sær av almannabókasavnsmálum, m.a. at skipa fyri skeiðvirksemi og endurútbúgving annars, og samstundis vera millumliður ímillum almannabókasavnsskipanina og landsstýrið. Mælt verður til, at bókasavnsstjórin, ið skal vera útbúgving bókavørður, fær sum sítt virkisøki tað, sum á Løgtingsins fíggjarlóg í dag eitur konto § 15-15202 Fólkabókasøvn.

2. MEGINBÓKASØVN.

Meginbókasavnsdømi.

Til tess at miðfirra bókasavnstænastuna í Føroyum, mælir arbeiðsbókurin til, at landsið verður skipað í 7 meginbókasavnsdømi. Í hvørjum meginbóksavnsdømi verður eitt væl útgjørt meginbókasavn, sum tekur sær av bókasavnstænastuni á staðnum og í døminum, um ikki annað er avrátt.

Ætlanin við meginbókasavnstankanum er at fáa bókasøvnini út, soleiðis, at allir landsins íbúgvar fáa, so frægt sum til ber, somu sømdir, tá ið tað snýr seg um bókasavnstænastu.

Meginbókasøvn.

Arbeiðsbólkurin mælri til, at meginbókasøvnini verða á hesum støðum:
eitt í Suðurstreymoy, sum skal vera í Havn.
eitt í Sandoynni, sum skal vera heima á Sandi.
eitt í Suðuroy, sum skal vera á Tvøroyri.
eitt í Vágoynni, sum skal vera í Miðvági.
eitt í Norðurstreymoy + Norður Eyslturoy, sum skal vera í Hvalvík.
eitt í Suður Eysturoy, sum skal vera á Glyvrum.
eitt í Norðoyggjum, sum skal vera í Klaksvík.

Uppgáva.
Meginbókasavnið skal, umframt at taka sær av bókasavnstænastuni í kommununi, har tað er, eisini skipa fyri, at bygdir í meginbókasavnsdøminum fáa eina líkinda bókasavnstænastu.

Eisini hevur meginbókasavnið í økjum, har sjúkrahús, ellisheim, ella aðrir tílíkir stovnar eru, skyldu til at royna at fáa í lag avtalur við hesar stovnar um bókaútlán.

Meginbókasavnið kann eisini gera avtalur um bókaútlán til skip.

Meginbókasavnið skal, í samráð við avvarðandi bý/bygdarráð og bókasavnsstjóran, stovna bókasøvn í bygdum, har einki almannabókasavn er frammanundan, ella á annan hátt syrgja fyri, at fólkinum verður veitt hóskandi bókasavnstænasta, t.d. við bókabili, ferðabókasøvnum, o.s.fr. Bókavørður frá meginbókasavninum skal hava ábyrgd av bókasavnstænastuni á teimum bókasøvnum, sum ikki hava bókavørð við útbúgving.

Innihald.

Meginbókasavnið skal lúka ávísar nærri ásettar treytir, sum landsstýrismaðurin í mentamálum lýsir í kunngerð viðvíkjandi tilfari, hølisviðurskiftum og manning, soleiðis at bókasavnstænastan kann verða røkt væl og virðiliga.

Meginbókasavnið skal vera soleiðis fyri, at tað kann veita almannabókasøvnunum í døminum bæði bókasavnstekniska og fakliga ráðgeving og hjálp. Meginbókasavnið skal eisini kunna læna ella útvega almannabókasøvnunum í meginbókasavnsdøminum bøkur og annað tilfar.

Starvsfólk.

Í øllum meginbókasøvnum skal leiðarin vera útbúgvin bókavørður við fullum arbeiðstímatali. Honum til hjálpar skal verða sett annað neyðugt starvsfólk. Við bókavørð er at skilja tan n, sum kann skjalprógva at hava lokið útbúgving í bókasavnsfrøði frá viðurkendum læristovni. Undantak frá hesi treyt kann bert verða givið av landsstýrismanninum í mentamálum, tá ið bókasavnsstjórin og bókavarðafelagið í felag mæla til.

Fígging / Rakstur.

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at til nýstovnan av meginbókasøvnum letur landið 50% í landskassastudningi og til rakstur verða latin 60%, restina rinda býy/bygdarráðið, har meginbókasavnið er.

Tær meiriútreiðslur, ið standast av, at bókasavnið eisini er meginbókasavn, verða goldnar av býy/bygdarráðunum og landinum í felag eftir einari nærri ásettari stuðulsskipan.

Bókasavnsráð.

Av stórum týdningi fyri virksemið hjá meginbókasøvnunum er, at neyvt samstarv verður teirra millum, soleiðis at tey kunnu styðja hvør annað við í felag at skipa fyri almannabókasavnsrakstrinum í landinum og leggja hann til rættis. Leiðararnir á meginbókasøvnunum mynda í felag eitt bóksavnsráð, ið hevur fund í minsta lagi tvær ferðir um árið, har tey taka sær av bókasavnsráðið.

Bókasavnsráðið er hægsti myndugleiki í almannabókasavnsmálum og skrivari ráðsins er bókasavnsstjórin.

Uppskot til lóg um almanna- og skúlabókasøvn

1. Endamál

§ 1. Almannabókasøvn hava til endamáls at fremja upplýsing, lærdóm og mentunarvirksemi.
2. stk. Til hetta hava søvnini til taks bøkur og annað hóskandi tilfar, sum kann verða lænt út uttan viðurgjald.

II. Almannabókasøvn

§ 2. Øll bý/bygdarráð hava skyldu at skipa fyri almannabókasavnstænastu.
2. stk. Almannabókasøvnini eru kommunal, og bý/bygdarráðini velja eina bókasavnsnevnd, ið hevur ábyrgdina av bókasavnsrakstrinum. Virkisøkið er avvarðandi býur/bygd, ella, um avtala er millum fleiri býir/bygdir um felags bókasavnsrakstur, hesar bygdir.
3. stk. Tað stendur øllum íbúgvum í landinum í boði frítt at nýta eitthvørt almannabókasavn.

§ 3. Almannabókasavnið skal hava deildir fyri bæði børn og vaksin.
2. stk. Í øllum almannabókasøvnum skal leiðarin vera útbúgvin bókavørður. Honum til hjálpar skal verða sett annað neyðugt starvsfólk.
3. stk. Almannabókasøvn hava skyldu at royna at fáa í lag avtalu við barnagarðar, vøggustovur og aðrar stovnar í virkisøkinum um bókasavnstænastu.
4. stk. Somuleiðis skulu almannabókasøvn samstarva við stovnsbókasøvn og onnur sersøvn.
5. stk. Har tørvur er á øktari bókasavnstænastu, skal almannabókasavnið seta á stovn deildir, veita bókabil- ella aðra tænastu.

Forslag til lov om folke- og skolebiblioteker

1. Formål

§ 1. Folkebibliotekernes formål er at fremme oplysning, lærdom og kulturelle aktiviteter.
Stk. 2. Dertil har bibliotekerne til deres disposition bøger og andet egnet materiale, som vederlagsfrit kan udlånes.

II. Folkebiblioteker

§ 2. Alle by/bygderåd har pligt til at etablere folkebibliotekstjeneste.
Stk. 2. Folkebibliotekerne er kommunale, og by/bygderådene nedsætter et biblioteksudvalg, som har ansvaret for biblioteksdriften. Virkeområdet er vedkommende by/bygd eller, når der foreligger aftale mellem flere byer/bygder om fælles biblioteksdrift, disse bygder.
Stk. 3. Der er fri afbenyttelse af ethvert folkebibliotek for alle landets indbyggere.

§ 3. Folkebiblioteket skal have afdelinger for både børn og voksne.
Stk. 2. I alle folkebiblioteker skal lederen være uddannet biblioteker. Til hans assistance skal der ansættes andet nødvendigt personale.
Stk. 3. Folkebibliotekerne har pligt til at søge at etablere aftaler med børnehaver, vuggestuer og andre lignende institutioner i virkeområdet om bibliotekstjeneste.
Stk. 4. Ligeledes skal folkebibliotekerne samarbejde med institutionsbiblioteker og andre specialsamlinger.
Stk. 5. Hvor der er behov for udvidet bibliotekstjeneste, skal folkebiblioteket oprette nye bogbustjeneste eller anden tjeneste.

§ 4. Fyri hvørt almannabókasavn ger bý/bygdarráðið eina viðtøku; um so er, at bókasavnið er felags savn fyri fleiri býir/bygdir, so gera bý/bygdarráðini viðtøkuna.

2. stk. Viðtøkurnar verða sendar bókasavnsráðnum til góðkenningar.

3. stk. Eftirlit við almannabókasøvnunum hevur meginbókasavnið í døminum, og tað veitir ráð og leiðbeiningar.

III. Meginbókasøvn

§ 5. Landið verður skipað í 7 meginbóksavnsdømi. Í hvørjum meginbókasavnsdømi verður eitt væl útgjørt meginbókasavn, sum tekur sær av bókasavnstænastuni á staðnum og í døminum, um ikki annað er avrátt.

2. stk. Í øllum meginbókasøvnum skal leiðarin vera útbúgvin bókavørður við fullum arbeiðstímatali. Honum til hjálpar skal verða sett annað neyðugt starvsfólk.

3. stk. Til nýstovnan av meginbóksøvnum letur landið 50% í landskassastudningi og til rakstur verða latin 60%, restina rindar bý/bygdarráðið. har meginbókasavnið er. Tær meiriútreiðslur, ið standast av, at bókasavnið eisini er meginbókasavn, verða goldnar av bý/bygdarráðunum og landinum í felags eftir eini nærri ásettari stuðulsskipan.

§ 4. For hvert folkebibliotek udfærdiger by/bygderådet et regulativ; i tilfælde af, at biblioteket er fælles for flere byer/bygder, gøres dette af by/bygderådene.

Stk. 2. Regulativerne skal forelægges biblioteksrådet til godkendelse.

Stk. 3. Områdets centralbibliotek har tilsyn med folkebibliotekerne, og det giver råd og vejledning.

III. Centralbiblioteker

§ 5. Landet opdeles i 7 centralbiblioteksdistrikter. I hvert centralbiblioteksdistrikt skal der være et velforsynet centralbibliotek, som tager sig af bibliotekstjenesten på stedet og i distriktet, når ikke andet er aftalt.

Stk. 2. I alle centralbiblioteker skal lederen være uddannet bibliotekar med fuld arbejdstid. Til hans assistance skal der ansættes andet nødvendigt personale.

Stk. 3. Til etablering af centralbiblioteker yder landet 50% som landskassetilskud og til driften 60%, resten udredes af det by/bygderåd, hvor centralbiblioteket er beliggende. De ekstraudgifter, der skyldes, at biblioteket også er centralbibliotek, erlægges af by/bygderådene og landet i fællesskab efter en nærmere fastsat støtteordning.

4. stk. Leiðararnir á meginbókasøvnunum mynda í felag eitt bókasavnsráð, ið hevur fund í minsta lagi tvær ferðir um árið, har tað tekur sær av bókasavnsmálum. Landsstýrið ásetir reglur fyri virki ráðsins.

IV. Fígging, Rakstur.

Vit eiga at umhugsa hetta, tá talan verður um at seta nýggjar útbúgvingar á stovn, so at ikki stórur partur av konufólkunum noyðast av landinum fyri at fáa sær útbúgving. Eisini kundi hugsast at broytt verandi útbúgvingar, so at tað verður gjørt møguligt og áhugavert hjá konufólki at farið til tær sokallaðu »mannfólkaútbúgvingar«. Hetta er ein leið, sum verður roynd aðra staðni, og tað vísir seg at vera gongd leið.

Tekniska útbúgvingar

Í Føroyum eru 2 tekniskir skúlar. Annar er í Havn og hin í Klaksvík. Skúlin í Klaksvík er farin undir 2. byggistig av skúlanum, og ætlanin er, at 2 byggistig skulu koma aftrat. Skúlin í Havn er ikki enn farin at byggja, men vónandi verður hetta skjótt, tí umstøðurnar hjá skúlanum eru ikki ov góðar við teimum útbúgvingum, sum í dag fara fram, og ætlanin er at seta nýggjar útbúgvingar á stovn.

Í sambandi við samráðingarnar um blokkstuðulin úr Danmark, varð Landsskúlafyrisitingin biðin um at gera eitt notat viðvíkjandi møguligt eftirsleip í mun til restina av ríkinum á hesum skúlaøki.

Tað kann nevnast, at teir teknisku skúlarnir, handilsskúlin og maskinskúlin eru felagsmál, og 100% fíggjaðir úr Danmark. Striltið hevur tó verið tey seinastu árini at fingið tann neyðuga peningin, og neyðugt hevur verið hjá landsstýrinum at goldið pening til maskinskúlan.

Á síðu 11-14 sæst hetta notatið — umsett til føroyskt.

Út frá hesum vil Landsskúlafyrisitingin skjóta hetta upp:

Sum er fara 4 handverksútbúgvingar fram í Klaksvík. Hesar útbúgvingar fara eisini fram í Havnini. Betri hevði verið, at ymiskar útbúgvingar fóru fram á teimum báðum skúlunum, tí lærlingatalið er í minna lagi til at skula býtast út á tveir skúlar. Útbúgvingin er ein ajourfød meistaralæra, so bert tey, sum hava lærukontrakt kunnu ganga á skúlanum (undantikið er útbúgvingin til tekniskar atstøðarar og tekniskar teknarar og so tey eftirútbúgvingarskeið, sum vera

hildin fyri handverkarar). Stórur tørvur er á eini nýskapan á økinum, sum kundi lúkað tørvin í samfelagnum.

1: Eitt støðisár verður sett á stovn.
2: Tær verandi útbúgvingarnar verða endurskoðarar og lagaðar til føroysk viðurskifti og til ta teknologisku menningina, sum fer fram.
3: Ymiskar framhaldandi tekniskar útbúgvingar verða settar á stovn í Tórshavn, sum t.d. byggiteknikara-útbúgving.
4: Sveisaraútbúgvingin verður gjørd til eina veruliga holla handverksútbúgving í Havn.
5: Støða eigur at vera tikin til, um skúlagongdin hjá lærlingum í veikstreymsfakunum skal flytast til Føroyar.
6: Ein verkstaðarskúli verður settur á stovn í Klaksvík.
7: Saman við HF-skeiðinum í Klaksvík verður ein HTx útbúgving skipað.
8: Útbúgvingar á matvøru- og servisu-økinum vera í Klaksvík, so sum t.d. tænarar, kokkar, køksatstøðarar o.a.
9: Báðir skúlarnir eiga at hava nógv tilboð um eftirútbúgving av handverkarum.

NB: HTx merkir: Hægri teknisk prógtøka og verður eisini kallað fyri tekniskt gymnasium.

Á síðu 46 síggjast nakrar talvur, sum vísa, hvørjar útbúgvingar tørvur verður á í næstu framtíð.

Viðvíkjandi teimum teknisku skúlunum í sambandi við blokkstuðul til Føroyar

---

Hyggja vit eftir útbúgvingarøkinum innan fyri teir teknisku skúlarnar í Føroyum, er ongin ivi um, at har er ávíst trot – eftirsleip – í mun til restina av ríkinum. Hetta er galdandi fyri bæði tær verandi útbúgvingarnar og serstakliga fyri útbúgvingar, ið ikki eru til í Føroyum yvirhøvur, sjálvt um tørvur heilt klárt er á teimum

Her kann nevnast:

VERANDI ÚTBÚGVINGAR:

Hesar útbúgvingar eru í dag á teimum báðum teknisku skúlunum:

Maskinarbeiðarari (á báðum skúlunum)
Rørsmiður
Blikksmiður
Stálskipasmiður
Sveisari
Bilmekanikari
Elektrikari (á báðum skúlunum)
Húsasmiður (á báðum skúlunum)
Træsmiður (á báðum skúlunum)
Frisørur
Tekniskur Atstøðari/Tekniskur Teknari

Hesar verandi útbúgvingar, sum allar (uttan tekniskir atstøðarar og tekniskir teknarar) eru skipaðar sum meistaralæra, eiga at vera tiknar upp til viðgerðar, soleiðis at tær eru á einum støði, sum er í minsta lagi líka so høgt, sum í restini av ríkinum, men lagað til føroysk viðurskifti. Her skal nevnast, at sveisaraútbúgvingin er á einum sera lágum støði. Hon varir bert 2 1/2 ár við einans 2 vikum á skúla. Ætlanir eru gjørdar um eina víðkan av hesi útbúgving. Maskinarbeiðaraútbúgvingin eigur eisini at endurskoðast, so at hon t.d. eisini fevnir um hydraulikk.

ÚTBÚGVINGAR. SUM IKKI ERU SETTAR Á STOVN Í FØROYUM:

Hesar útbúgvingar kunnu býtast í hesar bólkar:

1) *Eitt støðisár á tí tekniska skúlaøkinum.*
2) *Lærlinga- og »EFG«-líknandi útbúgvingar, sum ikki eru til í Føroyum í dag, men sum tørvur er á.*
3) *Grundleggjandi tekniskar útbúgvingar.*
4) *Verkstaðsskúlar — verkstaðsskeið.*
5) *Heilsuútbúgvingar.*
6) *Framhaldandi tekniskar útbúgvingar.*

Byrjan.
Tað verður viðhvørt ført fram, at um fleiri útbúgvingar verða settar á stovn í Føroyum, vil lærlinga/næmingatalið til tær verandi útbúgvingar minka. Hetta vísir seg tó ikki at vera so. Tá HHx og FHS byrjaðu, varð mett, at t.d. tilgongdin

til studentaskúlarnir og HF vildi minka. Hetta hendi ikki. Heldur vísti tað seg, at tørvurin á útbúgving ikki er dekkaður í Føroyum. Í hesum sambandi kunnu vit eisini hugsa um øll tey, sum taka útbúgving aðrastaðni, t.d. í Danmark. Eisini er tað soleiðis, at talið av ungum, sum fara undir útbúgving er vaksandi enn. Hetta merkir, at ungdómur, sum bert fyri fáum árum síðani fór til skips (mannfólk) ella var verandi heima, átti børn o.s.fr. (konufólk) í dag fara undir útbúgving. Serliga er útbúgvingartørvurin fyri konufólk stórur. Sum viðurskiftini eru nú, er tað sera vanligt, at konufólkini mugu fáa sær útbúgving í øðrum londum, tí onki er at bjóða teimum í Føroyum, og tað er eitt stórt tal av ungum, sum á hvørjum ári fara t.d. til Danmarkar at byrja eina útbúgving, og nógv venda ongantíð aftur. Serstakliga millum-teknikaraøkið liggur á láni.

AD. 1: Eitt støðisár fyri handverkaraútbúgvingarnar átti at verið sett á stovn. Tilgongdin til teir teknisku skúlarnar vildi óivað vaksið, av tí at hetta kann nýtast nógvar aðrar útbúgvingar, t.d. atstøðis- og teknikaraútbúgvingar. Tað vísir seg, at stórur tørvur er á handverkarum, serliga innan til byggifakini, og stórt tal av handverkarum verður innflutt úr Danmark, tí tørvur er á arbeiðskraft. Eitt støðisár vildi óivað økt um tilgongdina til handverkaraútbúgvingarnar, og fleiri gentur høvdu kanska farið hesa leið. Arbeitt hevur verið við ætlan um eitt felags støðisár fyri allar handverksútbúgvingarnar og ikki sum í Danmark býtt upp í øki, tí mett verður at hetta vildi verið ov dýrt, og eisini hevði næmingatalið verið ov lítið. Seinasta hálva kundi kanska verið býtt í fleiri greinar, sum næmingarnir kundu valt. Væntast kundi 1-2 flokkar í Klaksvík og 3-4 flokkar í Tórshavn.

AD. 2: Tørvur er t.d. á lærlinga- ella »EFG«-útbúgving á **Veikstreymsøkinum.** Útbúgvingin kundi fevnt um:
KONTÓRMASKINMEKANIKARAN, RADIOMEKANIKARAN, ELEKTRONIKMEKANIKARAN OG DATAMEKANIKARAN.

Í Føroyum er tað óivað ikki so skilagott at greina útbúgvingarnar so nógv, sum gjørt er í Danmark, men heldur gera eina breiðari útbúgving. Útviklingurin er væl soleiðis, at ein spesialisering frá byrjan ikki er heppin, tí økið er í stórari menning.

Á hesum økinum eru Føroyar eitt sera framkomið land. Tað er eitt av teimum mest »datamatiseraðu« økjunum í verðini. Tað kann nevnast, at fiskivinnan — øll flakavirkini — er datastýrd. Skipanin er gjørd av einum føroyskum virki, sum nú útflytir hesa til fiskaídnaðin um alla verðina. Í dag eru 4 stór datavirki í Føroyum. Nógv av teimum taka fólk inn, sum tey sjálvi upplæra. Onnur verða

send til Danmarkar, soleiðis sum eisini elektronikmekanikarar, radiomekanikarar og kontórmaskinumekanikarar fáa teirra skúlagongd í Danmark. Lærlingatalið er nú økt so mikið, at umhugsað eigur at verið, um tað ikki hevði loyst seg at havt skúlagongdina í Føroyum.

Í Føroyum verða automekanikarar útbúnir. Økið átti at verið víðkað til eisini at umfata ta stóru nøgd av maskinum, sum eru til vegarbeiði, byggjarí og onnur annlegg. Enn er tó ikki gjørd endalig ætlan um hetta.

Á matvøru- og Servisu-økinum er tørvur á útbúgvingum sum:

Køksatstøðarar. Tænarar. Kokkar. Fólk, sum gera smurt breyð (»smørrebrødsjomfru«) og Slátrarar.

Hesi seinastu árini eru Føroyar vorðnar eitt ferðamannaland. Talið á hotellum, matstovum, gistingarhúsum o.a. er vaksandi. Næstan onki útbúgvið fólk er á økinum, og tað hevur stóran týdning, at servisu-stigið er so høgt sum gjørligt. Tað hevur skund at fáa hesar útbúgvingar settar á stovn, so at tað ikki verður neyðugt at innflyta útbúgvið fólk frá øðrum londum.

(Aðrar útbúgvingar á matvøruøkinum á produktiónsøkinum eiga at koma undir fiskaídnaðarútbúgvingarøkinum, sum skjótt verður sett á stovn. Fiskaídnaðarútbúgvingin verður ikki ein lærlingaútbúgving, men ein atstøðara- og teknikaraútbúgving, og eisini verður hon ein føroysk útbúgving.)

AD. 3: Á hesum øki kunnu nevnast útbúgvingar sum:
Tekstil-útbúgving: Rávørur, viðgerð og tilvirking á atstøðarastøði. (Eitt uppskot er gjørt til eina slíka útbúgving, sum tekur 2 ár aftan á eitt støðisár við praktikk innlagt í 1/2 ár.

Føroyar hava ull og skinn sum rávørur, og fleiri virki á økinum. Tá vit síggja, hvat ið t.d. Ísland fær burtur úr sínum rávørum, er tað spell, at ikki meira verður gjørt fyri at útvikla og útnytta hesar rávørur. Tey fáu, sum hava útbúgving á økinum, hava fingið hana í m.a. Onglandi. Hetta vildi verið ein útbúgving, sum gentur høvdu valt.

HTx kann setast á stovn í sambandi við HF-skeiðið í Klaksvík. Hetta vildi verið ein góður møguleiki at boðið næmingunum, sum hava

tikið støðisárið. Á sama hátt sum HHx er ein góður møguleiki hjá næmingum, sum hava tikið FHS á handilsskúlanum.

AD. 4: **Verkstaðarskúlar og verkstaðarskeið** eru neyðug at seta á stovn.

Verkstaðarskúlar: 1 ár skúli + 1 (2) ár praktikk.
Verkstaðarskeið: 1/2 ár skúli + 1/2 (1) ár praktikk.
(Fyri fólk, sum hava HF ella líknandi).

Verkstaðsskúlar- og skeið eru ætlað til fólk, sum kundu hugsað sær framhaldandi tekniskar útbúgvingar, teknikum, maskinmeistara-útbúgving o.a., og sum ikki hava sveinabræv. Ein stórur partur av einum árgangi av ungum fara á studentaskúla og HF. Tann stóri parturin av teimum fara ikki undir longri, hægri útbúgvingar á lærdum háskúlum, men kundu hugsað sær eina millumteknikara-útbúgving. Men fyrst at fara undir eina langa handverksútbúgving fyri at fáa sveinabræv, er ein ov langur vegur at fara. Tørvurin er stórur á slíkum fólkum, og tí hevði tað verið eitt gott tiltak at sett hesar skúlar á stovn í sambandi við teir teknisku skúlarnar.

AD. 5: Útbúgvingar á heilsuøkinum eiga at takast við her. Tørvur er á: Røktarum, Røktarheimsatstøðarum og Sjúkrahjálparum. Umsókn liggur frá sjúkrahúsinum um skjótast tilber at fara undir at útbúgva røktarar, tí tørvurin er ógvuliga stórur, og ein loysn má gerast beinanvegin. Fleiri røktarheim eru í Føroyum og fleiri koma óivað. Ongir praktiskir trupulleikar skuldi verið fyri, at nevndu útbúgvingar kundu farið fram í Føroyum. Tað kann nevnast, at sjúkrasystraútbúgving er í Føroyum.

AD. 6: Tørvurin á fólki við framhaldandi tekniskum útbúgvingum er stórur, og arbeitt verður við at seta fleiri av hesum á stovn í Føroyum á teimum teknisku skúlunum. Sum nú er, verða fólk ofta útbúgvið beinleiðis á arbeiðsplássunum, men hetta er sera óheppið, tí tað gevur onki prógv, og heldur ikki fáa tey nakra skúlagongd, men bert praktiska upplæring. Hesar útbúgvingar kundu hugsast:

Í Danmark eru nógvar ymiskar framhaldandi tekniskar útbúgvingar:

BYGGITEKNIKARI
MASKINTEKNIKARI
ELEKTRONIKTEKNIKARI
EL-INSTALLATØRUR
eru bert nøkur fá dømi.

Óivað kundu vit í Føroyum havt nakrar av hesum útbúgvingunum, og »gjørt« ein breiðari teknikari.

Grundarlagið fyri at taka hesar útbúgvingar eru:

– Handverksútbúgving á jarn- og metalløkinum og byggi- og anleggsøkinum.

– Verkstaðsskúli ella verkstaðsskeið.

– Grundleggjandi tekniskar útbúgvingar, t.d. HTx, tekniskur atstøðari, tekniskur teknari o.a.

Landsskúlafyrisitingin juni 1986.

Fiskaídnaðar- og havbúnaðarútbúgving

Sum øllum kunnugt er fiskivinnan grundarlagið undir tí føroyska samfelagnum, og størsti partur av útflutningi okkara er fiskavørur. Hyggja vit í hesum sambandi eftir útbúgvingum á økinum, sæst, at Føroyar, sum einasta land í Norðurlondunum ikki hava útbúgving fyri fólk, sum skulu starvast í fiskaídnaðinum. Útbúgvingar eru á navigatións- og maskinøkinum á sjónum, men ikki nakrar, sum umfata viðgerð og góðsking av rávøruni.

Í 1982 setti táverandi landsskúlastjóri, Ludvig Petersen, eina nevnd at gera uppskot til útbúgvingar í fiskivinnuni. Í september 1983 varð eitt álit hesum viðvíkjandi liðugt. Uppskot um at seta á stovn ein yrkisskúla fyri fiskaídnað og havbúnað liggur nú á tingi, og vónandi verður uppskotið samtykt, soleiðis at farið kann vera undir at útbúgva fólk á hesum økinum. Tey seinastu 10 árini er eftirspurningurin eftir fólki við útbúgving innan fiskivinnuna vaksin nógv, og nógv ung fólk — bæði konufólk og mannafólk — hava fingið sær útbúgving í øðrum Norðanlondum, serstakliga í Noreg.

Á teimum næstu síðunum (síða 16-21) er ein stutt frágreiðing um útbúgvingina.

Landsskúlafyrisitingin skjýtur upp, at skúlin verður settur á stovn í Runavík. Deildir kunnu síðani leggjast aðra staðni í landinum, t.d. í Suðuroy og í Vágum.

Grundirnar til at Runavík verður skotin upp eru hesar:

Fyrsta árið skulu næmingarnir nýta helvtina av tíðina til ástøðiligar lærugreinir og hina helvtina til starvsupplæring. Ætlanin er at byrja við uml. 20 næmingum, so ikki ber til at seta lærarar við skúlan burturav í øllum lærugreinum. Tí má skúlin nýta lærarar úr øðrum skúlum sum t.d. HF, studentaskúlum og handilsskúlum. Ikki er ætlanin at byggja eitt fiskavirki til skúlan, so neyðugt er at næmingarnir kunnu fáa ta starvsligu upplæringina á verandi virkjum. Hetta krevur, at teir fáa atgongd til fleiri virki, tí ikki ber til hjá einum virki at hava 20 næmingar í upplæring, og heldur ikki verður hetta nóg fjølbroytt.

Runavík er eitt pláss, sum kundi uppfylt hesar treytir. Eisini kunnu næmingar, sum búgva í Havn ganga á skúlanum.

Útbúgvingin, sum tilsamans er 3 ár, skal kunna føra til hægri útbúgvingar innan fyri økið.

Fiskiídnaðarútbúgving

STUTT FRÁGREIÐING

ENDAMÁL: Endamálið við útbúgvingini er at geva næmingunum almennar og yrkisligar kunnleikar og fjølbroytta starvsliga venjing, soleiðis at teir gerast førir fyri at virka í og luttaka í menningini av tí føroyska fiskaídnaðinum. Teir skulu skilja støðið hjá fiskiídnaðinum, sæð í mun til tað føroyska samfelagið og tey náttúruríkidømi, sum hesin ídnaður er treytaður av. Teir skulu gjøgnum hesa útbúgving fáa møguleika fyri framhaldandi útbúgving.

UPPTØKUKRØV: Undirvísingin byggir á 9. flokks kunnleika, og aldursmarkið er 16 ár. Fólk, ið ikki hava 9. flokk úr fólkaskúlanum, kunnu tó takast upp, um tey í staðin hava arbeitt nøkur ár t.d. innan fiskivinnuni ella á annan hátt verða mett at vera før fyri at kunna gjøgnumføra útbúgvingina við rímiligum úrsliti.

BYGNAÐUR: Útbúgvingin er vanliga 2 ár, har hvørt ár endar við einari prógvtøku. Harafturat skulu næmingarnir antin:

a) taka 10 mánaðar skipaða, skúlastýrda starvsvenjing innan fiskiídnaðin aftan á 1. árið, ella

b) hava arbeitt í minsta lagi 2 ár innan fiskivinnu. — Hetta arbeiðið skal góðkennast av skúlanum).

a) ella b) saman við 1. árs prógvi gevur samstundis rætt til at taka eina yrkisroynd, sum gevur yrkisprógv.

INNIHALD: 1. árið: Undirvísingartíðin er 38 vikur á 40 tímar. Tilsamans verður hetta 1520 tímar. 50% av tíðini verða nýtt til **yrkisrættaðar, almennar lærugreinar,** og 50% verða nýtt til **yrkisstarvslæru og -ástøði.** Tann starvsliga upplæringin fer fram í royndarhølum skúlans og á verandi virkjum.
Aftaná 1. árið fáa næmingarnir fráfaringarprógv fyri bæði tann starvsliga og tann árstøðiliga partin.

LÆRUGREINIR: 1. ÁRIÐ: Almennar lærugreinir (yrkisrættaðar):

ALISFRØÐI/EVNAFRØÐI
ROKNING/STØDDFRØÐI/EDV
VIRKISBÚSKAPUR
SAMFELAGSLÆRA
FISKIFRØÐI
ENSKT
FØROYSKT
ARBEIÐSUMHVØRVI/ERGONOMI

Yrkisstarvslæra og -ástøði
Hesin partur er býttur upp í 6 høvuðspartar:
I: Fyrstahondshagreiðing um borð og í landi.
II. Frysting og framleiðsla av frystum fiskavørum.
III. Saltfiskur.
IV: Fiskamjøl.
V: Góðsking og vørumenning.
VI: Viðlíkahald av útgerð.

Mynd av fisk

Í samband við starvslæruna fáa næmingarnir tað ástøðiliga grundarlagið, umfatandi m.a. SMÁVERU-LÍVSFRØÐI, PRÍSÁSETAN, DYGDARKRØV, LÓGIR, REGLUR OG FYRISKIPANIR fyri fiskavøruframleiðslu o.ø.

Myndir av fiskum

STARVSVENJING: Fyri at tryggja, at næmingarnir fáa ta neyðugu venjingina og eisini fáa kunnleika til viðurskiftini á einum arbeiðsplássi, verður skipað fyri eini SKÚLASTÝRDARI STARVSVENJING í 10 mánaðar aftan á 1. árið. Hetta verður gjørt í samstarvi við fiskiídnaðin. Hjá næmingum, sum hava arbeitt í minsta lagi 2 ár innan fiskivinnuna, og sum fáa hetta góðkent frá skúlanum, er hetta tó ikki neyðugt.

YRKISROYND: Næmingar, ið hava staðið 1. árs royndina og harafturat hava omanfyri nevndu starvsvenjingina kunnu fara upp til eina YRKISROYND, sum vinnan er við til at skipa fyri. Hetta kann geva teimum eitt YRKISBRÆV, sum prógv fyri, at teir eru royndir innan fiskiídnaðararbeiði.

LÆRUGREINIR:
2. árið: Er 1. árið endað við nóg góðum úrsliti, gevur hetta rætt til at halda fram á 2. ári, um tann starvsliga venjingin er í lagi. T.e., at næmingurin antin hevur tikið 10 mánaðar skipaða starvsvenjing ella hevur arbeitt í minsta lagi 2 ár innan fiskivinnuna.

Undirvísingartíðin er 38 vikur á 35 tímar. Til samans verður hetta 1330 tímar. 65% av tíðini verða nýtt til ástøðiliga undirvísing í yrkisligum og almennum lærugreinum, og 35% verða nýtt til starvsstovuroyndir og venjing í royndarhøli, og á verandi virkjum.

Aftan á 2. árið fara næmingarnir til prógvtøku, og prógv verður givið fyri lokna fiskiídnaðarútbúgving.

LÆRUGREINIR:
2. ÁRIÐ: Árið er býtt upp í 2 lestrarhálvur. Nakrar lærugreinir vara bert eina hálvu, og aðrar báðar hálvurnar.

1. lestrarhálva:
MÁVERULÍVFRØÐI
LÍVFRØÐI

EVNAFRØÐI
ALISFRØÐI
HAGFRØÐI/EDV
ROKNSKAPARLÆRA
VIRKISBÚSKAPUR
FØROYSKT
ENSKT

2. lestrarhálva:
MATVØRULÆRA/FRAMLEIÐSLA
TILFARSLÆRA
MASKINLÆRA
ROKNSKAPARLÆRA
ARBEIÐSLEIÐSLA
VIRKISBÚSKAPUR
MARKNAÐARLÆRA
HAGFRØÐI/EDV
ENSKT

Konu mynd skal inn her

MØGULEIKAR AFTANÁ LOKNA ÚTBÚGVING:

1) Beinleiðis arbeiði á fiskavirkjum á einum stigi millum leiðsluna og arbeiðsfólkið, sum t.d. álitsfólk, formaður/kvinna, dygdarmetari, vrakari, starsstovuhjálparfólk ella annað starv.
2) Framhaldandi og/ella hægri útbúgving innan fiskivinnuna. Í summun føri verður óivað neyðugt við eykaskeiðum í ávísum lærugreinum.

3) Sum grundarlag fyri útbúgving á øðrum økjum, sum t.d. HF, studentaskúla, handilsskúla, tekniskum skúla og øðrum.

Møguleikarnir eru sjálvandi treytaðir av, á hvørjum stigi næmingurin hevur endað útbúgvingina: Aftan á 1. árið, 2. árið, við ella uttan yrkisroynd, og hvussu úrslitini av prógtøkunum eru.

ÚTBÚGVINGARSKIPAN:

Ein sjálvstøðug útbúgving verður sett á stovn — antin sum ein sjálvstøðugur skúli ella møguliga sum ein sjálvstøðug deild undir verandi skúla á sama útbúgvingarstigi — við einum leiðara ella møguliga einum deildarleiðara.

Til útbúgvingina hoyrir royndarhøli og starvsstova, har næmingarnir fáa starvsliga upplæring og gera starvsstovuroyndir. Samstarv við verandi virki fæst í lag, har næmingarnir fáa ta neyðugu venjingina og kunnleika til viðurskiftini á arbeiðsplássunum.

NÆMINGATAL: Í royndartíðini verða í mesta lagi 20 næmingar upptiknir um árið. Tá útbúgvingin er komin í eina fasta legu, kann støða takast til, um deildir skulu setast á stovn aðra staðni í landinum.


MØTISKYLDA: Næmingarnir hava møtiskyldu bæði til ta ástøðiligu og starvsligu undirvísingina og venjingina. Um møtiskyldan ikki verður yvirhildin, kunnu næmingarnir burtuvísast eftir nærri ásettum reglum.

Mynd av fiskinum við stavum.

TALVA 4 **13**


strikumynd nr.1: BYGNAÐUR:

Nærri frágreiðing fæst á næstu síðunum!!



21. TALVA 5

14 einfald uppseting av strikumynd nr. 1



»TEKSTIL-ÚTBÚGVING«

Á vári 1984 setti táverandi landsskúlastjóri, Ludvig Petersen, eina nevnd, sum skuldi gera eitt uppskot til eina útbúgving, umfatandi rávørur, viðgerð og tilvirking á »tekstiløkinum.« Henda nevndin, sum bert umfataði 3 fólk, skuldi fyri fyrst seta »rammurnar« fyri eina slíka útbúgving — v.ø.o. gera ein bygnað. Nevndin kannaði ymiskar útbúgvingar, t.d. í Danmark, har fleiri útbúgvingar eru á ymiskum stigum.

Úrslitið, sum nevndin kom til, sæst á síðu 30-31. Stutt kann sigast, at útbúgvingin umfatar tað, sum í Danmark kallast:
Tekstilassistent
Konfektionsassistent og
Tricotageassistent.

Ikki varð mett, at neyðugt verður við 3 ymiskum útbúgvingum, sum á nógvum økjum eru samanfallandi, men at gera eina útbúgving, sum hóskar til viðurskiftini og rávørurnar í Føroyum. Næmingarnir kunnu á henda hátt fáa eitt gott handverksligt og tekniskt grundarlag til antin at fara beinleiðis í eitt produktiónsvirki ella fara til hægri útbúgving, t.d. á listaskúla. Sakkøn fólk, sum nevndin hevði samband við, metti hetta vera eitt skilagott uppskot viðvíkjandi bygnaði og innihaldi.

Á síðu 32 sæst ein talva við teimum donsku útbúgvingunum á økinum.

Um hetta uppskotið verður góðtikið, er ætlanin at seta eina nevnd við serkønum fólkum til at gera uppskot um lesiætlanir o.a.

Stað:

LSF metir, at Sandoyggin kundi verið eitt hóskandi pláss fyri eina slíka útbúgving. Listaskúlin, sum koyrdi sum ein roynd í nøkur ár, var á Sandi, og kundi henda útbúgving verið sett í staðin.

Um ikki nógv mikið av lærarum kann fáast, kunnu ferðalærarar nýtast.

FYRIBILS UPPSKOT TIL EINA 2.-ÁRA-ÚTBÚGVING RÁVØRUR, VIÐGERÐ OG TILVIRKING Á TEKSTIL-ØKINUM

BYRJUNARTÍÐ: August 1988.

STAÐ: Á Sandi

NÆMINGATAL: Max. 12 næmingar.

TÍÐ: 2 ár.

PRÓGV/STØÐI: Útbúgvingin endar við einari prógvtøku í teimum ástøðiligu lærugreinunum og einari yrkisroynd í teimum starvsligu lærugreinunum. Støðið svarar til t.d. tekniskar assistentar.

UPPTØKUKRØV: Ætlanin er, at næmingarnir skulu taka eitt »støðisár« áðrenn, men áðrenn ein endaliga ætlan um samskiping av útbúgving fyri tey 16-19 ára gomlu liggur á borðinum, verður hetta ikki gjørt. Ætlanin er fyri fyrst at skipa fyri einum 1/2 støðisári, sum skal vera málrættað móti hesi útbúgving. Tekniski Skúli skipar fyri hesum 1/2 árinum. Ella á Sandi.

Upptøkukrøvini verða sostatt í fyrstini: 10. flokk + 1/2 støðisár, sum byrjar í januar 1989. Um næmingar hava HF ella líknandi, slepst tó undan hesum.

BYGNAÐUR: Næmingarnir skulu 3 × 2 mánaðar í praktikk. Við tað, at so fá virki eru her á landi á økinum, verður syrgt fyri, at næmingarnir sleppa til t.d. Íslands, Noreg, Danmarkar o.l. stød í praktikk. Restina av tíðini t.e. 3 lestrarhálvur = 1½ ár — eru næmingarnir á skúla.

Hvør lestrarhálva er roknað til 20 vikur á 35 tímar, tá teir eru á skúla, og 20 vikur á 40 tímar, tá teir eru í praktikk.

Hetta verður tilsamans 2900 tímar.
Av hesum eru 2100 tímar skúlaundirvísing og 800 tímar eru praktikk.

Teir 2100 skúlatímarnir verða býttir í 3 bólkar.

300 tímar til undirvísing í handils-lærugreinum og 300 tímar til undirvísing í tekniskum lærugreinum. 900 tímar eru so til yrkisundirvísing á skúlanum — bæði ástøðilig og starvslig undirvísing og saman við teimum 800 tímunum í praktikk, verða hetta 1700 tímar tilsamans.

LÆRUGREINIR:

Tær almennu lærugreinirnar:

ENSKT, ROKNING/STØDDFRØÐI, EVNAFRØÐI, KUNNING/FØROYSKT, UMHVØRISLÆRA, SAMFELAGSLÆRA.

Tær handilsligu lærugreinirnar:

»PRODUKTIONSPLANLÆGNING/STYRING«, KVALITETS- OG DRIFTSKONTROL«, DRIFTSØKONOMI, KALKULATION, DATALÆRA.

Tær teknisku lærugreinirnar:

MASKINLÆRA, APPARATUR, LABORATORIUTEKNIKK.

Tær yrkisligu lærugreinirnar.

Rávørur: Tekstiltægrar, tógv, klæð, skinn, litevni, kemikaliir, evnalæra o.a.

Viðgerð: Royting, vasking, napping, spinning, veving, binding, seyming, stoffprent, liting, eftirvirðgerð o.a.

Tilvirking: Tekning, kompositión, tilskering, modellkonstruktión, design, konfektión, trikotage, formgeving o.a.

Framhaldandi útbúgving: Seinri kan skúlin skipa fyri skeiðvirksemi á økinum sum framhaldandi útbúgving.


Aðra staðni: Framhaldandi útbúgving kann fáast í øðrum londum, sum t.d. Danmark og Týskland, har skúlar eru, sum geva framhaldandi útbúgving í fleiri ættir:

Produktiónslinju til teknikarastig og tekstilingeniør.
Modelkonstruktørlinjir
Designlinjur
Listalinjir.

29. mai 1984
Niels á Velbastað,
Hentzar Ellingsgaard,
Gunnvør Hoydal.

ODANNELSES
IAGRAM

BEKLÆDNINGS- og TEKSTILUDDANNELSER



Tekstiludbúgvingar
í Danmark

25.

TALVA 6

540

HEILSUÚTBÚGINGAR


Sjúkrasystraútbúgving er einanst heilsuútbúgving, sum vit hava í Føroyum, men tørvur verður óivað á útbúgvingum á ymiskum stigum og á ymiskum økjum innan fyri hesar útbúgingar.

Á síðu 39-41 eru ymiskar talvur yvir útbúgvingar í Danmark. Hvussu vit í Føroyum skulu skipa hesa útbúgvingar, er ikki greitt enn, men tó er nú so stórur tørvur á røktarum, at ein nevnd er sett at skipa fyri eina fyribils útbúgving av røktarum, sum skal byrja á heysti 1987. Peningur er avsettur á fíggjarlógini til hetta.

Henda útbúgving fer óivað at fylgja tí donsku skipanini, soleiðis at næmingarnir fyrst taka eitt ár, sum er á støði sum sjúkrahjálparar og síðani 8 mánaðar til røktara.


Henda útbúgving verður í Tórshavn á sjúkrasystraskúlanum. Røktaraútbúgvingin krevur eitt nøvt samstarv við eina psykiatriska deild, og ein slík finst bert í Tórshavn.

Seinri kundi hugsast at gjørt varð eitt uppskot til eina heildarætlan av útbúgving á heilsuøkinum, sum hóskaði til tann komandi tørvin í Føroyum.



TALVA 7 :
HEILSUÚTBÚGVINGAR
Í DANMARK
TALVA 7
PLEJEUDDANNELSER og HOSPITALSLABORANT
Undervis.S.
Ledende S.
Videreg.
lederud.
Sundhedsplejerske
RADIOGRAF
Plejer
Plejehjemsassistent
Sygeplejerske ①
Praksis
HOSPITALSLABORANT ③
praksis
Ledende/Ins
hospitalsla
SYGEHJÆLPER ②
G
g
ANM:
1. Fordelingen af teori/pr
2. Sygehjælpere får en vi
3. Der er linierne kli
PLEJEUDDANNELSES
DIAGRAM

TALVA 8 : HEILSUÚTBÚGVINGAR Í DANMARK (ARBEIDSØKI)

1. meginregla. ÚTBÚGVINGAR VIÐ EINUM BREIÐUM VIRKISØKI, MEN VIÐ AVMARKAÐUM OG HANDAHÓVSLIGUM ARBEIDSUPPGÁVUM.




2. meginregla: ÚTBÚGVINGAR VIÐ EINUM AVMARKAÐUM, MEN SERSTØKUM VIRKISØKI, SUM FEVNIR UM FYRI EIN PART SJÁLVSTØÐUÐAR ARBEIDSUPPGÁVUR.




ideal foto

3. meginregla: ÚTBÚGVINGAR VIÐ EINUM AVMARKAÐUM SETANARØKI, SUM FYRI EIN PART FEVNIR UM SJÁLVSTØÐUGAR ARBEIDS-UPPGÁVUR.



TALVA 9

YVIRLIT YVIR TEY VANLIGU SAMSTARVSØKINI MILLUM FAKBÓLKARNAR Í Í SOSIAL- OG HEILSUSKIPANINI Í DANMARK.



Sjómansútbúgvingar

Tilmæli til útbúgvingar og býti av skúlum hesum viðvíkjandi **Februar 1987**

Upprit í sambandi við verandi og komandi sjómansútbúgvingar og teir skúlar, sum eiga at fremja hesar útbúgvingar.

Sjómansútbúgvingar í dag kunnu býtast í 2 partar. Annar parturin fer fram á sjómansskúla og umfatar útbúgving til skipsførara, skiparar, heimaskipara, skipskokk, radiotelefoni við telex og dugnaskaparroyndir í sigling. Allar hesar útbúgvingar verða framdar sambært løgtingslóg nr. 65 frá 5. juni 1984 við seinni broytingum. Í somu lóg er álagt landsstýrinum at reka venjingarskip til nevndu útbúgvingar, og verður hetta gjørt í samráð við Vaktar- og bjargingartænastuna.

Hin parturin fevnir um útbúgving av motorpassarum, maskinistum og maskinmeistarum umframt dugnaskaparroynd í motorpassing, og verður hetta framt, undantikið motorpassarar, sambært ríkislóg nr. 197 frá 24. mai 1972. Tann fyrisitingarligi parturin verður umsitin av Landsskúlafyrisitingini í samstarvssavtalu við Direktoratet for Søfartsuddannelsen.

Verandi skúlar, sum í dag fremja hesar útbúgvingar eru:

Føroya Sjómansskúli, Tórshavn
Føroya Maskinskúli, Tórshavn
Klaksvíkar Sjómansskúli, Klaksvík og
Tekniski skúlin í Klaksvík.

Á nevndu skúlum fara fram fyrireikingar til:

Føroya Sjómansskúli:	Skipsførarar 3 ár
	Skiparar 1 ár
	Heimaskiparar ½ ár
	Harumframt fara fram dugnaskaparroyndir í sigling umfram eftirútbúgving av sjómonnum sambært STCW-samtyktini.
Føroya Maskinskúli:	Maskinmeistari 1½
	Maskinistar ½
	Motorpassarar ½ ár (henda útbúgving byrjað 2/2-87.
Klaksvíkar Sjómansskúli:	Skiparar 1 ár

Heimaskiparar ½ ár

Harumframt verður havt grundskeið fyri skipskokkar sum varir ½ ár, radiotelefoni við telex og dugnaskaparroyndir í sigling.

Tekniski skúlin í Klaksvík — Maskinistar ½ ár

Sambært altjóða krøv og eftir tí tørvi, sum vinnulívið í dag hevur, verður neyðugt at gera ymiskar broytingar í verandi útbúgvingarmynstri umframt at skapa nýggjar útbúgvingar.

Hetta arbeiðið er partvíst gjørt, men enn er nógv eftir. Miðjað hevur verið ímóti at hava ein ávísan bygnað í útbúgvingum og at býta nýggjar útbúgvingarmøguleikar til allar verandi skúlar umframt at havt hevur verið í huga, at nýggjar útbúgvingar eiga at leggjast um alt landið.

Tær broytingar, sum eru framdar, hava ført við sær vaksandi virksemi á skúlunum, meðan aðrar nýskipanir, sum ikki enn eru settar í verk, kunnu føra við sær minkandi virksemi á ávísum skúlum, um ikki rætt verður atborið ella nakað annað kemur í staðin.

Virksemið á Føroya Sjómansskúla hevur verið vaksandi við tí stóra næmingatalinum, sum har er, umframt at eftirútbúgving av sjómonnum er vorðin ein týðandi táttur eftir at krøvini til vinnubrøvini skulu lúkast sambært STCW-samtyktina.

Á Føroya Maskinskúla hevur virksemið verið vaksandi, orsakað av tí økta næmingatalinum og nú við mortorpassaraútbúgvingini, hóast niðurskurð av ríkisjáttanini, og hevur Landsstýrið tí tikið størsta partin av tí fíggjarligu byrjuni (samanber fíggjarlógina 1987).

Virksemið á Klaksvíkar Sjómansskúla er eisini økt við tí stóru næmingatilgongdini og samanleggingini av skiparaskúla og kokkaskúla.

Á Tekniska Skúlanum í Klaksvík er virksemið viðvíkjandi maskinistum tað sama, men hetta broytist í komandi ári. Komast skal nærri inn á hetta seinni.

Tær broytingar, sum nú eiga at vera framdar eru hesar:

1. Stovnsetan av sjóvinnuskúla í Føroyum.
2. Víðkaða maskinmeistararoyndin og bygging av maskinskúla í Føroyum.

3. Víðkan av skiparaútbúgvingini.
4. Víðkan av skipskokkaútbúgvingini.
5. Stovnsetan av verkstaðarskúla í Føroyum

Fyri at fremja omanfyrinevndu útbúgvingar er neyðugt at byggja 2 skúlar aftrat, umframt at neyðugar umvælingar og broytingar verða gjørdar á núverandi skúlum.

Í teimum føri har møguleiki ikki er fyri bygging, eigur at vera funnið fram til hóskandi høli, sum kunnu hýsa tí virksemi, ið er ætlað hesum útbúgvingum.

Sjóvinnu-skúlin:

Í sambandi við tað álit, sum er samtykt av Landsskúlaráðnum, 3. februar 1987, kann ein sjóvinnuskúli liggja so at siga allastaðni her á landi. Tann besta loysnin er at byggja ein skúla, sum er umleið 2.700m² til støddar og í einum umhvørvi, sum hóskar einum kostskúla av hesum slag.

Landsskúlafyrisitingin hevur gjørt ymiskar kanningar av verandi bygningum í landinum.

Kanningarnar eru gjørdar so hvørt kommunur og einstaklingar hava boðið seg fram við einari ella aðrari loysn.

Teir møguleikar, sum hava verið umhugsaðir eru í Vágum, á Tvøroyri, Við Áir og í Klaksvík. Eisini hava onnur uppskot verið frammi, men landsskúlafyrisitingin hevur valt at fylgja tilráðingini frá arbeiðsbólkinum, sum legði álitið fram.

Hetta merkir, at av nevndu møguleikum verður mett, at best hóskandi høli til hetta endamál er bygningurin hjá N. J. Mortensen á Tvøroyri.

Í hesum bygningi gerst møguleiki at reka ein skúla samsvarandi ætlaðu útbúgvingini. Bygningurin má sigast at vera væl egnaður, tá havt verður í huga tann broyting sum fer fram á havnaøkinum, har størsta virksemi í nánd og í hesum bygningi verður flutt til nýggja havnaøki á Drelnesi.

Samlaða gólvvíddin í hesum høli er omanfyri 3000m².

Møguleikin við at leggja sjóvinnuskúlan í Vágum kann bert fremjast við nýbygging.

Bygdaráðini í Vágum hava boðið ymiskar møguleikar, men hetta ber í sær, at skúlin ikki kann rekast sum ein eind, men bert við nógvum smærri fyribilshølum í ymiskum bygdum í Vágum og við tí treyt, at Hotel Vágar kann hýsa næmingunum.

Ein loysn, sum ikki verður mett í tráð við ætlaðu útbúgvingina.

Í Klaksvík hevur verið talan um at byggja eina hædd omaná verandi sjómansskúla. Hesi loysn verður rátt frá, við tað, at ein møgulig hædd aftrat bert gevur møguleika fyri innivist til í mesta lagi 36 næmingar, meðan eingin loysn er fyri øðrum hølum til skúlastovur, arbeiðsrúm og tílíkt uttanso, at verandi virksemi á skúlanum verður darvað.

Virksemið í Klaksvíkar Sjómansskúla ger, at brúk er fyri øllum skúlanum sum er, og harumframt verður tað ikki mett skilagott við skiparaskúla, kokkaskúla og sjóvinnuskúla á sama stað.

Eftir er so møguleikin við Alv-skúlanum við Áir, men her hevur tað ikki eydnast at fáa møguleikan fyri at kann henda skúla nærri. Annars sigst bygningurin at verða í ringum standi, og kann í mesta lagi hýsa 25 næmingum.

Um so var, at hesin skúli kundi verið nýttur, so er neyðugt at leggja saman við eldsløkkingarskúlanum og gera nýtslu av felags hølum. Tó kemur hetta ikki at nøkta tað, sum álitið byggir á.

Harumframt hevði tað gjørst neyðugt at funnið aðrar loysnir við Alv-skúlanum og Sløkkiskúlanum. Tessvegna verður hesin møguleiki ikki mettur sum nýtiligur.

Niðurstøðan verður tí tann, at sjóvinnuskúlin undir verandi umstøðum eigur at vera í Suðuroy.

Føroya Maskinskúli:

Umstøðurnar hjá Føroya maskinskúla, soleiðis sum hesin heldur til í leigaðum hølum í Tórshavn, mugu sigast at vera av teim ringastu.

Tess vegna er neyðugt at nýggjur skúli verður bygdur sum skjótast.

Samtykt er, at byggja skúla úti við Marknagilsvegin. Henda samtykt stavar frá 1982, har landsstýrið í prinsippinum tekur undir við byggingini á matr. nr. 1173.b. í Tórshavn eftir ynski frá sjálvsognarstovninum Føroya Maskinskúla.

Av ymiskum orsøkum, sum ikki skal greiðast frá her (sí frágreiðing um Føroya Masinskúla II frá 20/2-1986) er byggimálið ongantíð framt.

Nú talan er um at fara yvir til blokkstuðulsskipan, samstundis sum útbúgvingin til maskinist- og maskinmeistara verður broytt, verður virksemið skúlans alsamt at vaksa.

Motorpassaraútbúgvingin er byrjað og vónandi kann farast undir víðkaðu maskinmeistararoyndina í august í ár. Hetta, treytað av, at leigumál fæst við handilsfyritøku í Tórshavn, er aftur ein fyribilsloysn.

Mælt verður tí til, at maskinskúlin verður bygdur í Tórshavn sum eitt framhald av verandi tilbygningi av Føroya Sjómansskúla.

Við at lata sjómansskúla og maskinskúlan húsast undir somu lon, verða rakstrarútreiðslurnar væl minni.

Kostnaður til slíka bygging verður væl bíligari enn at byggja alt fyri seg. Við at leggja hesar báðar skúlar saman sleppst undan at byggja nýggja matstovu. Eisini er økið vælegnað til víðari útbygging, soleiðis sum upprunaliga var ætlað í sínari tíð.

Soleiðis sum gongdin er í øðrum norðanlondum, eru fleiri dømir um samanleggjan av júst hesum báðum skúlum, so hetta er ein skilagóð loysn.

Felags lærarar er eisini ein fyrimunur, og eftirútbúgving av sjómonnum við nýtslu av tekniskari útgerð sum simulator og EDV-útgerð kann leggjast á einum stað.

Mælt verður til, at landsstýrið letur Landsskúlafyrisitingina fara undir detailprojekt til slíka bygging.

Skipara-útbúgving:

Sambært ta broyting sum verður framd í lógini um manning av skipum og sjóvinnulógini, umframt ta sannroynd, at tíðin til skipara er ov stutt, verða fyrireikingar gjørdar at víðka tíðina til 18 mánaðir.

Fyri at fremja slíka útbúgving er ikki neyðugt við fleiri skúlum, men kemur hetta at ávirka virksemið á Klaksvíkar Sjómansskúla soleiðis, at skúlin fær fleiri næmingar.

Hesin skúlin, sum í fleiri ár hevur havt ov fáar næmingar, er nú nógv vaksin, og kemur í framtíðini saman við kokkaútbúgvingini at vera nýttur í størst møguligan mun.

Skipskokka-útbúgvingin:

Útbúgvingin fyri skipskokkar er um at vera løgd í fasta legu og fyri at náa hetta mál, eru umvælingar gjørdar á Klaksvíkar Sjómansskúla á tann hátt, at nú húsast skiparaskúli og kokkaskúli undir somu lon.

Henda loysn hevur roynst væl, og verður nú umhugsað at víðka skipskokkaútbúgvingina, soleiðis at henda lýkur tey krøv, sum verða sett í øðrum norðanlondum og sjóvinnulógini.

Mælt verður til, at henda skipanin á Klaksvíkar Sjómansskúla kann halda áfram.

Verkstaðar-skúlin:

Sambært teimum broytingum, sum gerast skulu í maskinist- og maskinmeistaraútbúgvingini verður ein av avleiðingunum, at maskinistútbúgvingin, sum í dag er á Tekniska skúla í Klaksvík verður hildin fyri seinastu ferð nú í 1987. Hetta merkir, at prógvtøka til maskinist í Klaksvík verður fyri seinastu ferð í juni í ár.

Næmingatlið í Klaksvík til maskinist er í løtuni 25 og hevur í fleiri ár ligið upp í móti 20 næmingum.

Motorpassaraútbúgvingin kann fyri ein part betra støðuna, men her skulu íløgur gerast til motorrúm.

Verkstaðarskúli hevur ikki verið royndur í Føroyum fyrr, men royndir aðrastaðni vísa, at fleiri og fleiri av teimum, sum ætla sær til maskinmeistara fara henda vegin.

Mælt verður tí til, at ein verkstaðarskúli verður settur á stovn á Tekniska Skúlanum í Klaksvík. Møguleikarnir mugu metast at verða góðir, nú skúlin er við at byggja út.

Niðurstøðan:

Við teimum broytingum og nýskipanum sum í dag verða fyrireikaðar í Føroyum og saman við øðrum møguleikum innan vinnuskúlar umframt tey tilmælir og álit, sum eru fingin til vega, verður hervið mælt til, at innan sjómansútbúgvingar verða skúlar og útbúgvingarmøguleikarnir býttir upp soleiðis:

1. Tilbyggingin av Føroya Sjómansskúla verður gjørd liðug sum skjótast.
2. Sjóvinnuskúlin verður settur á stovn í Suðuroy.
3. Maskinskúli verður lagdur um eitt framhaldandi byggiverk av Føroya Maskinskúla.
4. Á Klaksvíkar Sjómansskúla verður framhaldandi skiparaskúli og skipskokkaskúli.
5. Verkstaðarskúli verður settur á stovn á Tekniska skúlanum í Klaksvík.
6. Motorpassaraútbúgvingin verður løgd aðru hvørja ferð á Føroya Maskinskúla og Tekniska skúlanum í Klaksvík.
7. Neyðugar fyrireikingar verða gjørdar til løgtingslóg um maskinmeistaraútbúgving, og at almennur maskinskúli verður settur á stovn í Tórshavn.

·/· Hjáløgdu strikumyndir vísa hvussu sjómansútbúgvingar fara at síggja út, eftir at neyðugar broytingar eru framdar í lógum, kunngerðum og reglugerðum.


Landsskúlafyrisitingin

16. februar 1987

K.P.M.


Verandi skúlar


Sjómansútbúgvingar




Sjómansútbúgvinqar

Tilmæli um stað





Skipsføraraflokkur F
Skipsføraraflokkur E
Skipsføraraflokkur D
Skipsføraraflokkur C
Skipsføranaflokkur B
Skipsføraraflokkur A
3 ár
Upptøkuroynd II
Upptøkuroynd I
12 mánaða farmaskip
Skiparí 6 mðr
Heimaskiparí 6 mðr
6 mðr
18 mánaðir
dekks-tænasta
Dugnaskaparroynd í sigling
Yrkis-skeið
Yrkis-skeið
dekks-tænasta
stýri-manna-næmingar
dekks-tænasta
maskin-tænasta
Grundskeið 25 vikur
Fólkaskúlin
Uppskot (750 KW)
Motorpassari 5 mðr.
Dugnaskaparroynd í motorpassing
Maskinmeistaraflokkur 6
Maskinmeistaraflokkur 5
Maskinmeistaraflokkur 4
Maskinmeistaraflokkur 3
Maskinmeistaraflokkur 2
Maskinmeistaraflokkur 1
Vfðkaða maskin-meistararoynd
3 ár
1 ára roynd (1000 KW)
Lærlingaútbúgv.
Peiðarskipanis fyrl
4
3
2
1

Bygnaður á sjóvinnuskúla




MATRÓSUR/DEKKARI


SKIPSATSTØDARI ELLA MOTORMAÐUR




SKIPSKOKKUR



MASKINYVIRMADUR





Skipsfóraraflokkur F
Skipsfóraraflokkur E
Skipsfóraraflokkur D
Skipsfóraraflokkur C
Skipsfóraraflokkur B
Skipsfóraraflokkur A
Upptökuroynd II
Upptökuroynd I
skipari
6 mór
heima-
skipari
12 mór
óroyndur
skipsaistoðari
Skipstænasta
18 mór
óroyndur
matrósur eða
dekkari
DEKKSTÆNASTA
18 mór
fyriþilsskipan
dekkstænasta
36 mór
Grundskeið
25 vikur
FÓLKASKÓLIN
fyribilsskipan
dekkstænasta
31 mór
stýrimanna-
nemingar
21 mór
óroyndur
skipsaistoðari
skipstænasta
18 mór
Yrkis-
skeið
10 vikur
Grundskeið
25 vikur
óroyndur
matrósur eða
dekkari
dekkstænasta
18 mór
FÓLKASKÓLIN

BÝTI AV STØRVUM Í SAMFELAGNUM FRAMYVIR


Hesar talvur vísa prognosur yvir býti av størvum (útbúgvingum í samfelagnum framyvir. Nógvar ymiskar prognosur eru gjørdar, men allar vísa somu mynd. Vit eiga at hugsa um hetta, tá talan er um útbúgvingarpolitikk.

Síðani eru brot úr eini grein um yrkisleiðbeining fyri ung úr "Samvirke"/mars 1987.

Lønmodtagere fordelt på »kategori«



Udviklingen i beskæftigelsen inden for fabrikationserhvervene 1980-1995. FAST-rapporten 1981.



Det var en stor moderne virksomhed med avanceret produktion og maskinen. Et sted fik vi forklaret af en ansat, hvordan en drejebænk stort set af sig selv kunne stå og producere indviklede metalting. Hendes opgave var at overvåge maskinen, sørge for nogle dele af råstoftilførslen og deltage i møder med de programmerer, der udformede maskinens edb-program. Et andet sted arbejdedes med de varer, der skulle sættes i produktion i fremtiden. Her anvendtes det nyeste inden for edb-styrede »tegnemaskiner«. Når en maskine havde fået de centrale informationer, kunne den selv udforme arbejdstegninger af det nye produkt. Et tredje sted fik eleverne mulighed til at se tekst-behandling i praksis: breve, artikler, informationsmaterialer blev skrevet på maskiner, hvor ekranen med det samme kom op på en skærm, kunne rettes og laves om, uden at der var papir med i spillet, før det hele var i orden.

Her er det af stor betydning at opfatte den teknologiske udvikling bredt. Det er jo ikke kun edb, det drejer sig om. Genspejsning, energiområdet, massekommunikation kan være eksempler på nogle af de andre felter, hvor det går stærkt for tiden.

Hvilke konkrete færdigheder og evner står i centrum, når arbejdslivets folk tegner profilen af fremtidens medarbejder?

Der peges på:

- SELVSTÆNDIGHED
- SITUATIONSFORNEMMELSE
- KUNNE TILEGNE SIG NY VIDEN
- OMSTILLINGSEVNE, FLEKSIBILITET
- SAMARBEJDSEVNE
- INITIATIVRIG, KREATIV
- KENDSKAB TIL FREMMEDSPROG
- RIMELIG TEKNISK FORSTÅELSE
- SÅ BRED GRUNDUDDANNELSE SOM MULIGT

OOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOOO

Skjal 22: Skjal til løgtingsmál nr. 100-6: Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Hergeir Nielsen, løgtingsmanni viðvíkjandi samferðsluviðurskiftunum

Yvirlit yvir býtið av landskassaútreiðslum í 1988.

	1988	
§ 10. Løgting	14.477	0,5%
§ 11. Landsumsiting	148.621	5,4%
§ 12. Heilsumál	374.265	13,6%
§ 13. Samferðslumál	279.000	10,1%
§ 14. Skúlamál	370.410	13,4%
§ 15. Vísindi, bóm., list	98.300	3,6%
§ 16. Fiskivinna, sigling o.l.	396.339	14,4%
§ 17. Landbúnaður og matr.	47.564	1,7%
§ 18. Handil, íðnaður o.a.	43.526	1,6%
§ 19. Almenn forsorg	757.629	27,5%
§ 20. Pensjónistútreiðslur	6.495	0,2%
§ 21. Effektivar veðhaldsbinginar	50.000	1,8%
§ 22. Aðrar og óvissar útreiðslur	5.125	0,2%
§ 23. At leggja í ymsar grunnar	86.295	3,1%
§ 24. Avdráttir av lánum	21.544	0,8%
§ 25. Avskrivingar	58.603	2,1%
§ 26. Ymsar ognarútreiðslur	300	0,0%
	2.759.316	100,0%

Á FØROYA LØGTINGI, TANN 10. MARS 1988

Lasse Klein

LANDSVERKFRØDINGURIN

Tinghúsvegur 7, Postbox 72
3800 Tórshavn, Føroyar
Tlf. 11333, Telex 81353 laverk

J.nr. 22 HJ/ev

Tórshavn, 21. juli 1987

Áttaðar fløgur í vegir o.a. 1987- 1990 og nýtslan í 1986.

Tøl í mió. kr., (juli 1987 prísir).

Evni	1986	1987	1988	1989	1990
Hattarvík - Kirkju	0.7	0.5	-	-	-
Múlavegurin	2.9	2.5	2.5	2.5	2.5
Klaksvík - Norðoyrar	2.8	1.0	2.0	2.0	2.0
Syðradali - Trøllanes	4.7	3.5	3.5	3.0	2.0
Runavík - Rituvíkar	1.9	2.0	2.0	2.0	2.0
Strondum - Skála	2.9	4.0	4.0	4.0	4.0
Funningsfirði - Funnings	2.8	2.5	2.5	2.5	2.5
Skipanesi - Norðskálatunnilin	1.0	2.0	4.0	4.0	4.0
at flyta	19.7	18.0	20.5	20.0	19.0

Evni	1986	1987	1988	1989	1990
flutt	19.7	18.0	20.5	20.0	19.0
Eiðisvegurin	2.7	2.0	2.0	2.0	2.0
Velbastað - Syðradals	1.9	1.5	1.5	1.5	-
Tórshavn - Kirkjubø	2.4	2.0	2.0	2.0	2.0
Miðvági - Vatnsoyrar	4.7	5.0	5.0	5.0	2.0
Vegagerð í Sandoynni	1.1	1.5	1.5	1.5	2.5
Vági - Lopra	1.6	1.0	1.0	1.0	1.0
Trongisvági - Øravíkar	3.8	3.0	1.5	-	-
Tunnilsamband :					
Leirvík - Gøta					
Lopra - Sumba					
Klaksvík-Haraldssund-Kunoy	37.8	52.0	55.0	55.0	55.0
Tórshavn - Kollafjørð					
Bø - Gásadals					
Nýgerð av vegum og tunnlum	75.0	86.0	90.0	88.0	83.5

Evni	1986	1987	1988	1989	1990
flutt	75.7	86.0	90.5	88.0	83.5
Ferjulegur	4.7	5.5	5.5	5.5	5.5
Studningsarbeiðir	7.9	7.0	8.0	8.0	8.0
Grótbrot og asfaltverk	10.4	10.0	10.0	10.0	10.0
Smiðjur og amboðshølir	6.5	4.0	2.5	2.5	2.5
Størri ábøtur og trygdartiltøk	9.1	7.0	12.0	12.0	12.0
Asfaltgoymsla	7.5	1.0	1.0	1.0	1.0
Flogvøllurin - tyrlupallar o.a.	2.9	7.0	10.0	10.0	5.0
	124.7	127.5	139.0	137.0	127.5

Landsverkfrøðingurin 21. juli 1987

Ætlaðar íleggur í havnir 1987 - 1990 og nýtslan í 1986.

Tøl í mió. kr.


Kommuna	1986	1987	1988	1989	1990
Klaksvíkar	5.9	6.0	5.0	5.0	5.0
Fuglafjarðar	1.2	1.0	4.0	4.0	4.0
Leirvíkar	3.2	4.2	5.0	3.0	3.0
Gøtu	-	2.0	4.0	4.0	4.0
Runavíkar	0.3	0.3	4.0	4.0	4.0
Nes	2.4	2.0	3.0	3.0	3.0
Skála	0.1	-	3.0	3.0	3.0
Sjóar	3.7	6.0	6.0	4.0	3.0
Eiðis	-	1.0	4.0	3.0	3.0
Haldórsvíkar	1.0	1.0	2.0	1.0	2.0
Kollafjarðar	-	1.0	4.0	4.0	4.0
Tórshavnar	15.9	18.0	15.0	15.0	15.0
Vestmanna	3.2	3.0	6.0	6.0	4.0
Miðvágs - Sandavágs	1.0	-	3.0	3.0	3.0
at flyta	37.9	45.5	66.0	62.0	60.0

Kommuna	1986	1987	1988	1989	1990
flutt	37.9	45.5	66.0	62.0	60.0
Sørvágs	0.2	1.0	2.0	4.0	4.0
Skopunar	-	5.0	8.0	8.0	5.0
Sands	4.1	8.0	6.0	6.0	6.0
Hvalbiar	1.9	0.1	-	-	2.0
Froðbiar	5.9	5.0	2.0	2.0	3.0
Porkeris	-	3.0	2.0	-	-
Vágs	0.2	1.0	4.0	4.0	4.0
Havnarøkir o.a.	4.1	4.4	4.0	4.0	4.0
Nýggjar havnir undir komandi havnaætlan			10.0	10.0	10.0
	54.3	73.0	104.0	100.0	98.0
Ætlaðar fløgur í smærri havnir og lendingar	24.2	36.0	30.0	25.0	25.0
